*Løgtingsins umboðsmaður*

*Ársfrágreiðingin 2006*

# *LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR*

## *Ársfrágreiðingin 2006*

Tórshavn 2007

Løgtingsins umboðsmaður
Ársfrágreiðingin 2006
© 2007, Løgtingsins umboðsmaður
Umbróting, prent og innbinding: Føroyaprent

ISBN 99918-969-5-3

# *Innihaldsyvirlit*

I. Um embætið .................................... 9
II. Gongdin í 2006 .................................... 11
III. Hagtøl .................................... 12

IV. Álit og aðrar niðurstøður hjá umboðsmanninum í
málum avgreidd í 2006 .................................... 21

***11. Innlit*** .................................... 21
11.1 Noktan av innliti frá Vinnumálaráðnum
í hoyringsskriv um ætlaða burturvísing av stjóra .. 21
11.2 Noktan av almennum innliti og fráboðan til
embætismann, sum innlitsumbønin snúði seg um 29
11.3 Innlit í skriv frá aðalstjóranum til landsstýris-
mannin um viðurskifti í Almanna- og heilsumálum 41

***20. Almannamál*** .................................... 49
20.1 Drúgva málsviðgerðartíðin á Almannastovuni
av umsókn um hækkan av fyritíðarpensjón ...... 49

***22. Skattur og avgjøld v.m.*** .................................... 56
22.1 Viðgerðin av umsókn um eftirgeving av skatti ... 56

***23. Vinnulívs- og Fiskivinnumál v.m.*** .............. 70
23.1 Noktan av stuðli til flutning av fiski ............ 70

***25. Persóns-, familju- og arvamál*** ................. 88
25.1 Ónøgd at onnur brúka sama eftirnavn .......... 88
25.2 Viðgerðartíð av umsókn um arbeiðs- og
uppihaldsloyvi .................................... 95

***28. Starvsfólka- og arbeiðsmarknaðarmál v.m.*** ...... 122
28.1 Uppsøgn av starvsfólki í Tilhaldinum hjá Tórshavnar kommunu ...................... 122
28.2 Vantandi starvssetan á Arbeiðsloysisskipanini .... 145
28.3 Broytingar í tænastuviðurskiftunum hjá tollara... 192
28.4 Ávaringar til 12 lærarar í Hoydølum........... 219
28.5 Uppsøgn av trimum fólkum á Matrikulstovuni .. 245
28.6 Noktan av umsókn um loyvi til at arbeiða niðursetta tíð vegna sjúku .................... 285
28.7 Handfaringin hjá Almanna- og heilsumálaráðnum og Landssjúkrahúsinum av starvsfólkamáli hjá tænastumanni .......................... 352

V. Skjøl
1. Umboðsmanslógin.......................... 419
2. Vegleiðingin um Løgtingsins umboðsmann...... 423

Lógaryvirlit........................................ 427
Leitorð............................................. 439

# *Til Løgtingið*

Vísandi til § 11, stk. 1 í løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann lati eg av hondum hesa frágreiðing um virksemi mítt í 2006. Ársfrágreiðingin skal sambært nevndu grein verða almannakunngjørd áðrenn 1. juli 2007

Frágreiðingin er býtt upp soleiðis:

I. Um embætið
II. Gongdin í 2006
III. Hagtøl
IV. Álit og aðrar niðurstøður hjá umboðsmanninum í málum avgreidd í 2006
V. Skjøl
   1. Umboðsmanslógin
   2. Vegleiðingin um Løgtingsins umboðsmann

Tórshavn, mai 2007

*Sólja í Ólavsstovu*

# *I. Um embætið*

Sambært løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann velur Løgtingið fyri eitt 5-ára skeið ein uttantingsmann at hava innlit við fyrisiting heimastýrisins (§ 1). Við løgtingslóg kunnu verða gjørdar almennar reglur fyri virksemi umboðsmansins, sum annars í sínum starvi er óheftur av Løgtinginum (§ 3).

Virksemi umboðsmansins fevnir um alla fyrisiting heimastýrisins, t.e. bæði landsins og ta kommunalu (§ 4, stk. 1). Eisini feløg, stovnar, felagsskapir v.m., ið verða roknað við til almennu fyrisitingina sambært fyrisitingarlógini, eru fevndir av virksemi umboðsmansins (§ 4, stk. 2). Harumframt eru interkommunalir felagsskapir undirlagdir virksemi umboðsmansins (§ 4, stk. 4). Harafturímóti fevnir virksemi hansara ikki um ríkismyndugleikar, Løgtingið og stovnar undir Løgtinginum.(§ 4, stk. 5).

Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, at tær umsitingareindir, sum eru fevndar av virksemi hansara, ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti borgaranum (§ 5).

Ein og hvør kann senda umboðsmanninum klagu um tær í § 4 nevndu umsitingareindir, sum eru fevndar av virksemi hansara (§ 6, stk. 1). Klagarin skal navngeva seg í klaguni, og skal hon vera umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi eitt ár eftir, at tey viðurskifti, ið klagað verður um, áttu sær stað (§ 6, stk. 2). Er talan um avgerðir, sum kunnu leggjast fyri hægri umsitingarmyndugleika, skal hesin møguleiki vera royndur fyrst, áðrenn klagað verður til umboðsmannin (§ 6, stk. 3). Eru hesar treytir loknar, tekur umboðsmaðurin støðu til, um grundarlag er fyri víðari kanningum í tí máli, ið klagað verður um (§ 6, stk. 4).

Umboðsmaðurin kann eisini sjálvur av sínum eintingum taka eitt mál til viðgerðar og fremja neyðugar kanningar í hesum sambandi (§ 6, stk. 5).

Tær í § 4 nevndu umsitingar hava skyldu at geva umboðsmanninum tær upplýsingar og at leggja fram øll tey skjøl, sum hesin embætisins

vegna krevur at fáa fyrilagt. Umboðsmaðurin hevur rætt til at vitja støð, ið kannað verða, og hann hevur fría atgongd til at gera kanningar í øllum neyðugum hølum. Hann kann eisini stevna fólki í rættin at vitna um viðurskifti, ið eru avgerandi í kanningararbeiðinum. (§ 8).

Tá umboðsmaðurin er liðugur við sínar kanningar, ger hann sína niðurstøðu, og metir hann at álvarsligt mistak ella vatnsketni er framt, skal hann boða formansskapi Løgtingsins, løgmanni og viðkomandi landsstýrismanni og/ella kommunustýri frá hesum. Hann hevur rætt til alment at finnast at, koma við tilmælum og á annan hátt gera vart við meting sína av einum máli, hann hevur kannað. Hann kann eisini mæla viðkomandi myndugleikum til, at fríur rættargangur verður givin (§ 10).

Rakar umboðsmaðurin við lýti í galdandi lógum, fyriskipanum ella umsitingarligum avgerðum skal hann boða Løgtingi og viðkomandi landsstýrismanni frá hesum, og er talan um kommunal ella interkommunal viðurskifti, skal hann eisini boða viðkomandi kommunustýri frá. (§ 12).

Lógin og ein vegleiðing um, hvussu ein kann klaga til Løgtingsins umboðsmann, eru viðheft ársfrágreiðingini sum skjøl.

Fyrsti Umboðsmaðurin í embætinum Joen H. Andreassen fór frá vegna aldur við árslok 2005. Løgtingið valdi tann 23. november 2005 meg sum Løgtingsins Umboðsmann fyri tíðarskeiði 1. janaur 2006 til 31. desember 2010. Eg tók við embætinum tann 1. janaur 2006.

Umframt meg sjálvan er embætið mannað við løgfrøðiligu medarbeiðarum mínum Johnhardi Klettheyggj, ráðgeva, Biritu Ludvíksdóttir, ráðgeva, og Lailu Egholm, skrivstovufulltrúa.

Í sambandi við at Birita Ludvíksdóttir var í farloyvi í 2006, varð Jóhanna Arge, løgfrøðingur, sett í starv sum ráðgevi frá 1. apríl til 31. desember. Laila Egholm, skrivstovufulltrúi, var eisini í farloyvi frá 1. mai til 31. oktober 2006, og í hesum tíðarskeiði røkti Sælvør Bogisdóttir Ellingsgaard starvið.

Adressan er Traðagøta 43, Postsmoga 2008, FO-165 Argir, og teldupostadressan er lum@lum.fo.

Heimasíða umboðsmansins eitur www.lum.fo.

# *II.Gongdin í 2006*

Í 2006 fekk umboðsmaðurin 105 klagur, og er hetta munandi fleiri enn undanfarna ár. Av teimum vóru 79 endaliga avgreiddar við árslok umframt 14 klagur, sum stóðu eftir frá 2005.

Virksemið í 2006 hevur eins og í 2005 verið eyðkent av tí lutfalsliga stóra talinum av starvsfólkamálum. Heili 14 av teimum 33 viðgjørdu málunum (42,4%) hava snúð seg um starvsfólkaviðurskifti (starvssetanir, uppsagnir, ávaringar og lønarviðurskifti v.m.)

Av teimum 93 klagunum, sum vórðu avgreiddar í 2006, vórðu 60 avvístar. Hetta svarar til 64,5% og er nakað hægri enn undanfarna ár.

Hóast talið av innkomnum klagum er væl hægri enn undanfarna ár, er samlaða viðgerðartíðin av viðgjørdum málum ikki økt nakað serligt. Í avvístu málunum er viðgerðartíðin hinvegin lækkað eitt sindur.

Umboðsmenninir í Noregi, Danmark, Íslandi, Grønlandi og Føroyum koma regluliga saman til fundar eina ella tvær ferðir um árið, har evni av felags áhuga koma til viðgerðar. Í 2006 var hesin fundur hildin í døgunum 26.-29. apríl í Nuuk í sambandi við, at at Grønland hátíðarhelt 10 ára dagin fyri stovnsetan av tí grønlandska umboðsmannastovninum. Eisini umboðsmenninir í øllum Norðanlondunum halda regluligar fundir annað ella triðja hvørt ár. Ein slíkur fundur var hildin á suðurlandinum í Íslandi í august 2006. Umboðsmaðurin og Johnhard Klettheyggj, ráðgevi, luttóku á hesum fundi. Í døgunum 15, og 16. august luttóku starvsfólk á stovninum í eini eftirlitsvitjan hjá tí danska Umboðsmannastovninum á Psykiatrisk Center Gentofte, Distriktspsykiatrien í Gentofte og á bústovninum Pilekrogen í Gentofte.

7. desember 2006 luttók umboðsmaðurin eisini á fundi við umboð fyri „Office of the Commissioner for Human Rights“ á føroysku sendistovuni í Keypmannahavn.

# *III. Hagtøl*

**Klagur innkomnar í 2006 býttar á myndugleikar**

Í 2006 blivu upprættaði 74 mál, sum innihildu 105 sjálvstøðugar klagur. Hesar klagurnar vóru býttar soleiðis millum ymsu myndugleikarnar:

(Talva 1)

| ***Myndugleiki:*** | ***Klagur:*** |
|---|---|
| Mentamálaráðið | 10 |
| Innlendismálaráðið | 13 |
| Fíggjarmálaráðið | 4 |
| Vinnumálaráðið | 5 |
| Fiskimálaráðið | 9 |
| Almanna- og heilsumálaráðið | 5 |
| Løgmansskrivstovan | 4 |
| Almannastovan | 21 |
| Kommunur | 18 |
| Strandfaraskip Landsins | 1 |
| Skuldarumskipanarnevndin | 2 |
| Skipaeftirlitið | 1 |
| Skatta- & avgjaldskærunevndin | 2 |
| Sjúkrahús | 1 |
| Dátueftirlitið | 1 |
| Akstovan | 1 |
| Málnevndin | 1 |
| Kærunevndin hjá Arbeiðsloysisskipanini | 1 |
| Búnaðarstovan | 2 |
| Búnaðargrunnurin | 1 |
| Yrkisskúlar | 1 |
| LÍV | 1 |
| **Tilsamans** | **105** |

**Innkomnar klagur í 2006 býttar á málsøki og klaguinnihald**
Klagurnar, sum komu inn í 2006 kunnu býtast upp eftir málsøki og innihaldi, sum gjørt er niðanfyri:

(Talva 2)

| *Málsøki* | *Tal av klagum* | *Klagur um avgerðir* | *Klagur um málsviðgerð* | *Klagur um atburð v.m.* |
|---|---|---|---|---|
| Starvsfólkamál | 20 | 14 | 6 | |
| Fiskivinnumál | 8 | 2 | 6 | |
| Almannamál | 22 | 5 | 15 | 2 |
| Skattur v.m. | 6 | 6 | | |
| Undirvísing v.m. | 1 | | 1 | |
| Byggimál v.m. | 15 | 6 | 9 | |
| Innlit | 11 | 8 | 3 | |
| Arbeiðsmarknaðarmál | 2 | 1 | 1 | |
| Persónsmál | 4 | 1 | 3 | |
| Vegir, flutningur v.m. | 3 | 3 | | |
| Vinnumál | 5 | 2 | 3 | |
| Heilsuverk | 2 | 2 | | |
| Kommunumál | 2 | 2 | | |
| Umhvørvi | 1 | | 1 | |
| Ymiskt | 3 | 1 | 2 | |
| **Tilsamans** | **105** | **53** | **50** | **2** |

**Klagur endaliga avgreiddar í 2006**

Av teimum 105 klagunum, sum komu inn í 2006 vóru 79 endaliga avgreiddar innan 31. des. 2006. Harumframt vóru avgreiddar 14 klagur, sum vóru innkomnar (men ikki avgreiddar) í 2005. Úrslitið av viðgerðini var hetta (býtt upp eftir myndugleika):

(Talva 3)

| *Myndugleiki* | *Klagur* | *Avvístar* | *Viðgjørdar* | *Viðgjørdar uttan átalu/ tilmæli* | *Viðgjørdar átala/tilmæli givið* |
|---|---|---|---|---|---|
| Mentamálaráðið | 11 | 6 | 5 | 0 | 5 |
| Innlendismálaráðið | 10 | 6 | 4 | 0 | 4 |
| Alm.- og heilsumálaráðið | 5 | 2 | 3 | 0 | 3 |
| Vinnumálaráðið | 5 | 4 | 1 | 0 | 1 |
| Fiskimálaráðið | 4 | 3 | 1 | 0 | 1 |
| Fíggjarmálaráðið | 4 | 1 | 3 | 0 | 3 |
| Løgmansskrivstovan | 3 | 2 | 1 | 0 | 1 |
| Kommunur | 18 | 11 | 7 | 0 | 7 |
| Almannastovan | 14 | 10 | 4 | 0 | 4 |
| Toll- og Skattst. Føroya | 1 | 1 | 0 | 0 | 0 |
| Búnaðarstovan | 2 | 2 | 0 | 0 | 0 |
| Skatta- og avgj.kærun. | 2 | 2 | 0 | 0 | 0 |
| Skipaeftirlitið | 1 | 1 | 0 | 0 | 0 |
| Yrkisskúlar | 1 | 1 | 0 | 0 | 0 |
| Skuldarumskipanarn. | 2 | 1 | 1 | 1 | 0 |
| Strandfaraskip Landsins | 1 | 1 | 0 | 0 | 0 |
| Sjúkrahús | 2 | 2 | 0 | 0 | 0 |
| Heimarøktin | 1 | 1 | 0 | 0 | 0 |
| ALS | 2 | 0 | 2 | 0 | 2 |
| ALV | 1 | 0 | 1 | 0 | 1 |
| LÍV | 1 | 1 | 0 | 0 | 0 |
| Málnevndin | 1 | 1 | 0 | 0 | 0 |
| Akstovan | 1 | 1 | 0 | 0 | 0 |
| **Tilsamans** | **93** | **60** | **33** | **1** | **32** |

**Klagur avvístar í 2006**

Í 2006 blivu 60 klagur avvístar av ymiskum orsøkum. Býtið teirra millum sæst niðanfyri:

(Talva 4)

| *Avvísingarorsøk* | *Klagur* |
|---|---|
| Innkomin ov seint; § 6, stk. 2 | 11 |
| Kærumøguleiki ikki troyttur; § 6, stk. 3 | 5 |
| Ikki grundarlag fyri víðari kanningum; § 6, stk. 4 | 42 |
| Uttanfyri heimildarøki; § 4 | 1 |
| Afturkallað | 1 |
| **Tilsamans** | **60** |

**Viðgjørdar klagur í 2006 býttar á málsøki**

Tey málini, sum blivu endaliga viðgjørd í 2006, kunnu býtast upp eftir málsøki á hendan hátt:

(Talva 5)

| *Málsøki* | *Klagur* |
|---|---|
| Starvsfólkamál | 14 |
| Fiskivinnumál | 1 |
| Almannamál | 4 |
| Skattur v.m. | 2 |
| Byggimál v.m. | 1 |
| Undirvísing v.m. | 1 |
| Persónsmál | 3 |
| Innlit | 7 |
| **Tilsamans** | **33** |

**Málsviðgerðartíðin hjá umboðsmanninum av viðgjørdum klagum**

Í teimum 33 endaliga viðgjørdu klagunum hevur miðal viðgerðartíðin verið hendan:

(Roknað er við 30 døgum pr. mánað)

(Talva 6)

***Viðgerðartíð í miðal:***

| | |
|---|---|
| Aftaná partshoyring: | 2 mðr. 13 dg. |
| Samlað: | 6 mðr. 18 dg. |

**Málsviðgerðartíðin hjá umboðsmanninum av avvístum klagum:**

Í teimum 60 avvístu klagunum hevur miðal viðgerðartíðin verið hendan:

(Roknað er við 30 døgum pr. mánað)

(Talva 7)

***Viðgerðartíð í miðal:***

| | |
|---|---|
| Aftaná partshoyring: | 12 dg. |
| Samlað: | 25 dg. |

**Málsviðgerðartíðin hjá umboðsmanninum av bæði viðgjørdum og avvístum klagum:**

Fyri allar klagurnar, tvs. bæði avvístar og endaliga viðgjørdar klagur, hevur málsviðgerðartíðin í miðal verið hendan:

(Roknað er við 30 døgum pr. mánað)

(Talva 8)

***Viðgerðartíð í miðal:***

| | |
|---|---|
| Aftaná partshoyring: | 1 mðr. 3 dg. |
| Samlað: | 2 mðr. 26 dg. |

## Klagur innkomnar í 2006 býttar á myndugleikar



**Klagur innkomnar í 2006 býttar á málsøki**




**Klagur innkomnar í 2006 býttar eftir klaguinnihaldi**



**Klagur endaliga avgreiddar í 2006**




**Klagur avvístar í 2006 býttar eftir avvísingarorsøk**



**Klagur viðgjørdar í 2006 býttar á málsøki**




**Innkomnar klagur**



# *IV. Álit og aðrar niðurstøður hjá umboðsmanninum í málum avgreidd í 2006*

## *11. Innlit*

### 11.1 Noktan av innliti frá Vinnumálaráðnum í hoyringsskriv um ætlaða burturvísing av stjóra

Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu frá Útvarpinum um, at Vinnumálaráðið noktaði Útvarpinum innlit í hoyringsskrivið um ætlaðu burturvísingina av fyrrverandi stjóranum í Rúsdrekkasølu Landsins vísandi til § 13, stk. 1, nr. 3 í innlitslógini.

Umboðsmaðurin helt ikki, at Vinnumálaráðið hevði gjørt nakra ítøkiliga meting av, um tað var neyðugt at avmarka rættin til innlit í hoyringsskrivið, og hetta helt umboðsmaðurin vera átaluvert.

Vinnumálaráðið hevði noktað at givið innlit í hoyringsskrivið við teirri grundgeving, at ásetingin loyvir einum myndugleika at undantaka upplýsingar, í tann mun tað er neyðugt til verju av munandi umhugsni fyri m.a. ákærdum í agasóknarmálum. Umboðsmaðurin helt ikki, at ráðið kundi nýta § 13, stk. 1, nr. 3 sum heimild fyri at sýta innlit í hoyringsskrivið, tí tá Vinnumálaráðið í januar 2006 sýtti innlitsumbønini, var stjórin í Rúsdrekkasølu Landsins eftir egnum ynski farin úr starvi knappar fýra mánaðir frammanundan, og málið var avgreitt við semju partanna millum.

Umboðsmaðurin helt ikki viðgerðina av málinum vera nøktandi, og mælti Vinnumálaráðnum til at viðgera málið av nýggjum. (J. nr. 200600017)

## Klagan

Við skrivi, dagfest 25. januar 2006, hevur A, tíðindamaður í Útvarpinum, sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

> „Tíðindadeild Útvarpsins kærir avgerðina hjá Vinnumálaráðnum at sýta fyri innliti í tað skjal, dagfest 11.11.05, sum burturvísti B sum stjóra í Rúsdrekkasølu Landsins.
>
> Umframt munnligt noktandi svar, fingu vit eisini skrivligt noktandi svar, dagfest 10. januar 2006. Hetta er hjálagt.
>
> Vit halda ikki, at grundgevingin hjá Vinnumálaráðnum er haldgóð."

## Málsgongd

Sambært skjølunum í málinum hevur Útvarpið í januar 2006 fingið innlit í málið um, tá B fór úr starvi sum stjóri á Rúsdrekkasølu Landsins. Útvarpið fekk tó ikki innlit í hoyringsskrivið frá Vinnumálaráðnum til B, dagfest 11. september 2005, har grundgivið varð fyri ætlanini um at vísa hana burtur úr starvinum.

Útvarpið sendi 10. januar 2006 Vinnumálaráðnum ein teldupost, har tað m.a. varð spurt soleiðis:

> „Hví er skrivið frá VMR til B 11. september 2005 ikki við í tí tilfari, sum fjølmiðlarnir fingu innlit í?"

Vinnumálaráðið svaraði Útvarpinum við telduposti sama dag við soljóðandi grundgeving:

> „Viðvíkjandi spurninginum um avgreiðsluna av áheitanini um innlit, skal viðmerkjast, at Vinnumálaráðið ikki ynskti at lata innlit í skrivið til B, dagfest 11. november 2005. Víst verður til § 13, stk. 1, nr. 3, í lógini um innlit í fyrisitingina."

Útvarpið sendi 11. januar 2006 Vinnumálaráðnum enn ein teldupost, har tað m.a. varð sagt soleiðis:

> „Einaferð afturat verður biðið um alment innlit í alt málið viðvíkjandi B. Eisini grundgevingina fyri at vísa hana burtur.“

Vinnumálaráðið svaraði Útvarpinum við telduposti, dagfestur 13. januar 2006, soleiðis:

> „Tit hava fingið grundgivið svar, um hví tit ikki fáa innlit í umrødda skriv, og harvið er fyrispurningurin avgreiddur frá okkara síðu.“

Vinnumálaráðið hevur í telefonsamrøðu, 14. juni 2006, upplýst, at Vinnumálaráðið á vári 2006 skrivaði eina frágreiðing til løgmann um málið, har grundgevingarnar fyri ætlaðu burturvísingini vórðu endurgivnar, og at Vinnumálaráðið, eftir at Løgmansskrivstovan hevði givið innlit í hesa frágreiðing, eisini gav innlit í frágreiðingina.

## Partshoyring

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta mál nærri, og við skrivi, dagfest 27. mars 2006, varð klagan send Vinnumálaráðnum við áheitan um at lata umboðsmanninum eina frágreiðing, eins og ráðið varð biðið um at lata umboðsmanninum eitt avrit av umrødda skrivinum til láns.

Við skrivi, dagfest 1. mai 2006, hevur Vinnumálaráðið latið umboðsmanninum soljóðandi frágreiðing:

> „**Viðvíkjandi klagu frá Útvarpinum, dagfest 25. januar 2006.**
> Víst verður til skriv tykkara, dagfest 27. mars 2006, har Vinnumálaráðið verður biðið um eina frágreiðing um innlitsmál, ið Útvarp Føroya hevur kært til umboðsmannin.
>
> Í skrivinum frá útvarpinum kærir útvarpið „*...avgerðina hjá Vinnumálaráðnum at sýta fyri innliti í tað skjal, dagfest 11.11.05, sum burturvísti B sum stjóra á Rúsdrekkasølu landsins.*“

Til hetta skal fyrst viðmerkjast, at slíkt skjal finst ikki, tí B hevur ongantíð fingið eitt burturvísingarskriv frá Vinnumálaráðnum. B fekk tó sama dag eitt hoyringsskriv um ætlaða burturvísing, og hava vit

undir avgreiðsluni av umrøddu áheitan um innlit frá útvarpinum, roknað við, at tað var hetta skriv, sum innlit varð biðið í.

Sum skilst av kæruni, verður ikki hildið, at grundgevingin hjá Vinnumálaráðnum, um at sýta innlit, er haldgóð.

Vinnumálaráðið sýtti útvarpinum innlit í hoyringsskrivið vísandi til § 13, stk. 1, nr. 3 í lógini um innlit, ið loyvir einum myndugleika at undantaka upplýsingar, í tann mun tað er neyðugt til verju av munandi umhugsni fyri m.a. ákærdum í agasóknarmálum. Tey høvuðsfyrilit, ið hava verið avgerandi fyri útinningini av metingini eru nevnd í sjálvari ásetingini í § 13, stk. 1. Í einum máli sum hesum, meta vit, at hetta er ein nøktandi og haldgóð grundgeving, og vísa í hesum sambandi á § 23, stk. 3 í fyrisitingarlógini.

Til tykkara kunnleika leggja vit avrit av samskifti okkara við útvarpið um hetta mál – undantikið tann partin, sum tit longu hava fingið frá útvarpinum, umframt avrit av skjalinum, ið innlit var biðið í."

Við skrivi, dagfest 3. mai 2006, varð frágreiðingin frá Vinnumálaráðnum send klagaranum til ummælis við eini freist áljóðandi tríggjar vikur.

Tá umboðsmaðurin einki hevði frætt aftur frá klagaranum, boðaði hann, við skrivi, dagfest 29. mai 2006, pørtunum frá, at málið varð tikið upp til endaliga viðgerð.

## *Niðurstøða*

*Sambært § 4, stk. 1 í innlitslógini eru eisini starvsfólkamál fevnd av rættinum til skjalainnlit. Undantikin eru tó mál um setan í starv og flytan í hægri starv, sbr. § 2, stk. 1,*

*§ 4, stk. 1 í innlitslógini er soljóðandi:*

*„§ 4. Ein og hvør kann við teimum undantøkum, sum eru nevnd í §§ 7-14, krevja at fáa høvi til at gera seg kunnugan við skjøl, sum ein myndugleiki hevur móttikið ella gjørt sum liður í fyrisitingarligari*

*saksviðgerð í samband við virksemi myndugleikans. Ein myndugleiki kann geva loyvi til skjalainnlit í størri mun, um ikki annað fylgir av reglum um tagnarskyldu v.m.„*

*Sum nevnt í ásetingini, so kunnu upplýsingar ella skjøl í starvsfólkamálum undantakast, men bert um §§ 7 – 14 í lógini heimila hesum. Upplýsingar um t.d. tænastubrot eru fevndar av reglunum um innlit, men tó ikki um tað samstundis verða avdúkaðar upplýsingar um privat viðurskifti.*

*Vinnumálaráðið hevur greitt soleiðis frá viðgerðini av málinum um at sýta fyri innliti:*

> *„Tey høvurðsfyrilit, ið hava verið avgerandi fyri útinningini av metingini eru nevnd í sjálvari ásetingini í § 13, stk. 1.“*

*§ 13, stk. 1, nr. 3 í innlitslógini er soljóðandi:*

> *„§ 13. Rætturin til skjalainnlit kann avmarkast í tann mun tað er neyðugt til verju av munandi umhugsni viðvíkjandi*
>
> *…*
>
> *3) fyribyrging, avdúkan og søkjan at lógarbrotum, revsingarfulgerð og líknandi og verju av ákærdum, vitnum ella øðrum í málum um revsi- ella agasókn,“*

*Danski umboðsmaðurin hevur viðgjørt eitt mál um einsljóðandi ásetingina í donsku innlitslógini, sí FOB 98, bls. 83, har hann sigur soleiðis um fyrireikingina av málinum:*

> *„Undtagelse af oplysninger efter denne eller de øvrige bestemmelser i § 13, stk. 1, kan kun foretages hvis det i den konkrete sag findes nødvendigt at begrænse retten til aktindsigt på grund af væsentlige hensyn (mine fremhævelser) til de beskyttelsesinteresser der er angivet. Denne formulering tilsigter at tilkendegive at en begæring om aktindsigt kun kan afslås hvor der efter en konkret vurdering er nærliggende fare for at de nævnte interesser – hensynene til opklaring og forfølgning af lovovertrædelser samt beskyttelse af sigtede, vidner og andre i sager om strafferetlig og disciplinær forfølgning – vil lide skade af betydning. Jeg*

*henviser til Folketingstidende 1985-86, tillæg A, sp. 229, betænkning nr. 857/1978 s. 263, og den kommenterede offentlighedslov v/John Vogter (1992), s. 201.“*

*Hesum kann eg bert taka undir við. Sambært frágreiðingini hjá Vinnumálaráðnum hevur ráðið onga ítøkiliga meting gjørt av, um tað er neyðugt til verju av munandi umhugsni fyri áhugamálunum í ásetingini at avmarka rættin til innlit í hoyringsskrivið, og um tað kann skaða nevndu áhugamálini, um innlit verður givið. Hetta haldi eg vera átaluvert.*

*Í sama máli sigur danski umboðsmaðurin:*

*„…følger … af offentlighedslovens § 13, stk. 1, nr. 3, at bestemte oplysninger – men ikke uden videre hele dokumenter eller sager – kan undtages fra aktindsigt. Det fremgår af § 13, stk. 2, at den pågældende skal gøres bekendt med dokumentets øvrige indhold hvis hensynene i stk. 1 kun omfatter en del af dokumentet.“*

*§ 13, stk. 2 í donsku lógini og føroysku lógini eru einsljóðandi, og sum málið er upplýst fyri mær, hevur Vinnumálaráðið heldur ikki tikið støðu til, um umstøður, sum nevndar eru í § 13, stk. 1, nr. 3 bert gera seg galdandi fyri ein part av skjalinum, og um umsøkjarin tískil átti at gerast kunnigur við restina av innihaldinum í skjalinum, sbr. § 13, stk. 2.*

*Vinnumálaráðið hevur víst til § 13, stk. 1, nr. 3 í innlitslógini sum heimild fyri at nokta innlit í hoyringsskrivið um ætlaðu burturvísingina av stjóranum í Rúsdrekkasølu Landsins, og hevur í frágreiðingini til mín greitt frá, at ásetingin loyvir einum myndugleika at undantaka upplýsingar, í tann mun tað er neyðugt til verju av munandi umhugsni fyri m.a. ákærdum í agasóknarmálum.*

*Í serligu viðmerkingunum til § 13, stk. 1, nr. 3 í danska lógaruppskotinum, sum er fyrimyndin fyri okkara innlitslóg, stendur soleiðis í Folketingstidende 1985/86, tillæg A, sp. 228 – 229:*

*„...Hemmeligholdelse for at sikre beskyttelse af „sigtede, vidner eller andre..." vil f.eks. kunne være påkrævet af hensyn til muligheden for at kunne opnå en forklaring fra de pågældende i forbindelse med den administrative behandling af en straffe- eller disciplinærsag. Undtagelsesbestemmelsen kan derfor også i denne henseende i et vist omfang være begrundet i hensynet til retshåndhævelsens effektivitet. Undtagelsesbestemmelsen vil imidlertid være anvendelig også i andre tilfælde, hvor hensynet til beskyttelse af den nævnte personkreds gør hemmeligholdelse påkrævet..."*

*Udtrykket „disciplinær forfølgning" omfatter alle arter af disciplinærsager, der er under behandling i den offentlige forvaltning."*

*Í Offentlighedsloven med kommentarer af John Vogter, 3. udg., bls. 241, stendur m.a. soleiðis:*

*„...Anvendelsen af denne del af bestemmelsen forudsætter i øvrigt, at vedkommende myndighed er kompetent til at rejse en sådan sag, og at sagen er eller står umiddelbart over for at blive rejst som disciplinærsag..."*

*Staðfestast kann, at tá Vinnumálaráðið í januar 2006 sýtti umbønini um skjalainnlit, var stjórin í Rúsdrekkasølu Landsins eftir egnum ynski farin úr starvi knappar fýra mánaðir frammanundan, og málið var avgreitt partanna millum við semju.*

*Leggjast má tí til grund, at hvørki revsi- ella agamál var í gongd, ella at tílíkt mál var um at verða reist. Vinnumálaráðið kundi tískil, eftir míni meting, ikki sýta innlitsumbønini við heimild í § 13, stk. 1, nr. 3.*

*Samanumtikið haldi eg ikki viðgerðina av innlitsumbønini vera nøktandi, og eg fari at mæla Vinnumálaráðnum til at taka málið uppaftur til viðgerðar og at lata meg frætta, hvørja niðurstøðu ráðið kemur til hesum viðvíkjandi.*

Við teldubrævi 5. juli 2006 hevur Vinnumálaráðið kunnað umboðsmannin um, at innlit er givið í umrødda skrivið. Umboðsmaðurin ger tí ikki meira við hetta málið.

## 11.2 Noktan av almennum innliti og fráboðan til embætismann, sum innlitsumbønin snúði seg um

Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um handfaringina hjá Løgmansskrivstovuni av einari innlitsumbøn. Løgmansskrivstovan hevði í fyrstu atløgu avvíst umbønina í sínari heild vísandi til § 4, stk. 3 í innlitslógini. Hetta helt umboðsmaðurin ikki vera nøktandi, tí at partar av umbønini vóru í hvussu er nóg neyvir til, at støða kundi verið tikin til hesar. Umboðsmaðurin vísti samstundis á vegleiðingarskylduna í § 7, stk. 1 í fyrisitingarlógini. Umboðsmaðurin helt tað heldur ikki vera nøktandi, tá Løgmansskrivstovan í aðru atløgu sýtti einum ávísum parti av umbønini vísandi til § 4, stk. 3, og mælti tí til, at Løgmansskrivstovan vendi sær til tíðindamannin at spyrja, um hesin parturin av umbønini framvegis var aktuellur, og um so er at viðgera hetta. Umboðsmaðurin helt tað ikki vera skeivt, men heldur natúrligt og eitt dømi um góðan fyrisitingarsið, at Løgmansskrivstovan hevði kunnað avvarðandi starvsfólkið um innlitsumbønina í starvsfólkaviðurskifti hjá viðkomandi. (J. nr. 200600063)

## Klagan

Við skrivi, dagfest 16. juni 2006, hevur A, tíðindaleiðari í Sjónvarpinum sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

„**Viðvíkjandi umbøn um alment innlit og eftirfylgjandi uppringingum**

Sum lið í journalistiska arbeiðinum søkti B, journalistur í Sjónvarpinum, hósdagin 15. juni Løgmansskrivstovuna um alment innlit. Umsóknin var send sum t-postur, og stutt eftir váttaði Løgmansskrivstovan við t-posti fyri móttøkuna og lovaði at viðgera umsóknina uttan drál. Løtu seinni ringdi C, kunningarráðgevi, sum bæð B um at siga meiri nágreiniliga, hvat hann var áhugaður í. Hon vísti til, at verandi umsókn vildi taka einum manni 14 dagar at fylla upp í pappeskjur. Síðani skrivaði B eina nýggja umsókn, sum eisini varð send við t-posti. Stutt eftir kom noktandi svar – burtursæð ávísing til tilfar, sum er frítt atkomiligt á alnótini. Týdningarmesti parturin av innlitinum

var noktaður vísandi til grein 4, stk. 3 í lógini um alment innlit, tí løgmansfyrisitingin metti umsóknina vera ov ónágreiniliga.

B ringdi síðani til D fyri at fáa at vita, hvat trupulleikin ítøkiliga var. D segði, at tey meira nágreiniligari máttu hava at vita, hvat innlitið snúði seg um.

Í hesum báðum samrøðunum kendi B, at hann noyddist í smálutum at siga, hvar hann royndi at kanna, fyri at tey á Løgmansskrivstovuni kundu útvega honum rætta tilfarið.

Men líka lítið hjálpti tað, tí niðurstøðan var hin sama, at vit ikki fingu innlit.

Til dømis var ikki nóg mikið at siga, at hann vildi hava innlit í ferðaútreiðslur og resepsjónir hjá einum ávísum alment settum persóni í eitt ávíst tíðarskeið, fekk B at vita frá.

D gjørdi eisini greitt, at ein umbøn um alment innlit skuldi vera so nágreinilig, at tað onga arbeiðsorku skuldi krevja av fyrisitingini.

Í dag 16. juni ringir E til B og sigur, at hann hevur skilt á D, at B hevur søkt um alment innlit um seg. E varð áhugaður at frætta, hvat vit skuldu brúka upplýsingarnar til.

Eg vil í hesum sambandi kæra um málsviðgerðina sum heild.

Herundir um grundgevingarnar fyri noktandi svarinum upp á umsókn um innlit.

Í øðrum lagi um, at E av Løgmansskrivstovuni er vorðin kunnaður um, at Sjónvarpið arbeiðir „við einum ella øðrum“ um hann, og at hann brúkar hesa vitan, sum grund fyri at ringja til umsøkjaran og spyrja, hvat hann ætlaði við upplýsingunum.

Tað skal undirstrikast, at E varð kunnaður um umbønina um innlit, sjálvt um B fekk noktandi svar. Og hann var kunnaður um hetta, AFTANÁ at avgerðin um at nokta innlit var tikin.

Hjálagt er tvey teldubrøv, sum vísa samskiftið við løgmansskrivstovuna.“

## Málsgongd

Við teldubrævi, 15. juni 2006, kl. 11.04, sendi B, tíðindamaður, Løgmansskrivstovuni soljóðandi innlitsumbøn:

„Hervið biði eg um innlit í roknskapir og øll skjøl, notatir og annað, ið hevur samband við føroysku umboðsstovuna í ... fevnandi um tíðina, E starvaðist har, ella sum hava samband við hansara starvstíð har."

Við teldubrævi 15. juni 2006, kl. 12.07, hevur D, ráðgevi, svarað tíðindamanninum soleiðis:

„Vísandi til hjáløgdu umsókn verða tygum biðin um at senda inn neyvari orðaða innlitisumsókn, sum uppfyllir tær treytir, sum innlitislógin § 4 stk. 3 setur.

./. Hjálagt
1. Løgtingslóg um alment innlit
http://www.tinganes.fo/logir/1993.133.htm
2. Kommentar til § 4 stk. 3 í lógini um alment innlit"

Viðmerkingarnar til lógina, sum víst verður til undir pkt. 2, er avrit av Offentlighedsloven med kommentarer af John Vogter, 3. udg. 1998, bls. 126-131.

15. juni 2006, kl. 12.25 hevur tíðindamaðurin sent D soljóðandi teldubræv:

> „Innlitið, ið biðið verður um, fevnir um roknskapirnar hjá føroysku umboðsstovuni í ... fyri tíðina, E starvaðist har og alt samskifti við aðrar almennar myndugleikar – eitt nú Landsgrannskoðanina – hesum viðvíkjandi.
>
> Harumframt skal innlitið fevna um aðrar evt. útreiðslur, sum tað almenna hevur goldið fyri E sjálvan ella umboðsstovuna í hansara starvstíð har, og sum ikki er við í sjálvum roknskapunum.

Eisini vil eg hava upplýst, hvat var játtað av peningi til umboðsstovuna í hesum tíðarskeiði.

Endiliga vil eg fegin hava innlit í setanarsáttmálan, sum var gjørdur við E viðvíkjandi starvinum sum føroyskt umboð í ... og tær almennu starvstreytirnar fyri slík størv – íroknað lønarligar treytir, treytir um aðrar samsýningar og treytir um, hvat tað almenna annars skal gjalda ella endurrinda av útreiðslum hjá starvsfólkum í slíkum størvum."

Við teldubrævi, 15. juni, kl. 14.41 hevur D svarað tíðindamanninum soleiðis:

Svarast kann soleiðis:

**1) Roknskapirnar hjá føroysku umboðsstovuni í ... fyri tíðina, E starvaðist har.**
Sí vanliga landsroknskapin á www.gjaldstovan.fo/ – dátur

**2) Alt samskifti við aðrar almennar myndugleikar – eitt nú Landsgrannskoðanina – hesum viðvíkjandi.**
Umbønin uppfyllir ikki § 4 stk. 3 í innlitislógini.

**3) Harumframt skal innlitið fevna um aðrar evt. útreiðslur, sum tað almenna hevur goldið fyri E sjálvan ella umboðsstovuna í hansara starvstíð har, og sum ikki er við í sjálvum roknskapunum.**
Umbønin uppfyllir ikki § 4 stk. 3 í innlitislógini.

**4) Eisini vil eg hava upplýst, hvat var játtað av peningi til umboðsstovuna í hesum tíðarskeiði.**
Sí fíggjarløgtingslógina fyri viðkomandi ár í Kunngerðablaðnum á http://tidarrit.bok.hi.is/titlebrowse.jsp?t_id=200019&lang=0 og http://kunngerdasavn.logir.fo/

**5) Endiliga vil eg fegin hava innlit í setanarsáttmálan, sum var gjørdur við E viðvíkjandi starvinum sum føroyskt umboð í ... og tær almennu starvstreytirnar fyri slík størv – íroknað lønarligar treytir,**

**treytir um aðrar samsýningar og treytir um, hvat tað almenna annars skal gjalda ella endurrinda av útreiðslum hjá starvsfólkum í slíkum størvum.**

Spurningurin verður svaraður seinni av starvsfólkafyrisitaranum á løgmansskrivstovuni, F."

Við teldubrævi, dagfest 22. juni 2006, hevur F svarað tíðindamanninum soleiðis:

> „Viðvíkjandi fyrispurnigi tínum um:
>
> **5) ...**
>
> Viðvíkjandi almennu starvstreytum fyri slík størv, verða tygum at venda tygum til Udenrigsministeriet, Personaleafdelingen, sum umsitur reglurnar.
>
> Tað er ongin setanarsáttmáli við E í sambandi við starvið sum sendimaður, setanarbræv varð gjørt, tá E varð settur í starv á Løgmansskrivstovuni.
>
> Fráboðanin frá Løgmansskrivstovuni til Udenrigsministeriet um avgerð Løgmansskrivstovunar at E skuldi gerast sendimaður í… , verður send tykkum í komandi viku."

Við teldubrævi, dagfest 29. sept. 2006, hevur F svarað tíðindamanninum soleiðis:

> „Í sambandi við fyrispurning tín um innlit í setanarsáttmálan hjá E, boðaðu vit frá, at fráboðanin til Uttanríkisráðið um avgerð Løgmansskrivstovunar at E skuldi gerast sendimaður í ..., skuldi sendast seinni. Hettar var tí, at vit høvdu ikki skjalið júst tá.
>
> Orsakað av summarfrí o.ø. og av tí at spurt hevur ikki verið eftir skjalinum, mugu vit ásanna, at vit av misgávum hava gloymt málið.
>
> Skjalið verður við hesum sent SVF.
> Vónandi bera tit yvir við okkum."

## Partshoyring

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og við skrivi, dagfest 20. juni 2006, varð klagan send Løgmansskrivstovuni til ummælis við einari freist áljóðandi 4 vikur.

Við skrivi, dagfest 29. juni 2006, hevur Løgmansskrivstovan latið umboðsmanninum soljóðandi frágreiðing:

> „Vísandi til skriv løgtings umboðsmansins, 20. juni 2006 við umbøn um ummæli av klagu frá A, tíðindaleiðara, 16. juni 2006, um noktandi svar uppá alment innlit viðvíkjandi ymiskum viðurskiftum hjá E meðan hann var sendimaður í... , skal eg stutt svara soleiðis:

Illa ber til at útgreina neyvari grundgevingina fyri noktanini, enn tað er gjørt í svarinum, serliga tí hjálagda løgfrøðiliga litteraturinum.

D upplýsir fyri mær, at telefonsamrøðufrásøgnin hjá A er ikki heilt røtt. Sagt verður, at tað „ikki var nóg mikið at siga, at hann vildi hava innlit í ferðaútreiðslur og reseptiónir hjá einum ávísum alment settum persóni í eitt ávíst tíðarskeið", og at „umbøn um alment innlit skuldi vera so nágreinilig, at tað onga arbeiðsorku skuldi krevja av fyrisitingini". D sigur, at hann segði, at hann so dánt mátti hava at vita hvørja ferð áleið tað, tað snúði seg um, ikki bar til at biðja um allar ferðir uttan so var, at tíðarskeiðið var rættuliga trongliga lýst. Orðini „onga arbeiðsorku" sigur D seg ikki hava brúkt. Neyva orðingin var, at umsóknin ikki mátti krevja „bearbejdning" av fyrisitingini. Tað er, at umsóknin kann greiðast, við at tilfarið við hjálp frá skjalaskrásetingini uttan størri kanningararbeiði kann finnast fram og latast tíðindafólkum at blaða í.

Rætt er tað, at E er kunnaður um skrivligu svarini, sum farin eru út til sjónvarpið um noktan av almennum innliti í hansara viðurskifti vegna ov óneyva umsókn. Bert ein grund kundi verið fyri, at hetta var ólógligt, nevniliga at tað við hesi kunning varð framt eitt tagnarskyldubrot.

Tagnarskyldan er í borgaraligu revsilógini í § 152 stk. 3 ásett allýst soleiðis.

> „En oplysning er fortrolig, når den ved lov eller anden gyldig bestemmelse er betegnet som sådan, eller når det i øvrigt er nødvendigt at hemmeligholde den for at varetage væsentlige hensyn til offentlige eller private interesser.“

**Tagnarskylduliðirnir eru sostatt tríggir:**
*Lóggávan ásetur tað*: Her er serliga at viðmerkja revsilógarinnar § 109, ríkisloynidómar og § 264 um at siga frá privatum viðurskiftum, sum „åbenbart kan forlanges unddraget offentligheden“. Hesi privatu viðurskifti eru í persónsupplýsingarlógini § 2 nr. 9 allýstir sum viðkvæmir upplýsingar og fevna um eitt nú upplýsing um lit og ættarslag, um átrúnaðarliga, heimsspekiliga ella politiska sannføring, um revsiverd og kynslig viðurskifti, heilsustøðu, yrkisfelagsligt tilknýti, munandi sosialar trupulleikar og onnur heilt privat viðurskifti.

*Tænastuboð*: Ein hægri fyrisettur kann mótvegis einum lægri starvssettum altíð geva boð um, at ávísur upplýsingur er undirgivin tagnarskyldu.

*Væsentlige hensyn til offentlige eller private interesser*: Hetta er ein trygdarventilur í lóggávuni. Tú átti, sum alment settur, av tær sjálvum at vita, at hetta er ein tagnarskylduupplýsingur, tú fekk.

Eg meti ikki, at umbønin um alment innlit og svarið uppá hesa koma undir tagnarskylduregluna. Tvørturímóti meti eg, at tað er ein góður fyrisitingarligur siður at kunna starvsfólkið, sum innlit verður biðið um viðvíkjandi.“

Við skrivi, dagfest 30. juni 2006, vórðu viðmerkingarnar frá Løgmansskrivstovuni sendar klagaranum til ummælis við einari freist áljóðandi 3 vikur.

Við teldubrævi, dagfest 22. juli 2006, hevur A sent umboðsmanninum

viðmerkingar til frágreiðingina frá Løgmansskrivstovuni. Orsakað av teldutrupulleikum hjá umboðsmanninum, eru viðmerkingar ikki móttiknar fyrr enn 1. aug. 2006. Teldubrævið er soljóðandi:

> „Tá B hevur verið í feriu, hevur ikki fyrr enn í dag borið til at gera viðmerkingar til málið:
>
> Frá okkara síður verður hildið uppá, at orðini fullu sum sagt í kæruni.
>
> Men okkatra klaga snýr seg um grundgevingarnar fyri noktandi svari frá Løgmansskrivstovuni, umframt tær eftirfylgjandi kunningar, sum førdu til privata uppringing frá E.“

Við skrivi, dagfest 11. aug. 2006, vórðu viðmerkingarnar frá klagaranum sendar Løgmansskrivstovuni til ummælis við einari freist áljóðandi 3 vikur.

Við skrivi, dagfest 14. aug. 2006, hevur Løgmansskrivstovan svarað umboðsmanninum soleiðis:

**„Viðvíkjandi kæru frá Sjónvarp Føroya til løgtingsumboðsmannin um innlit í ymisk viðurskifti viðvíkjandi E, meðan hesin var sendimaður Føroya í Bretlandi.**

Viðmerkingarnar frá A, tíðindaleiðara, dagfestar 22. juli 2006, sum løgtingsumboðsmaðurin sendi okkum 11. august 2006, geva mær ikki høvi til aðrar viðmerkingar enn

> -at ongin grund er at gera viðmerkingar til, hvat varð sagt undir telefonsamrøðuni, tá ið tíðindaleiðarin í svarinum skilliga avmarkar kæruna til skrivliga samskifti
>
> -at svarið frá løgmansskrivstovuni ikki var meira noktandi enn so, at biðið varð um ítøkiliggering av umsóknini, áðrenn umsóknin varð játtað.“

Við skrivi, dagfest 21. aug. 2006, hevur umboðsmaðurin boðað pørtunum frá, at hann ikki helt tað vera neyðugt við framhaldandi partshoyringum, og at málið tí bleiv tikið upp til endaliga viðgerð.

Tann 3. okt. 2006 hevur F sent umboðsmanninum soljóðandi teldubræv:

> „Til Løgtingsins Umboðsmann
> Í sambandi við málið um setanarviðurskiftini hjá fyrrverandi sendimanni Føroya í... , E, sendi eg tykkum eitt skjal, sum av misgávum er sent SVF nakað seint."

Við skrivi, dagfest 12. okt. 2006, hevur umboðsmaðurin biðið Løgmansskrivstovuna um skjótast gjørligt at lata sær øll skjøl, sum vóru komin afturat hesum máli, síðani skjølini av fyrstan tíð vórðu send umboðsmanninum. Kunning um hetta var eisini send klagaranum.

Við skrivi, dagfest 16. okt. 2006, hevur Løgmansskrivstovan sent umboðsmanninum umbidnu skjølini.

## *Niðurstøða*

*Viðgerð mín av hesari klaguni fevnir um málsviðgerðina hjá Løgmansskrivstovuni av innlitsumbønini og grundgevingarnar fyri noktandi svørum, umframt at Løgmansskrivstovan hevur kunnað embætismannin, ið málið snúði seg um, um innlitsumbønina.*

*Í klaguni verður eisini greitt frá munnliga samskiftinum millum Løgmansskrivstovuna og tíðindamannin. Av tí, at talan er um ymisk uppáhald um, hvat hevur ella skal hava verið sagt undir hesum samrøðum, geri eg ikki meira við tann spurningin. Tó undrar tað meg, at eingi notat eru skrivað frá hesum samrøðum. Av tí, at samskiftið um hesa innlitsumbønina hevur hildið áfram sama dag gjøgnum teldupost, fari eg kortini ikki at gera meira við hendan spurningin.*

*Einasta kravið, sum sambært lógini (løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina við seinni broyting) verður sett til eina innlitsumbøn, er at finna í § 4, stk. 3, ið er soljóðandi:*

*„Stk. 3. Áheitan sambært stk. 1 og 2 skal skila til tey skjøl ella tað mál, sum viðkomandi ynskir at gera seg kunnugan við."*

*Tað krevst sostatt, at umsøkjarin hevur ein ávísan kunnleika til, at umrøddu mál ella skjøl finnast. Í hesum liggur, at umsøkjarin má vísa til tað mál ella tey skjøl, sum hesin ynskir at fáa innlit í, og skal hetta verða gjørt á ein slíkan hátt, at myndugleikin kann finna tilfarið í skjalagoymslum sínum.*

*Løgmansskrivstovan hevur í fyrstu atløgu við teldubrævi, 15. juni – kl. 12.07, sýtt innlitsumbønini vísandi til § 4, stk. 3 í lógini.*

*Eg haldi ikki, at hetta svarið frá Løgmansskrivstovuni er nøktandi. Tað kann væl vera, at umbønin sum heild ikki er nóg neyv, men eingin ivi kann vera um, at partar av umbønini eru nóg greitt lýstir. Her hugsi eg serliga um tann partin av umbønini, ið snýr seg um roknskapirnar fyri tíðarskeiðið, tá E starvaðist á umboðsstovuni í ... . Løgmansskrivstovan kundi lættliga havt viðgjørt hendan partin av innlitsumbønini, og annars biðið tíðindamannin útgreina restina. Av tí, at hesin parturin av innlitsumbønini er svaraður seinni sama dag, geri eg ikki meira við hetta.*

*Í hesum sambandi skal eisini verða víst til § 7, stk. 1 í fyrisitingarlógini, har ásett er, at ein myndugleiki hevur skyldu at veita persónum vegleiðing, tá hesir venda sær til myndugleikan, um viðurskifti innan málsøki hjá myndugleikanum. Fyri innlitsmál merkir hetta ítøkiliga, at myndugleikin eigur at vegleiða umsøkjaran um, hvat myndugleikanum tørvar at fáa at vita, fyri at innlitsumbønin kann avgreiðast.*

*Við teldubrævi sama dag, kl. 12.25, útgreinar tíðindamaðurin innlitsumbøn sína, og verður hendan lutvíst svarað í teldubrævi, 15. juni – kl. 14.41, tvs. seinni sama dag.*

*Eg havi sum so ongar viðmerkingar til svørini í pkt. 1 og 4.*

*Viðvíkjandi pkt. 2 haldi eg tað ikki vera nøktandi, at Løgmansskrivstovan sýtir umbønini vísandi til § 4, stk. 3 í lógini. Víst verður her til tað, sum er umrøtt frammanfyri. Innlitsumbønin nevnir t.d. beinleiðis samskiftið við Landsgrannskoðanina um roknskapirnar fyri tíðarskeiðið, tá E starvaðist á umboðsstovuni. Løgmansskrivstovan kundi tí lættliga havt viðgjørt*

*hendan partin av innlitsumbønini, og annars biðið tíðindamannin útgreina restina. Tað er tí ikki nøktandi, at Løgmansskrivstovan ikki hevur viðgjørt hendan partin av innlitsumbønini. Vísandi til tíðina, sum er farin, síðani innlitsumbønin varð sett fram, fari eg at mæla Løgmansskrivstovuni til at venda sær til tíðindamannin fyri at vita, um hesin parturin av innlitsumbønini framvegis er aktuellur, og um so er, at viðgera umbønina hesum viðvíkjandi.*

*Eg haldi ikki, at innlitsumbønin sum heild er serliga neyv, og havi tí onga viðmerking til, at Løgmansskrivstovan svarar noktandi viðvíkjandi pkt. 3. Løgmansskrivstovan kundi biðið tíðindamannin útgreina hendan partin av innlitsumbønini, men av tí, at hetta er gjørt áður sama dag, havi eg ongar viðmerkingar til hendan partin av svarinum.*

*Viðvíkjandi setanarsáttmálanum v.m. (pkt. 5) sigur Løgmansskrivstovan, at hesin spurningur verður svaraður seinni. Hesin parturin av innlitsumbønini verður lutvíst svaraður við teldubrævi 22. juni, og havi eg ongar viðmerkingar til hetta svarið. Løgmansskrivstovan gloymir kortini at senda tíðindamanninum fráboðanina til danska uttanríkisráðið, eins og lovað. Hendan fráboðan verður ikki send Sjónvarpinum fyrr enn stívliga 3 mðr. seinni, tvs. 29. sept. Hetta haldi eg avgjørt ikki vera nøktandi, og skal í hesum sambandi vísa til § 16, stk. 1 í lógini, har ásett er, at innlitsumbønir skulu svarast sum skjótast, umframt at skjalainnlitið síðani verður givið so skjótt sum til ber.*

*Løgmanskrivstovan hevur biðið Sjónvarpið bera yvir við hesum mistakinum, og kann eg ikki annað enn taka undir við, at hetta er gjørt.*

*Klagarin er eisini ónøgdur við, at Løgmansskrivstovan hevur kunnað E um innlitsumbønina. Eg dugi ikki at síggja, at nakað galið er í hesum, og haldi tað ikki vera annað enn natúrligt, at viðkomandi starvsfólk, verða kunnaði, tá biðið verður um innlit, ella innlit verður givið í starvsfólkamál teirra. Hetta er nakað, sum tann, ið biður um innlit, má og eigur at tola. Eg haldi tí eins og Løgmansskrivstovan, at hetta er eitt dømi um góðan fyrisitingarsið.*

*Tað kann hinvegin undra, at E seinni hevur ringt til tíðindamannin fyri at spyrja, hvat hesin skuldi nýta upplýsingarnar til. Eg dugi ikki at síggja, hvørjum endamáli hetta skuldi tæna, men av tí, at E helst hevur gjørt hetta sum privatpersónur, og ikki sum umboð fyri myndugleikan, geri eg ikki meira við hendan spurning.*

*Burtursæð frá viðmerkingunum frammanfyri, geri eg ikki meira við hetta málið.*

Við teldubrævi 7. nov. 2006 hevur Løgmansskrivstovan vent sær til klagaran og greitt frá, at einki samskiftið er við Landsgrannskoðanina um málið. Løgmansskrivstovan hevur samstundis biðið klagaran ítøkiliggera innlitsumbønina. Umboðsmaðurin ger ikki meira við hetta málið.

## 11.3 Innlit í skriv frá aðalstjóranum til landsstýrismannin um viðurskifti í Almanna- og heilsumálum

Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um avgerðirnar hjá Almanna- og heilsumálaráðnum í sambandi við umbøn um innlit í skriv, sum fyrrverandi aðalstjórin hevði skrivað um viðurskiftini í ráðnum. Umboðsmaðurin helt ongan iva vera um, at talan var um innanhýsis arbeiðsskjøl, men vísti samstundis á, at upplýsingarnar í skjølunum um veruligu umstøðurnar í málinum vóru fevndar av § 11, og tí skuldu latast umsøkjaranum, um ikki aðrar ásetingar í lógini forðaðu hesum.

Ráðið sýtti fyrst umbønini vísandi til § 7 í lógini. Eftir at tíðindamaðurin hevði mótmælt avgerðini, viðgjørdi ráðið umbønina av nýggjum, men sýtti framvegis at geva innlit. Ráðið viðgjørdi innlitsumbønina tvær ferðir afturat, aftaná at klagan varð send ráðnum til ummælis. Fyrru ferð varð innlit givið í onnur skjøl, og seinnu ferð varð innlit latið samsvarandi § 11 í innlitslógini. Umboðsmaðurin helt tað ikki vera nøktandi, at ráðið ikki kom til hesa niðurstøðu fyrr enn í fjórðu atløgu, og gav ráðnum eina átalu fyri handfaringina av málinum. Víst varð eisini á týdningin av, at innlitsumbønir verða avgreiddar so skjótt sum til ber. Umboðsmaðurin helt, at ráðið í hesum føri beinanvegin átti at havt umhugsað, hvørt innlit skuldi verið givið í skjalið í sínari heild sambært regluni um meirinnlit í § 4, stk. 1, 2. pkt. (J. nr. 200600041)

## Klagan

A, útvarpsmaður, hevur við skrivi, dagfest 21. apríl 2006, sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

<u>Kæra viðvíkjandi umsókn um skjalainnlit</u>
Undirritaði vil hervið kæra avgerð hjá Almanna- og Heilsumálaráðnum, dagfest 5. apríl 2006, at nokta mær innlit í skriv, sum B, fráfarandi aðalstjóri fyri nøkrum mánaðum síðani skrivaði um viðurskifti í ráðnum og hjá avvarandi stovnum.

Almanna- og Heilusmálaráðið hevur staðfest avgerð sína 16. apríl 2006.

> Eg meti ikki at grundgevingin hjá Almanna- og Heilsumálaráðnum er haldgóð, og kæri tí avgerðina við vón um at sleppa at fáa hesar fyri almenningin so viðkomandi upplýsingar, so skjótt sum tilber.
>
> Samskiftið millum meg og Almanna- og heilsumálaráðið fór fram við telduposti, og sendi eg útskrift av teldupostum við kæruni.

## Málsgongd

D, tíðindaleiðari sendi við telduposti 5. apríl 2006 Almanna- og heilsumálaráðnum soljóðandi innlitsumbøn:

> „Søkt verður um alment innlit í tað skriv ella tey skriv, sum B, aðalstjóri, hevur sent Almanna- og heilsumálaráðnum/landsstýrismanninum ella landsstýrinum um vantandi fólk/arbeiðsorku og vantandi kunngerðir, gl. lógir etc.
>
> Í miðlunum í gjár, 4.4., segði hon, at hon hevði gjørt vart við ónøgd sína. Vit rokna við, at tað er gjørt skrivliga.
>
> Vit arbeiða víðari við málinum, og fyri at kunna fara víðari er neyðugt, at vit rættiliga skjótt kunnu fáa innlit í relevant skjøl."

Almanna- og heilsumálaráðið sýtti umbønini við telduposti, 5. apríl 2006, sum var soljóðandi:

> „Tað skrivliga tilfar, ið B aðalstjóri hevur latið landsstýrismanninum um tey viðurskifti, ið víst verður til niðanfyri, er tilfar til innanhýsis nýtslu. Við heimild í § 7 í løgtingslóg um innlit í fyrisitingina, ið er endurgivin niðanfyri, hava vit valgt at nokta tær innlit í hetta tilfar."

Eftir áheitan frá A viðgjørdi Almanna- og heilsumálaráðið innlitsumbønina av nýggjum og sendi honum, 16. apríl 2006, soljóðandi teldupost:

> „Avgerðin um at sýta Útvarpi Føroya innlit í „tað skriv ella tey skriv,

sum B, aðalstjóri, hevur sent Almanna- og heilsumálaráðnum/ landsstýrismanninum ella landsstýrinum um vantandi fólk/ arbeiðsorku og vantandi kunngerðir, gl. lógir etc" (sí umbøn frá D tíðindamanni og svar frá undirritaða sama dag kl. 16:31 í telduposti niðanfyri) stendur við.

Eg havi umhugsað um tilfarið kanska kundi sigast at vera fevnt av § 8, nr. 3 í lóg um innlit í fyrisitingina, og eri komin til ta niðurstøðu at so er ikki (reglan er endurgivin niðanfyri). Tilfarið, ið B aðalstjóri hevur handað landsstýrismanninum í hesum máli er ikki framleitt fyri lýsa ella prógva faktisk viðurskifti í sambandi við viðgerðina av einum máli, sum AHR varðar av – tað er framleitt í AHR sum ein liður í eini innanhýsis umrøðu av hvussu AHR kann mennast, og tí er tað ikki fevnt av § 8, nr. 3. Hetta sjónarmið verður stuðlað í „Offentlighedsloven med kommentar, John Vogter, Jurist- og økonomforbundets forlag, 1998, s. 189.

Avgerðin er endalig í fyrisitingini."

Almanna- og heilsumálaráðið hevur 19. mai 2006 vent sær til A við soljóðandi telduposti:

„Eftir at hava viðgjørt umbøn tykkara (sí niðanfyri) enn einaferð eri eg komin til ta niðurstøðu, at eg átti at kunnað tykkum um evt. onnur skjøl, ið vóru viðkomandi fyri tykkum, hóast hesi ikki passaðu beinleiðis til umbønina.

Soleiðis hevur landsstýrismaðurin í Almanna- og heilsumálum tann 28. februar 2006 sent løgmanni eitt bræv, ið eg haldi er viðkomandi fyri tykkum. Tað er skrásett sum skjal nr. 1 í máli nr. 200500204.

Um tit ynskja innlit í hetta bræv, so rokni eg við at hoyra frá tykkum aftur."

A hevur, 23. mai 2005, fingið innlit í nevnda skriv frá landsstýrismanninum til løgmann.

Almanna- og heilsumálaráðið hevur, 26. mai 2006, sent A soljóðandi teldupost:

„Eg má sanna, at mín fyrsta avgerð um ikki at veita tykkum innlit í tey brøv, ið B, táverandi aðalstjóri, hevði sent landsstýrismanninum um vantandi orkuna í AHR til at loysa neyðugar uppgávur so sum lógir og kunngerðir ikki var nøktandi.

Hóast skjølini eru innanhýsis skjøl sambært § 7 í ll. um innlit í fyrisitingina, so átti eg sambært § 11, stk. 1 at latið tykkum avrit av teimum upplýsingum í skjølunum, „ið eru umfatað av § 7 og § 10, nr. 1-4, um veruligar umstøður, sum eru av stórum týdningi fyri málið“. Um ikki annað, so átti eg at gjørt vart við, at eg hevði umhugsað sokallaðu „ekstraheringsskylduna“ sambært § 11 stk. 1.

Nú havi eg so bert strikað tær reglurnar, ið púra greitt eru metingar ella tilmæli hjá aðalstjóranum (altso ikki faktiskir upplýsingar), og latið alt hitt standa – hóast alt kanska ikki hevur líka stóran týdning fyri málið.

Gevið gætur, at tað skrivið, ið B vísir til at vera handað landsstýrismanninum 31. august 2005 (annað reglubrot í skrivi frá 5. september 2005) varð tikið aftur av henni og handað honum sum skrivið frá 5. september 2005. Tað finst soleiðis einki skriv frá 31. august 2005 í okkara journalskipan.“

## Partshoyring

Við skrivi, dagfest 4. mai 2006, varð klagan send Almanna- og heilsumálaráðnum til ummælis, eins og ráðið varð biðið um at lata umboðsmanninum til láns øll skjøl, sum viðvíkja innlitsumbønini, herundir eisini umrøddu frágreiðingina frá aðalstjóranum.

Við skrivi, dagfest 26. mai 2006, hevur Almanna- og heilsumálaráðið sent umboðsmanninum soljóðandi frágreiðing:

**„Ummæli av klagu frá A tíðindamanni um at AHR hevur noktað honum innlit í skriv frá táverandi aðalstjóra til ráðið/landsstýrismannin viðvíkjandi viðurskiftunum í ráðnum.**

Tygum hava í skrivi dagfest 4. mai 06 heitt á Almanna- og heilsumálaráðið (AHR) um at lata tygum eitt ummæli av klaguni frá A tíðindamanni um at AHR hevur noktað honum innlit í skriv frá táverandi aðalstjóra til ráðið/landsstýrismannin viðvíkjandi viðurskiftunum í ráðnum.

Frágreiðingin er skipað eftir skjølunum í máli nr. ..., ið er málið um umbønina frá D og A.

Øll viðkomandi skjøl eru hjáløgd frágreiðingini. Hesi finnast í máli nr. ... um flyting av málsøkjum og máli ..., ið er umbønin frá D og seinni A.

**Skjal 1, 5. apríl 2006 kl. 09.21**: D, tíðindamaður hjá Útvarpi Føroyum heitir á AHR um at fáa innlit í „Tað skriv ella tey skriv, sum B, aðalstjóri, hevur sent Almanna- og heilsumálaráðnum/landsstýrismanninum ella landsstýrinum um vantandi fólk/arbeiðsorku og vantandi kunngerðir, gl. lógir etc.“

**Skjal 2, 5. apríl 2006 kl. 16.31**: AHR svarar D, at tilfarið, ið B hevur latið landsstýrismanninum er til innanhýsis nýtslu, og grundgivið verður fyri avslagi við § 7 í 11. um innlit í fyrisitingina.

Tað eru bert 2 skjøl, ið passa til umbønina frá D. Tað eina er dagfest 5. september 2005 og skrásett sum skjal nr. 2 í málinum um flytan av málsøkjum og hitt skjalið er frá 2. september 2004, og er skrásett sum bilag til skjalið frá 5. september 2005.

**Skjal 3, 6. apríl kl. 16.13**: AHR váttar A, at AHR hevur móttikið teldupost, send ráðnum sama dag kl. 14.46, um at ÚF hevur kært avgerðina hjá AHR.

**Skjal 4, 16. apríl kl. 04.55**: AHR staðfestir avgerðina frá 5. apríl (skjal 2).

**Skjal 5, 19. mai kl. 17.53**: AHR ger umsøkjararnar varugar við eitt bræv frá landsstýrismanninum til løgmann (skjal 1 í málinum um flytan av málsøkjum), ið er viðkomandi fyri umsøkjararnar. Hóast brævið ikki beinleiðis er fevnt av umbønini frá teimum, so viðger brævið júst tað

málið, ið umsøkjararnir ynskja at verða kunnaðir um. Sambært § 7 í fyrisitingarlógini so skal ein fyrisitingarmyndugleiki í tørvandi mun veita vegleiðing og hjálp til persónar, sum venda sær til myndugleikan við spurningum innan málsøkið hjá myndugleikanum.

Skjal 6, 23. mai kl. 16.29: Avrit av brævinum frá landsstýrismanninum til løgmann verður sent útvarpinum eftir umbøn frá A í telduposti sama dag.

**Skjal 7, 26. mai kl. 11.46**: AHR sendir umsøkjarunum avrit av teimum upplýsingunum í báðum skrivunum frá aðalstjóranum til landsstýrismannin (skrásett sum skjal nr. 2 í málinum um flytan av málsøkjum), ið AHR sambært § 11, stk. 1 í ll. um innlit í fyrisitingina hevur skyldu til at útflýggja hóast ásetingarnar í § 7. Tær reglur, ið púra greitt vórðu metingar og tilmæli hjá aðalstjóranum vóru strikaðar yvir.

**Skjal 8, 26. mai kl. 15.01**: A takkar fyri móttøku."

Við skrivi, dagfest 30. mai 2006, vórðu viðmerkingarnar sendar klagaranum til ummælis. Tá umboðsmaðurin einki hevði frætt aftur frá klagaranum, boðaði umboðsmaðurin við skrivi, dagfest 27. juni 2006, pørtunum frá, at umboðsmaðurin fór undir endaligu viðgerðina av málinum.

## *Niðurstøða*

*Sambært meginregluni í § 5 í innlitslógini (løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina, sum broytt við løgtingslóg nr. 76 frá 8. mai 2001) eru øll skjøl fevnd av rættinum til skjalainnlit. Tó eru ásett nøkur undantøk. Eitt av hesum undantøkum er § 7, ið fevnir um innanhýsis arbeiðsskjøl, tvs. skjøl, sum eru gjørd av einum myndugleika til egna nýtslu, og sum eru undantikin rættinum til skjalainnlit. Í § 8 er so ásett, at nøkur ávís innanhýsis arbeiðsskjøl kortini eru fevnd av innliti, og í § 11 er ásett, at upplýsingar í innanhýsis arbeiðsskjølum um veruligu umstøðurnar, sum eru av stórum týdningi fyri eitt mál, hóast ásetingina í § 7 eru fevndar av innliti, um hesar upplýsingar ikki eru at finna aðrastaðni.*

*Eg havi frá Almanna- og heilsumálaráðnum fingið skrivini, dagfest ávikavist 2. sept. 2004 og 5. sept. 2005, sum fyrrverandi aðalstjórin skrivaði til landsstýrismannin um ymisk viðurskifti í ráðnum. Tað er eftir innihaldinum í skrivunum eingin ivi um, at talan er um innanhýsis skjøl, ið eru fevnd av § 7 í innlitslógini. Ivi kann neyvan heldur vera um, at upplýsingarnar í hesum skjølum um umstøðurnar í Almanna- og heilsumálaráðnum, og sum høvdu við sær, at aðalstjórin seinni segði seg úr starvi sínum, mugu metast at vera av so mikið stórum týdningi, at hesar upplýsingar eru fevndar av ásetingini í § 11, og at hesar upplýsingar tí skulu latast umsøkjaranum, um ikki aðrar ásetingar í lógini forða hesum.*

*Umsóknin um skjalainnlit er latin ráðnum, 5. apríl 2006, og sama dag sýtir ráðið umbønini vísandi til § 7 í lógini. Tað sær ikki út til, at ráðið hevur umhugsað hinar umrøddu greinarnar í lógini, og er hetta ikki nøktandi.*

*Í svari sínum 16. apríl sigur ráðið seg hava umhugsað, hvørt skjølini vóru fevnd av rættinum til innlit sambært § 8, nr. 3 í lógini, men er komið til ta niðurstøðu, at so er ikki. Eg eri samd við ráðnum í, at umrøddu skjølini ikki eru fevnd av § 8, nr. 3, tí at hesi umframt at lýsa støðuna í ráðnum eisini innihalda metingar og uppskot frá táverandi aðalstjóranum. Henda fatan er eisini í tráð við Justitsministeriets vejledning om lov om offentlighed i forvaltningen, sum á hesum øki er einsljóðandi og fyrimyndin fyri okkara lóg, og har tað undir pkt. 28 stendur soleiðis:*

> *„Visse undersøgelsesrapporter m.v.*
> *Ifølge bestemmelsen i § 8, nr. 3, skal også selvstændige dokumenter, der udarbejdes af en myndighed for at tilvejebringe bevismæssig ella anden tilsvarende klarhed med hensyn til en sags faktiske omstændigheder, og som ikke tillige indeholder en vurderende stillingtagen (mín undirstriking), undergives lovens almindelige regler om aktindsigt..."*

*Eftir at hava fingið klaguna til ummælis, tók ráðið málið uppaftur til viðgerðar tvær ferðir afturat.*

*19. mai 2006 boðaði ráðið umsøkjaranum frá, at ráðið hevði viðgjørt málið enn einaferð, og vísir í hesum sambandi á eitt annað skriv, sum kann hava áhuga hjá fjølmiðlinum í sambandi við hetta málið. Innlit er seinni givið í hetta skrivi.*

*Tann 26. mai boðaði ráðið tíðindamanninum frá, at viðgerðin hjá ráðnum ikki hevði verið nøktandi, og innlit bleiv samstundis givið í upplýsingarnar um veruligu umstøðurnar í umrøddu skjølunum samsvarandi § 11 í lógini.*

*Eftir at hava kannað umrøddu skjølini havi eg ongar viðmerkingar til hesa seinastu avgerðina, men eg haldi tað kortini ikki vera nøktandi, at ráðið ikki kemur til hesa niðurstøðuna fyrr enn í fjórðu atløgu, og fari eg tí at geva ráðnum eina átalu fyri handfaringina av hesum málinum. Eg skal í hesum sambandi eisini vísa á týdningin av, at innlitsumbønir verða avgreiddar so skjótt sum til ber.*

*Av tí, at talan var um skjøl, sum ein av landsins hægstu embætismonnum hevði gjørt fyri at lýsa trupulleikarnar í Almanna- og heilsumálaráðnum, og sum seinni førdi til, at aðalstjórin segði seg úr starvi, haldi eg, at ráðið eisini beinanvegin átti at havt umhugsað, hvørt innlit skuldi verið givið í skjalið í sínari heild sambært regluni um meirinnlit í § 4, stk. 1, 2. pkt., í tann mun at onnur lóglig atlit ikki forðaðu fyri hesum.*

*Burtursæð frá givnu átaluni geri eg ikki meira við hetta málið.*

# *20. Almannamál*

## 20.1 Drúgva málsviðgerðartíðin á Almannastovuni av umsókn um hækkan av fyritíðarpensjón

Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um drúgva viðgerðartíð á Almannastovuni av eini umsókn um hækking av fyritíðarpensjón. Umboðsmaðurin hevði einki at viðmerkja til, at tað gingu tríggir mánaðir frá tí at Almannastovan móttók umsóknina, til hon sendi Vanlukkutryggingarráðnum, sum tá hevði avgerðarmyndugleikan í tílíkum málum, tilráðing sína í málinum. Eftir at avgerðarheimildin í fyritíðarpensjónsmálum 1. januar 2006 varð flutt til Almannastovuna, sendi Vanlukkutryggingarráðið øll óavgreidd mál aftur til Almannastovuna. Klagarin fekk tó ikki fyrr enn 28. juni 2006 játtandi svar uppá umsóknina. Umboðsmaðurin helt tað avgjørt ikki vera nøktandi, at tað gingu knappir seks mánaðir, frá tí avgerðarmyndugleikin varð fluttur Almannastovuni, til avgerðin varð tikin. Tá Almannastovan sendi ráðnum tilráðingina, hevði hon viðgjørt málið liðugt, og eftir at málið varð sent Almannastovuni aftur, sást einki meira at vera hent í málinum. Tað hevði tí fyri umboðsmanninum at síggja verið ein avgreiðsluspurningur hjá Almannastovuni at taka avgerðina. Umboðsmaðurin gav Almannastovuni eina átalu fyri óneyðuga drúgva viðgerðartíð. (J. nr. 200600044).

## Klagan

Viðv. klagu um drúgva málsviðgerðartíð á Almannastovuni av umsókn um hækking av fyritíðarpensjón

Umboðsmaðurin hevur, 16. mai 2006, móttikið soljóðandi klagu:

„Fari við hesum at heita á tygum um vegna konu mína A, ... at taka upp og fáa skundað undir niðanfyri nevnda mál um umsókn um hækkaða fyritíðarpensjón, sum nú hevur verið til viðgerð síðan, ja, tað gongur meira og minni fram av hjáløgdu skjølum.

A fekk fyrst í 2004 (haldi eg) tillutaða lægstu fyritíðarpensjón vegna

sína vánaligu almennu heilsustøðu. Afturat hesum fekk hon staðfest … .

Hesa avgerð kærdi eg hennara vegna í mei 2004 og hava vit síðan, tykir mær, fingið ein slutur fyri ein slatur hvørja ferð spurt er eftir, hvar málið er komið. Tími ikki at fara út í æsir við hesi umtalu men kann staðfesta, at í sept-okt 2004 varð nýggj umsókn skrivað. Henda fór av misgáum til læknan og varð hagani send 25. mars 2005 til Almannastovuna, sum páheldur at tey hava fingið hana í juni mánaða 2005.

Í september 2005 fer málið av Almannastovuni viðgjørt (og viðmælt fekk eg at vita) til Vanlukkutryggingarráðið, sum tann 8. desember sigur A frá at hon hevur 2 vikur at gera viðmerkingar. Næsta, hon frættir er 31. januar 2006, har hon frá sama stað fær at vita at málið er sent aftur til Almannastovuna og at um einar 2 mánaðar kann hon av nýggjum fara undir at spyrja eftir málinum. Nú er komið út í hálvan mei mánaða og hon hevur hvørki hoyrt orð ella eið!

Tað sýnist at vera ávís óvissa um dagfesting av umsóknini og nær Almannastovan hevur móttikið umsóknina. Loyvi mær at halda, at málið eigur at ganga í minsta lagið aftur til kæruna (mei 2004), ella kanska heldur frá fyrsta degi, søkt varð!

Uttan mun til, hvat úrslit komið verður fram til, er tað ófatiliga ørkymlandi at hava hesa kensluna av at vera dottin niður ímillum onkustaðni og at tað ikki letur seg gera at fáa eitt líkinda svar!“

## Málsgongd

Víst verður til frágreiðingina frá Almannastovuni til umboðsmannin, sum er endurgivin niðanfyri.

## Partshoyring

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og við skrivi, dagfest 18. mai 2006, varð klagan send Almannastovuni við áheitan um at lata umboðsmanninum eina frágreiðing um hetta málið, eins

og Almannastovan varð biðin um at lata umboðsmanninum øll skjølini í málinum til láns.

Tá umboðsmaðurin einki hevði frætt frá Almannastovuni, eftir at ummælisfreistin uppá 4 vikur var farin, sendi umboðsmaðurin við skrivi, dagfest 22. juni 2006, eina áminning til Almannastovuna.

Við skrivi, dagfest 4. juli 2006, hevur Almannastovan latið umboðsmanninum soljóðandi frágreiðing um málið:

> **„Viðvíkjandi klaguni frá B, dagfest 14. mai 2006**
>
> Í skrivi tann 18. mai 2006 verður Almannastovan biðin um at senda skjøl og koma við frágeiðing um viðgerðina av umsóknunum hjá A um hækkan av fyritíðarpensión og um hjálp til fótarøkt.
>
> Av tí at talan um er tvær umsóknir, verður málslýsingin býtt sundir í tvey.
>
> **Lýsing av málsgongdini um hækkan av fyritíðarpensión**
> Tann 3. juni 2005 móttók Almannastovan umsókn frá A um hækkan av fyritíðarpensiónini. Tann 9. juni 2005 boðar B í teldubrævi frá, at C, kommunulækni, hevði sagt honum, at hann hevði sent Almannastovuni umsókn um hækkan av fyritíðarpensión saman við umsókn um fótarøkt.
>
> Eftir móttøkuni av umsóknini bað Almannastovan í skrivi tann 15. juni 2005 kommunulæknan um frágreiðing. Avrit av hesum varð send til umsøkjaran til kunningar. Hesa frágreiðing móttók Almannastovan 28. juni 2005. Síðan varð ein tilráðing gjørd, henda er dagfest 17. august 2005, og varð umsóknin – saman við tilráðingini – síðan løgd fyri Endurbúgvingar- og Pensiónsráðið tann 5. september 2005, har ein tilráðing varð gjørd til Vanlukkutryggingarráðið um at játta miðal fyritíðarpensión. Henda tilráðing varð send Ráðnum tann 26. september 2005. Hetta var eisini fráboðað A í skrivi dagfest 26. september 2005.

Tann 2. november 2005 spyr B í skrivi til Almannastovuna um skriftliga frágreiðing um, hvar umsóknin um fyritíðarpensión var strandað. Hesin fyrispurningur varð svaraður í skrivi tann 7. november 2005. Í skrivinum varð millum annað sagt, at umsóknin var send til Vanlukkutryggingarráðið, og at svar var ikki koma haðanífrá.

Í sambandi við at avgerðarmyndugleikin varð fluttur frá Vanlukkutryggingarráðnum til Almannastovuna frá 1. januar 2006, boðaði Vanlukkutryggingarráðið í skrivi tann 31. januar 2006 A frá, at nú var umsókn hennara send aftur til Almannastovuna til støðutakan. Í skrivinum varð sagt, at broytingin kom at fáa avleiðingar fyri viðgerðartíðina, men at viðkomandi kundi venda sær til Almannastovuna um hetta.

Almannastovan hevur síðan viðgjørt umsóknina og tikið avgerð, sum er fráboðað A 28. juni 2006.

**Lýsing av málsgongdini um umsóknina um fótarøkt**
Almannastovan móttók tann 12. apríl 2005 umsókn um fótarøkt. Tann 15. juni 2005 sendi Almannastovan skriv til A har biðið varð um útreiðsluskjøl í sambandi við viðgerðina av umsóknini.

Í sambandi við fyrispurning frá B tann 2. november 2005 avgjørdi Almannstovan at kanna um gjørligt var at veita fótarøkt sambært § 18, stk. 5. Niðurstøðan varð, at tað var ikki grundarlag til tess. Sambært uppritinum frá 24. november 2005 fekk B boðini um, at neyðugt var at lata inn útreiðsluskjøl fyri at umsóknin kundi verða viðgjørd, hetta sambært § 12 í almannapensiónslógin og kunngerðini um persónliga viðbót.

**Viðmerkingar til klaguna**
Í klaguni verður sagt, at umsóknin var send av kommunulækna tann 25. mars 2005, men sambært skrásetingini hjá Almannastovuni, so er hon skrásett tann 3. juni. 2005. Almannastovan hevur ikki grundarlag at halda, at umsóknin er innkomin áðrenn, tí tað er einki, ið bendir á, at umsóknin hevur ligið ikki skrásett á Almannastovuni.

Viðvíkjandi kæruna um lægstu fyritíðarpensión hevur Almannastova ongar viðmerkingar, tá ið tað er ein avgerð frá Vanlukkutryggingarráðnum, sum kundi kærast til Den Sociale Ankestyrelse.

Almannastovan skilur væl, at tað kann verða ørkymlandi fyri A at fáa kunning um, at umsóknin ikki skal verða avgreidd av Vanlukkutryggingarráðnum, men av Almannastovuni, men var hetta orsaka av broytingum í almannapensiónslógini.

Ført verður fram, at A ikki hevur fingið svar um umsóknina um fótarøkt. Almannastovan hevur biðið um útreiðsluskjøl; men eru hesi ongantíð móttikin, og tessvegna hevur Almannastovan ikki kunna viðgjørt umsóknina.

**Niðurstøða**
Samanumtikið metir Almannastovan, at viðgerðin er farin fram á haldgóðum fyrisitingarligum grundarlagi.

Umsóknin um fyritíðarpensión hevur gingið tað vanligu gongdina. Mett verður, at frá tí at hon kom inn, og til hon var avgreidd til Vanlukkutrygginarráðið hevur verið á nøktandi hátt. Talan var um 4 mánaðir. Eftir at hava ligið í 3 mánaðir til viðgerðar hjá Vanlukkutryggingarráðnum, var umsóknin send aftur til Almannatovuna. Hetta hevur sjálvsagt longt um viðgerðartíðina.

Í sambandi við lógarbroytingina av almannapensiónslógini hevði Almannastovan vænta, at umsóknir, ið Vanlukkutrygginarráðið hevði fingið til viðgerðar áðrenn lógarbroytingina, vóru avgreiddar av Ráðnum; men tað metti Ráðið seg ikki hava heimild til, tí eingin skiftistíð var ásett í lógini. Tessvegna fekk Almannastovan øll tey mál sendandi aftur, ið Ráðið ikki hevði avgreitt. Talan var um 100 mál.

At fáa 100 mál sendandi aftur, tekur sjálvsagt tíð at avgreiða, og tíanverri hevur hetta tikið longri tíð enn Almamastovan vónaði, men at fáa eina nýggja skipan at virka hevur tikið tíð. Hetta er høvuðsorsøkin til, at málið hjá A hevur tikið hesa tíð, síðan málið var sent aftur til Almannastovuna.

> At viðurskiftini hava verið soleiðis, at avgreiðslan av málinum hevur verið ov drúgv, harmar Almannastovuna.
>
> Viðvíkjandi umsóknini um fótarøkt verður mett, at viðgerðin hevur verið nøktandi. Viðkomandi hevur fingið fráboðan um, at neyðugt er við útreiðsluskjølum, fyri at umsóknin kann verða endaliga avgreidd.
>
> Hjálagt avrit av øllum skjølum, sum eru í málinum í sambandi við umsókn um hækkan av fyritíðarpensión og fótarøkt.
>
> Upplýsast skal at fleiri skjøl eru í málinum, men hava hesi við ta fyrstu umsóknina um fyritíðarpensión at gera. Ynskir umboðsmaðurin innlit í hesi, vinarliga boði frá.“

Við skrivi, dagfest 6. juli 2006, vórðu hesar viðmerkingar sendar klagaranum til ummælis. Í skrivinum varð gjørt vart við, at umboðsmaðurin sambært § 6, stk. 3 í umboðsmanslógini ikki kann taka støðu til sjálva avgerðina hjá Almannastovuni, dagfest 28. juni 2006, fyrr enn hendan er kærd til Kærunevndina í almannamálum, og kærunevndin hevur tikið avgerð.

Tá umboðsmaðurin einki hevði frætt aftur frá klagaranum, boðaði umboðsmaðurin við skrivi, dagfest 24. august 2006, pørtunum frá, at umboðsmaðurin fór undir endaligu viðgerðina av málinum.

## *Niðurstøða*

*Klagan snýr seg um viðgerðartíðina á Almannastovuni av eini umsókn um hækking av fyritíðarpensjón. Tá klagað varð til mín, vóru 11 mánaðir gingnir, síðani Almannastovan hevði móttikið umsóknina, og klagarin hevði tá ikki fingið svar uppá umsóknina.*

*Sambært skjølunum í málinum og frágreiðingini hjá Almannastovuni, hevur Almannastovan móttikið umsóknina 3. juni 2005 og sent Vanlukkutryggingarráðnum, sum tá hevði avgerðarmyndugleikan í tílíkum málum, sína tilráðing 26. september 2005. Eg havi einki at viðmerkja til viðgerðartíðina í hesum føri.*

*1. januar 2006 varð avgerðarheimildin í fyritíðarpensjónsmálum flutt frá Vanlukkutryggingarráðnum til Almannastovuna. Hetta var m.a. grundað á eitt ynski um at stytta viðgerðartíðina í hvørjum einstøkum máli. Broytingin hevði við sær, at Vanlukkutryggingarráðið sendi øll óavgreidd mál aftur til Almannastovuna, herímillum málið hjá A. A fær tó ikki fyrr enn 28. juni 2006 svar frá Almannastovuni um, at umsóknin verður játtað. Hetta er ein góðan mánað eftir at klagað er til mín.*

*Eg haldi tað avgjørt ikki vera nøktandi, at tað ganga knappir seks mánaðir, frá tí avgerðarmyndugleikin verður fluttur Almannastovuni, til avgerðin verður tikin. Almannastovan hevði, tá hon sendi Vanlukkutryggingarráðnum sína tilráðing, viðgjørt málið liðugt, og eftir at Almannastovan fekk málið aftur, sæst einki meira at vera hent í málinum. Tað hevur tí fyri mær at síggja verið ein avgreiðsluspurningur hjá Almannastovuni at taka avgerðina. Hóast Almannastovan fekk eini 100 mál av sama slag sendandi aftur frá Vanlukkutryggingarráðnum, so haldi eg viðgerðartíðina vera alt ov drúgva. Alt bendir eisini á, at tað kemur ikki gongd á málið aftur, fyrr enn klagað verður til mín.*

*Eg fari tí at geva Almannastovuni eina átalu fyri óneyðuga drúgva viðgerðartíð.*

*Í klaguni verður nevnt, at ósemja er um, nær umsóknin er latin Almannastovuni. Eftir at hava kannað skjølini, kann staðfestast, at sjálv umsóknin er ikki dagfest, men stemplað at vera móttikin á Almannastovuni 3. juni 2005. Eg haldi ikki grundarlag vera fyri at gera nakað við hendan spurningin.*

*Burtursæð frá átaluni fyri drúgva viðgerðartíð geri eg ikki meira við hetta málið.*

# *22. Skattur og avgjøld v.m.*

## 22.1 Viðgerðin av umsókn um eftirgeving av skatti

Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um viðgerðina hjá Skuldarumskipanarnevndini (Føroya Kærustovni) og Vágs kommunu av einari umsókn um eftirgeving av skatti. Umboðsmaðurin helt ikki, at avgerðin hjá Skuldarumskipanarnevndini bygdi á annað enn saklig atlit, og hevði tí ongar viðmerkingar til hesa. Hinvegin helt umboðsmaðurin ikki viðgerðina hjá Vágs kommunu vera í samsvari við lóggávuna, tí sambært skjølunum og frágreiðingini frá kommununi sást einki til nakra málsfyrireiking ella veruliga viðgerð av málinum. Einki var gjørt fyri at lýsa umstøðurnar í málinum, eins og eingin grundgeving var fyri avgerðini um at nokta umsóknini. Umboðsmaðurin helt tí avgerðina vera at meta sum ógilduga, og gav kommununi eina álvarsliga átalu fyri handfaringina. Eisini mælti umboðsmaðurin kommununi til at taka málið uppaftur til viðgerðar av nýggjum. (J. nr. 200600020).

## Klagan
viðvíkjandi klagu um viðgerðina av umsókn um eftirgeving av skatti

Við skrivi, dagfest 16. februar 2006, hevur A sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

„**Viðv. Umsókn um skattaeftirgevan í … kommunu.**
Undirritaði ið er føddur … vil hervið heita á Løgtingsins Umboðsmann, um at kanna, hví í mínar umsóknir um eftirgevan av gamlari skattaskuld ikki blíva viðgjørdar/eftirlíkaðar á sama hátt, sum hjá hinum nógvu umsøkjaraðum í … kommunu.

Hetta er triða umsóknin, ið verður avvíst av Vágs kommunnu, og hví onki svar nækrantí er komi frá Vágs kommunu uppá umsókninar í 6-8 ár.

Skal einki skrivligt svar koma?, við grundgevingum, hví tað verður avvíst.

Viðlagt eru brøv í hesum sambandi.“

**Málsgongd**
Við umsóknarblaði, dagfest 3. aug. 2005, hevur A søkt Føroya Kærustovn, Skuldarumskipanarnevndina um umskipan av skattaskuld. Um orsøkina verður greitt soleiðis frá í umsóknini:

> „Orsøkin til hesa skattaskuld sum er íkomin skildast fyri mær ókunnu. Eg var begyntir at betala av skuldini, men so hendi hetta.
>
> Eg bygdi …. í … og sjálvandi lúkaði eg tær treytir sum vóru lagdar við byggiloyvinum. Men 27. jan. 1993 kom eg í F.B. at taka pengar út fyri ein maskindeil, ca. 1800 kr, tá bleiv bókin skrikt úr hondini á mær av ... bankakvinnu og havi eg ikki sæð bókina síðan, á henni stóðu … milliónir.
>
> Seinri bleiv skipi eisini tikið frá mær. Tað var ein dyggur smeitur fyri meg. Seinri fekk eg so eisini blóðtøpp í hjarta og havi eg sostatt ikki verið arbeiðsførur síðan. Ta er grundin til at eg ikki eri førur fyri at gjalda hesa skattaskuld.“

Við skrivi, dagfest 17. aug. 2005, hevur Føroya Kærustovnur sent klagarnum soljóðandi móttøkuváttan:

> „**Viðvíkjandi umsókn tygara um eftirgeving av skatti.**
> Váttað verður hervið, at umsókn tygara um eftirgeving av skatti er móttikin á Kærustovninum tann 9. august 2005.
>
> Umsóknin er í dag send Toll- og Skattstovu Føroya til innheintan av nærri upplýsingum við áheitan um, at hesar verða sendar Kærustovninum innan 19. september 2005.
>
> Tygum frætta nærri frá Kærustovninum, tá upplýsingarnar frá Toll- og Skattstova Føroya fyriliggja.“

Við skrivi, dagfest 17. aug. 2005, hevur Føroya Kærustovnur biðið Toll- og Skattstovu Føroya, Stýrið, um skjølini og eina frágreiðing um málið. Skrivið er soljóðandi:

**„Viðvíkjandi umsókn frá A, ... um eftirgeving/ av skatti.**
Føroya Kærustovnur hevur tann 9. august 2005 móttikið umsókn frá omanfyri nevnda um eftirgeving av skatti.

Avrit av hesi umsókn verður send tykkum við áheitan um at útvega øll skjøl, sum eru viðkomandi fyri málið, gera eina greining av skuld hansara og eina frágreiðing um gongdina í málinum.

Toll- og Skattstova Føroya verður biðin um at upplýsa um alla skuld umsøkjarans, hvat slag av skuld talan er um, hvat ár skuldin stavar frá og hvat upprunaskuldin var. Upplýst verður eisini, um nakað av skuldini er goldin og um so er hvussu. Harafturat verður upplýst, um pant er tikið í ogn umsøkjarans fyri nakað av skuldini. Eisini eigur eitt uppbýti av skuldini í lands- og kommunuskatt, rentur o.s.fr. at verða gjørt.

Hevur Toll- og Skattstova Føroya annars nakað serligt at viðmerkja til málið, ynskja vit eisini at fáa tað upplýst.

Umbidnu upplýsingar skulu verða Kærustovninum í hendi innan 19. september 2005.“

Við skrivi, dagfest 16. sept. 2005, hevur Toll- og Skattstova Føroya sent Føroya Kærustovni soljóðandi frágreiðing:

**„Viðvíkjandi umsókn frá A, ..., um eftirgevin av skatti, tykkara J.nr. 05-05-26**

Vísandi til skriv tykkara frá 17. august 2005 verður her latin frágreiðing um eftirstøðuna hjá omanfyri nevnda.

Toll- og Skattstova Føroya er biðin at upplýsa

- alla skuld umsøkjarans, hvat slag av skuld talan er um, hvat ár skuldin stavar frá og hvat upprunaskuldin var, um nakað av skuldini er goldið og um so er, hvussu
- um pant er tikið í ogn umsøkjarans fyri nakað av skuldini

- uppbýti av skuldini í lands- og kommunuskatt, rentur
- og geva eina frágreiðing um gongdina í málinum

*ad Skuld umsøkjarans:*

Saldo pr. 9. september 2005:

| *Kravslag:* | *Ár:* | *Uppruna krav:* | *Goldið:* | *Saldo:* |
|---|---|---|---|---|
| Írestandi skattur | 1988 | 142.448,00 | 80.104,45 | 62.343,55 |
| Írestandi skattur | 1989 | 124.447,00 | 81.512,00 | 42.935,00 |
| Írestandi skattur | 1990 | 56.483,00 | 8.789,00 | 47.694,00 |
| Írestandi skattur | 1991 | 32.194,00 | 0,00 | 32.194,00 |
| Írestandi skattur | 1994 | 10.788,00 | 3.596,00 | 7.192,00 |
| Írestandi skattur | 1997 | 6.358,00 | 616,00 | 5.742,00 |
| Morarenta | 1993 | 23.921,29 | 0,00 | 23.921,29 |
| Morarenta | 1994 | 33.117,25 | 0,00 | 33.117,25 |
| Morarenta | 1995 | 31.547,23 | 0,00 | 31.547,23 |
| Morarenta | 1996 | 30.987,28 | 0,00 | 30.987,28 |
| **Íalt** | | **492.291,05** | **174.617,45** | **317.673,60** |

Hjálagt er kontoavrit úr Innkrevjingarskipanini, sí skjal nr. 1.
*ad Pant í ogn umsøkjarans:*
Pant er tikið í matr. … í Vági. Seinast pantað 13.02.2004
Hjálagt er avrit úr pantifútabók 1007/26, sí skjal nr. 2
*ad Uppbýti av eftirstøðuni í lands- og kommunuskatt:*
Uppbýti av skattaeftirstøðu í lands-, kommunu- og kirkjuskatt:

| *Kravslag:* | *Ár:* | *Eftirstøða* | *Lands-* | *Kommunu-* | *Kirkju-* |
|---|---|---|---|---|---|
| Írestandi skattur | 1988 | 62.343,55 | 43.853,65 | 18.221,94 | 267,97 |
| Írestandi skattur | 1989 | 42.935,00 | 29.887,51 | 12.858,40 | 189,09 |
| Írestandi skattur | 1990 | 47.694,00 | 31.809,82 | 15.653,98 | 230,20 |
| Írestandi skattur | 1991 | 32.194,00 | 19.984,48 | 12.032,26 | 177,26 |
| Írestandi skattur | 1994 | 7.192,00 | 2.437,17 | 4.702,42 | 52,41 |
| Írestandi skattur | 1997 | 5.742,00 | 1.623,36 | 4.074,35 | 44,29 |
| **Íalt** | | **198.100,55** | **129.595,99** | **67.543,35** | **961,22** |

Hjálagt er sundurgreinað útrokning av býtinum, sí skjal nr. 4 a – f.

Rentueftirstøða:
Morarentur 1993-1996 í alt kr. 119.573,05

*ad Gongdin í málinum:*

Um gongdina viðvíkjandi innheinting gevur Suðuroyar Øki hesa frágreiðing:

> „A hevur verið í eftirstøðu síðan 1988. Tann 4. juli 1997 hevur Føroya Landsstýri sent umsøkjaranum skriv, har samtykt er, at steðga innheintingini og at pant skal takast fyri skuldina og rentutilskrivingin skal steðga.“
>
> Hava tit brúk fyri fleiri upplýsingum ella hava tit spurningar vinarliga setið tykkum í samband við undirritaða.“

Við skrivi, dagfest 19. sept. 2005, hevur Føroya Kærustovnur sent Vágs kommunu soljóðandi skriv:

> **„Viðvíkjandi umsókn um eftirgeving av lands- og kommunuskatti.**
> Kærustovnurin hevur móttikið umsókn um eftirgeving/útseting av lands- og kommunuskatti frá A, ....
>
> Í hesum sambandi hevur Kærustovnurin innheintað upplýsingar frá Toll- og Skattstovu Føroya. Hesar verða saman við umsóknini sendar tykkum til støðutakan viðvíkjandi kommunuskattinum.
>
> Fyri at fáa eina heildarmynd av fíggjarstøðu umsøkjarans, verður mett rættast at bíða við viðgerðini í Skuldarumskipanarnevndini, til kommunan hevur tikið avgerð um kommunuskattin.
>
> Kærustovnurin væntar sostatt at frætta aftur frá tykkum, so skjótt sum tit hava tikið støðu til kommunuskattin og helst innan 14. oktober 2005.“

Við skrivi, dagfest 19. sept. 2005, hevur Føroya Kærustovnur eisini

sent frágreiðingina frá Toll- og Skattstovu Føroya, Stýrinum, til klagaran til ummælis. Skrivið er soljóðandi:

> „**Viðvíkjandi umsókn tygara um eftirgeving av lands- og kommunuskatti.**
> Kærustovnurin hevur frá Toll- og Skattstovu Føroya, Stýrinum móttikið frágreiðing og upplýsingar um skuld tygara.
>
> Frágreiðingin, dagfest 16. september 2005 verður send tygum til kunningar og møguligar viðmerkingar. Somuleiðis verður sent yvirlit yvir skjølini, sum eru móttikin í málinum. Eru tað skjøl, nevnd á yvirlitinum, ið tygum ynskja avrit av, frætta vit fegin aftur.
>
> Hava tygum viðmerkingar til upplýsingarnar frá Toll- og Skattstovu Føroya, verða tygum biðin um skrivliga at lata okkum viðmerkingar tygara innan 3. oktober 2005.
>
> Er ikki hoyrt frá tygum innan nevndu freist, verður gingið út frá, at tygum ikki hava fleiri viðmerkingar til málið.
>
> Umsóknin um eftirgeving av kommunuskatti verður síðan saman við innkomnu skjølunum send ?kommunu til viðgerðar. Tá kommunan hevur tikið støðu, verður umsóknin um eftirgeving av landsskatti fyrireikað at leggja fyri Skuldarumskipanarnevndina til avgerðar.
>
> Miðað verður eftir at fáa málið lagt fyri Skuldarumskipanarnevndina innan 3 mánaðir. Er tað soleiðis, at tygum ynskja at møta á fundi hjá Skuldarumskipanarnevndini, verða tygum biðin um at siga skrivstovu okkara frá hesum innan áður nevndu freist.“

Við skrivi, dagfest 27. sept. 2005, hevur Vágs kommuna sent Føroya Kærustovni soljóðandi fráboðan:

> „**Viðv. umsókn um eftirgeving av skatti hjá A ….**
> Sigast skal frá, at málið verður viðgjørt á býráðsfundi tann 18. okt. 05. og svar verður sent tykkum tann 19. okt 05.“

Við skrivi, dagfest 19. okt. 2005, hevur Vágs kommuna sent Føroya Kærustovni soljóðandi fráboðan:

> „Borgarstjórin legði fram, á býráðsfundi 18. oktober 2005 til viðgerðar, skriv d.f. 19. september 2005 viðv. umsókn frá A, ... um eftirgeving av lands- og kommunuskatti.
>
> Møtt á fund vóru: ....
> Býráðið samtykti, við 8 atkvøðum ímótur og 1 atkvøðu fyri, ikki at eftirgeva skatt.“

Við skrivi, dagfest 18. jan. 2005, hevur Føroya Kærustovnur, Skuldarumskipanarnevndin sent klagaranum soljóðandi avgerð:

> **„Viðvíkjandi umsókn tygara um eftirgeving av skatti og rentum.**
> Mál tygara varð lagt fyri Skuldarumskipanarnevndina tann 9. januar 2006.
>
> **Nevndin samtykti ikki at ganga umsóknini á møti.**
>
> Tá mett verður, um persónur kann fáa skuldarumskipan, verður ein fíggjarlig meting gjørd. Skuldin, ið er fevnd av § 2 í lógini um skuldarumskipan, kann eftir umsókn umskipast, um skuldarin prógvar, at hann ikki er førur fyri og innan fyri næstu árini eingi útlit hevur fyri at kunna lúka sínar gjaldskyldur til landskassan, og viðurskiftini hjá skuldaranum og umstøðurnar annars tala fyri hesum, smb. § 3, stk. 1, nr. 1 og 2.
>
> Av viðmerkingunum til lógina sæst, at í samsvari við vanligar reglur í sambandi við skuldarumskipan kann skuld, sum er tryggja við veð, sum meginregla ikki eftirgevast. Tað er ongin serlig orðsøk í hesum málinum til at víkja frá hesi meginreglu.
>
> Nevndin metti at avgerðin hjá Fíggjarmálastýrinum tann 4. juli 1997, har samtykt varð, at steðga innheintingini, at steðga rentutilskrivingini og at taka pant fyri skuldina í húsinum hjá konuni var rímulig. Nevndin metti, at tygum lúka ikki treytirnar fyri at fáa skuldarumskipan eftir hesi

lógini, tí tygum longu hava fingið skuldina umskipaða og veð er fingið fyri skuldina.

Sagt verður sagt frá, at Vágs Býráð á fundi tann 18. oktober 2005 samtykti, ikki at eftirgeva kommunuskattin.

Avrit av hesum skrivi er sent til Toll- og Skattstovu Føroya, Stýrið og Vágs Býráð.“

## Partshoyring

Við skrivi, dagfest 8. mars 2006, varð klagan send Føroya Kærustovni og Vágs kommunu til ummælis viðvíkjandi umsóknini frá 2005. Samstundis boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at umboðsmaðurin ikki kundi viðgera tey viðurskiftini, sum lógu meira enn eitt ár frammanundan klaguni.

Við skrivi, dagfest 14. mars 2006, hevur Føroya Kærustovnur sent umboðsmanninum soljóðandi frágreiðing:

> **„Viðvíkjandi klagu frá A, ....**
> Umboðsmaðurin hevur við skrivi dagf. 8. mars 2006 biðið um nærri frágreiðing og skjølini í málinum um skuldarumskipan hjá A, ....

Niðanfyri er málsgongd og frágreiðing. Hjálagt verða send skjølini í málinum.

**Málsgongd:**

| | | |
|---|---|---|
| 9. august | 2005 | Umsókn, dagf. 3. august 2005, kemur inn. |
| 17. august | 2005 | Váttan send til umsøkjaran. Fráboðað at umsóknin er send til Toll- og Skattstovu Føroya, Stýrið, til innheintan av nærri upplýsingum. |
| 17. august | 2005 | Umsóknin send til Toll- og Skattstovu Føroya, Stýrið, til ummælis. Freist sett til 19. september 2005. |
| 19. september | 2005 | Móttikið ummælið, við fylgiskjølum, frá Toll- og Skattstovu Føroya, Stýrinum. |

| | | |
|---|---|---|
| 19. september | 2005 | Ummælið sent til hoyringar hjá umsøkjara. Freist sett til 3. oktober 2005. |
| 19. september | 2005 | Umsókn, saman við ummælinum og fylgiskjølum frá Toll- og Skattstovu Føroya, Stýrinum, send til Vágs Kommunu. Heitt varð á Vágs Býráð um at taka støðu til eftirgeving av kommunuskattinum. |
| 29. september | 2005 | Móttikið skriv frá Vágs kommunu, har sagt varð frá, at málið kom fyri á fundi tann 18. oktober 2005. |
| 24. oktober | 2005 | Móttikið avgerð frá Vágs Kommunu. |
| 9. janur | 2006 | Málið var fyri á fundi í Skuldarum skipanarnevndini. Samtykt varð ikki at ganga umsóknini á møti, tí umsøkjarin longu hevur eina avgerð frá Fíggjarmálaráðnum frá 4. juli 1997, ið var mett at verða rímulig. Í tí avgerðini var samtykt, at steðga innheintingini, at steðga rentutilskrivingini og at taka pant fyri skuldina í húsinum hjá konuni. |
| 18. januar | 2006 | Avgerð send til umsøkjaran, avrit av avgerðini varð send til Toll- og Skattstovu Føroya, Stýrið og Vágs Býráð. Avgerðin hjá Vágs Býráð er nevnd í avgerðini. |

Sum sæst á málsgongdini, er her talan um vanliga málsgongd, har Kærustovnurin útvegar nærri upplýsingar um fíggjarviðurskiftini hjá umsøkjaranum, herundir støðutakan hjá býráðnum til kommunuskattin, áðrenn málið verður lagt fyri Skuldarumskipanarnevndina til støðutakan.

At Kærustovnurin ikki sendir avgerðina frá býráðnum til hoyring hjá umsøkjaranum, kemst av at gingið verður út frá, at kommunan fráboðar sína avgerð til umsøkjaran, og at umsøkjarin tí er kunnaður um avgerðina.

Í sambandi við sjálva avgerðina, so er hendan avgerð tikin út frá eini

metan av, at skuldin við avgerðini frá Fíggjarmálaráðnum frá 4. juli 1997, ikki tyngir dagligu fíggjarorkuna hjá umsøkjaranum.

Tá so landskassin hevur tryggjað veð í fastari ogn varð mett, at grundarlag var ikki fyri eftirgeving av skuldini.

Tá Kærustovnurin nú er gjørdur varugur við, at tað møguliga eru kommunur ið ikki kunnað umsøkjarar um avgerðir sínar viðvíkjandi kommunuskattinum, ger Kærustovnurin í skrivinum til kommunurnar tær nú varugar við, at avgerð viðvíkjandi kommunuskattinum skal sendast til umsøkjaran, og at avrit skal sendast til Kærustovnin.

Elva skjølini ella frágreiðingin til spurningar, so læt okkum frætta aftur frá tykkum."

Við skrivi, dagfest 14. mars 2006, hevur Vágs kommuna sent umboðsmanninum soljóðandi frágreiðing:

„Vágs kommuna fær frá Føroya Kærustovni umsókn um eftirgeving av lands- og kommunuskatti sendandi til støðutakan viðvíkjandi kommunuskattinum. Vágs kommunu sendir sostatt sína avgerð aftur til Føroya Kærustovn og ikki til umsøkjaran.

Tá Vágs Kommuna fær eina umsókn um eftirgeving av kommunuskatti er mannagongdin tann, at borgarstjórin leggur málið fram á næst komandi býráðsfundi (afturlatnum fundi).

Mannagongdin á býráðsfundinum er tann, at málið verður beinleiðis sett undir atkvøðugreiðslu við seðli. Og verður tað út frá hesari atkvøðugreiðslu avgerðandi hvat svara verður, um tað er fleirtal fyri at eftirgeva skatt ella ikki.

Hjáløgd eru øll skjøl sum viðvíkja hesum málið.

Vónandi er hetta nøktandi fyri tykkum, um ikki eru tit vælkomin at seta tykkum í samband við okkum aftur."

Við skrivi, dagfest 16. mars 2006, vórðu frágreiðingarnar frá Føroya Kærustovni og Vágs kommunu sendar klagaranum til ummælis við einari freist áljóðandi 3 vikur. Samstundis varð frágreiðingin frá Føroya Kærustovni send Vágs kommunu til kunningar og øvugt.

Tá umboðsmaðurin einki hevði frætt aftur frá klagaranum, boðaði hann við skrivi, dagfest 19. apríl 2006, pørtunum frá, at málið bleiv tikið upp til endaliga viðgerð.

## *Niðurstøða*

*Viðgerð mín av hesi klaguni snýr seg um avgerðirnar hjá ávikavist Vágs kommunu og Skuldarumskipanarnevndini (Føroya Kærustovni), og fari eg at viðgera hesar hvør sær.*

*Sambært § 8 í løgtingslóg nr. 29 frá 8. apríl 2005 um umskipan av landsskatta-, MVG- og tollskuld v.m. hjá fólki (skuldarumskipanarlógin) er heimildin at taka avgerð um eftirgeving av landsskattaskuld løgd til Skuldarumskipanarnevndina.*

*Í §§ 3 og 4 í skuldarumskipanarlógini stendur soleiðis:*

> ***§ 3.** Skuld, ið er fevnd av § 2, kann eftir umsókn umskipast, um:*
> *1) skuldarin prógvar, at hann ikki er førur fyri og innan fyri næstu árini eingi útlit hevur fyri at kunna lúka sínar gjaldskyldur til landskassan, og*
> *2) viðurskiftini hjá skuldaranum og umstøðurnar annars tala fyri hesum.*
> *Stk. 2. Tá mett verður um, hvørt treytin í stk. 1, nr. 1) er lokin, skal dentur eisini leggjast á ognar – og inntøkuviðurskiftini hjá øllum húskinum.*
> *Stk. 3. Tá mett verður um, hvørt treytin í stk. 1, nr. 2) er lokin, skal dentur serliga leggjast á, um skuldarin einans ella fyri ein stóran part hevur skuld til tað almenna, áhugan hjá skuldaranum í at fáa skuldina eftirgivna, hvussu gomul skuldin er, hvussu skuldin er íkomin og higartil afturgoldin, umframt skuldarans viðurskifti undir viðgerðini av eftirgevingarmálinum.*

> *§ **4.** Skuld sambært § 2 kann vera heilt ella lutvíst eftirgivin ella umskipað...“*

*Nevndin metti ikki, at klagarin leyk treytirnar sambært lógini og vísti samstundis til viðmerkingarnar til § 3 í lógini, har tað stendur soleiðis:*

> “...
> Í samsvari við vanligar reglur í sambandi við skuldarumskipan kann skuld, sum er tryggjað við veð, sum meginregla ikki eftirgevast.
> ...“

*Eg havi ikki grundarlag fyri at halda, at avgerðin hjá Skuldarumskipanarnevndini byggir á annað enn saklig atlit, og havi tí heldur ongar viðmerkingar til hesa.*

*Eg havi varnast, at Føroya Kærustovnur eftir øllum at døma nýtir standardskriv, tá fráboðanir verða sendar út. Hetta er sera praktiskt og tíðarsparandi, men ansast má eftir, at hesi standardskriv verða tillagaði tí einstaka málinum. Í hesum málinum hevur Føroya Kærustovnur helst gloymt at rætta í skrivinum til klagaran, dagfest 19. sept. 2005, tá sagt verður: „...send til ?kommunu...“ Í hesum førinum visti klagarin óivað, hvørja kommunu talan var um, og geri eg tí ikki meira við hendan spurningin.*

*Heimildin hjá kommunustýrunum at eftirgeva kommunuskattaskuld er ásett í § 157 í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt (skattalógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 52 frá 16. mai 2006, ið er soljóðandi:*

> *“§ **157.** Bygda(r)ráðunum er einans loyvt at geva eftir persónligan endaliga álíknaðan kommunuskatt v.m. í serstøkum førum, tá inntøka skattgjaldarans av sjúku, andláti, tungum húsi, vinnuloysi ella øðrum tílíkum umstøðum hevur verið stóran mun minni enn inntøkan í tí ári írestandi kommunuskatturin er álíknaður eftir, og tá fíggjarligu kor hansara annars mugu ætlast at vera til hindurs fyri, at hann fær goldið allan tann álíknaða írestandi skattin. Umsókn um at fáa skatt*

> *eftirgivnan skal verða send bygda(r)ráðnum skrivliga, í kommunum við fastari sosialnevnd skal umsóknin sendast til hesa, og avgerð um hetta skal – tá neyðturvuligir upplýsingar eru fingnir til vegar – verða tikin á bygda(r)ráðsfundi.“*

*Sambært hesari áseting skal kommunan meta um fíggjarligu korini hjá umsøkjaranum, og hvørt hesi eru til hindurs fyri, at umsøkjarin fær goldið allan tann írestandi skattin.*

*Sambært skjølunum og frágreiðingini frá Vágs kommunu sær tað ikki út til, at nøkur málsfyrireiking ella verulig viðgerð hevur verið í hesum málinum. Sambært borgarstjóranum verður málið lagt fram á fundi og sett beinleiðis undir atkvøðugreiðslu.*

*Hetta haldi eg hvørki vera í samsvari við § 157 í skattalógini ella fyrisitingarrættin. Ein fyrisitingarmyndugleiki hevur skyldu til at lýsa málið á ein slíkan hátt, at ein avgerð kann verða tikin á fullfíggjaðum grundarlagi. Í hesum málinum hevur Vágs kommuna fingið allar tær upplýsingar frá Føroya Kærustovni, sum hesin hevði undir hond.*

*Eingin viðgerð, meting ella tilráðing sæst at verða gjørd í hesum málinum, ið sum áður nevnt er sett beinleiðis undir loyniliga atkvøðugreiðslu (við seðlum). Tí er heldur eingin grundgeving fyri avgerðini um at nokta umsóknini at finna í skjølunum.*

*Sambært § 21 í fyrisitingarlógini skal myndugleikin, tá ein avgerð, sum ikki til fulnar gongur partinum á møti, verður fráboðað skrivliga, grundgeva fyri avgerð sínari. Sambært § 23 í somu lóg skal grundgevingin vísa, hvat myndugleikin hevur bygt avgerð sína á.*

*Í hesum málinum er eingin fráboðan send umsøkjaranum, men avgerðin er einans fráboðað Føroya Kærustovni í einum stuttum skrivi, har ongin grundgeving er fyri avgerðini. Umsøkjarin verður so kunnaður um avgerðina hjá kommunustýrinum umvegis Føroya Kærustovn.*

*Hetta haldi eg avgjørt ikki vera nøktandi. Eg haldi, at kommunurnar í slíkum málum eiga at boða umsøkjaranum beinleiðis frá avgerðini*

*í einum skrivi, sum eisini lýkur krøvini til grundgeving sambært fyrisitingarlógini.*

*Vísandi til, at eingin málsfyrireiking hevur verið, og at eingin grundgeving er fyri avgerðini, haldi eg avgerðina hjá kommununi vera at meta sum ógylduga. Eg fari tí at geva Vágs kommunu eina álvarsliga átalu fyri handfaringina av hesum málinum, og fari at mæla kommununi til at taka hetta málið uppaftur til viðgerðar av nýggjum. Samstundis fari eg at biðja kommununa lata meg frætta, hvat víðari hendir í hesum málinum.*

*Av tí, at eg haldi talan hava verið um álvarslig brek við viðgerðini hjá Vágs kommunu av hesum máli, havi eg samsvarandi § 10, stk. 1 í umboðsmanslógini kunnað formansskapin í Løgtinginum, løgmann og landsstýrismenninar í fíggjarmálum og kommunumálum um hetta málið.*

*Burtursæð frá givnu átaluni og tilmælinum geri eg ikki meira við hetta málið.*

*Við skrivi, dagfest 8. juni 2006, hevur Vágs kommuna boðað umboðsmanninum frá, at kommunan hevur broytt mannagongdina fyri viðgerðina av slíkum málum, og at málið verður tikið upp til nýggja viðgerð. Umboðsmaðurin ger ikki meira við hetta málið.*

# *23. Vinnulívs- og Fiskivinnumál v.m.*

## 23.1 Noktan av stuðli til flutning av fiski

Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu mótvegis Fiskimálaráðnum um noktan av flutningsstuðli í sambandi við fiskakeyp. Ráðið hevði noktað umsóknini við teirri grundgeving, at talan var um sølu millum virkir, og ikki um beinleiðis keyp. Umboðsmaðurin var samdur við ráðnum í, at stuðul sambært lógini ikki kundi latast til sølu millum virkir. Eftir at hava kannað avreiðingarseðlarnar og fakturarnar metti umboðsmaðurin kortini, at klagarin reelt var at meta sum beinleiðis keypari av fiskinum. Hann mælti tí Fiskimálaráðnum til at taka málið uppaftur til viðgerðar við atliti at hesum spurningi. (J. nr. 200500075)

## Klagan

Við skrivi, dagfest 5. sept. 2005, hevur P/F A sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

„**<u>Kæra um ikki útgoldnan flutningsstuðul:</u>**
Vísandi til løgtingslóg nr. 14 frá 3. mars 1999 um stuðul til flutning av fiski, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 175 frá 21. desember 2001, og til kunngerð nr. 76 frá 6. desember 2004 um stuðul til flutning av fiski loyva vit okkum at kæra um, at vit hóast greiðar ásetingar bæði í lóg og kunngerð ikki fáa flutningsstuðul útgoldnan.

Virkið okkara keypur feskan fisk yvir uppboðssølu norðanfyri og virkar hann til saltfisk, sum síðani verður seldur av landinum.

Vanlig mannagongd er, at vit ringja inn til telefonuppboðssøluna og avtala har keyp av teimum nøgdum av feskum fiski, vit hava brúk fyri til virkingar, og verður hesin fiskur síðani fluttur suður til okkara við Farmaleiðum og Strandfaraskipum Landsins.

Nústaðni, ið vit eiga einar 50.000 kr. til góðar í flutningsstuðuli, fáa vit at vita frá Fiskimálaráðnum, at heimild er ikki til at rinda okkum stuðulin.

Hetta er sum at fáa vátan vøttin, og fáa vit ikki henda stuðul, sum vit halda okkum hava fullan lógligan rætt til, so noyðast vit at lata aftur.

Í fyrsta lagi átti almenni myndugleikin ikki at lati okkum liva í teirri trúgv í fleiri mánaðir, at vit áttu rætt til henda stuðul, og so noktað okkum hann, tá ið hann skal rindast okkum. Henda niðurstøða skuldi sjálvandi verið kunnað okkum beinanvegin, so at vit ikki framleiddu okkum í óføri.

Í øðrum lagi fara vit ikki at góðtaka, at vit ikki fáa okkara sømdir sambært galdandi lóg og rætti.

Hjáløgd hesi kæru er váttan frá landingarmiðstøðini í Sørvági um, at fiskurin, ið A hevur keypt frá C, er landaður umvegis landingarmiðstøðina har. Vit keypa umvegis telefonina, og hava ongan møguleika at fylgja við í, hvussu annar fiskur frá øðrum ella sama báti verður seldur víðari, landaður og virkaður.

Talan er um sølu umvegis uppboðssølu, so sum lógarinnar bókstavur ásetur, og óskiljandi er fyri okkum, at Fiskimálastýrið júst brúkar hesa mannagongd sum undanførslu fyri at nokta okkum stuðul.

Fortreytin fyri, at okkara virkið kann virkað fisk er, at vit fáa hann til keyps onkustaðni frá. Vit hava í hesum umfari keypt frá uppboðssøluni í Sørvági, og hava einki lógligt krav um ella rætt til at fáa innlit í, hvussu hesin fiskur annars verður seldur og handfarin.

Fiskimálaráðið hevur skrivað til okkara tann 23. august 2005, har avvíst verður at gjalda flutningsstuðul úr Sørvági suður til okkara, grundgivið við, at fiskurin skal vera seldur um uppboðssølu.

Vit hava síðani kært hesa avgerð yvir telefonina, og hava fingið svarskriv frá Fiskimálaráðnum tann 31. august 2005. Nú er niðurstøðan hon, at heimild er ikki til flutningsstuðul, sjálvt um fiskurin er seldur um uppboðssølu.

Hesar mótstríðandi grundgevingar verða víðari grundgivnar við, at heimild er ikki til at gjalda flutningsstuðul til flutning millum tvey virkir, uttan mun til um fiskurin upprunaliga er landaður um eina landingarmiðstøð ella ikki.

Vit finna ikki heimildina fyri hesi undanførslu, hvørki í løgtingslóg nr. 14 frá 3. mars 1999 um stuðul til flutning av fiski, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 175 frá 21. desember 2001, ella í kunngerð nr. 76 frá 6. desember 2004 um stuðul til flutning av fiski.

Vit hava einvíst hildið okkum til lógarinnar bókstav og hava keypt umvegis uppboðssøluna í … . Vit hava virkað fiskin til útflutnings, og fáa ikki fyrrenn í tólvta tíma at vita, at vit kortini ikki eru fevnd av frammanfyri nevnda lógarverkið, sum annars er samtykt, lýst og játta júst til virksemi av okkara slag.

Upplýst er ikki málinum um annan kærumøguleika, og loyva vit okkum tí at senda hesa kæru til Løgtingsins Umboðsmann til viðgerðar.

Hjáløgd eru avrit av:
- skrivi frá Fiskimálaráðnum, dagfest 23. august 2005,
- váttan frá Landingarmiðstøðini í Sørvági, dagfest 25. august 2005,
- skrivi frá Fiskimálaráðnum, dagfest 31. august 2005.“

## Málsgongd

P/F A hevur í tveimum umførum søkt um flutningsstuðul fyri ávikavist juni og juli 2005.

Við skrivi, dagfest 23. aug. 2005, hevur Fiskimálaráðið, Lønjavningarstovan svarað P/F A soleiðis:

**„Viðvíkjandi flutningsstuðli**
- fiskakeyp frá D og C juni og juli 2005

Skulu vit siga frá, at vit hava fingið umsókn tykkara um flut-

ingsstuðul; men sambært viðløgdu kunngerð nr. 76 frá 6. desember 2004 um stuðul til flutning av fiski, skal fiskurin verða seldur um uppboðssølu.

Sagt verður frá hesum.“

25. august 2005 hevur Landingarmiðstøðin í Sørvági sent klagaranum soljóðandi telefaks:

„Landingarmiðstøðin í Sørvági, (LMS) váttar hervið at fiskurin, ið A hevur keypt frá C, er landaður umvegis okkum.

Hetta snýr seg um fisk frá:

| | | |
|---|---|---|
| S4, | 23/6-2005 | 5093 kg |
| S1, | 20/6-2005 | 20047 kg |
| S4, | 6/6-2005 | 18797 kg |
| S2, | 4/7-2005 | 18560 kg |
| S3, | 11/7-2005 | 15753 kg |

...“

Sama dag er soljóðandi frágreiðing frá E, I send klagaranum:

„G í Sørvági eigur tveir partrolarar S2/S4 og S3/S1.

H sum eigur G eigur eisini part í C í Sørvági sum framleiður saltfisk.

Tað sum er gjørt í hesum sambandi er at tá landað verður á Landingarmiðstøðini í Sørvági, tekur C og avroknar allan bátin, tvs um A ella B fáa fisk frá til dømis S3, so verður rokning send frá C.

Vit síggja nú at hetta ikki er so heppið fyri til dømis A tá teir skulla søkja um flutningstuðul.

E

Er hetta nokk?

lat meg hoyra aftur“

Klagarin vendi sær aftur til Fiskimálaráðið í sambandi við, at hann ikki var nøgdur við avgerðina. Fiskimálaráðið hevur gjørt soljóðandi notat (dagfest 25.09.2005) frá telefonsamrøðu við klagaran 25. aug. 2005:

> „**Notat viðvíkjandi teleklagu um flutningsstudning**
> Í sambandi við umsókn frá p/f A um flutningsstudning til fiskakeyp frá fiskavirkinum C í Sørvági og D á Eiði.
>
> Vit hava í skrivi dagf. 23.08.2005 til A avvíst at gjalda flutningsstuðul til ávíst fiskakeyp.
>
> F frá A hevur pr. telefon 25.08. boða frá, at teir eru ikki nøgdir við hesa avgerð okkara.
>
> Forkláraði honum, at umtalaða fiskakeypi ikki er lýkur treytirnar, sum heimila at gjalda stuðul til flutning av fiski frá uppboðssølu, frá landingarstaðið, tá fiskurin er seldur um uppboðssølu, og frá landingarmiðstøð.
>
> Royndi at greiða honum frá muninum at handla fisk beinleiðis við bátin frá eini landingarmiðstøð og at handla beinleiðis við eitt fiskavirki, so sum í hesum førinum. Tað hevði ongan týdning, um fiskurin var landaður um eina landingarmiðstøð, tí vit metti handilin verða millum tvey virkir.
>
> C og D eru ikki landingarmiðstøðir, tí í kunngerðini verður ein landingarmiðstøð greinað sum stað, har fiskur verður landaður, men ikki virkaður.“

29. aug. 2005 er soljóðandi notat skrivað í Fiskimálaráðnum viðvíkjandi málinum:

> „**Notat viðvíkjandi flutningsstudningi.**
> Í samband við umsókn frá p/f A um flutningsstudning til fiskakeyp frá fiskavirkinum C í Sørvági og D á Eiði.

Við umsóknini er váttan frá Landingarmiðstøðini í Sørvági, at ávísi fiskurin, sum A hevur keypt frá p/f C og D, er landaður umvegis teirra landingarmiðstøð.

Rokningin fyri fiskakeyp hjá A er frá ávikavist p/f C og p/f D.

Sostatt metir umsitingin, at talan ikki er um beinleiðis sølu frá báti, sum landar sína veiðu um landingarmiðstøð, men um sølu millum virkir.

Vit hava tí í skrivi dagf. 23.08.2005 til A avvíst at gjalda flutningsstuðul.

A hava pr. telefon boða frá, at teir eru ikki nøgdir við hesa avgerð, og tí hava vit tikið hesa avgerð viðgerðar av nýggjum.

Fundur var ídag millum M, N og O.

Niðurstøðan av fundinum var, at vit skuldu halda fast við avgerðina, at hetta var søla millum virkir."

Fiskimálaráðið hevur síðani sent P/F A soljóðandi skriv, dagfest 31. aug. 2005:

„**Viðvíkjandi flutningsstudningi**
Víst verður til skriv okkara dagfest 23.08.2005, har vit avvísa at gjalda flutningsstudning til flutning av fiski frá fiskavirkinum C í Sørvági og til … .

Víst verður í hesum sambandi til § 1, 1. stk. í løgtingslóg nr. 14 frá 3. mars 1999 um flutningsstuðul, sum er soljóðandi:

„Landsstýrismanninum verður heimilað at útgjalda stuðul til flutning av fiski frá uppboðssølu, frá landingarstaði, tá fiskurin er seldur um uppboðssølu, og frá landingarmiðstøð til virkingar í økjum, har firðir og sund skilja."

Av tykkara innsendu skjølum framgongur, at fiskurin er landaður á

Landingarmiðstøðini í Sørvági, p/f C keypir frá bátunum og selur síðani ein part av fiskinum víðari til p/f A. Tí meta vit, at her er talan um beinleiðis sølu millum tvey fiskavirkir.

Líka síðani lógin kom í gildi í 1999, hevur tað verið siðvenja, ikki at gjalda flutningsstudning, tá talan er um beinleiðis sølu millum virkir, soleiðis sum talan er um í hesum føri.

Tit hava síðani pr. telefon boða frá, at tit ikki eru nøgdir við hesa avgerð okkara, og tí tóku vit málið upp til viðgerðar av nýggjum saman við løgfrøðingum okkara eftir at nýtt skjalatilfar fyrilá í málinum.

Niðurstøðan var, at ikki er heimild at gjalda flutningsstudning til flutning millum tvey virkir, uttan mun til um fiskurin upprunaliga er landaður um eina landingarmiðstøð ella ikki."

## Partshoyring

Við skrivi, dagfest 14. sept. 2005, sendi umboðsmaðurin Fiskimálaráðnum klaguna til ummælis.

Við skrivi, dagfest 7. okt. 2005, hevur Fiskimálaráðið svarað umboðsmanninum soleiðis:

**„Viðvíkjandi kæru frá p/f A, tykkara j.nr. …**
Eftir at hava nærlisið kæruna, er óvist, hvat veruliga verður kært um, tá kæruskrivið ikki er serliga nágreiniligt, men sera víttfevnandi.

Mett verður tó, at ósemjan snýr seg um 5 ella 8 ávís fiskapartí. Talan er um 5 fiskakeyp frá fiskavirkinum C í Sørvági og møguliga 3 fiskakeyp frá fiskavirkinum D á Eiði.

Tað er í hvussu er tað, sum Lønjavningarstovan hevur avvíst at gjalda flutningsstuðul fyri.

A søkir um henda flutningsstuðul í 2 umsóknum, móttiknar ávikavist 7. juli og 9. august 2005.

Málsviðgerðin av umsóknunum er eitt sindur seinkað við atliti til, at vit eru mitt í feriutíð. Men aftaná at hava viðgjørt umsóknirnar,

verður útfrá fyriliggjandi upplýsingum givið noktandi svar til part av umsóknum teirra, í skrivi dagfest 23.08.2005, har grundgivið verður, at fiskurin ikki er keyptur á uppboðssølu. Restin av tí umsøkta flutningsstuðulinum er avgreiddur 06.09.2005.

<u>Tað, sum avvíst verður at lata stuðul til, snýr seg um henda fiskaflutning í fyrru umsóknini:</u>
Fiskakeyp frá C, Sørvágur – partur av avreiðing hjá S4, 06.06.
Fiskakeyp frá C, Sørvágur – partur av avreiðing hjá S1, 20.06.
Fiskakeyp frá C, Sørvágur – partur av avreiðing hjá S4, 23.06.

<u>og í seinnu umsóknini er tað hesin fiskaflutningur:</u>
Fiskakeyp frá D, Eiði – partur av avreiðing hjá S1, 30.06.
Fiskakeyp frá C, Sørvágur – partur av avreiðing hjá S2, 04.07.
Fiskakeyp frá C, Sørvágur – partur av avreiðing hjá S3, 11.07.
Fiskakeyp frá D, Eiði – partur av avreiðing hjá S2, 12.07.
Fiskakeyp frá D, Eiði – partur av avreiðing hjá S3, 19.07.

25. august ringir F frá A til Lønjavningarstovuna, og er ikki nøgdur við avgerðina. Seinni sama dag kemur ein váttan frá Landingarmiðstøðini í Sørvági, sum váttar, at 5 ávísar landingar eru farnir umvegis landingarmiðstøðina har, og somuleiðis ein frágreiðing um telefax frá E, sølumanni hjá C og D, sum váttar, at vanliga landa skipini S3, S1, S4 og S2 á landingarmiðstøðini. Og her keypir C alla veiðina, sí viðløgdu avreiðingarseðlar, og selur partar víðari til A, B osv.

29. august er málið til viðgerðar á fundi. Á fundinum luttóku O fyri Lønjavningarstovuna, N og M løgfrøðingar fyri aðalráðið. Niðurstøðan av fundinum var, at talan var um sølu av fiski millum virkir og hevði tí ikki rætt til stuðul.

Víst verður til skriv frá Lønjavningarstovuni dagfest 31. august 2005 til p/f A, har grundgivið verður fyri, hví stuðul ikki verður játtaður til part av umsókn teirra, tá hetta verður mett at vera beinleiðis søla millum virkir.

Stuðul til flutning av fiski verður veittur sambært løgtingslóg nr. 14

frá 3. mars 1999 við seinni broytingum og kunngerð nr. 76 frá 6. desembur 2004.

Upprunaliga varð flutningsstuðul bert latin til útróðrarbátar á plássum, har onki fiskavirki var. Men við uppboðssølu kom kappingin um fiskin, og fyri at allir keyparar skuldu vera javnstillaðir, uttan mun til hvar í landinum teirra virksemi var, varð lógin broytt eisini at umfata allan fisk, keyptan á uppboði, og sum var fluttur til virkingar yvir firðir og sund. Seinni komu so landingarmiðstøðirnar, har fiskur var landaður og reiðarin so sjálvur kundi bjóða fiskin út til sølu og selja um neyðugt í partíum. Og fyri at líkastilla henda søluháttin við uppboðsølurnar, varð lógin broytt til eisini at umfata fisk frá landingarmiðstøðum.

Í kunngerð um stuðul til flutning av fiski verður ein landingarmiðstøð greinað til at vera stað, har fiskur verður landaður, men ikki virkaður.

Staðfestast kann tí, at D á Eiði og C í Sørvági, har fiskurin er keyptur frá, eru ikki landingarmiðstøðir.

Løgtingslógin um stuðul til flutning av fiski heimilar at gjalda stuðul til flutning av fiski frá:

---

Uppboðssølu
Landingarstaði, tá fiskurin verður seldur um uppboðssølu og frá
Landingarmiðstøð til virkingar í økjum, har firðir og sund skilja.

Vit meta ikki, at umtalaði handil av fiski hjá A lýkur nakrar av hesum treytum, tí handilin er farin fram í næsta liði, tvs. millum virkir.

<u>Viðløgd skjøl í málinum:</u>
Avrit av umsóknum – 1.0 og 2.0
Avrit av fakturum – 1.1 og 2.1
Avrit av avreiðingarseðlum – 1.2 og 2.2
Avrit av okkara skrivi dagf. 23.08.2005 – 3.0
Avrit av frágreiðing frá landingarmiðstøðini 4.0

Avrit av telefax frá E 4.1
Avrit av notat um kæru umvegis telefon 25.08.2005 – 5.0
Avrit av notat um flutningsstuðulin – 5.1
Avrit av okkara skrivi dagf. 31.08.2005 – 6.0“

Við skrivi, dagfest 21. okt. 2005, vórðu viðmerkingarnar frá Fiskimálaráðnum sendar klagaranum til ummælis.

Við skrivi, dagfest 31. okt. 2005, hevur klagarin latið umboðsmanninum hesar viðmerkingar:

> **„Viðmerkingar til kæru um ikki útgoldnan flutningsstuðul, j.nr.200500075/3:**
> Løgtingsins umboðsmaður hevur sent okkum viðmerkingar frá Fiskimálastýrinum, dagfestar 21. oktober 2005, til kæru okkara um ikki útgoldnan flutningsstuðul.

Vísandi til hesar viðmerkingar vilja vit enn eina fer vísa á, at vit halda okkum hava virkað og handlað eftir givnum mannagongdum á marknaðinum.

> Sp/f A hevur keypt til virkingar fisk umvegis landingarmiðstøðina í Sørvági frá skipum í Sørvági, sum verða umsitin av P/F C og P/F D. Okkum er váttað av sølumanni hjá P/F C og P/F D, E, at skipini landað um landingarmiðstøðina í Sørvági.
>
> Talan er ikki um beinleiðis keyp millum tvey virki, men um keyp og sølu millum eitt virkið og skip, sum verða umsitin av einum felag, sum eisini rekur eitt virkið.
>
> Reiðaríðið P/F G í Sørvági eigur skipini, og P/F H keypti P/F G úr … fyri nøkrum árum síðani. P/F H eigur eisini ein part av P/F C saman við mø. P/F I í … .
>
> Fyri at samskipa skrivstovu og fyrisiting av øllum hesum feløgum hevur P/F C umsitið keyp og sølu av fiski hjá P/F G, og er tað her tvístøðan tekur seg upp, har Fiskimálaráðið pástendur, at P/F C hevur

keypt allan fiskin frá P/F G til virkingar á teirra virki, men selur so upsan víðari til Sp/f A.

Í okkara verð umsitur P/F C keyp og sølu av fiski hjá P/F G, har vit hava keypt ein part frá skipunum, og tí halda okkum so avgjørt hava rætt til flutningsstuðul, sum er heimilaður í lóg og kunngerð gjørd til endamál av okkara slag.

Leggjast kann afturat, at Fiskimálaráðið hevur sovið í tímanum, tá tað ikki hevur kunnað okkum beinanvegin um umsókn okkara frá 7. juli 2005. Um umsitingin riggaði, so sum hon átti, so vóru vit ikki komin út í so stórar eftirstøður, og so hevði ikki verið so stórur tvídráttur um hetta mál.

Vit stríðast móti yvirvaldinum, men fáa vit ikki hesa eftirstøðuna, sum vit halda okkum eiga fullan rætt til, so fer eisini hendan royndin at skapa nakað vinnuligt virksemi í útjaðaranum fyri bakka."

Við skrivi, dagfest 7. nov. 2005, vórðu viðmerkingarnar frá klagaranum sendar Fiskimálaráðnum til ummælis.

Við skrivi, dagfest 24. nov. 2005, hevur Fiskimálaráðið svarað umboðsmanninum soleiðis:

**„Viðvíkjandi kæru um flutningsstuðul**
Víst verður til viðmerkingar frá sp/f A til frágreiðing Fiskimálaráðsins dagfest 07.10.2005.

Vit hava viðgjørt teirra viðmerkingar og vilja vísa á, at onki týðandi nýtt kemur fram, sum kann broyta avgerðina í málinum.

Sp/f A vísir í viðmerkingunum á, at tað eru p/f C og p/f D, sum umsita skipini, sum teir hava keypt fisk frá.

Hesar upplýsingar eru síðani eftirkannaðar.

P frá p/f G, sum eigur skipini, afturvísir í telefonsamrøðu við

Lønjavningarstovuna 23.11.2005, at p/f C og p/f D umsita partrolarar teirra, men váttar í skrivi dagfest 18.11.2005, at E, sølustjóri hjá p/f C og p/f D, hevur selt fiskin hjá partrolarum felagsins frá 1. juni í ár.

Hinvegin verður ikki váttað, at hetta hevur nakað við fiskavirkini C og D at gera.

Landingarmiðstøðin í … hevur váttað, at nøkur av teimum fiskapartíum, sum sp/f A hevur søkt um flutningsstuðul fyri, eru farin um innvigingarskipan teirra, tó ikki fiskurin frá S3, 30.06. og S2, 12.07.2005, men sum tó er við í umsóknini frá sp/f A.

Um vit til dømis taka eina landing hjá S3 19.07.2005 sum dømi: S3 landar tilsamans 34.858 kg á landingarmiðstøðini. Keyparar fyri hesa landing eru: p/f Q, 1.698 kg, p/f R, 18.528 kg, p/f L, 3.123 kg og p/f D, 11.509 kg. Sp/f A er ikki skásett fyri nakað keyp, men keypir sín fisk frá p/f D, 5.180 kg. tvs. frá einum virki.

Um uppáhaldið hjá sp/f A var veruleiki, so hevði p/f D keypt 34.858 kg. og so selt víðari til allar teir skrásettu keypararnar.

Seinastu viðmerkingarnar frá p/f A broyta sostatt onki uppá veruleikan, sum kemur fram av skjalatilfarinum í málinum:

Fyri tað fyrsta vísa skjølini, at tað er antin p/f C í Sørvági ella p/f D á Eiði, sum keypa fiskin frá skipunum (skjal 1.2 avreiðingarseðil).

Harnæst vísa skjølini, at ávikavist p/f C og p/f D selja fiskin víðari til p/f A í … (skjal 1.1 fakturi).

Staðfestast kann sostatt, at meginparturin av fiskinum, sum sp/f A søkir flutningsstuðul fyri, er upprunaliga farin um eina landingarmiðstøð, men er keyptur frá skipunum av ávikavist p/f C og p/f D, sum síðani selja partvíst víðari til sp/f A.

Tí er niðurstøðan framvegis, at umtalaði handil av fiski er farin fram í næsta søluliði, tvs. millum virkir.

> Viðlagt er skriv frá p/f. G, Landingarmiðstøðini og avreiðingarlisti hjá S3 19.07.05."

Við skrivi, dagfest 1. des. 2005, vórðu hesar viðmerkingar sendar klagaranum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Við skrivi, dagfest 2. jan. 2006, boðaði nývaldi umboðsmaðurin, Sólja í Ólavsstovu, formansskapinum í Løgtinginum frá, at hon samsvarandi ásetingini í § 3, stk. 1, nr. 4 í fyrisitingarlógini metti seg vera ógegniga at viðgera málið, tí at hon hevði havt málið til viðgerðar í starvstíð sínari í Fiskimálaráðnum. Partarnir vórðu somuleiðis kunnaðir um hetta.

Við skrivi, dagfest 31. jan. 2006, heitti Løgtingið á undanfarna umboðsmannin, Joen H. Andreassen, um at viðgera hetta málið sum settur umboðsmaður.

## *Niðurstøða*

*Í løgtinslóg nr. 14 frá 3. mars 1999 um stuðul til flutning av fiski, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 175 frá 21. desember 2001, stendur m.a.:*

> *„**§ 1**. Landsstýrismanninum verður heimilað at útgjalda stuðul til flutning av fiski frá uppboðssølu, frá landingarstaði, tá fiskurin er seldur um uppboðssølu, og frá landingarmiðstøð til virkingar í økjum, har firðir ella sund skilja.*
>
> *...*
>
> ***§ 3.** Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð flutningsstuðulin og treytir fyri útgjaldan av stuðlinum.*
>
> ***§ 4.** Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og samstundis fer løgtingslóg nr. 67 frá 13. juni 1995 sum broytt við løgtingslóg nr. 112 frá 13. juni 1997 um stuðul til flutning av fiski úr gildi.*
>
> *..."*

*Í viðmerkingunum til lógaruppskotið, løgtingsmál nr. 75 frá 1999, tá § 1, stk. 1 fekk sína núverandi orðing, stendur m.a.:*

*„**Viðmerkingar***
*Løgtingslóg um stuðul til flutning av fiski hevur til endamáls at javnstilla fiskakeyparar, sum bjóða uppá heila last ella partar av last, sum neyðugt kann verða at flyta til virkingar yvir fjørð ella sund. Lógin varð seinast broytt á vári 1999.*

*Hesar broytingar førdu m.a. við sær, at í mun til frammanundan kundi stuðul ikki latast, um fiskurin var seldur um uppboðssølu og landaður t.d. á … ella á … . Uppskotið førir nú við sær, at hetta aftur verður møguligt. T.v.s. hevur skip selt um telefonuppboðssølu, so kann veitast stuðul til flutning frá landingarstað til virki í økjum, har firðir ella sund skilja.*

…

***Viðmerkingar til tær einstøku broytingarnar***
*<u>ad. § 1, nr. 1.</u> Broytingin víðkar um núverandi skipan til eisini at fevna um flutning frá landingarstað til virkingar í økjum, har firðir ella sund skilja, treytað av sølu um uppboðssølu.*

*Ætlanin er at javnstilla allar fiskakeyparar, sum bjóða uppá heila last ella partar av last, sum neyðugt kann verða at flyta til virkingar yvir fjørð ella sund. Úrslitið av broytingini verður, at størri nøgdir av fluttum fiski koma undir stuðul.*
…“

*Við heimild í hesari lóg hevur landsstýrismaðurin ásett nærri reglur í kunngerð, ið er soðljóðandi:*

*„**Kunngerð nr. 76 frá 6. des. 2004 um stuðul til flutning av fiski:***
*Við heimild í § 3 í løgtingslóg nr. 14 frá 3. mars 1999 um stuðul til flutning av fiski, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 175 frá 21. desember 2001, verður ásett:*

***§ 1.** Til flutning av fiski, livur og rogn verður eftir umsókn og skjalprógvi fyri flutningi latið fiskavirki/framleiðsluvirki flutningsstuðul í kr fyri kilo sambært fylgiskjali 1.*
…

*§ **3.** Umsóknir um flutningsstuðul skulu vera Lønjavningarstovuni í hendi í seinasta lagi 2 mánaðir eftir, at flutningurin er farin fram. Umsókn, sum ikki lýkur hesa tíðarfreist, verður ikki viðgjørd.*
*Stk. 2. Stuðul til flutning frá landingarmiðstøð verður bert útgoldin, um landingarmiðstøðin er stað, har fiskur verður landaður, men ikki virkaður.*
*Stk. 3. Stuðul verður ikki latin til flutning av feskum fiski, sum er meira hagreiddur enn sløgdur, avhøvdaður, vaskaður, ísaður og lagdur í kassar ella pakning.*
*Stk. 4. Stuðulin verður veittur føroyskum felag ella einstaklingi, sum er MVG skrásett/ur.*

*§ **4.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis fer kunngerð nr. 95 frá 12. juni 2003 um stuðul til flutning av fiski úr gildi.*

Fylgiskjal 1 / 2004

| *Frá\til* | *Eysturoy/Streymoy* | *Norðoyggjar* | *Sandoy* | *Suðuroy* |
|---|---|---|---|---|
| *Vágar* | *0,07* | *0,17* | *0,24* | *0,30* |
| *Suðuroy* | *0,24* | *0,32* | *0,40* | |
| *Sandoy* | *0,17* | *0,25* | | |
| *Norðoyggjar* | *0,10* | | | |

Sambært orðaljóðinum í § 1 í lógini, verður heimilað landsstýrismanninum at útgjalda stuðul til flutning av fiski

- *frá uppboðssølu,*
- *frá landingarstaði, tá fiskurin er seldur um uppboðssølu, og*
- *frá landingarmiðstøð*

*til virkingar í økjum, har firðir ella sund skilja.*

*Eg eri tí samdur við Fiskimálaráðnum í sjónarmiðnum um, at sambært lógini er tað bert søla í fyrsta søluliði, tvs. frá bátinum umvegis uppboðssølu ella landingarmiðstøð til keyparan, sum gevur rætt til flutningsstuðul. Víðarisøla millum virkir gevur hinvegin ikki rætt til hendan stuðul.*

*Men eftir at hava kannað teir einstøku avreiðingarseðlarnar og fakturarnar frá teimum átta fiskakeypunum, sum Fiskimálaráðið hevur sýtt P/F A stuðul fyri, eri eg farin at ivast í, um P/F A ikki er at meta sum reelli keyparin viðvíkjandi tí fiskinum, sum virkið hevur fingið.*

*Formelt standa ávikavist C og D sum keyparar, men um hugt verður nærri at avreiðingarseðlunum, so eru ymsu bólkarnir av upsa býttir sundur soleiðis, at t.d. Upsi 1 er býttur sundur í tvey, harav P/F A keypir annan bólkin. Hetta ger seg galdandi fyri øll átta keypini og fyri allar upsastøddirnar. Tað er eisini vert at leggja til merkis, at P/F A bert keypir upsa, og at tað einans er upsin, sum er uppbýttur á hendan hátt.*

*Sum eitt dømi um hetta kunnu vit taka avreiðingarseðilin frá 20. juni 2005 fyri S1, … . Av hesum seðli framgongur m.a.:*

*“...*

| *FISKASLAG* | *STØDD* | *VEKT KG* | *Á KR UPPHÆDD* |
|---|---|---|---|
| *Upsi 1 5,0+* | *202* | *4,00* | *808,00* |
| *Upsi 1 5,0+* | *291* | *4,00* | *1.164,00* |
| *Upsi 2 3,0-5,0* | *886* | *4,00* | *3.544,00* |
| *Upsi 2 3,0-5,0* | *1.271* | *4,00* | *5.084,00* |
| *Upsi 3 1,5-3,0* | *13.408* | *3,75* | *50.280,00* |
| *Upsi 3 1,5-3,0* | *4.667* | *3,60* | *16.801,20* |
| *Upsi 3 1,5-3,0* | *19.237* | *3,75* | *72.138,75* |
| *Upsi 3 1,5-3,0* | *6.696* | *3,60* | *24.105,60* |
| *Upsi 4 0,7-1,5* | *884* | *3,30* | *2.917,20* |
| *Upsi 4 0,7-1,5* | *1.268* | *3,30* | *4.184,40* |

*...“*

*Vit kunnu síðani hyggja at fakturanum frá keypinum hjá P/F A av fiski burturav hesari landingini, har C formelt stendur sum seljari:*

*“...*

*Kg.Vøruheiti Kr. pr. kg. Upphædd kr.*

S1 landað í … 20.06.2005:

| | | | |
|---|---|---|---|
| *202* | *Upsi 1* | *4,00* | *808,00* |
| *886* | *Upsi 2* | *4,00* | *3.544,00* |
| *13.408* | *Upsi 3* | *3,75* | *50.280,00* |
| *4.667* | *Upsi 3* | *3,60* | *16.801,20* |
| *884* | *Upsi 4* | *3,30* | *2.917,20* |

...“

*At ymsu upsastøddirnar á avreiðingarseðlinum konsekvent eru býttar upp í tvey, hóast talan er um sama prís fyri báðar bólkar, og at P/F A síðani hevur keypt annan bólkin burturúr fyri sama prís, haldi eg vera eina greiða ábending um, at P/F A reelt má metast sum beinleiðis keypari av hesum fiskinum. Fakturarnir eru í seks førum dagfestir sama dag sum avreiðingarseðilin og í tveimum førum dagin eftir.*

*Tað sær sambært skjølunum ikki út til, at Fiskimálaráðið hevur umhugsað júst hendan spurningin, men at ráðið bert hevur konstaterað, at ávikavist C ella D formelt hava staðið sum seljarar av fiskinum til P/F A, og at stuðul tí ikki kundi latast.*

*Fyri mær at síggja er eingin forðing í lógini fyri, at framleiðarar keypa fisk inn í felag, og tí kann tað virka í so formalistiskt bert at hyggja at navninum, sum formelt stendur á fakturanum/avreiðingarseðlinum. Um ætlanin er, at flutningsstuðul bert kann latast tí, sum formelt stendur sum keypari í skjølunum, átti hetta at framgingið av kunngerðini. Landsstýrismaðurin hevur sum kunnugt heimild í lógini fyri at áseta treytirnar í kunngerð.*

*Sambært viðmerkingunum til lógina var ætlanin at javnstilla fiskakeyparar í útjaðaranum við hinar. Hetta taki eg sum eina ábending um, at grundarlag ikki er fyri at tulka lógina so avmarkandi, sum Fiskimálaráðið tykist gera í hesum førinum.*

*Eg fari tí at mæla Fiskimálaráðnum til at taka hetta málið uppaftur til viðgerðar eina ferð enn við atliti at spurninginum, um ikki P/F A*

*reelt er at meta sum keypari av hesum fiskinum, og fari samstundis at biðja ráðið lata meg frætta, hvørja niðurstøðu ráðið kemur til hesum viðvíkjandi.*

Við skrivi, dagfest 18. des. 2006, hevur Fiskimálaráðið kunnað umboðsmannin um nýggju avgerð sína í hesum málinum. Umboðsmaðurin ger tí ikki meira við hetta málið.

## *25. Persóns-, familju- og arvamál*

## 25.1 Ónøgd við at onnur brúka sama eftirnavn

Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu í sambandi við, at Innlendismálaráðið hevur loyvt einum persóni at fáa eftirnavnið „við Stein". Klagarin førdi fram, at umsøkjarin ikki hevði nakað tilknýti til staðið við Stein, bert tí at omma umsøkjaran hevði búð har. Einki er ásett í lógini um, hvat er at skilja sum eitt tilknýti, ið kann geva rætt til at fáa eitt bústaðar- ella húsanavn til eftirnavn. Uppá fyrispurning greiddi Innlendismálaráðið umboðsmanninum frá, at tað verður mett sum nøktandi tilknýti, at onkur av forfedrunum í beinari linju hevur búð á staðnum. Ráðið hevði viðgjørt 7 onnur slík mál síðani 1. jan. 2001, ið øll vórðu játtaði. Umboðsmaðurin hevði ikki grundarlag fyri at halda, at tulkingin hjá ráðnum ikki var í tráð við lógina, men helt, at tað hevði verið ynskiligt at tað var ásett í lóggávuni, hvar markið fyri hesum tilknýti var. Umboðsmaðurin mælti tí landsstýrismanninum til at umhugsa hendan spurningin nærri, tá broytingar møguliga aftur skulu gerast í navnalógini. (J. nr. 200600002)

### Klagan

A við Stein hevur sent umboðsmanninum eina klagu í sambandi við, at annar persónur hevur søkt um og fingið játtað frá Innlendismálaráðnum, at viðkomandi kann bera eftirnavnið: „við Stein".

### Málsgongd

Við telefaksi, dagfest 19. aug. 2005, hevur A við Stein vent sær til Innlendismálaráðið og mótmælt, at ráðið hevur játtað øðrum persóni loyvi til at fáa eftirnavnið „við Stein".

Við skrivi, dagfest 20. sept. 2005, hevur Innlendismálaráðið svarað A soleiðis:

„Innlendismálaráðið hevur tann 19. august 2005 fingið telefaks har tygum føra fram, at ein av tygum navngivin kvinna (B við Stein)

av órøttum hevur fingið loyvi frá Innlendismálaráðnum til sama eftirnavn sum tygum, og tygum vilja tí hava Innlendismálaráðið at broyta hetta loyvi.

**Avgerð**
Innlendismálaráðið hevur í dag tikið avgerð um, at avvísa áheitan tygara.

**Viðmerkingar hjá Innlendismálaráðnum**
Innlendismálaráðið hevur givið loyvi til omanfyri nevndu navnabroyting við heimild í § 10, stk. 1, sbr. § 11, stk. 3 í tí føroysku navnlógini (løgtingslóg nr. 41 frá 26. mars 2002 um fólkanøvn). Sambært § 11, stk. 3 eru bústaðar- ella húsanøvn einans vard soleiðis, at onnur, ið kunnu vísa á, at tey hava tilknýti til bústað ella hús við sama navni, eisini kunnu fáa loyvi til navnið.

Vísandi til omanfyri standandi fer Innlendismálaráðið at avvísa áheitan tygara."

## Partshoyring

Fyri at umboðsmaðurin kundi meta um, hvørt hetta var eitt mál, ið kundi ella átti at verða kannað nærri, varð Innlendismálaráðið við skrivi, dagfest 10. jan. í ár, biðið um at greiða umboðsmanninum nærri frá málinum umframt at lata honum øll skjølini.

Við skrivi, dagfest 25. jan. 2006, hevur Innlendismálaráðið svarað umboðsmanninum soleiðis:

„Vísandi til skriv tygara, dagfest 10. januar 2006, ið snýr seg um eitt navnamál, har Innlendismálaráðið hevur givið persóni loyvi til at taka eftirnavnið „við Stein", verða hjáløgdu avrit av øllum skjølunum í báðum málunum send tygum, okkara j. nr. 2008-0164/2004 (B við Stein) og 2008-026/05 (A við Stein).

***Viðmerkingar frá Innlendismálaráðnum***
Innlendismálaráðið hevur við heimild í § 10, stk. 1, sbr. § 11, stk. 3 í navnalógini (løgtingslóg nr. 41 frá 26. mars 2002 um fólkanøvn) við navnaprógvi, dagfest tann 19. mai 2004, givið loyvi til, at B ....

strikar ættarnavnið „….“ og fær eftirnavnið „við Stein“ sum nýtt eftirnavn.

Sambært § 11, stk. 3 eru bústaðar- ella húsanøvn einans vard soleiðis, at onnur, ið kunna vísa á, at tey hava tilknýti til bústað ella hús við sama navni, eisini kunnu frá loyvi til navnið.

Umsøkjarin (B við Stein) sendi Innlendismálaráðnum váttan frá Runavíkar kommunu um, at staðið, har gomlu húsini, ið ……. bygdi norðan fyri kirkjuna á ….., verður kallað „við Stein“. ……. var abbi ommuna hjá B við Stein, og sambært umsøkjaranum er omma hennara fødd og uppvaksin undir somu lon sum abbin, tvs. á staðnum „við Stein“ á …...

Innlendismálaráðið hevur tí mett, at umsøkjarin (B við Stein) hevði eitt tilknýti til staðið „við Stein“ soleiðis, at hon við heimild í § 11, stk. 3 í navnalógini kundi fáa loyvi til eftirnavnið „við Stein“.

Av tí grund, hevur Innlendismálaráðið ikki gingið áheitanini frá A við Stein á møti um at taka loyvið aftur. Víst verður annars til avgerðina hjá Innlendismálaráðnum, dagfest 20. september 2005.“

Við skrivi, dagfest 31. jan. 2006, bað umboðsmaðurin Innlendismálaráðið greiða sær nærri frá, nær fólk verða mett at hava eitt slíkt tilknýti til eitt bústaðar-/húsanavn, at tey sambært navnalógini kunnu fáa loyvi til at nýta hetta sum eftirnavn.

Við skrivi, dagfest 23. febr. 2006, hevur Innlendismálaráðið greitt umboðsmanninum soleiðis frá hesum:

„Vísandi til skriv tygara, dagfest 31. januar 2006, har umboðsmaðurin biður um frágreiðing um, nær Innlendismálaráðið metir fólk hava eitt slíkt tilknýti til eitt bústaðar-/húsanavn, at tey sambært navnalógini kunnu fáa loyvi til at fáa hetta sum eftirnavn, skal vera greitt frá hesum og siðvenju á økinum.

Tá fólk søkja um loyvi til eftirnavn sambært § 11, stk. 3 í navnalógini, biður Innlendismálaráðið umsøkjaran um at vátta (skjalprógva) tilknýtið til bústaðar- ella húsanavnið. Vanliga verður hetta gjørt við, at umsøkjarin sjálvur vendir sær til kommununa har bústaðar- ella húsanavnið liggur og biður kommununa um at vátta:

- at tað snýr seg um eitt bústaðar- ella húsanavn og
- at umsøkjarin antin býr ella hevur búð á bústaðnum

Innlendismálaráðið ger síðan í hvørjum einstøkum føri eina ítøkiliga meting um fastleikan av tilknýtinum.“

Við skrivi, dagfest 28. febr. 2006, boðaði umboðsmaðurin Innlendismálaráðnum frá, at tað fyri umboðsmanninum at síggja ikki var samsvar millum hetta ítøkiliga málið og mannagongdina/siðvenjuna, sum ráðið vísti til í skrivi sínum. Umboðsmaðurin bað tí ráðið um viðmerkingar til hetta.

Við skrivi, dagfest 7. mars 2006, hevur Innlendismálaráðið latið umboðsmanninum soljóðandi ískoytisfrágreiðing:

„Víst verður til skriv tygara, dagfest 28. februar 2006, har biðið verður um, at Innlendismálaráðið greiðir frá, hvussu Innlendismálaráðið heldur avgerðina um at loyva eftirnavninum „við Stein“ samsvara við lógina/siðvenjuna á økinum, og um ráðið ætlar at gera meira við hetta málið.

Talan hevur í hesum málinum verið um eina umsókn um loyvi til eftirnavn sambært § 11, stk. 3 í løgtingslóg nr. 41 frá 26. mars 2002 um fólkanøvn (navnalógin).

Umsøkjarin hevur ikki kunna víst á, at hann sjálvur býr ella hevur búð á bústaðnum, men hevur hinvegin víst á, at omman er úr bústaði á ….. nevndur „við Stein“, og at umsøkjarin soleiðis hevur eitt tilknýti til henda bústað.

Av tí, at tað ikki greitt framgongur í navnalógini ella í viðmerkingunum til § 11, stk. 3, hvussu „tilknýti“ skal skiljast/tulkast, verður tað í hvørjum einstøkum føri gjørd ein ítøkilig meting um fastleikan av tilknýtinum. Snýr tað seg um umsøkjara, ið er ættaður úr einum ávísum bústaði, metir Innlendismálaráðið, at kann umsøkjarin vísa á, at hann hevur ættarbond í beinari linju, tvs. foreldur, ommur og abbar, ið eru ella hava verið búsitandi á staðnum, er hetta at meta sum eitt slíkt tilknýti, at umsøkjarin kann fáa loyvi til at bera navnið.

Innlendismálaráðið hevur eisini í øðrum málum givið loyvi til eftirnavn (bústaðarnavn), har umsøkjarin ikki býr ella hevur búð á

staðnum, men tí umsøkjarin hevur haft forfedrar í beinari linju, ið hava búð ella búgva á bústaðnum.

Havandi í huga skriv okkara, dagfest 23. februar 2006, átti Innlendismálaráðið at tikið hetta við í fráðgreiðingina um, nær Innlendismálaráðið metir fólk at hava eitt tilknýti til eitt bústaðar-/húsanavn, at tey sambært navnalógini kunnu fáa loyvi til at fáa hetta sum eftirnavn.

Tí skuldi hendan frágreiðing eisini havt lýst, at umsøkjari, ið ikki býr ella hevur búð á staðnum, kann venda sær til kommununa og fáa kommununa at váttað:

- at umsøkjarin er ættaður úr bústaðnum

Innlendismálaráðið ger síðan í hvørjum einstøkum føri eina ítøkiliga meting um fastleikan av hesum tilknýti.

Innlendismálaráðið fer ikki at gera meira við hetta málið. Hetta er grundað á, at talan í hesum ítøkiliga málinum hevur verið um eina meting av fastleikanum av tilknýtinum har komið er fram til, at umsøkjarin hevði eitt sovorðið tilknýti til bústaðin, at loyvi kundi gevast til eftirnavnið eftir § 11, stk. 3 í navnalógini.“

Við skrivi, dagfest 16. mars 2006, bað umboðsmaðurin Innlendismálaráðið greiða sær frá, hvussu nógv dømi av hesum slagnum talan var um, og um hesi øll vórðu játtaði. Eisini varð ráðið biðið um at lata umboðsmanninum til láns øll málini av hesum slagi, sum vórðu avgreidd aftaná 1. jan. 2001.

Við skrivi, dagfest 4. apríl 2006, hevur Innlendismálaráðið svarað umboðsmanninum soleiðis:

„Í skrivi frá umboðsmanninum, dagfest 16. mars 2006, verður Innlendismálaráðið biðið um at greiða frá, hvussu nógv fordømi eru í tali um umsóknir um loyvi til at taka eitt bústaðar- ella húsanavn til eftirnavn sambært § 11, stk. 3, har viðkomandi hevur ættarbond í beinari linju til onkran, sum er ella hevur verið búsitandi á staðnum, og um allar eru játtaðar.

Harumframt biður umboðsmaðurin um at fáa til láns øll málini av hesum slag, sum eru avgreidd aftaná 1. januar 2001.

**Viðmerkingar frá Innlendismálaráðnum**
Innlendismálaráðið hevur leitað aftur til 1. januar 2001. Innlendismálaráðið hevur funnið 7 mál av omanfyri nevnda slag, ið øll eru játtað.

Avrit av hesum omanfyri nevndu málum eru hjáløgd."

## *Niðurstøða*

*Í klaguni hevur A við Stein ført fram, at umsøkjarin ikki kundi fáa loyvi til at bera eftirnavnið „við Stein", tí at hetta navnið er vart sambært lóg.*

*Til hetta er at siga, at við navnalógini frá 1992 (løgtingslóg nr. 142 frá 8. oktober 1992 um fólkanøvn/om personsnavne) varð verjan av eftirnøvnum avmarkað, tá talan er um bústaðarnøvn. § 12, stk. 4 í hesari lógini varð orðað soleiðis:*

„Stk. 4. Navne efter bopælsnavn, der ikke kun findes ét sted her i landet, kan herefter ikke forbeholdes, og forbehold, som sådanne navne har efter hidtil gældende lovgivning, ophæves."

*Verjan av nøvnum eftir bústaðarnøvnum, ið ikki eru einnevnd í landinum, er sostatt avtikin við 1992-lógini.*

*§ 11, stk. 3 í galdandi navnalóg (løgtingslóg nr. 41 frá 26. mars 2002 um fólkanøvn) er soljóðandi:*

*„Stk. 3. Bústaðar- ella húsanøvn eru einans vard soleiðis, at onnur, ið kunnu vísa á, at tey hava tilknýti til bústað ella hús við sama navni, eisini kunnu fáa loyvi til navnið."*

*Hetta merkir, at hóast navnið „við Stein" verður nýtt í dag og harvið er vart, so kunnu fólk, sum kunnu vísa á tilknýti til hendan ella annan stað við sama navni, eisini fáa rætt til navnið.*

*Í klaguni hevur A við Stein ført fram, at umsøkjarin ikki sjálv hevði nakað tilknýti til staðið „við Stein", og at tað ikki er nokk, at omma hennara hevur búð á hesum staðnum.*

*Einki er sagt í lógini ella í viðmerkingunum til hesa, hvat er at skilja sum tilknýti, ið gevur rætt til at fáa navnið til eftirnavn. Landsstýrismaðurin skal tí meta um henda spurning í hvørjum einstøkum føri.*

*Innlendismálaráðið hevur greitt mær frá, at tað verður mett sum nøktandi tilknýti, um onkur av forfedrunum í beinari linju, hevur búð á staðnum. Ráðið hevur í hesum sambandi latið mær tey 7 málini til láns, sum eru avgreidd aftaná 1. jan. 2001, harav øll eru játtaði. Dømini, sum talan er um, eru hesi:*

- *á Kák (abbin og omma umsøkjaran vórðu kallað „á Kák")*
- *Fossá (abbin kallaður „við Fossá" – oldurabbin fyrstur at búsetast har)*
- *Mittún (pápin føddur/uppvaksin í Mittúni)*
- *Á Bø (omman og abbin búðu á Bø)*
- *Í Lon (omman búði í Lon)*
- *Í Skorti (langabbin setti búgv í Skorti – pápin føddur har)*
- *Í Bartalsstovu (mamman er úr Bartalsstovu)*

*Eg havi ikki grundarlag fyri at siga, at tulkingin hjá ráðnum ikki er í tráð við lóggávuna. Eg havi tí heldur ikki grundarlag fyri at finnast at avgerðini hjá ráðnum í hesum málinum.*

*Eg haldi kortini, at tað hevði verið ynskiligt, at tað var ásett í lógini ella í kunngerð við heimild í lógini, hvar markið fyri hesum tilknýti gongur. Serliga tí, at tilknýti til eitt staðar- ella bústaðarnavn natúrliga má metast at vikna, jú fleiri ættarlið eru millum umsøkjaran og tann av forfedrunum, ið hevur búð á staðnum. Hetta skal haldast upp ímóti atlitinum til tey, sum longu bera navnið frammanundan. Eg fari tí at mæla landsstýrismanninum til at umhugsa hendan spurningin nærri, tá broytingar møguliga aftur skulu gerast í navnalógini.*

*Burtursæð frá hesum haldi eg ikki grundarlag vera fyri at gera meira við hetta málið.*

## 25.2 Viðgerðartíð av umsókn um arbeiðs- og uppihaldsloyvi

Umboðsmaðurin hevði ongar viðmerkingar til, at ráðið hevði lagt málið, sum annars stóð til at enda við einum frámæli, til viks í 2004, meðan arbeitt var við at finna eina politiska loysn á málum av hesum slagnum. Umboðsmaðurin góðtók hinvegin ikki umberingina hjá ráðnum um, at talið av akademiskum málsviðgerum var lækkað á heysti 2004. Umboðsmaðurin vísti á týdningin av, at mál verða viðgjørd á forsvarligan hátt, og at viðgerðin ikki eigur at taka longri tíð enn neyðugt er. Umboðsmaðurin góðtók heldur ikki umberingina hjá ráðnum um, at nýggja umsóknin frá februar 2006 ikki var avgreidd, tí at ráðið ivaðist í, um hendan kundi komu undir „politisku loysnina" frá 2004. Umboðsmaðurin gav tí ráðnum eina átalu fyri viðgerðina av hesari umsóknini, og heitti samstundis á ráðið um at avgreiða málið, um hetta ikki longu var gjørt. (J. nr. 200600023/13).

## Klagan

Við skrivi, móttikið 6. mars 2006, hevur A, fólkatingslimur latið umboðsmanninum soljóðandi klagu:

**„Kæra viðvíkjandi viðgerðartíð av umsókn um arbeiðs- og uppihaldsloyvi**
Undirritaði heitir hervið á Løgtingsins umboðsmann um at kanna og meta viðgerðartíðina av umsókn um arbeiðs- og uppihaldsloyvum í Føroyum.

Klagan er viðvíkjandi tveimum ávísum persónum, ið hava søkt um varandi uppihaldsloyvi í Føroyum. Eg havi viðlagt fulltrú.

Gjøgnum tað síðsta árið hava minst 35 fólk vent sær til mín – sum Fólkatingsmaður valdur í Føroyum – vegna menniskjasligar kreppur orsakað av vantandi svari frá myndugleikunum uppá umsókn teirra um arbeiðs- og uppihaldsloyvi, familjusamanføring ella varandi uppihaldsloyvi.

Vantandi svar viðførir, at hesi fólk liva í einari drúgvari óvissu sum sjálvsagt ávirkar teirra lív og møguleikar. Hóast tey hava arbeiðstilboð, mugu tey bíða eftir svari – hetta kann hava við sær, at tey orsakað av sálarligum trýsti eru tvungin at velja aðrar framtíðarætlanir. Ímeðan umsøknin um longt uppihaldsloyvi er undir viðgerð, kunnu tey, ið eru í Føroyum, ikki fara av landinum í yrkis- ella privatum ørindum.

Tey mál, ið eg havi fingið persónligan kunnleika til, eru serliga mál íkomin frá 2004 í samband við broytt fyrisitingarlig viðurskifti í viðgerðini av umsóknum. Hesar broytingar í reglugerðum og praksis eru framdar uttan tilsvarandi broytingar í útlendingalógini, ið er galdandi fyri Føroyar, og uttan nýggjar kunngerðir við heimild í útlendingalógini. (Málini verða avgjørd í útlendingastýrinum millum annað við støði í hoyringssvari frá tí føroyska landsstýrinum).

Tí havi eg spurt Integratiónsmálaráðharran um hennara meting av hesum mongu málum og av fyrisitingini og rættartrygdini hjá umsøkjarunum.

Avrit av svarinum frá ráðharranum er viðlagt. Ráðharrin upplýsir millum annað, at viðvíkjandi 85 málum hevur viðgerðartíðin verið yvir eitt hálvt ár, og at tað longsta málið tók 639 dagar. Í metingini av fyrisitingini og rættartrygdini hjá umsøkjarunum vísir ráðharrin millum annað til, at umsøkjarir kunnu leggja málini fyri Fólkatingsins Umboðsmann.

Eg havi fleiri ferðir mælt umsøkjarum, sum hugtung hava sett seg í samband við meg, til sjálvi at kæra ella at geva undirritaða fulltrú til at fara til Fólkatingsins Umboðsmann við teirra máli. Hetta hevur víst seg at vera ógvuliga trupult. Umsøkjarar vísa oftast til teirra royndir við myndugleikunum í heimlandi teirra, har tey óttast eina enn longri útsetan av teirra máli, ella eina negativa avgerð, um tey kæra yvir myndugleikarnar.

Hetta er sjálvsagt ein ógrundaður ótti, tá tað ræður um teir donsku og føroysku myndugleikarnar, men hetta er ein veruligur ótti fyri

umsøkjaran, soleiðis at teir halda seg aftur við at kæra og at geva fulltrú til at kæra. Eg havi tí bert kært til Fólkatingsins Umboðsmann viðvíkjandi tveimum málum.

Málið, ið hendan klagan viðvíkur, er millum annað eitt av teimum málunum, sum eg fyrr havi sent til Fólkatingsins Umboðsmann. Svarið frá Ministeriet for Flygtinge, Indvandrere og Integration var, at útlendingastýrið ikki kann átalast fyri sína viðgerðartíð, ið var tríggjar mánaðir. Eg havi viðlagt avrit av svarinum. Samlaða viðgerðartíðin var 13 mðr, men í 10 mðr lá málið í Føroyum -Innlendismálaráðið fekk umsóknina til ummælis frá fútanum 19. aug. 2004 og hevur sent ummælið aftur til fútan 3. juni. 2004.

Eg havi viðlagt fulltrú frá B, ið hevur søgt um varandi uppihaldsloyvi í Føroyum.

Harumframt er kæran viðvíkjandi ...

Undir ávísing til tey svar og upplýsingar, ið eg havi fingið frá Integrationsmálaráðharranum, og somuleiðis at ráðharrin beinleiðis vísir til at kæra til Umboðsmannin, vil eg eisini heita á Løgtingsins Umboðsmann at fara inn í málið um viðgerðartíðina av umsóknum til Føroyar."

Av tí, at klagan fevnir um tvey sjálvstøðug mál, sum einki hava við hvørt annað at gera, hevur umboðsmaðurin gjørt av at viðgera hesi hvørt sær. Hetta álitið fevnir um umsóknina frá B.

## Málsgongd

Umsóknin frá B verður send Innlendismálaráðnum til ummælis við soljóðandi skrivi, dagfest 19. aug. 2004:

„**Vedrørende britisk statsborger, B, f.d. ....**
Fremsendes Færøernes Landsstyre med anmodning om en udtalelse efter sagens anledning."

Viðvíkjandi sjálvari málsgongdini annars verður víst til frágreiðingina

frá Innlendismálaráðnum, dagfest 4. apríl 2006, ið er endurgivin niðanfyri undir partshoyringini.

Við skrivi, dagfest 3. juni 2005, hevur Innlendismálaráðið sent Føroya Landfúta soljóðandi ummæli av umsókniní:

> „Viðv. ríkisborgara úr Bretlandi, B, f. ...:
> Innlendismálaráðið hevur fingið umsókn frá omanfyri nevnda um tíðaróavmarkað uppihaldsloyvi í Føroyum til ummælis frá Landfútanum tann 19. august 2004.
>
> Viðvíkjandi framleingjan av arbeiðs- og uppihaldsloyvi hjá B er talan um framleingjan hjá sama arbeiðsgevara, og mett verður at lønarviðurskiftini hjá umsøkjaranum eru vanlig eftir føroyskum viðurskiftum. Innlendismálaráðið kann tí viðmæla at B fær longt sítt arbeiðs- og uppihaldsloyvi sum ....
>
> Av tí, at onki er upplýst frá Fútanum um, hvat Innlendismálaráðið verður biðið um at upplýsa í sambandi við umsóknina um tíðaróavmarkað uppihaldsloyvi, hevur Innlendismálaráðið fingið upplýsingar til vega um:
>
> - hvussu leingi umsøkjarin hevur búð í Føroyum,
> - um umsøkjarin hevur størri skuld enn 50.000 kr til tað almenna, ið er fallin til gjaldingar, og
> - revsiváttan.
>
> Sagt skal vera frá, at Innlendismálaráðið í mun til omanfyri nevndu upplýsingar, onga viðmerking hevur. Av tí at Innlendismálaráðið ikki hevur atgeingi til útlendingaskránna hjá Udlændingestyrelsen, hevur Innlendismálaráðið ikki kannað, um uppihaldsgrundarlagið hjá umsøkjaranum hevur verið (í høvuðsheitum) tað sama øll árini. Ummælið er givið við teirri fortreyt, at Udlændingestyrelsen, í sama mun sum siðvenja er í Danmark, tryggjar sær, at B lýkur treytirnar í mun til tíðaróavmarkað uppihaldsloyvi, herundir at uppihaldsgrundarlagið hjá umsøkjaranum hevur verið (í høvuðsheitum) tað sama øll árini.

+ skjøl
+ skjøl viðv. bústaðarváttan
+ váttan frá Toll- og Skattstovu Føroya
+ revsiváttan“

**Partshoyring**
Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna málið nærri við atliti at viðgerðartíðini hjá Innlendismálaráðnum, og við skrivi, dagfest 16. mars 2006, varð klagan send ráðnum til ummælis, eins og biðið varð um skjølini.

Við skrivi, dagfest 12. apríl 2006, hevur Innlendismálaráðið svarað umboðsmanninum soleiðis:

> „Viðvíkjandi áheitan tygara, dagf. 16. mars 2006 – í sambandi við klagu frá A, fólkatingslimi, um viðgerðartíðina í Innlendismálaráðnum í sambandi við umsóknir hjá B og ... um uppihaldsloyvi – sendir Innlendismálaráðið við hesum frágreiðing sína saman við umbidnu skjølunum.
>
> Aftrat skjølunum í málinum sendir ráðið eisini tær frágreiðingar um útlendingamál, sum víst verður til undir gjøgnumgongdini av málinum.“

Frágreiðingin, sum er dagfest 4. apríl 2006, er soljóðandi:

> **„Lýsing av málsgongdini viðvíkjandi umsókn um tíðaróavmarkað uppihaldsloyvi hjá B, f. ...**
>
> A, fólkatingslimur, hevur klagað til umboðsmannin um viðgerðartíðina hjá Innlendismálaráðnum í málinum um seinastu umsókn um arbeiðs- og uppihaldsloyvi hjá B, f. ..., sum harumframt snýr seg um umsókn um tíðaróavmarkað uppihaldsloyvi. Málsgongdin frá tí at Innlendismálaráðið fekk hesa umsókn til ummælis 23. august 2004, verður tí lýst niðanfyri. Tó verða øll skjøl í málinum send Løgtingsins umboðsmanni, eins og yvirlit yvir málsgongdina verður sent umboðsmanninum.

*Lýsing av málinum*
Innlendismálaráðið fekk 23. august 2004 í skrivi frá Føroya Landfúta, dagfest 19. august 2004, umsókn frá umsøkjaranum til ummælis við hesi orðing: **„Vedrørende britisk statsborger, B, f.d. .... Fremsendes Færøernes Landsstyre med anmodning om en udtalelse efter sagens anledning.“**

Hjálagt skrivinum frá Fútanum var umsóknarblað frá umsøkjaranum og váttan frá arbeiðsgevaranum, .... Á fyrstu síðu í umsóknarblaðnum hevði umsøkjarin skrivað, at hann søkti um tíðaróavmarkað (permanent) uppihaldsloyvi og á síðu trý í umsóknarblaðnum hevði umsøkjarin viðmerkt: **„I would like to apply for permanent permission to stay in the Faroe Islands as I have permanent employment and have lived here for seven years“.**

13. september 2004 heitir Innlendismálaráðið á Landsfólkayvirlitið um at upplýsa bútíðirnar hjá umsøkjaranum í Føroyum fyri at kanna, hvussu leingi umsøkjarin hevur búð í Føroyum. Tá søkt verður um tíðaróavmarkað uppihaldsloyvi í Føroyum, eru bútíðirnar í Føroyum avgerandi fyri, hvørt umsøkjarin kann fáa slíkt loyvi ella ikki (skjalið er skrásett í journalskipanini 12. november 2004).

Í skrivi, dagfest 11. november 2004, heitir Innlendismálaráðið á Toll- og Skattstovu Føroya um at fáa upplýsingar um samlaðu inntøkuna í 2003 og higartil í 2004. Hetta er vanlig mannagongd í málum um framleingjan av arbeiðs- og uppihaldsloyvum, og verður gjørt til tess at Innlendismálaráðið kann meta um, hvørt treytin um at lønin skal svara til eitt fulltíðarstarv samsvarandi føroyska lønarlagnum í viðkomandi vinnugrein, er lokin.

12. november 2004 er avrit av seinasta ummæli frá Vinnumálaráðnum, dagfest 20. august 2003, viðvíkjandi umsókn um arbeiðs- og uppihaldsloyvi frá umsøkjaranum, skrásett í málinum.

15. november 2004 sendir Toll- og Skattstova Føroya Innlendismálaráðnum umbidnu inntøkuupplýsingarnar.

Í skrivi, dagfest 1. februar 2005, heitir Innlendismálaráðið á Føroya Landfúta um at fáa revsiváttan fyri umsøkjarin, eins og heitt verður á Toll- og Skattstovu Føroya um at fáa upplýst, hvørt umsøkjarin hevur skuld til tað almenna, ið er fallin til gjaldingar. Orsøkin til at Innlendismálaráðið biður um hesar upplýsingar frá ávikavist Føroya Landfúta og Toll- og Skattstovu Føroya er, at tá søkt verður um tíðaróavmarkað uppihaldsloyvi er tað ein treyt, at umsøkjarin umframt at lúka treytirnar fyri framleingjan av arbeiðs- og uppihaldsloyvi ikki skal hava skuld til tað almenna, sum er fallin til gjaldingar, og er størri enn 50.000 kr, eins og krøv verða sett í sambandi við revsing, sbr. § 11, stk. 5, í, í *Anordning nr. 182 fra 22. marts 2001 om ikrafttræden for Færøerne af udlændingeloven* (hereftir: útlendingalógin).

Í skrivi, dagfest 4. februar 2005, upplýsir Toll- og Skattstova Føroya fyri Innlendismálaráðnum, at umsøkjarin onga falna skuld hevur til Toll- og Skattstovu Føroya d.d.

8. februar 2005 sendir Føroya Landfúti Innlendismálaráðnum „Straffeattest til offentlig brug“ fyri tíðarskeiðið, sum umsøkjarin hevur búð í Føroyum.

Í skrivi, dagfest 3. juni 2005, sendir Innlendismálaráðið ummæli til Føroya Landfúta.

*Viðmerkingar til viðgerðartíðina*

Eftir at málið er komið í Innlendismálaráðið, er tað fyrsta sum hendir í málinum, at upplýsingar verða útvegaðar frá Landsfólkayvirlitinum tann 13. september 2004. Frá 13. september og fram til 11. november 2004 hendir onki í málinum. Undir vanligum umstøðum vildi hetta (ivaleyst/helst) verið mett sum ov long tíð, at onki hendir í málinum. Til júst hetta tíðarskeið er at viðmerkja, at í september 2004 kom í lag politiska fyribilsloysnin um at framleingja arbeiðs- og uppihaldsloyvir til sama arbeiðsgevara, uttan at meta um generellu arbeiðsmarknaðarstøðuna, sbrt. § 9, stk. 2, nr. 3, eins og ítróttaravtalan eisini varð gjørd um somu tíð, sbr. pkt. 4 og 5 í generellu frágreiðingini.

Hetta førdi við sær, at tey nógvu málini, ið ikki vóru avgreidd, tí bíðað hevði verið eftir politisku loysnini, í stóran mun máttu avgreiðast áðrenn tey nýggju málini vórðu avgreidd. Harafturat minkaði talið á fulltrúum, sum lutvíst arbeiddu við útlendingamálum, úr trimum niður í tveir, sum ein fylgja av skerjingunum hjá landsstýrinum á heystið 2004.

Hetta var helst orsøkin til, at so lítið hendi í málinum frá 23. august til 11. november 2004. Í november 2004 vóru tær vanligu upplýsingarnar í mun til framleingjan av arbeiðs- og uppihaldsloyvum útvegaðar. Hevði ummælið bara snúð seg um eina vanliga framleingjan av arbeiðs- og uppihaldsloyvinum, hevði Innlendismálaráðið ongar trupulleikar havt við at avgreitt málið í november 2004.

Trupulleikin hjá Innlendismálaráðnum var, at sambært skrivinum frá Føroya Landfúta var ikki tilskilað, hvat Innlendismálaráðið skuldi ummæla í hesum føri, tá umsøkjarin, afturat umsóknini um framleingjan av arbeiðs- og uppihaldsloyvinum, søkti um tíðaróavmarkað uppihaldsloyvi, bæði við frámerki og serligari viðmerking, har umsøkjarin sjálvur í umsóknarblaðnum hevði tilskilað hetta.

Ongar skrivaðar reglur eru viðvíkjandi tíðaróavmarkaðum uppihaldsloyvum grundað á arbeiðsloyvi, men sbrt. § 11, stk. 4, í útlendingalógini ber til eftir umsókn at geva tíðaróaavmarkað uppihaldsloyvi, tá serlig viðurskifti tala fyri hesum. Eftir donskum reglum er siðvenja, at hevur umsøkjarin arbeitt í minsta lagi 7 ár í landinum, og hevur uppihaldsgrundarlagið hjá umsøkjaranum verið (í høvuðsheitum) tað sama øll árini, ber til at fáa slíkt loyvi, tá ymiskar aðrar treytir eru loknar.

Á heystið 2004 hevði Innlendismálaráðið ummælt arbeiðs- og uppihaldsloyvir í umleið 9 mánaðir. Hetta var ein av teimum fyrstu umsóknunum um tíðaróavmarkað uppihaldsloyvi, og hevði Innlendismálaráðið á heystið 2004 ikki nóg mikið av løgfrøðiligum førleika til at ummæla hesi mál, tá tað ikki frammanundan var tilskilað, hvat ið Innlendismálaráðið ítøkiliga skuldi ummæla.

Í desember 2004 vóru tvey starvsfólk úr Innlendismálaráðnum á arbeiðsvitjan í Udlændingestyrelsen eina viku hvør. Hesi arbeiðsuppihald umframt onnur kunning frá Udlændingestyrelsen og Føroya Landfúta um m.a. óskrivaðar reglur á økinum, førdu við sær, at Innlendismálaráðið í februar 2005 í hesum máli bað um revsiváttan frá Føroya Landfúta og um upplýsingar um møguliga almenna skuld frá Toll- og Skattstovu Føroya, av tí at hetta vóru nakrar av treytunum fyri at kunna fáa tíðaróavmarkað uppihaldsloyvi, sbrt. § 11, stk. 4 og 5, í útlendingalógini.

Frá tí at upplýsingarnar vóru útvegaðar í februar 2005 gingu nærum 4 mánaðir til Innlendismálaráðið sendi ummæli til Føroya Landfúta 3. juni 2005. Ymiskar orsøkir vóru til hetta. Hóast upplýsingarnar vóru útvegaðar, so var ikki greitt, hvussu víðari skuldi farast fram í málinum. Fútin hevði ikki biðið um eitt tilskilað ummæli, eins og Innlendismálaráðið ongantíð áður hevði ummælt slík mál.

Arbeiðsorkan í Innlendismálaráðnum var sera lítil í mun til tær uppgávur, ið vóru í stjórnarráðnum, og var tí neyðugt at raðfesta uppgávurnar, sbr. pkt. 5. í frágreiðingini.

Raðfestingin hjá Innlendismálaráðnum millum tey meira arbeiðskrevjandi málini var, at tey málini, ið vóru mett at vera mest átrokandi, og har tað kundi fáa serliga tyngjandi fylgjur fyri umsøkjaran – ella fyri avvarðandi vinnuvirki — um málið kom í drag, vóru ummæld fyrst. Hetta kundi til dømis vera, um umsøkjarin ikki hevði uppihaldsloyvi frammanundan, ella ætlaði at skifta arbeiðsøki, og tí beinleiðis varð forðaður í ætlanum sínum, til málið var avgreitt. Harafturímóti metti Innlendismálaráðið, at tey mál, har umsøkjarin søkti um framlongt arbeiðsloyvi – og umsøkjarin tí kundi virka sum vant í Føroyum til umsóknin varð avgreidd, frægari toldi at bíða.

Í ítøkiliga málinum kundi umsøkjarin halda fram við arbeiði sínum í Føroyum, hóast málið ikki varð avgreitt. Hetta er í sjálvum sær ikki nøkur grundgeving fyri, at málið tók so drúgva tíð at ummæla, men er ein grundgeving fyri ta raðfesting, sum Innlendismálaráðið gjørdi í hesum sambandi.

Aftaná at hava umrøtt hetta slagið av málum fleiri ferðir á innanhýsis fundum í Innlendismálaráðnum, varð komið fram til ein leist at ummæla hesi mál eftir, sbr. skjal nr. 10. Málið varð saman við tveimum øðrum umsóknum um tíðaróavmarkað uppihaldsloyvir ummælt 3. juni 2005 (umsóknirnar frá hinum báðum umsøkjarunum vóru ummældar 31. mai 2005).

*Galdandi mannagongd*
Innlendismálaráðið hevur í dag mannagongd fyri, hvussu málini skulu upplýsast, tá søkt verður um tíðaróavmarkað uppihaldsloyvi. Mannagongdin er sambært *Vegleiðing til ummæli av útlendingamálum* hendan:

**„Ummæli av tíðaróavmarkaðum uppihaldsloyvum**
Søkir umsøkjarin um tíðaróavmarkað uppihaldsloyvi, grundað á arbeiðsloyvi, sbrt. §11, stk. 4, í útl. verður afturat vanligu viðgerðini um arbeiðs- og uppihaldsloyvi biðið um:
1. Váttan frá Landsfólkayvirlitinum um, hvussu leingi umsøkjarin hevur búð í Føroyum. (Sambært siðvenju skal umsøkjarin hava arbeitt í minsta lagi 7 ár í Føroyum, og skal uppihaldsgrundarlagið hjá umsøkjaranum hava verið (í høvuðsheitum) tað sama øll árini. Umsøkjarin hevur ikki krav um at fáa tíðaróavmarkað uppihaldsloyvi).
2. Váttan frá Toll- og Skattstovu Føroya og Almannastovuni um, hvørt umsøkjarin hevur skuld til tað almenna, sum er fallin til gjaldingar, og er størri enn 50.000 kr.
3. Revsiváttan frá Fútanum.

Um øll skjøl eru í lagi, sbr. § 11, stk. 2, nr. 2, í útl. verður ummæli sent til Fútan við standardorðing, møguliga við onkrari viðmerking (sí standardorðing).“

Leggjast skal afturat, at um umsóknin um tíðaróavmarkað uppihaldsloyvi av einari ella aðrari orsøk er trupul at viðgera, hevur Innlendismálaráðið í onkrum føri viðgjørt umsóknina um framleingjan av arbeiðs- og uppihaldsloyvi fyri seg, meðan

bíðað hevur verið við at ummæla umsóknina um tíðaróavmarkað uppihaldsloyvi.

*Onnur viðmerking*
Vísast kann á brot úr parti, sum embætisfólk úr Innlendismálaráðnum hava sent til Integrationsministeriet 1. februar 2006 í sambandi við at arbeiðsbólkur, mannaður við føroyskum og donskum embætisfólki, varð settur at betra um mannagongdirnar og stytta um avgreiðslutíðirnar í útlendingamálum.

Føroysku embætisfólkini vístu í hesum sambandi á, at uppgávubýtið í sambandi við umsóknir um tíðaróavmarkað uppihaldsloyvir var ógreitt, t.d. viðvíkjandi:

- hvørji viðurskifti Innlendismálaráðið heilt ítøkiliga skal ummæla,
- hvussu Udlændingestyrelsen tulkar tey ummæli, sum Innlendismálaráðið ger, og í hvønn mun tey verða partur av sjálvari avgerðini, og
- hvussu Udlændingestyrelsen hevði "fyrihildið seg til" mál, sum Innlendismálaráðið ikki ummældi ella greiddi frá, hví mett var, at tað ikki bar til at ummæla málið, sbr. hjálagda skriv um **Kommunikation mellem danske og færøske myndigheder og afgivelse af høringsudtalelser** — *Anmodninger om høringsudtalelser i sager om permanent opholdstilladelse.*

Spurningur kann harafturat møguliga verða settur við, hví Innlendismálaráðið ikki bara sendi umsóknina aftur til Føroya Landfúta og bað um at fáa tilskilað, hvat Innlendismálaráðið ítøkiliga skuldi ummæla. Við tí vitan, sum Innlendismálaráðið hevur um útlendingaøkið í dag, hevði hetta mál møguliga verið skjótari avgreitt, um umsóknin beinanvegin var send aftur til Fútan og biðið varð um at fáa tilskilað, hvat Innlendismálaráðið ítøkiliga skuldi ummæla.

Brot úr parti, sum embætisfólk úr Innlendismálaráðnum sendu Integrationsministeriet 1. februar 2006 í sambandi við at arbeiðsbólkur, mannaður við føroyskum og donskum embætisfólki, varð settur

at betra um mannagongdirnar og stytta um avgreiðslutíðirnar í útlendingamálum:

**Kommunikationen mellem danske og færøske myndigheder og afgivelse af høringsudtalelser**
Der er i udlændingeloven 3 høringsbestemmelser, hvorefter landsstyret kan blive hørt (§ 9, stk. 12 (vedr. forsørgelseskrav), § 9, stk. 13 (vedr. boligforhold) og § 46, stk. 4 (alle afgørelsessager)), og der er bemyndigelser til at Integrationsministeren kan efter forhandling med landsstyret fastsætte nærmere regler herfor – både konkret og generelt; men der er ikke fastsat nogen nærmere regler.

IMR's erfaringer fra de seneste års administration af udlændingeområdet viser, at der er et klart behov for en sådan regelfastsættelse, samt for at aftale nærmere, hvorledes kommunikationen mellem færøske og danske myndigheder på udlændingeområdet bør foregå. Derudover er det nødvendigt at få afklaret nærmere og helt konkret, hvilke gensidige forventninger der foreligger eller bør være.

Mangelen på nærmere regelfastsættelse betyder for IMR's vedkommende, at det er aldeles uklart, hvilken rolle der er tiltænkt IMR i forbindelse med afgivelse af udtalelser. Den <u>eneste</u>, *delvise* undtagelse er i forbindelse med afgivelse af udtalelser vedrørende ansøgninger om arbejds- og opholdstilladelser til almindeligt lønarbejde, hvor der er en vis vejledning indbygget i selve høringsanmodningen fra Udlændingestyrelsen.

*Anmodninger om høringsudtalelser i sager om permanent opholdstilladelse*
For IMR er der f. eks. store uklarheder vedrørende opgavefordelingen i forbindelse med ansøgninger om permanente opholdstilladelser, eksempelvis hvem der skal vurdere ansøgernes sprogkundskaber, og hvordan denne vurdering foretages.

I samtlige tilfælde er der uklarhed om
- Hvilke forhold IMR helt konkret bør udtale sig om

- På hvilke måder IMR bør foretage de vurderinger, der ligger til grund for udtalelserne
- Hvordan Udlændingestyrelsen tolker de udtalelser som IMR afgiver, og med hvilken vægt de indgår i de forskellige afgørelsesprocesser
- Hvordan Udlændingestyrelsen ville forholde sig til sager, hvor IMR helt undlader at udtale sig, eller forklarer hvorfor man ikke ser sig i stand til at afgive udtalelser

Denne uklarhed, og de deraf følgende tilbagevendende tvivlsspørgsmål, bidrager væsentligt til at forlænge den i forvejen for lange ekspeditionstid i IMR."

Generella frágreiðingin, sum víst verður til undir partinum: „*Viðmerkingar til viðgerðartíðina*" er soljóðandi:

**Um útlendingaøkið og leiklutin hjá Innlendismálaráðnum í útlendingamálum**

**1. Um avgerðarheimildir at viðgera útlendingamál og um leiklutin hjá Innlendis-málaráðnum**

Mál um arbeiðs- og uppihaldsloyvi eru partar av málsøkinum „Útlendingamál", sum er ríkismál.

Føroyar og Danmark eru eisini í mun til útlendingaøkið hvør sítt løgdømi. Londini eru tí hvør sítt uppihaldsøki, soleiðis at skilja at loyvi (bæði visa og verulig uppihaldsloyvi) til uppihald í Føroyum galda ikki í Danmark, og loyvi til uppihald í Danmark galda ikki í Føroyum.

Uppihaldsloyvi, grundað á familjusamanføring, *skulu* verða givin, tá ið ávísar treytir eru loknar, og verða givin við atliti at tíðar-óavmarkaðum loyvi, men avmarkað til 1 ár í senn fyrstu 3 árini, sbr. § 9, stk. 1, í útlendingalógini. Eftir 3 ár verður so tíðaróavmarkað loyvi givið, uttan so at serlig viðurskifti eru (fyrst og fremst serlig revsiverd viðurskifti, og ikki-hildin skuld til hitt almenna), sum tala ímóti hesum, sbr. § 11, stk. 3 og 5, í „Anordning nr. 182 af 22.03.2001 om ikrafttræden for Færøerne af udlændingeloven", hereftir útlendinga-lógin.

Uppihaldsloyvi, grundað á arbeiði, *kunnu* verða givin, um serlig vinnulig ella serlig arbeiðsmarknaðarlig viðurskifti tala fyri hesum, sbr. § 9, stk. 2, nr. 3, í útlendingalógini. Hesi arbeiðs- og uppihaldsloyvi verða altíð staðbundin til eitt ávíst arbeiði hjá einum ávísum arbeiðsgevara, og verða givin við atliti at fyribils uppihaldi, tíðaravmarkað eftir ítøkiliga arbeiðstilboðnum; men kortini til í mesta lagi 1 ár í senn, sbr. §§ 13 og 15 í útlendingalógini. Siðvenja er, at hevur útlendingur havt arbeiðs- og uppihaldsloyvi, sum í høvuðsheitum er grundað á somu viðurskifti, í 7 ár uttan íhald, kann hann søkja um tíðaróavmarkað uppihaldsloyvi, sum hann kann fáa, um serlig viðurskifti tala fyri hesum, og um serlig viðurskifti (fyrst og fremst serlig revsiverd viðurskifti, og ikki-hildin skuld til hitt almenna) ikki eru, sum tala ímóti hesum, sbr. § 11, stk. 4 og 5, í útlendingalógini.

Útlendingur við tíðaróavmarkaðum uppihaldsloyvi er ikki bundin til ávísan arbeiðsgevara, men hevur rætt til at finna sær arbeiði á jøvnum føti við danskar og aðrar norðurlendskar ríkisborgarar, sbr. § 14, stk. 1, nr. 3, í útlendingalógini.

Danska útlendingalógin er við ríkislógartilmæli sett í gildi her við teimum tillagingum, sum mett verður, at serligu føroysku viðurskiftini gera, at tørvur er á.

Søguliga sæð verða slíkar tillagingar mestsum bara gjørdar við at ásetingar, sum ikki verða mettar at hóska til føroysk viðurskifti, verða tiknar úr. Sum vanligt er á økjum, ið eru felagsmál, hava hvørki danska stjórnin ella landsstýrið roynt at orða ein serligan útlendingapolitikk fyri Føroyar. Munurin millum galdandi útlendingalóg í Danmark og okkara er tí fyrst og fremst, at ásetingar um ríkisborgarar úr EBS-londunum, og um teir partarnar av Schengen-samstarvinum, sum Føroyar ikki eru fevndar av, ikki galda í Føroyum. Harafturat er lógin her ikki broytt síðani 2001, so allar tær nógvu herðingarnar í donsku útlendingalógini galda ikki í Føroyum. Loksins eru ongar kunngerðir eftir føroysku útlendingalógini.

Ongin integratiónslóg er fyri Føroyar.

Danska Integratiónsmálaráðið og danska Útlendingastýrið undir

tí, umsita økið sambært „Anordning nr. 182 af 22.03.2001 om ikrafttræden for Færøerne af udlændingeloven".

Landsstýrið (Innlendismálaráðið) hevur ongar avgerðarheimildir viðvíkjandi útlendingamálum, men verður oftast hoyrt, áðrenn Útlendingastýrið tekur avgerð í málum um uppihaldsloyvi í Føroyum.

Hetta eru lógásett, men ikki lógkravd ummæli, og viðhvørt verða avgerðir tiknar, uttan at Innlendismálaráðið verður hoyrt. Tað vanliga er tó, at Útlendingastýrið sendir mál til hoyringar, og fylgir ummælunum.

Innlendismálaráðið skal eisini verða hoyrt, um so verður at donsku myndugleikarnir fara at gera kunngerðir ella aðrar nærri reglur sambært ásetingunum í lógini.

Innlendismálaráðið er sum sagt ikki avgerðarmyndugleiki á útlendingaøkinum – leiklutur tess í mun til persónsmálini er einans at lata donsku myndugleikunum ummæli. Vegleiðingarskyldan liggur tí hjá donsku myndugleikunum. Hinvegin venda viðskiftafólk og avvarðandi teirra, eins og arbeiðsgevara- og arbeiðstakaraumboð, sær ofta til Innlendismálaráðið, helst tí at Innlendismálaráðið er føroyskur myndugleiki, og tí tað er sera kostnaðarmikið at ringja til Udlændingestyrelsen (bíðitíðin hevur vanliga verið 20 minuttir ella meira, men nú eru tiltøk sett í verk at bøta um tænastuna). Aftrat hesum kemur, at summir útlendingar, sum hava verið nøkur ár í Føroyum, skilja føroyskt hampiliga væl, men als ikki danskt.

Í slíkum førum greiðir Innlendismálaráðið vanliga viðskiftafólkunum frá generella muninum millum galdandi reglur í Danmark og í Føroyum, og um vanligastu trupulleikarnar, sum kunnu taka seg upp í sambandi við ymsu sløgini av umsóknum. Innlendismálaráðið roynir hinvegin sum mest at halda seg frá at ráðgeva og leiðbeina ítøkiliga viðvíkjandi einstøku málunum, bæði tí at Innlendismálaráðið metir, at tað sum ummælandi myndugleiki ikki eigur at átaka sær henda leiklutin, og tí tað oftast ikki er umsøkjarin sjálvur, sum vendir sær til

Innlendismálaráðið, men onnur avvarðandi, so sum arbeiðsgevarar ella makar. Innlendismálaráðið metir heldur ikki, at tað er í tráð við leiklut tess sum hoyringsmyndugleiki at venda sær til donsku myndugleikarnar vegna viðskiftafólk teirra.

Onki kunningartilfar er gjørt um føroysk viðurskifti — uttan okkurt heilt smávegis á heimasíðunum hjá føroysku umboðsstovunum um visum og arbeiðs- og uppihaldsloyvi, sum umboðsstovan í Onglandi hevur framleitt saman við Innlendismálaráðnum, sí t.d. http://www.faroeislands.org.uk/Default.asp?f=2B8310Al-2E32-4B7E-968B-7E3650FC1527.

Av tí at Innlendismálaráðið einans er hoyringsmyndugleiki á útlendingaøkinum, er tað ikki mannað til at vegleiða viðskiftafólkum í hópatali, og Innlendismálaráðið ger tí ikki notat viðvíkjandi generellum telefonfyrispurningunum. Innlendismálaráðið metir at hetta er forsvarligt, av tí at fyrispurningarnir í størstan mun verða svaraðir generelt (uttan ítøkiliga ráðgeving og leiðbeining), og tí at vegleiðingin sum so ikki er partur av uppgávuni hjá Innlendismálaráðnum. – Tí er so at siga onki skjalfest frá teimum mongu telefonsamrøðum, sum hava verið ...

Hendir tað seg, at Innlendismálaráðið kortini í undantaksførum veitir ítøkiliga ráðgeving og leiðbeining, ella koma upplýsingar fram í telefonsamrøðunum, sum verða mettar at kunna hava týdning fyri ummælini hjá Innlendismálaráðnum – ella verður mett, at talan er um upplýsingar ella annað, ið donsku útlendingamyndugleikarnir ikki kenna – verður hetta tó altíð ført til skjals. – ...

Tá Innlendismálaráðið svarar umsøkjarum viðvíkjandi avgreiðslutíð, verður sagt, at ikki ber til at siga nakað fast um avgreiðslutíðina, uttan at hon í øllum førum er long. Verður nakað neyvari sagt um avgreiðslutíð, er tað ikki annað enn at tað kann henda, at mál verða avgreidd eftir bert 3 mánaðum, men at onki óvanligt er í, at mál taka hálvt ár ella meira. Annars vísir Innlendismálaráðið til leiðbeinandi avgreiðslutíðirnar hjá Udlændingestyrelsen á http://www.udlst.dk/Statistik/sagsbehandlingstider.htm, sum javnan verða dagførdar.

## 2. Postgongdin

### 2.1. Útlendingur, staddur uttanlands, søkir um familjusamanføring ella arbeiðs- og uppihaldsloyvi:

1. Útlendingur letur inn umsókn á danskari sendistovu í tí landinum, har hann býr lógliga. Passið skal fylgja við.
2. Sendistovan váttar samleika umsøkjarans og møguliga onnur viðkomandi skjøl, og sendir Útlendingastýrinum alt tilfarið.
3. Útlendingastýrið kannar, hvørt avgerandi fortreytir fyri at málið kann verða veruleikaviðgjørt vanta (sum kunnu føra til „allerede fordi-afslag“). Eru ongir tílíkir manglar, sendir Útlendingastýrið Føroya Landfúta umsóknina við áheitan um at senda Innlendismálaráðnum umsóknina til hoyringar.
4. Føroya Landfúti kannar m.a., um útlendingurin er kendur í Schengen-kunningarskipanini, og sendir annars Innlendismálaráðnum umsóknina til hoyringar.
5. Innlendismálaráðið ger neyðugar kanningar viðvíkjandi viðurskiftum í Føroyum. Verður søkt um familjusamanføring, kannar Innlendismálaráðið t.d. um umsøkjarin framhaldandi er skrásettur at búgva saman við hjúnafelaga/sambúgva. Verður søkt um arbeiðs- og uppihaldsloyvi, ger Innlendismálaráðið eina ella fleiri av hesum kanningum:
   a. Innlendismálaráðið metir um støðuna á viðkomandi parti av arbeiðsmarknaðinum
   b. ráðførir seg við ALS
   c. spyr arbeiðsgevaran nærri – við spurnarblaði til útfyllingar – og biður ofta um ískoytissupplýsingar
   d. ráðførir seg við avvarðandi arbeiðsgevara- og arbeiðstakarafeløg
6. Innlendismálaráðið metir um málið, og sendir politinum sítt ummæli.
7. Politiið sendir Útlendingastýrinum málið aftur, saman við upplýsingum frá sínari egnu eftirkanning, og saman við ummæli Innlendismálaráðsins.

8. Útlendingastýrið tekur avgerð, og sendir sendistovuni avgerðina í brævi saman við passinum.
9. Sendistovan kunnar umsøkjaran um avgerðina. Sendistovan skal eisini kunna umsøkjaran munnliga um avgerðina, um hvussu longi loyvið varir (vanliga upp til 1 ár), og kunna um treytirnar, sum eru tengdar at loyvinum. Sendistovan festir uppihaldsloyvið í passið, og flýggjar umsøkjaranum passið aftur.

Innlendismálaráðið fær onga kunning um avgerðina hjá Udlændingestyrelsen, og hevur ikki meira við málið at gera, fyrr enn ein møgulig umsókn um framlongt uppihaldsloyvi kemur til viðgerðar seinni.

**2.2. Útlendingur, staddur í Føroyum, søkir um familjusamanføring ella framlongt arbeiðs- og uppihaldsloyvi:**

Tá ið útlendingur søkir um framlongt loyvi, letur hann vanliga umsóknina inn hjá politinum í Føroyum. Eisini aðrir útlendingar, sum eru lógliga í Føroyum (tv.s. eru her í visumtíðarskeiði sínum, annaðhvørt við visum ella sum visumfrítiknir, ella útlendingar, sum longu hava uppihaldsloyvi), kunnu lata umsókn um familjusamanføring inn í Føroyum, og kunnu eisini fáa loyvi at uppihalda sær her, meðan teir bíða eftir, at umsóknin verður viðgjørd.

Í slíkum førum fær politiið í Føroyum leiklutin hjá sendistovuni, sum nevndur er í pettunum 1, 2, 7 og 8, og sendir Innlendismálaráðnum málið til hoyringar, áðrenn Útlendingastýrið sær tað.

Mannagongdirnar í Innlendismálaráðnum eru annars tær somu, tó við tí fráviki, at tá ið søkt verður um framlongt arbeiðs- og uppihaldsloyvi, kannar Innlendismálaráðið í hvørjum einstøkum føri (við kontuavriti av fyribilsskattaskránni frá Toll- og Skattastovuni), hvørt inntøkan hevur verið í minsta lagi tann, sum er vanlig fyri viðkomandi starvsslag í Føroyum, og hvørt hon samsvarar við tað, sum arbeiðsgevarin hevur lovað í arbeiðsgevaraváttanini til umsøkjaran.

- Innlendismálaráðið hevur biðið um at fáa avrit av avgerðunum um uppihaldsloyvi til kunningar, so tað fær frægari grundarlag at vegleiða eftir; men donsku myndugleikarnir ivast í, um teir hava heimild til, sum fasta mannagongd og uttan givna orsøk í hvørjum einstøkum føri, at lata Innlendismálaráðnum hesa kunning, vísandi til at Innlendismálaráðið bert er hoyringsmyndugleiki.

**3. Um siðvenjuna viðvíkjandi tí, at landsstýrið verður hoyrt – vantandi reglur**

Siðvenja hevur verið, at landsstýrið javnan hevur fingið mál um uppihaldsloyvi til útlendingar til hoyringar, serliga mál um arbeiðs- og uppihaldsloyvi.

Eftir at mikil umrøða var í sambandi við, at Útlendingastýrið hevði umsóknir um arbeiðs-og uppihaldsloyvi frá nøkrum ávísum útlendingum um arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum til viðgerðar, ynskti landsstýrið – eisini sum lið í fyrireikingum til ætlanirnar, ið tá vóru um at yvirtaka økið — at verða kunnað betur um útlendingamál.

Tá ið lógin varð dagførd í 2000, vórðu tí nógvar heimildir settar inn í lógina, so donsku myndugleikarnir fast kundu hoyra landsstýrið, áðrenn teir tóku avgerð.

Onki nærri bleiv avrátt um ummælini í sambandi við lógarbroytingarnar — eitt nú um, hvørji viðurskifti ummælismyndugleikin skuldi leggja serligan dent á. Ongar nærri reglur eru síðani ásettar í sambandi við ummælini, og kunngerðarheimildirnar í lógini eru í ongum føri nýttar fyri Føroya viðkomandi, hvørki áðrenn ella eftir lógarbroytingarnar í 2000 og 2001.

Ógreitt er, hví onki hendi beint eftir lógarbroytingina í 2000, men í politiskt spentu støðuni í sambandi við fyrireikingarnar til fullveldissamráðingarnar setti táverandi danski forsætismálaráðharrin donsku stjórnarráðunum, og myndugleikum undir teimum, forboð fyri yvirhøvur at samskifta beinleiðis við føroyskar myndugleikar, og hetta man í hvussu so er hava verið medvirkandi orsøk til, at

onki tá varð gjørt hesum viðvíkjandi. Somuleiðis hevur danska embætisverkið givið ábendingar um, at tað hevur raðfest uppgávurnar at gera kunngerðir lágt, tí danir øll árini hava væntað, at økið varð yvirtikið skjótt – um eitt ár ella so. Í staðin hevur verið røtt um at gera aðrar reglur og mannagongdir, ið skuldu galda, til økið varð yvirtikið, men hetta er so ikki enn blivið til nakað.

Hetta hevur ført við sær, at hóast leikluturin hjá (nú) Innlendismálaráðnum sum ummælandi myndugleiki er sera avmarkaður í mun til einstøku málini, er serstakliga trupult at ummæla málini á nøktandi hátt, tí Innlendismálaráðið noyðist av eintingum at finna fram til, hvat verður væntað av tí í sambandi við ymisku sløgini av ummælum, og mótsett eitt nú flóttafólkaviðurskiftum eru teir partarnir av útlendingarætti, sum eru um familjusamanføring og arbeiðs- og uppihaldsloyvi, sera lítið lýstir í fakbókmentunum. — At bøta eitt sindur um hetta, tók Innlendismálaráðið í 2004 stig til at tvey starvsfólk úr Innlendismálaráðnum í styttri skifti vóru í Udlændingestyrelsen at nema sær kunnleika um málsviðgerina har, fyri soleiðis at fáa frægari ábendingar um, hvussu ummælini úr Innlendismálaráðnum skulu passa inn í heildina. Hetta hevur lætt nakað um, og í næstum verður ein skipan við føstum samstarvsfeløgum í Integrationsministeriet og Udlændingestyrelsen – sum Innlendismálaráðið altíð kann venda sær til – vónandi sett í verk, og soleiðis fara ivamálini vónandi at fækka nakað.

## 4. Broytingar í ummælissiðvenjuni

### 4.1. Fútaskrivstovan avmarkar sín leiklut

Siðvenjan til í 2002 var, at Fútin í ummælisáheitan síni greiddi stutt frá, hvat slag av umsókn talan var um, og (vanliga) mælti til at umsóknin varð játtað í tráð við galdandi siðvenju í Danmark. Somuleiðis gjørdi Fútin viðhvørt í skrivum sínum Innlendismálaráðið vart við at serlig viðurskifti vóru, sum ein átti at vera varugur við í sambandi við umsóknirnar.

Hetta lætti munandi um uppgávuna hjá landsstýrinum. Landsstýrið nýtti sera avmarkaða orku til ummælini, og ummælissvarini frá

landsstýrinum vóru tí aloftast einsljóðandi, nevniliga at tikið varð undir við tilmæli Fútans.

Í 2002 metti Fútin, at hendan mannagongd var skeiv, at leiklutur Fútaskrivstovunnar heldur var at virka sum „udvidet postkontor“, og at Fútaskrivstovan samsvarandi hesum frameftir ikki átti at hava nakra vegleiðing ella til- ella frámæli við, tá biðið varð um ummæli.

Vanliga áheitanin frá Fútaskrivstovuni er nú „....til udtalelse efter sagens anledning“. Onki verður sagt um til- ella frámæli, og ongin viðmerking er um, hvat slag av umsókn talan er um. Tað kann ofta vera ein bági, tí mangan eru umsóknknar fleirtýddar.

Løgmálaráðið/Innlendismálaráðið hevur síðani ummælt mál um familjusamanføring soleiðis, at tað hevur bert upplýst málini í mun til serlig føroysk viðurskifti – ofta ikki annað enn at kanna, hvørt umsøkjararnir sambært Landsfólkayvirlitinum búgva saman – og hevur annars sagt seg ongar viðmerkingar at hava.

Gongdin var á leið hin sama viðvíkjandi umsóknum um arbeiðs- og uppihaldsloyvi, tó so at Vinnumálaráðið ofta spurdi arbeiðsgevaran, hvat ið hann hevði gjørt fyri at fáa føroyska arbeiðsmegi, og — serliga tá talan var um nógvar umsóknir av sama slagi — ráðførdi seg við partarnar á arbeiðsmarknaðinum.

**4.2. Tá ið táttað varð í**

Á fundi við Løgmálaráðið og Vinnumálaráðið tann 24. september 2003 vísti Fútin á, at teir um 700 útlendingarnir, sum fóru at søkja um uppihaldsloyvi í Føroyum í 2003, vóru dupult so nógvir, sum teir okkurt um 350, ið søktu, tá ið oljuleitingarvirksemið var uppá tað mesta — hóast so at siga ongar umsóknir í 2003 vóru tengdar at oljuvinnu. Umrokna vit samsvarandi donsku tølini til føroysk viðurskifti, skuldi talan verið um fleiri ferðir færri mál um árið. Hetta kundi bent á, at sera stórur munur er á siðvenjuni í mun til samsvarandi umsitingina eftir donsku lógini, hóast orðingarnar í lógini eru eins, tá um arbeiðs- og uppihaldsloyvi ræður.

Fútin vísti eisini á, at ummæli landsstýrisins viðvíkjandi umsóknum um arbeiðs- og uppihaldsloyvi mestsum uttan mun til innihaldið í umsóknini vóru jalig, og hartil ofta serstakliga óneyv. Av tí at Udlændingestyrelsen helt seg neyvt til føroysku ummælini, bæði í málsviðgerðini og í orðingunum í loyvunum, førdu óneyvu loyvini til, at Fútanum bar illa til at røkja eftirlitsuppgávuna, sum hann skuldi.

Fútin boðaði greidliga frá, at helt gongdin fram, fór hann at hava ilt við at hava eftirlit við økinum.

Niðurstøðan eftir fundin var, at tørvur var á at samskipa umsitingina av útlendingamálum í Føroyum betur, hóast landsstýrið (táverandi Løgmálaráðið og Vinnumálaráðið) bert vóru hoyringsmyndugleikar í útlendingamálum.

Grundað á millum annað henda fundin við Fútan metti Løgmálaráðið í uppriti til landsstýrisfund 14. oktober 2003, at „... *heldur gongdin fram bert stutta tíð afturat, fáa vit ein útlendingapolitiskan trupulleika í Føroyum*".

Umsitingarnar í Vinnumálaráðnum og Løgmálaráðnum vóru samdar um, at vóru øll ummæli á einum stað, bar til at umsita ummæli av útlendingamálum betri, og at leggja meira arbeiði í ummælini. Somuleiðis vóru tær samdar um, at rættast var, at Løgmálaráðið umsat økið framyvir.

Landsstýrið tók undir við at so skuldi verða, og gjørdi av, at eitt fólk afturat skuldi setast til uppgávuna burturav, og at broytingarnar komu í gildi á nýggjárinum í 2004. Av tí at nýval varð útskrivað, fall meirjáttanin burtur, men broytingin varð sett í verk.

**4.3. Tillagingar fram til verandi ummælissiðvenju**

Meðan hetta hendi, var búskaparvøksturin dovnaður, og alivinnan var fyri hóttafalli, soleiðis at veruligur vøkstur var í arbeiðsloysinum.

Av tí at onnur aðalfortreytin fyri at arbeiðs- og uppihaldsloyvi kunnu

verða givin er, at „væsentlige beskæftigelsesmæssige hensyn" tala fyri hesum, sbr. § 9. stk. 2, nr. 3, elvdi økta arbeiðsloysið, saman við tí at ummælissiðvenjan varð fingin í frægari samljóð við endamálið við lógini, til eina ógvusliga broyting: meðan so at siga hvør einasta umsókn um arbeiðs- og uppihaldsloyvi fekk viðmæli úr Føroyum í 2003, fingu kanska eini 60% av umsóknunum frámæli fyrra hálvár í 2004 (nógvar teirra vóru umsóknir frá útlendingum, sum frammanundan høvdu arbeiðs- og uppihaldsloyvi).

Helst tí at avlagaða ummælissiðvenjan undanfarnu árini hevði elvt til umfatandi misfatanir av, hvussu rættarstøðan á útlendingaøkinum er – saman við tí at útlendingaøkið ongantíð veruliga hevur fingið politiska viðgerð í føroysku skipanini – elvdi henda vend til víðfevnda politiska ónøgd, og útlendingaøkið varð nú tikið til viðgerðar í fleiri fyrispurningum á tingi, á landsstýrisfundum og í lítlu samgongu.

Í framhaldi av hesi politisku viðgerð avgjørdi landsstýrið, at politisk støða skuldi verða tikin til, hvussu økið skuldi virka frameftir. Samstundis avgjørdi landsstýrið at heita á landsstýrismannin um at bera so í bandi, at øll verandi arbeiðs- og uppihaldsloyvi fyribils vórðu framlongd, til politisk støða er tikin um, hvussu økið skal virka frameftir.

Fyrisitingin fekk boð um at bíða við at avgreiða fleiri frámæli, meðan roynt varð at fáa slíka fyribilsloysn í lag.

Danska Integratiónsmálaráðið avgjørdi, eftir fyrispurningi frá landsstýrismanninum, at fyribilsloysnin kundi verða, at tá ið Innlendismálaráðið ummælti umsóknir frá útlendingum, sum ætlaðu at halda fram hjá sama arbeiðsgevara, kundi tað treingja metingina av „*væsentlige beskæftigelsesmæssige eller erhvervsmæssige hensyn*" soleiðis at Innlendismálaráðið einans skal meta um ítøkiliga tørvin, sum ítøkiligi arbeiðsgevarin hevur á, at ítøkiligi útlendingurin heldur fram í starvi hjá júst honum.

Tað vil í roynd og veru siga, at er talan um sama arbeiðspláss, og eru øll viðurskifti annars (mest løn og setanarkor) í lagi, so

kunnu øll arbeiðs- og uppihaldsloyvi verða framlongd sbrt. politisku fyribilsloysnini, uttan mun til hvussu arbeiðsloysið ella tørvurin á arbeiðsmegi er í viðkomandi parti av arbeiðsmarknaðinum, ella í viðkomandi parti av landinum.

Seinni er staðfest, at hendan loysnin fevnir um teir útlendingar, sum høvdu arbeiðs-og uppihaldsloyvi í Føroyum, tá loysnin kom í gildi, tað vil siga útlendingar sum høvdu arbeiðs-og uppihaldsloyvi hin 8. september 2004.

Eisini undir politisku fyribilsloysnini kunnu útlendingar, sum hava verið nøkur ár í landinum — men ikki so leingi, at teir kunnu søkja um tíðaróavmarkað uppihaldsloyvi — tó fáa sýtandi svar uppá umsókn um framlongd loyvi, um so er at teir ikki halda fram hjá sama arbeiðsgevara, og í sambandi við framhaldandi politiska ónøgd um hetta, hevur danska Integratiónsmálaráðið — eftir nýggjum fyrispurningi frá landsstýrismanninum – avgjørt, at útlendingar, sum higartil hava havt arbeiðs- og uppihaldsloyvi í landinum, kunnu fáa arbeiðs- og uppihaldsloyvi her, hóast serlig vinnulig ella arbeiðsmarknaðarlig viðurskifti ikki tala fyri hesum, og hóast talan ikki er um framhaldandi arbeiði hjá sama arbeiðsgevara.

Hendan loysnin — ið í útgangsstøðinum ikki er tíðaravmarkað, eins og hin fyrra var ætlað at vera – er somikið nýggj, at hon ikki er farin at virka enn. Enn er til dømis ikki greitt, hvørjir útlendingar eru fevndir av nýggju loysnini – um talan eisini her er um útlendingar, sum høvdu arbeiðs- og uppihaldsloyvi hin 8. september 2004, um loysnin til dømis skal fevna um allar útlendingar, sum høvdu arbeiðs- og uppihaldsloyvi, nú nýggja loysnin kom (brævið frá danska integratiónsmálaráðharranum er dagfest 8. september 2004, ella um hon eisini kann fevna um útlendingar, sum framyvir fara at fáa arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum, eftir at teir hava verið her í ávísa tíð.

**5. Støðan á útlendingaøkinum í Innlendismálaráðnum nú**

Boðini um at bíða við at avgreiða møgulig frámæli elvdu — saman við at almikil umsitingarorka fór til politikaratænandi partin av

arbeiðinum, til at virka við til at skapa ítróttaravtaluna og at fáa avráddu politisku loysnina at virka í verki — tilsamans til, at sera nógv mál vóru óavgreidd á heysti 2004, tá ein fylgja av skerjingunum hjá landsstýrinum varð, at talið á fulltrúum, sum lutvíst arbeiddu við útlendingamálum, minkaði úr trimum niður í tveir.

Samstundis elvdu nýggju mannagongdirnar til nógv nýggj sløg av ivamálum. Innlendismálaráðið hevur tí ongantíð heilt fingið arbeitt undan, og útlit eru heldur ikki fyri, at so verður.

Innlendismálaráðið hevur roynt at raðfesta soleiðis, at ávís arbeiðsorka alla tíðina verður sett av til tey málini, ið krevja minstu viðgerðina, soleiðis at bíðitíðin ikki økist púra óneyðuga nógv.

Millum tey meira arbeiðskrevjandi málini hevur Innlendismálaráðið mett tey málini vera mest átrokandi, har tað kann fáa serliga tyngjandi fylgjur fyri umsøkjaran – ella fyri avvarðandi vinnuvirki — um málið kemur í drag. Hetta kann til dømis vera, um umsøkjarin ikki hevur uppihaldsloyvi frammanundan, ella ætlar at skifta arbeiðsøki, og tí er beinleiðis forðaður í ætlanum sínum, til málið er avgreitt. Harafturímóti hevur Innlendismálaráðið mett, at tey mál tola frægari at bíða, har umsøkjarin søkir framlongda familjusamanføring, ella søkir framlongt arbeiðsloyvi — og umsøkjarin tí kann virka sum vant í Føroyum til umsóknin verður avgreidd.

Ongi mál eru higartil avgreidd eftir nýggju politisku loysnini."

Við skrivi, dagfest 19. apríl 2006, varð hendan frágreiðing send klagaranum til ummælis við einari freist áljóðandi 3 vikur.

Tá umboðsmaðurin einki hevði frætt aftur frá klagaranum, boðaði hann við skrivi, dagfest 17. mai 2006, pørtunum frá, at málið bleiv tikið upp til endaliga viðgerð.

Við skrivi, dagfest 11. juli 2006, kunnaði umboðsmaðurin partarnar um, at málið ikki bleiv endaliga avgreitt fyri summarfrítíðina.

## *Niðurstøða*

*Viðgerð mín av hesari klaguni snýr seg bert um viðgerðina og viðgerðartíðina hjá Innlendismálaráðnum, ið er ummælandi myndugleiki á økinum. Av tí, at útlendingamál eru danskt málsøki, tvs. at avgerðin, hvørt loyvi skuldi gevast, verður tikin av einum donskum myndugleika, er avgerðin ikki fevnd av málsræði mínum. Eg fari tí heldur ikki at taka støðu til tað innihaldsliga í málinum, tvs. spurningin um, hvørt ráðið átti at mælt til ella frá, at loyvi bleiv givið.*

*Sambært frágreiðingini frá Innlendismálaráðnum er hetta málið til viðgerðar hjá ráðnum í tíðarskeiðnum frá 23. aug. 2004 til 3. juni 2005. Ráðið greiðir eisini frá, at meðan arbeitt var við at finna eina politiska fyribilsloysn á heysti 2004, hendi einki við málinum í knappar 2 mánaðir. Hetta havi eg sum so ongar viðmerkingar til. Men tá hugt verður at endaliga ummælinum frá Innlendismálaráðnum, haldi eg avgjørt ikki, at samlaða viðgerðartíðin kann sigast at vera nøktandi.*

*Innlendismálaráðið sigur seg í ummælinum hava kannað samlaðu bústaðartíðina í Føroyum, hvørt umsøkjarin hevði falna skuld til tað almenna og revsiváttanina. Ráðið hevur ongar viðmerkingar hesum viðvíkjandi, men tekur annars fyrivarni um, at Udlændingestyrelsen tryggjar sær, í sama mun sum siðvenja er í Danmark, at treytirnar fyri tíðaróavmarkaðum uppihaldsloyvi eru loknar.*

*Tá ráðið einans hevur kannað og ummælt hesi trý viðurskiftini, átti viðgerðin bert at tikið heilt stutta tíð. Hesar upplýsingar kundu allar verið savnaðar inn beinanvegin og samstundis.*

*Eg haldi tað eisini vera løgið, at Innlendismálaráðið skal útvega sær eina revsiváttan frá fútanum, fyri síðani at boða fútanum frá, at ráðið ikki hevur viðmerkingar til revsiváttanina. Eina revsiváttan, sum fútin eins væl kundi útvega avgerðarmyndugleikanum. Eg fari tí at mæla Innlendismálaráðnum til at umhugsa hendan partin av mannagongdini.*

*Innlendismálaráðið greiðir eisini frá, at langa viðgerðartíðin lutvíst skyldast, at talan er um eitt av fyrstu málunum um varandi loyvi, sum*

*ráðið hevði til ummælis, eins og at áheitanin frá fútanum ikki sigur neyvt, hvat tað er, sum ráðið skal ummæla.*

*Hesum sjónarmiði kann eg ikki taka undir við, tí um hetta var ein trupulleiki, átti ráðið eftir mínari fatan at vent sær aftur til fútan ella Udlændingestyrelsen og spurt, hvat tað var, sum hesin ynskti, at ráðið skuldi ummæla. Hetta vildi óivað stytt munandi um viðgerðartíðina hjá ráðnum.*

*Sum eina aðra grundgeving fyri longu viðgerðartíðini, hevur ráðið víst á skerjingarnar, sum vórðu gjørdar á heysti 2004, og at ráðnum tí vantaði løgfrøðiligan førleika. Eg haldi ikki, at hendan undanførslan kann nýtast sum umbering fyri longu viðgerðartíðina. Ráðið hevði sjálvt møguleika fyri at raðfesta, hvussu skerjingarnar skuldu fremjast og harvið eisini, hvørjar avleiðingar komu at standast av hesum.*

*Ráðið greiðir at enda frá, at ein raðfesting varð gjørd av málunum, soleiðis at tey málini, sum „toldu at bíða" blivu viðgjørd seinast.*

*Eg havi ongar viðmerkingar til, at ráðið, um hetta gerst neyðugt, raðfestir uppgávurnar á hendan hátt, men eg haldi avgjørt ikki, at samlaða viðgerðartíðin í hesum málinum hevur verið nøktandi, og fari tí at geva ráðnum eina átalu fyri hetta. Burtursæð frá hesum geri eg ikki meira við málið.*

# *28. Starvsfólka- og arbeiðsmarknaðarmál v.m.*

## 28.1 Uppsøgn av starvsfólki í Tilhaldinum hjá Tórshavnar kommunu

Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina uppsøgn av einum starvsfólki í Tilhaldinum hjá Tórshavnar kommunu. Umboðsmaðurin hevði ongar viðmerkingar til avgerðina hjá kommununi um, at neyðugt var at siga fólki úr starvi vegna sparingar. Umboðsmaðurin helt seg heldur ikki kunna meta um, hvørt ein hondarbeiðslærari er betri egnaður til starvið enn ein sjúkrarøktarfrøðingur, ella hvat av hesum báðum starvsfólkum hevði roynst best í starvinum. Umboðsmaðurin kundi bara staðfesta, at tey atlitini, sum kommunan hevði nevnt í frágreiðing sínari, vóru saklig og viðkomandi fyri metingina. Umboðsmaðurin vísti á, at tað er ein trupul støða, tá ein arbeiðsgevari í sambandi við sparingar skal velja, hvønn ella hvørji av starvsfólkunum skulu sigast úr starvi, og at serlig fyrilit tí eiga at verða víst í slíkum málum. Umboðsmaðurin helt ikki, at kommunan hevði handfarið hesa uppsøgnina á nøktandi hátt, tá hugsað verður um, nær uppsøgnin varð fráboðað. Starvsfólkið fekk handað ætlanarskrivið dagin fyri ólavsøku, og júst sum hon var liðug við uppsetingina av ólavsøkuframsýningini hjá Tilhaldinum. Hetta helt umboðsmaðurin vera sera óheppið, serliga tí einki var, sum forðaði kommununi at bíða við hesum til seinni. (J. nr. 200500086)

## Klagan

Við skrivi, dagfest 25. nov. 2005, hevur A, adv., sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

„**Viðv. kæru um Tórshavnar kommunu í sambandi við uppsøgn av B, starvsfólki í Tilhaldinum**

Sum advokatur fyri Starvsmannafelagið skal eg við hesum kæra viðgerð og avgerð hjá Tórshavnar kommunu um at siga B úr starvi á Tilhaldinum.

Tilhaldið er tilhaldsstað fyri pensiónistar í Tórshavnar kommunu.

Tilhaldið virkar eftir reglugerð, sum er millum tey viðløgdu skjølini.

Tað framgongur av viðlagda samskifti millum Tórshavnar kommunu og Starvsmannafelagið, at ætlanin at siga B úr starvi var konkret fíggjarliga grundað. Tá henda grund vísti seg ikki at halda, varð uppsagnargrundin broytt, og seinni hevur kommunan so eisini nevnt nøkur konkret atlit, sum hon hevur tikið í metingum sínum.

Starvsmannafelagið hevur grund til at halda, at uppsagnargrundin ikki er verulig, og í øðrum lagi heldur felagið, at metingin hjá kommununi er eyðsýnt skeiv, tí B er júst tað av starvsfólkunum í Tilhaldinum, sum hevur útbúgving innan tað økið, sum Tilhaldið eftir reglugerðini virkar á."

## Málsgongd

Við skrivi, dagfest 3. juni 2005, hevur Almannastovan sent Tilhaldinum soljóðandi avgerð:

„**Umsókn um umsorganararbeiði 2005**
Dagtilhaldið í Tórsgøtu hevur søkt um fíggjarligan stuðul til umsorgnararbeiðið fyri 2005. Søkt verður um kr. 830.000,-.

Eftir at játtanin til umsorganararbeiðið fyri 2005 er broytt frá eini „lógarbundari játtan" til „aðra játtan", og sum hevur við sær, at Almannastovan bert hevur tann pening at ráða yvir, sum er játtaður á løgtingsfíggjarlógini fyri 2005. Almannastovan avgjørdi tí, at seta lýsing í bløðini um fíggjarligan stuðul til umsorganararbeiði, og við eini umsóknarfreist til 1. apríl 2005. Harumframt avgjørdi Almannastovan, at stuðulin fyri 2005, skuldi játtast í mun til játtanina 2004, og at nýggjar umsóknir verða mettar sum hava verandi inni í skipanini, við tí upphædd sum søkt er um, tí peningur var ikki til at játta umsóknunum við fullari upphædd. Hetta hevur við sær, at allir umsøkjarir fáa 56% av tí upphædd teir fingu játta í 2004, og nýggjir umsøkjarar 56% av tí upphædd teir hava søkt um.

Játtanin hjá Dagtilhaldinum var í 2004 kr. 798.000, sjálvt um bert kr. 746.049 var útgoldið. Orsøkin var, at avlop frá játtanini fyri 2003 bleiv mótroknað. Dagtilhaldið fær tí játta 56% av kr. 798.000, ella kr. 447.102.

Annars eru vanligu treytirnar galdandi, at roknskapur skal

sendast inn, og at eitt møguligt avlop skal gjaldast Almannastovuni aftur.

**Hendan avgerð kann innan 4 vikur eftir móttøkuni av hesum skrivið, kærast til kærunevndina í almannamálum, Skálatrøð 20, 100 Tórshavn.**“

Við skrivi, dagfest 15. juli 2005, hevur leiðarin í Tilhaldinum skrivað soljóðandi fráboðan:

„Kunning um fíggjarligu støðu Tilhaldsins
Almannastovan hevur minkað játtanina til Tilhaldið við 44%. Játtanin er farin frá 798.000,- niður á 447.102,- Hetta hevur stórar avleiðingar fyri Tilhaldið og virksemið tess. Hendan upphædd røkkur ikki til lønirnar av starvsfólkunum í Tilhaldinum í dag.

Nevndin í Tilhaldinum hevði fund 28. juni og 8. juli 2005, um hesa álvarsligu støðuna. Skal Tilhaldið yvirhøvur hóra undan, verða vit noydd at fyrihalda okkum til hendan niðurskurð. Í fyrstu syftu við hesum niðurskurði:-
At skerja útreiðslurnar til starvsfólkalønir
Støða verður tikin til, um Tilhaldið skal verða afturlatið mikudag, aftaná summarsteðgin.“

Við skrivi, dagfest 21. juli 2005, hevur Almannastovan aftur sent Tilhaldinum soljóðandi avgerð:

„**Viðv. umsorganararbeiði 2005**
Fíggjarnevnd Føroya Løgtings hevur við fíggjarnevndarskjali tann 6. juli 2005, avgjørt at veita eina eykajáttan uppá 2. mió. kr. til umsorganararbeiði 2005.

Avgjørt er eisini, at mattænastan verður raðfest hægst, harnæst eigur ta virksemi, ið var í gongd áðrenn 2005, at verða raðfest.

Hetta hevur við sær, at stovnur/dagtilhald fær fult endurgjald fyri mattænastuna, tó undantikið mattænastur byrjaðar í 2005. Harumframt fáa stovnur/dagtilhald hvørs virksemi var í gongd áðrenn 2005, 92,4% av játtanini fyri 2004. Nýtt virksemið frá 2005, fær ikki lut í eykajáttanini fyri 2005.

Hetta merkir í tykkara føri, at Dagtilhaldið í Tórsgøtu fær økt

sína játtan fyri 2005 við kr. 290.840 og sum við fyrra útgjaldinum til umsorganararbeiði, tilsamans er 92,4% av játtanini fyri 2004.

**Henda avgerð Almannastovunnar kann, innan 4 vikur frá móttøkuni av hesum skrivi, kærast til Kærunevndina í almannamálum, Føroya Kærustovnur, Skálatrøð 20, 100 Tórshavn.**"

Við skrivi, dagfest 27. juli 2005, hevur Tórshavnar kommuna sent B soljóðandi hoyringsskriv:

„Hoyringsskriv
Vísandi til skrivligu kunningina tann 15. juli 2005, um lækkaðu játtanina til Tilhaldið, verður við hesum boðað frá, at neyðugt tíanverri er hjá Tilhaldinum, at siga fólk úr starvi, fyri at halda skerdu játtanina. Í hesum sambandi umhugsar kommunan at siga tygum úr starvi.

Ætlaða uppsøgnin er grundað á at hitt starvsfólkið, við síni útbúgving sum sjúkrarøktarfrøðingur, hevur størri fakligan kunnleika til umsorganina fyri húsfólkunum í Tilhaldinum.

Kommunan væntar sær møguligar viðmerkingar til hetta skriv í seinasta lagi 10. august 2005 kl. 12:00, annars verður avgerð tikin út frá fyriliggjandi upplýsingum.

Avrit av hesum skrivið er í dag sent Starvsmannafelagnum."

Við skrivi, dagfest 15. aug. 2005, hevur Starvsmannafelagið sent Tórshavnar kommunu soljóðandi viðmerkingar til ætlaðu uppsøgnina:

„**Viðv. hoyringsskrivi til B.**
Vísandi til skriv tykkara dagf. 27.07.2005, tykkara j.nr. 2005-1939/1-STAF viðvíkjandi hoyringsskriv um ætlaða uppsøgn av B, starvsfólki í Tilhaldinum.

Grundgevingarnar fyri ætlaðu uppsøgnini eru:
lækkaða játtanin til Tilhaldið
og at hitt starvsfólkið í Tilhaldinum er útbúgvin sjúkrarøktarfrøðingur, og hevur størri fakligan kunnleika til umsorganina fyri húsfólkunum í Tilhaldinum.

**Ad. 1.** Í skrivligu kunningini dagf. 15. juli verður sagt, at Almannastovan hevur minkað játtanina til Tilhaldið við 44%, eins og eisini gjørt var við eitt nú Lágargarð. Men sum øllum kunnugt bað landsstýrismaðurin í Almanna- og heilsumálum Fíggjarnevndina hjá løgtinginum um ein eykajáttan uppá kr. 2.000.000,00 sí hjálagda fíggjarnevndarskjal. Pengarnir eru játtaðir, og taka vit sum givið, at Tilhaldið, eins og eitt nú Lágargarður, fekk part í hesi játtan, soleiðis at ikki varð neyðugt at skerja játtanina hjá Tilhaldinum við 44%.

Starvsmannafelagið skal við hesum biðja um at fáa upplýst, hvussu stóran part av eykajáttanini uppá 2 mió.kr. til umsorganararbeiði Tilhaldið fekk.

**Ad. 2.** Hetta má verða ein misskiljing. Sambært reglugerðini fyri dagtilhaldið § 1, stendur, at endamálið er *at geva pensjónistum í Tórshavnar kommunu møguleika og umstøður at møtast til* ***fjøltáttað ítriv*** *í hugnaligum umhvørvi.* Viðløgd í avriti.

B hevur útbúgving sum handarbeiðslærari, og má hendan útbúgving metast at verða rættuliga relevant at uppfylla endamálsorðingina fyri virksemi í Tilhaldinum. Tí húsfólkini, sum koma í Tilhaldið, tørva ikki røkt, men koma har fyri at fáa eitt annað innihald í teirra gerðandisdag, og tað má sigast at B hevur verðið við til at gjørt. Hon hevur ikki bert ríka teirra gerandisdag, men harumframt við tiltøkum saman við húsfólkunum skipa fyri tiltøkum, sum hava givið heilt fitt av peningi, sum hava verið eitt gott ískoyti til at skipa fyri aktiveringum og sosialum tiltøkum fyri húsfólkini.

Starvsmannafelagið metir tí ikki, at tað eru haldgóðar grundgevingar fyri uppsøgnini av B, og fara vit tí at biðja býráðið um at upplýsa okkum um:
hvussu stóran part av eykajáttanini uppá 2 mió.kr. Tilhaldið fekk,
grundgevinga fyri uppáhaldinum um, ein sjúkrarøktarfrøðingur er betur enn ein handarbeiðslærari til umsorganararbeiði til Tilhaldinum, sum samb. reglugerð er *at geva pensjónistum í Tórshavnar kommunu møguleika og umstøður at møtast til* ***fjøltáttað ítriv*** *í hugnaligum umhvørvi.*

Biðið verður um svar uppá omanfyrinevndu spurningar í seinasta lagi fríggjadagin 19. august 2005, kl. 12.00, so Starvsmannafelagið endaliga kann taka støðu til, um málið samb. § 6, stk. 5 í sáttmálanum skal takast upp við Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Avrit av hesum skrivi er sent til Sosialu nevnd, D, forkvinnu og E formanni í nevndini fyri Tilhaldið til kunningar.“

Í skrivi, dagfest 15. aug. 2005, hevur Tórshavnar kommuna sent Starvsmannafelagnum soljóðandi fráboðan:

„**Til kunningar, viðvíkjandi starvsviðurskiftunum hjá B.**
Av tí at leiðaran í Tilhaldinum er uttanlanda í summarfrí í løtuni, verður málið ikki viðgjørt fyrr enn seinast í hesum mánaðinum.“

Við skrivi, dagfest 1. sept. 2005, hevur Tórshavnar kommuna sent Starvsmannafelagnum soljóðandi fráboðan:

„**Viðvíkjandi hoyringsskrivi til B.**
Nevndin og leiðarin fyri Tilhaldinum fer komandi mikudag at hava fund, har virksemið í Tilhaldinum verður endurskoðað. Tá hesin fundur hevur verið, fær Starvsmannafelagið gjøllari frágreiðing um málið.

Viðvíkjandi játtanini frá Almannastovuni kann upplýsast, at upprunaliga varð játtanin 798.000 kr. Henda upphæd varð síðan skerd niður til 447.102 kr.

Í.s.v. eykajáttanina fekk Tilhaldið tilluta 290.840kr. soleiðis, at játtanin frá Almannastovuni nú er 737.942 fyri 2005, svarandi tii eina lækking uppá 60.058kr.“

Við skrivi, dagfest 15. sept. 2005, hevur Tórshavnar kommuna sent Starvsmannafelagnum soljóðandi frágreiðing (avrit er sent B):

„**Viðvíkjandi ætlaðari uppsøgn av B**
Kommunan hevur gjøgnumgingið fíggjarligu karmarnar hjá Tilhaldinum og niðurstøðan er framvegis, at neyðugt er at seta sparingar í verk beinanvegin, tí longu nú heldur játtanin fyri 2005 ikki. Útlitini frá almannastjóranum eru, at játtanin fyri 2006 verður skerd, tí umsóknirnar fyri til umsorgarkontoina økjast ár undan ári.

Umframt at játtanin frá Almannastovuni er lækkað við góðum 60.000 kr í 2005, eru útreiðslurnar hjá Tilhaldinum hækkaðar. Tilhaldið hevur økt hølini frá upprunaliga 150 fermetrum í 1998 til

nú 3 ferðir 150 fermetur, nú Kvøld- og barnaskúlin í summarfrítíðini 2005 eru farnir úr aðru hædd í Tilhaldinum.

Rakstrarútreiðslunar hækka væntandi við í hvussu er 50.000 kr. í 2006 í mun til 2005, nú øki hjá Tilhaldinum er vaksið og Tilhaldið nú ber allar útreiðslurnar av húsinum.

Í sambandi við skerjingarnar í játtanini, øktu útreiðslurnar og víðkaðu hølini, arbeiðir leiðarin, sum hevur ábyrgdina, við málsetninginum fyri 2006. Skerjingarnar viðføra, at ein av málsetningunum verður, at húsfólkini framyvir fara at hava størri ábyrgd av sjálvum tiltøkunum í Tilhaldinum.

Sum tað framgongur av áður framsendu starvslýsing, er eingin ávís útbúgving kravd. Ynskiligt er at viðkomandi dugur at arbeiða sjálvstøðugt, passar væl til høvuðsuppgávurnar í starvinum og hevur viðkomandi útbúgving og royndir.

Í sambandi við ítøkiliga málið, er førleikin og hegni til at ríka gerandisdagin hjá húsfólkunum, umframt evni og vilji at gera tað praktiska arbeiði, tikin við í metingina av, hvørt starvsfólk ætlandi skuldi sigast úr starvi.

Hitt starvsfólkið í Tilhaldinum hevur góðan førleika og hevur víst betri hegni til at ríka gerandisdagin hjá húsfólkunum. Viðkomandi hevur víst betri evni og vilja til at luttaka í praktiska arbeiðinum í Tilhaldinum og at skipa fyri tiltøkum. Harumframt hevur hon, við síni útbúgving sum sjúkrarøktarfrøðingur, vitan og førleika til umsorganararbeiði.

Eisini hevur hitt starvsfólkið drúgvar royndir innan fyriskipan og handverk. M.a. hevur hon skipað fyri Gluggaglæma og Hendur & Hugflog í fleiri ár.

Út frá hesum metir kommunan, at hennara førleiki og persónligu eginleikar passa betri til starvið í Tilhaldinum hóast B hevur útbúgving sum handarbeiðslærari.

Út frá omanfyristandandi umhugsar kommunan framvegis, at siga B úr starvi, og væntar sær møguligar viðmerkingar til hetta skriv innan 26. september 2005 kl. 12:00. Annars verður avgerð tikin út frá fyriliggjandi upplýsingum.

Avrit av hesum skrivi er í dag sent til B.“

Við skrivi, dagfest 19. sept. 2005, hevur B sent kommununi hesar viðmerkingar:

„Viðv. uppsagnarætlan kommununar, tygara J.nr.2005-1939/1-STAF
Tá tað í brævi tygara, dagfest 15/09/2005 til Starvsmannafelagið, sum tit hava sent mær avrit av, verður ført fram, at eg skal hava víst verri vilja og førleika at starvast í Tilhaldinum enn starvsfelagi mín, haldi eg meg hava rætt til at fáa viðlagt fylgjandi:

15. juli 2005 verða vit í Tilhaldinum kunnað um, at útreiðslurnar til starvsfólkalønir og virksemið skulu skerjast vegna 44% minking í játtanini frá Almannastovuni.

27. juli, beint sum eg eri liðug við áralongu uppsetingina av ólavsøkuframsýningini hjá Tilhaldinum, fái eg stungið í hondina hoyringsskriv, dagfest sama dag, við kunning um, at tað er meg, sum kommunan ætlar at siga upp vegna sparingina, tí eg ikki eri sjúkrasystir. Hetta sá eg sum eitt fakfelagsmál til Starvsmannafelagið at taka sær av.

Tá samanum kom, varð játtanin bert er minkað við 60.000 kr. Men nú verða nýggjar grundgevingar fyri starvsfólkauppsøgn førdar fram:

Hølini til húsfólkið eru trýfaldað, og tí má starvsfólkatalið sostatt skerjast (við einum triðingi), skal játtanin haldast. Hetta kann eg bara undrandi fyrihalda meg til.

Sum nýggj argument fyri, at júst eg skal uppsigast, verða nú førd fram, at eg skal hava
víst verri hegni at ríka gerandisdagin hjá húsfólkunum og
víst verri evni og vilja til at luttaka í praktiska arbeiðinum og skipa fyri tiltøkum enn starvsfelagi mín, og
ongar royndir innan fyriskipan og handverk uttanfyri Tilhaldið ávístar.

Hesa meting av mær og mínum arbeiði í og uttanfyri Tilhaldið finni eg bæði órættvísa og niðrandi, og tað framført við vilja, so tað ikki skal kunna komast uttan um eina uppsøgn, tygara ella mína, nú eg á triðja mánaði ikki veit um eg eri keypt ella seld.

Eg havi lagt tygara skriv fyri starvsfelaga og húsfólk, og eru vit sera illa við og pínliga rørd av tygara handfaring av málinum. Høvdu

tygum spurt húsfólk og starvsfelaga, hevði sloppist undan hesum vanæruliga skotsmáli.

Tvørturímóti er at nevna, at eg hesi tvey árini havi starvast í samveru við húsfólkið (brúkararnar) og havi ikki dugað at „sett skott ímillum," sambært leiðslustílinum annars, og heldur havi borið meg undan máltíðum aftan læstar hurðar. Eisini havi eg eftir førimuni virkað fyri trivnaði og meiri samveru millum okkum starvsfólkini við royndini at fáa innført regluligar starvsfólkafundir, teamwork, eftirmetingar, opinleika og innlit í nýtsluna av egnum pengainntøkum, sí hjáløgdu evnaskrá mína til fyrsta starvsfólkafund 9. mai 2005. Men hetta vann tíverri ikki frama.

Av øðrum nýbrotum kunnu nevnast, at eg havi ferðast einsamøll við 31 brúkarum í Hetlandi, havt regluligar kvøldsetur við døgverða, og saman við húsfólkunum skipað fyri jólasølum, øðrvísi framsýningum í Grasagarði, mentanardagarnar, og á ólavsøku við lutum og siðsøguligum myndum, sum húsfólkið við ídni og eldhuga fekk til vega, og sum fitt av míni frítíð er farin til. Nevndu tiltøk hava ætlandi givið einar 135.000 kr. eyka at ríka tilveruna hjá húsfólkunum við. Tíanverri varð sýtt okkum innlit í uppgerð og ávirkan á, hvussu hesir sjálvgivnu pengar vórðu nýttir. Men tað skotsmál fekk eg kortini, at ongantíð áður er so nógvur peningur innkomin.

Tað skal einki takast frá starvsfelaga mínum, men hevur førleiki uttanfyri Tilhaldið týdning í hesum máli, er tað eingin grund at lata ónevnt, at eg innan Háskúlan og Kvøldskúlan í gjøgnum 17 ár havi skipað fyri handarbeiði og framsýningum, og seinastu 18 árini havi skipað fyri umsorganararbeiði og ráðstevnum innan Javna, bæði innanlands og í norðurlanda høpi.

Uppískoyti: Evnaskrá til starvsfólkafund 9. mai 2005:

| | Evni | viðmerkingar |
|---|---|---|
| daglig | teamwork um felagsuppgávur | F-G-B<br>-arbeiðsbýti eftir áhuga<br>(við brúkarum) |
| | starvsfólkafundir | mánaðarliga-eftir tørvi |
| | starvslýsing, preciserað | saman við ella bara fyri teimum gomlu / brúkarum |

| | | |
|---|---|---|
| | fíggjarætlan, intern | uppgerð yvir pengagevandi tiltøk- innlit í pengabrúk |
| | fíggjarætlan, extern | býráðs-, almannastovu-, kunning um skerjingar |
| | stýrisfundur | kunning áðrenn og aftaná |
| framtíðar | tiltøk, evaluering | eftirmeting og avgerð um framhald, evt. broyting kunning um ætlað skeið, nýggj tiltøk |
| | starvsfólkamenning | skeið, temadagar |
| | frítíðarplanlegging | fastlegging av feriudøgum tilgóðar |

Av hesum vann bara málið um starvsfólkafundir og partvís kunning um stýrisfundir frama, og nýggjur starvsfólkafundur varð avtalaður til 8. juni. Henda dagin fekk F ikki luttikið allan fundin. Tá vit sótu tværeinar eftir, ruddaði G borðið og bað meg bara siga upp beinanvegin, um eg ikki treivst í verandi umstøðum. Henda vend kom líka óvæntað sum hon var ósakligt. Við burturvísingini av reingerðarkonuni vikuna fyri í huga valdi eg at torga hesa merkisverdu umbøn og eftirlíkaði ikki. Og tað standi eg við enn í dag.

Satt at siga haldi eg hetta vera kjarnuna í málinum, heldur enn mín vantandi førleiki."

Við skrivi, dagfest 19. sept. 2005, hevur Starvsmannafelagið sent forkvinnuni í sosialu nevnd hjá Tórshavnar kommunu soljóðandi fyrispurning:

„**Viðv. reglugerð fyri Tilhaldið í Tórsgøtu 21, Tórshavn.**
Starvsmannafelagið hevur fingið nýtt ætlanarskriv um uppsøgn av B, starvsfólk í Tilhaldinum til hoyringar, hjálagt í avriti.

Starvsmannafelagið vendir sær til tín, sum forkvinnu í Sosialu nevnd í Tórshavnar Býráð, sum varandi av Tilhaldinum. Sambært § 4 í reglugerð, undirskriva av táverandi forkvinnu fyri Sosialu nevnd, stendur í seinna broti, ***at leiðarin hevur ábyrgdina av at fyriskipa tiltøkini og av fíggjarliga rakstrinum samb. góðkenda fíggjarætlan.***

Í 4. reglubroti í ætlanarskrivinum stendur, at leiðarin hevur

ætlanir um, at húsfólkini framyvir fara at *hava størri ábyrgd* av sjálvum tiltøkunum í Tilhaldinum.

Starvsmannafelagið metir, at hetta er ein broyting sum er í stríð við reglugerðina, og fara vit at spyrja teg sum forkvinnu í Sosialu nevnd, um arbeitt verður við at broyta reglugerðina, soleiðis at húsfólkini framyvir koma at hava størri ábyrgd av sjálvum tiltøkunum í Tilhaldinum.

Starvsmannafelagið hevur freist til at svara býráðnum innan 26. sept. So vónandi fært tú svara okkum í seinasta lagi fríggjadagin 23. september 2005."

Við skrivi, dagfest 21. sept. 2005, hevur forkvinnan í sosialu nevnd svarað Starvsmannafelagunum soleiðis:

„**Viðv. reglugerð fyri Tilhaldið í Tórsgøtu 21, Tórshavn**

Í brævi dagfest 19.09.2005 er fyrispurningur til undirritaðu, um arbeitt verður við at broyta reglugerðina fyri Tilhaldið, soleiðis at húsfólkini framyvir koma at hava størri ábyrgd av tiltøkunum í húsinum.

Undirritaða hevur ikki tikið stig til at broyta reglugerðina fyri Tilhaldið og er heldur ikki vitandi um at arbeitt verður við hesum."

Við skrivi, dagfest 27. sept. 2005, hevur Starvsmannafelagið sent Tórshavnar kommunu hesar viðmerkingar:

„**Viðv. Ætlaðari uppsøgn av B.**

Vísandi til skriv tykkara dagf. 15.09.2005, tykkara j.nr. 2005-1939/5-STAF um ætlaðari uppsøgn av B, starvsfólk í Tilhaldinum.

Í fyrsta ætlanarskrivinum vóru sparingarnar 447.102,00 kr, síðani er hetta tal komið niður á 60.058,00 kr., hetta kundi verði loyst við tí uppskotinum, leiðarin kom við í skrivinum 15. juli, um at Tilhaldið ikki var opið mikudagar, sum so eisini hevði minka um starvsfólkaútreiðslurnar.

Men nú skal Tilhaldið økja um hølini við 150 ferðmetrum, og má hetta væl merkja, at fleiri tiltøk skulu fyriskipast fyri húsfólkini, tá rakstarútreiðslurnar eisini ***væntandi hækka*** við kr. 50.000,00

komandi ár. Men hetta skal so klárast við einum starvsfólki, sum arbeiðir 2 dagar um vikuna?

Sagt verður at skerjingarnar koma at viðføra, at ein av málsetningunum verður, at húsfólkini framyvir fara at hava størri ábyrgd av sjálvum tiltøkunum í Tilhaldinum. Hetta metir Starvsmannafelagið er eitt brot á reglugerðina § 4 fyri Tilhaldið, og hevur Starvsmannafelagið skrivliga vent sær til forkvinnuna fyri Sosialu deild við fyrispurningi um, hvørt arbeitt verður við at broyta reglugerðina samsvarandi ætlanini hjá leiðaranum fyri Tilhaldið.

Í skrivi dagf. 21.09.2005 frá forkvinnuni fyri Sosialu deild (hjálagt í avriti) verður sagt, at hon ikki hevur tikið stig til at broyta reglugerðina fyri Tilhaldið og er heldur ikki vitandi um, at arbeitt verður við hesum.

Tá talan er um umsorganararbeiði at ríka gerandisdagin hjá pensjónistunum í Tilhaldinum, er trupult at fyrihalda seg til, at her skal verða neyðugt við starvsfólki, sum hava útbúgving sum sjúkrarøktarfrøðingur, fram um eina útbúgving innan handarbeiði til at uppfylla endamálsorðingina í reglugerðini, sum definerar umsorganararbeiði til „fjøltáttað ítriv“.

Og tá talan er um at fyriskipa tiltøk, so er eingin munur á teimum báðum starvsfólkunum, tí leiðarin er fullvitandi um hvørji tiltøk B millum ár og dag hevur skipað fyri innan Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúla og Javna.

Sagt verður eisini í æltaðanarskrivinum, at hitt starvsfolkið hevur víst betri evni og vilja at luttaka í praktiska arbeiðinum í Tilhaldinum og at skipa fyri tiltøkum, og uttan at taka nakað frá hinum starvsfólkinum, er tað einasta B hevur borði seg undan, at ***seta skott millum seg og húsfólkini***, og hvat viðvíkur at skipa fyri tiltøkum, haldi eg skuldi verði óneyðugt at útgreina, hvat hon hevur avrika hesi seinastu 2 árini, tí sambært B sjálva, so hava hesi tiltøk ikki bert ríka gerandisdagin, men eisini givið fitt av peningi, sum skuldi sæst aftur í virkseminum hjá Tilhaldinum.

Tað er ófatiligt, at **kommunan** er komin til tað niðurstøðu, at førleiki og persónligu eginleikar hjá hinum starvsfólkinum passa betur til starvið í Tilhaldinum, tá kommunan ongantíð hevur tosað hvørki við B ella hitt starvsfólkið, so okkara spurningur til tín er, hvussu kommunan hevur mett persónligu eginleikarnar hjá báðum

starvsfólkunum, uttan nakrantíð at hava tosað við starvsfólkini? Væntandi svarar tú okkum uppá hetta, áðrenn avgerð verður tikin í málinum.

Hetta er tað næsta ætlanarskrivi Starvsmannafelagið hevur fingið í hesum málinum, og vænta vit eisini at síggja tað triðja, har leiðarin verunliga kallar ein spaka fyri ein spaka, uttan at koma við vanæruligum skoðsmálum um B sum starvsfólk.

Avrit av skrivinum er sent D, forkvinnu í sosialu deild og E, nevndarformann fyri Tilhaldið."

Í bornum brævi, dagfest 30. sept. 2005, hevur Tórshavnar kommuna latið B soljóðandi uppsøgn:

„**Uppsøgn**

Vísandi til hoyringsskriv kommununnar, dagfest 15. september 2005, svarskriv tygara, dagfest 19. september 2005 og svarskriv Starvsmannafelagssins, dagfest 27. september 2005, verður við hesum boðað frá, at viðmerkingarnar til hoyringsskrivið, dagfest 15. september 2005, geva ikki kommununi orsøk til at broyta ætlanina um at siga tygum úr starvi. Tí verður við hesum boðað frá, at avgerð er tikin um at siga tygum úr starvi við 3 mánaðar uppsagnaðarfreist soleiðis, at seinasti lønardagur tygara er 31. desember 2005.

Orsøkirnar til uppsøgnina eru tær somu, sum eru nevndar í hoyringsskrivinum, dagfest 15. september 2005.

Kommunan hevur hesar viðmerkingar til svarskrivið hjá tygum og Starvsmannafelagnum.

Felagið skjýtur upp, at Tilhaldið ikki er opið mikudagar, fyri at spara. Hetta metir kommunan ikki er rætta loysnin, tí harvið minkar møguleikin hjá teimum eldru at møtast.

Felagið førir fram, at §4 í reglugerðini fyri Tilhaldið verður brotin. Hetta uppáhald skilur kommunan ikki rættuliga, tí §4 ásetur: „Leiðarin hevur ábyrgdina av at fyriskipa tiltøkini og av fíggjarliga rakstrinum....". Avgerðin um at spara á lønarøkinum er júst tikin fyri at halda fíggjarligu karmarnar.

Felagið ynskir, at kommunan „veruliga kallar ein spaka fyri ein spaka uttan at koma við vanæriligum skoðsmálum". Kommunan

metir seg hava roynt ikki at brúkt henda málburð við at grundgeva fyri, hví kommunan hevur valt hitt starvsfólkið framum tygum.

Tá felagið framvegis ynskir fleiri konkretar grundgevingar hví hitt starvsfólkið er valt framum tygum, vil kommunan niðanfyri vísa nøkur konkret dømi uppá hetta.

Hitt starvsfólkið dugur betur at brúka tøkni, sum er ynskiligt, tí Tilhaldið brúkar hesa í virki sínum. Eisini er hitt starvsfólkið betur til at málbera seg skrivliga, sum er neyðugt tá tiltøk o.a. skulu fyriskipast. Harumframt hava tygum t.d. noktað at gera ávíst arbeiði á bókasavninum.

Tað er tí framvegis áskoðan kommununnar, at hitt starvsfólkið hevur betri førleika til at fyriskipa tiltøk og evni og vilja til at luttaka í dagliga arbeiðinum.

Avrit av hesum skrivi er sent starvsmannafelagnum."

Við skrivi, dagfest 30. sept. 2005, hevur nevndarformaðurin í Tilhaldinum sent Tórshavnar kommunu soljóðandi skriv:

„**Viðv. Ætlaðari uppsøgn av B**

Í skrivi dagfest 15.08.2005 hevur Starvsmannafelagið sent nevndarformanninum fyri Tilhaldinum í Tórsgøtu 21 avrit av skrivi frá Tórshavnar kommunu dagfest 15.09.2005 – tykkara J.Nr. 2005-139/5-STAF- sum viðvíkur ætlaðari uppsøgn av omanfyri nevndu B.

Nevndin í Tilhaldinum hevur á fundi 28.09.2005 viðgjørt skrivið til Starvsmannafelagið frá Starvsfólka- og lønardeildini, sum er dagfest 15.09.2005. Nevndin hevur sum so ongar viðmerkingar til sjálva uppsøgnina, men tað var full semja um at átala tær grundgevingarnar, sum verða nevndar í 7. og 8. reglubroti.

Fyri tað fyrsta heldur nevndin tað vera óneyðugt við slíkum grundgevingum, tá ið tað einans snýr seg um eina uppsøgn vegna fíggjarligar orsøkir. Fyri tað næsta er tað púra óviðkomandi fyri hetta málið at fara at meta starvsfólk upp ímóti hvørjum øðrum og draga førleikar inn í málið, sum ikki eru settir sum krav í starvslýsingini.

Haraftrat var misnøgd við, at sett varð í skrivið sum ein grundgeving, at húsfólkini framyvir fara at hava størri ábyrgd av tiltøkunum í Tilhaldinum. At leiðslan hevur tað sum ein málsetning at aktivera húsfólkini meira í dagliga virkseminum, sum tey jú

longu frammanundan í ávísan mun taka lut í, tað er eitt heilt annað mál.“

Við skrivi, dagfest 5. okt. 2005, hevur A, adv., sent Tórshavnar kommunu soljóðandi skriv:

„**Viðv. uppsøgn av starvsfólki í Tilhaldinum**
Starvsmannafelagið hevur borið mær avrit av øllum skjølum í málinum um uppsøgn av B starvsfólki í Tilhaldinum. Felagið hevur biðið meg gera eina meting av málinum, tí mett verður ikki, at henda uppsøgn er røtt ella rímilig.

Eg havi hugt málið ígjøgnum.

Eg kann staðfesta, at tað fyrsta ætlanarskrivið er grundað við, at játtanin frá landskassanum er minkað við 44%, sum svarar til eina upphædd millum 400.000 og 500.000 kr. Hetta er løgið, tí longu tá hetta varð skrivað, visti ella átti tann kommunali myndugleikin at vita, at hetta var ikki so, tí við fíggjarnevndarskjali vikur frammanundan varð játtanin økt aftur, so hon bara var einar 60.000 kr. lægri.

Annað ætlanarskrivið er grundað við, at av tí at aktiviteturin í Tilhaldinum skal økjast so nógv, at neyðugt verður at siga einum fólki upp(!), tí rakstrarútreiðslurnar fara at hækka.

Síðani er ymiskt komið afturat sum grundgeving fyri at siga júst hendan persónin úr starvi. Ein góð lýsing av hesum framgongur av brævaskiftinum millum Starvsmannafelagið og Tórshavnar kommunu.

Eg fái hetta ikki at hanga saman – orsøkin var tann stóri niðurskurðurin, sum varð av ongum, og sum ikki ein gong var aktuellur, tá henda grundgevingin varð givin í ætlanarskrivinum. Tá hetta so kemur fram, heldur kommunan fast við, at hetta starvsfólkið framvegis skal sigast úr starvi vegna sparing, samstundis sum ætlanir eru um at økja virksemið.

Eg haldi, at tað brævaskiftið, sum er millum Tórshavnar kommunu og Starvsmannafelagið er so sigandi, at tað talar fyri seg. Fyri mær at síggja er grundir til at halda, at henda uppsagnarætlan er ikki so saklig, sum lóg, góður fyrisitingarsiður og rættarpraksis fyriskriva.

Um so er, at kommunan fastheldur hesa uppsøgn, fer Starvs-

mannafelagið at fylgja gjølla við, hvussu arbeiðið í Tilhaldinum fer at vera lagt til rættis í framtíðini, og í hvønn mun Tilhaldið fer at seta fólk, avloysarar ella fyribilshjálp ella aðra arbeiðsmegi.

Fyri góðan ordan skyld skal eg siga frá, at Starvsmannafelagið hevur biðið meg kunna borgarstjóran persónliga um málið, og tað havi eg gjørt við at senda honum avrit av hesum brævi saman við avriti av øllum brævaskiftinum millum kommununa og Starvsmannafelagið."

Við skrivi, dagfest 27. okt. 2005, hevur Tórshavnar kommuna svarað advokatinum soleiðis:

„**Viðvíkjandi uppsøgn av starvsfólki í Tilhaldinum, tygara mál nr. 001/2005**
Vísandi til skriv tygara, dagfest 5. oktober 2005, og rykkjara tygara til borgarstjóran, verður við hesum boðað frá, at uppsøgnin verður fasthildin og meira verður ikki gjørt við málið."

## Partshoyring

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri og við skrivi, dagfest 1. des. 2005, varð klagan send Tórshavnar kommunu til ummælis við einari freist áljóðandi 4 vikur.

Tá umboðsmaðurin einki hevði frætt aftur, sendi hann við skrivi, dagfest 9. jan. 2006, kommununi eina áminning.

Við skrivi, dagfest 11. jan. 2006, hevur Tórshavnar kommuna sent umboðsmanninum soljóðandi frágreiðing um málið:

„**Viðv. uppsøgn av B**
Í fyrru helvt av 2005 fekk kommunan, á fundi við H, almannastjóra, at vita, at játtanin fyri 2006 fór at vera skerd. Hetta tí umsókninar til umsorganarkontoina økjast, m.a. tí at fleiri tilhald koma í øðrum bý og bygdum, uttan at samlaða játtanin hækkar.

Av tí at Tilhaldið frá summarfrítíðini 2005 yvirtók restina av húsinum í Tórsgøtu og harvið skuldi bera allan raktstrarkostnaðin av húsunum, samstundis sum oljuprísurin hækkaði munandi hetta

tíðarskeið, fóru rakstrarútreiðslurnar hjá Tilhaldinum væntandi at vaksa í 2006.

3. juni 2005 fær Tilhaldið skriv frá Almannastovuni um, at játtanin fyri 2005 verður broytt frá 798.000 kr. til 447.102 kr. Ein lækking á 350.898 kr.

Hetta skriv, saman við kunningini frá almannastjóranum um, at játtanin fyri 2006 fór at minka gjørdi, at neyðugt varð at seta sparitiltøk í verk beinanvegin. Út frá fyriliggjandi upplýsingum um fíggjarligu viðurskiftini fyri 2005 og 2006, varð avgerð tikin um at minka um rakstrarútreiðslurnar beinanvegin og í hesum sambandi eisini at siga fólk úr starvi.

Í hoyringsskrivinum um ætlaða uppsøgn, ið varð send til B, vóru øktu útreiðslurnar vegna víðkaðu hølini og hækkaða oljuprísin ikki nevnd, tí at niðurskurðurin frá Almannastovuni var so stórur, at tað í sær sjálvum gjørdi tað neyðugt at gera inntriv beinanvegin.

Tilhaldið var ikki vitandi um, at játtanin verður skerd við góðum 60.000 kr. fyrr enn aftaná summarfrítíðina og aftaná at fyrra hoyringsskrivið er sent. Orsøkin er, at skrivi, dagfest 21. juli 2007, er sent beinleiðis til Tilhaldið, sum altíð í summarfrítíðini hevur Poste Restante, tí ongin postkassi er í húsinum. Nær Poste Restante var í 2005 kann ikki staðfestast, men hetta var innan 27. juli 2005.

Tá kommunan, aftaná at hoyringsskrivið varð sent út, fær kunnleika til, at játtanin ikki verður skerd við 350.898 kr. men góðum 60.000 kr., vóru fíggjarligu viðurskiftini fyri 2006 gjøgnumgingin. Tað vísti seg tíanverri, at neyðugt framvegis varð at siga fólk úr starvi fyri at halda fíggjarligu karmarnar, eisini at tí lønarútreiðslur skulu rindast í uppsagnartíðini. Út frá hesum varð nýtt hoyringsskriv gjørt tann 15. september 2005.

Út frá omanfyristandandi sæst, at orsøkin til uppsøgnina var fíggjarliga grundað.

Viðvíkjandi kæruni av meting kommununar um, hvør av starvsfólkunum ætlandi skuldi sigast úr starvi, verður víst til skrivini frá kommununi, ið lýsa hví kommunan valdi at siga B úr starvi og ikki hitt starvsfólkið.

Av tí at Starvsmannafelagið í skrivum sínum sáar iva um meting kommununnar, er grundgevingin leypandi útgreina í svarskrivunum

til felagið, hóast kommunan framhaldandi stendur við upprunaligu grundgevingina.

Hjálagt er útskrift úr elektroniska málinum umframt avrit av skrivi frá Almannastovuni til Tilhaldið. Av tí at hjáløgdu skjølini eru avrit, er ikki neyðugt at senda tey aftur til kommununa."

Við skrivi, dagfest 19. jan. 2006, vórðu viðmerkingarnar frá kommununi sendar klagaranum til ummælis við einari freist áljóðandi 3 vikur.

Við skrivi, dagfest 25. jan. 2006, hevur A, adv., sent umboðsmanninum hesar viðmerkingar:

„**Viðv. tykkara j.nr. 200500086/9: Klaga fyri Starvsmannafelagið vegna B**
Víst verður til skriv tykkara dagfest 19.01.06.

Eg havi lagt tað fyri Starvsmannafelagið og B, og tey hava hesar viðmerkingar:

Tann 05.07.05 er eykajáttan umbiðin við fíggjarnevndarskjali frá Almanna- og Heilsumálaráðnum.

Tað var øllum alment kunnugt, at henda umbøn í mesta mun fór at verða gingin á møti.

Niðast á síðu 1 í skrivi frá 11.01.06 frá Tórshavnar Kommunu til Løgtingsins Umboðsmann verður ført fram, at Tilhaldið ikki var vitandi um, at játtanin var skerd við góðum kr. 60.000,00 fyrr enn eftir summarfrítíðina, og eftir at fyrra hoyringsskrivið varð sent.

Orsøkin verður søgd at vera, at eitt skriv dagfest 21.07.07 er sent beinleiðis til Tilhaldið, sum hevur poste restante í summarfrítíðini. Til hetta er at viðmerkja, at summarfrítíðin hjá Tilhaldinum byrjaði 01.08., og tað er tí ikki rætt, at summarfrítíð ella poste restante eru orsøk til nakra seinking ella misskiljing.

Hvørki kærarin ella Starvsmannafelagið hava aðrar viðmerkingar."

Við skrivi, dagfest 27. jan. 2006, vórðu viðmerkingarnar frá klagaranum sendar Tórshavnar kommunu til ummælis við einari freist áljóðandi 3 vikur.

Við skrivi, dagfest 16. febr. 2006, hevur Tórshavnar kommuna latið umboðsmanninum hesar viðmerkingar:

> „Viðv. klagu frá A.
> Tá A, í skrivi dagfest 25. januar 2005, førir fram, at „tað var øllum alment kunnugt, at henda umbøn í mesta mun fór at vera gingin á møti“ so er hetta eitt uppáhald, ið kommunan ikki kann byggja sína støðutakan á, tá avgerðir um raksturin skulu takast.
>
> Tá nýggju upplýsingarnar komu frá Almannastovuni um fíggjarligu viðurskiftini, blivu fíggjarligu karmarnir enn einaferð gjøgnumgingnir. Tað vísti seg tíverri, at tað framvegis varð neyðugt at siga fólk úr starvi fyri at halda karmarnar.“

Klagarin hevur sent umboðsmanninum soljóðandi skriv, dagfest 14. febr. 2006:

> **„Viðv. kæru Starvsmannafelagsins vegna B**
> Eg vísi til málið.
>
> Í sambandi við málið hevur Starvsmannafelagið biðið um innlit í tey fíggjarligu viðurskiftini hjá Tilhaldinum fyri at kanna eftir, um grundgevingin um fíggjarlig atlit fyri uppsøgn av B hevur hald í veruleikanum.
>
> Eg leggi við tað tilfar, sum Starvsmannafelagið hevur fingið.
>
> Hetta tilfar er fyri mær at síggja ørkymlandi á í nógvar mátar, serliga tí at út frá tí ber illa til at lesa seg fram til tær grundgevingar, sum higartil eru komnar fram um orsøkina til at B skuldi sigast upp.
>
> Eg lati hetta til umboðsmansins nýtslu og kunnleika.“

Við skrivi, dagfest 1. mars 2006, boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at hann ikki helt tað vera neyðugt við framhaldandi partshoyringum. Avrit av seinastu skrivunum frá pørtunum, vórðu samstundis send hinum partinum til kunningar.

## *Niðurstøða*

*Í klaguni sigur Starvsmannafelagið, at uppsagnargrundin ikki er verulig, tá kommunan vísir til fíggjarlig atlit, og í øðrum lagi at metingin*

*hjá kommununi er eyðsýnt skeiv, tá støða skuldi takast til, hvørt av starvsfólkunum skuldi sigast upp.*

*Í ætlanarskrivinum, dagfest 27. juli 2005, verður víst til skerdu játtanina til Tilhaldið sum grundgeving fyri uppsøgnini, umframt at hitt starvsfólkið, ið er sjúkrarøktarfrøðingur, hevur størri fakligan kunnleika til umsorganina fyri brúkarunum av Tilhaldinum.*

*Starvsmannafelagið hevur í hesum sambandi víst á, at Tilhaldið longu tá átti at veri vitandi um, at játtanin ikki fór at verða skerd við 44% í mun til játtanina fyri 2004, men einans við 7,6%. Víst verður í hesum sambandi til nýggju avgerðina hjá Almannastovuni, dagfest 21. juli 2005.*

*Kommunan sigur hinvegin, at Tilhaldið ikki kendi til hesa fráboðanina tá, og at einki varð nevnt í ætlanarskrivinum um broyttu hølisviðurskiftini og harav øktu útreiðslurnar, tí at skerda játtanin í sjálvum sær kundi bera uppsøgnina.*

*Í einum teldubrævi 12. jan. 2006, hevur leiðarin fyri Tilhaldið sent kommununi soljóðandi frágreiðing um viðurskiftini í Tilhaldinum um hetta mundið:*

> "...
>
> 1. *Eykajáttanin er daterað hósdagin 21. juli 2005*
> 2. *Var til arbeiðis 22 – 25 – 26 juli*
> 3. *27. juli Tilhaldið stongt vegna fyrireiking av Ólavssøkuframsýningini*
> 4. *Ólavssøkuframsýningin er opin 28. – 29. – 30. juli kl. 14.00 – 20.00 og 31. juli kl. 14.00 – 18.00*
> 5. *Tilhaldið stongt frá 1. aug. – 26. aug. 2005.*
>
> *Tá ið Tilhaldið er stongt hava vit postrestancu. Veit ikki hvønn dato postrestancan var gjørt 22. – 25. ella 26. juli. Havi ringt á posthúsið. Har er ongin skráseting av postrestancuni hjá Tilhaldinum. Postrestanca verður ikki skrásett, tá ið tíðarskeiðið er so stutt.*"

*Eg havi sostatt ikki grundarlag fyri at halda, at Tilhaldið ella kommunan*

*kendu broyttu játtanina frá Almannastovuni, tá ætlanarskrivið varð sent B. Í frágreiðing sínari, dagfest 15. sept. 2005, hevur kommunan útgreinað broyttu umstøðurnar fyri Starvsmannafelagnum og B.*

*Sambært § 4, stk. 3 í umboðsmanslógini skal umboðsmaðurin í meting sínari av kommunalari umsiting vísa atlit til tær serligu umstøður, sum kommunufyrisiting virkar undir. Hetta merkir m.a., at umboðsmaðurin skal vísa atlit til tað fíggjarliga sjálvstýrið, sum kommunurnar hava. Umboðsmaðurin eigur ikki at blanda seg uppí, hvat kommunurnar nýta sín pening til, og hvørji tilboð tær annars veita sínum borgarum, uttan at hava skyldu til tess, og á hvønn hátt hesi tilboð verða givin.*

*Eg havi tí heldur ongar viðmerkingar til avgerðina hjá kommununi um, at neyðugt var at siga fólki úr starvi í Tilhaldinum.*

*Spurningurin er síðani, hvørt tað var rætt at siga B úr starvi heldur enn hinum starvsfólkinum.*

*Í starvslýsingini fyri starvsfólk í Tilhaldinum stendur m.a. soleiðis:*
*"...*

*Referansu til:* *LEIÐARAN Á TILHALDINUM*

*...*

*Høvuðsuppgávur:*

- *Avloysa leiðaran, tá hesin er burturstaddur*
- *Skapa trivna fyri tey vitjandi*
- *Matgerða til viðskiftafólk*
- *Taka væl ímóti teimum vitjandi*
- *Geva ráð og vegleiðing til tey vitjandi*
- *Koma við uppskotum og fyrireika tiltøk, ið eru á skránni*
- *Virka fyri einum hugnaligum umhvørvi*

*Førleikakrøv:*

*Útbúgving/royndir:*

- *Relevanta útbúgving, t.d. innan umsorgan, heilsu og fyribyrging*

- *Drúgvar arbeiðsroyndir t.d. innan umsorgan, heilsu og fyribyrging.*
- *Góð samstarvsevni og áhuga í samfelagsligum viðurskiftum.*

*Onnur krøv:*

- *Skal kunna arbeiða sjálvstøðugt*
- *Skal vera røkin*
- *Skal vera framsøkin*
- *Skal hava lætt við at samskifta.*
- *Skal vera til reiðar at taka eina hond í praktiska arbeiðinum í Tilhaldinum*

*...“*

*Eg dugi út frá omanfyri standandi atlitum ikki at meta um, hvørt ein hondarbeiðslærari er betri egnaður til starvið í Tilhaldinum enn ein sjúkrarøktarfrøðingur. Eg kann av góðum grundum heldur ikki meta um, hvørt av starvsfólkunum hevur roynst best í starvinum, men má bara staðfesta, at tey atlit, ið eru nevnd í frágreiðingini frá kommununi eru saklig og viðkomandi fyri metingina. Tað hevði tó verið ynskiligt, tá kommunan nevnir tær royndir, sum hitt starvsfólkið hevur innan fyriskipan og handverk aðrastaðni frá, at kommunan samstundis nevndi samsvarandi royndir hjá B, og gjørdi sammetingar millum hesar. Havast skal í huga, at tað er ein trupul støða, tá ein arbeiðsgevari í sambandi við sparingar skal velja, hvønn ella hvørji av starvsfólkunum skulu sigast úr starvi. Serlig fyrilit eiga tí at verða víst starvsfólkunum í slíkum málum.*

*Eg haldi ikki, at kommunan hevur handfarið hesa uppsøgnina á nøktandi hátt, tá hugsað verður um, nær ætlaða uppsøgnin er fráboðað. Tað er ein meginregla fyri eini góðari starvsfólkaleiðslu, at uppsagnir ikki eiga at verða fráboðaðar beint uppundir eitt vikuskifti, frítíð ella líknandi, tá starvsfólkini annars fara heim. Í hesum førinum hevur B fingið handað ætlanarskrivið 27. juli, tvs. dagin fyri ólavsøku, og beint sum hon er liðug við uppsetingina av ólavsøkuframsýningini hjá Tilhaldinum. Eg haldi hetta vera sera óheppið, serliga tá hugsað verður um, at einki var, sum forðaði kommununi at bíða við hesum*

*átaki til seinni. Sjálv uppsøgnin varð jú heldur ikki framd fyrr enn 30. sept. 2005.*

*Samanumtikið havi eg tó ikki grundarlag fyri at meta um, hvørt av hesum starvsfólkum kommunan best kundi vera fyri uttan, tá sparingar skuldu fremjast. Eg geri tí ikki meira við hetta málið.*

## 28.2 Vantandi starvssetan á Arbeiðsloysisskipanini

Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um vantandi starvssetan á Arbeiðsloysisskipanini og um noktan av skjalainnliti. Í fyrra setanarumfarinum var eingin av teimum 25 umsøkjarunum settur í starv – í seinna umfarinum vóru tveir aðrir umsøkjarar settir. Arbeiðsloysisskipanin hevði vent sær til ein fyrrverandi arbeiðsgevara og fingið upplýsingar, sum ikki vóru til fyrimuns fyri umsøkjaran. Sambært frágreiðing frá stjóranum til stýrið varð avgjørdur dentur lagdur á hesar upplýsingar, tá avgjørt var ikki at seta klagaran í starv. Vísandi til grundleggjandi feilirnar í viðgerðini, serliga at klagarin ikki var partshoyrdur um upplýsingarnar frá fyrrverandi arbeiðsgevaranum, helt umboðsmaðurin avgerðina vera at meta sum ógilduga mótvegis klagaranum. Umboðsmaðurin vísti eisini á, at upplýsingar um trúarviðurskiftini hjá klagaranum ikki áttu at verið noterað, tí hetta hevði ongan týdning fyri starvið. Umframt átalur fyri viðgerðina, mælti umboðsmaðurin Arbeiðsloysisskipanini til at taka setanirnar uppaftur til viðgerðar við atliti at umsóknunum frá klagaranum, fyri síðani at taka eina nýggja avgerð. Arbeiðsloysisskipanin hevði eisini noktað klagaranum innlit í, hvør persónurin var, sum hevði úttalað seg um hann. Umboðsmaðurin mælti eisini Arbeiðsloyssisskipanini til at taka innlitsumbønina uppaftur til viðgerðar og upplýsa klagaranum fulla navnið á kelduni. (J. nr. 200500069)

## Klagan

Við skrivi, dagfest 14. juni 2005, hevur A sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

„**Kæruskriv**

Um at setanarpolitikkurin hjá Landsstýrinum er settur til síðis av Arbeiðisloysisskipanini, har grundgivið er við, at førleikarnir, sambært fyriliggjandi upplýsingum, ikki vóru hóskandi til krøvini/ynskini, ið sett vóru til starvið, hóast umsøkjara við hóskandi førleika søkti starvið.

Arbeiðsloysisskipanin lýsti tvey størv leys

Undirritaði søkti bæði størvini, ið vóru lýst leys m.a. í lýsing í Dimmalætting 04.05.2005. Til starvið á Ávísingardeildini vóru 32 umsóknir. Tað starvið bleiv sett.

Tað er mannagondin v.m. til starvið á Tryggingardeildini, sum ikki bleiv sett, sambært skriv dagf. 16.06.2005, tí førleikarnir ikki vóru hóskandi, ið eg vil kæra um, og sum Løgtingsins Umboðsmaður vónandi tekur til viðgerar/eftirtektar.

Tað vóru 25 umsóknir til starvi. Talan er um eitt vanligt skrivstovustarv – málsviðgeri – har dentur var lagdur á tey í lýsingini (samb. lýsingini vóru krøvini fleiri enn her nevnt, men hevur Arbeiðsloysisskipanin lagt høvuðsdentin á niðanfyri nevndu) settu krøvini/ynskini, m.a.:

- hóskandi útbúgving
- viðkomandi royndir
- evnini at arbeiða skjótt og sjálvstøðugt í einum arbeiðsumhvørvi við nógvari ferð
- førleikar at arbeiða eftir lógarverki
- evnini at samskifta í skrift og talu

Grundgevingin fyri ikki at seta starvi var soljóðandi:
„*Avgerðin er grundað á, at førleikarnir, sambært fyriliggjandi upplýsingum, ikki vóru hóskandi til krøvini/ynskini, ið sett verða til hettar starvið.*“

Undirritaði var bara ein av 25 umsøkjarum. Førleikan hjá hinum umsøkjarunum, veit eg einki um. Men tað kann hugsast at onkrir av hinum umsøkjarunum, eins og undirritaði, hava havt førleikarnar at virka sum vanligur málsviðgeri.

Hjálagt er mín egna umsókn við CV. Sum tað framgongur havi eg lokna HA-útbúgving (civiløkonomi) og afturat tí lisið meginpartin av cand.merc.aud. Har afturat hevur undirritaði frammanundan, arbeiðroyndir innan almenna fyrisiting, nevnuliga á Toll- og Skattstovu Føroya. Á Toll- og Skattstovuni eru krøvini og hugburðurin at arbeiða skjótt og sjálvstøðugt, við ymiskum uppgávum samstundis

og at arbeiða eftir lógarverki. Somuleiðis at samstarva, samskifta og samrøða við fólk, bæð innan- og uttanfyri „diskin".

Niðurstøðan kann ikki verða onnur, enn at tað var umsøkjari til starvið, ið hevði:

- hóskandi útbúgving
- viðkomandi royndir
- evnini at arbeiða skjótt og sjálvstøðugt í einum arbeiðsumhvørvi við nógvari ferð
- førleikar at arbeiða eftir lógarverki
- evnini at samskifta í skrift og talu

Føroya Landsstýri, Løgmansskrivstovan, hevur orðað leiðreglur fyri, hvussu farast skal fram í starvsfólkapolitiskum viðurskiftum innan almenna fyrisiting.

Eitt brot í almenna starvsfólkapolitikkinum er setanarpolitikkurin, sum ásetur m.a. at setanir verða gjørdar eftir ásettari mannagongd.

Endamálið við setanarpolitikkinum er heilt greið og soljóðandi: *„Endamálið er at tryggja, at stovnurin setir tann umsøkjaran, sum, úr einum heildarsjónarmiði, er best egnaður til starvið.* ***Setanarpolitikkurin skal eisini tryggja, at umsøkjarar, sum ikki fáa eitt starv teir hava søkt, kortini kunnu verða vísir í, at viðgerðin er farin fram á rættan og rættvísan hátt „***

Eitt annað brot í setanarpolitikkinum er viðgerðin av umsóknunum. M.a. skal setanarbólkurin viðgerða umsóknirnar nágreiniliga, og metast skal um førleikarnar. Setanarbólkurin velur eisini út hvørji skulu til samrøðu.

Sagt verður í avslagnum at Arbeiðsloysisskipanin hevur **viðgjørt** innkomnu umsóknirnar.

Hvussu veit Arbeiðsloysisskipanin, eftir at hava **<u>viðgjørt</u>** innkomnu umsóknirnar, at førleikarnir, ikki vóru hóskandi til krøvini/ynskini, ið sett vóru til starvið ?

Spurnartekin kann setast við, um verulig viðgerð av umsóknunum er farin fram, tá ið umsøkjari við kravdum førleika hevur søkt, men ikki fær møguleika/sleppur til samrøðu.

Tað er ivasamt um nakar av umsøkjarunum kann føla seg tryggan í, sum umsøkjara til eitt starv, sum eingin fekk, at viðgerðin er farin fram á rættan og rættvísan hátt.

Undirritaði følir seg í øllum førum ikki sannførdan.

Tessvegna verður kært um:

1) At Arbeiðsloysisskipanin hevur ikki fylgt procedurereglunum og sett í starv tann umsøkjaran, ið út frá sakligari meting var best egnaður.
2) At Arbeiðsloysisskipanin eigur at viðurkenna at umsøkjari hevði hóskandi førleika og at hetta ikki kann afturvísast.
3) At Arbeiðsloysisskipanin eigur at koma við veruligum grundgevingum, hví starvi ikki bleiv sett og ikki við undanførslum.“

## Málsgongd

Á vári 2005 varð soljóðandi lýsing frá Arbeiðsloysisskipanini at finna í bløðunum:

„...

**Málsviðgeri til Tryggingardeildina**

**Um Tryggingardeildina**

Tryggingardeildin umsitur vanligan arbeiðsloysisstuðul, fiskavirkis-skipanina, arbeiðs-loysistrygging fyri sjálvstøðug vinnurekandi, farloyvisskipanina og Barsilsskipanina

Á Tryggingardeildini starvast 7 fólk.

**Uppgávur**
Uppgávurnar hjá málsviðgeranum verða:

- at taka sær av málsviðgerð í sambandi við tær uppgávur, ið deildin umsitur
- samrøður og samskifti annars við viðskiftafólk okkara
- at verða við til at tillaga og menna tænasturnar

**Førleiki**
Vit leita eftir einum persóni, sum er røkin og nærlagdur, og trívist í einum arbeiðsumhvørvi við nógvari ferð.

Tað rætta starvsfólkið hevur:

- hóskandi útbúgving
- viðkomandi royndir
- evni at arbeiða skjótt og sjálvstøðugt
- evni at arbeiða við fleiri ymiskum uppgávum samstundis
- førleikar at arbeiða eftir lógarverki
- góð samstarvsevni
- evni at samskifta bæði í skrift og talu
- góðan teldukunnleika

Talan er um eitt fast fulltíðarstarv við góðum møguleikum fyri eftirútbúgving. Løn sambært avtalu. Starvið verður at seta skjótast til ber.

...“

Við skrivi, dagfest 11. mai 2005, sendi A Arbeiðsloysisskipanini soljóðandi umsókn:

„**Umsókn – Málsviðgeri til Tryggingardeildina**
Vísandi til lýsing í Dimmalætting 04.05.2005, søkir undirritaði omanfyri nevnda starv á Tryggingardeildini hjá Arbeiðsloysisskipanini.

Undirritaði hevur lokið HA-útbúgvingina (civiløkonomi) og afturat tí lisið meginpartin av cand.merc.aud., ið ikki er endaliga avsluttað enn. Har afturat hevur undirritaði viðkomandi arbeiðroyndir innan almenna fyrisiting, nevnuliga á Toll- og Skattstovu Føroya.

Førleikakrøvini eru ikki ókend fyri undirritaða. Krøvini at arbeiða sjálvstøðugt, við ymiskum uppgávum samstundis og at arbeiða eftir lógarverki var dagligdagurin á Toll- og Skattstovuni. Somuleiðis at samstarva og samskifta við fólk, bæði innan- og uttanfyri „diskin". Telduførleikin hevur verið inntaktur higartil arbeiðsmessiga.

Persónligir eginleikar og krøv annars, tit sóknast eftir, meti eg meg at lúka, sambært teirri lívsgongdarlýsing v.m., ið er viðløgd umsóknini. Leggjast kann afturat, at eitt av mondulunum til cand.merc.aud., var „personalejura og EU-ret", har m.a. danski arbeiðsrætturin bleiv gjøgnumgingin,

Tit eru vælkomin at biðja um fleiri upplýsingar, um tørvur er á tí."

Við umsóknini varð lagt eitt CV, har tað m.a. stóð soleiðis:

**„CV (lívsgongdarlýsing)**

...

| | |
|---|---|
| Útbúgving: | 10. klassa, Klaksvík (1982) |
| | HH-prógv, Tórshavn (1987) |
| | HA-prógv, Sønderborg (1998) |
| | Cand.merc.aud, ikki avlsutta, Kolding (2003) |
| | |
| Størv: | ……., 1982/83 |
| | ……., 1983/84 |
| | Líkningarráð Føroya, 1986-1991 |
| | Toll- og Skattstova Føroya, 1992-1993 og 1995-1996 |
| | Toll- og Skattstova Føroya, avloysari sum tollari, 21/10-03 – 31/3-04 |
| | Toll- og Skattstova Føroya, avloysari sum fulltrúi, 01/04-04 – 31/12-04 |
| | |
| Referencer: | B, stjóri, Toll- og Skattstova Føroya, |
| | D, Økisstjóri, T&S, Norðoya Øki |
| | E, fráfarandi økisstjóri, T&S, Streymoyar Øki" |

Við skrivi, dagfest 13. mai 2005, hevur Arbeiðsloysisskipanin sent A móttøkuváttan fyri umsóknina.

Sum grundarlag undir metingini av umsóknunum hevur Arbeiðsloysisskipanin nýtt hetta skjal:

| „Nr. | Krav/fyrimunur | Førleiki |
|---|---|---|
| 1. | K | hóskandi útbúgving |
| 2. | K | viðkomandi royndir |
| 3. | K | evnini at arbeiða skjótt og sjálvstøðugt |
| 4. | K | evnini at arbeiða við fleiri ymiskum uppgávum samstundis |
| 5. | K | førleika at arbeiða eftir lógarverki |
| 6. | K | góð samstarvsevni |
| 7. | K | evni at samskifta bæði í skrift og talu |
| 8. | K | góðan teldukunnleika |
| 9. | F | røkin |
| 10. | F | nærlagdur |
| 11. | F | trívist í einum arbeiðsumhvørvi við nógvari ferð“ |

Tveir av trimum limum í setanarbólkinum hava givið umsóknini frá klagaranum 3. prioritet, meðan ein teirra hevur givið umsóknini 2. prioritet. Í notati hevur setanarbólkurin gjørt hesar viðmerkingar um klagaran:

| „Svarað lýsingini ? | Styrki | Veikleikar |
|---|---|---|
| Ja/Nei | Viðkomandi royndir og útbúgving | Kanska yvirkvalifiseraður |
| 1 ? 2 + | | Samrøðu ?? |
| 3 + 4 + | | |
| 5 + 6 ? | | Kvikleiki ?? |
| 7 ? 8 ? | | |
| 9 ? 10 ? | | |
| 11 ?“ | | |

Millum skjølini viðvíkjandi klagaranum liggur eitt hondskrivað

telefonnotat. Notatið er ikki er dagfest, og tað framgongur heldur ikki, hvør hevur skrivað hetta notatið, ið er soljóðandi:

„TLF-Notat av samrøðu við Toll- & Skat …
Arbeiddi seint, men vælgerin.
Ikki tann sum skundar sær
Ikki góður til deadlines (seinur)
Ikki lættur at stressa
Møtir væl upp
„Ebeneser-maður burturav“

Við skrivi, dagfest 16. juni 2005, hevur Arbeiðsloysisskipanin svarað A soleiðis uppá starvsumsóknina:

„**Viðvíkjandi umsókn tygara um starvið sum málsviðgeri á Tryggingardeildini**

Tygum hava søkt starvið sum málsviðgeri á Tryggingardeildini. 25 umsøkjarar vóru til starvið.

Arbeiðsloysisskipanin hevur viðgjørt innkomnu umsóknirnar og er komin til ta niðurstøðu ikki at seta nakran av umsøkjarunum í starvið.

Sum nevnt í lýsingini, eru uppgávurnar hjá málsviðgeranum m.a, at taka sær av málsviðgerð í sambandi við tær uppgávur, ið deildin umsitur, og at hava samrøður og samskifti annars við viðskiftafólk okkara.

Við hædd fyri uppgávunum hjá málsviðgeranum varð í viðgerðini av umsóknunum dentur lagdur á tey í lýsingini settu krøvini/ynskini, herímillum:

- hóskandi útbúgving
- viðkomandi royndir
- evnini at arbeiða skjótt og sjálvstøðugt í einum arbeiðsumhvørvi við nógvari ferð

- førleikar at arbeiða eftir lógarverki
- evnini at samskifta í skrift og talu

Avgerðin er grundað á, at førleikarnir, sambært fyriliggjandi upplýsingum, ikki vóru hóskandi til krøvini/ynskini, ið sett verða til hettar starvið.

Arbeiðsloysisskipanin vil til seinast nýta høvi til at takka tygum fyri tann áhuga, tygum sýndu við at søkja starvið."

Í sambandi við, at klagarin hevði vent sær til Stýrið fyri Arbeiðsloysisskipanina um hetta málið, hevur stjórin á Arbeiðsloysisskipanini gjørt soljóðandi innanhýsis upprit til stýrisformannin, dagfest 8. juli 2005:

„**Um lýsingina eftir málsviðgera til Tryggingardeildina**
Sum sæst í hjálagda skrivi frá A, verða ymsir spurningar settir við mannagongdirnar, í sambandi við at ALS søkti eftir málsviðgera til Tryggingardeildina. Niðanfyri vilja vit greiða frá, hvat er hent í málinum.

Í mai mánaði valdu vit at søkja eftir málsviðgerum bæði til Tryggingar- og Ávísingardeildina. Vit valdu í hesum sambandi at gera eina lýsing, har søkt varð eftir báðum málsviðgerunum.

Tveir setunarbólkar vóru settir. Til starvið í Ávísingardeildini varð bólkurin mannaður við deildarleiðaranum á Ávísingardeildini, starvsfólkaumboði og undirritaðu, og til starvið í Tryggingardeildini varð setunarbólkurin mannaður við deildarleiðaranum á Tryggingardeildini, starvsfólkaumboði og undirritaðu. Niðanfyri umrøða vit ítøkiligu mannagongdina, sum nýtt varð í sambandi við starvið á Tryggingardeildini (vísandi til at hettar er tað, sum A umrøður í skrivinum). Tó skal verða viðmerkt, at sama mannagongd varð nýtt til bæði størvini.

Tann einstaki limurin í setunarbólkinum gjøgnumgekk umsóknirnar við hædd fyri teimum krøvum/ynskjum, sum vóru sett í lýsingini til førleikar v.m. (Hesi krøvini vóru innleiðandi gjøgnumgingin í felag í

setunarbólkinum). Síðan møttist setunarbólkurin og gjøgnumgekk, hvørjir umsøkjarar, mett varð, áttu at verða kallaðir inn til eina samrøðu. Tey, sum øll, ella ein meiriluti í setunarbólkinum, mettu vera mest sannlík at lúka krøvini/ynskini, vórðu innkallaði til eina samrøðu. Í tryggingarbólkinum gjørdist talan um at innkalla fimm fólk til samrøðu. Her skal verða viðmerkt, at av teimum 25 umsøkjarunum vóru 18, sum høvdu søkt bæði størvini. Hettar undraði okkum ikki sørt í setunarbólkinum, tá ið talan varð um størv, har søkt varð eftir sera ymiskum profilum.

Eftir at hava havt tey fimm fólkini til samrøðu máttu vit staðfesta, at vit ikki mettu nakran av teimum at hava hóskiligar førleikar til starvið. Heldur ikki mettu vit nakan av hinum at hava førleikarnar, sum vóru hóskandi til krøvini/ynskini, ið sett vóru til starvið. Her skal verða nevnt, at nakrir av umsøkjarunum vóru mettir at vera yvirkvalifiseraðir til starvið. Hettar ljóðar kanska løgið, men júst til starvið á Tryggingardeildini settu vit so nýliga sum á vári 2004 ein málsviðgera, sum nærum var liðug við sína kandidatútbúgving. Tað vísti seg tó skjótt, at avbjóðingarnar í starvinum vóru á einum alt ov lágum støði, og keddi hon seg skjótt. Hettar gjørdist tí ein trupul støða fyri hana, men ikki minni fyri ALS. Fyri at sleppa undan eini líknandi støði aftur longu nú, var tað tí umráðandi fyri okkum ikki at endurtaka ein tílíkan feil, og tí mettu vit nakrar av umsøkjarunum at vera yvirkvalifiseraðar og harvið óegnaðar til starvið.

Í sambandi við ítøkiliga málið um A skal verða upplýst, at vit fyrst av øllum mettu hansara útbúgvingarliga støði at vera ov høgt. Men hansara royndir vístu, at hann hevði arbeitt á Toll- & Skattstovu Føroya, og mettu vit tí, at hann kanska kortini var hóskandi. Hann hevði í sínari umsókn tilvísingar til fyrrverandi arbeiðsgevarar, ein av hesum var Toll- & Skattstova Føroya. Vit valdu at venda okkum til teirra og fingu upplýst, at A arbeiddi seint, og at hann ikki var góður til dead-lines. Í lýsingini høvdu vit greitt víst á, at rætta starvsfólki skuldi hava evnini at arbeiða skjótt, og mettu vit hetta verða ein umráðandi førleika. Niðurstøðan gjørdist tí, at heldur ikki A varð mettur at hava neyðugu førleikarnar til starvið.

**Eftirmeting av sjálvari lýsingini:**
Hettar er fyrstu ferð, at eg í mínari tíð sum stjóri upplivi ikki at seta nakran av umsøkjarunum. Hettar hevur sjálvandi havt við sær, at vit hava eftirmett gongdina í hesum ítøkiliga førinum, og niðurstøðan er, at:

- Tað ikki var skynsamt at søkja eftir tveimum so ymsum málsviðgerum í einari lýsing
- Tað ikki var nóg greitt orðað í lýsingini, hvørjar royndir og útbúgvingar vóru hóskandi, serliga tá ið talan var um starvið á Tryggingardeilini.
- Tá ið søkt aftur verður eftir málsviðgera til Tryggingardeildina, skal tað framganga, hvat útbúgvingarligt støði er hóskiligt til starvið"

Í september 2005 varð soljóðandi lýsing aftur at finna í bløðunum:

**„Lýst verður við hesum eftir málsviðgera til Tryggingardeildina hjá Arbeiðsloysisskipanini**

**Um Tryggingardeildina**
Tryggingardeildin umsitur vanligan arbeiðsloysisstuðul, fiskavirkisskipanina, arbeiðsloysistrygging fyri sjálvstøðug vinnurekandi, farloyvisskipanina og Barsilsskipanina

Á Tryggingardeildini starvast 6 fólk.

**Uppgávur**
Uppgávurnar hjá málsviðgeranum verða:

- at taka sær av málsviðgerð og samrøðum í sambandi við tær uppgávur, ið deildin umsitur
- samrøður og samskifti annars við viðskiftafólk okkara
- at verða við til at tillaga og menna tænasturnar

**Førleiki**
Vit leita eftir einum persóni, sum er røkin, nærlagdur, tænastuhugaður og trívist í einum arbeiðsumhvørvi við nógvari ferð.

Tað rætta starvsfólkið hevur:

- skrivstovuútbúgving ella aðra hóskandi útbúgving
- viðkomandi royndir
- evni at arbeiða skjótt, sjálvstøðugt og við støðugum evstamørkum
- evni at arbeiða við fleiri ymiskum uppgávum samstundis
- førleikar at arbeiða eftir lógarverki
- góð samstarvsevni
- evni at samskifta bæði í skrift og talu
- góðan teldukunnleika

**ALS bjóðar**
Talan er um eitt fast starv við góðum møguleikum fyri eftir-útbúgving.

Løn sambært avtalu.

Starvið verður at seta skjótast gjørligt.

**Umsókn**
Umsóknir, við avriti av prógvum og møguligum viðmælum, skulu vera ALS í hendi í seinasta lagi mikudagin 21. september 2005 kl. 12.00.
..."

A hevur sent Arbeiðsloysisskipanini soljóðandi umsókn, dagfest 19. sept. 2005:

„**Umsókn – Málsviðgeri til Tryggingardeildina**
Vísandi til lýsing í Dimmalætting 16. sept. 2005, søkir undirritaði omanfyri nevnda starv á Tryggingardeildini hjá Arbeiðsloysisskipanini.

At arbeiða skipað, at vera røkin og at hava ordan í tingunum, er partur av mínum hugburði. Eg havi eitt gott tænastusinni, við neyðugum innlivingarevnum. Harnæst hevur nærlagni og arbeiðsemið altíð eyðkent mítt arbeiðslag.

Somuleiðis krøvini at arbeiða sjálvstøðugt, samstarva og taka ábyrgd. Hetta vóru lyklaorðini og hava altíð verið raðfest frammalaga í umhvørvinum á Toll- og Skattstovuni. Líkaleiðis at samskifta og samrøða við fólk, bæði innan- og uttanfyri „diskin".

Tað sama kann sigast m.a. um førleikakrøvini at arbeiða við ymiskum uppgávum samstundis og at arbeiða eftir lógarverki, tá hetta var dagligdagurin á Toll- og Skattstovuni. Telduførleikin hevur verið inntaktur higartil arbeiðsmessiga. At (eftir)útbúgva seg víðari er ein sjálvfylgja.

Undirritaði hevur lokna HA-útbúgving og lisið cand.merc.aud., ið ikki er endaliga avsluttað enn. Áðrenn eg fór til Danmarkar, tók eg m.a. skattarætt II, organisation og Ledelse og samarbejde á merkonom støði. Leggjast kann afturat, at eitt av mondulunum til cand.merc.aud., var „personalejura og EU-ret", har m.a. danski arbeiðsrætturin bleiv gjøgnumgingin.

Eg havi gott innlit í samfelagsviðurskifti. Eg havi einki tilknýti til nakran politiskan flokk.

Persónligir eginleikar, royndir og krøv annars, tit sóknast eftir, verða lýstir sambært teirri lívsgongdarlýsing v.m., ið er viðløgd umsóknini.

Tit eru vælkomin at biðja um fleiri upplýsingar, um tørvur er á tí."

Saman við umsóknini hevur A sent Arbeiðsloysisskipanini soljóðandi skriv, dagfest 19. sept. 2005:

**„Viðv. Umsókn sum málsviðgeri hjá ALS**
Vísandi til lýsing í Dimmalætting 16. september 2005, har søkt verður eftir málsviðgera til Tryggingardeildina hjá ALS, søkir undirritaði nevnda starv. Samstundis verða hesar viðmerkingar lagdar saman við umsóknini.

> Sum tykkum kunnugt søkti undirritaði sum ein av 25 umsøkjarum, starvið á Tryggingardeildini hjá ALS sum málsviðgeri, ið var lýst leyst m.a. í Dimmalætting 4. maj 2005. Tað starvið fekk eingin av teimum 25 umsøkjarunum, tí sum ALS segði: „Avgerðin er grundað á, at førleikarnir, sambært fyriliggjandi upplýsingum, ikki vóru hóskandi til krøvini/ynskini, ið sett verða til hettar starvið."
>
> Hóast hesa fráboðan frá ALS, fari eg kortini ikki frívilliga at erklera meg sjálvan sum ikki at hava førleikan at søkja eitt – vanligt málsviðgera starv – hóast hetta er hjá ALS. Avgerðin um førleikan kann Løgtingsins Umboðsmaður vónandi taka støðu til og greiða ALS og mær frá.
>
> Roknast kann tó ikki við, at ALS kann góðkenna nakran av teimun 25, ið søktu starvið sum málsviðgeri fyrru fer, tvs. sambært lýsing í Dimmalætting m.a. 4. maj 2005. Tí at koma í ansøgn við seg sjálvan; tað vil ALS neyvan hava sitandi á sær. Hinvegin, haldi eg at ALS burdi verið fair og givið sær sjálvum og okkum 25 ein møguleika at søkt omanfyri nevnda starv, ið er lýst leyst.
>
> Tað kann gott vera at umsóknin er orðað annarleiðis hesuferð. Lýsingin er eisini orðað eitt sindur ørðvísi. Kortini er substansurin óbroyttur/tann sami í bæði í lýsingunum og umsóknunum.
>
> Við vón um góða og positiva viðgerð."

Við skrivi, dagfest 20. sept. 2005, hevur Arbeiðsloysisskipanin sent A eina móttøkuváttan fyri umsóknina.

Sum grundarlag undir metingini av umsøkjarunum hevur Arbeiðsloysisskipanin nýtt soljóðandi notat:

> „Krøv (K) og/ella ynski (F), ið eru sett fram um førleikar í lýsingini eftir málsviðgera til Tryggingardeildina:

| Nr. | Krav/fyrimunur | Førleiki |
|---|---|---|
| 01.00 | K | skrivstovuútbúgving ella aðra hóskandi útbúgving |
| 02.00 | K | viðkomandi royndir |
| 03.00 | K | evnini at arbeiða skjótt, sjálvstøðugt og við støðugum evstamørkum |
| 04.00 | K | evnini at arbeiða við fleiri ymiskum uppgávum samstundis |
| 05.00 | K | førleikar at arbeiða eftir lógarverki |
| 06.00 | K | góð samstarvsevni |
| 07.00 | K | evni at samskifta bæði í skrift og talu |
| 08.00 | K | góðan teldukunnleika |
| 09.00 | F | røkin |
| 10.00 | F | nærlagdur |
| 11.00 | F | tænastuhugaður |
| 12.00 | F | trívist í einum arbeiðsumhvørvi við nógvari ferð“ |

Ein samdur setanarbólkur hevur í niðurstøðu sínari givið umsóknini frá klagaranum 3. prioritet. Í trimum notatum hava einstøku limirnir í setanarbólkinum, sum eg havi valt at nevna lim 1, 2 og 3, gjørt hesar viðmerkingar um klagaran:

**Limur 1:**

| „Svarað lýsingini ? | | Styrki | Veikleikar |
|---|---|---|---|
| 1 Nei | 7 Ja | Royndir sum málsviðgeri | Yvirkvalifiseraður |
| 2 Ja | 8 Ja | | Svarar ikki øllum spurningum í lýsingini |
| 3 Ja | 9 Ja | | |
| 4 Ja | 10 Ja | | Sera negativur í sambandi við umsóknina |
| 5 Ja | 11 Ja | | |
| 6 ? | 12 ?“ | | |

---

**Limur 2:**

| „Svarað lýsingini ? | | Styrki | Veikleikar |
|---|---|---|---|
| 1 Ja ? | 7 | ? | Óhøviskur í síni umsókn |
| 2 Ja | 8 | | Yvirkval. |
| 3 ? | 9 | | |
| 4 Ja | 10 | | |
| 5 Ja | 11 Ja | | |
| 6 | 12 ?“ | | |

---

**Limur 3:**

| „Svarað lýsingini ? | | Styrki | Veikleikar |
|---|---|---|---|
| 1 | 7 V | A) Royndir sum | A) Yvirkvalifiseraður |
| 2 V | 8 V | málsviðgeri | B) Svarar øllum spm. uttan |
| 3 . | 9 V | | teimum viðv. skjóttleika, |
| 4 V | 10 V | | ferð og evstamørk |
| 5 V | 11 V | | C) Sera negativar viðm. til |
| 6 V | 12 .“ | | umsóknina |
| | | | D) Ikki avslutta Cand.merc. aud. |

Viðvíkjandi teimum báðum umsøkjarunum, ið vórðu settir í starv, og sum eg havi valt at nevna umsøkjara 1 og 2, hava einstøku limirnir í setanarbólkinum skrivað soleiðis í notatunum:

**Limur 1:**

*Umsøkjari 1:*

| „Svarað lýsingini ? | | Styrki | Veikleikar |
|---|---|---|---|
| 1 Ja | 7 Ja | Góð umsókn | Hevur ikki arbeitt við i |
| 2 Ja | 8 Ja | Sera góð ummæli | lógarverk |
| 3 Ja | 9 Ja | Sera góðar karakterir | |
| 4 ? | 10 Ja | frá skúla | |
| 5 ? | 11 Ja | | |
| 6 Ja | 12 ?“ | | |

...

*Umsøkjari 2:*

| „Svarað lýsingini ? | | Styrki | Veikleikar |
|---|---|---|---|
| 1 Ja | 7 Ja | Er avlærd á ALS | Svarar ikki lýsingini væl |

2 Ja 8 Ja Var ein dugnaligur og
3 Ja 9 ? arbeiðssamur persónur
4 ? 10 ?
5 ? 11 ?
6 ? 12 Ja“
---

**<u>Limur 2:</u>**
*Umsøkjari 1:*

| „<u>Svarað lýsingini ?</u> | | <u>Styrki</u> | <u>Veikleikar</u> |
|---|---|---|---|
| 1 Ja | 7 Ja | Góð ummæli | Lógartekstur |
| 2 Ja | 8 Ja | | |
| 3 Ja | 9 Ja | | |
| 4 ? | 10 Ja | | |
| 5 ? | 11 ? | | |
| 6 Ja | 12 ?“ | | |

...
*Umsøkjari 2:*

| “<u>Svarað lýsingini ?</u> | | <u>Styrki</u> | <u>Veikleikar</u> |
|---|---|---|---|
| 1 Ja | 7 Ja | | |
| 2 Ja | 8 Ja | | |
| 3 Ja | 9 - | | |
| 4 ? | 10 | | |
| 5 Ja | 11 - | | |
| 6 ? | 12 Ja“ | | |

---

**<u>Limur 3:</u>**
*Umsøkjari 1:*

| “<u>Svarað lýsingini ?</u> | | <u>Styrki</u> | <u>Veikleikar</u> |
|---|---|---|---|
| 1 V | 7 | A) Sera góð ummæli | |
| 2 V | 8 V | B) Sera góðar karakterir | |
| 3 V | 9 V | frá skúlum og skeiðum | |
| 4 | 10 V | | |
| 5 | 11 V | | |
| 6 V | 12 „ | | |

...

*Umsøkjari 2:*

| "Svarað lýsingini ? | | Styrki | Veikleikar |
|---|---|---|---|
| 1 V | 7 ÷ | A) Arb. í ALS fyrr | A) Svarar ikki uppá lýsingina |
| 2 ÷ | 8 ÷ | | |
| 3 ÷ | 9 ÷ | | |
| 4 ÷ | 10 ÷ | | |
| 5 ÷ | 11 ÷ | | |
| 6 ÷ | 12 ÷" | | |

Við skrivi, dagfest 30. sept. 2005, hevur Arbeiðsloysisskipanin svarað umsóknini frá klagaranum soleiðis:

> „**Viðvíkjandi umsókn tygara um starv sum málsviðgeri á Tryggingardeildini**
> Tygum hava søkt starv sum málsviðgeri á Tryggingardeildini. 15 umsøkjarar vóru.
>
> Arbeiðsloysisskipanin hevur viðgjørt innkomnu umsóknirnar og er komin til ta niðurstøðu at seta aðrar umsøkjarar í starv; tveir umsøkjarar vórðu settir.
>
> Sum nevnt í lýsingini, eru arbeiðsuppgávurnar m.a. at taka sær av málsviðgerð í sambandi við tær uppgávur, ið deildin umsitur, og at hava samrøður og samskifti annars við viðskiftafólk okkara.
>
> Við hædd fyri arbeiðsuppgávunum varð í viðgerðini av umsóknunum dentur lagdur á tey í lýsingini settu krøvini/ynskini, herímillum:
>
> - skrivstovuútbúgving ella aðra hóskandi útbúgving
> - viðkomandi royndir
> - evnini at arbeiða skjótt, sjálvstøðugt og við støðugum evstamørkum
> - evnini at arbeiða við fleiri ymiskum uppgávum samstundis
> - førleikar at arbeiða eftir lógarverki
> - góð samstarvsevni
> - evnini at samskifta bæði í skrift og talu

- góðan teldukunnleika
- tænastuhugaður

Avgerðin er grundað á, at teir settu persónarnir betur luku teir førleikar, sum eru nevndir omanfyri.

Arbeiðsloysisskipanin vil til seinast nýta høvi til at takka tygum fyri tann áhuga, tygum sýndu við at søkja starvið.“

Við skrivi, dagfest 14. nov. 2005, hevur klagarin sent Arbeiðsloysisskipanini soljóðandi innlitsumbøn:

**„Viðv. skjalainnlit í upplýsingar, í samband við umsókn sum málsviðgeri hjá ALS**
Undirritaði søkti starv sum málsviðgeri á Tryggingardeildini, samb. lýsing í Dimmalæting 04.05.2005. Samb. skriv frá ALS, dagf. 16.06.2005, fekk undirritaði at vita, at eingin av umsøkjarunum bleiv settur við soljóðandi grundgeving:

“Avgerðin er grundað á, at førleikarnir, sambært fyriliggjandi upplýsingum, ikki vóru hóskandi til krøvini/ynskini, ið sett varð til hetta starvið. „

Undirritaði kærdi omanfyri nevndu avgerð til Løgtingsins Umboðsmann. Løgtingsins Umboðsmaður hevur fingið í hendur, eina frágreiðing frá ALS, í samband við hettar mál, (J.nr.: 200500069 hjá Løgtingsins Umboðsmanni). Í hesi frágreiðing verður upplýst, at ALS hevur vent sær til Toll- og Skattstovu Føroya og hevur m.a. fingið upplýst, at undirritaði arbeiddi seint (“Ikki tann sum skundar sær“) og at undirritaði ikki var góður til dead-lines. Til seinast í frágreiðingini er viðmerkt, at ALS ikki vil lata onnur, herundir klagaranum fáa avrit av innanhýsis skjølum, serliga hvønn persón hjá Toll- og Skattstovu Føroya, ALS hevur tosa við.

Hervið verður biðið um skjalainnlit í omanfyri nevnda setanarmál, tvs. øll skjøl, upplýsingar og hvønn persón ALS hevur tosað við á Toll- og Skattstovu Føroya.

Víst verður til grein 9, stk. 1 í fyrisitingarlógini, um rættin til skjalainnlit; grein 10, stk. 2, hvat rætturin til skjalainnlit fevnir um; grein 12, stk. 2, um undantøku av skjølum, men sum vísir til upplýsingar um veruligar umstøður, sum eru av stórum týdningi fyri avgerðina í málinum, og sum bert standa í innanhýsis arbeiðsskjølum, skulu hóast ásetingina í stk. 1 latast í samsvari við reglurnar í kapittli 4 og grein 13, um rættin til skjalainnlit.

Biðið verður um svar samb. grein 16 í fyrisitingarlógini.“

Við skrivi, dagfest 8. des. 2005, hevur Arbeiðsloysisskipanin svarað innlitsumbønini soleiðis:

„**Viðv. skjalainnlit í upplýsingar, í sambandi við umsókn tygara sum málsviðgeri hjá ALS**
Víst verður til bræv tygara dagfest 14. novembur 2005, ið er móttikið 24. novembur 2005, har tygum biðja um skjalainnlit í sambandi við umsókn sum málsviðgeri hjá ALS.

Vit hava gjøgnumgingið alt málið og loyva okkum at leggja við avrit av hesum skjølum:

- Viðv. skjalainnlit í upplýsingar, í samband við umsókn sum málsviðgeri hjá ALS, dagfest 14.11.2005. Skrivið er til Arbeiðsloysisskipanina frá A.
- Frágreiðing í sambandi við at lýst varð eftir málsviðgera til Tryggingardeildina, dagfest 15. september 2005. Skrivið er til Løgtingsins Umboðsmann frá Arbeiðsloysisskipanini.
- Eg leggi við avrit av brævi Løgtingsins Umboðsmanni, dagfest 18.08.2005. Skrivið er frá Advokatskrivstovuni til Arbeiðsloysisskipanina.
- Eg leggi við avrit av brævi, sum eg havi sent Løgtingsins Umboðsmanni, dagfest 15.08.2005. Skrivið er frá Advokatskrivstovuni til Arbeiðsloysisskipanina.
- Í sambandi við at lýst varð eftir málsviðgera til Tryggingardeildina, dagfest 15. august 2005. Skrivið er frá Arbeiðsloysisskipanini til A.
- Viðvíkjandi klagu frá A, móttikin 18. juli 2005, dagfest 22. juli

2005. Skrivið er til Arbeiðsloysisskipanina frá Løgtingsins Umboðsmanni.

- Kunnan um eitt av tveimum málsviðgerar(størvum), ið ikki bleiv sett – tí førleikarnir ikki vóru hóskandi ? dagfest 27.06.2005. Skrivið er til Stýrið fyri Arbeiðsloysisskipanina frá A.
- Málsviðgerar til ALS. Hetta er lýsingin eftir málsviðgerum til ALS.
- Yvirlit yvir upplýsingar um A. Yvirlit yvir aðrar umsøkjarar er strikað.
- Yvirlit yvir 11 Krav/fyrimunir yvir førleikar.
- Yvitlit yvir eftirmetingarskema yvir A. Yvirlit yvir aðrar umsøkjarar er strikað.
- Viðvíkjandi umsókn tygara um starvið sum málsviðgeri á Tryggingardeildini, dagfest 16.06.2005. Skrivið er til A frá Arbeiðsloysisskipanini.
- Viðvíkjandi umsókn tygara, dagfest 13.05.2005. Skrivið er til A frá Arbeiðsloysisskipanini.
- Telefonnotat av samrøðu við Toll- & Skattstovu Føroya. Navn á persóni á Toll- & Skattstovu Føroya er strikað.

Tygum fáa avrit av uppriti, sum gjørt er frá telefonsamrøðu millum ALS og Toll- og Skattstovu Føroya, men vit hava fjalt navnið á viðkomandi persóni á Toll- og Skattstovu Føroya.

Vit meta, at talan er um eitt innanhýsis arbeiðsskjal, og meta vit ikki, at tað hevur týdning fyri málið, at tygum fáa upplýst, hvør hesin persónur er.“

Við soljóðandi skrivi, dagfest 19. des. 2005, hevur klagarin vent sær aftur til Arbeiðsloysisskipanina:

„**Viðv. skjalainnlit í upplýsingar, í samband við umsókn sum málsviðgeri hjá ALS**
Víst verður til skriv tykkara dagfest 08.11.2005, har ALS svarar skrivi mínum dagfest 14.11.2005, viðvíkjandi skjalainnliti í samband við umsókn mína sum málsviðgeri hjá ALS.

Saman við skrivi tykkara, fekk undirritaði ymisk skjøl. M.a. avrit av uppriti, sum gjørt er frá telefonsamrøðu millum ALS og Toll- og Skattstovu Føroya, men tit hava fjalt navnið á viðkomandi persóni á Toll- og Skattstovu Føroya. Tit siga at tit meta, at talan er um innanhýsis arbeiðsskjal og meta tit ikki, at tað hevur týdning fyri málið, at undirritaði fær upplýst, hvør hesin persónur er.

Mint verður á, at undirritaði heitti á ALS, um at fáa svar samb. grein 16 í fyrisitingarlógini. Her verður víst til grein 16, stk. 3, har m.a. sagt verður: „*Hevur tað týdning fyri møguleikan hjá einum parti, at røkja síni áhugamál, at hann fær avrit ella makaskjal av skjølunum í málinum, skal ein tílík áheitan verða gingin á møti. ...*“

Tað hevur týdning fyri møguleikan hjá undirritaða, at røkja síni áhugamál, at eg fáaði avrit av øllum uppritinum, sum gjørt er frá telefonsamrøðuni millum ALS og Toll- og Skattstovu Føroya, har navnið á viðkomandi persóni á Toll- og Skattstovu Føroya IKKI er fjalt.

Grundgeving
Eg søki framhaldandi størv. Í øllum mínum umsóknum, havi eg tilvísing til fyrrverandi arbeiðsgevarar. Hetta eru persónar innan Toll- og Skattstovu Føroya. Eg kann ikki framhaldandi livað við, ikki at vita hvør hesin persónurin er, ið úttalar seg um undirritaða, um viðurskifti, ið ikki eru í tráð við veruleikan. Hvønn av hesum persónum skal eg strikað á reference-listanum ?

Sum omanfyri frágreitt, hevur tað týdning fyri møguleikan hjá mær framyvir, at røkja míni áhugamál, at eg fái at vita hvør hesin persónurin er. Hinvegin, um eg ikki fái navni á viðkomandi persóni, havi eg ikki møguleikan at røkja míni áhugamál, í samband við umsóknir/søkjan eftir arbeiði.

Tessvegna skal mín áheitan enn einaferð vera á ALS, at geva undirritaða innlit í hvør hesin persónurin er. Um ALS framhaldandi ikki vil út við navninum, vil eg hava svar sambært grein 16 í fyristingarlógini, har stk. 2, nevnir um orsøkina til ikki at ganga áheitani á møti.

Somuleiðis verður víst til grein 16, stk. 3, har víst verður til, at kærast kann til mynduleika. Eg vil hava at vita, til hvønn avgerðin hjá ALS kann kærast til."

Við skrivi, dagfest 6. jan. 2006, hevur Arbeiðsloysisskipanin svarað seinnu innlitsumbønini soleiðis:

„**Viðvíkjandi fyrispurningi um skjalainnlit**
Vit vísa til fyrispurning tygara um skjalainnlit, serliga bræv tygara dagfest 9. desembur, har tygum ynskja innlit í uppritið frá telefonsamrøðu okkara við Toll- og Skattstovu Føroya, og eisini innlit í hvønn persón á Toll- og Skattstovu Føroya vit hava tosað við.

Í brævi tygara vísa tygum til § 16 stk. 3 í fyrisitingarlógini, har tað er ásett, at um tað hevur týdning fyri møguleikan hjá einum parti at røkja síni áhugamál, skal áheitan um skjalainnlit gangast á møti.

Í fyrra skrivi okkara, har vit sendu við avrit av skjølum, sum vóru í málinum, høvdu vit sum kunnugt fjalt navnið á tí persóni á Toll- og Skattstovuni vit høvdu tosað við, og grundgeving okkara var – og er framhaldandi – at talan er um innanhýsis arbeiðsskjal, sum eftir § 12 í fyrisitingarlógini eru undantikin rættinum til skjalainnlit.

Í § 12, stk. 2 er ásett „upplýsingar um veruligar umstøður, sum eru av stórum týdningi fyri avgerðir í málinum, og sum bert standa í innanhýsis arbeiðsskjølum, skulu hóast ásetingina í stk. 1, latast í samsvari við reglurnar í hesum kaptili."

Vit hava umhugsað málið av nýggjum, men eru framvegis av tí fatan, at navnið á viðkomandi persóni ikki er so avgerandi, og ikki hevur verið av so stórum týdningi fyri avgerðina í málinum, at undantakið í § 12 stk. 2 skal koma framum høvuðsregluna um at innanhýsis arbeiðsskjøl ikki eru fevnd av rættinum um skjalainnlit.

Viðvíkjandi kærumøguleika meta vit ikki, at annar fyrisitingarligur myndugleiki er at kæra slíka avgerð hjá Arbeiðsloysisskipanini til. Vit meta ikki at kærunevndin hjá ALS skal viðgera slík mál,

og mett verður, at Stýrið hjá ALS og fyrisitingin er ein og sami fyrisitingarmyndugleiki, tá ið hugsað verður um kærumøguleika.

Um tygum umhugsa at kæra hesa niðurstøðu, meta vit rættast, at tygum leggja málið fyri Løgtingsins Umboðsmann."

## Partshoyring

Við skrivi, dagfest 22. juli 2005, bað umboðsmaðurin Arbeiðsloysisskipanina um skjølini og viðmerkingar til klaguna.

Við skrivi, dagfest 15. aug. 2005, bað advokatur vegna Arbeiðsloysisskipanina um, at ummælisfreistin varð longd til hálvan september, og hesum játtaði umboðsmaðurin.

Við skrivi, dagfest 15. sept. 2005, hevur Arbeiðsloysisskipanin greitt umboðsmanninum soleiðis frá málinum:

„**Frágreiðing í sambandi við at lýst varð eftir málsviðgera til Tryggingardeildina**
Í skrivi tygara dagfest 22. juli 2005 verður heitt á Arbeiðsloysisskipanina (ALS) um at koma við einari frágreiðing um málið. Vísandi til hesa áheitan vilja vit niðanfyri greiða frá, hvat er hent í málinum.

Í mai mánaði 2005 valdu vit at søkja eftir málsviðgerum bæði til Tryggingar- og Ávísingardeildina. Vit valdu í hesum sambandi at gera eina lýsing, har søkt varð eftir báðum málsviðgerunum (sí hjálagda avrit av lýsingini).

Tveir setunarbólkar vórðu settir. Til starvið í Ávísingardeildini varð bólkurin mannaður við deildarleiðaranum á Ávísingardeildini, starvsfólkaumboði og undirritaðu (sum stjóra og starvsfólkaleiðara), og til starvið í Tryggingardeildini varð setunarbólkurin mannaður við deildarleiðaranum á Tryggingardeildini, starvsfólkaumboði og undirritaðu.

Tann einstaki limurin í setunarbólkinum gjøgnumgekk umsóknirnar við hædd fyri teimum krøvum/ynskjum, sum vóru sett í lýsingini

til førleikar v.m. (Hesi krøvini vóru innleiðandi gjøgnumgingin í felag í setunarbólkinum, sí hjálagda yvirlit). Setunarbólkurin møttist síðani og gjøgnumgekk, hvørjir umsøkjarar, mett varð, áttu at verða kallaðir inn til eina samrøðu. Tey, sum vórðu mett vera mest sannlík at lúka krøvini/ynskini, vórðu innkallaði til eina samrøðu. Í tryggingarbólkinum gjørdist talan um at innkalla fimm fólk til samrøðu (sí hjálagda skjal frá hesum arbeiði í setunarbólkinum „Prioritering av umsøkjarum Tryggingardeildin" Stjørna er sett við hesar umsøkjarar). Her skal verða viðmerkt, at av teimum 25 umsøkjarunum (sí hjálagda yvirlit yvir umsøkjararnar „Samandráttur av umsøkjarumum til starvið sum málsviðgeri á Tryggingardeildini") vóru 18, sum høvdu søkt bæði størvini. Hettar undraði okkum ikki sørt í setunarbólkinum, tá ið talan varð um tvey størv, har søkt varð eftir rættuliga ymiskum profilum.

Eftir at hava havt tey fimm fólkini til samrøðu varð staðfest, at vit ikki mettu nakran av teimum hava hóskiligar førleikar til starvið (sí hjáløgdu upprit frá samrøðunum). Heldur ikki mettu vit nakran av hinum hava førleikarnar, sum vóru hóskandi til krøvini/ynskini, ið sett vórðu til starvið. Her skal verða nevnt, at nakrir av umsøkjarunum vórðu mettir at vera yvirkvalifiseraðir til starvið. Í hesum sambandi skal verða viðmerkt, at til júst starvið á Tryggingardeildini settu vit so nýliga sum á vári 2004 ein málsviðgera, sum nærum var liðugur við sína kandidatútbúgving. Tað vísti seg tó skjótt, at avbjóðingarnar í starvinum ikki vóru nøktandi, og keddi viðkomandi seg skjótt. Hettar gjørdist tí ein trupul støða fyri málsviðgeran sjálvan, men eisini fyri ALS sum arbeiðspláss. Umráðandi var tí fyri okkum, at henda støða ikki endurtók seg, og tí mettu vit teir umsøkjarar, ið vóru yvirkvalifiseraðar, at vera óegnaðar til starvið.

Sostatt komu inn 25 umsóknir til starvið sum málsviðgeri á Tryggingardeildini, og valdi ALS ongan at seta. Eins og nevnt varð í skrivinum til umsøkjararnar, varð henda avgerð grundað á, at førleikarnir, sambært fyriliggjandi upplýsingum, ikki vórðu mettir hóskandi til krøvini/ynskini, ið sett vórðu til starvið. Tá ið metingin varð gjørd, varð henda grundað á eina heildarmynd av teim fyriliggjandi upplýsingum (umsókn, samrøðu, tilvísingum v.m.),

og varð hettar sett í mun til tey krøv/ynskir, sum vórðu framførd í starvslýsingini.

Í sambandi við ítøkiliga málið um A skal verða upplýst, at vit fyrst av øllum mettu hansara útbúgvingarliga støði at vera ov høgt av tí grund, sum omanfyri er nevnd, at stórur vandi varð fyri, at hann ikki fór at trívast í starvinum. Hansara royndir vístu, at hann hevði arbeitt á Toll- & Skattstovu Føroya, og mettu vit tí, at hann kanska kortini var hóskandi. Hann hevði í sínari umsókn tilvísingar til fyrrverandi arbeiðsgevarar, ein av hesum var Toll- & Skattstova Føroya. Vit valdu at venda okkum til teirra og fingu m.a. upplýst, at A arbeiddi seint ("Ikki tann sum skundar sær"), og at hann ikki var góður til dead-Lines (sí hjálagda telefonupprit). Í lýsingini høvdu vit greitt víst á, at rætta starvsfólki skuldi hava evnini at arbeiða skjótt, og mettu vit hetta vera ein umráðandi førleika. Niðurstøðan gjørdist tí, at heldur ikki A varð mettur at hava neyðugu førleikarnar til starvið.

***Eftirmeting av (málinum) sjálvari lýsingini:***
*Tað er avgjørt ikki vanligt, at ongin umsøkjari verður settur, tá ið størv verða lýst leys. Hettar hevur sjálvandi havt við sær, at vit hava eftirmett gongdina í hesum ítøkiliga førinum, og niðurstøðan er, at:*

- *Tað ikki var skynsamt at søkja eftir tveimum so ymiskum málsviðgerum í einari lýsing*
- *Tá ið søkt aftur verður eftir málsviðgera til Tryggingardeildina, skal meira greitt framganga, hvat útbúgvingarligt støði er hóskiligt til starvið*

...

Hjáløgd eru øll skjøl í sambandi við starvssetanirnar. Summi av hesum skjølum eru eftir okkara meting ikki almenn men innanhýsis arbeiðsskjøl, og vit fara tí at heita á tykkum um ikki at lata øðrum, herundir klagaranum, avrit av hesum skjølum, serliga upplýsingarnar um hvønn persón hjá Toll- & Skattstovu Føroya vit hava tosað við."

Við skrivi, dagfest 19. sept. 2005, hevur klagarin sent umboðsmanninum soljóðandi ískoyti til klaguna:

„Heitt verður á Løgtingsins Umboðsmann, at taka hetta skriv v.m. við í málsviðgerðina av omanfyri nevndu kæru míni. Sum Løgtingsins Umboðsmanni kunnugt, snýr omanfyri nevnda kæra seg um, at undirritaði søkti eitt starv sum málsviðgeri á Tryggingardeildini hjá Arbeiðsloysisskipanini, samb. lýsing í Dimmalætting m.a. tann 4. maj 2005. Umsøkjarnir vóru 25 í tali. Arbeiðsloysisskipanin setti ongan av umsøkjarunum, tí førleikarnir eftir teirra tykki ikki vóru hóskandi.

Við hesum verður Løgtingsins Umboðsmanni gjørdur varðugur við, at Tryggingardeildin hjá Arbeiðsloysisskipanini nú um dagarnar (m.a. 16. september 2005 í Dimmalætting) aftur søkir eftir málsviðgera. Substansurin í báðum lýsingunum er tann sami, tvs. at søkt verður eftir málsviðera, sum skal lúka somu krøv v.m. sum í fyrru lýsingini.

Væntast kann at tey 25, ið søktu fyrru fer, ikki kenna seg førleikabúgvin at søkja hesuferð. Um tey kortini søkja, kann hugsast at tey blíva útilukkað í viðgerðini av umsóknunum, tí ALS neyvan vil vera skurt fyri at koma í ansøgn við seg sjálvan. (Ikki at góðtaka umsøkjara fyrru fer, orsakað av ikki hóskandi førleikum, fyri síðani at taka hesi við í viðgerðina hesa seinnu ferina.)

Eg havi kortini søkt starvi, tí eg framhaldandi haldi fast við, at eg havi førleikarnir til **eitt vanligt málsviðgera starv**, har m.a. skráirnar (almennar) í arbeitt verður við, lættliga kunnu samanberast við míni fyrrverandi størv. Harafturat havi eg m.a. tikið HA-útbúgving.

Sostatt er talan um tvey mál/sakir, ið eru púra eins, og sum fult út kunnu samanhaldast upp ímóti hvørjum øðrum. Tessvegna fari eg at heita á Løgtingsins Umboðsmann at kunnað seg um hetta setanarmál av málsviðgera hjá ALS eisini; og at bíða við málsviðgerðini og niðurstøðuni av søk míni, j.nr. 200500069/8, inntil hetta seinna setanarmál er avgreitt. Hetta fyri at greiða m.a. kann fáast á, um umsøkjari frá fyrru lýsingini/umsóknunum, kortini hevur søkt og møguliga verður settur. Ella um umsøkjari, ið ikki søkti fyrrufer, fær starvið. Tá at samanbera førleikarnar hjá viðkomandi, í mun til teir 25 frammanundan, ið blivu settir til síðis. Ein annar møguleiki er kanska eisini, at bara undirritaði av teimun 25 ið søktu fyrru fer, hevur søkt hesufer. Um mín umsókn av teirri grund verður frásortera, byggir starvssetanin ikki á sakliga grand.

Eg eri partur í báðum málunum. Talan er sostatt um tvey mál, ið viðkoma hvørjum øðrum, og fult út kunnu samanberast við hvørt annað. Eg vil bert vísa á, at Løgtingsins Umboðsmaður í hesi søk, hevur møguleika

> at kannað til fulnar, hvørt Arbeiðsloysisskipanin veruliga tekur **saklig atlit** í sínum setanarpolitikki ella ikki. Tað er tað hetta mál í veruleikanum snýr seg um, og sum støða skal takast til.“

Við skrivi, dagfest 6. okt. 2005, bað umboðsmaðurin Vinnumálaráðið um eina meting av, hvørt hetta málið kundi verið kært til ráðið. Frágreiðingin frá Arbeiðsloysisskipanini varð eisini send klagaranum til kunningar.

Við skrivi, dagfest 24. okt. 2005, hevur klagarin sent umboðsmanninum soljóðandi áheitan:

> „Undirritaði hevur móttikið skriv frá Løgtingsins Umboðsmanni dagf. 5. oktober 2005, har m.a. upplýsingar koma fram um, samb. frágreiðingini hjá Arbeiðsloysisskipanini, at stjórin á ALS hevur tosað við onkran á Toll- og Skattstovuni, ið eg ikki má fáa upplýst um hvør tað er.
>
> Eg havi umhugsa gongdina í hesum máli síðani.
>
> Úttalilsir frá persónum, um aðrar persónar, vilja til eina og hvørja tíð vera subjektivir. Tessvegna farið eg at heita á Løgtingsins Umboðsmann, at upplýsa fyri undirritaða hvør hesin persónurin á Toll- og Skattstovuni er, sum stjórin á ALS ikki vil út við. Soleiðis at eg havi møguleika at tosað við viðkomandi, hvat fram er farið. Hvat nú um talan er um misskiljingar ?
>
> Somuleiðis verður biðið um aðrar upplýsingar frá tí ónevnda á Toll- og Skattstovuni um undirritaða, sum Løgtingsins Umboðsmaður hevur, tí í frágreiðingini hjá ALS stendur at teir uppgivnu upplýsingarnir bara eru „millum aðrar“(m.a.) upplýsingar sum eru komnir fram. Upplýsingar um meg sjálvan kunnu ikki vera duldir fyri mær sjálvum ella hvat ?
>
> Eg vil hava svar.
>
> Um Løgtingsins Umboðsmaður ikki kann ganga umbøn míni á

> møti, verður biði um eitt sindur av umhugsingar tíð afturat, hesi søk viðvíkjandi.“

Í telefonsamrøðu, 27. okt. 2005, bað Vinnumálaráðið um, at svarfreistin var longd við 2 vikum, og varð hetta játtað.

Við skrivi, dagfest 31 okt. 2005, hevur umboðsmaðurin boðað klagaranum frá, at hann ikki kann geva klagaranum innlit í skjøl, sum umboðsmaðurin hevur fingið til láns frá Arbeiðsloysisskipanini, men at klagarin má venda sær til Arbeiðsloysisskipanina hesum viðvíkjandi. Vísandi til, at klagarin bað um umhugsunartíð, spurdi umboðsmaðurin klagaran, hvørt hann ynskti at sleppa klagu sínari.

Við skrivi, dagfest 7. nov. 2005, hevur klagarin sent umboðsmanninum soljóðandi fráboðan:

> „**Viðv. kæru mínari – j.nr.: 200500069 / 22 – skriv tykkara dagf. 31.10.2005**
> Í omanfyri nevnda skrivi tykkara, verður heitt á undirritaða at boða Løgtingsins Umboðsmanni frá, hvørt undirritaði ynskir at sleppa klaguni hjá umboðsmanninum ella ikki.
>
> Sagt verður frá, at undirritaði ikki ætlar at sleppa klaguni, men fyrireikar eitt skriv v.m. til Løgtingsins Umboðsmann, sum svar uppá frágreiðingina hjá ALS. Somuleiðis verður eitt skriv fyrireika, til ALS um at fáa innlit í málsviðgerðina av starvsetanum, har ALS hevur upplýsingar um undirritaða frá persóni á Toll- og Skattstovu Føroya, ið ALS ikki vil út við.
>
> Omanfyri nevndu skriv, verða væntandi umboðsmanninum og ALS í hendi uml. mikudagin 16. november 2005.“

Við skrivi, dagfest 22. nov. 2005, hevur Vinnumálaráðið boðað umboðsmanninum frá, at ráðið ikki metir, at avgerðir um starvssetanir hjá Arbeiðsloysisskipanini kunnu kærast til ráðið.

24. nov. 2005 hevur umboðsmaðurin móttikið soljóðandi skriv frá klagaranum, dagfest 15. nov. 2005:

**„Viðv. kæru mínari – j.nr.: 200500069**
Undirritaði hevur móttikið skriv frá Løgtingsins Umboðsmanni dagf. 5. oktober 2005, har boða er frá, at Løgtingsins Umboðsmaður hevur sett fram fyrispurning til Vinnumálaráðið, viðvíkjandi omanfyri nevndu kæru. Harafturat hevur Løgtingsins Umboðsmaður sent mær avrit av frágreiðingini hjá Arbeiðsloysisskipanini, tó uttan skjøl.

Undirritaði heitti í skrivi dagf. 24.10.2005 á Løgtingsins Umboðsmann, at upplýsa fyri undirritaða hvør persónurin á Toll- og Skattstovuni er, sum stjórin á ALS ikki vil út við. Soleiðis at eg hevði møguleika at tosað við viðkomandi, hvat fram er farið. Somuleiðis var biðið um aðrar upplýsingar frá tí ónevnda á Toll- og Skattstovuni um undirritaða, sum Løgtingsins Umboðsmaður hevur, tí í frágreiðingini hjá ALS stendur at teir uppgivnu upplýsingarnir bara eru „millum aðrar"(m.a.) upplýsingar sum eru komnir fram.

Svar er komi frá Løgtingsins Umboðsmanni, ið ikki kann geva mær innlit, men sigur at eg má seta meg beinleiðis í samband við Arbeiðsloysisskipanina um nevndu upplýsingar. Sagt verður frá, at eg fari at heita á ALS, at geva mær innlit í nevndu upplýsingar og skjøl. Gingið verður út frá, at so leingi upplýsingar koma afturat í málinum, bíðar Løgtingsins Umboðsmaður at viðgera kæruna.

Hervið verður sagt Løgtingsins Umboðsmanni frá, at málsviðgera starvið, ið bleiv lýst leyst m.a. í Dimmalætting 16. september 2005, har undirritaði søkti, er sett. Fráboðanin er dagf. 30. september 2005. Søkt var eftir málsviðgera; meðan tveir umsøkjarar vóru settir. Hettar líkist eitt sindur „at krógva seg aftan fyri seinnu lýsingina", tá ið tveir umsøkjara nú eru settir, serliga tá ið grundgevingin fyri setanum er soljóðandi:

*„Avgerðin er grundað á, at teir settu persónarnir betur luku teir førleikar, sum eru nevndir omanfyri."*

Arbeiðsloysisskipanin grundgevur við, at teir settu umsøkjarnir, betur luku teir førleikar, sum kravdir vóru. Hetta kann ikki skiljast øðrvísi enn, at ALS nú viðurkennur at undirritaði hevur førleikan, men at aðrir umsøkjarar, eftir teirra fatan, luku førleikan betur. Fyrru ferðina, sum hendan kæran snýr seg um, bleiv undirritaði avvístur. Hesar útsagnir hanga ikki saman. ALS mótsigur sær sjálvum.

Sostatt kann staðfestast, at við teirri vitan og grundarlag, ið ALS hevði pr. 16.06.2005, tá ið avslagið er dagfest, avvísti umsøkjara vegna ikki hóskandi førleika, sum teir nú siga luku førleikan. Hetta sigur somikið, at avvísingin í veruleikanum er ógrundað, tá ALS viðurkennir førleikan nú.

Hetta undirbyggir eisini tað, ið eg førdi fram í kæru míni dagf. 14.06.2005, at tað er ivasamt um nakar av umsøkjarunum kann føla seg tryggan í, sum umsøkjara til eitt starv, sum eingin fekk, at viðgerðin er farin fram á rættan og rættvísan hátt.

Hettar undirstrikar eisini tann veruleika, at Løgtingsins Umboðsmaður eigur at fara inn í hetta seinna setanarmálið, fyri at sannføra seg sjálvan og kæraran um, hvørt hesir persónar, sum nú eru settir, hava **skræddaðar-seymaðar** førleikar til størvini, í mun til teir 25 sum søktu fyrru ferðina.

Hetta mál minnir kanska eisini eitt sindur um „at bíða eftir onkrum sum tey vilja hava at søkja", av eini ella aðrari orsøk (familja, kennskapir ella okkurt annað). Hetta havi eg einki prógv fyri ella kennskap til. Men, ein kann loyva sær at hava ein illgruna. Kanska vil hetta vera afturvíst við teirri gundgeving, at tvey blivu sett. Men, hvør visti ultimo juni 2005, at onkur fór úr starvi.

Hetta mál hevur meira í sær, enn komi er inná omanfyri. Í dag má eg viðurkenna, at mangt hevði verið ósagt og annað ósvarað, um undirritaði av fyrstan tíð (í fyrsta avslagnum), hevði fíngið tað veruligu grundgevingna fyri, hví ALS ikki vildi vita av míni umsókn. Hetta er eitt gott dømi uppá, hvussu neyðugt tað er við gjøgnumskygni. Hvussu skal man annars kunna verja seg fyri, at

vera hildin fyri tað turra spott, uttan at vita av tí. Hinvegin átti Arbeiðsloysisskipanin beinanvegin at verið so frætt at sær komin, at grundgivið við, hvat veruliga lá aftanfyri teirra avvísing av mær sum umsøkjara av **størvum** hjá ALS. Men hvat skal man vænta av ALS. Tey vilja hava so nógva fer, at tað nógva fer av í svinginum, soleiðis at tey sum oftast eru noydd at bakka aftur. Tey skilja bara ikki at tað at bakka, er ikki frammeftir og at tað eisini ber til at hava nógva fer aftureftir.

Eg sigi størvum hjá ALS. Tí, sum ALS greiðir frá í síni frágreiðing, so lýsti ALS eftir málsviðgerum bæði til Tryggingardeildina og Ávísingardeildina. Tað er neyvan torført at fyristillað sær, at tá úttalisið frá persóni á Toll- og Skattstovuni, ið eg ikki má fáa at vita hvør tað er, verður tikið fyri fult av ALS, so framgongur av frágreiðingini, at undirritaði frammanundan er útilukkaður frá øllum líknandi størvum á ALS. Tað vil siga, starvi á Ávísingardeildini, og báðum størvunum á Tryggingardeildini. Tá ALS ikki finnur útav at koma við veruligu grundgevingunum, so velur man heldur at halda fram við myrkaspælinum.

Í dag má eg bara ásannað, at tað íbúgvandi treiskni, hevur lagt ymist fyri dagin, sum kanska ikki er so hugaligt at hugsa um. Her meini eg við, at eg havi søkt onnur størv uttan fyri ALS, uttan úrslit. Um so er at setanarbólkarnir, hava havt samband við sama persón sum ALS hevur tosað við á Toll-og Skattstovuni, so skilir man betur hvussu lítið skal til at oyðileggja so nógv. (Meiningin kann ikki vera, at kærast skal hvørja ferð, man fær eitt avslag, tá ið søkt verður um arbeiði, m.a. av tí at persónar kunnu úttalað seg um umsøkjara og síðani vera vardir av tí sum hevur spurt. Tá er nemt at koma við slíkum, sum er heldur ivasamt.)

Tað vísir seg at ALS leggur alstóran dent á, at rætta starvsfólki skal hava evnini at arbeiða skjótt og at hetta er ein umráðandi førleiki eftir teirra tykki. Eg virði fult út, at spurt verður eftir slíkum førleika. Men spurningurin er bara, hvat ALS meinar við at arbeiða skjótt ?

Í skrivi mínum til Stýrið fyri Arbeiðsloysisskipanina, dagf. 27.06.2005

vísti eg á dømir og eina útgreining av hvat skiljast kann við hugtakið at arbeiða „skjótt", ella sum nevnt verður í lýsingini um „arbeiðsumhvørvi við nógvari ferð". Somuleiðis hvat meint verður við førleikan at samskifta í skrift og talu. Eg haldi hetta, at arbeiða skjótt í einum arbeiðsumhvørvi við nógvari ferð, spælur eina so stóra rollu í hugaheiminum hjá stjóranum á ALS, at eg farið at vísa á hesi dømi einafer enn, og okkurt dømi afturat, fyri at útgreina at hesi hugtøk ikki eru so einføld at praktisera í veruleikanum, sum ALS vil gera tað til. Papír er takksamt. Vit kenna brotið í yrkingini hjá ........, sum hann fekk heiður og æru fyri frá Norðurlandaráðnum, nevnuliga m.a. at: „...tað regnar á bókasavninum ... og ... at tað lekur í millum teori og praksis."

...

Dømi 5:

Viðvíkjandi upplýsingum frá persóni á Toll- og Skattstovuni um hvussu eg arbeiði. Her hevur ALS eftir øllum at døma eisini valt at brúka sín førleika at arbeiða skjótt. Í øllum mínum umsóknum, havi eg havt tilvísing til fyrrverandi arbeiðsgevarar. Eg kann upplýsa, at persónar innan Toll- og Skattstovu Føroya hava verið uppgivnir, men allir hava ikki veri tilvístir hvørja fer á hvørjari einstaku umsókn. Talan er um persónar, ið nevndir eru á innanhýsis skrivi mínum, dagf. 14.11.2005. Somuleiðis er hjálagt eitt úttalilsið frá nøkrum av nevndu persónum, sum ikki hava trupuleikar av at siga sína hugsan um undirritaða og hansara arbeiðis tempo og royndir við hildnum tíðarfreistum/dead-lines v.m.

ALS hevur so nógva ferð og arbeiðir so skjótt, at tey ikki hava stundir at kanna grundarlagið fyri slíkum úttalisum til lítar, men svølgja tí fyrsta og besta, rátt. Avgerandi verður, hvat av hesum úttalilsum Løgtingsins Umboðsmaður velur at leggja størst tyngd. Verður tað frá einum persóni á Toll- og Skattstovuni, sum ALS hevur tosað við, sum onnur og slett ikki kærarin má fáa at vita hvør tað er, ella persónar innan Toll- og Skattstovuna, sum hava sett sína undirskrift undir síni úttalilsir.

Hevði úttalilsið hjá ónevnda persóninum hjá Toll- og Skattstovuni verið í trá við veruleikan, ivist eg onga løtu í, at undirritaði uttan

trupuleikar hevði fingið at vita, hvør viðkomandi var. Men, onkur hevur fingið samvitskubit. Trúvirðið er í vanda. Eg fari at halda fast við, at so leingi ALS-stjórin, kann verja sína keldu, fari eg at krevja at kunna gera tað sama. Eg havi hóast alt eitt úttalilsið, við navngivnum persónum, sum hava vátta við síni undirskrift, meðan ALS ikki hevur nakað hondfast váttað skriv, men bert eitt notat, har vissa ikki ein gang er fyri, at alt er rætt endurgivið, skilt ella tolka.

Eg havi altíð lagt herðslu á, fyrst og fremst í mínum arbeiði, at hava grundalagið í lagi, fyri at sleppa undan at brúka tíð uppá at taka mál aftur/rætting. Endamálið má altíð vera, at avgreiða málini soleiðis, at tey enda í arkivinum ella mappum sum skjótast. Tá kanst tú tosa um at arbeiða skjótt og við nógvari ferð. Hvussu kann man annars tosa um „resultat-arbeiði". ALS dámar eftir øllum at døma betur kvantitet heldur enn kvalitet.

ALS kemur við ymiskum í síni frágreiðing, sum so ikki hevur við hetta mál at gera. Men, velur Løgtingsins Umboðmaður at draga hetta uppí sína niðurstøðu, so havi eg hug at gera nakrar viðmerkingar um tað. M.a. at tey á ALS undraðu seg á, í setunarbólkinum, at 18 persónar høvdu søkt bæði størvini, ávíkavist á Ávísingardeildini og Tryggingardeildini. Í veruleikanum kann hetta ikki undra nakran. Sum uttanfyri standandi, arbeiðsleysur, søkjandi eftir arbeiði, við rímuligum papírum, er einki løgið í at søkt verður bæði størvini. Fyri umsøkjara er tað líka feitt, um ALS internt hevur eina fatan av, at talan er um rættuliga ymikar profilar. Tað er uppgávan hjá ALS at finna fram til tann rætta umsøkjaran, ið kann útfylla starvi. Ella krevur ALS at umsøkjaranir frammanundan skulu vita hvat ALS hugsar. Í dupultlýsing, nevnir ALS um innlivingarevnir. Vóru innlivingarevnini intakt hjá ALS, høvdu tey ikki ført slíka orðafyllu fram. Í mínari verð, merkir innlivingarevnir, at t.d. ein málsviðgeri, er førur fyri at seta seg inn í støðuna hjá einum øðrum persóni og handla har útfrá. Eg havi søkt nógv størv, men ikki øll, sum eru uppsligin. Tað er og verður eisini ein intern vurdering hjá tí einstaka, hvørt viðkomandi heldur seg kunna útfylla eitt starv ella ikki.

Skoytast kann uppí, at tá ALS í frágreiðing síni, nevnir um persónar

sum eru yvirkvalifiseraðir og sum sita og keða seg, so er hetta til deils ein faliterklering og uttanum tos, tí ALS-stjórin allatíðina tosar um hvussu nógva ferð ALS hevur. Ein situr eftir við teirri fatan, at nógv er at gera hjá ALS. Sostatt skuldi man trú at eingin nýttist at sita og keða seg. Hetta er eisini partvís ein roynd at generalisera. Altso tá ið hetta er satt fyri ein persón, so er hetta galdandi fyri allar yvirkvalifiseraðar persónar. Veruleikin er ikki so einfaldur. Menniskju eru ymisk, eisini tá talan er um arbeiði v.m. Tessvegna fari eg heita á Løgtingsins Umboðsmann, at taka slíka generalisering við fyrivarni, og ikki at hanga spjaldur uppá øll, fyri tað um eitt tilfeldi er satt fyri ein persón.

Í Dimmalætting frá 2. november 2005, verður greitt frá nýggjum leiðara til ungdómshúsið í Klaksvík. Í hesi grein framgongur at viðkomandi hevur virka sum málsviðgeri hjá ALS, men at viðkomandi ikki treivst. Tí at sita átta tímar um dagin á eini skrivstovu, var ikki tað rættað fyri viðkomandi. Viðkomandi dámar betur at rokast og gera okkurt. Man hetta ikki fara at passað nokk so væl inn í frágreiðingina hjá ALS, um málsviðgeran við nærum lidnari kandidatútbúgving, sum sat og keddi seg. Staðfestast má at ALS viðhvørt hevur tikið feil í sínum starvssetanum, við at hava hildið seg hava valt tann rætta umsøkjaran, men sum eftirfylgjandi, vísti seg ikki at vera tann heilt rætti at útfylla uppgávuna. ALS hevur ikki bara tikið feil. Eitt dømi er um ALS-stjóran sjálv, sum byrjaði sum málsviðgeri hjá ALS, men sum síðani er blivin stjóri hjá ALS. Her kann av røttum sigast, at tann rætti umsøkjarin fekk starvi. So eg vil mæla til, at man etur eitt sindur av breyði afturvið, tosinum um yvirkvalifiseraðar persónar ?

ALS førir eisini fram, at ALS valdi ongan at seta í starv á Tryggingardeildini, grundað á at førleikarnir, sambært fyriliggjandi upplýsingum, ikki vóru mettir hóskandi til krøvini/ynskini, ið sett vóru til starvið. Tá ið metingin varð gjørd, varð hendan grundað á eina heildarmynd av teim fyriliggjandi upplýsingum (umsókn, samrøðu, tilvísingum v.m.), og varð hettar sett í mun til tey krøv/ynskir, sum vóru framførd í starvslýsingini. Hjálagda úttalilsi sigur so mikið, at heildarmyndin ikki var so heil, sum ALS gongur runt og

heldur. Staðfestast kann bara, at ALS ikki hevur gjørt sítt heimaarbeiði gott nokk.

Upplýsingar um meg sjálvan kunnu ikki vera loyndarmál fyri meg sjálvan. Slíkt sum ikki tolir dagsins ljós, kann ikki brúkast at taka støðu út frá. Tað fari eg at halda fast við.

Eg havi einki ímóti at persónar siga og skriva alt møguligt um mín persón, men tá ið útsagnir, sum ikki tola dagsins ljós koma fyri dagin, verða niðurskrivaðar og brúktar í saksaktum, tá er ovboðið.

Hvør finnur seg í slíkum ? ? ?

Í veruleikanum átti man eisini at hugsa um, at ALS nevnir í síni frágreiðing, at undirritaði „kanska kortini var hóskandi", men at úttalisið frá ónevnda persóninum á Toll- og Skattstovuni, hava verið avgerandi fyri at eg ikki fekk starvið (størvini). Úttalilsir sum nú vísa seg at vera heldur ivasom. Spurningurin um møguligan inntøkumiss er ikki fjarur og heldur ikki hvat viðvíkur endurgjaldi fyri sviða og tort.

Eg vil einafer enn heita á Løgtings Umboðsmann, væl og virðiliga at viðgera hesa kæru, har kannað verður um Arbeiðsloysisskipanin veruliga tekur saklig atlit í sínum setanarpolitikki ella ikki.
...
Hjálagt er avslag frá ALS, dagf. 30.09.05; skriv til ALS um skjalainnlit; innanhýsis skriv dagf. 07.11.2005; grein úr Dimmalætting, frá 2. november 2005 og úttalilsið frá persónum á Toll- og Skattstovuni. Eg fari at heita á tykkum um ikki at lata øðrum, herundir ALS, avrit av innanhýsis skrivi mínum og heldur ikki av úttalilsinum frá persónum á Toll- og Skattstovuni, serliga upplýsingarnar um hvørjir persónar hjá Toll- og Skattstovu Føroya eg havi fingið úttalilsið frá. Men, í somu løtu og treyta av, at ALS vil lata mær upplýsingar um persónin á Toll- og Skattstovu Føroya, tey hava tosað við, og upplýsingar annars um meg frá ónevnda persóninum, er í lagi at Løgtingsins Umboðsmaður letur ALS fáa innanhýsis skriv mítt og úttalilsið."

Við skrivi, dagfest 10. jan. 2006, boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at hann hevði gjørt av at kanna hetta málið nærri. Skrivini frá klagaranum, dagfest ávikavist 19. sept. og 15. nov. 2005, vórðu samstundis send Arbeiðsloysisskipanini til ummælis við einari freist áljóðandi 4 vikur.

Við skrivi, dagfest 30. jan. 2006, hevur Arbeiðsloysisskipanin latið umboðsmanninum soljóðandi frágreiðing:

> **„Frágreiðing í sambandi við at lýst varð eftir málsviðgera til Tryggingardeildina, september 2005**
> Í skrivi tygara dagfest 10. januar 2006 verður heitt á Arbeiðsloysisskipanina (ALS) um at koma við einari frágreiðing um „seinnu" setanina umframt at lata tygum øll skjølini viðvíkjandi hesari setanini. Vísandi til hesa áheitan vilja vit niðanfyri greiða frá, hvat er hent í sambandi við málið.
>
> Í sambandi við fyrru lýsingina eftir málsviðgerum í juli mánað valdu vit ikki at seta nakran av umsøkjaranum. Vísast skal til frágreiðing til Løgtingsins Umboðsmann dagfest 15. september 2005. Í sambandi við eftirmeting av tí málinum komu vit eftir, at lýsingin ikki varð nóg greitt orðað, hvat viðvíkti hóskiligum útbúgvingarstøði hjá málsviðgeranum søkt varð eftir, umframt at vit mettu tað ikki skynsamt at søkja eftir tveimum so ymiskum málsviðgerum í einari lýsing. Tað vísti seg, at onkur umsøkjari var, ið hevði hægri akademiska útbúgving, og ivi var ikki um, at vit mettu hesar umsøkjarar at vera yvirkvalifiseraðar og tískil ikki egnaðar til starvið.

Í september mánaði 2005 valdu vit at søkja eftir málsviðgera til Tryggingardeildina av nýggjum. (sí avrit av lýsingini). Í hesi lýsing søktu vit bert eftir málsviðgera til Tryggingardeildina, og í hesi lýsing skuldi greitt ganga fram, at krav til eina hóskiliga útbúgving skuldi verða skrivstovuútbúgving ella aðra hóskandi útbúgving. Í sjálvari lýsingini stóð m.a., at tað rætta starvsfólkið hevur:

> *„skrivstovuútbúgving ella aðra hóskandi útbúgving"*
>
> Ein setunarbólkur varð settur at viðgera umsóknirnar. Bólkurin

skuldi eftir ætlan mannast við deildarleiðara fyri Tryggingardeildina, starvsfólkaumboði og stjóra, men vegna forfall hjá stjóranum bleiv endaligi setunarbólkurin mannaður við hesum persónum: deildarleiðaranum fyri Tryggingardeildina, starvsfólkaumboðið og deildarleiðaranum fyri Fíggjar- og Fyrisitingardeildina.

Inn komu 15 umsóknir til starvið. Tann einstaki limurin í setunarbólkinum gjøgnumgekk umsóknirnar við hædd fyri teimum krøvum/ynskjum, sum vóru sett í lýsingini til førleikar v.m. (Hesi krøv vóru innleiðandi gjøgnumgingin í felag í setunarbólkinum, sí hjálagda yvirlit). Setunarbólkurin møttist síðani og gjøgnumgekk, hvørjir umsøkjarar, mett varð, áttu at verða kallaðir inn til eina samrøðu. Tey, sum vóru mett vera mest sannlík at lúka krøvini/ynskini, vóru innkallaði til eina samrøðu. Talan gjørdist um at innkalla 4 fólk til samrøðu (sí hjálagda skjal frá hesum arbeiði í setunarbólkinum). Tann eini persónurin takkaði nei til samrøðuna, tí at viðkomandi hevði júst fingið nýtt starv. Talan gjørdist sostatt um at hava 3 fólk til samrøðu.

Eftir at hava havt samrøðurnar raðfestu vit, hvør av teimum trimum umsøkjarunum var mettur at verða nr. 1, hvør var nr. 2 og síðani hvør var nr. 3. Tað vísti seg, at setunarbólkurin var heilt samdur í, hvør var at meta sum nr. 1, nr. 2 og nr. 3. Avgjørt varð at bjóða nr. 1 og nr. 2 arbeiði á Tryggingardeildini.

Í tí ítøkiliga málinum um A skal verða upplýst, at øll trý í setunarbólkinum mettu A at vera yvirkvalifiseraðan, og var hann tískil ikki tikin til samrøðu. Viðmerkt skal vera, at ALS broytti tí seinnu lýsingina soleiðis, at ikki ivi skuldi verða um, at umsøkjararnir skuldu hava eitt útbúgvingarstøði sum skrivstovuútbúgving ella aðra hóskandi útbúgving. Niðurstøða gjørdist sostatt, at A var mettur ikki at hava hóskandi førleikarnar til starvið.

Vit hava ikki gjørt viðmerkingar til tær skuldsetingar, sum A førir fram í skrivi sínum, tí vit meta at hetta ikki er ein partur av setunarmálinum. Um Umboðsmaðurin ynskir frágreiðing hesum viðvíkjandi, vænta vit at frætta.

Hjálagt eru øll skjøl í sambandi við starvssetanina. Nøkur av hesum skjølum eru eftir okkara meting ikki almenn men innanhýsis arbeiðsskjøl, og vit fara tí at heita á tygum um ikki at lata øðrum, herundir klagaranum, avrit av hesum skjølum."

31. jan. 2006, hevur umboðsmaðurin móttikið soljóðandi skriv frá klagaranum, dagfest 23. jan. 2006, har hesin víðkar klagu sína til eisini at fevna um viðgerðina hjá Arbeiðsloysisskipanini av innlitsumbøn hansara:

„Undirritaði heitti á ALS í skrivi dagf. 14.11.2005, um at fáa skjalainnlit í omanfyri nevnda kærumál. Í svari frá ALS dagf. 08.12.2005, fekk eg avrit av øllum skjølum, eisini innanhýsis arbeiðsskjølum, sum viðvíkti undirritaða, men navni á persóninum á Toll- og Skattstovuni, ið ALS hevur tosað við um undirritaða, vildi ALS ikki upplýsa.

Svarið var soljóðandi: *„Vit meta, at talan er um eitt innanhýsis arbeiðskjal, og meta vit ikki, at tað hevur týdning fyri málið, at tygum fáa upplýst, hvør hesin persónur er.*"

Undirritaði var ikki nøgdur við svari, og sendi eitt nýtt skriv til ALS, dagf. 19.12.2005, har heitt var einaferð afturat, at fáa navni á ónenvda persóninum á Toll- og Skattstovuni upplýst. Eg vísti til grein 16 í fyrisitingarlógini, serliga til grein 16, stk. 3, har m.a. sagt verður: *„Hevur tað týdning fyri møguleikan hjá einum parti, at røkja síni áhugamál, at hann fær avrit ella makaskjal av skjølunum í málinum, skal ein tílík áheitan verða gingin á møti. ...*"

Eg vísti á, at tað hevur týdning fyri møguleikan hjá undirritaða, at røkja síni áhugamál, at fáa avrit av øllum uppritinum, sum gjørt er frá telefonsamrøðuni millum ALS og Toll- og Skattstovu Føroya, har navnið á viðkomandi persóni á Toll- og Skattstovu Føroya IKKI er fjalt.

Grundgeving er tann, at eg framhaldandi søki størv. Í øllum mínum umsóknum, havi eg tilvísing til fyrrverandi arbeiðsgevarar. Hetta eru persónar innan Toll- og Skattstovu Føroya. Eg kann ikki

framhaldandi livað við, ikki at vita hvør hesin persónurin er, ið úttalar seg um undirritaða, um viðurskifti, ið ikki eru í tráð við veruleikan. Spurningurin er tí, hvønn persón eg skal strikað á reference-listanum ?

Sum omanfyri frágreitt, hevur tað týdning fyri møguleikan hjá mær framyvir, at røkja míni áhugamál, at eg fái at vita hvør hesin persónurin er. Hinvegin, um eg ikki fái navni á viðkomandi persóni, havi eg ikki møguleikan at røkja míni áhugamál, í samband við umsóknir/søkjan eftir arbeiði.

Tessvegna heitti eg á ALS, at geva undirritaða innlit í hvør hesin persónurin er. Somuleiðis gjørdi eg tað viðmerking, at um ALS framhaldandi ikki vildi út við navninum, vildi eg hava svar sambært grein 16 í fyristingarlógini, har stk. 2, nevnir um orsøkina til ikki at ganga áheitani á møti. Somuleiðis varð víst til grein 16, stk. 3, har víst verður til, at kærast kann til mynduleika. Eg vildi eisini hava at vita, til hvønn avgerðin hjá ALS kundi kærast til.

Svar kom frá ALS, dagf. 06.01.2006, har ALS segði seg hava umhugsað málið av nýggjum, men er ALS framvegis av teirri áskoðan, at navnið á viðkomandi persóni ikki er so avgerandi, og ikki hevur verið av so stórum týdningi fyri avgerðina í málinum, at undantakið í grein 12 stk, 2 skal koma framum høvuðsregluna um at innanhýsis arbeiðsskjøl ikki eru fevnd av rættinum um skjalainnlit. ALS metir at rættast er at leggja møguliga kæru fyri Løgtingsins Umboðsmann.

Eg vil minna enn eina ferð á grein 16, stk. 3 har tað greitt verður sagt at: *„Hevur tað týdning fyri møguleikan hjá einum parti, at røkja síni áhugamál, at hann fær avrit ella makaskjal av skjølunum í málinum, skal ein tílík áheitan verða gingin á møti. ...“* **Her er eingin ivi, ein tílík áheitan <u>skal</u> gangast á møti.**

Eg vil vísa á, at tað er avgerandi fyri meg, at røkja míni áhugamál samb. grein 16, stk. 3 at eg fái upplýst navni á ónevnda persóninum. Tí sum eg havi sagt omanfyri, hevur tað týdning fyri meg at vita, hvønn persón eg skal strika á reference-listanum.

Fái eg ikki upplýst navni á viðkomandi, má eg antin velja at lata allar persónarnar standa á reference-listanum og risikera og acceptera útsóknir, ið ikki eru í tráð við veruleikan, og harvið blíva sorteraður burtur frá í umsóknar bunkanum, ella at strikað allar av reference-listanum. At eg ongan reference-lista skal hava; kann eg sjálvsagt ikki góðtaka. Tá vera míni áhugamál ikki røkt.

Eitt annað sum eg heldur ikki eri nøgdur við, er at ALS ikki tekur støðu til ella grundgevur fyri síni støðu, hvørt sýtanin ávirkar mótpartin, fyri at kunna røkja síni áhugamál ella ikki. Sum tað framgongur omanfyri, so **metir** ALS bara at navni ikki hevur týdning fyri avgerðina í málinum (setanin). Tað er nokk rætt. Men tað hevur týdning fyri undirritaði, at kunna røkja síni áhugamál, at navni verður upplýst. Tað svarar ALS ikki uppá. Eg vil heita á Løgtingsins Umboðsmann, at taka støðu til hetta.

Um Løgtings Umboðsmaður tekur hendan spurning inní omanfyri nevnda mál, ella letur hetta koyra sum eitt mál fyri seg sjálvt, hevur ikki so stóran týdning. Tað sum hevur týdning og sum er principielt í hesum føri, er hvørt starvsetanar mynduleikin kann sýta fyri at upplýsa fyri umsøkjara hvør keldan (persónurin) er, ið setanarmynduleikin innheintar upplýsingar frá um umsøkjara.

Hevur umsøkjarin rætt til at fáa upplýst hvør keldan er ?

Hetta mál er eitt lýsandi dømi um, hvørjar avleiðingar tað kann fáa fyri ein umsøkjara, ið tekur eitt avlslag fyri tað sum tað er, men sum í veruleikanum verður avvístur, við øðrum grundum enn teimum, ið liggja aftan fyri avvísingina, og sum standa í avslagnum. Hetta átti ALS at fingið meira enn eina kraftiga átalu fyri. Eg vil heita á Løgtingsins Umboðsmann at umhugsa og taka støðu til, hvørt arbeiðsgevarin ella setanarmynduleikin hevur skyldu til at upplýsa fyri umsøkjara, tá ið upplýsingar um umsøkjaran og hvørjir upplýsingar vera inntiknir í eitt setanarmál.“

Við skrivi, dagfest 15. febr. 2006, varð víðkaða klagan send

Arbeiðsloysisskipanini til ummælis við einari freist áljóðandi 3 vikur.

Við skrivi, dagfest 28. febr. 2006, hevur Arbeiðsloysisskipanin latið umboðsmanninum hesar viðmerkingar:

> „Víst verður til bræv tykkara dagfest 15. februar 2006, har tit biðja um viðmerkingar til skriv dagfest 23. januar í ár frá A.
>
> Í nevnda skrivi klagar A at hann ikki hevur fingið innlit í hvør persónur hevur úttalað seg um arbeiðseginleikar hansara.
>
> Vit hava í skrivi dagfest 6. januar í ár, ið verður lagt við í avriti, endurtikið sjónarmið okkara at nevnda skjal eftir okkara tykki er eitt innanhýsis arbeiðsskjal, og tí eftir § 12 í fyrisitingarlógini undantikið rættinum til skjalainnlit.
>
> Í skrivi sínum dagfest 23. januar 2006, endurtekur A sjónarmið síni, sum í stuttum eru, at hann í sambandi við at hann frameftir søkir arbeiðir ynskir at vita, hvør persónur á Toll- og Skattstovuni hevur upplýst ALS um hansara arbeiðseginleikar, soleiðis at hann kann strika viðkomandi á tilvísingarlista sínum.
>
> Í sínum skrivi vísir A til § 16 stk. 3 í fyrisitingarlógini, men hendan grein hevur eftir okkara tykki ikki týdning í hesum máli.
>
> Málið skal eftir okkara meting framhaldandi avgerast eftir § 12, og við tað at undantakið í § 12, stk. 2 eftir okkara meting bert snýr seg um upplýsingar, sum eru av stórum týdningi fyri hetta aktuella málið, og ikki fyri støðuna hjá A í sambandi við komandi umsóknir, er tað framvegis okkara fatan, at navnið á viðkomandi persóni er so avgerandi og hevur so stóran týdning fyri avgerðini í hesum konkreta málinum, at undantakið skal koma framum høvuðsregluna um at innanhýsis arbeiðsskjøl ikki eru fevnd av rættinum um skjalainnlit.“

Við skrivi, dagfest 13. mars 2006, boðaði umboðsmaðurin

pørtunum frá, at hann ikki helt grundarlag vera fyri framhaldandi partshoyringum, og at hetta málið tí bleiv tikið upp til endaliga viðgerð.

## *Niðurstøða*

*Klagan snýr seg um viðgerðina hjá Arbeiðsloysisskipanini av tveimum setanarumførum viðvíkjandi starvi sum málsviðgeri á Tryggingardeildini og um avgerðina hjá Arbeiðsloysisskipanini um ikki at geva klagaranum fult innlit í skjølini viðvíkjandi starvsumsókn hansara.*

*Í fyrra setanarumfarinum gjørdi Arbeiðsloysisskipanin av ikki at seta nakran av teimum 25 umsøkjarunum, vísandi til, „at førleikarnir sambært fyriliggjandi upplýsingum, ikki vóru hóskandi til krøvini/ ynskini, ið sett verða til hettar starvið". Í uppritinum til stýrisformannin greiðir stjórin á Arbeiðsloysisskipanini soleiðis frá metingini hjá setanarbólkinum:*

> „Í sambandi við ítøkiliga málið um A skal verða upplýst, at vit fyrst av øllum mettu hansara útbúgvingarliga støði at vera ov høgt. Men hansara royndir vístu, at hann hevði arbeitt á Toll- & Skattstovu Føroya, og mettu vit tí, at hann kanska kortini var hóskandi. Hann hevði í sínari umsókn tilvísingar til fyrrverandi arbeiðsgevarar, ein av hesum var Toll- & Skattstova Føroya. Vit valdu at venda okkum til teirra og fingu upplýst, at A arbeiddi seint, og at hann ikki var góður til dead-lines. Í lýsingini høvdu vit greitt víst á, at rætta starvsfólki skuldi hava evnini at arbeiða skjótt, og mettu vit hetta verða ein umráðandi førleika. Niðurstøðan gjørdist tí, at heldur ikki A varð mettur at hava neyðugu førleikarnar til starvið."

*Sambært hesari frágreiðingini frá stjóranum, ið var limur í setanarnevndini, kann eingin ivi vera um, at Arbeiðsloysisskipanin hevur lagt avgerandi dent á ummælið, sum varð fingið til vega í samrøðuni við Toll- og Skattstovu Føroya, og sum er endurgivið frammanfyri undir málsgongdini. Klagarin visti ikki av, at Arbeiðsloysisskipanin hevði fingið umrødda ummælið til vega, eins og hann heldur ikki visti, hvør tað var, sum hevði úttalað seg um hansara arbeiðseginleikar. Talan er um upplýsingar, ið ikki vóru til fyrimuns fyri klagaran. Arbeiðsloysisskipanin*

*hevði tí sambært § 18 í fyrisitingarlógini skyldu til at leggja hesar upplýsingar fyri klagaran til ummælis, áðrenn avgerð bleiv tikin um at sálda hann frá sum óegnaðan til starvið. Hetta er ikki gjørt, og meti eg hetta vera ein sera álvarsaman feil í viðgerðini.*

*Reglurnar um partshoyring eru ein grundleggjandi áseting, sum skal tryggja, at avgerðir verða tiknar á fullgóðum grundarlagi, og brot á hesar reglur eru altíð at meta sum álvarsom. Vísandi til hetta fari eg at geva Arbeiðsloysisskipanini eina álvarsliga átalu fyri ikki at hava partshoyrt klagaran um hesar upplýsingar.*

*Í telefonnotatinum hevur Arbeiðsloysisskipanin noterað, at klagarin sambært upplýsingunum frá Toll- og Skattstovu Føroya skal vera ein „Ebeneser-maður burturav". Sambært § 6 í innlitslógini hevur ein myndugleiki skyldu til at notera allar upplýsingar, sum hesin munnliga ella á annan hátt tekur ímóti viðvíkjandi teimum veruligu umstøðunum, ið hava týdning fyri avgerðina í málinum. Eg dugi ikki at síggja, at trúarviðurskifti skulu hava nakran týdning yvirhøvur fyri eitt starv sum málsviðgeri hjá Arbeiðsloysisskipanini. Hendan upplýsing kann tí einans vera við til at ávirka avgerðina á ósakligan hátt, og átti tí ikki at verið noterað. Av tí, at ongar ábendingar eru um, at hetta hevur ávirkað avgerðina hjá Arbeiðsloysisskipanini, geri eg kortini ikki meira við hendan spurning.*

*Umrødda telefonnotatið lýkur heldur ikki tey krøv, ið mugu stillast til slík notat, tvs. at tað framgongur greitt, hvør hevur skrivað notatið, hvønn tosað er við, dagfesting og nær samrøðan hevur verið.*

*Sambært § 21 í fyrisitingarlógini hevði Arbeiðsloysisskipanin skyldu til at geva klagaranum eina grundgeving fyri avgerðini um ikki at seta hann í starv. Hetta er gjørt í skrivinum til klagaran, dagfest 16. juni 2005. Men eg haldi ikki, at grundgevingin mótvegis klagaranum lýkur krøvini í § 23 í fyrisitingarlógini, ið er soljóðandi:*

> ***„§ 23.*** *Ein grundgeving fyri eini avgerð, skal hava eina tilvísing til tær rættarreglur, sum avgerðin er grundað á. Í tann mun, avgerðin eftir hesum reglum hvílir á eini fyrisitingarligari meting, skal*

*grundgevingin eisini tilskila tey høvuðsfyrilit, ið hava verið avgerandi fyri útinningina av metingini.*

*Stk. 2.* *Grundgevingin skal eisini um neyðugt hava eina stutta frágreiðing viðvíkjandi teimum veruligu umstøðunum, sum hava havt stóran týdning fyri avgerðina.*

*Stk. 3.* *Grundgevingin kann verða avmarkað í tann mun áhugi partanna í at kunna nýta kunnleika til hesa til røkjan av sínum tørvi má metast at eiga at víkja fyri avgerandi umhugsni fyri honum sjálvum ella øðrum privatum ella almennum áhugamálum, jbr § 15.*

*Tá avgerðin eins og í hesum førinum er konkret grundað á upplýsingarnar frá Toll- og Skattstovu Føroya um, at klagarin skal „arbeiða seint", átti hetta at framgingið beinleiðis av skrivinum, og ikki at verið krógvað í generellum vendingum, eins og gjørt er í hesum føri. Eg fari tí eisini at geva Arbeiðsloysisskipanini eina átalu fyri eina ikki-nøktandi grundgeving í hesum málinum.*

*Vísandi til hesar sera grundleggjandi feilirnar, serliga ta vantandi partshoyringina, haldi eg avgerðina hjá Arbeiðsloysisskipanini um ikki at seta nakran av umsøkjarunum vera at meta sum ógylduga mótvegis klagaranum. Eg fari tí at mæla Arbeiðsloysisskipanini til at taka fyrra setanarmálið uppaftur til viðgerðar við atliti at umsóknini frá klagaranum og at partshoyra hann um uppritið frá Toll- og Skattstovu Føroya, fyri síðani at taka eina nýggja avgerð.*

*Viðvíkjandi seinnu umsóknini tykist Arbeiðsloysisskipanin ikki at hava lagt sama dent á ummælið frá Toll- og Skattstovuni, tó so, at ein limur í setanarbólkinum hevur viðmerkt sum ein veikleika, at klagarin hevur svarað øllum spurningum í lýsingini uttan teimum viðvíkjandi skjótleika, ferð og evstamørkum. Ein samdur setanarbólkur vísir á, at klagarin skal vera yvirkvalifiseraður, men samstundis heldur ein teirra tað vera ein veikleika, at hann ikki er liðugur við Cand.merc. aud.-útbúgving sína. Bólkurin tykist eisini samdur um, at klagarin skal hava verið sera negativur ella óhøviskur í sambandi við umsóknina. Tað er rætt, at klagarin í fylgiskrivinum til seinnu umsóknina vísir á sína ónøgd við viðgerðina av fyrra setanarumfarinum, eins og umsóknin ber brá av at vera ein roynd hjá klagaranum at „eftirkanna" fyrru*

*avgerðina. Men havandi í huga ta ikki-nøktandi grundgevingina frá fyrra setanarumfarinum, er hetta ikki so løgið.*

*Eg haldi ikki, at tað kann síggjast burtur frá vandanum fyri, at upplýsingarnar frá Toll- og Skattstovu Føroya, sum vórðu fingnir til vega í sambandi við fyrru umsóknina, kunnu hava havt eina ávirkan á metingina hjá setanarbólkinum í sambandi við seinnu setanina. Havast skal í huga, at 2 av limunum eru teir somu sum í fyrra setanarbólkinum. Eg fari tí eisini at mæla Arbeiðsloysisskipanini til at taka viðgerðina av seinna málinum uppaftur viðvíkjandi umsóknini frá klagaranum.*

*Tá klagarin umvegis frágreiðingina frá Arbeiðsloysisskipanini til umboðsmannin gerst kunnugur við, at onkrar upplýsingar um hann finnast hjá Arbeiðsloysisskipanini, biður hann í skrivi, dagfest 14. nov. 2005 um innlit. Arbeiðsloysisskipanin hevur noktað klagaranum innlit í, hvør persónurin á Toll- og Skattstovu Føroya er, sum hevur úttalað seg um hansara arbeiðseginleikar vísandi til, at talan er um eitt innanhýsis skjal, og at tað ikki hevur týdning fyri málið, at klagarin fær hetta upplýst.*

*Hesa avgerð og grundgevingina skilji eg ikki, tí sambært frágreiðingini frá stjóranum til stýrið var tað júst hetta ummælið, sum gjørdi, at klagarin ikki varð settur í starv fyrru ferðina. Men uttan mun til, hvønn týdning hendan upplýsingin hevur havt, kann eingin ivi vera um, at talan er um eitt innanhýsis arbeiðsskjal, sum er fevnt av § 13, nr. 2) í fyrisitingarlógini, og sum klagarin tí eisini hevði krav uppá at fáa innlit í samsvarandi reglunum í lógini.*

*Eins og áður nevnt, átti Arbeiðsloysisskipanin av sínum eintingum at lagt hesar upplýsingar, saman við upplýsing um, hvønn tosað varð við, fyri klagaran til ummælis, áðrenn avgerðin varð tikin í fyrra setanarumfarinum.*

*Umrøddi persónurin á Toll- og Skattstovu Føroya er bara nevndur við fornavni í uppritinum. Eg fari tí at mæla Arbeiðsloysisskipanini til at taka innlitsumbønina frá klagaranum uppaftur til viðgerðar, og at upplýsa honum fulla navnið á kelduni.*

*Av tí, at eg haldi talan vera um álvarslig brek viðvíkjandi báðum setanarumførunum, havi eg samsvarandi § 10, stk. 1 í umboðsmanslógini boðað formansskapi Løgtingsins, løgmanni og landsstýrismanninum í vinnumálum frá niðurstøðu mínari. Eg fari eisini at biðja Arbeiðsloysisskipanina lata meg frætta, hvat hendir við hesum málinum. Burtursæð frá hesum og givnu átalunum/tilmælunum haldi eg ikki grundarlag vera fyri at gera meira við hetta málið.*

ALS hevur kunnað umboðsmannin um trinni skriv til klagaran. Fyrsta skrivið, dagfest 3. juli 2006, er soljóðandi:

„Sum kunnugt hevur Løgtingsins Umboðsmaður tikið endaliga støðu og hevur givið Arbeiðsloysisskipanini eina álvarsliga átalu fyri m.a. ikki at hava partshoyrt tygum viðvíkjandi teimum upplýsingum, sum vit fingu frá Toll- og Skattstovu Føroya.

Vit kunnu bert staðfesta, at vit eru samdir í niðurstøðuni frá Løgtingsins Umboðsmanni.

Harumframt áleggur Løgtingsins Umboðsmaður okkum at upplýsa fulla navnið á tí persóni á Toll-og Skattstovu Føroya, sum vit høvdu tosað við. Hetta hava vit gjørt við brævi tann 16. juni 2006.

Hetta keðiliga mál eigur at fáa ein virðiligan enda, og vit fara tí at spyrja um tygum hava áhuga í at koma á Arbeiðsloysisskipanina til eina samrøðu, soleiðis at tær misskiljingar, sum eru íkomnar orsakað av mistaki okkara um vantandi partshoyring, kunnu verða ruddaðar av vegnum.

Um tygum ynskja hetta, fari eg at biðja tygum ringja til undirritaða, so vit kunnu avtala eina tíð.

Avrit av hesum skrivi er sent til Løgtingsins Umboðsmann.“

Umboðsmaðurin hevur einki hoyrt aftur frá klagaranum, og ger tí ikki meira við málið.

## 28.3 Broytingar í tænastuviðurskiftunum hjá tollara

Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu frá tænastumanni um handafaringina hjá Toll- og Skattstova Føroya av starvsfólkamáli hansara.

Tá tænastumaðurin, sum starvaðist sum tollari, misti koyrikortið, umskipaði Toll- og Skattstova Føroya arbeiði hansara, so hann bert skuldi arbeiða um dagin. Hann skuldi fyribils ikki hava vaktararbeiði, tí hann kundi ikki koyra bil. Klagarin førdi fram, at talan var um so stórar broytingar í uppgávunum í tænastuni, serliga grundað á týðandi inntøkumiss vegna vantandi vaktararbeiði, at flytingingarnevnd sambært tænastumannalógini átti at verið sett. Umboðsmaðurin helt broytingina vera innanfyri tað, sum tænastumaður eigur at tola sambært § 11, stk. 1 í tænastumannalógini. At tænastumaðurin ikki forvann eins nógv í yvirtíð sum frammanundan ávirkar ikki metingina av, hvussu stór broytingin sambært § 11, stk. 1 er, tí tænastumaður, hvørs viðurskifti verða broytt, hevur bert krav uppá at varðveita vanligu føstu lønina, men ikki samsýning fyri yvirtíð.

Klagað varð eisini um tríggjar ávaringar, sum Toll- og Skattstova Føroya hevði givið tænastumanninum. Fíggjarmálaráðið hevði seinni, í sambandi við at málið varð kært til landsstýrismannin, ógildað ávaringarnar. Hesum kundi umboðsmaðurin bert taka undir við. Toll- og Skattstova Føroya hevði tó ikki boðað tænastumanninum frá, at ávaringarnar vóru ógildaðar, og umboðsmaðurin mælti Toll- og Skattstovu Føroya til at boða honum frá hesum. (J. nr. 200600011).

## Klagan

Við skrivi, dagfest 27. januar 2006, hevur A, advokatur, sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

„**Viðv. kæru av starvssetanarmál hjá tænastumanni.**

Undirritaði kærir vegna Tænastumannafelag Landsins sum mandatar fyri B, tollara ta viðferð Toll- og Skattstova Føroya sum arbeiðsgevari hevur givið starvsetanarmáli hansara.

Kært verður um:

1. At Toll- og Skattstova Føroya (hereftir nevnd arbeiðsgevarin) ikki hevur hildið reglurnar í tænastumannalógini og latið tænastumannakanning farið fram og

2. at broytingin í tænastuviðurskiftum B, fráboðað í skjali 1 og 3, undir øllum umstøðum eru ólóglig og skeiv.

B hevur mist koyrikortið orsakað av rúsdrekkakoyring. Brotið varð ikki framt, meðan B var í tænastu.

Arbeiðsgevarin lat hin 05.07.05 B hoyringsskriv, og tað er skjal 1.

Arbeiðsgevarin ger galdandi, at B ikki kann røkja starv sítt sum tollari til fulnar, hevur hann ikki koyrikortið.

Av somu orsøk verður ásett, at B fyribils bert skal arbeiða um dagin – t.v.s. at hann skal ikki hava vaktararbeiði. Orsøkin er, at hann ikki kann koyra tænastubil.

Í hoyringsskrivinum verður samstundis fráboðað, at ætlanin er, at geva B eina skrivliga ávaring um „at leiðslan góðtekur ikki, at tygum hava meira fráveru enn starvsfólk vanliga hava“ og „at leiðslan ikki góðtekur, at tygum missa koyrikortið einaferð afturat meðan tygum eru tollari“.

A ger viðmerkingar til hoyringsskrivið skjal 2 hin 05.08.05. Hildið verður fast við hesar viðmerkingar í sínari heild. Gjørt verður galdandi, at talan er um slíka stóra broyting í uppgávunum í tænastuni hjá B, at hetta ikki kann gerast uttan, at flytingarnevnd sambært tænastumannalógini hevur góðtikið ætlan arbeiðsgevarans.

Harumframt verður gjørt galdandi:

- at tað hvørki í starvslýsing ella starvsavtalu er sett sum treyt, at B hevði koyrikortið
- at B til fulnar kann røkja vaktaruppgávurnar, sjálvt um hann ikki hevur koyrikortið
- at grundgevingin um tænastubil er púrasta burturvið, m.a. tí at hvørki í Suðuroy, í Vágum ella í Norðoyggjum hevur Tollvaldið nakran tænastubil

- at aðrir tænastumenn í líknandi støðum hava ikki verið fyri eins týðandi broytingum í tænastuviðurskiftunum, og at ongantíð áður hevur avleiðingin verið so týðandi inntøkumissur (umleið helvtin av samlaðu lønninntøkuni) hjá tænastumanni.

Toll- og Skattstova Føroya hevur ikki, hóast áheitan, sí skjal 2 framlagt tey skjøl, ið umbiðin eru, og sum hava stóran týdning fyri málið.

Arbeiðsgevarin átti at hildið reglurnar um agamálsrevsing í tænastumannalógini og gjørt verður galdandi, at tann revsing arbeiðsgevarin á hendan hátt uttan um reglurnar í tænastumannalógini hevur sett í verk, er munandi ógvusligari enn tænastumannalógin loyvir.

Viðvíkjandi ávaringini verður víst til skjal 2, harav viðmerkingar okkara framganga, og verða hesar fasthildnar.

Heitt verður á Løgtingsins Umboðsmann um at taka hetta mál til viðgerðar. Hjáløgd eru hesi skjøl:
- skjal 1:hoyringsskriv frá Toll- og Skattstovu Føroya dagfest 15.07.05
- skjal 2:skriv frá A til Toll- og Skattstovu Føroyar dagfest 15.08.05.
- skjal 3:ávaringarskriv frá Toll- og Skattstovu Føroya dagfest 31.08.05
- skjal 4:kæra frá A til D, landsstýrismann dagfest 07.09.05

Um neyðugt er við fleiri upplýsingum til málið, eru vit tilreiðar at leggja hesar fram."

Skjølini 1 – 4 verða endurgivin undir málsgongdini.

## Málsgongd

Sambært skjølunum í málinum, hevur málsgongdin verið hendan:

15. juli 2005 hevur Toll- og Skattstova Føroya, Stýrið, sent soljóðandi skriv til B:

„**Hoyringsskriv**
Leiðslan fyri Toll- og Skattstovuna er blivin kunnað um, at tygum hava mist koyrikortið orsakað av rúsdrekkakoyring, og at tað er hent í tygara frítíð. Víst verður í hesum sambandi til fyrispurning til tygum frá E tann 7. juli 2005.

Fyri at tygum kunnu røkja starv tygara sum tollari til fulnar, er neyðugt, at tygum hava koyrikort. Tá ið koyrikortið verður tikið, broytast fortreytirnar fyri, hvussu tygum kunna røkja arbeiði tygara.

Leiðslan fyri Toll- og Skattstovuna hevur tí ætlanir um, at tygum fyribils bert skulu arbeiða um dagin, og tískil ikki hava vaktararbeiði, tí tygum ikki kunnu koyra tænastubilin. Í staðin skulu tygum kunna átaka tygum vanligar tolleftirlitsuppgávur, sum deildarleiðarin áleggur tygum.

Av tí at tygum ikki fáa røkt arbeiðið, soleiðis sum tollarastørvini eru skipaði, skal hendan fyribils ætlaða umleggingin av starvi tygara síggjast sum ein roynd frá leiðslunar síðu at hjálpa tygum, meðan tygum einki koyrikort hava. Leggjast skal avtrat, at málið verður tikið uppaftur, um trupulleikar stinga seg upp.

Tygum kunnu koma við viðmerkingum til ætlanina um at broyta arbeiðsuppgávur tygara.

Viðmerkingarnar skulu verða leiðsluni fyri Toll- og Skattstovuni í hendi í seinasta lagi mánadagin 15. august 2005 kl. 12.00.

Hetta hoyringsskriv er samstundis ein fráboðan um, at ætlanin er at geva tygum eina skrivliga ávaring um, at leiðslan góðtekur ikki, at tygum hava meira fráveru, enn starvsfólk vanliga hava, og um at leiðslan ikki góðtekur, at tygum missa koyrikortið einaferð afturat, meðan tygum eru tollari.

Áðrenn skrivliga ávaringin verður givið tygum, hava tygum møguleika at koma við viðmerkingum til málið. Leiðslan fyri Toll- og Skattstovuna skal hava viðmerkingarnar í seinasta lagi mánadagin 15. august 2005 kl. 12.00.“

19. juli 2005 hevur B ringt til E, yvirtollara/ deildarleiðara, sum er dagligur leiðari hjá B. E hevur skrivað soljóðandi notat frá telefonsamrøðuni:

„19.07.05. kl. 20.25

B ringdi til mín á fartelefonina meðan eg var í føðingardag hjá .....

Hann segði mær frá, at hann hevði fingið eitt bræv frá F, um at hann m.a. ikki skuldi ganga vaktirnar – men hava dagvakt og helt, at innihaldið í brævinum var langt úti. Hann segði at eg var nevndur í brævinum og siteraði setningin um E.

Eg segði honum, at eg kendi til brævið hann hevði fingið og at eg hevði verið við til at lisið innihaldið í tí, áðrenn tað var sent, og at eg var einigur í niðurstøðunum í brævinum.

Hann byrjaði so at leggja meg undir at hava skrivað brævið. Eg hevði altíð verið úti eftir sær, og at eg var eitt reyvarhol og hann vónaði at eg fór at brenna upp í helviti. Hann vónaði, at tað fanst eitt tól, sum kundi gera skjótt av við meg.

Eitt kundi hann siga mær. At hann skuldi beinleiðis í bløðini við mær. Hann hevði eina tjúkka bók, sum hann hevði noterað í um meg. Hann visti at eg hevði snýtt í skatti fyri fleiri hundrað túsund krónur við at leiga neystið út, uttan at geva nakað upp í skatti. Hann hevði sjálvur gjørt onkran roknskap um tað. Eisini visti hann at eg hevði verið umborð í russara og keypt brennivín fyri síðan at taka teir.

Eg svaraði honum aftur, at tað hann segði var langt úti. Eg segði honum at eg ístaðin hevði hjálpt honum og hildið hendirnar yvir honum og at hetta var takkalønin. Eg bað hann rannsaka seg sjálvan og brúka møguleikan í brævinum, at gera viðmerkingar sínar, til ásettu tíðina sum var nevnd í brævinum. So var samrøðan endað.“

Við skrivi, dagfest 15. august 2005, hevur A, adv., gjørt soljóðandi viðmerkingar til hoyringsskrivi frá Toll- og Skattstovu Føroya:

„**Viðv. hoyringarskrivi: Tykkara j. nr. .....: B, tænastumaður.**

Tænastumannafelag Landsins hevur vent sær til undirritaða í sambandi við, at B – limur og álitisfólk felagsins – hevur móttikið „hoyringsskriv", dagfest 15. juli 2005, um fleiri viðurskifti, sum hvørki felagið ella móttakarin kunnu góðtaka.

Í umrødda skrivi tykkara verða 3 viðurskifti fráboðað:

1) Broyttar arbeiðsuppgávur
2) Ávaring um meira fráveru, „enn vanlig starvsfólk hava"
3) Ávaring um, „at leiðslan ikki góðtekur, at tygum missa koyrikortið einaferð afturat"

Ad 1:
Tað er ikki uttan avmarkingar og forðingar, at arbeiðsgevarin kann broyta uppgávurnar í tænastuni hjá tænastumanni. Her er talan um týðandi broytingar í uppgávunum og enn meira týðandi broytingar í inntøkunum hjá tænastumanninum. Hetta kann ikki gerast, um tænastumaðurin setur seg uppímóti hesum, og kann síðan ikki gerast uttan at ein í lógini fyriskrivað flytingarnevnd hevur góðtikið ætlanirnar.

Undirritaði er kortini av tí føstu fatan, at málið er fallið til jarðar langt áðrenn, komið er so langt. Hetta tí grundgevingin fyri broyttum uppgávum er eitt koyrikort, sum klientur mín møguliga ikki hevur.

Tað er fullkomiliga burtur við at broyta uppgávurnar hjá klienti mínum, einans tí at koyrikortið møguliga ikki verður tøkt í eitt avmarkað tíðarskeið. Klientur mín kann náa arbeiðstøðini á vakt, uttan at neyðugt er at nýta tænastuakfar stovnins. Heldur ikki var setan hansara treytað av koyrikorti, og heldur ikki hava aðrir tænastumenn í líknandi støðu fingið týðandi broytingar í ávikavist uppgávum ella verið fyri týðandi inntøkumissi.

Undirritaði er sannførdur um, at hendingin við koyrikortinum verður nýtt sum umbering at sleppa undan lógarinnar agamálsreglum, soleiðis at tænastumaðurin verður raktur meinast, uttan at arbeiðsgevarin noyðist at halda galdandi mannagongdir og málsviðgerð. Hetta verður á fínum lógarmáli rópt „detournement de procedure". Hetta sjónarmiðið verður ført fram, tí broyttu uppgávurnar og fíggjarligu avleiðingarnar av hesum eru nógv ógvusligari, enn agamálsrevsing loyvir sambært § 21, smbr. §§ 17-19 í galdandi tænastumannalóg. Tað er ein rættartrygdarforskrift tænastumanninum til frama, soleiðis at tænastumannkanning verður framd, áðrenn slíkar agamálsrevsingar verða avgjørdar.

Samanumtikið er ætlaða broytingin eisini púrasta uttan proportionalitet. Sagt verður, at broytingarnar eru neyðugar „Fyri at tygum kunnu røkja starv tygara sum tollari til fulnar .." Hvat byggir henda meting á ? Er tað tí, at tollara r í Suðuroy, Vágoy, Norðuroyggjum við ongum tænastubili ikki røkja teirra øki sum tollarar til fulnar ??? Ella av ringum royndum, tá ið aðrir tollarar hava verið uttan koyrikort í einum tíðarskeiði ??? Hetta er rætt og slætt humbukk og tvætl, tí tænastumaðurin sjálvandi hevur skyldu at møta á rætta staði, uttan at fluttningurin er trupulleiki arbeiðsgevarans. Hetta er ein grundregla á øllum arbeiðsmarknaðnum við sera fáum skipaðum undantøkum. Í hoyringarskrivi tykkara er eingin nærri grundgeving um hesi við urskifti av teirri eyðsýndu orsøk, at ampi tykkara er uppfunnin og grundarleysur!

Undir hesum punkti verður Toll- og Skattstova Føroya biðin um at útvega undirritaða hesar upplýsingar og møguleika at gera viðmerkingar, áðrenn endalig avgerð verður tikin:

a) Avrit av almennu lýsingina eftir tollarum, tá ið B var settur
b) Avrit av setanarskrivi B
c) Avrit av innahýsis reglum um nýtslu av tænastubili innan tolløkið
d) Upplýsingar um, hvussu nógvir tollarar hava mist koyrikortið

seinastu 15 árini og hvørjar tænastuligar avleiðingar hetta fekk.

e) Avrit av seinastu almennu lýsing (og setanarskriv uttan navn) á tolløkinum.

Ad2:
Ætlaða ávaringin saknar bæði vit og skil. Tað ber rætt og slætt ikki til at ávara nakran á rbeiðsmarknaðinum um ikki at hava fleiri sjúkradagar enn starvsfólk vanliga hava.

Meginreglan er, at frávera vegna sjúku er lógligt forfall. Henda reglan hevur verið skansin fram um allar skansar hjá tænastumonnum og er síðan vorðin meir og meir vanlig á arbeiðsmarknaðinum. Sjúkrareglurnar eru sera einfaldar: Antin røkir tænastumaðurin sítt starv ella fer hann/hon frá vegna sjúku. At ávara um lógligt forfall er uttan høpi og meining.

Ad3:
Triði skelkurin er so henda ávaringin, sum ætlandi skal gevast fyri at missa koyrikortið eina aðru ferð. Einasta hóskandi aftursvarið er: Den tid, den sorg!

Formligi skeivleikin er, at Toll- og Skattstova Føroya fyrst má innføra koyrikortið sum førleikakrav undan setan sum tænastumaður, annars ber ikki til at harta tænastumann fyri ikki at hava førleika, sum ikki vóru kravdir, tá ið hann/hon vóru sett. Sera fá undantøk eru frá hesi reglu sum t.d. faklig broyting á økinum (læknar skulu fylgja fakliga við o.s.fr. – optimus vir/ bonus pater – um ein heldur vil rópa so). Førleikakravið her er hvørki kravt við setan ella seinni innført á ein tílíkan hátt, at tænastumaðurin nýtist at óttast fyri sínum tænastulívi ella óttast ósakligar/ólógar flytingar.

Ætlaða ávaringin kann samanberast við alt, sum ein tænastumaður kanska fer at gera, sum ikki hóvar arbeiðsgevaranum. Hetta ber ikki til, tí misbrot í tænastuni mugu og skulu takast upp eftirfylgjandi. Trupulleikin her er, at mist koyrikort kann heldur ikki takast upp

eftirfylgjandi, tí tað er hvørki misbrot í tænastuni ella mistur førleiki, sum ikki kann verast fyri uttan.

Saman um tikið væntar undirritaði, at ætlanarskriv tykkara frá 15. juli 2005 verður afturtikið ella bara gloymt, tí tað uppfyllir ikki minstukrøvini til lógliga og sakliga viðferð av tænastumanni.

Fyrivarni verður tikið um at seta fram endurgjaldskrav fyri einhvønn fíggjarligan og ikki fíggjarligan miss, sum klientur mín hevur ella fer at hava av hesum máli.“

31. august 2005 hevur Toll- og Skattstova Føroya, Stýrið, sent soljóðandi skriv til B:

„**Ávaringarskriv**

15. juli 2005 fingu tygum hoyringsskriv frá Toll- og Skattstovuni, sum tygum hava latið tænastumannafelagnum. Advokatur felagsins hevur síðani sent Toll- og Skattstovuni skriv í málinum. Hetta er dagfest 15. august 2005.

Leiðslan bað síðani um fund við advokatin. Hesin fundur var á skrivstovuni í Stýrinum 25. august 2005, men stutt fyri tann fundin hevði leiðslan á Toll- og Skattstovuni fingið at vita frá E, yvirtollara, at tygum kl. 20.25 um kvøldið 19.07.2005 ringdu hann upp, og vóru serstakliga óhøviskur við hann í samband við hoyringsskrivið frá 15. juli 2005, ið tygum tá høvdu fingið. E hevur skrivað niður, hvussu samrøðan gekk fyri seg.

Henda nýggja vend í málinum varð kunnað advokatinum, samstundis sum boðað varð honum frá, at slíka mannagongd frá tygara síðu vildi leiðslan á stovninum undir ongum umstøðum góðtaka. Advokaturin hevði ikki stórvegis viðmerkingar til hetta, men hann upplýsti, at E, skuldi persónliga hava vent sær til løgregluna, og spurt um tygum høvdu mist koyrikortið, og tað helt hann ikki, at E, hevði nakað við at gera. Hetta avvísir E. Hann hevur bert tosað við tygum um koyrikortið.

Samanumtikið metir leiðslan, at tað, at tygum ikki hava koyrikort, ger, at tygum ikki kunnu røkja vaktararbeiði sum tollari nøktandi, og heldur tí fast við, at broytingin í arbeiðsviðurskiftum tygara, sum er boðað tygum frá í hoyringsskrivinum frá 15. juli 2005, verður sett í verk, tá tygum koma aftur úr summarfrí í ár.

Eisini verður gjørt tygum greitt, at E er tygara leiðari í dagliga arbeiðinum, og hevur ikki bara rætt til, men skal eisini, leiða og fordeila dagliga arbeiðið, og tygum eiga at fylgja teimum mannagongdum og tilrættisleggingum av arbeiðinum, ið hann setur í verk.

Tað, at tygum lata hoyringsskrivið frá leiðsluni til felag tygara/ advokat, hava vit sjálvandi ongar viðmerkingar til. Tað er tygara rættur, men at ringja tygara dagliga leiðara upp, aftan á at hava fingið eitt hoyringsskriv frá leiðsluni á Toll- og Skattstovuni, og í serstakliga óhøviskum vendingum leggja hann undir bæði eitt og annað, kunnu vit ikki góðtaka.

Henda hending løgd saman við tí, sum hoyringsskrivið umrøður, ger, at tygum fáa eina ávarðing frá leiðsluni, sum krevur, at tygum góðtaka, at tað er E, yvirtollari, ið hevur leiðslurættin á tygara arbeiðsplássi, og harumframt góðtaka tær treytir, ið nevndar eru í hoyringsskrivinum frá 15. juli 2005.

Verða hesar treytir ikki hildnar av tygum, sær leiðslan á Toll- og Skattstovuni seg noydda til at taka málið upp av nýggjum, við teimum fylgjum, ið tað so kann koma at hava fyri tygum."

7. september 2005 hevur A, adv., sent soljóðandi skriv til D, landsstýrismann:

**„Viðv. tænastuviðurskiftum B, tollara.**

Tað var gamalt, at tá ið einki annað nyttaði, varð skrivað til kongs og kært um ótolandi viðurskifti. Tað plagdi at hjálpa, og tað er í teirri vón, at eg skrivi til tygara í hesum máli.

Í skrivi, dagfest tann 15. juli 2005, fekk B eitt sokallað hoyringsskriv,

sum undirritaði hevur svarað vegna B og felag hansara: Tænastamannafelag Landsins. Avrit av hesum skrivum leggi eg við her.

Á fundi við leiðsluna í Tolli og skatti tann 25. aug. 2005 helt eg fast um sjónarmið míni, soleiðis sum skriv mítt frá 15. aug. 2005 vísti. Á sama fundi var lítil áhugi at viðgera míni sjónarmið, men heldur at vísa á eina „nýggja hending", sum snúði seg um, at B skuldi hava verið sera óhøviskur við E, yvirtollara, í eini telefonsamrøðu teirra millum tann 19. juli 2005.

Mítt sjónarmið var og er, at „nýggja hendingin" mátti fáa eina sjálvstøðuga málsviðgerð, t.v.s., at hann mátti fáa høvi til at ummæla hendingina, áðrenn nøkur avgerð kundi takast, tí hendingin var ikki umrødd og enn minni lýst í æsir í fyrra ummælisskrivinum (hoyringsskrivið frá 15. juli 2005).

Kortini kom skriv frá Tolli og skatti, dagfest 31. august 2005, har avgerð er tikin uttan at rættartrygdarforskriftirnar eru hildnar. Hetta er brot á alla málsviðgerð og fer ikki at halda, tá ið málið fer víðari.

Umframt omanfyri nevndu viðurskifti, verður avgerðarskriv Toll- og skattstovunnar frá 31. aug. 2005, sum ber heitið „Ávaringarskriv", nýtt at revsa klient mín upp á tað harðasta fyri eina hending, sum liggur uttan fyri tænastuviðurskiftini. Fíggjarligu avleiðingar eru so ógvusligar, at reglurnar í tænastumannalógini verða grovliga settar til viks. Eg hvørki tími ella orki at greiða einum almennum stovni frá rættari málviðgerð, tí hetta eigur stovnurin at duga í svøvni, uttan at ein firtin advokatur í tíð og ótíð skal greiða frá grundleggjandi reglum um málsviðgerð, tá ið um tænastumenn ræður.

Undirritaði skal við hesum skrivi heita á tygum um at gera rætt og skjal í málinum, soleiðis at B fær eina lógliga og rætta viðferð. Eg skal ikki dylja mína áskoðan viðvíkjandi rætta úrslitinum í hesum máli:

1) Fyrri parturin av málinum eigur at „goymast og gloymast", tí málið er rætt og slætt skomm fyri alla almenna fyrisiting

og brot á alla r agamálsreglur fyri tænanstumenn og hartil úti av allari proportión.

2) Seinna hendingin er ein gerandishending, sum leiðari og undirmaður eiga at greiða og avgreiða við skilagóðum samrøðum, og skal ávaring gevast, skulu reglurnar í minsta lagi haldast."

7. november 2005 hevur Fíggjarmálaráðið svarað A, adv., soleiðis:

„**Viðvíkjandi tænastuviðurskiftum B, tollara**

Fíggjarmálaráðið hevur fingið skriv frá tygum, dagfest 7. september 2005, har tygum gera vart við, at ymisk viðurskifti eru farin fram millum B, tollara, og Toll- og Skattstovu Føroya, sum ikki kunnu góðtakast.

Fíggjarmálaráðið hevur síðani viðgjørt málið, og skal við hesum greiða frá, hvat Fíggjarmálaráðið metur sum rætta handfaring av málinum.

Toll- og Skattstovan hevur við skrivi til B, dagfest 15. juli 2005, boðað frá, at ætlanin er at leggja arbeiðið hjá honum um. Greitt verður frá at hetta verður gjørt, tí B hevur mist koyrikortið, og tað er neyðugt at kunna koyra bil, tá ið tollari í Streymoyarøki er á vakt.

Ætlanirnar hjá Toll- og Skattstovuni skulu ikki síggjast sum nøkur revsing ella nøkur umbering fyri at sleppa undan agamálsreglunum, sum tygum í skrivi til Toll- og Skattstovuna, dagfest 15.08.05, gera galdandi.

Umskipan av arbeiðinum fyri eina tíð er ein reint praktisk loysn, sum er neyðug, um B framhaldandi skal kunna røkja starvið sum tollari útfrá teimum reglum, sum arbeiðsgevarin hevur sett fyri útinnan av arbeiðinum. Tænastubilur er knýttur at tænastustaðnum, Streymoyarøki, og er akfarið keypt við tí endamáli, at tað skal verða nýtt av øllum tollarunum í samband við, at teir eru á vakt.

Toll- og Skattstovan er sinnað at leggja uppgávurnar hjá B um í hesum tíðarskeiði, hóast hetta førir við sær, at vaktarskipanin, ið er galdandi fyri allar tollararnar, í tíðarskeiðinum eisini má verða løgd um.

Á hvønn hátt B møtir til arbeiðis blandar arbeiðsgevarin seg ikki uppí, men hvussu hann røkir arbeiðið m.a. kemur á staðið til tollingar uppgávur í arbeiðstíðini, kann arbeiðsgevarin blanda seg uppí. Arbeiðsgevarin hevur rætt til at gera hetta í kraft av leiðslurættinum.

Tygum vísa í skrivinum til Toll- og Skattstovuna, dagfest 15.08.05, at tað ikki er uttan avmarkingar og forðingar, at broytingar kunnu gerast í tænastuni hjá tænastumanni.

Í § 11 í tænastumannalógini er ásett:

Tænastumaður hevur skyldu til á tænastuøki sínum at ganga undir tílíkar broytingar í tænastuviðurskiftunum, sum ikki broyta starvseyðkennið, og sum ikki ger, at starvið ikki longur kann haldast hóskandi fyri hann. Í sama mun kann áleggjast honum at taka við øðrum starvi.

Stk. 2. Um so er at broytingar í fyrisitingini gera tað neyðugt, kann landsstýrið í samráð við nevndina eftir § 12 áleggja tænastumanni at taka við starvi uttanfyri sítt egna tænastuøki, um arbeiðið svarar til tað í starvinum higartil og kann haldast hóskandi fyri hann.

Tygum siga í sama skrivi, at ein flytingarnevnd eigur at góðtaka ætlanirnar, um B skal flytast. Sum ásett í § 11, stk. 2 skal ein flytingarnevnd góðtaka ætlanirnar, um tænastumanninum skal verða álagt at taka við starvi uttan fyri sítt egna tænastuøki. Tað er ikki talan um hetta í málinum hjá B.

Um hugt verður í starvslýsingina, tá ið B var settur, er einki sum týður uppá, at starvið er broytt meira, enn hann eigur at tola.

Í starvslýsingini stóð: „Primerar uppgávur: Tolleftirlit við inn- og útflutning av vørum og ferðafólki og avgreiðsla av pappírsarbeiði,

ið har til hoyrir. Harumframt seruppgávur, sum framleiðslueftirlit og sóttverjueftirlit. Sekunderar uppgávur: Allar aðrar avgreiðslu- og eftirlitsuppgávur innan toll, skatt og mvg."

Tænastumaður, sum verður fluttur í annað starv, sum t.d. er flokkað lægri, hevur krav uppá at varðveita sína vanligu føstu løn. Løn í samband við yvirtíð, hevur hann ikki krav uppá at varðveita.

Toll- og Skattstovan hevur greitt frá, at tað er ymiskt , hvussu nógv koyring er í ymisku økjunum, og er tænastubilur tískil ikki knýttur at øllum økjunum.

Toll- og Skattstovan hevur í einum øðrum máli, har tollari hevur mist koyrikortið, tikið vaktirnar frá viðkomandi, men hevur viðkomandi nú fingið koyrikortið og tollvaktirnar aftur. Tískíl verður ikki mett, at málið hjá B er øðrvísi handfarið, enn onnur líknandi mál eru og fara at verða handfarin framyvir.

Tygum vísa á, at talan er um procesfordrejning. Fíggjarmálaráðið metur ikki, at mista koyrikortið er eitt tænastubrot, og málið orsakað av hesum eigur at verða viðgjørt sum agamál.

Viðvíkjandi ávaring um fráveru vegna sjúku, er Fíggjarmálaráðið samt við tygum í, at málið ikki er handfarið rætt sambært fyrisitingarlógini. Fíggjarmálaráðið fer tískil at biðja Toll- og Skattstovuna um at koma við einum nýggjum hoyringsskrivi viðvíkjandi fráveru, sum uppfyllir treytirnar í fyrisitingarlógini, um ávaringin skal hava gildi.

Tygum hava í skrivi tygara, dagfest 07.09.05, víst á 2 hendingar, og siga tygum seinast í skrivinum, at seinna hendingin er ein gerandishending, sum leiðari og undirmaður eiga at greiða og avgreiða við skilagóðum samrøðum.

Seinna hendingin, sum tygum umrøða, fór fram tann 17.07.05. E, ið er leiðari hjá B varð ringdur upp av B, sum hevði serstakliga grovar skuldsetingar og grovan málburð móti E.

Fíggjarmálaráðið er av teirri áskoðan, at hetta má verða at meta sum eitt tænastubrot.

Fíggjarmálaráðið fer at biðja Toll- og Skattstovuna fylgja galdandi reglum í sambandi við, at ein ávaring verður givin fyri tænastubrot.“

15. november 2005 var fundur millum A, adv., L, formann í Tænastumannafelag Landsins, H, aðalstjóra og I, fulltrúa um málið hjá B.

Niðurstøðan á fundinum var, at umboðini fyri Fíggjarmálaráðið skuldu tosa við Toll- og Skattstovu Føroya um møguleikan at geva B vaktararbeiði, hóast hann ikki fekk koyrt bil í sambandi við vakt á Streymoynni.

22. november 2005 hevur Fíggjarmálaráðið sent Toll- og Skattstovu Føroya fráboðan um, at skrivið, dagfest 7. november 2005, er sent A, adv., og víst varð til niðurstøðurnar hjá Fíggjarmálaráðnum viðvíkjandi ávaringini vegna fráveru vegna sjúku og tænastumisbrot.

## Partshoyring

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og við skrivi, dagfest 16. februar 2006, varð klagan send Fíggjarmálaráðnum til ummælis, har ráðið varð biðið um eina frágreiðing um málið og at lata umboðsmanninum øll skjøl viðvíkjandi málinum.

Við skrivi, dagfest 13. mars 2006, hevur Fíggjarmálaráðið latið umboðsmanninum soljóðandi frágreiðing um málið:

**„Ummæli av klagu til Løgtingsins umboðsmann,**
**j.nr. 200600011/5**

Løgtingsins umboðsmaður hevur við skrivi, dagfest 16. februar 2006, biðið Fíggjarmálaráðið um eina frágreiðing í starvsfólkamálinum hjá B, tollara og um at fáa øll skjøl í málinum.

Málið er hjá okkum skrásett sum „.... Toll og Skatt – uppgávubroytingar hjá tollara", og liggja skjølini í málinum við hesum skrivi.

Fíggjarmálaráðið hevur valt at skipa arbeiði soleiðis, at Fíggjarmálaráðið kemur við frágreiðing um sín leiklut í málinum, og Toll- og Skattstova Føroya, sum er avvarðandi stovnur, ger sína frágreiðing um málið.

Fíggjarmálaráðið fekk tann 7. september 2005 kæru frá A um handfaringina hjá Toll- og Skattstovu Føroya av málinum hjá B, tollara.

Kæran frá A snúði seg um

1. At agamálsreglarnar í tænastumannalógini ikki vóru yvirhildnar og málið var úti av proportión.
2. At rættartrygdarforskriftirnar og grundleggjandi reglar um málsviðgerð ikki vóru yvirhildnar.

Fíggjarmálaráðið viðgjørdi síðani kæruna og gjørdi eina niðurstøðu í málinum, ið varð fráboðað A við skrivi, dagfest 7. november 2005.

Umleggingina av arbeiðinum hevur Fíggjarmálaráðið ikki mett vera meira enn tænastumaðurin eigur at tola eftir § 11, stk. 1 í Ll. nr. 31 frá 5. juli 1971 um tænastumenn landsins, við seinni broytingum.

Fíggjarmálaráðið hevur mett, at broytingin í tænastuviðurskiftinum hjá B er framd, fyri at hann framhaldandi skal kunna røkja arbeiði á stovninum undir teimum krøvum, sum arbeiðsgevarin stillar.

Toll- og Skattstova Føroya hevur mett, at tað ikki ber til at kunna røkja arbeiði, sum tollari á vakt í Streymoyarøki, tá ið viðkomandi einki koyrikort hevur, og hevur stovnurin tískil valt at leggja arbeiði hjá tollaranum um í tíðarskeiðinum, viðkomandi ikki hevur koyrikort.

Arbeiði er í hesum tíðarskeiði umskipað soleiðis, at hann í størri

mun enn áður arbeiðir í sjálvari tollbúðini við uppgávum, ið svara til tær í starvslýsingini.

Í tann mun tað hevur borið til, hevur arbeiðsgevarin givið B vaktir, har tað ikki er neyðugt, at viðkomandi fær koyrt tænastubilin.

Starvslýsingin fyri tollarar er soleiðis orðað:

„Primerar uppgávur: Tolleftirlit við inn- og útflutningi av vørum og ferðafólki og avgreiðsla av pappírsarbeiði ið har til hoyrir. Harumframt seruppgávur, sum framleiðslueftirlit og sóttverjueftirlit. Sekunderar uppgávur: Allar aðrar avgreiðslu- og eftirlitsuppgávur innan toll, skatt og mvg."

Í løtuni er arbeiði hjá tollarum soleiðis skipað, at teir fáa nógv utgoldið í yvirtíð. Um arbeiði hjá tollara verður umskipað, kann tað viðføra broytingar í yvirtíðarsamsýningunum, sum kunnu fara niður, og samlaða inntøkan tí eisini gerst lægri.

Starvsfólk kunnu ikki frá einum degi til annan uttan fráboðan fara niður í løn, men tá verður hugsað um føstu lønina í tí lønarflokki viðkomandi er í.

Yvirtíðarsamsýning er ikki nakað sum starvsfólk fast kunnu rokna við ella innrættað seg uppá, tí tænastan kann verða umskipað, soleiðis at yvirtíð ikki kemur fyri í líka stóran mun sum áður.

Yvirtíðarsamsýning kann eisini verða burtur frá einum degi til annan t.d. í samband við sjúku, tá starvsfólk bert fær sína føstu løn eftir tí lønarflokki, tey eru lønt eftir.

A hevur í kæruni, dagfest 27. januar 2006, til Løgtingsins umboðsmann víst á, at ein flytingarnevnd sambært tænastumannalógini átti at góðtikið ætlan arbeiðsgevarans um at broyta uppgávurnar hjá tænastumanninum.

Sambært § 11, stk. 2 í tænastumannalógini eigur ein flytingarnevnd at

vera við í viðgerðini, tá ið broytingar í fyrisitingini gera tað neyðugt, at tænastumaður tekur við starvi uttan fyri sítt tænastuøki. Í hesum málinum er ikki talan um broytingar í fyrisitingini, og heldur ikki er talan um, at viðkomandi fær álagt at taka við starvi uttan fyri egið tænastuøki. Tískil hevur arbeiðsgevarin í hesum málinum ikki havt skyldu til at taka eina flytingarnevnd við uppá ráð.

Fíggjarmálaráðið hevur ikki mett tað vera eitt tænastubrot, at viðkomandi hevur mist koyrikortið í sínari frítíð, og hevur tí ikki mælt til at viðgera málið sum agamál orsakað av hesum.

Fíggjarmálaráðið hevur í skrivinum, dagfest 7. november 2005, til A greitt frá, at Fíggjarmálaráðið tekur undir við, at ávaringarnar, sum vóru latnar B ikki vóru í tráð við fyrisitingarlógina.

Fíggjarmálaráðið hevur síðani tann 22. november 2005 sent Toll- og Skattstovu Føroya avrit av svarinum til A, og víst til niðurstøðurnar hjá Fíggjarmálaráðnum viðvíkjandi ávaringini vegna fráveru og ávaringini vegna tænastubrot.

Sum tað framgongur av teimum skjølum, sum við hesum skrivi verða latin Løgtingsins umboðsmanni er enn gongd í málinum um tænastuviðurskiftini hjá B, tollara."

Við skrivi, dagfest 14. mars 2006, hevur Toll- og Skattstova Føroya, Stýrið, latið umboðsmanninum soljóðandi frágreiðing um málið:

**„Ummæli av kæru til løgtingsins umboðsmann,**
**j.nr. 200600011/5**

Toll- og Skattstova Føroya hevur eftir áheitan frá Fíggjarmálaráðnum gjørt eina frágreiðing um málið. Viðmerkjast skal, at F, fyrrverandi stjóri á Toll- og Skattstovu Føroya, umsat starvsfólkamál til hann fór frá vegna aldur í desembur 2005, undirritaði var við á flestu fundum um málið. Frágreiðingin byggir á skjølini í persónsmappuni hjá B og samrøður við E yvirtollara.

Málið var reist, eftir at E kunnaði stýrið um, at B var tikin fyri rúsdrekkakoyring, í einum eposti til F 8. juli 2005. Leiðslan var samd við E í, at B ikki kundi røkja tollvaktina uttan koyrikort, og metti, at hann átti at fáa ávaring. Á Streymoyar øki er ein tænastubilur sum tann, ið hevur tollvakt, brúkar. Hetta er neyðugt, tí økið fevnir um Streymoy, minus Sunda kommunu. Koma skip inn t.d. á Vestmanna, er vanlig mannagongd, at tollavgreiða skipið, tá tað kemur, óansæð tíð og veður. Flest skip koma til Tórshavn, men trafikkurin á Kollafjørð og Sund er stórur og vaksandi.

Í hoyringsskrivinum, dagfest 15. juli 2005, til B er eisini ein fráboðan um, at leiðslan ikki góðtók, at B hevði nógva fráveru í mun til sínar starvsfelagar. Vanligt var, at B ikki var til arbeiðis mánamorgun, orsøkin kundi vera alt frá sjúkt barn til trupulleikar við rygginum.
Ofta var hann so burtur tað mesta av vikuni.

B var ofta heima við sjúkum barni. Tað var eisini vanligt, at orsøkin, ið B gav, tá hann boðaði frá, at hann ikki kom til arbeiðis, var broytt til sjúku, tá klokkuseðilin skuldi skrivast.
…

Tann 19. juli 2005 eftir at hava móttikið ætlanarskrivið, ringdi B til E, har hann við ónærisligum málburði legði E undir líkt og ólíkt. Hetta skrivaði E niður í eitt notat.

Tann 15. august kom svar uppá hoyringsskrivið frá sakføranum hjá B, við viðmerkingum. Fundur var avtalaður við sakføraran, og á fundinum vóru F, stjóri, J, varastjóri, og G, sakførari. Fyri fundin var E yvirtollari í stýrinum, har hann handaði tað, ið skrivað var niður 19. juli 2005, um telefonsamrøðuna millum hann og B.

F boðaði á fundinum frá, at málið nú hevði eina nýggja vend, hann vísti til telefonsamrøðuna millum B og E tann 19. juli 2005. Stórur partur av fundinum fór at viðgera hesa samrøðu, og sakførarin segði seg vera samdan í, at B átti at tola eina ávaring fyri sítt málbrúk í hesari samrøðu. Sakførarin kundi tó ikki góðtaka, at B misti vaktina, m.a. tí hetta, eftir hansara meining, var ein broyting í starvinum.

Leiðslan vísti á, at hetta á ongan hátt var ein broyting, bert ein neyðug tillaging, tí B ikki kundi brúka tænastubilin. Eisini var víst á, at stovnurin vildi geva B møguleika at røkja starvið, hóast hann ikki kundi koyra tænastubilin. Leiðslan vísti eisini á, at tað, at B ikki kundi hava tollvakt, gjørdi, at hinir tollararnir fingu meira at gera.

B skuldi tá, í tann mun tað var møguligt, vera á vakt á Flogvøllinum og við at tollavgreiða Norrønu uttan fyri arbeiðstíð.

Eftir henda fundin var ein ávaring til B orðað, har tikið var saman um. Umframt tað, ið stóð í hoyringsskrivinum, var eisini telefonsamrøðan tikin við, tá leiðslan metti hana vera tænastubrot. Hetta tók Fíggjarmálaráðið seinni undir við. Ávaringin var síðani send til B, 31. august 2005, har leiðslan kravdi, at B góðtók, at E, yvirtollari, hevði leiðslurættin á arbeiðsplássinum, og at B skuldi góðtaka treytirnar, ið nevndar vóru í hoyringsskrivinum frá 15. juli 2005.

B kærir so til Landsstýrismannin í fíggjarmálum. Í hesum sambandi var eitt ávíst samskifti við lønardeildina í fíggjarmálaráðnum, har m.a. var spurt, um aðrir tollarar høvdu mist koyrikortið, um tað var neyðugt at hava koyrikort fyri at røkja starvið nøktandi, og um koyrikortið ikki er neyðugt, hvat var grundin?

F svaraði lønardeildini 5. oktobur 2005, har hann váttaði, at ein tollari hevði mist koyrikortið. Her er ein misskiljing hend. Tað, viðkomandi mál snúði seg um, var, at ein tollari misti tollvaktina, tí viðkomandi hevði møtt ávirkaður til arbeiðis.

Metingin hjá leiðsluni er, at neyðugt er at hava koyrikortið fyri at kunna røkja arbeiðið við at hava tollvaktina á øllum økjum. Tollararnir fáa samsýning fyri ferðing, tá teir nýta egnan bil.

Toll- og Skattstova Føroya hevur 2 tænastubilar, ein í Eysturoynni og so tann í Tórshavn, tí mest koyring er í hesum økjum. Í Vágum er arbeiðsplássið og tær allarflestu avgreiðslurnar á flogvøllinum, í Sandoynni og í Suðuroynni eru fáar avgreiðslur, og í Klaksvík er

flestu avgreiðslur á Kósini, stutt frá hølunum hjá Toll- og Skattstovu Føroya.

...

Tann 1. januar 2006 tók undirritaði við starvinum sum stjóri á Toll- og Skattstovu Føroya. 7. februar ringdi E og kunnaði undirritaða um, at B var dømdur fyri rúsdrekkakoyring. Í fylgi B sjálvum, misti hann koyrikortið 2½ ár....

...

Við skrivi, dagfest 17. mars 2006, sendi umboðsmaðurin frágreiðingarnar hjá Fíggjarmálaráðnum og Toll- og Skattstovu Føroya til A, adv., til ummælis.

Við skrivi, dagfest 5. apríl 2006, hevur A, adv., sent umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

**„Viðv. j.nr. 200600011/9 – Kæra vegna Tænasumannafelag Landsins fyri B, tollara**

Víst verður til skriv umboðsmansins dagfest 17. mars 2006 til A.

Viðmerkingar okkara til tað Toll- og Skattstova Føroya og Fíggjarmálaráðið føra fram eru hesar:

Kæran verður fasthildin, soleiðis sum hon er sett fram í skrivi, dagfest 27. januar 2006, til Løgtingsins Umboðsmann.

Fíggjarmálaráðið sigur, at broytingin í tænastuviðurskiftum B er framd til tess, at hann framhaldandi skal kunna røkja sítt starv í sambandi við tey krøv, arbeiðsgevarin setir. Sagt verður, at Toll- og Skattstova Føroya metir, at ikki ber til at røkja arbeiðið í Streymoyar Øki, um viðkomandi onki koyrikort hevur.

Starvslýsingin er enn ikki løgd fram, men orðingin er endurgivin, verður sagt. Sambært hesum er onki krav um koyrikort, og leiðslan

ger sína meting, hóast B vísir á, at hann væl er førur fyri at røkja vaktirnar, sjálvt um hann onki koyrikort hevur til bil.

Broytingin er sera ógvuslig í sjálvum sær, tí hjá tollarum er yvirtíðin ein sera vanligur og fastur partur av arbeiðinum, og harvið er stórur partur av lønini samsýning fyri yvirtíð.

Stórur partur av tænastuøkinum er flutt frá tollaranum í hesum føri. Tollaraarbeiði eru í so máta øðrvísi enn so mong onnur starvsøki.

...
Gjørt verður galdandi, at ógvusliga broytingin í tænastuviðurskiftunum er púra óneyðug og í veruleikanum er talan um revsing – hóast sagt verður, at mett verður ikki, at talan er um tænastubrot. Málið átti tí at verið viðgjørt sum ásett í tænastumannalógini soleiðis, at tænastumannakanning fór fram – tað bera viðmerkingarnar frá Fíggjarmálaráðnum vitnisburð um í sjálvum sær.

Av viðmerkingunum frá Toll- og Skattstovu Føroya framgongur, at málið er handfarið soleiðis, at eftir sum B varð tikin fyri rúsdrekkakoyring, so verða allar „syndir" smáar og stórar, nýggjar og gamlar, alt samalt verður nú umrøtt og tikið upp. Okkurt fær tað avleiðing, at ávaring verður givin, sum so ikki heldur.

Veruleikin er bara, at starvssetanarliga er hetta skeivt.

Ávaringar skulu sum kunnugt gevast í tilknýti til tað ávísu hendingina og fortreytin er sjálvsagt, at til ber at ávara um tað – ið neyðugt verður hildið at ávara um.

B hevur framlagt læknaváttan fyri sjúkufráveru, tá hetta hevur verð neyðugt og hevur onga ítøkiliga ávaring fingið um tey viðurskifti, ið nú verða umrødd.

B heldur tað vera beinleiðis skeiv grundgeving, tá sagt verður, at við at taka vaktirnar frá honum verður givin honum høvi til at røkja starvið, hóast hann onki koyrikort hevur.

> B vísir á, at fyri nøkrum árum síðani misti tollari í Suðuroy koyrikortið fyri rúsdrekkakoyring.
>
> Hesin misti ikki vaktirnar. Hann fekk fólk at koyra fyri seg, tá hann hevði vakt. Koyrikortið varð mist fyri 2½ ár.
>
> Í øðrum føri – í … – misti tollari koyrikortið í ½ ár fyri at koyra við ov nógvari ferð.
>
> Hesin misti sambært B ikki vaktirnar.
>
> Gjørt verður galdandi, at B hevur rætt til at varðveita vaktirnar, og at broytingin í tænastuni er meir ógvuslig enn neyðygt og rætt er.
>
> …
>
> Við hesum verður vinarligast heitt á Løgtingsins Umboðsmann um at viðgera hesa kæru."

Við skrivi, dagfest 8. apríl 2006, sendi umboðsmaðurin hesar viðmerkingarnar til ummælis hjá Fíggjarmálaráðnum og Toll- og Skattstovu Føroya.

Við skrivi, dagfest 27. apríl 2006, boðaði Fíggjarmálaráðið frá, at ráðið hevði ikki fleiri viðmerkingar til málið.

Við skrivi, dagfest 9. mai 2006, boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at umboðsmaðurin fór undir endaligu viðgerðina av málinum.

## *Niðurstøða*

*Klagarin sigur í klaguni, at Toll- og Skattstova Føroya hevur ikki hildið reglurnar í tænastumannalógini og latið tænastumannakanning farið fram, og at broytingin í tænastuviðurskiftunum hjá B undir øllum umstøðum er ólóglig og skeiv.*

*Klagarin sigur eisini, at einki grundarlag er fyri ávaringunum um ávikavist fráveru, at leiðslan ikki góðtekur, at hann missir koyrikortið aftur, og óhøviskan málburð mótvegis leiðaranum.*

*Eg kann taka undir við sjónarmiðnum hjá Fíggjarmálaráðnum*

*um, at tað er ikki tænastumisbrot at missa koyritkortið vegna rúsdrekkakoyring uttanfyri arbeiðstíð. Av hesi orsøk eru broytingarnar í tænastuviðurskiftunum ikki at meta sum agarevsing sambært tænastumannalógini, og tí er heldur ikki viðkomandi at tosa um tænastumannakanning.*

*Um broytingar í arbeiðsuppgávunum hjá tænastumanni, sigur § 11, stk. 1 í løgtingslóg nr. 31 frá 5. juli 1971 um tænastumenn landsins soleiðis:*

> „Tænastumaður hevur skyldu til á tænastuøki sínum at ganga undir tílíkar broytingar í tænastuviðurskiftunum, sum ikki broyta starvseyðkennið, og sum ikki ger, at starvið ikki longur kann haldast hóskandi fyri hann. Í sama mun kann áleggjast honum at taka við øðrum starvi.“

*Hetta merkir, at arbeiðsgevari kann gera broytingar í tænastuviðurskiftunum, um hann heldur tað vera neyðugt. Við í metingina kunnu takast atlit til viðurskifti hjá arbeiðsgevaranum / myndugleikanum eins væl og tænastumanninum sjálvum.*

*Um orsøkina til broytingarnar í viðurskiftunum hjá B sigur Toll- og Skattstova Føroya, at tað ber ikki til at røkja arbeiði sum tollari á vakt í Streymoyarøki, um ein ikki hevur koyrikort, tí landafrøðiliga arbeiðsøkið er stórt, og ofta krevst at kunna koyra til ávísu støðini. Í hesum førinum kann B í eitt tíðarskeið ikki koyra bil, og eg havi tí einki at viðmerkja til, at Toll- og Skattstova Føroya umskipaði arbeiði, so B fyribils bert skuldi hava arbeiðsuppgávur, har tað ikki kravdist at koyra bil.*

*Spurningurin, sambært § 11, stk. 1, er, hvussu stórar broytingar, tænastumaðurin skal tola.*

*Sambært ávaringarskrivinum skuldi B útinna „vanligar tolleftirlitsuppgávur“, men ikki hava vaktararbeiði, tí hann ikki kundi koyra tænastubilin í arbeiðsørindum.*

*Í starvslýsingini, tá B varð settur í starv, stendur m.a. soleiðis um arbeiðsuppgávurnar:*

“…

***Arbeiðsuppgávur***

*Tey, ið sett verða skulu í høvuðsheitum gera vanligt tolleftirlitsarbeiði og aðrar arbeiðsuppgávur í tollavgreiðsluni.*

***Førleikakrøv***

*Tey, ið sett verða skulu helst verða til aldurs um 25 – 35 ár og skulu hava lokið t.d. stundentsprógv, HF, ella aðra relevanta útbúgving. Umsøkjarar skulu helst hava kunnleika til enskt mál. Umsøkjarar við kunnleika innan tollumsiting hava fyrimun.*

…

***Toll- og Skattstovan hevur niðanfyristandandi starvslýsing av tollarastarvinum.***

| | |
|---|---|
| Primerar uppgávur: | Tolleftirlit við inn- og útflutning av vørum og ferðafólki og avgreiðsla av pappírsarbeiði ið har til hoyrir. Harumframt seruppgávur, sum framleiðslueftirlit og sóttverjueftirlit. |
| Sekunderar uppgávur: | Allar aðrar avgreiðslu- og eftirlitsuppgávur innan toll, skatt og mvg.“ |

*Sambært starvslýsingini eru arbeiðsuppgávurnar „vanligt tolleftirlitsarbeiði“, og sambært ætlanarskrivinum skulu arbeiðsuppgávurnar vera „vanligar tolleftirlitsuppgávur“ tó undantikið vaktararbeiði. Fíggjarmálaráðið hevur upplýst fyri umboðsmanninum, at arbeiðið kortini varð skipað soleiðis, at B í ávísan mun fekk tillutað vaktararbeiði, har tað ikki kravdist at kunna koyra bil. Eg haldi hesa broyting vera innanfyri tað, sum tænastumaður eigur at tola sambært § 11, stk. 1.*

*At B ikki hevur eins nógvar vaktir, og tí ikki forvinnur eins nógv í yvirtíð sum frammanundan, ávirkar ikki metingina av, hvussu stórar broytingarnar sambært § 11, stk. 1 eru. Tænastumaður, hvørs viðurskifti*

*verða broytt, hevur bert krav uppá at varðveita vanligu føstu lønina, men ikki samsýning fyri yvirtíð.*

*Toll- og Skattstova Føroya gav í ávaringarskrivinum B tríggjar ávaringar, eina fyri fráveru vegna sjúku, eina um ikki at missa koyrikortið aftur, og eina um at hava verið serstakliga óhøviskur mótvegis næsta leiðara sínum. Bert tvær tær fyrru eru nevndar í hoyringsskrivinum, meðan telefonsamrøðan við E, sum lá til grund fyri triðju ávaringini, ikki fór fram, fyrr enn eftir at B hevði fingið hoyringsskrivið. Triðja ávaringin er tí bert nevnd í ávaringarskrivinum, og uttan at Toll- og Skattstova Føroya hevur lagt ætlaðu ávaringina og grundarlagið fyri henni fyri B og givið honum høvi at úttala seg um hana.*

*Í sambandi við kæruviðgerðina av hesum máli boðaði Fíggjarmálaráðið Toll- og Skattstovu Føroya frá, at ávaringin um fráveru vegna sjúku ikki var handfarin rætt og bað Toll- og Skattstovu Føroya um at geva B eitt nýtt hoyringsskriv, um ávaringin skuldi hava gildi. Fíggjarmálaráðið segði seg samstundis vera av teirri áskoðan, at telefonsamrøðan við E, deildarleiðara, var at meta sum eitt tænastubrot og bað Toll- og Skattstovuna fylgja galdandi reglum fyri ávaringar fyri tænastubrot.*

*Eg kann ikki tulka skrivi frá Fíggjarmálaráðnum til Toll- og Skattstovu Føroya, dagfest 22. november 2005, øðrvísi enn, at Fíggjarmálaráðið hevur ógildað ávaringarnar, sum Toll- og Skattstova Føroya gav B. Hesum kann eg bert taka undir við, men eftir øllum at døma hevur Toll- og Skattstova Føroya framvegis ikki boðað B frá hesum. Eg fari tí at mæla Toll- og Skattstovu Føroya til at boða honum frá hesum og lata meg frætta aftur.*

*Burtursæð frá hesum, haldi eg ikki grundarlag vera fyri at gera meira við hetta málið.*

Toll- og Skattstova Føroya hevur kunnað umboðsmannin um, at ávaringarnar fyri sjúku og tænastumisbrot eru afturtiknar 12. juli 2006. Umboðsmaðurin ger tí ikki meira við hetta málið.

## 28.4 Ávaringar til 12 lærarar í Hoydølum

Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu frá Yrkisfelag Studentaskúla og HF-lærara um ávaringarnar, sum 12 lærarar á studentaskúlanum í Hoydølum fingu fyri fráveru, tá teir løgdu niður arbeiðið í oktober 2005.

Umboðsmaðurin hevur í viðgerðini ikki tikið støðu til, um arbeiðssteðgurin var lógligur, tí umboðsmaðurin helt, at hesin spurningur átti at verið loystur í einum gerðarrætti ella í einum rættarmáli.

Umboðsmaðurin helt, at tað einans var rektarin, sum eisini er starvsfólkaleiðari, sum hevði heimild at geva lærarum ávaringar, tí at løgtingið við seinastu broytingini í § 13 staðiliga hevði skert tær heimildir, sum landsstýrismaðurin í aðramáta hevur sum ovasti fyrisitingarligi myndugleiki á økinum. Landsstýrismaðurin hevði tí ikki annan lut í starvsfólkmálum á studentaskúlanum enn at vera kærumyndugleiki fyri avgerðir hjá rektaranum. Umboðsmaðurin gav Mentamálaráðnum eina átalu fyri at hava givið lærarunum ávaringarnar.

Av tí at landsstýrismaðurin hevur tikið aftur ávaringarnar, ger umboðsmaðurin ikki meira við málið. (J. nr. 200600012)

# Klagan

Við skrivi, dagfest 27. januar 2006, hevur Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

**„KÆRA**

Vit loyva okkum við hesum at senda umboðsmanninum kæru um málsviðgerðina og avgerðina hjá rektaranum á Føroya Studentaskúla- og HF-skeiði í Hoydølum og, landsstýrismanni, í sambandi við ávaringar, sum givnar eru 12 av limum okkara sum starvast á skúlanum í Hoydølum.

Forsøgan

Felag okkara hevur í summar sagt upp sáttmálan við Mentamálaráðið, soleiðis at hesin sáttmáli fór úr gildi 01.10.05.

Síðani hava samráðingarfundir verið, m.a. um ásetingarnar um, hvussu nógvir næmingar kunnu vera í hvørjum flokki, men eingin semja er fingin í lag viðvíkjandi nøkrum av teimum spurningunum, sum hava verið til umrøðu á samráðingarfundum okkara.

Tá talan er um sáttmálaloysi, er eingin friðarskylda galdandi, og Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara avgjørdi tí at seta í verk avmarkaðan arbeiðssteðg, soleiðis at vit við skrivi dagfest 01.10.05 boðaðu frá, at avmarkað verkfall varð lýst fyri limir okkara, sum skuldu geva frálæru úr flokkunum 05 A og 05 B í tíðarskeiðinum frá 03.10.05, kl. 08.00 til týsdagin 04.10.05, kl. 24.00.

Ávaringarnar

Avleiðingin av hesum tiltaki var, at rektari á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði, sendi limum okkara ætlanarskriv dagfest 02.10.05, har boðað varð frá, at ætlanin var at geva limum okkara, sum vóru raktir av verkfallinum ávaring við fráboðan um, at um slíkt endurtekur seg, so verða stig tikin til at burturvísa limirnar úr starvinum.

Felag okkara sendi rektaranum fyribils svar til nevnda ætlanarskriv, har vit settu rektaranum fleiri ítøkiligar spurningar, og vit vístu eisini á, at vit ynsktu nærri frágreiðing um, við hvørjari løgfrøðiligari grundgeving ætlanin var at geva ávaring fyri fráveru í sambandi við lógliga lýst verkfall undir sáttmálaloysi, tá eingin friðarskylda var galdandi.

Rektarin svaraði ikki spurningum okkara, men sendi 06.10.05 limum okkara formliga ávaring, har boðað varð frá, at um slík frávera „uttan lógliga grund“ endurtekur seg, so verða stig tikin til at burturvísa limum okkara úr starvi teirra.

Í skrivinum varð eisini boðað frá, at avgerðin hjá rektaranum var endalig og kann ikki kærast til hægri fyrisitingarligan myndugleika.

Leikluturin hjá A, landsstýrismanni

Felag okkara kærdi kortini avgerðina hjá rektaranum til A, landsstýrismann við mentamálum, og er hetta gjørt við skrivi dagfest 24.10.05.

Við skrivi dagfest 02.11.05 boðaði landsstýrismaðurin frá, at rektarin hevur fingið boð frá Mentamálaráðnum um at senda limum okkara ætlanarskriv um ávaring, og at orsøkin til, at avgerðin er endalig er, at Mentamálaráðið hevur tikið avgerðina, og at avgerðin, sum Mentamálaráðið hevur tikið ikki kann kærast til Mentamálaráðið.

Grundgevingarnar fyri kæru okkara

Vit meta ikki, at málsviðgerðin hjá rektaranum og landsstýrismanninum eru í samsvar við galdandi fyrisitingarlóg og fyrisitingarreglur annars, og vit meta heldur ikki, at rektarin og landsstýrismaðurin hava havt heimild til at geva limum okkara ávaring, tá talan er um fráveru, sum er grundað á, og fráboðað við støði í, at sáttmálaloysi er, og at eingin friðarskylda tí er galdandi millum partarnar.

Vit heita við hesum á umboðsmannin um at taka upp hetta mál, tí fyri alla føroysku fakfelagsrørsluna hevur málið rættiliga stóran týdning, tá landsstýrismaðurin her roynir at skerja aldagamla rættin hjá føroysku fakfelagsrørsluni at lýsa arbeiðssteðg, tá sáttmálaloysi er.

Vit skulu annars vísa á:

- at hvørki rektarin ella landsstýrismaðurin hava víst á nakra løgfrøðiliga heimild fyri at geva limum okkara ávaring
- at hvørki rektarin ella landsstýrismaðurin hava hildið reglurnar um hoyring

- at hvørki rektarin ella landsstýrismaðurin hava svarað ítøkiligu spurningum okkara
- at hvørki rektarin ella landsstýrismaðurin hava hildið reglurnar um grundgeving

Serliga átaluvert meta vit tað vera, at hvørki rektarin ella landsstýrismaðurin vilja svara ítøkiligu spurningum okkara, og at hvørki rektarin ella landsstýrismaðurin hava givið nakra veruliga grundgeving fyri avgerðini um at geva 12 av limum okkara ávaring við hóttan um uppsøgn.

Vit meta tað eisini vera sera álvarsligt, tá rektarin og landsstýrismaðurin tilvitað tykjast at hava roynt at forðað felagnum og limum okkara at brúka sjálvsagda rættin til at kæra eina fyrisitingarliga avgerð.

Vit senda hjálagt avrit av frammanfyri nevnda brævaskifti og fara at heita á umboðsmannin um út í æsir at kanna málsviðgerðina, herundir alt samskiftið millum rektaran øðrumegin og Mentamálaráðið/landsstýrismannin hinumegin.

Um tykkum tørvar aðrar upplýsingar, vænta vit at frætta aftur.

Avrit av hesari kæru er send, rektara, landsstýrismanni og løgmanni.“

Sambært § 6, stk. 4 í umboðslógini ger umboðsmaðurin sjálvur av, um grundarlag er fyri víðari kanningum í máli, ið klagað verður um.

Eg havi í hesum málinum gjørt av ikki at viðgera tann partin av kæruni, sum fevnir um arbeiðsrættarligu viðurskiftini, herímillum rættin hjá Yrkisfelagnum til at lýsa arbeiðssteðg. Grundgevingin fyri avgerð míni er, at eg haldi, at spurningurin um arbeiðssteðgurin var lógligur er ein sáttmálaspurningur, sum eigur at verða viðgjørdur í einum gerðarrætti ella í einum rættarmáli.

## Málsgongd

Sambært skjølunum í málinum, hevur málsgongdin, í tann mun tað er viðkomandi fyri viðgerðina av málinum, verið hendan:

Mentamálaráðið hevur 7. juli 2005 boðað Yrkisfelagnum frá, at ætlanin er at geva Føroya Studentaskúla og HF-skeiði boð um at seta á stovn 3 flokkar á málsligu deild og 4 flokkar á støddfrøðiligu deild skúlaárið 2005/06, og at tað tískil verða fleiri næmingar í flokkunum enn hægsta talið vanliga er sambært protokollati í sáttmála millum Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara og Fíggjarmálaráðið, dagfest 14. mai 2001.

Yrkisfelagið hevur, 25. juli 2005, boðað Mentamálaráðnum frá, at felagið góðtekur ikki, at næmingatalið fer upp um 24, og at talan ikki er um eitt *undantaksføri*. Felagið metir ætlanina vera brot á protokollatið.

Yrkisfelagið hevur, 16. august 2005, í tíðindaskrivi boðað frá, at Yrkisfelagið, tá verandi sáttmáli fer úr gildi 1. oktober 2005, fer at steðga allari undirvísing í teimum yvirmannaðu flokkunum, um myndugleikarnir ikki til ta tíð hava loyst trupulleikan.

Fíggjarmálaráðið hevur, 24. august 2005, boðað Yrkisfelagnum frá, at Fíggjarmálaráðið metir ikki, at talan er um brot á protokollatið, og at sjálvt um sáttmálin fer úr gildi 1. oktober 2005, so er tað vanligt, at sáttmálin heldur fram til nýggjur sáttmáli er gjørdur, ella samráðingarnar eru slitnaðar.

23. september 2005 var fundur í Mentamálaráðnum millum Mentamálaráðið og Yrkisfelagið. Niðurstøðan á fundinum var, at miðast skuldi eftir at finna eina definitión uppá hugtakið *undantaksføri* í protokollatinum.

27. september 2005 var aftur fundur í Mentamálaráðnum millum Mentamálaráðið og Yrkisfelagið. Niðurstøðan á fundinum er, at Mentamálaráðið skal taka málið upp við Fíggjarmálaráðið.

30. september 2005 var fundur millum Fíggjarmálaráðið og Yrkisfelagið. Fundurin endaði úrslitaleysur.

Yrkisfelagið hevur, 30. september 2005, sent Fíggjarmálaráðnum og Mentamálaráðnum fráboðan um, at felagið í fyrstu atløgu hevur gjørt av at lýsa avmarkað verkfall fyri limir sínar, og at felagið frá mánadegnum 3. oktober 2005 kl. 8.00 til týsdagin 4. oktober 2005 kl 24.00 lýsir verkfall fyri teir limir, sum geva frálæru í 05A og 05B í Hoydølum.

Lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum hevur 2. oktober 2005 boðað Yrkisfelagnum frá, at tá ið sáttmáli er uppsagdur at fara úr gildi, er siðvenja, at arbeitt verður eftir sáttmálanum til semja er gjørd um nýggjan sáttmála, ella sáttmálasamráðingar eru endaðar úrslitaleysar og annar parturin hevur gjørt av at seta í verk arbeiðssteðg. Fíggjarmálaráðið heitir á felagið at skipa soleiðis fyri, at fráboðaða verkfallið verður av ongum. Ráðið viðmerkir eisini, at tey starvsfólk, sum leggja arbeiðið niður, verða drigin í løn. Um verkfallið í aðramáta fær rættarligar fylgjur fyri starvsfólkini, avger einstaki arbeiðsgevarin.

Mentamálaráðið hevur, 2. oktober 2005, boðað Yrkisfelagnum frá, at um lærarar niðurleggja undirvísingina, er talan um fráveru uttan lógliga grund, og at hetta fer at fáa avleiðingar fyri teir lærarar, sum niðurleggja undirvísingina. Mentamálaráðið heitir á felagið um at boða avvarðandi lærarum frá, at arbeiðsgevarin ætlar at geva ávaring fyri ólógliga fráveru, og at í ávaringini verður fráboðað, at um ólóglig frávera endurtekur seg, so verða stig tikin at burturvísa læraranum úr starvinum.

Yrkisfelagið hevur, 2. oktober 2005, við telduposti boðað Mentamálaráðnum og lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum frá, at felagið fer ikki at taka aftur verkfallsfráboðanina.

E deildarstjóri í Mentamálaráðnum hevur, 2. oktober 2005, sent rektaranum á studentaskúlanum í Hoydølum soljóðandi teldupost:

„Góði B!
Sambært avtalu sendi eg tær hervið 3 fílar, fráboðan frá YF um arbeiðssteðg, bræv frá MMR til YF viðv. arbeiðssteðgi og ætlanarskriv til lærarar, sum møguliga ikki møta til undirvísing tann 3. og 4. oktober 2005.

Tú verður vinarliga biðin um at taka neyðug stig í hesum sambandi.“

Rektarin á Føroya Studentaskúla og HF-skeiðið hevur undirskrivað og handað teimum 12 lærarunum soljóðandi ætlanarskriv: (skrivini vóru dagfest ávikavist 2. oktober og 4. oktober 2005)

**„Ætlanarskriv**

Í sambandi við at tygum ikki eru møttur at undirvísa í flokkunum, 05A og 05B í Studentaskúlanum og HF-skeiðinum í Hoydølum, tann 3. oktober 2005 (4. okotber 2005), er ætlanin at geva tygum ávaring fyri fráveruna.

Grundgevingin er, at Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara hevur fráboðað, at undirvísingin í nevndu flokkum verður løgd niður. Eru tygum fráverandi orsakað av nevndu fráboðan, so er talan um fráveru uttan lógliga grund.

Lóglig frávera er ásett í sáttmálanum millum Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara og Fíggjarmálaráðið, og kann harumframt verða sbrt. avtalu millum tygum og rektaran á skúlanum.

Ætlaða ávaringin verður við hesum send tygum til hoyringar, og verða tygum biðin um at lata rektaranum viðmerkingar tygara til ætlanina um at geva ávaring í seinasta lagi mikudagin 5. oktober 2005 (hósdagin 6. oktober 2005).

Samstundis verður boðað frá, at um talan í hesum føri er um fráveru uttan lógliga grund, og um slík frávera endurtekur seg, so verða stig tikin at burturvísa tygum úr starvi tygara.“

Teir 12 lærararnir hava, 5. oktober 2005, sent rektaranum soljóðandi svarskriv:

„**Fyribilssvar til ætlanarskriv**

Eg fekk í gjár, mánadagin 03.10.2005, handað ætlanarskriv títt, sum dagfest er 02.10.2005.

Í skrivinum verður boðað frá, at eg ikki eri møttur at undirvísa „*í flokkunum 05A og 05B í Studentaskúlanum og HF-skeiðinum í Hoydølum, tann 3. oktober 2005*", og at ætlanin er at geva mær eina ávaring fyri fráveruna. Samstundis verður hótt við at burturvísa meg úr starvi mínum, um slík frávera endurtekur seg.

Eg skal boða frá, at eg ikki kann góðtaka, at nakað grundarlag er fyri at geva mær nakra ávaring og enn minni at burturvísa meg úr starvi mínum.

Avgerðin um at lata mær ætlanarskriv er sambært dagfesting av ætlanarskrivinum tikin, áðrenn tiltøkini hjá Yrkisfelagnum vórðu sett í verk.

Fyrst skal eg viðmerkja, at tað ikki er í samsvar við vanligar fyrisitingarligar grundreglur, at stovnsleiðsla áðrenn eitt tænastubrot skuldi verið framt, hevur tikið avgerð um at senda út ætlanarskriv við fráboðan um ætlaða ávaring og eisini skrivar slíkt ætlanarskriv áðrenn tiltøkini skuldu setast í verk.

Fyrisitingarligur myndugleiki kann ikki, fyrr enn møguligt tænastubrot er framt, taka nakra avgerð um møgulig stig, sum skulu takast grundað á hesi møguligu tænastubrot.

Sambært tímatalvuni so skuldi eg ikki undirvísa í flokkunum 05A og 05B.

Í ætlanarskrivinum verður boðað frá, at eg ikki eri møttur at undirvísa í tveimum ymiskum flokkum, mánadagin 03.10.2005, men sum kunnugt, so

skuldi eg sambært tímatalvuni bert undirvísa í øðrum av hesum flokkum í 90 minuttir.

Sáttmálin millum Yrkisfelag Studentaskúla og HF-lærara fór úr gildi 01.10.2005.

Sum tú óivað hevur kunnleika til, so er omanfyri nevndi sáttmáli sagdur upp og fór úr gildi tann 01.10.2005.

Hóast hetta, so vísir tú í ætlanarskrivinum á, at „***Lóglig frávera er ásett í sáttmálanum millum Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara og Fíggjarmálaráðið.***"

Tað er ikki nøktandi, at leiðsla skúlans vísir til sáttmálaásetingar, sum ikki eru í gildi, og tí verður heitt á teg um skrivliga at svara mær hesum spurningum:

- hvør er løgfrøðiliga grundgevingin fyri, at tú brúkar ein sáttmála, sum ikki er í gildi, sum grundgeving fyri hóttanum um at geva mær ávaring og burturvísa meg úr starvi mínum?

- kannst tú vísa á fordømi frá løgfrøðilesnaði ella avgerðum frá dómstolum ella umboðsmanni, har staðfest er, at fakfelag ikki hevur heimild at seta í verk faklig tiltøk, tá eingin friðarskylda er galdandi ?

- kannst tú vísa á fordømi, har staðfest er av dómstólum ella umboðsmanni, at løgfrøðiligt grundarlag er fyri at geva starvsfólki ávaring ella vísa tey burtur úr starvi teirra við tí grundgeving, at starvsfólkið hevur luttikið í tiltøkum, sum fakfelag hevur sett í verk undir sáttmálaloysi ?

Hví verður rætturin hjá fakfelag okkara at lýsa arbeiðssteðg, tá sáttmálalovsi er, ikki virdur ?

Tú hevur óivað frætt um tey skriv, sum Yrkisfelagið hevur sent

Fíggjarmálaráðnum og Mentamálaráðnum, har greitt er víst á, at sáttmálin er farin úr gildi, og at felagið tí hevur rætt at seta tiltøk í verk, tí tá eingin sáttmáli er galdandi, tá er heldur eingin friðarskylda galdandi.

Eg skilji, at Yrkisfelagið ikki hevur fingið nakra frágreiðing frá Fíggjarmálaráðnum ella Mentamálaráðnum, um at aðalráðini eru ósamd við Yrkisfelagið í hesum sjónarmiðum og enn minni hvør orsøkin er til, at aðalráðini ikki tykjast vilja virða rættin hjá fakfelag at seta í verk faklig tiltøk, tá sáttmálaloysi er.

Nú tú hevur sent mær hóttan um ávaring og møguliga burturvísing, so loyvi eg mær at heita á teg um at senda mær eina nágreinuliga frágreiðing, um tú metir at, Yrkisfelagið ikki hevur heimild at seta í verk arbeiðssteðg (verkfall), og eisini um tú metir, at eg ikki havi heimild at fylgja boðum frá fakfelag mínum um at luttaka í slíkum fakligum tiltøkum.

Í ætlanarskrivinum er eingin ítøkilig grundgeving fyri, at tú, beint ímóti øllum arbeiðsrættarligum grundreglum, gert galdandi, at eg havi brotið tænastuskyldur mínar, nú eg fylgdi boðunum frá fakfelag mínum um at leggja niður arbeiði mánadagin 03.10.2005.

Eg vóni, at tú skilir, at eg ikki havi møguleika at verja støðu mína, um tú ikki svarar teimum spurningum, sum eg havi sett omanfyri.

Eg haldi meg hava skyldu at fylgja fráboðan frá fakfelag mínum um luttøku í lógligum tiltøkum, og tí vænti eg at fáa eina útgreinaða grundgeving fyri hóttanum tínum, áðrenn eg lati tær endaligu viðmerkingar mínar til ætlanarskriv títt.

Fyrisitingarligu grundreglurnar um hoyring og grundgeving eru ikki fylgdar, um parturin í málinum ikki fær eina veruliga útgreinaða frágreiðing um, ikki bert veruligu viðurskiftini í málinum, men eisini um løgfrøðiliga grundarlagið undir ætlaðu tiltøkunum móti borgaranum (tann sokallaða víðkaða hoyringsskyldan, sum galdandi er í starvsfólkamálum).

At enda skal eg viðmerkja, at eg skilji, at Yrkisfelagið fer at senda løgmanni kæru um máls-viðgerðina hjá Fíggjarmálaráðnum og Mentamálaráðnum,

og sjálvur havi eg avgjørt, at um nøkur ávaring verður latin mær, so fari eg víðari við málinum, tí eg kann sjálvsagt ikki góðtaka, at leiðsla skúlans setir fram slíkar hóttanir, uttan at nakað løgfrøðiligt grundarlag er fyri hesum hóttanum.

Eg biði um at fáa svar í seinasta lagi fríggjadagin 7. oktober 2005."

F, fulltrúi í Mentamálaráðnum, hevur 6. oktober 2005 sent rektaranum soljóðandi teldupost:

„Góði B
Viðfest er skriv í sambandi við ávaring. Tú verður vinaliga biðin um at taka neyðug stig í hesum sambandi."

Rektarin á Føroya Studentaskúla og HF-skeiðið hevur undirskrivað og handað teimum 12 lærarunum soljóðandi ávaring, sum er dagfest 6. oktober 2005:

„**Ávaring**

Í sambandi við at tygum ikki møttu at undirvísa í flokkinum 05A í Føroya Studentaskúla og HF-skeiði í Hoydølum, tann 3. oktober 2005, verður givið tygum ávaring fyri fráveruna.

Grundgevingin er, at tygum hava verið burtur frá undirvísingini uttan lógliga grund.

Ætlaða ávaringin var send tygum til hoyringar, og hava tygum í hesum sambandi m.a. víst á, at tygum løgdu niður undirvísingina í flokkinum 05A í Føroya Studentaskúla og HF-skeiði í Hoydølum, sbrt. fráboðan í skrivi frá Yrkisfelagnum til Mentamálaráðið, sunnudagin tann 2. oktober 2005 – nevnt: „FRÁBOÐAN UM ARBEIÐSSTEÐG í YVIRMANNAÐU FLOKKUNUM í HOYDØLUM"

**Talan er sostatt um fráveru uttan lógliga grund.**

Tygum vísa í skrivi tygara á, at tað ikki er í samsvar við vanligar fyrisiting-

arligar grundreglur, at stovnsleiðsla, áðrenn eitt tænastubrot skuldi verið framt, hevur tikið avgerð um at senda út ætlanarskriv við fráboðan um ætlaða ávaring.

Rektarin var av Mentamálaráðnum regluliga kunnaður um gongdina í málinum og samskifti millum partarnar. Eisini fekk rektarin avrit av skrivi, sum Mentamálaráðið móttók frá YF kl. 21.26 leygarkvøldið 1. oktober 2005. Klokkan 14.00, sunnudagin tann 2. oktober 2005, fekk rektarin munnliga fráboðan frá G, nevndarlimi í Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara, um, at ætlanin var ikki at fremja undirvísing í flokkunum 05A og 05B.

Mentamálaráðið boðaði í skrivi sama dag Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara og rektaranum frá, at hetta fór at fáa avleiðingar fyri teir lærarar, sum niðurløgdu undirvísingina. Mentamálaráðið roknaði eisini við, at YF boðaði einstøku læraranum frá hesum. Sí hjálagda skriv frá Mentamálaráðnum til YF, dagfest tann 2. oktober 2005.

**Tá ið staðfest var, at tygum ikki framdu undirvísing í flokkinum 05A sambært tímatalvuni, var ætlanarskriv handað tygum.**

Tygum vísa eisini á, at fyrisitingarligar grundreglur um hoyring og grundgeving ikki eru fylgdar. Í hesum sambandi skal verða víst á § 18, stk. 1 í løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg, har ásett er, at um ein partur í einum máli ikki er kunnugur við, at myndugleikin hevur ávísar upplýsingar viðvíkjandi teim veruligu umstøðunum, so kann avgerð ikki verða tikin, fyrr enn myndugleikin hevur gjørt partin kunnugan við upplýsingarnar og hann hevur fingið høvi til at koma við einum ummæli.

Avgerð um at geva tygum ávaring stendur við, tí í hesum máli eru tygum kunnugur við allar viðkomandi upplýsingar í málinum, sum eru grundarlag undir hesari avgerðini, umframt at tygum hava havt høvi at gera viðmerkingar til málið.

**Sagt verður frá, at um frávera uttan lógliga grund endurtekur seg, so verða stig tikin at burturvísa tygum úr starvi tygara.**

Viðvíkjandi sáttmálaviðurskiftunum annars, sum tygum vísa á í svari tygara, verður víst til Fíggjarmálaráðið. Sí eisini hjálagda skriv frá Fíggjarmálaráðnum til YF, dagfest tann 2. oktober 2005.

Henda avgerð er endalig og kann ikki kærast til hægri fyrisitingarligan myndugleika. Avgerðin verður skrásett í persónsmáli tygara."

Yrkisfelagið hevur, 24. oktober 2005, sent A, landsstýrismanni, soljóðandi kæru:

„**KÆRA**

Vegna limir okkara

...

loyva vit okkum við hesum at senda tygum sum landsstýrismanni kæru um ávaringarnar, sum rektarin fyri Føroya Studentaskúla- og HF-skeiði í Hoydølum hevur givið nevndu limum okkara við skrivi dagfest 05.10.2005.

Í hesum sambandi krevja vit, at tygum sum kærumyndugleiki staðfesta:

- **at** tað ikki er í samsvari við galdandi fyrisitingarrætt, tá rektarin boðar frá, at avgerðin um ávaring er endalig
- **at** málsviðgerðin ikki er farin fram samsvarandi fyrisitingarlógini og vanligum fyri-sitingarreglum annars
- **at** onki løgfrøðiligt grundarlag er fyri avgerðini um at lata nevndu limum okkara ávaring
- **at** ávaringarnar verða ógildaðar.

Sum nærri grundgeving fyri kæru okkara skulu vit viðmerkja fylgjandi:

…"

Mentamálaráðið hevur, 2. november 2005, svarað Yrkisfelagnum soleiðis uppá kæruna:

„**Viðv. kæru Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara**

Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara hevur við skrivi, dagfest 24. oktober 2005, kært ávís viðurskifti í sambandi við avgerð Mentamálaráðsins, um at geva ávaringar fyri fráveru uttan lógliga grund.

Millum annað verður kravt, at landsstýrismaðurin sum kæramyndugleiki staðfestir ávís viðurskifti í sambandi við avgerðina, og at ávaringarnar verða ógildaðar.

Tann 1. oktober 2005 boðaði YF frá arbeiðssteðgi í flokkunum 05A og 05B í Studentaskúlanum í Hoydølum, frá mánadegnum 3. oktober 2005 kl. 08.00 til týsdagin 4. oktober 2005 kl. 24.00.

Eftir at Mentamálaráðið hevði móttikið fráboðanina tann 1. oktober 2005, kl. 21.26, varð avgjørt at geva YF boð um, at talan var um frávera uttan lógliga grund, sum fór at fáa avleiðingar fyri teir lærarar, sum niðurløgdu undirvísingina á henda hátt. Í skrivinum frá Mentamálráðnum var samstundis boðað frá, at Mentamálaráðið roknaði við, at YF boðaði avvarðandi lærarum frá, at arbeiðsgevarin ætlaði at geva ávaring. Eisini var kunnað um, at um ólóglig frávera endurtekur seg, so verða stig tikin at burturvísa læraranum úr starvinum.

YF fekk harumframt, tann 2. oktober 2005, eina áheitan frá Lønardeildini, um at skipa soleiðis fyri, at fráboðaði arbeiðssteðgurin varð av ongum, og um at hugsa um ta óhepnu støðu, sum limir felagsins komu í, um teir vóru burtur uttan lógliga grund. Eisini var kunnað um, at arbeiðssteðgurin kundi fáa aðrar rættarligar fylgjur fyri starvsfólkini.

YF vísir á, at málsviðgerðin ikki er farin fram samsvarandi fyrisitingarlógini og vanligum fyrisitingarreglum annars. Vísandi til

innihaldið í nevndu skrivum, sum YF hevur lagt við kæruni, so staðfestir Mentamálaráðið, at YF hevur fingið allar neyðugar upplýsingar í sambandi við at Mentamálaráðið tók avgerð um at geva ávaringar.

Rektarin fekk álagt at kanna eftir, um lærarar vóru burtur frá undirvísingini, soleiðis sum fráboðað av YF. Tá ið rektarin staðfesti, at lærari ikki var møttur at undirvísa í flokkunum 05A og 05B tann 3. og 4. oktober 2005, í tráð við fráboðanina frá YF, fekk hann frá Mentamálaráðnum boð um at handa eitt ætlanarskriv, soleiðis sum Mentamálaráðið hevði fráboðað YF í skrivi, tam 2. oktober 2005.

Tá tað í innkomnu hoyringarskrivinum varð staðfest, at talan var um fráveru uttan lógliga grund, í samsvari við fráboðanina frá YF tann 1. oktober 2005 um at niðurleggja undirvísingina 05A og 05B, tók Mentamálaráðið avgerð um at geva ávaring og gav rektaranum boð um hetta.

Orsøkin til, at skrivini innihalda upplýsing um, at avgerðin er endalig, er at Mentamálaráðið hevur tikið avgerðina. Avgerð sum Mentamálaráðið hevur tikið, kann ikki kærast til Mentamálaráðið.

Mentamálaráðið undrast á, at YF hevur tikið avgerð um at fasthalda arbeiðssteðgin, og soleiðis seta einstakar limir í hesa óhepnu støðu. Serliga tá hugsað verður um, at YF var kunnað framanundan bæði av Lønardeildini og Mentamálaráðnum, og at limir felagsins áttu at verið vitandi um tær avleiðingar, sum frávera uttan lógliga grund hevur við sær.

Við hesum verður sagt frá, at Mentamálaráðið ikki tekur kæruna frá 24. oktober 2005 til viðgerðar, og at ávaringarnar, sum givnar eru limum felagsins í sambandi við fráveru uttan lógliga grund, standa við.“

## Partshoyring

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og við skrivi, dagfest 6. februar 2006, varð klagan send Mentamálaráðnum

til ummælis, samstundis sum ráðið varð biðið um at lata umboðsmanninum øll skjøl viðvíkjandi málinum til láns.

Við skrivi, dagfest 3. mars 2006, hevur Mentamálaráðið latið umboðsmanninum eina frágreiðing um málið. Frágreiðingin er í stóran mun ein endurgeving av málsgongdini, og eg havi tí valt bert at endurgeva ein brotpart úr henni:

> „**Viðvíkjandi klagu frá Yrkisfelag Studentaskúla og HF-lærara**
>
> Vísandi til skriv tygara, dagfest tann 6. februar 2006, vil Mentamálaráðið við hesum geva tygum hetta ummæli.
>
> Yrkisfelagið vísir í kæru síni á, at felagið segði upp sáttmálan við Mentamálaráðið, soleiðis, at hesin sáttmáli fór úr gildi tann 1. oktober 2005. Tað er Lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum, sum røkir arbeiðsgevara heimildirnar hjá almenna arbeiðsgevarnum, og sum í hesum sambandi hevur sáttmála við Yrkisfelag Studentaskúla og HF-lærara (sí fylgiskjal 1), hereftir stytt Yrkisfelagið.
>
> ...
>
> Tann 2. oktober 2005 (sí fylgiskjal 17) boðar Mentamálaráðið eisini Yrkisfelagnum skrivliga frá, at um lærarar niðurleggja undirvísingina í flokkunum, 05A og 05B í Hoydølum, soleiðis sum fráboðað í skrivinum frá Yrkisfelagnum, er talan um fráveru uttan lógliga grund, og at hetta fer at fáa avleiðingar fyri teir lærarar, sum niðurleggja undirvísingina á henda hátt. Mentamálaráðið boðar eisini Yrkisfelagnum frá, at Mentamálaráðið roknar við, at Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara boðar avvarðandi lærarum frá, at arbeiðsgevarin ætlar at geva ávaring fyri ólógliga fráveru, áðrenn ætlanin um at niðurleggja arbeiðið verður sett í verk. Harumframt heitir Mentamálaráðið á Yrkisfelagið um at kunna hesar lærarar um, at í ávaringini verður fráboðað, at um ólóglig frávera endurtekur seg, so verða stig tikin at burturvísa læraranum úr starvinum.
>
> ...

Yrkisfelagið vísir á, at B, rektari á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði sendi limum ætlanarskriv, tann 2. oktober 2005 (sí fylgiskajl 25, síða 19), har boðað varð frá, at ætlanin var at geva limum, sum vóru raktir av verkfallinum, ávaring við fráboðan um, at um slíkt endurtekur seg, so verða stig tikin til at burturvísa limum úr starvinum.

Rektarin á Føroya Studeníaskúla og HF-skeiði fekk álagt av Mentamálaráðnum at kanna eftir, um lærarar vóru burtur frá undirvísingini soleiðis, sum fráboðað av Yrkisfelagnum. Tá ið rektarin staðfesti, at lærari ikki var møttur at undirvísa í flokkunum 05A og 05B tann 3. og 4. oktober 2005, í tráð við fráboðanina frá Yrkisfelagnum, fekk hann frá Mentamálaráðnum boð um at handa eitt ætlanarskriv soleiðis, sum Mentamáláráðið hevði fráboðað Yrkisfelagnum í skrivi, tann 2. oktober 2005. Av missgáum er dagfestingin í ætlanarskrivinum til nakrar lærarar skeiv.

Yrkisfelagið vísir á, at felagið sendi fyribils svar til ætlanarskrivini frá rektaranum (sí fylgiskjal 25, síða 11, 12 og 13), har Yrkisfelagið setti rektaranum fleiri ítøkiligar spurningar, umframt at Yrkisfelagið ynskti frágreiðing um løgfrøðiligu grundgevingarnar v.m.

Tá tað í innkomnu hoyringarskrivinum varð staðfest, at talan var um fráveru uttan lógliga grund, í samsvari við fráboðanina frá Yrkisfelagnum tann 1. oktober 2005 um at niðurleggja undirvísingina 05A og 05B, tók Mentamáláráðið avgerð um at geva ávaring og gav rektaranum boð um hetta (sí fylgiskjal 24).

Tann 24. oktober 2005 (sí fylgiskjal 25) kærir Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara ávís viðurskifti í sambandi við avgerð Mentamáláráðsins um at geva ávaringar fyri fráveru uttan lógliga grund. Millum annað verður kravt, at landsstýrismaðurin sum kærumyndugleiki staðfestir ávís viðurskifti í sambandi við avgerðina, og at ávaringarnar verða ógildaðar.

Tann 2. november 2005 (sí fylgiskjal 26) boðar Mentamáláráðið Yrkisfelagnum m.a. frá, at orsøkin til, at skrivini innihalda upplýsing um, at avgerðin er endalig, er, at Mentamáláráðið hevur tikið

avgerðina. Avgerð sum Mentamálaráðið hevur tikið, kann ikki kærast til Mentamálaráðið. Mentamálaráðið boðar yrkisfelagnum frá, at Mentamálaráðið ikki tekur kæruna frá 24. oktober 2005 til viðgerðar, og at ávaringarnar, sum givnar eru limum felagsins í sambandi við fráveru uttan lógliga grund, standa við.

...“

Frágreiðingin hjá Mentamálaráðnum varð send klagaranum til ummælis við eini freist áljóðandi 3 vikur.

Við skrivi, dagfest 23. mars 2006, hevur Yrkisfelagið sent umboðsmanninum hesar viðmerkingar:

**„Viðv. j.nr. 200600012/6: Klaga okkara um málsviðgerðina hjá Mentamálaráðnum.**

Vísandi til skriv tykkara dagfest 08.03.2006 skulu vit við hesum gera viðmerkingar til skrivið, sum Mentamálaráðið hevur sent umboðsmanninum 03.03.2006.

Vit skulu fyrst gera vart við, at vit kunnu staðfesta, at Mentamálaráðið í skrivi sínum als ikki tykist at vísa aftur teimum grundgevingum, sum vit hava givið fyri klagu okkara, men hinvegin er skriv ráðsins ein gjøgnumgongd av málinum, soleiðis sum ráðið tykist at síggja hetta mál, hóast skeivleikar eru í fatan ráðsins av veruligu umstøðunum í málinum.

Ráðið mótmælir ikki:

- at hvørki rektarin ella landsstýrismaðurin hava víst á nakra løgfrøðiliga heimild fyri at geva limum okkara ávaring
- at hvørki rektarin ella landsstýrismaðurin hava hildið reglurnar um hoyring
- at hvørki rektarin ella landsstýrismaðurin hava svarað ítøkiligum spurningum okkara
- at hvørki rektarin ella landsstýrismaðurin hava hildið reglurnar um grundgeving

- at rektarin og landsstýrismaðurin tilvitað, tykjast at hava roynt at forða felag okkara og limum okkara at brúka sjálvsagda rætt okkara til at kæra eina fyrisitingarliga avgerð.

Vit skulu í hesum sambandi vísa til teir heilt ítøkiligu spurningar, sum vit hava biðið landsstýrismannin svarað, men alt til fánýtis.

Sum hjáløgdu skjøl vísa, so vóru samráðingar okkara byrjaðar, men uttan nakað úrslit, og tí avgjørdu vit at seta í verk rættuliga avmarkað faklig tiltøk, og tá talan var um faklig tiltøk tá eingin sáttmálai var galdandi, so er tað fyri okkum heilt óskiljandi, at Mentamálaráðið setur í verk tiltøk móti limum okkara, og hetta kunnu vit ikki tulka á annan hátta, enn at ráðið tykist at vilja ræða okkum at brúka løgfrøðiliga rætt okkara at lýsa arbeiðssteðg tá sáttmálaloysi er.

Tað, sum fyri okkum er rættiliga álvarsligt er, at vit kunnu staðfesta, at Mentamálaráðið, sum hevur málsøkið um hendi:

- viðurkennir, at tað er ráðið, sum hevur givið rektaranum boð um at geva limum okkara ávaring
- at sama aðalráð hevur givið rektaranum boð um at gera galdandi, at avgerðin um at geva ávaringar ikki kann kærast til hægri fyrisitingarligan myndugleika, uttan at boðað er frá, at tað í veruleikanum var Mentamálaráðið, sum hevði tikið avgerðina um at geva ávaringar
- at landsstýrismaðurin fullkomiliga sær burtur frá teimum ítøkiligu spurningum, sum Yrkisfelagið setti honum í sambandi við kæruskriv okkara
- at landsstýrismaðurin als ikki hevur svarað nøkrum av hesum spurningum
- at landsstýrismaðurin ikki hevur viljað ella kunna víst á eitt einasta fordømi har almennur myndugleiki hevur gjørt galdandi, at friðarskylda er galdandi á arbeiðsmarknaðinum, tá sáttmálaloysi er
- at landsstýrismaðurin ikki vil ella kann vísa á eitt einasta dømi um, at nakað stig áður er tikið mótvegis limi í fakfelag,

tá fakfelagið hevur lýst verkfall, tá sáttmálaloysi er partanna millum

- at allir partar, bæði á privata- og almenna arbeiðsmarknaðinum í nógv ártíggju hava viðurkent rættin hjá pørtunum at lýsa faklig tiltøk, tá sáttmálaloysi er
- at hetta eisini er ein sjálvsagdur grundleggjandi rættur hjá pørtunum á arbeiðsmarknaðinum í øllum grannalondum okkara
- at landsstýrismaðurin ikki kann skjóta ábyrgdina fyri málsviðgerð og avgerð sínari yvir á Fíggjarmálaráðið, sum ikki hevur hetta málsøki um hendi
- at landsstýrismaðurin tykist at hava misskilt skrivið frá Lønardeildini, har boðað verður frá, „*at vanligt er, at arbeitt verður eftir sáttmálanum til semja er gjørd um nýggjan sáttmála, ella at sáttmálasamráðingarnar eru endaðar úrslitaleysar og annar parturin hevur gjørt av at seta í verk arbeiðssteðg*“
- at hetta skriv frá Fíggjarmálaráðnum á ongan hátt kann skiljast soleiðis, at Fíggjarmálaráðið ger galdandi at friðarskyldan er galdandi, tá sáttmálin er farin úr gildi
- at Mentamálaráðið og landsstýrismaðurin sostatt ikki við einum orði sakliga hava grundgivið fyri avgerðini, um at geva limum okkara ávaring
- at avgerðin um at geva limum okkara ávaring sostatt løgfrøðiliga er ógildug.

Fyri felag okkara hevur tað alstóran týdning, at umboðsmaðurin veruliga staðfestur, at ein landsstýrismaður ikki soleiðis kann geva tilvildarligar ávaringar fyri løgliga framd tiltøk frá fakfelagsins síðu og eisini er tað umráðandi, at Løgtingsins Umboðsmaður staðfestur:

- at reglurnar um hoyring ikki eru fylgdar
- at reglurnar um grundgevingar ikki eru fylgdar
- at Mentamálaráðið og landsstýrismaðurin ikki hava havt løgfrøðiliga heimild at forða felag og limum okkara at kæra ta avgerð, sum formliga varð fráboðað frá rektaranum um, at ávaringar vórðu givnar,

- at ávaringarnar eru ógildugar.

Vit senda hjálagt avrit av semju millum Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara og Fíggjarmálaráðið frá 28. januar 1998 (skjal 1), sum er partur av sáttmála okkara við Fíggjarmálaráðið“

Hesar viðmerkingarnar hjá klagaranum vórðu sendar Mentamálaráðnum til ummælis við einari freist áljóðandi 3 vikur.

Við skrivi, dagfest 5. apríl 2006, hevur Mentamálaráðið sent umboðsmanninum hesar viðmerkingar:

„**Viðv. klagu frá Yrkisfelag Studentaskúla og HF-lærara**

Vísandi til skriv tygara, dagfest 27. mars 2006, vil Mentamálaráðið við hesum geva tygum hesar viðmerkingar.

Yrkisfelagið vísir í skrivi sínum á semju millum Fíggjarmálaráðið og Yrkisfelagið frá 28. januar 1998, har tað m.a. framgongur, at eitt fylgiskjal hoyrir við til semjuna.

Fyri at ongar misskiljingar skulu standast av hesum, er avrit av semjuni frá 28. januar 1998 við fylgiskjalinum, sum hoyrir til semjuna, hjálagt.

Mentamálaráðið vil við hesum eisini vísa á, at semjan frá 1998 er avloyst av fleiri semjum av nýggjari dagfesting, í mun til tær sáttmálasamráðingar, sum hava verið. Teksturin í protokollatinum viðvíkjandi vanliga næmingatalinum í einum studentaskúla-og HF-flokki er tó ikki broyttur, og tann seinasta semjan er dagfest tann 15. apríl 2004, og er hon eisini hjáløgd.“

Hesar viðmerkingar vórðu sendar klagaranum til viðmerkingar við eini freist áljóðandi 2 vikur.

Við skrivi, dagfest 18. apríl 2006, hevur klagarin sent umboðsmanninum hesar viðmerkingar:

**„Viðv. klagu okkara um málsviðgerð og avgerð um ávaring til limir okkara tykkara i.nr. 200600012/11).**

Vit hava móttikið skriv tygara dagfest 8.apríl 2006 har viðlagt var avrit av skrivi dagfest 5. apríl 2006 frá Mentamálaráðnum við fylgiskrivum.

Vit kunnu staðfesta, at Mentamálaráðið hevur havt kæruskriv okkara til hoyringar og hevur sent Umboðsmanninum endaligu viðmerkingar sínar.

Vit skulu í hesum sambandi viðmerkja, at semjan frá 15. apríl 2004, sum aðalstjórin vísir á, og hevur viðlagt sum avrit av sáttmála okkara, hevur einki við protokollatið at gera. Semjurnar, sum vit hava gjørt við FMR síðan 1999 hava ongantíð fevnt um protokollatið, men av praktiskum grundum hava vit sett protokollat o.a. inn í tann seinasta sáttmálan, sum er samanskrivaður við støði í semjuni við FMR frá 15. apríl 2004. Undirskriftimar á síðu 18 í sáttmálanum (sum aðalstjórin hevur lagt við svarinum til umboðsmannin) eru sostatt kopieraðar úr semjuni frá 15. apríl 2004, sum einans nevnir tey mál, sum semja var um at broyta í gamla sáttmálanum – protokollatið er sostatt als ikki nevnt í semjuni.

Hjálagt senda vit semjuna frá 15. apríl 2004 í fullari orðing.

Hesi skjøl hava tó ongan týdning fyri løgfrøðiligu spurningarnar í kæru okkara.

Nú Mentamálaráðið hevur latið Umboðsmanninum endaligu viðmerkingar sínar, so kunnu vit staðfesta:

- at Mentamálaráðið framvegis ikki hevur víst á nakra løgfrøðiliga heimild at geva ávaringar fyri tiltøk, sum sett eru í verk tá eingin friðarskylda er (t.v.s. tá eingin sáttmáli er galdandi),
- at Mentamálaráðið framvegis ikki hevur givið nakra grundgeving fyri tørvandi hoyring sínari,

- at Mentamálaráðið framvegis ikki hevur greitt frá tørvandi grundgevingum sínum,
- at Mentamálaráðið framvegis ikki hevur svarað einum einasta av teimum ítøkjuligu spurningum, sum vit hava sett ráðnum,
- at Mentamálaráðið tykist at viðurkenna, at einki fordømi yvirhøvur er, har arbeiðsgevarapartur hevur sett í verk tiltøk móti starvsfólki, sum fevnt er av lógliga fráboðaðum tiltøkum undir sáttmálaloysi,
- at Mentamálaráðið, hóast áheitan okkara, ikki hevur víst á nakað sum á nakran hátt kann stuðla sjónarmiðinum, um at nøkur løgfrøðilig siðvenja er galdandi, sum forðar einum fakfelag at seta í verk tiltøk, tá sáttmálaloysi er.

Sum vit áður hava víst á, so er her talan um eina so tilvildarliga fyrisitingarliga viðgerð, har einki atlit er tikið til heilt grundleggjandi fyrisitingarreglur, at fyri okkum og onnur fakfeløg við, er greitt, at talan er um eina ógilduga avgerð.

Vit vóna at Umboðsmaðurin sum skjótast kann viðgera kæru okkara."

Hesar viðmerkingar vórðu saman við einum skjali, sum klagarin hevði sent umboðsmanninum við skrivi, dagfest 7. apríl 2006, sendar Mentamálaráðnum til ummælis við eini freist áljóðandi 14 dagar.

Við skrivi, dagfest 1. mai 2006, boðaði Mentamálaráðið umboðsmanninum frá, at ráðið hevði ikki fleiri viðmerkingar til málið.

Við skrivi, dagfest 9. mai 2006, boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at umboðsmaðurin fór undir endaligu viðgerðina av málinum.

## *Niðurstøða*

*Yrkisfelagið hevur klagað um málsviðgerðina og avgerðina hjá rektaranum á Føroya Studentaskúla- og HF-skeiði í Hoydølum og A, landsstýrismanni, í sambandi við, at 12 lærarar í oktober 2005 fingu ávaringar fyri fráveru.*

*Sum nevnt fyrr í álitinum, so havi eg gjørt av ikki at viðgera tann partin av kæruni, sum fevnir um arbeiðsrættarligu viðurskiftini, herímillum rættin hjá Yrkisfelagnum til at lýsa arbeiðssteðgin í Hoydølum.*

*Ein ávaring, sum verður givin í sambandi við starvsviðurskifti, er ein avgerð í einum starvsfólkamáli. Fyri viðgerð mína av málinum er tískil neyðugt at staðfesta, hvør hevur heimild at geva lærarunum ávaringar, og hvør í roynd og veru tók avgerðina um at geva lærarunum í Hoydølum ávaringar fyri fráveru.*

*§ 10 í studentaskúlalógini (løgtingslóg nr. 106 frá 29. juni 1995 við seinni broytingum) er soljóðandi:*

„***§ 10.*** Landsstýrismaðurin setur í starv og loysir úr starvi rektara. Rektarin er dagligi leiðari skúlans og hevur ábyrgdina av virksemi skúlans mótvegis landsstýrismanninum.

Stk. 2. Rektarin hevur námsfrøðiligu ábyrgdina av undirvísingini og próvtøkunum á skúlanum mótvegis landsstýrismanninum.

Stk. 3. Landsstýrismaðurin kann geva rektaranum boð í námsfrøðiligum málum.

Stk. 4. Rektarin leiðir og býtir arbeiðið millum lærarar og starvsfólk á skúlanum og tekur allar ítøkiligar avgerðir viðvíkjandi næmingunum, herímillum um upptøku av næmingum.

Stk. 5. Rektarin heldur próvtøku og skrivar prógvini.“

*Í serligu viðmerkingunum til § 10 (§ 11 í løgtingsmáli 97/1994) stendur soleiðis um ásetingina:*

„Sambært hesi grein er tað rektarin, sum hevur ábyrgdina av studentaskúlanum. Endamálið við hesi grein er m.a. greitt at tilskila, at tað bert er rektarin, ið hevur rætt og skyldu at útinna ávísar funktiónir á skúlanum. M.a. í sambandi við at farið verður yvir til mál- og rammustýring, verður tað mett umráðandi, at ábyrgdin verður greitt tilskilað.“

*§ 13, stk. 1 í studentaskúlalógini er soljóðandi:*

„Rektarin setir og loysir úr starvi lærarar og onnur starvsfólk.“

*§ 13 varð broytt við gildi frá 1. apríl 2005. Undan hesum hevði landsstýrismaðurin (formligu) heimildina at seta og loysa úr starvi lærarar. Hetta fór fram eftir tilmæli frá rektaranum.*

*Í broytingaruppskotinum (løgtingsmál 41/2004) stendur m.a. soleiðis um broytingina í § 13:*

> „3. ... Við at leggja ábyrgdina av setan av lærarum í fast starv út til rektaran, fer starvssetan á studentaskúla- og HF-økinum fram á sama hátt sum í hinum miðnámsútbúgvingunum. Bæði út frá fyrisitingarligum og leiðslupolitiskum sjónarmiðum er tað rættari, at tað er rektarin, sum er setanarmyndugleiki, tí hann frammanundan hevur ábyrgdina av størsta partinum av setanartilgongdini og av dagligu arbeiðsviðurskiftunum hjá starvsfólki skúlans.“

*Løgtingið hevur við § 10 og § 13 staðiliga tikið støðu til, at tað er rektarin, sum er dagligur leiðari og eisini starvsfólkaleiðari á studentaskúlanum, og at tað tískil er hann, sum hevur allar heimildirnar í starvsfólkamálum. Løgtingið hevur samstundis skert tær heimildir, sum landsstýrismaðurin í mentamálum í aðramáta hevur sum ovasti fyrisitingarligi myndugleiki yvirfyri einum myndugleika, sum er skipaður undir landsstýrismanninum. Úrslitið av tí er, at landsstýrismaðurin í starvsfólkamálum skal ikki hava annan leiklut enn at vera kærumyndugleiki fyri avgerðirnar hjá rektaranum.*

*Sum fyrr nevnt, er ein ávaring ein avgerð, sum er partur av einum starvsfólkamáli. Ein ávaring kann t.d. vera eitt neyðugt stig í tilgongdini til eina uppsøgn. Í ávaringarskrivinum, sum lærararnir í Hoydølum fingu, var eisini tilskilað, at um frávera uttan lógliga grund endurtók seg, so fóru stig at verða tikin til at burturvísa lærararnar úr starvi teirra.*

*Mentamálaráðið hevur í skrivi til Yrkisfelagið, dagfest 2. november 2005, greitt frá, at tað var Mentamálaráðið, sum tók avgerðina um at geva ávaringarnar, og at hetta var orsøkin til, at avgerð rektarans ikki kundi kærast til Mentamálaráðið.*

*Hóast tað var rektarin, sum undirskrivaði bæði ætlanarskrivini og ávaringarskrivini, so eri eg eisini av teirri fatan, at tað í roynd og veru var Mentamálaráðið, sum tók avgerðina um at geva lærarunum eina ávaring.*

*Hetta verður eisini styðjað av,*

- *at Mentamálaráðið, longu áðrenn arbeiðssteðgurin varð settur í verk, boðaði Yrkisfelagnum frá, at arbeiðsgevarin ætlaði at geva lærarunum ávaringar fyri ólógliga fráveru,*
- *at Mentamálaráðið í telduposti 2. oktober gav rektaranum beinleiðis boð um at handa ætlanarskrivini,*
- *at Mentamálaráðið í telduposti 6. oktober gav rektaranum beinleiðis boð um at handa ávaringarskrivini, og*
- *at rektarin, sambært skjølunum í málunum, ikki sýnist at hava havt nakran leiklut í fyrireikingini av málinum.*

*Eg haldi tað vera átaluvert, at Mentamálaráðið, uttan at hava heimild til tess, tók avgerð um at geva hesum lærarum í Hoydølum ávaring fyri fráveru.*

*Av tí at Mentamálaráðið í mai mánaða í ár, hevur tikið ávaringarnar aftur, haldi eg ikki grundarlag vera fyri at gera meira við málið.*

## 28.5 Uppsøgn av trimum fólkum á Matrikulstovuni

Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um uppsøgn av trimum starvsfólkum á Matrikulstovuni í sambandi við bygnaðarbroytingar. Avgerðin er kærd til Innlendismálaráðið, sum ikki helt seg hava grundarlag fyri at gera nakað við avgerðina hjá stjóranum á Matrikulstovuni.

Umboðsmaðurin helt ikki, at partshoyringin í málinum leyk krøvini í § 18 í fyrisitingarlógini, og gav Innlendismálaráðnum eina átalu fyri ikki at hava víst á hetta í kæruviðgerðini. Bygnaðarbroytingar kunnu vera saklig grund fyri møguligum uppsagnum, men umboðsmaðurin vísti á, at tað er ein treyt, at myndugleikin ger eina meting av uppgávunum hjá sær, og hvønn ella hvørji starvsfólk myndugleikin í hesum sambandi best kann vera fyri uttan. Umboðsmaðurin dugdi ikki at síggja nakað í skjølunum, sum vísti, at Matrikulstovan hevði gjørt nakra slíka meting, og dugdi tí heldur ikki at síggja, hvussu Innlendismálaráðið kundi koma fram til niðurstøðu sína. Umboðsmaðurin mælti tí Innlendismálaráðnum til at taka hetta málið uppaftur til viðgerðar við atliti at spurninginum um, hvørt sakligt grundarlag yvirhøvur var fyri uppsagnunum, umframt teirri ikki-nøktandi partshoyringini. Umboðsmaðurin helt heldur ikki mannagongdina vera í lagi, tá eitt av starvsfólkunum hevði fingið ein tíma at avrigga arbeiðið og arbeiðsplássið. (J. nr. 200600021)

## Klagan

Við skrivi, dagfest 22. febr. 2006, hevur Starvsmannafelagið sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

**„Kæra um uppsagnarmál á Matrikulstovuni**
**Kæra um handfaring Innlendismálaráðsins av kæru okkara um hetta**

Vit leggja við avrit av kæru okkara til Innlendismálaráðið, dagfest 11. januar 2006 og avrit av avgerð Innlendismálaráðsins, dagfest 26. januar 2006.

Við hesum kæra vit Matrikulstovuna og Innlendismálaráðið til Løgtingsins Umboðsmann.

Vegna okkara nevndu uppsøgdu limir á Matrikulstovuni kæra vit um

– at stjórin á Matrikulstovuni gongur ímóti áheitanini frá avvarðandi landsstýrismanni um ikki at fremja uppsagnirnar
– at stjórin á Matrikulstovuni við skrivinum 4. januar 2006 hevur sagt teimum trimum upp við heilt aðrari grundgeving, enn tey fingu til hoyringar í ætlanarskrivi hansara 22. november 2005

og vit gera tí galdandi

– at tey trý og felagið tískil í veruleikanum als ikki eru hoyrd um ta framdu uppsøgnina
– og at uppsagnirnar vegna brot á hoyringsskylduna tískil ikki áttu at fingið gildi

Vegna okkara nevndu uppsøgdu limir á Matrikulstovuni kæra vit eisini um

– at Innlendismálaráðið ikki hevur tikið kæru okkara 4. januar 2006 til eftirtektar og ikki hevur ógildað uppsagnirnar

Hjálagt er eisini skriv frá Almanna- og Heilsumálaráðnum (A, landstýrismanni) til Innlendismálaráðið (B, landsstýrismann) dagfest 03. februar 2006."

## Málsgongd

Við skrivi, dagfest 22. nov. 2005, hevur Matrikulstovan latið teimum trimum starvsfólkunum skriv um ætlaða uppsøgn. Skrivini, ið eru einsljóðandi burtursæð frá, at eitt av starvsfólkunum hevði rætt til uppsagnarløn í 5 heldur enn 6 mánaðir, eru soljóðandi:

„**Ætlanarskriv um uppsøgn.**

Undirritaði hevur í umbúna at siga tygum úr starvi, og kemst hetta av, at uppgávur stovnsins frameftir verða broyttar í sambandi við

bygnaðarbroytingar, sum stovnurin skal fremja. Avleiðingin verður, at starvsfólkini verða færri í tali.

Sambært reglunum fyri almenna fyrisiting eiga tygum ummælisrætt til hesa ætlaðu uppsøgn, soleiðis at tygara viðmerkingar verða tiknar við í endaligu støðutakanini. Tygum verða vinarligast biðin um at lata Matrikulstovuni tygara viðmerkingar í seinasta lagi fríggjadagin 9. desember 2005.

Sambært § 6, stk. 4, í sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og yrkisfelag tygara -Starvsmannafelagið – skal felagið hava fráboðan um ætlaðu uppsøgnina 2 vikur innan møgulig uppsøgn verður givin. Tískil verður avrit av hesum skrivi sent Starvsmannafelagnum til ummælis við somu freist, t.v.s., 9. desember 2005.

Eftir upplýsingum stovnsins eiga tygum 6 mánaðir í uppsagnarløn umframt frítíð og frítíðarløn/frítíðarískoyi sambært lóg og/ella galdandi sáttmála.

Sagt skal verða frá, at tygum verða fríttstillað í uppsagnartíðini, tó soleiðis at onnur lønarinntøka verður at mótrokna sambært galdandi reglum (minimumserstatninsreglen).“

Við skrivi, dagfest 25. nov. 2005, sendi Starvsmannafelagið Matrikulstovuni avrit av brævi felagsins til Vinnumálaráðið, ið var soljóðandi:

**„Viðvíkjandi ætlaðum broyttum bygnaði og arbeiðsumstøðum og harav ætlaðum uppsagnum á Matrikulstovuni.**

Í skrivi dagfest 22. 11. 2005 fekk Starvsmannafelagið ætlanarskriv frá Matrikulstovuni um uppsøgn av trimum starvsfólkum á stovninum, við hesi grundgeving:..*at uppgávur stovnsins frameftir verða broyttar í sambandi við bygnaðarbroytingar, sum stovnurin skal fremja. Avleiðingin verður, at starvsfólkini verða færri í tali.*

Enn einaferð mugu vit tíverri staðfesta, at myndugleikarnar vísa lítla virðing og beinleiðis skapa ótta og ótryggleika fyri arbeiðsplássið og ikki minst starvsfólkunum, tá ætlanir um broytingar eru uppá tal.

Men her ber av: tað fyrsta starvsfólkini á Matrikulstovuni hoyra, er at nøkur av teimum, eftir langa og trúgva tænastu, fáa stungið eitt ætlanarskriv um uppsøgn uppí nøsina!

Her er talan um stórar, ógvusligar og umfatandi broytingar, sum hvørki vit, álitisfólk ella starvsfólk,- sum frammanfyri víst á, – yvirhøvir frammanundan høvdu minnsta kunnleika um og tíansheldur ongan møguleika hava havt gera sína ávirkan og sjónarmið galdandi, soleiðis sum greitt er niðurfelt í sáttmála okkara við Fíggjarmálaráðið,- § 2, stk. 1 og 2 og § 3, stk. 7 og sum harafturat átti at verið minsta krav fyri sømuligheit.

§ 2, stk. 1 sigur ml.a.:
*"Tá avgeraðndi broytingar verða gjørdar á arbeiðsgongdini ella umsitingini á einum stovni, skal starvsfólkið hava boð um hetta í góðari tíð fyri at fáa høvi til at vera við í tilrættaleggingini*
og stk. 2:
*..álitisfólkini skulu takast við í ráðaleggingini, tá broytingar verða gjørdar sbr. stk.,*
og síðani § 3, stk. 7:
*Tá talan er um at flyta ella siga upp starvsfólk, skal leiðslan samráðast við álitisfólkið á avvarðandi deild. Verða partarnir ikki samdir, skal álitisfólkið leggja málið fyri felagið.*
Greiðar orðingar, men sum ikki eru fylgdar !

Í skrivi, sum álitisfólk okkara á stovninum, D, hevur sent Løgmannskrivstovuni 24.11.2005 og sum eisini er viðlagt her, verður eisini væl lýst, hvussu útav lagi illa hetta málið er handafarið frá tykkara síðu. Ja, – tað er beinleiðis skelkandi at lesa, at so umfatandi skýmaskotsarbeiði skal ganga fyri seg, sum fær so álvarsligar avleiðingar fyri starvsfólkini á hesum og helst øðrum stovnum við, uttan at hesi eru tikin við uppá ráð frá fyrsta degi av.

Vit fara undir ongum umstøðum at góðtaka hesa mannagongd, sum áður sagt, beinleiðis er í stríð við galdandi sáttmála og eigur tí ætlaðu uppsagnirnar at verða tiknar aftur.

Samstundis fara vit at biðja um at fáa innlit í alt tað, sum er farið fram og sum fer fram í hesum arbeiði, at tæga sundur og leggja saman stovnar, yvir høvdinum á teimum, sum fyrst fremst áttu at vita hvat fyriferst uttan um tey!. Hetta hava bæði vit og starvsfólk krav uppá at fáa á borðið, soleiðis at vit fáa at vita hvat tað er sum fer fram og hvørjar veruligu ætlanirnar eru við hesum broytingum og flytingum og at høvi verður at verða við í hesum arbeiði frá fyrsta degi!

Hetta skriv er eisini sent Innlendismálaráðnum (E), Løgmansskrivsstovuni (F), Matrikulstovuni og álitisfólkinum, D."

Við skrivi, dagfest 29. nov. 2005, hevur Vinnumálaráðið svarað Starvsmannafelagnum soleiðis:

„**Viðvíkjandi Matrikulstovuni**
Vísandi til skriv tykkara, dagfest 25.11.2005, skal viðmerkjast:

Í sambandi við at Matrikulstovan frá 1. januar 2006 verður flutt til landsstýrismannin í innlendismálum, og tað eisini hevur verið arbeitt við at broyta bygnaðin í P/F Føroya Dátusavn, hevur verið umhugsað møguligar bygnaðarbroytingar í hesum sambandinum, og um hesar møguliga kundi verða framdar í sambandi við fíggjarlógina 2006.

Avgerð er tikin um, at ongar broytingar verða gjørdar í sambandi við fíggjarlógararbeiðið fyri 2006, og at Matrikulstovan verður flutt í óbroyttum líki frá Vinnumálaráðnum til Innlendismálaráðið.

Annars skal verða sagt frá, at Vinnumálaráðið er samt við Starvsmannafelagið, at sáttmálar og starvsfólkapolitikkur skulu yvirhaldast."

Tann 29. nov. 2005 hevur Starvsmannafelagið sent Vinnumálaráðnum soljóðandi teldubræv (avrit sent Løgmansskrivstovuni, Innlendismálaráðnum og Matrikulstovuni):

„Víst verður til skriv okkara dagfest 25.11.2005, sum er svar uppá

hoyringsskriv frá Matrikulstovuni dagfest 22.11.2005 um ætlaða uppsøgn av trimum starvsfólkum á stovninum: G, H og I.

Í nevnda skrivi verður biðið um at uppsagnirnar verða tiknar aftur, við tí grundgeving, at hesar eru tiknar útfrá bæði skeivum og væntandi sakligum grundarlagi og sum beinleiðis eru í stríð við galdandi sáttmála. Samstundis bóðu vit um innlit í alt sum er farið fram og sum fer fram í arbeiðnum at tæga sundur og leggja saman stovnar.

Við tað at Matrikulstovan setur hoyringsfreistina at svara til 09.12.2005, vilja vit hava svar uppá áheitan okkara um innlit í góðari tíð áðrenn 09.12., hóast vit longu halda okkum hava svarað og afturvíst ætlaðu uppsagnunum."

Við teldubrævi, dagfest 30. nov. 2005, hevur Vinnumálaráðið svarað Starvsmannafelagnum soleiðis:

„Vísandi bræv tykkara frá 25.11.2005, svar okkara 29.11.2005 og e-mailin niðanfyri skal hetta leggjast aftrat svarinum:

Sum nevnt í skrivinum frá 29.11.2005 fer Matrikulstovan tann 1. januar 2006 undir landsstýrismannin í Innlendismálum, og tað henda ongar bygnaðarligar broytingar á stovninum áðrenn tað av hesi orsøk. Hetta er tí heldur ikki orsøkin til ætlanarskrivið viðvíkjandi møguligari uppsøgn av starvsfólki á Matrikulstovuni. Orsøkin er, sum stjórin á Matrikulstovuni hevur greitt frá á fundi í Vinnumálaráðnum í dag, at leiðslan á Matrikulstovuni hevur arbeitt við at styrkja stovnin fakliga, sum hevur við sær ávísar innanhýsis umprioteringar av starvsfólkanýtsluni.

Orsøkin til ætlanarskrivið er sostatt innanhýsis ætlanir um umproriteringar viðvíkjandi starvsfólkanýtslu, og hevur einki við at gera flytingina av Matrikulstovuni til Innlendismálaráðið, ella møguliga flyting av uppgávum til Landsverk."

Við skrivi, dagfest 1. des. 2005, hevur Vinnumálaráðið sent Matrikulstovuni soljóðandi fráboðan:

**„Viðv. ætlanarskrivi um møguligari uppsøgn av starvsfólki á Matrikulstovuni**
Á fundi í Vinnumálaráðnum 30.11.2005 kunnaði stjórin á Matrikulstovuni um málið viðv. ætlanarskrivi um møguligari uppsøgn av starvsfólki á Matrikulstovuni.

Vinnumálaráðið skal viðmerkja:
Í ætlanarskrivinum verður grundgivið við, at uppgávurnar hjá stovninum verða broyttar í sambandi við bygnaðarbroytingar, sum stovnurin skal fremja. Á fundinum við Vinnumálaráðið greiddi stjórin hinvegin frá, at orsøkin til ætlanarskrivið er, at leiðslan á Matrikulstovuni ætlar at styrkja stovnin fakliga, sum hevur við sær nakrar innanhýsis umprioriteringar av starvsfólkanýtsluni, og hevur hetta við sær, at eini 3 fólk á stovninum skulu sigast úr starvi.

Starvsmannafelagið hevur mótmælt ætlaðu uppsøgnini og gjørt galdandi, at brot er framt á sáttmálan, tí Starvsmannafelagið, álitisfólk og starvsfólkini eru ikki kunnaði um ætlanirnar, og hava ikki havt møguleika at gera sína ávirkan og sjónarmið galdandi. Vinnumálaráðið hevur ikki nóg neyvan kunnleika til málið at taka støðu til hendan spurningin, umframt at sáttmálaspurningar er mál hjá landsstýrismanninum í Fíggjarmálum.

Stovnurin skal tann 1. januar 2006 leggjast undir landsstýrismannin í innlendismálum, og tað er Matrikulstovuni kunnugt, at tað hevur verið umhugsað at gera ymsar bygnaðarligar broytingar í tí sambandinum. Ongar broytinar verða tó gjørdar áðrenn 1. januar. Í løtuni er tí óvist, hvørjar uppgávur stovnurin skal prioritera, og hvussu bygnaðurin verður í framtíðini. Vinnumálaráðið metir tí, at tað er óheppið, at tað nú beint áðrenn stovnurin verður fluttur, og áðrenn tað er meira greitt, hvørjar uppgávur stovnurin skal hava, og hvussu bygnaðurin verður í framtíðini, verða tiknar avgerðir, sum kunnu skerja handlimøguleikarnar, tá støða seinni skal takast til nevndu spurningar. Stjórin metir, at stovnurin leingi hevur verið undirmannaður serliga viðvíkjandi landmátarafakkunnleika.

Loysn av hesum spurninginum eigur tí at tola at bíða, til støða seinni

> er tikin til uppgávur og bygnað hjá Matrikulstovuni uttan so, at tað eru tvingandi grundir at loysa hetta málið nú.“

Við skrivi, dagfest 1. des. 2005, hevur Matrikulstovan sent teimum trimum starvsfólkunum soljóðandi fráboðan:

> **„Viðvíkjandi ætlaðu uppsagnunum á Matrikulstovuni.**
> Vegna kæru um ætlaðar uppsagnir á Matrikulstovuni verður hoyringsfreistin longd til 2. januar 2006.
>
> Viðvíkjandi uppsagnarætlanunum annars verður víst til ætlanarskrivini dagfest 22. nov. 2005.“

Við skrivi, dagfest 6. des. 2005, hevur Matrikulstovan svarað Vinnumálaráðnum soleiðis:

> „Tann 1. dec. 2005 er, eftir samrøðu við formannin í Starvsmannafelagnum J, hoyringsfreistin fyri ætlanarskrivi um møguligar uppsagnum av starvsfólki á Matrikulstovuni, longd til 2. jan. 2006.
>
> Undir samrøðuni kom skilliga fram, at undirritaði og J ikki leggja sama týdning í orðið „bygnaðarbroytingar“.
> Undirritaði meinar tó framvegis, at tað eru bygnaðarbroytingar innanhýsis á Matrikulstovuni, sum eru grundgevingin í ætlanarskrivunum.
>
> Fyri at fáa loysn á málinum bleiv hoyringsfreistin longd til 2. jan. 2006, tí nú kunnu álitsfólkið og varðaálitisfólkið vátta at rætt er farið fram sambært semjum millum Starvsmannafelagið og Landsstýrið, so henda grundgeving ikki kann nýtast fyri at krevja málið at ganga umaftur.
>
> Tað er alneyðugt, at leiðslan verður styrkt við landinspektøri ella líknandi kandidati, bæði viðvíkjandi aldursbýti og førleika, stjórin verður 63 ár í apríl 2006, og næsti maður verður 65 ár í hesum mánaðinum. Vit atliti til uppsagnarfreist má broytingin fremjast nú.

Undirritaði metir, at ætlanarskrivini eiga at standa við, men koma skrivlig boð frá Vinnumálaráðnum um at tey skulu takast aftur, verður hetta gjørt."

Við skrivi, dagfest 22. des. 2005, hevur Starvsmannafelagið sent Matrikulstovuni soljóðandi viðmerkingar til ætlaðu uppsagnirnar:

„**Svar uppá hoyringsskriv um ætlaðar uppsagnir av I, H og G. – M.j. nr. ...**

Svar okkara er eisini umboðandi omanfyri nevndu.

Í skrivum dagfest 22.11.2005 er ætlanarskriv um uppsøgn send nevndu persónum, við hesi grundgeving: ***..at uppgávur stovnsins frameftir verða broyttar í sambandi við bygnaðarbroytingar, sum stovnurin skal fremja. Avleiðingin verður, at starvsfólkini verða færri í tali...***, og varð hoyringsfreistin sett til 9.12. Men í skrivi dagfest 01.12.2005 boða tit frá, at:***.. vegna kæru um ætlaðar uppsagnir... verður hoyringsfreistin sett til 02.01.2006.***

Tað liggur greitt, at fráboðan tykkara um ætlaðu uppsagnirnar liggur í politisku ætlanini at flyta og tæga sundur stovnin. Út frá hesum boðaði Starvsmannafelagið Vinnumálaráðnum, Innlendismálaráðnum, løgmanni og Matrikulstovuni frá, at framferðahátturin ikki var í samsvari við sáttmálaásetingarnar, ml.a. var ætlaða broytingin ikki viðgjørd saman við álitisfólkunum.

At álitisfólk og starvsfólk fáa eina fráboðan um, at avgerðirnar eru tiknar, er als ikki í tráð við ásetingarnar í sáttmálanum, tí her verður greitt ásett. „*Tá avgerðandi broytingar verða gjørdar... skal starvsfólkið hava boð um hetta í góðari tíð fyri at fáa høvi til at vera við í tilrættaleggingini*".. Ein kunning uppá hvamsvís er sostatt ikki nøktandi!

Í skrivi frá Vinnumálaráðnum dagfest 29.11. 2005, -J.nr. 200500207/ 3-, verður ml.a sagt: „*At avgerð er tikin, at ongar broytingar verða gjørdar í sambandi við figgjarlógararbeiðið fyri 2006, og at*

*Matrikulstovan verður flutt í óbroyttum líki frá Vinnumálaráðnum til Innlendimálaráðið."* Og í ískoytis telduposti 30.11. verður hetta tikið uppaftur av Vinnumálaráðnum og lagt verður afturat, at stjórin á Matrikulstovuni hevur boðað frá, at ætlanin er at..*"styrkja stovnin fakliga"*, og er her tí talan um innanhýsis ætlanir, sum onki hava við ætlaðu flytingina og sundurtægingina av stovninum at gera.

Men í skrivi til Matrikulstovuna dagin eftir, – 01.12.2005, -J.nr.: 200500207/12 -, og sum Starvsmannafelagið hevur fingið innlit í, gerð Vinnumálaráðið stovninum heilt greitt ml.a.: *„Stovnurin skal tann 1. januar 2006 leggjast undir landsstýrismannin í innlendismálum, og tað er Matrikulstovuni kunnugt, at tað hevur verið umhugsað at gera ymsar bygnaðarligar broytingar í tí sambandinum. Ongar broytingar verða tó gjørdar áðrenn 1. januar. Í løtuni er óvist, hvørjar uppgávur stovnurin skal prioritera, og hvussu bygnaðurin verður í framtíðini, Vinnumálaráðið metir tí, at tað er óheppið, at tað nú beint áðrenn stovnurin verður fluttur, og áðrenn tað er meira greitt, hvørjar uppgávur stovnurin skal hava, og hvussu bygnaðurin verður í framtíðini, verða tiknar avgerðir, sum skerja handlimøguleikarnar, tá støða seinni skal takast til nevndu spurningar. Stjórin metir, at stovnurin leingi hevur verið undirmannaður serliga viðvíkjandi landmátarafakkunnleikanum.*

*Loysn av spurninginum eigur tí at tola at bíða, til støða seinni er tikin til uppgávur og bygnað hjá Matrikulstovuni uttan so, at tað eru tvingandi grundir at loysa málið nú."*

Samanumtikið er ongin ivi um, at ætlaðu uppsagnirnar hava verða bygdar á tað ætlaðu broytingina og sundurtægingina av stovninum, men sum nú heilt verða tiknar aftur av Vinnumálaráðnum, og sum samstundis beinleiðis mælir til at als ongar broytingar verða gjørdar yvirhøvir á stovninum, so leingi alt bygnaðarmálið og harav framtíðin hjá stovninum í verandi líki liggur í óvissuni.

At Matrikulstovan nú leggur upp til, at uppsagnirnar byggja á innanhýsis broytingar, hongur als ikki saman við niðurstøðuni hjá Vinnumálaráðnum og er harafturat als ikki viðgjørt á stovninum,

sum sáttmálaásetingin sigur skal fara fram, áðrenn nøkur ætlað broyting fer fram.

Eftir okkara meting, varð ætlanin at loysa ein innanhýsis (fakligan) spurning á Matrikulstovuni við øðrum grundgevingum, sum nú (í hvussu so er fyribils) ikki gerst veruleiki.

Tí er okkara niðurstøða, at ætlaðu uppsagnirnar eiga at verða afturtiknar, tí fortreytinar fyri teimum ikki eru bygdar á sakligar og haldgóðar grundgevingar."

Við skrivi, dagfest 1. jan. 2006, hevur H sent Matrikulstovuni hesar ískoytisviðmerkingar:

„Viðvíkjandi ætlanarskrivi tygara um uppsøgn dagf. 22.11.05 og uppískoyti viðv. tað sama dagf. 01.12.05, vil undirritaða við hesum vísa til skriv frá Starvsmannafelagnum til Matrikulstovuna att. M, stjóra, dagf. 22.12.05 og afturat tí, loyva mær fylgjandi viðmerkingar.

Undirritaða má byrja við, at eg aldri hevði ímyndað mær at eg, aftaná 32 ár í starvi á sama stovni, skuldi svara einum ætlanarskrivi um uppsøgn. Fyrst segðist orsøkin vera bygnaðarbroytingar, men er hettar nú broytt, til at fakliga støðið á stovninum skal styrkjast. Hettar hava vit skilt aftaná at vit gjøgnum Starvsmannafelagið hava fingið innlit í málið. Fyrra orsøkin kann als ikki góðtakast, tí sambært skrivi frá K, landsstýrismanni, til Starvsmannsafelagið dagf. 29.11.05, verður upplýst at avgerð er tikin um at ongar broytingar verða gjørdar í sambandi við fíggjarlógararbeiðið fyri 2006, og at Matrikulstovan verður flutt í óbroyttum líki frá Vinnumálaráðnum til Innlendismálaráðið.

Hóast seinna orsøkin ikki beinleiðis er kunngjørd okkum, tykist mær sera undranarvert at skula sigast úr starvi, av tí at fakliga støðið á stovninum skal styrkjast, tá ein hugsar um at stovnurin sjálvur hevur útbúgvið meg. Fyrst í 3 ár, á táverandi teknistovuni, sum matrikulteknari (soleiðis kallaðu tey tað, men í veruleikanum er hendan útbúgvingin ikki til og kann sostatt ikki brúkast nakra aðrastaðni). Har bað eg um at sleppa á skeið, men varð hettar

noktað, tí har skuldi ikki vera peningur til tess. Ætlaði so sjálv at taka kvøldskeið sum teknikari, men tað var als ikki væl sæð av leiðsluni, so eisini tað varð av ongum. Havi síðani fingið frálæru og verið á skeiðum í at gera og viðlíkahalda digital kort, sum eg so afturat havi arbeitt við í nógv ár.

Annars haldi eg at framferðarhátturin í sambandi við uppsagnirnar av okkum er sera løgin, og so himmalvítt frá áður sáttmálagjørdum avtalum og hvat annars er frætt, starvsfólkapolitikki hjá tí almenna viðvíkjandi. Her fari eg at loypa um at eg lá sjúk heima tá stjórin ringdi og segði seg ætla at siga meg úr starvi, og fara beint til tað ørkymlandi við ymisku grundgevingunum og signalunum ið eru givin. T.d. fekk ein okkara at vita, at um viðkomandi hevði hoyrt undir umsitingina og ikki kortdeildina hevði helst ikki verið neyðugt at siga viðkomandi úr starvi. Álvaratos, ein av okkum uppsøgdu hoyrir júst undir hesa somu umsiting!

Annars er ein heilt onnur tilgongd til málið alt tað tosið ið hevur verið í seinastuni, í øllum miðlunum, viðvíkjandi arbeiðsmøguleikunum hjá teimum veiku í samfelagnum, fólki við skerdum førleika og fólki í vardum starvi. Tað eru ikki meira enn 2-3 vikur síðani at hópurin av fólki innan almannaverkið, við landsstýrismanninum innan almannamál á odda, úttalaðu seg um, hvussu tað almenna mátti og skuldi ganga á odda, tá tað snúði seg um at fáa fólk við skerdum førleika í arbeiði. Í tí sambandi haldi eg tað vera **ógvuliga ræðandi**, tá hugt verður at hvørji vit 3 eru, ið ætlanin er at siga úr starvi: I, 60 ára gamal, við spastiskum lammilsum og uttan talumál, arbeiðir ½ tíð og verið starvssettur í 40 ár. G, 62 ára gamal, um at koma fyri seg aftur aftaná ein blóðtøpp í heilanum, starvssettur í 7 ár og H, 51 ára gomul, í vardum starvi orsaka av trigeminusneuralgii, har Almannastovan endurrindar 50% av lønini, starvssett í 32 ár.

**Eg meini so við, rættiligur starvsfólkapolitikkur mótvegis veikum og gomlum!**

Greitt er at vit sjálvandi einki kunna siga til at verða søgd úr starvi, um málið fyrst er viðgjørt og umrøtt sambært galdandi reglum og

avtalum, og at orsøkin tá ikki bert er „okkurt“ sum í bráðskundi er uppfunnið til høvið, men seriøst og veruliga grundað.

Hettar er lív og framtíð okkara tað snýr seg um. Og tá hugsað verður um at, hóast okkara veikleikar, er meðaltíðin vit 3 hava starvast á stovninum meira enn 26 ár, er hettar tað minsta vit mugu kunna krevja.“

Við skrivi, dagfest 1. jan. 2006, hevur G sent Matrikulstovuni soljóðandi ískoytisviðmerkingar:

„Í sambandi við, at Starvsmannafelagið hevur sent tær svarskriv viðvíkjandi ætlaðum uppsøgnum, vil undirritaði hervið eisini gera vart við mína ónøgd við framferðina í hesum máli.

Eftir mínum tykki var hon frá byrjan av óheppin og óneyðuga bondsk. At fáa boð um at fara heim alt í einum og uttan aðra ávaring henda mánamorgunin 22. nov. 2005 og innan fyri ein knappan tíma at skula rigga av og avhenda alt, sum hevði við mítt arbeiði fyri stovnin at gera, kendist bæði skelkandi og hartil særandi. Hetta var heldur ikki, sum formaðurin í Starvsmannafelagnum eisini hevur ført fram, á nakran hátt í samsvari við reglurnar, sum galda á hesum øki, t.d. at ætlaðar broytingar eiga at fráboðast **í góðari tíð**, og at:“Uppsøgd starvsfólk eiga -(í tann mun arbeiðsgevarin metir tað bera til) – **at fáa høvi til** at fara úr starvinum beinanvegin (ikki verða jagstrað!)

Undir øllum umstøðum er tað at undrast á, um tað almenna førir ein politikk, sum m.a. hevur til endamáls at „lúka burtur“ medarbeiðarar vegna aldur ella brek. Rationaliseringar kunnu metast at vera bæði skilagóðar og neyðugar; men hvat gjørdist av gyltu lyftunum um ein virðiligan og sømuligan eldrapolitikk, sum tekur atlit eisini til teirra, sum hóast tilkomnan aldur ella eitthvørt brek royna at geva sítt íkast til samfelagið á teimum ymisku arbeiðsplássunum.

Undirritaði vil við hesum brævi samstundis boða frá, at eg taki

fult undir við svarskrivinum frá Starvsmannafelagnum, dagfest 22.12.2006“

Við skrivi, dagfest 1. jan. 2006, hevur I sent Matrikulstovuni soljóðandi ískoytisviðmerkingar:

„I anledning af den modtagne skrivelse af 22. november 2005 vedrørende varslet opsigelse vil jeg hermed tillade mig følgende bemærkninger udover dem, der er kommet fra Starvsmannafelagið og øvrige kolleger, der ved samme lejlighed på voldsom måde blev gjort bekendt med opsigelsen.

Jeg har været ansat i Matrikulstovan i snart 40 år – de 40 år nås kort inden min eventuelle endelige opsigelse.

Stillingen var fuldtid, ikke „beskyttet“, og jeg imødekom af egen drift, at mit arbejdsområde blev ændret og gik derfor af egen drift bl.a. af denne årsag for nogle år siden ned på halv tid.

Jeg har passet sit arbejde samvittighedsfuldt alle årene og har haft meget få sygedage – de få, der var, kom på én gang i forbindelse med en lungebetændelse, hvor jeg arbejdede i flere dage trods sygdommen, men til sidst måtte give op.

Jeg har ikke ligget til last for Matrikulstovan eller samfundet, bor nu alene, har et stort hus at passe og vedligeholde, og har ikke umiddelbart mulighed for at ændre dette.

Jeg har – om nogen – haft grund til at søge invalidepension, men troede at jeg havde et livstidsarbejde, som jeg mente, jeg passede fuldt ud.

Mig bekendt har jeg således ikke fået klager over mit arbejde, og jeg har tilsvarende ikke fået tilbud om omskoling eller yderligere oplæring.

Min arbejdsdag er **fuldt optaget**, indholdsrig, og jeg er ked af ad omveje at høre, at én mand skal overtage arbejdet fra alle os, der er opsagt.

Jeg er også ked af at høre om de modsigende grunde til opsigelsen.

Vi fik først én grund: mindre personale på grund af sammenlægninger

Vi fik siden en ny grund: interne ændringer i Matrikulstovan.

Det øvrige personale fik åbenbart en helt anden grund: tvungne besparelser, og dette er jo slet ikke i tråd med indholdet i de skrivelser, vi har fået indsigt i.

Jeg vil anstændigvis gerne have den korrekte grund til opsigelsen.

Det er uhyre stødende at opleve at jeg, der i den grad pligtopfyldende og pålideligt har tjent Matrikulstovan i snart 40 år med fradrag af højst 14 dages sygdom, skal siges op, samtidig med at landsstyresmedlemmer for åben mikrofon meddeler, at netop offentlige kontorer, m.v. i større grad skal gå i front og gøre plads til folk, der ikke har fuld førlighed/gør fuld nytte.

Jeg har som bekendt ikke fuld førlighed, men jeg har af al magt forsøgt at passe mit arbejde og tjene Matrikulstovan.

Opsigelsesgrundene nævnt ovenfor har intet med førlighed at gøre, men jeg kan konstatere, at alle vi, der er opsagt, af forskellige årsager ikke har fuld førlighed.

Matrikulstovan's personale har i nogen grad erstattet min nærmeste familie, der er væsentlig indskrænket de seneste år.

Således har personalet også i flere tilfælde hjulpet mig, når det er nødvendigt med f.eks. telefonisk henvendelse for tilkaldelse af hjælp af diverse art, dog uden at jeg af den grund er en byrde for det øvrige personale.

Jeg har omvendt søgt at takke ved socialt samvær udenfor arbejdstid, budt ind ved mine runde dage, ligesom mit hjem har stået åbent for dem, der havde lyst at komme.

Matrikulstovan er i dag mit liv.
Eller måske rettere var.
Matrikulstovan gav mit liv indhold.

Jeg er netop blevet 60 år gammel og har ingen mulighed for at få andet arbejde.

På grund af mine handikap har jeg et meget begrænset liv udenfor mit arbejde og anmoder om at opsigelsen ikke bliver effektueret – ikke på grund af mit handikap, men fordi jeg mener at jeg gør nytte, også ved en fremtidig sammenlægning med andre institutioner."

Við skrivi, dagfest 4. jan. 2006, hevur Matrikulstovan latið teimum trimum starvsfólkunum soljóðandi uppsøgn (skrivini eru einsljóðandi burtursæð frá uppsagnartíðini):

„**Uppsagnarskriv.**
Undirritaði hevur móttikið skriv tygara, dagfest 1. januar 2006, sum er aftursvar til ætlanarskrivið frá 22. nov. 2005 og uppískoytisskrivið frá 1. des. 2005, bæði skrivini frá Matrikulstovuni um ætlanina, um at siga tygum úr starvi. Felag tygara hevur eisini latið Matrikulstovuni mótmæli í málinum í skrivi, dagfest 22. des. 2005.

Umrøddu mótmælisskriv eru viðgjørd, og broyta ikki ætlanirnar, um at siga tygum úr starvi við teirri freist sum galdandi sáttmáli veitir tygum. Sambært okkara upplýsingum eiga tygum 6 mánaðir frá 1. feb. 2006 at rokna. Herumframt eiga tygum frítíðarískoyti og frítíðarløn sambært galdandi sáttmála og/ella galdandi lóg á hesum øki.

Tygum eru fríttstillað í uppsagnartíðini, tó so at onnur lønarinntøka verður at mótrokna sambært galdandi reglum (minimumserstatningsreglen).

Orsøkin til uppsøgnina er tann, sum leiðsla stovnsins hevur greitt frá, og sum stendur í ætlanarskrivinum frá 22. nov. 2005, soleiðis at innanhýsis broytingar (bygnaðarbroytingar) ella tillagingar verða gjørdar á stovninum, ið koma at viðføra færri starvsfólk í tygara starvsbólki.

Vegna Matrikulstovuna skal eg nýta høvi at takka tygum fyri tíðina, tygum hava arbeitt her og ynskja tygum góðan byrð."

Við skrivi, dagfest 11. jan. 2006, hevur Starvsmannafelagið sent Matrikulstovuni avrit av kæru, ið er send Vinnumálaráðnum, Innlendismálaráðnum og Fíggjarmálaráðnum, og er soljóðandi:

> **„Kæra um framferðina hjá stjóranum á Matrikulstovuni og um uppsagnir, sum hann hevur sett í verk.**
> Við hesum skal Starvsmannafelagið seta fram kæru um stjóran á Matrikulstovuni fyri á ósakligum grundarlagi og ímóti áheitan frá landsstýrismanninum í Vinnumálum at hava sagt trimum starvsfólkum úr starvi.
>
> Í sambandi við ætlaða yvirskipaða umlegging, sum Matrikulstovan skuldi vera partur av, sendi stjórin 22. november 2005 trimum starvsfólkum ætlanarskriv um uppsøgn vegna bygnaðarbroytingar. Avrit av ætlanarskrivunum vóru send Starvsmannafelagnum.
>
> Ætlanarskrivini eru viðløgd hesi kæru sum ***skjal 1, 2 og 3***.
>
> Tann 25. november skrivaði felagið Vinnumálaráðnum bræv um uppsagnarætlanina og mótmælti henni. Brævið varð í avriti sent, Løgmansskrivstovuni, Innlendismálaráðnum og Matrikulstovuni.
>
> Bræv felagsins til Vinnumálaráðið er lagt við hesi kæra sum ***skjal 4***.
>
> Vinnumálaráðið svaraði brævi felagsins við skrivi dagfest 29. november 2005, har sagt verður frá, at ongar bygnaðarbroytingar verða framdar á Matrikulstovuni í fíggjarárinum 2006.
>
> Svarbrævið frá Vinnumálaráðnum til Starvsmannafelagið er lagt við hesi kæru sum ***skjal 5***.
>
> Vinnumálaráðið skrivar eisini Matrikulstovuni bræv, dagfest 1. desember 2005 um uppsagnarætlanina. Tað framgongur greitt av brævi ráðsins til Matrikulstovuna, at ráðið metir, at uppsagnarætlan stjórans eigur at bíða.

Brævið frá Vinnumálaráðnum til Matrikulstovuna er lagt við hesi kæru sum ***skjal 6***.

Starvsmannafelagið skal eftir galdandi sáttmála, – §6 -, hoyrast um allar ætlaðar uppsagnir, og felagið hevur gjørt sínar viðmerkingar í skrivi dagfest 22. desember 2005. Legg til merkis, at Starvsmannafelagið m.a. staðiliga vísir til áheitan landsstýrismansins til Matrikulstovuna um at bíða við at fremja uppsagnarætlanina.

Viðmerkingarnar frá Starvsmannafelagnum til tær ætlaðu uppsagnirnar eru lagdar við hesi kæru sum ***skjal 7***.

Tey nú uppsøgdu starvsfólkini hava hvør sær latið Matrikulstovuni sínar viðmerkingar til ætlanarskrivið. Hesi brøv eru øll dagfest 1. januar 2006.

Viðmerkingarnar frá teimum uppsøgdu starvsfólkunum eru lagdar hesi kæru sum ***skjal 8, 9 og 10***.

Hóast hetta verða tey trý starvsfólkini uppsøgd við skrivi dagfest 4. januar 2006. Orsøkin til uppsagnirnar er nú „...innanhýsis broytingar (bygnaðarbroytingar) ella tillagingar...“.

Uppsagnarskrivini eru løgd við hesi kæru sum ***skjal 11,12 og 13***.

---

Vegna felagið sjálvt og okkara nevndu uppsøgdu á Matrikulstovuni kæra vit um

- **at stjórin á Matrikulstovuni gongur ímóti áheitanini frá avvarðandi landsstýrismanni um ikki at fremja uppsagnirnar**
- at stjórin á Matrikulstovuni við skrivinum 4. januar 2006 hevur sagt teimum trimum upp við heilt aðrari grundgeving, enn tey fingu til hoyringar í ætlanarskrivi hansara 22. november 2005
- at tey trý og felagið tískil í veruleikanum als ikki eru hoyrd um ta framdu uppsøgnina

- og at uppsagnirnar vegna brot á hoyringsskylduna tískil ikki hava gildi

Vit heita á tann landsstýrismann, sum varar av Matrikulstovuni og á Fíggjarmálaráðið um at viðgera hesa kæru, seta stjóran upp á pláss og at ógilda uppsagnirnar.

Avrit er eisini sent til Matrikulstovuna, álitismannin B, H, I og G."

Við skrivi, dagfest 26. jan. 2006, hevur Innlendismálaráðið sent H soljóðandi fráboðan:

„Góða H
Innlendismálaráðið móttók 1. januar 2006 rúgvismikið tilfar frá tygum viðvíkjandi ætlaðu uppsøgnunum á Matrikulstovuni. Tygum vísa á, at tygum vóna tað fær positiva ávirkan. Eisini hevur ráðið móttikið skriv frá Starvsmannafelagnum viðvíkjandi tygara uppsøgn.

Sum tygum vita, so er Matrikulstovan, frá 1. januar í ár, flutt undir málsøkið hjá Innlendis-málaráðnum. Í ætlanarskrivinum frá stjóranum á Matrikulstovuni til tygum framgongur, at ætlaða uppsøgnin er grundgivin við, at „uppgávur stovnsins frameftir verða broyttar í sambandi við bygnaðarbroytingar, sum stovnurin skal fremja". Innlendismálaráðið hevur í hesum sambandi tosað við stjóran og er tað okkum m.a. upplýst, at stovninum tørvar landmátingarførleika og at fíggjarliga støðan ger tað neyðugt at siga fólki upp fyri at fremja neyðugar broytingar í starvssamansetingini. Hetta er ein avgerð, sum stjórin á Matikulstovuni hevur heimild at taka fyri at røkka endamálinum við bygnaðarbroytingunum.

Tað er tó at harmast um, at tað tykist sum at tað eru tey veikast settu, sum eru harðast rakt av avgerðini. Eisini harmist eg um, at vit ikki í nóg stóran mun megna at geva fólki við skerdum førleika javnbjóðis møguleikar á arbeiðsmarknaðinum.

> At enda verður víst á, at svarskriv verður sent Starvsmannafelagnum ein av fyrstu døgunum.“

Við skrivi, dagfest 26. jan. 2006, hevur Innlendismálaráðið sent G soljóðandi fráboðan:

> „Góði G,
> Tað harmar meg at frætta, at stjórin á Matrikulstovuni hevur sagt tygum úr starvi. Í brævið dagfest 1. januar í ár til Innlendismálaráðið gera tygum vart við tygara ónøgd við framferðina hjá stjóranum í sambandi við, at ætlanarskriv um uppsøgn varð handað tygum 22. nov. 2005. Tygum fýlast á framferðarhátt stjórans við tað at boð vórðu givin um, at tygum skuldi rigga av innanfyri ein tíma og síðani fara til hús. Eisini hevur ráðið móttikið skriv frá Starvsmannafelagnum viðvíkjandi tygara uppsøgn.
>
> Sum tygum vita, so er Matrikulstovan, frá 1. januar í ár, flutt undir málsøkið hjá Innlendis-málaráðnum og er sjálvt ætlanarskrivið tí sent tygum meðan stovnurin enn vísti til Vinnu-málaráðið. Hetta meti eg tó ikki sum nakra forðing fyri at viðgera tygara skriv til Innlendismálaráðið, eftirsum virknaðurin av ætlanarskrivinum røkkur inn í ár 2006.
>
> Tað framgongur greitt í ætlanarskrivinum, at tygum varð fríttstillaður í uppsagnartíðini. At stjórin hevur givið tygum boð um at avrigga arbeiðið og arbeiðsplássið innan ein tíma tykist heldur bráfýsið. Spurdur um framferðarháttin hevur stjórin upplýst, at tygum fingu í boði at koma aftur seinni at rigga av og at tygum gjørdi brúk av tí møguleikanum.
>
> Eg harmist um framferðarháttin tygum hava verið fyri í sambandi við uppsøgnina. Hinvegin má eg ásanna, at uppsøgnin er framd í sambandi við, at neyðugt er at gera broytingar í starvssamansetingini á Matrikulstovuni og tí fái eg ikki gjørt meira við málið. At enda verður víst á, at svarskriv verður sent Starvsmannafelagnum ein av fyrstu døgunum.“

Við skrivi, dagfest 26. jan. 2006, hevur Innlendismálaráðið sent I soljóðandi fráboðan:

> „Góði I
> Tað harmar meg at frætta um støðu tygara nú stjórin á Matrikulstovuni hevur sagt tygum úr starvi, hóast tygum við nærlagni hava røkt starvið í meira enn ein mansaldur.
>
> Í brævi dagfest 2. januar í ár heita tygum á meg um at hjálpa tygum, so at tygum ikki missa starvið. Eisini hevur ráðið móttikið skriv frá Starvsmannafelagnum viðvíkjandi tygara uppsøgn. Tíverri má eg staðfesta, at eg ikki fáið hjálpt tygum hesum viðvíkjandi.
>
> Sum tygum vita, so er Matrikulstovan, frá 1. januar í ár, flutt undir málsøkið hjá Innlendis-málaráðnum. Í ætlanarskrivinum frá stjóranum á Matrikulstovuni til tygum framgongur, at ætlaða uppsøgnin er grundgivin við, at „uppgávur stovnsins frameftir verða broyttar í sambandi við bygnaðarbroytingar, sum stovnurin skal fremja". Innlendismálaráðið hevur í hesum sambandi tosað við stjóran og er tað okkum m.a. upplýst, at stovninum tørvar landmátingarførleika og at fíggjarliga støðan ger tað neyðugt at siga fólki upp fyri at fremja neyðugar broytingar í starvssamansetingini. Hetta er ein avgerð, sum stjórin á Matrikulstovuni hevur heimild at taka fyri at røkka endamálinum við bygnaðarbroytingunum.
>
> Tað er tó at harmast um, at tað tykist sum at tað eru tey veikast settu, sum eru harðast rakt av avgerðini. Eisini harmist eg um, at vit ikki í nóg stóran mun megna at geva fólki við skerdum førleika javnbjóðis møguleikar á arbeiðsmarknaðinum. At enda verður víst á, at svarskriv verður sent Starvsmannafelagnum ein av fyrstu døgunum."

Við skrivi, dagfest 26. jan. 2006, hevur Innlendismálaráðið svarað kæruni frá Starvsmannafelagnum soleiðis:

> **„Viðvíkjandi kæru Starvsmannafelagsins um framferðina hjá**

**stjóranum á Matrikulstovuni og um uppsagnir, sum stjórin hevur sett í verk**
Í brævið til landsstýrismannin í innlendismálum, dagfest 11.01.2006, kærir Starvsmannafelagið framferðina hjá stjóranum á Matrikulstovuni og tríggjar uppsagnir, sum stjórin hevur sett í verk við skrivi dagfest 4. januar 2006.

Felagið kærir,

1. at stjórin á Matrikulstovuni gongur ímóti áheitanini frá avvarðandi landsstýrismanni um ikki at fremja uppsagnirnar,
2. at stjórin á Matrikulstovuni við skrivinum 4. januar 2006 hevur sagt teimum trimum upp við heilt aðrari grundgeving, enn tey fingu til hoyringar í ætlanarskrivi hansara 22. november 2005,
3. at tey trý og felagið tískil í veruleikanum als ikki eru hoyrd um tað framdu uppsøgnina, og
4. at uppsagnirnar vegna brot á hoyringsskylduna tískil ikki hava gildi

**Til kærupunkt 1**
Sum kunnugt er Matrikulstovan frá 1. januar 2006 flutt undir málsøkið hjá landsstýrismanninum í innlendismálum. Hetta merkir, at ætlanarskrivini um uppsagnirnar vórðu send út meðan Matrikulstovan enn vísti til landsstýrismannin í vinnumálum, meðan uppsagnirnar vórðu settar í verk, nú Matrikulstovan vísir til landsstýrismannin í innlendismálum.

Gjørt verður vart við, at landsstýrismenninir eru javnstillaðir og kann ein landsstýrismaður tí ikki seta seg yvir viðgerðir og avgerðir hjá øðrum landsstýrismanni. Her verður víst til løgmann og eftirlitsheimildir hansara sambært stýrisskipanarlógini.

Starvsmannafelagið førir fram, at uppsagnirnar ganga ímóti áheitanini frá avvarðandi landsstýrismanni, í hesum førum landsstýrismanninum í vinnumálum, og vísir til brøv frá Vinnumálaráðnum til felagið og Matrikulstovuna dagfest ávikavist 25.11.2005 og 1.12.2005. Felagið

førir fram, at Vinnumálaráðið í nevnda brævið hevur ført fram, „at ongar bygnaðarbroytingar verða framdar á Matrikulstovuni í fíggjarárinum 2006.“

Ein nærlestur av brævinum frá Vinnumálaráðnum til Starvsmannafelagið vísir, at fatanin hjá Starvsmannafelagnum byggir á orðini „Avgerð er tikin um, at ongar broytingar verða gjørdar í sambandi við fíggjarlógararbeiðið fyri 2006, ....“ Fíggjarlógararbeiðið og fíggjarárið 2006 er hvør sítt. Eisini eru fíggjarlógartekniskar broytingar og bygnaðarbroytingar hvør sítt. Tað, at víst verður til, at ongar broytingar verða gjørdar í sambandi við fíggjarlógararbeiðið fyri 2006 merkir, at Matrikulstovan, í óbroyttum (fíggjarligum) líki, varð flutt inn undir játtanina hjá landsstýrismanninum í innlendismálum pr. 1. januar 2006.

Eftir stendur, at fíggjarárið 2006 er byrjað og heimildirnr hjá landsstýrismanninum í vinnumálum mótvegis Matrikulstovuni endaðu pr. 1. januar 2006 samstundist sum Matrikulstovan er flutt undir landsstýrismannin í innlendismálum.

Innlendismálaráðið staðfestir eisini, at ætlanarskrivini vórðu send út 22.11.2005 og er tað eina góða viku áðrenn brævið við áheitanini um at bíða við møguligari uppsøgn varð send Matrikulstovuni frá Vinnumálaráðnum. Innlendismálaráðið metir ikki at áheitanin frá Vinnumálaráðnum í sjálvum sær hevur ella eigur at hava týdning fyri málið, tí talan varð um eina áheitan og tí, at ætlanarskrivini longu vóru komin fram til starvsfólkini. Avgerðin um uppsøgn varð tikin og fráboðað 4. januar 2006, eftir at starvsfólkini fyrst vórðu partshoyrd og Starvsmannafelagið fráboðað, soleiðis sum fyriskrivað er.

Niðurstøðan er, at Innlendismálaráðið ikki metir, at stjórin treytaleyst hevði skyldu til at fylgja áheitanini frá Vinnumálaráðnum, tí talan var um eina áheitan og ikki eini boð, og at áheitanin ikki eigur at hava týdning fyri málið, m.a. tí at uppsagnirnar ikki vórðu framdar í verki fyrr enn 4. januar 2006.

**Til kærupunkt 2**
Tað framgongur av skjølunum í málinum, at sambært ætlanarskrivinum varð grundgevingin fyri ætlaðu uppsagnunum, „at uppgávur stovnsins frameftir verða broyttar í sambandi við bygnaðarbroytingar, sum stovnurin skal fremja“ og sambært uppsagnarskrivinum er orsøkin, „at innanhýsis broytingar (bygnaðarbroytingar) ella tillagingar verða gjørdar á stovninum, ið koma at viðføra færri starvsfólk í tygara starvsbólki.“

At grundgevingin fyri uppsagnini er meira ítøkilig enn í ætlanarskrivinum er ikki óvanligt. Partshoyringin, og tíðin sum verður sett av til partshoyring, er við til at gera málið búgvið til endaliga støðutakan. Soleiðis sær tað eisini út til at vera í hesum førinum. Bæði Vinnumálaráðið og Innlendismálaráðið hava fingið upplýst frá Matrikulstovuni, at stovnurin hevur verið undirmannaður og at broytingar máttu gerast í starvssamansetingini. Hetta er ein avgerð, sum stjórin á Matrikulstovuni hevur heimild at taka fyri at røkka endamálinum hjá stovninum, og kann eg sum landsstýrismaður ikki leggja meg út í tað. At játtanin ikki loyvir slíkari umlegging uttan at fólk samstundis verða uppsøgd er harmiligt, serliga tá tað vísir seg, at tað eru tey veikast settu, sum eru harðast rakt av avgerðini.

**Til kærupunkt 3**
Vísandi til svarið av kærupunkti 1 og 2 omanfyri er greitt, at bæði felagið og partarnar eru hoyrdir soleiðis sum teir eiga at verða tað eftir galdandi sáttmála og lógum.

**Til kærupunkt 4**
Víst verður enn einaferð til grundgevingarnar til kærupunkt 1, 2 og 3.

**Niðurstøða**
Mett verður ikki at grundarlag er fyri at umgera, ógilda ella á annan hátt taka aftur avgerðina hjá stjóranum á Matrikulstovuni um at siga trimum fólkunum úr starvi vegna bygnaðarbroytingar á stovninum.

Tað er tó at harmast um, at tað tykist sum at tað eru tey veikast settu, sum eru harðast rakt av avgerðini. Eisini harmist eg um, at vit ikki í nóg stóran mun megna at geva fólki við skerdum førleika javnbjóðis møguleikar á almenna arbeiðsmarknaðinum.“

Við skrivi, dagfest 22. febr. 2006, hevur Innlendismálaráðið biðið Matrikulstovuna um eina frágreiðing. Skrivið er soljóðandi:

„**Frágreiðing um uppsagnarmálini framd í januar 2006**

Góði M,
Løgmaður hevur sambært § 33, stk. 3 í stýrisskipanarlógini heitt á meg um at eftirkanna, hvørt uppsagnirnar, sum vórðu framdar á Matrikulstovuni um ársskiftið, eru lógligar, t.e. um tær

- lúka tey formligu krøvini, lóggávan setur
- lúka tær treytir, sáttmálar á økinum seta
- eru sakligar, t.e. um haldast má, at uppsagnirnar byggja á tær grundgevingar, sum givnar eru, og um hesar grundgevingar eru lógligar.

Eg fari at heita á Matrikulstovuna um at koma við einari fullfíggjaðari frágreiðing um málið í seinasta lagi <u>17. mars 2006</u>. Frágreiðingina ætli eg at lata avvarðandi partar í málinum til hoyringar, áðrenn eg taki endaliga støðu til, um eg meti hetta málið hevur verið umsitið fullgott sambært § 33 í stýrisskipanarlógini.“

Við skrivi, dagfest 6. mars 2006, hevur Matrikulstovan latið Innlendismálaráðnum soljóðandi frágreiðing um málið:

„**Viðvíkjandi skrivi tygara, dagfest 22. feb. 2006, mál 1600-054/05-37, um frágreiðing um uppsagnarmál framd í januar 2006.**

Vísandi til omanfyri nevnda skriv tygara verður biðið um svar viðvíkjandi fylgjandi viðurskiftum í sambandi við umrøddu uppsagnir:

1) Eru tey formligu krøvini fylgd
2) Eru sáttmálar o.l. á økinum hildnir

3) Eru grundgevingarnar haldbarar og lógligar

Eg skal eftir førimuni royna at greiða frá málinum og leggja við tey skjøl, sum hoyra til málið.

Ad 1:
Her verður ivaleyst hugsað um ta lóggávu og onnur formlig viðurskifti, sum eru galdandi í sambandi við eina uppsøgn hjá einum almennum stovni. Í hesum sambandi verður fyrst og fremst hugsað um § 18 í Løgtingslóg um fyrisiting frá 1993, sum fyriskrivar, at tann sum verður raktur av avgerðini, skal hava høvi at ummæla ætlaðu avgerðina. Henda sera týðandi regla er hildin.

Ummælisfreistin varð longd, tá ið tað kom upp, at ivi var um innhaldið í grundgevingini.

Ad 2:
Tey uppsøgdu starvsfólkini eru limir í Starvsmannafelagnum og tí vard av § 6, stk. 4, í sáttmálanum við Fíggjarmálaráðið umframt reglurnar um uppsagnarløn og frítíðarløn/frítíðarískoyti.

Í málinum sæst, at Starvsmannafelagið skiftir sjónarmið undir málsgongdini. Í skrivi, dagfest 25. nov. 2005, til Matrikulstovuna, ger felagið galdandi, at fylgjandi ásetingar á sáttmálanum ikki eru hildnar „§ 2, stk. 1 og 2 og § 3, stk. 7.“

Í skrivi, dagfest 22. des. 2005, verður gjørt galdandi, at „Eftir okkara meting, varð ætlanin at loysa ein innhýsis (fakligan) spurning á Matrikulstovuni við øðrum grundgevingum, sum nú (í hvussu so er fyribils) ikki gerst veruleiki.“ Og til seinast skriv, dagfest 11. jan. 2006, til Vinnumálaráðið, Innlendismálaráðið og Fíggjarmálaráðið, ger felagið m.a. galdandi, at „uppsagnirnar vegna brot á hoyringsskylduna tískil ikki hava gildi“, tí „at stjórin á Matrikulstovuni við skrivinum 4. jan. 2006 hevur sagt teimum trimum upp við heilt aðrari grundgeving, enn tey fingu til hoyringar í ætlanarskrivi hansara 22. november 2005.“

Samanumtikið ger Starvsmannafelagið galdandi, at talan var um

„skindbegrundelse," og at tey 3 starvsfólkini als ikki eru hoyrd í sambandi við uppsøgnina.

Undirritaði heldur fast við, at grundgevingin, sum varð givin í ætlanarskrivunum 22. nov. 2005 varð gjølligari lýst í samskiftinum við Starvsmannafelagið, álitisfólk felagsins og starvsfólkunum annars á stovninum. Hetta hendi samstundis sum ummælisfreistin varð longd til 2. jan. 2006. Í ummælisskrivunum eftir tað longdu freistina er eingin ivi um, at bæði felagið og tey 3 uppsøgdu høvdu skilt grundgevingarnar, og tískil eru tey hoyrd til fulnar.

Viðvíkjandi spurninginum um „skindbegrundelse" er at siga, at eg kann bara endurtaka orsøkirnar til uppsagnirnar og halda fast við, at talan er um sakligar og lógarligar orsøkir. Starvsmannafelagið kann ikki meina, at tey 3 fólkini vóru uppsøgd, tí tey onkursvegna bóru brek. Tilík skuldseting er burturvið og ikki verd eina viðmerking.

Ad 3:
Orsøkin til uppsagnirnar vóru bygnaðarbroytingar, sum vóru neyðugar til tess at styrkja fakliga førleikan á stovninum – serliga við atliti til útskiftingar og í sambandi við roknskap, men tá ið ætlanarskrivini vóru orðað og send út, ráddi eisini tann „yvirskipaði" trupulleikin, at stovnurin skuldi skerjast munandi, tí at kortgerð og uppmáling í hesum sambandi skuldi vera eftir í Vinnumálaráðnum. Eftir at Starvsmannafelagið kærdi ætlaðu uppsagnirnar í skrivi til Vinnumálaráðið tann 25. nov. 2005, tók Vinnumálaráðið sínar ætlanir um skerjing av stovnsvirkseminum aftur, sí skrivið dagfest 29. nov. 2005 til Starvsmannafelagið. Henda nýggja støðan gjørdi, at uppsagnargrundin fyri felagnum og teimum uppsøgdu tyktist at vera burtur, men so var ikki, tí mín uppfatan og meining við hugtakinum „bygnaðarbroytingar" fevndi eisini um innanhýsis bygnaðarbroytingar ella tillagingar – og hesum gjørdi eg eisini Starvsmannafelagnum greitt samstundis sum eg valdi at leingja ummælisfreistina til 2. jan. 2006.

Grundað á, at eingin misskiljing skuldi stinga seg upp, avgjørdi eg at leingja ummælisfreistina, soleiðis at Starvsmannafelagið eins og

viðkomandi limir tess skuldu fáa høvi at gera viðmerkingar til ta røttu grundgevingina. Tað sæst eisini týðuliga á ummælunum, sum seinni komu, at móttakararnir hava skilt innihaldið í grundgevingini.

Formaðurin í Starvsmannafelagnum meinti, at grundarlagið undir uppsøgnunum var burtur, eftir at Vinnumálaráðið ikki longur helt fast við bygnaðarbroytingar. Samskiftið í málinum var ímillum undirritaða og Starvsmannafelagið, og undirritaði metti, at neyðugt var at leingja ummælisfreistina, tí møguliga kundi grundgevingin misskiljast, soleiðis at bara tær stóru bygnaðarbroytingar lógu til grund fyri uppsagnunum (spurningurin um uttanhýsis mótvegis innanhýsis bygnaðarbroytingum). Být merki í, at í ætlanarskrivinum stendur hvørki uttanhýsis- ella innanhýsis bygnaðarbroytingar, men einans bygnaðarbroytingar. Í báðum førum hevði avleiðingin verið, at færri starvsfólk fóru at vera eftir, sí skriv mítt til Vinnumálaráðið, dagfest 6. des. 2005.

<u>Almennar viðmerkingar:</u>
Eftirfylgjandi ber altíð til at finna lýti ella mistøk, men eingin ivi er um, at bæði Starvsmannafelagið, tey uppsøgdu og starvsfólkini á stovninum vistu ella áttu at vita, at broytingar vóru ávegis, og at tvídrátturin um, hvørt talan var um uttanhýsis- og/ella innanhýsis bygnaðarbroytingar ella bara „broytingar" ger ongan mun í samlaðu myndini. Starvsfólk stovnsins og álitisfólk Starvsmannafelagsins hava fingið kunning um øll viðurskifti, sum hava við uppsagnarmálið at gera.

Alt í alt dugi eg ikki at síggja, at grundgevingin hevur verið óhaldbar ella ósaklig á nakran hátt. Tiskil er alt fari lógliga fram.

Í fjølmiðlunum hevur uppsagnarmálið verið nógv merkt av, at tey 3 starvsfólkini hava verið skerd í sínum vinnumøguleikum vegna brek og tí hevur verið talan um sokallað vard størv. Av teimum 3 umrøddu starvsfólkunum, er talan um, at eitt teirra var í hálvum vardum starvi. Annars er at siga, at ongar reglur eru í lóg ella kunngerð sambært lóg, ið veita tílíkum starvsfólki tryggari setan enn øðrum starvsfólkum, og at Matrikulstovan fyrst og fremst má

raðfesta at loysa sínar lógaráløgdu skyldur og uppgávur, áðrenn onnur og veikari fyrilit skulu fylgjast.

Upplýsast skal, at stovnurin hevur í løtuni 6% av arbeiðsmegini undir vardum starvi, meðan hetta lutfall var 12% undan uppsøgnunum. Hvussu lutfallið er millum vanlig størv og vard størv á øðrum almennum stovnum, havi eg ikki beinleiðis kunnleika til, men mín varhugi er, at støðan á Matrikulstovuni er í betra endanum.

Niðurstøða:
Eg meti, at alt er farið rætt og lógliga fram."

Við skrivi, dagfest 21. mars 2006, hevur N eftir áheitan frá Innlendismálaráðnum latið ráðnum eina meting av málinum. Í frágreiðingini stendur m.a.:

„**Uppsagnir á Matrikulstovuni**
Innlendismálaráðið (hereftir IMR) hevur heitt á meg um at ganga ígjøgnum og meta um alt málið um uppsagnir, 4. januar 2006, av trimum starvsfólkum á Matrikulstovuni (hereftir MS).

Áheitanin byggir m.a. á skriv frá løgmanni, dagfest 13. februar 2006, har løgmaður sambært stýrisskipanarlógini § 33, stk. 3, spyr B, landsstýrismann í innlendismálum, um hann hevur eftirkannað, hvørt uppsagnirnar eru lógligar t.e. um tær

- lúka tey formligu krøvini, lóggávan setur
- lúka tær treytir, sáttmálar á økinum seta
- eru sakligar t.e. um haldast má, at uppsagnirnar byggja á tær grundgevingar, sum givnar eru, og um hesar grundgevingar eru lógligar.

Innlendismálaráðharrin verður at enda spurdur um hann metir, at MS hevur umsitið hettar málið fullgott sambært stýrisskipanarlógini § 33.

...

**Viðgerð**
Mín viðgerð av hesum málið verður skipað, sum svar uppá nevndu

spurningar løgmans til B, landsstýrismann í innlendismálum, um hann hevur „eftirkannað, hvørt uppsagnirnar eru lógligar t.e. um tær

- lúka tey formligu krøvini, lóggávan setur
- lúka tær treytir, sáttmálar á økinum seta
- eru sakligar t.e. um haldast má, at uppsagnirnar byggja á tær grundgevingar, sum givnar eru, og um hesar grundgevingar eru lógligar.

Innlendismálaráðharrin verður at enda spurdur um hann metir, at MS hevur umsitið hettar málið fullgott sambært stýrisskipanarlógini § 33.“

...

*Samanumtøka*

Grundgevingin fyri uppsagnunum á MS hevur alla tíðina verið „bygnaðarbroytinar“. Eitt av uppsagdu starvsfólkunum, álitisfólkið á MS og Starvsmannafelagið hava ført fram at grundgevingarnar upprunaliga vóru uttanhýsis bygnaðarbroytingar. Starvsmannafelagið hevur haraftrat ført fram, at eftir at VMR seint í november 2005 slepti síni ætlan at leggja part av MS saman við Landsverk, broyttist grundgevingin hjá MS til at verða innanhýsis bygnaðarbroytingar, soleiðis at talan her er um nýggja grundgeving. Stjórin á MS heldur hinvegin fast í, at grundgevingin alla tíðina eisini var innanhýsis broytingar.

Tað er eingin ivi um, at aðalgrundgevingin alla tíðina hevur verið „bygnaðarbroytingar. Í ósemjuni um ávíkavist „innanhýsis“ og „uttanhýsis“ er talan um orð móti orði. Eg meti tó ikki at ójavna uppfatanin av júst hesum spurningi, hevur avgerðandi týdning í málinum. Hetta fyri tað fyrsta tí, at aðalgrundgevingin „bygnaðarbroytingar“ alla tíðina hevur verið hin sama, nevniliga „bygnaðarbroytingar“. Harnæst eisini tí, at tey 3 starvsfólkini, saman við Starvsmannafelagnum, fingu eina longda hoyringsfreist, við tí útgreinaðu grundgevingini, eftir at leiðslan á MS gjørdist varug við, hvussu uppsagnar grundgevingin varð fatað. Misskiljingin varð rættað beinanvegin.

Stjórin á MS hevur í skrivi til IMR, dagfest 7. mars 2006 gjørt vart við, at bygnaðarbroytingarnar ítøkiliga skyldast bygnaðarbroytingar, sum vóru neyðugar til tess at styrkja fakliga førleikan á stovninum – serliga við atliti til útskiftingar og í sambandi við roknskap. Bygnaðarbroytingar eru í sjálvum sær, eftir vanliga setanarrættinum, ein lóglig grundgeving fyri at siga starvsfólki úr starvi.

Eg meti tí samanumtikið, at uppsagnirnar mugu metast at verða sakligar, t.e. at uppsagnirnar byggja á tær grundgevingar, sum givnar eru, og at hesar grundgevingar eru lógligar.

***4. Metir innlendismálaráðharrin, at MS hevur umsitið hettar málið fullgott sambært stýrisskipanarlógini § 33.***

Sum tað gongur fram, av svarunum undir pkt. 1-3 omanfyri, er lóggávan hildin, burtursæð frá § 7, stk. 2 í fyrisitingarlógini, um skylduna hjá almennum myndugleikum at víðarisenda boð til rætta myndugleika. Hesa áseting hava hvørki MS, VMR, IMR, Løgmansskrivstovan ella Almanna- og Heilsumálaráðið hildið.

Viðvíkjandi teimum treytum sum sáttmálar á økinum seta, kann sigast, at í mun til:

- *uppsagnirnar av 3 starvsfólkum* hevur alt gingið rætt fyri seg, burtursæð frá at leiðslan á MS ikki hevur hildið ásetingina í § 3, stk. 7 í sáttmálanum millum Starvsmannafelagið og FMR.
- *Bygnaðarbroytingarnar*, hevur MS ikki lokið ásetingarnar í § 2, stk. 1 og 2 í sáttmálanum millum Starvsmannafelagið og FMR.

Grundgevingin fyri uppsagnunum eru eftir mínum tykki sakligar, t.e. at uppsagnirnar byggja á tær grundgevingar, sum givnar eru, og at hesar grundgevingar eru lógligar.

Við hesum vóni eg, at landsstýrismaðurin hevur fingið eitt haldgott grundarlag, at meta um MS hevur umsitið hetta málið fullgott eftir § 33 í stýrisskipanarlógini."

**Partshoyring**
Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og við skrivi, dagfest 1. mars 2006, varð klagan send Innlendismálaráðnum til ummælis. Hetta varð gjørt, tí at Innlendismálaráðið hevði viðgjørt málið sum eitt kærumál, og hevði staðfest avgerðina hjá Matrikulstovuni.

Við skrivi, dagfest 30. mars 2006, hevur Innlendismálaráðið greitt umboðsmanninum soleiðis frá málinum:

> **„Frágreiðing og skjøl til umboðsmannin viðvíkjandi málinum um uppsagnirnar á Matrikulstovuni, sum vórðu framdar 4. januar 2006**
> Innlendismálaráðið móttók 2. mars 2006 áheitan frá løgtingsins umboðsmanni um at lata eina frágreiðing og øll skjøl í málinum um nevndu uppsagnir á Matrikulstovuni.
>
> Umboðsmaðurin er varugur við, at Innlendismálaráðið longu í januar hevur viðgjørt og avgjørt kærur frá teimum uppsøgdu og Starvsmannafelagnum og at niðurstøðan hjá ráðnum varð, at uppsagnirnar vóru lógligar.
>
> Upplýst verður, at 13. februar 2006 heitti løgmaður, við heimild í § 33 í stýrisskipanarlógini, á landsstýrismannin í innlendismálum um at geva sær frágreiðing í málinum um uppsagnirnar. Tann frágreiðingin er júst latin løgmanni og byggir í stóran mun á trý skjøl í málinum, t.e. kæruavgerðina hjá Innlendismálaráðnum, frágreiðing frá stjóranum á Matrikulstovuni um málið og eina frágreiðing frá einum uttanhýsis løgfrøðingini, sum varð biðin um at eftirkanna, hvørt uppsagnirnar kunnu metast sum lógligar.
>
> Eftirsum uppsagnarmálið so dyggiliga er upplýst og kannað, m.a. orsakað av § 33-kanningini hjá løgmanni, og tí, at landsstýrismaðurin hevur tikið niðurstøðurnar í nevndu frágreiðingum til eftirtektar, loyvir ráðið sær at vísa til hesar frágreiðingar heldur enn at gera eina triðju og sjálvstøðuga frágreiðing til umboðsmannin. Skuldi tað víst

seg, at umboðsmaðurin afturat hesum allíkavæl hevur tørv á fleiri útgreiningum, gera vit fegin hesar.

Hjálagt hesum skrivi eru øll skjøl í málinum viðvíkjandi uppsagnunum, herímillum

- kæruavgerðin hjá Innlendismálaráðnum
- frágreiðing frá stjóranum á Matrikulstovuni
- frágreiðing frá uttanhýsis løgfrøðingi, sum m.a. viðger fyrisitingarligar spurningar
- brævið til løgmann"

Frágreiðingin frá Innlendismálaráðnum til løgmann er soljóðandi (hini nevndu skjølini eru endurgivin undir málsgongdini):

**„Svar til løgmann í sambandi við, at heitt varð á landsstýrismannin í innlendismálum at eftirkanna uppsagnirnar á Matrikulstovuni sambætt § 33 í stýrisskipanarlógini**

Í brævi dagfest 13. februar 2006 spurdi løgmaður meg, sambært § 33 í stýrisskipanarlógini, um eg hevði eftirkannað, hvørt uppsagnirnar á Matrikulstovuni eru lógligar, t.e. um tær

- lúka tey formligu krøvini, lóggávan setur
- lúka tær treytir, sáttmálar á økinum seta
- eru sakligar, t.e. um haldast má, at uppsagnirnar byggja á tær grundgevingar, sum givnar eru, og um hesar grundgevingar eru lógligar

Eisini spurdi løgmaður, um eg meti at Matrikulstovan hevur umsitið hetta málið fullgott sambært § 33 í stýrisskipanarlógini.

Í hesum sambandi verður víst á, at eg sum landsstýrismaður í innlendismálum ikki fekk málsræðið yvir Matrikulstovuni fyrr enn 1. januar 2006, t.v.s. fýra dagar áðrenn uppsagnirnar vórðu framdar í verki. Áðrenn 1. januar 2006, og í hoyringstíðarskeiðinum, vísti Matrikulstovan til landsstýrismannin í vinnumálum sambært málsbýti løgmans.

Tá áheitanin um eftirkanning kom frá løgmanni, hevði Innlend-

ismálaráðið longu viðgjørt og avgjørt kærurnar frá teimum uppsøgdu og Starvsmannafelagnum. Niðurstøðan í kæruavgerðunum var í stuttum, at ráðið metti, at uppsagnirnar vóru lógligar.

Eftirsum ráðið soleiðis longu hevði gjørt niðurstøðu í kærumálunum, ásannaði eg, at skilabest varð at heita á ávikavist stjóran á Matrikulstovuni og ein óheftan løgfrøðing uttanfyri ráðið um at eftirkanna uppsagnirnar við støði í útgreinaðu spurningunum frá løgmanni. Grundað á hesar frágreiðingar, saman við okkara egnu kæruavgerð, meti eg málið verða nóg væl upplýst til, at eg nú kann svara løgmanni.

Vísandi til løgfrøðiligu frágreiðingina, frágreiðingina frá stjóranum á Matrikulstovuni og okkara egnu kæruavgerð, meti eg eftir míni bestu sannføring, at uppsagnirnar av teimum trimum starvsfólkunum á Matrikulstovuni eru lógligar og at stjórin á Matrikulstovuni hevur umsitið málið fullgott við tað at stjórin hevði heimild at brúka sín leiðslurætt til at siga fólkunum úr starvi vegna bygnaðarbroytingar.

Tað skerst annars ikki burtur, at málið um uppsagnirnar á Matrikulstovuni hevur verið kensluborið, serliga tí at tað vóru fólk við skerdum førleika, sum blivn rakt av uppsagnunum. Tann sannroynd, at kærarnir og Starvsmannafelagið „kærdu" ætlaðu uppsagnirnar til fleiri aðaláð, t.e. Fíggjarmálaráðið, Almanna- og Heilsumálaráðið, Løgmansskrivstovuna, Vinnumálaráðið og Innlendismálaráðið, gjørdi ikki viðgerðina av málinum lættari, serliga tá tað vísti seg, at Almanna- og Heilsumálaráðið í einum skrivi til Innlendismálaráðið sáddi iva um grundgevingarnar fyri uppsagnunum. Eitt skriv, sum seinni varð tikið aftur, eftirsum ráðið í veruleikanum ikki hevði eftirkannað spurningin, men tá hevði løgmaður longu heitt á meg um at eftirkanna málið sambært § 33 í stýrisskipanarlógini.

Hjálagt niðurstøðu míni sendi eg løgmanni:

- øll skjøl í málinum um uppsagnirnar á Matrikulstovuni, soleiðis sum málið hevur ligið upplýst í Innlendismálaráðnum, har ímillum

- frágreiðingina frá óheftum løgfrøðingi
- frágreiðingina frá stjóranum á Matrikulstovuni

Við vón um at løgmaður hevur fingið fullgott svar uppá spurningarnar."

Við skrivi, dagfest 31. mars 2006, vórðu viðmerkingarnar og tey í skrivinum nevndu skjølini frá Innlendismálaráðnum send Starvsmannafelagnum til ummælis.

Við skrivi, dagfest 7. apríl 2006, hevur Starvsmannafelagið sent umboðsmanninum hesar viðmerkingar:

> „**Viðvíkjandi tykkara J.nr. 200600021: Klaga um uppsagnir á Matrikulstovuni**
> Víst verður til skriv tykkara 31. mars 2006.
>
> Vit skulu gera hesar viðmerkingar:
>
> Tá talan er um uppsagnir av starvsfólki hjá tí almenna, er ein serlig víðkað hoyringsskylda galdandi.
>
> Henda regla er knæsett av tí danska umboðsmanninum og er staðfest bæði í dómspraksis og í løgfrøðiligari teori, smb. til dømis L o.fl.: Forvaltningsret, 2. udgave 2002, síða 235.
>
> Í tí konkreta málinum hjá Matrikulstovuni hava uppsagnirnar ikki livað upp til krøvini til ta víðkaðu hoyringsskylduna; og uppsagnargrundirnar – líka mikið hvørja mann velur – uppfylla heldur ikki krøvini til vanliga málsupplýsing ella konkretisering.
>
> Tað tykist sum at hetta mál skal standa og falla við, um Matrikulstovan meinti uttanhýsis ella innanhýsis bygnaðarbroytingar sum grund fyri uppsagnunum, men veruleikin er, at hugtakið „bygnaðarbroyting" er líka ófullfíggjað og ólógligt sum uppsagnargrund, sum t.d. hugtakið „samstarvstrupulleikar". Í báðum førum er ta skylda stovnsleiðslunnar, at útgreina orsøkina og ikki, at skjóta seg undir meira ella minni verulig hugtøk.

> Tað kemst ikki uttanum, at orsøk er til at seta spurnartekin við hesar uppsagnir, tá leitast skal eftir fleiri ymiskum uppsagnargrundum, sum tó allar eru ónýtiligar vegna tey lýti, sum nevnd eru omanfyri."

Við skrivi, dagfest 19. apríl 2006, vórðu viðmerkingarnar frá Starvsmannafelagnum sendar Innlendismálaráðnum til ummælis.

Við skrivi, dagfest 2. mai 2006, hevur Innlendismálaráðið svarað umboðsmanninum soleiðis:

> „Viðvíkjandi klaguni frá Starvsmannafelagnum, dagfest 22. februar 2006
>
> Í brævi móttikið 20. apríl hevur Innlendismálaráðið fingið høvi til at gera viðmerkingar til viðmerkingarnar frá Starvsmannafelagnum viðvíkjandi málinum um uppsagnirnar á Matrikulstovuni framdar 4. januar í ár.
>
> Starvsmannafelagið heldur í sínum viðmerkingum uppá, at
>
> - Matrikulstovan, sum almennur myndugleiki, hevur eina serliga víðkaða hoyringsskyldu tá talan er um uppsagnir og
> - Uppsagnargrundirnar ikki lúka krøvini til vanliga málsupplýsing ella konkretisering
>
> Innlendismálaráðið hevur ongar ískoytisviðmerkingar aðrar enn tær í longu liggja í málinum. Í sama viðfangi verður bert mint og víst á løgfrøðiligu viðgerðina og frágreiðingina frá N, sum liggur í málinum."

Við skrivi, dagfest 8. mai 2006, boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at málið bleiv tikið upp til endaliga viðgerð.

## *Niðurstøða*

*Viðgerð mín av hesari klaguni snýr seg lutvíst um nýttu mannagongdina og um grundarlagi undir uppsøgnini av teimum trimum starvsfólkunum á Matrikulstovuni, umframt viðgerðina hjá Innlendismálaráðnum av málinum.*

*Starvsmannafelagið førir fram, at starvsfólkini eru uppsøgd við aðrari grundgeving, enn nýtt var í ætlanarskrivinum, og at starvsfólkini tí ikki eru partshoyrd um ætlaðu uppsøgnina.*

*Matrikulstovan sigur í ætlanarskrivinum, dagfest 22. nov. 2005, at uppsagnirnar eru grundaðar á, at: „uppgávur stovnsins frameftir verða broyttar í sambandi við bygnaðarbroytingar, sum stovnurin skal fremja. Avleiðingin verður, at starvsfólkini verða færri í tali.“ Tá ummælisfreistin verður longd við skrivi til starvsfólkini, dagfest 1. des. 2005, verður aftur víst til ætlanarskrivið, dagfest 22. nov. 2005.*

*Formliga er ein partshoyring sostatt framd, men hendan er eftir mínari fatan ikki nøktandi.*

*Endamálið við einari partshoyring er, at tey avvarðandi fáa møguleika at koma við viðmerkingum ella hugskotum til ætlaðu avgerðina, og á tann hátt møguliga kunna ávirka myndugleikan til at broyta hesa. Tá talan eins og í hesum førinum er um uppsagnir vegna bygnaðarbroytingar, krevst at myndugleikin greiðir frá, hvørjar broytingar vera mettar neyðugar og hví, umframt hvørjar ítøkiligu avleiðingarnar av hesum vera fyri tað einstaka starvsfólkið.*

*Skrivini til tey trý starvsfólkini siga einki um, hvørjar broytingar skulu henda, og hví júst tey trý skuldu sigast úr starvi. Tí var heldur einki hjá uppsøgdu fólkunum at gera viðmerkingar til.*

*Hesin spurningur er eisini kærdur til Innlendismálaráðið, sum í niðurstøðu sínari, dagfest 26. jan. 2006, hevur svarað Starvsmannafelagnum, at „bæði felagið og partarnir eru hoyrdir soleiðis sum teir eiga at verða tað eftir galdandi sáttmála og lógum.“*

*Eg haldi avgjørt ikki, at hendan „partshoyringin“ lýkur krøvini í § 18 í fyrisitingarlógini. Eg fari tí at geva Innlendismálaráðnum eina átalu fyri ikki í niðurstøðu sínari at hava víst á hetta brekið í viðgerðini hjá Matrikulstovuni.*

*Við teldubrævi, dagfest 30. nov. 2005, fær Starvsmannafelagið frá*

*Vinnumálaráðnum upplýst, at orsøkin til uppsagnirnar er: „sum stjórin á Matrikulstovuni hevur greitt frá á fundi í Vinnumálaráðnum í dag, at leiðslan á Matrikulstovuni hevur arbeitt við at styrkja stovnin fakliga, sum hevur við sær ávísar innanhýsis umprioriteringar av starvsfólkanýtsluni.*

*Orsøkin til ætlanarskrivið er sostatt innanhýsis ætlanir um umprioriteringar viðvíkjandi starvsfólkanýtslu, og hevur einki við at gera flytingina av Matrikulstovuni til Innlendismálaráðið, ella møguliga flyting av uppgávum til Landsverk."*

*Í skrivi til Vinnumálaráðið, dagfest 6. des. 2005, hevur Matrikulstovan greitt soleiðis frá grundarlagnum undir ætlaðu uppsagnunum: „Tað er alneyðugt, at leiðslan verður styrkt við landinspektøri ella líknandi kandidati, bæði viðvíkjandi aldursbýti og førleika, stjórin verður 63 ár í apríl 2006, og næsti maður verður 65 ár í hesum mánaðinum. Vit atliti til uppsagnarfreist má broytingin fremjast nú."*

*Bygnaðarbroytingar eru eitt sakligt grundarlag fyri møguligum uppsagnum, og havi eg tí ongar viðmerkingar til, at Matrikulstovan ynskti at umskipa seg, og at tað í hesum sambandi kundi gerast neyðugt at siga nøkur fólk upp.*

*Tað er tó ein treyt, at myndugleikin ger eina meting av, hvørjar uppgávur hesin skal røkja, og hvønn ella hvørji starvsfólk myndugleikin í hesum sambandi best kann vera fyri uttan. Í skrivi, dagfest 1. mars í ár, bað eg Innlendismálaráðið um øll skjølini viðvíkjandi hesum málinum – bæði frá ráðnum og Matrikulstovuni. Eftir at hava gjøgnumgingið skjalatilfarið, sum eg fekk frá ráðnum, dugi ikki at síggja nakað skjalprógv fyri, at Matrikulstovan hevur gjørt nakra ítøkiliga meting hesum viðvíkjandi. Hvørki ætlanar- ella uppsagnarskrivini siga heldur nakað um hetta. Eg havi tí heldur einki grundarlag fyri at meta um, hvørt avgerðin um at siga júst hesum fólkunum úr starvi, var saklig ella ikki.*

*Innlendismálaráðið sigur í svarinum uppá kæruna frá Starvsmannafelagnum, dagfest 26. jan. 2006, at: „Mett verður ikki at grundarlag er fyri at umgera, ógilda ella á annan hátt taka aftur avgerðina hjá*

*stjóranum á Matrikulstovuni um at siga trimum fólkum úr starvi vegna bygnaðarbroytingar á stovninum.*

*Tað er tó at harmast um, at tað tykist sum at tað eru tey veikast settu, sum eru harðast rakt av avgerðini. Eisini harmist eg um, at vit ikki í nóg stóran mun megna at geva fólki við skerdum førleika javnbjóðis møguleikar á almenna arbeiðsmarknaðinum."*

*Eg dugi sum sagt ikki at síggja nakað í skjalatilfarinum, hvørt uppsagnirnar vóru sakliga grundaðar, og dugi tí heldur ikki at síggja, hvussu Innlendismálaráðið er komið fram til hesa niðurstøðu sína. Eg fari tí at mæla ráðnum til at taka hetta málið uppaftur til viðgerðar við atliti at, hvørt sakligt grundarlag yvirhøvur var fyri at siga hesum trimum fólkunum úr starvi umframt teirri ikki-nøktandi partshoyringini. Eisini fari eg at biðja ráðið lata meg frætta, hvørja niðurstøðu ráðið kemur til hesum viðvíkjandi.*

*Í ummælisskrivi sínum, dagfest 1. januar 2006, sum varð lagt við kæruni til Innlendismálaráðið, greiddi G frá, at hann fekk ein tíma at rudda skrivstovuna hendan morgunin og at avlevera arbeiðið og lyklarnar.*

*Í svari sínum til G, dagfest 26. jan. 2006, sigur Innlendismálaráðið, at: „Tygum fýlast á framferðarhátt stjórans við tað at boð vórðu givin um, at tygum skuldi rigga av innanfyri ein tíma og síðani fara til hús. Eisini hevur ráðið móttikið skriv frá Starvsmannafelagnum viðvíkjandi tygara uppsøgn.*

*...*

*Tað framgongur greitt í ætlanarskrivinum, at tygum varð fríttstillaður í uppsagnartíðini. At stjórin hevur givið tygum boð um at avrigga arbeiðið og arbeiðsplássið innan ein tíma tykist heldur bráfýsið. Spurdur um framferðarháttin hevur stjórin upplýst, at tygum fingu í boði at koma aftur seinni at rigga av og at tygum gjørdi brúk av tí møguleikanum.*

*Eg harmist um framferðarháttin tygum hava verið fyri í sambandi við uppsøgnina."*

*Eg haldi avgjørt ikki, at nýtta mannagongdin er í lagi, tá hugsað verður um grundgevingina fyri uppsøgnini, nevniliga bygnaðarbroytingar. Hetta átti Innlendismálaráðið at havt átalað yvirfyri Matrikulstovuni.*

*Vísandi til, at eg haldi talan vera um álvarslig brek við viðgerðini av hesum málinum, havi eg samsvarandi § 10, stk. 1 í umboðsmanslógini boðað formansskapinum í Løgtinginum, løgmanni og landsstýrismanninum í innlendismálum frá niðurstøðu mínari.*

*Burtursæð frá givnu átaluni og áheitanini á Innlendismálaráðið um at taka hetta málið uppaftur til viðgerðar, geri eg ikki meira við hetta málið.*

## 28.6 Noktan av umsókn um loyvi til at arbeiða niðursetta tíð vegna sjúku

Umboðsmaðurin hevur vigjørt eitt mál um noktan av loyvi fyribils at arbeiða niðursetta tíð á Vinnuháskúlanum vegna sjúku. Avgerðin varð kærd til Mentamálaráðið, sum staðfesti avgerðina. Umboðsmaðurin helt seg ikki kunna meta um, hvørt tað var gjørligt hjá skúlanum at kunna játta umsóknini, men ivaðist í, hvørt grundgevingarnar fyri noktanini vóru rættar. Umboðsmaðurin helt ikki, at uppgerðin hjá skúlanum av, hvat sjúkrafráveran hjá klagaranum hevði kostað skúlanum var eitt sakligt atlit, eins og umboðsmaðurin helt hóttanina frá stjóranum um uppsøgn, um Mentamálaráðið gav kæraranum viðhald, vera heilt burturvið. Umboðsmaðurin helt heldur ikki rættleiðingina, sum Mentamálaráðið segði seg hava givið stjóranum, vera nøktandi, hvørki fyri klagaran ella stjóran, og mælti tí ráðnum til at avgreiða hetta á rættan hátt. Umboðsmaðurin helt eisini avgerðina hjá skúlastjóranum, um at nokta læraranum at hava nakran við sær á fund teirra millum, at vera í stríð við grundleggjandi regluna í § 8 í fyrisitingarlógini. Umboðsmaðurin helt málið bera týðilig brá av, at talan ikki hevði verið um sakliga fyrisiting frá skúlastjóranum, og mælti tí ráðnum til at taka kærumálið uppaftur fyri at kanna, um grundgevingarnar fyri noktandi svarinum eisini vóru tær, sum avgerðin veruliga bygdi á. Umboðsmaðurin hevur kunnað formansskapin í Løgtinginum, løgmann og avvarðandi landsstýrismann um hetta málið. Umboðsmaðurin gav eisini Mentamálaráðnum eina átalu fyri avgreiðsluna av einari innlitsumbøn frá klagaranum. (J. nr. 200600026).

## Klagan

Við skrivi, dagfest 13. mars 2006, hevur A sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

**„Klaga til Løgtingsins umboðsmann um viðgerð av umsókn um loyvi at arbeiða niðursetta tíð vegna sjúku á Maskinmeistaraskúlanum.**

**Klagan snýr seg eisini um, at undirritaða verður noktað alment innlit.**

Málið snýr seg um, at undirritaði A vegna sjúku og eftir skrivligum tilmæli frá eygnalækna søki um loyvi at arbeiða hálva tíð á Maskinmeistaraskúlanum í eitt hálvt ár. Havi starvast á skúlanum síðani 19. okt. 1981. Stjórin noktar mær at arbeiða niðursetta tíð uttan at grundgeva fyri noktanini. Málið verður síðani kært til Mentamálaráðið (MMR), sum ikki gongur kæruni á møti í fyrsta umfari.

Seinni tekur MMR málið uppaftur, men nú fer alt fram í tí dulda. MMR skipar fyri sokallaðum „non existing" fundi (loynifundi) 16. august 2005, har eingin fær loyvi at skriva nakað niður. Av tí at fleiri avtalur, sum vórðu gjørdar á hesum ódámliga fundi, ikki verða hildnar, havi eg valt at kæra mannagongdina, sum MMR brúkar, til Umboðsmannin.

Eftir loynifundin havi eg roynt at fingið greiði á ymiskum viðurskiftum við at nýta lógina um alment innlit, men onki ber til.

Spurningurin er, hvar ið rættartrygdin hjá borgaranum er, tá avtalur, gjørdar á loynifundi, har onki er skrivað niður, ikki verða hildnar.

**Lýsing av gongdini**

Umsókn verður send Maskinmeistaraskúlanum tann 18. jan. 2005 um loyvi at arbeiða hálva tíð frá 1. august 2005. Umsóknin snýr seg eisini um at fáa farloyvi til summarfrítíðina, so eg kann koma fyri meg aftur eftir sjey skurðviðgerðir. Henda umsókn verður eisini noktað uttan nakra veruliga grundgeving. Stjórin brúkar fýra vikur at svara umsóknini.

Frágreiðing um málið verður send fakfelagi mínum tann 19. mars 2005.

Fakfelagið vendir sær til B, sakførara, tann 5. apríl 2005, sum sendir kæru til MMR tann 18. apríl 2005 (ikki 18.05.2005, sum nevnt í brævinum).

MMR sendir skúlastjóranum kæruna til ummælis. Stjórin svarar MMR aftur tann 1. juni 2005. Eisini hesaferð brúkar stjórin fýra vikur at svara skrivinum.

Viðm. til skrivið: Tað er óskiljandi, at stjórin ikki kann leggja tímabýtið fyri august til rættis, tá mín umsókn um loyvi at arbeiða hálva tíð frá august er honum í hendi longu í januar 2005. Seinni havi eg frætt, at 11 næmingar í sama flokki hava havt fund við stjóran tann 27. juni 2005 (í summarfrítíðini); teir biðja um at fáa A til lærara í el-tøkni í august. Eg skilji tí ikki, at tað stríðir ímóti áhugamálum skúlans, at A byrjar aftur í august. Eru áhugamál teirra lesandi ikki eisini áhugamál skúlans?

MMR sendir skrivið frá maskinskúlastjóranum til sakførara fakfelagsins til at gera viðmerkingar.

Sakførarin svarar MMR aftur tann 28. juni 2005. Saman við skrivinum sendir hann ummæli frá fyrrverandi stjórum mínum á skúlanum. Í hesum sambandi kann nevnast, at Q, fyrsti stjórin, hevur sagt mær, at var hann stjóri enn, so varð umsókn mín frá 18. jan. 2005 játtað og avgreidd sama dag, sum hon kom honum í hendi. So einfalt skuldi málið verið.

Tann 19. juli 2005 kemur svarið upp á kæruna frá MMR. Hetta er, meðan MMR er stongt vegna summarfrí.

Í skrivinum verður enn einaferð sagt, at trupult er at finna avloysara fyri A. Hetta er beinleiðis ósatt, tí avloysari kom fyri A tann 1. apríl 2004. Hesin persónur er á skúlanum enn, tí brúk er fyri honum at minka um nógvu yvirtíðina. Her skal eisini verða víst á, at MMR tulkar § 4 og § 24 í sáttmálanum øðrvísi enn báðir sakførararnir í Rættarhjálpini og B gera.

Í telefonsamrøðum við meg siga bæði mentamálaráðharrin, D, (25. juli 2005) og deildarstjórin, C, (2. august 2005), at teir eru harmir um, at brævið er sent, meðan MMR er í feriu og teir ikki vita av.

Tað kundi bara skiljast sum, at vistu teir av, so varð avgerðin broytt, og eg fekk loyvi at arbeiða hálva tíð.

Sakførarin sendir landsstýrismanninum, D, teldubræv tann 1. august 2005 við umbøn um at málið verður tikið upp aftur, tí avgerðin kann ikki góðtakast.

Tann 2. august 2005 ringir deildarstjórin í MMR, C, tvær ferðir til mín úr ..., tí mentamálaráðharrin hevur álagt honum at loysa málið, hóast deildarstjórin er í summarfrí. C nevnir, at hann hevur tosað við skúlastjóran um málið. Skúlastjórin sigur seg vera til reiðar at játta mær at arbeiða hálva tíð, um eg komi á fund við stjóran um málið. Eg sigi, at eg eri til reiðar at koma á fund um málið, um sakførarin, fakfelagsformaðurin ella deildarstjórin í MMR eru við á fundinum.

Seinni sama dag ringir C aftur. Hann hevur aftur tosað við stjóran. Stjórin noktar fyri at nakar annar enn A kemur á fund, tí hann tímir ikki at hava sakførara ella nakran annan við á fund. Spurdur, um eg kann byrja at arbeiða hálva tíð, sigur C nú, at tað hevur stjórin ongantíð sagt. Tað merkir, at deildarstjórin nú broytir frágreiðingina fullkomiliga, sum hann hevði givið mær tveir tímar frammanundan. Tað hevði verið áhugavert at frætt, um nakað notat er frá telefonsamrøðunum hendan dagin.

Henda sama dag byrjar skúlagongdin á Maskinmeistaraskúlanum aftur eftir summarfrítíðina. Lærararnir hava nógva yvirtíð, tí A fær ikki loyvi at koma til arbeiðis aftur, og aðrir røkja hansara lærugreinar.

Tann 3. august 2005 halda nevndirnar í báðum fakfeløgunum á samanlagda Maskinmeistara- og Sjómansskúlanum felags fund um málið. A fær fullan stuðul.

Tann 7. august 2005 skrivar sakførarin aftur teldubræv til landsstýrismannin við áheitan um at loyva A til arbeiðis aftur.

Tann 11. august 2005 kemur stutt bræv frá løgfrøðingi í MMR við

boðum um, at MMR umhugsar at taka málið upp til nýggja viðgerð, tá fólk koma aftur úr summarfrí. Hetta er seinasta skriv frá MMR, tí nú skal onki skrivast niður!

Tann 15. august ringir B, sakførari, til A við áheitan frá MMR um at biðja A koma einsamallan á fund við MMR dagin eftir. Sakførarin mælir A til at fara á fundin, tí stjórin er „settur upp á pláss", og fundurin skal bert snúgva seg um, hvørjar uppgávur A skal røkja, tá hann byrjar aftur at arbeiða ein av fyrstu døgunum.

Týsdagin 16. august 2005 kl. 14 verður minniligi fundurin settur í MMR við Hoyvíksvegin í Havn.

Á fundinum vóru: mentamálaráðharrin, deildarstjórin, skúlastjórin og undirritaði A. Deildarstjórin lesur upp úr einum skjali, hvussu fundurin skal fara fram. Tað var skelkandi at uppliva, at fundurin var ein **„non existing"**-fundur, og at MMR hevur eina skrivliga mannagongd fyri hvussu slíkir fundir skulu skipast. Havi ongantíð hoyrt heitið „non existing meeting" nevnt áður. Á fundinum vórðu drigin fleiri onnur mál fram, sum eg als ikki var fyrireikaður uppá.

Komin heim eftir fundin, ringdi eg alt fyri eitt til sakførara fakfelagsins, sum eg hevði fingið loyvi at tosa við á loynifundinum. Hann bað meg beinanvegin seta meg at skriva eina fundarfrásøgn frá fundinum. Eg so gjørdi, og er hon viðløgd hesum klaguskrivi.

Sama kvøld sendi eg deildarstjóranum teldubræv við fyrispurningi um eitt skriv, sum skúlastjórin og deildarstjórin høvdu brúkt ímóti mær á loynifundinum.

Tann 18. august biði eg um alment innlit frá MMR. Sama dag ringir deildarstjórin til mín. Honum dámar ikki, at eg í skrivinum havi nevnt fundin, sum var tann 16. august.

Fríggjadagin 19. august 2005 fái eg teldubræv frá skúlastjóranum um, at eg kann byrja at arbeiða uml. 40 % tíð. Eg avtali við sakføraran at bíða við at svara til sunnudagin.

Sunnukvøldið 21. august kemur aftur eitt teldubræv frá stjóranum.

Mánadagin 22. august 2005 byrji eg at undirvísa á samanlagda skúlanum í Nóatúni.

--- o ---

Av tí at avtalur, gjørdar á loynifundinum tann 16. august, ikki verða hildnar, kunni eg um støðuna í teldubrævi til MMR tann 5. sept. 2005.

Tá onki hendir í málinum, sendi eg aftur MMR teldubræv tann 7. okt. 2005.

MMR svarar í skrivi tann 28. okt. 2005.

Tann 16. des. 2005 sendi eg aftur MMR teldubræv við rættingum til brævið frá MMR. Kunnað verður eisini um lønarmálið. Deildarstjórin svarar aftur í hóttandi teldubrævi tann 19. des. 2005, meðan eg eri staddur uttanlands í sjúkraviðgerð.

Tann 28. februar 2006 søki eg um alment innlit í fýra mál, sum øll vórðu umrødd á loynifundinum í august. Tann 6. mars svarar undirvísingarleiðarin, L, við at senda mær avrit av tveimum gomlum brøvum, sum eg áður havi fingið, tí tey eru stílað til mín. Hetta meti eg at vera eina háðan móti mær, og eina vanvirðing av lógini um alment innlit.

Eg sendi mentamálaráðharranum teldubræv tann 13. mars 2006 við kunning um, at alt málið verður sent Løgtingsins umboðsmanni.

**Klagan til Umboðsmannin**

1. Eg fari at biðja Umboðsmannin kanna málið um viðgerðina av umsókn míni um loyvi at arbeiða niðursetta tíð vegna sjúku og meta um, hvørt umsóknin fekk sakliga viðgerð ella ikki.

2. Hvat heldur Umboðsmaðurin um tað, at MMR skipar fyri „non existing“-fundi, har ongin fær loyvi at skriva nakað niður? Tá fundurin er lokin, hevur ongin fundur verið! Hvar er rættartrygdin hjá borgaranum, tá ongin skrivlig avtala finst og ongin fundarfrásøgn?

3. Hvat heldur Umboðsmaðurin um svarini frá MMR upp á umbønir mínar um alment innlit? Havi eg ikki rætt at fáa innlit í nevndu mál?

Viðm. til skrivið 28. febr. 2006: Kann tað hugsast, at skrivini, eg biði um (pkt. 1 og 2), ongantíð eru skrivað? Kann MMR møguliga viðgera eitt mál um meg, uttan at eg eri kunnaður (pkt. 3)? Seinasta málið (pkt. 4) átti helst at verið latið Landsgrannskoðaranum at kanna.“

**Málsgongd**

Við skrivi, dagfest 22. juni 2004, hevur F, yvirlækni, sent táverandi Maskinmeistaraskúlanum soljóðandi fráboðan:

„Viðv. A, f. ...
Sagt skal vera frá, at undirritaði metir, at nú áðurnevndi hevur verið gjøgnum eina trupla tíð við fleiri operatiónum í høgra eyga, er støðan beint nú rættuliga stabil. Hann heldur seg til at fara til verka aftur fulla tíð eftir summarfrítíðina. Tó verður neyðugt hjá honum fyrstu tíðina at dúva uppá tað eygað, sum ikki er skurðviðgjørt. Vinstra eyga hevur altíð verið tað veikara eygað. Teir næstu mánaðirnar verður neyðugt at útnytta sjónina á vinstra eyga í fullan mun. Eg vil tí tilmæla, at omanfyri nevndi ger roynd við arbeiði fulla tíð, men at hann komandi skúlaár kann undirvísa í teimum gomlu fakunum hjá sær. Tað verður munandi truplari hjá honum at fríska uppaftur onnur fak. Haraftrat kann viðmerkjast, at tað møguliga mitt í skúlaárinum, tvs. umleið nov.-des. í ár verður neyðugt at taka støðu til at operera høgra eyga einaferð afturat. Um so er, kann tað verða neyðugt við sjúkramelding.“

Við skrivi, dagfest 13. jan. 2005, hevur F, yvirlækni, sent skúlanum soljóðandi fráboðan:

**„Viðv. A, f. ...**
Vísandi til bræv til Maskinmeistaraskúlan, dagf. 22.06.04 (við uppískoyti dagf. 16.07.04) skal hervið boðast frá, at støðan við sjónini hjá omanfyrinevnda framvegis er trupul, og noyðist hann eisini næstu mánaðirnar at dúva upp á vinstra eygað.

Í apríl-mai í ár verður helst neyðugt at skurðviðgera høgra eyga enn einaferð. Tá verður óivað neyðugt við sjúkramelding aftur.

Eg fari tí at mæla til, at A kann arbeiða hálva tíð restina av 2005, fyri ikki at overva eyguni. Framvegis verður mælt til, at hann heldur seg til verandi, kendu uppgávurnar, og ikki átekur sær aðrar krevjandi uppgávur."

Við skrivi, dagfest 18. jan. 2005, hevur A sent skúlanum soljóðandi umsókn:

**„Viðv. umsókn um farloyvi og arbeiði niðursetta tíð**
Sum nevnt í brævi frá eygnalæknanum, dagf. 13. januar 2005 verður neyðugt hjá mær aftur at fáa viðgerð fyri eyguni seinni í vár. Í løtuni eri eg sjúkrameldaður til 18. februar 2005. Eisini mælir eygnalæknin til, at eg arbeiði niðursetta tíð fyri ikki at overva eyguni.

Vísandi til omanfyri nevnda bræv frá eygnalæknanum haldi eg tað vera best fyri meg, at eg søki um farloyvi restina av hesi lestrarhálvuni. Eg fari tí hervið at søkja um farloyvi frá arbeiði mínum sambært § 4 í sáttmálanum frá 20. febr. til 30. juni 2005.

Samstundis fari eg eisini at søkja um at arbeiða hálva tíð (50 %) seinna hálvár 2005 sambært § 24 í sáttmálanum.

Við vón um skjóta og lagaliga viðgerð."

Við skrivi, dagfest 1. febr. 2005, hevur skúlastjórin sent A eina móttøkuváttan fyri umsóknina.

Við teldubrævi til skúlastjóran, 10. febr. 2005, hevur A rykt eftir svari

uppá umsókn sína. Dagin eftir hevur skúlastjórin svarað honum, at hann fær svar fyrst í komandi viku.

Við skrivi, dagfest 13. febr. 2005, hevur skúlastjórin svarað umsóknini frá A soleiðis:

> „**Viðvíkjandi umsøkn um farloyvið og at arbeiða niðursetta tíð.**
> Vísandi til umsøkn tína, dagfest 18. januar 2005, er Maskinmeistaraskúlin / Føroya Sjómansskúli komin til tað niðurstøðu, at umsøkn tín um farloyvi ikki kann gangast á møti fyri tíðarskeiðið 20. februar 2005 til 30. juni 2005.
>
> Niðurstøðan er grundað á metingar um tørvin hjá skúlanum í tíðarskeiðnum farloyvi er søkt um. Eisini metir skúlin tað verða torført at finna avloysara til so avmarkað tíðarskeið.
>
> Tygum hava verið burtur frá arbeiði vegna sjúku í umleið 2x120 dagar í farna ári og hevur hetta havt óhepnar avleiðingar fyri starvsøki tygara. Mett verður, at tað er í stríð við áhugamál skúlans at geva tygum farloyvi í tíðarskeiðinum søkt verður um.
>
> Maskinmeistaraskúlin/Føroya Sjómansskúli er tó altíð sinnaður, saman við tygum, at finna eina loysn í málinum.
>
> Viðvíkjandi umsøkn tygara um niðursetta tíð til hálva tíð, frá skúlaársbyrjan 2005, er Maskinmeistaraskúlin / Føroya Sjómansskúli komin til tað niðurstøðu, at umsóknin kann ikki gangast á møti.
>
> Niðurstøðan byggir á sama grundarlag sum fyri avgerðina um farloyvi.“

Tann 15. febr. 2005 hevur A sent skúlastjóranum soljóðandi teldubræv:

> „Endiliga kom svarið, sum eg havi bíðað eftir (nærum 4 vikur. Men svarið kann sjálvandi ikki góðtakast. **Tú hevur sjálvur biðið meg søkt um farloyvi**, tá tú ringdi til mín frá Sjómansskúlanum um middagsleitið tann 18. januar

2005. Tú kanst ikki fyrst biðja meg søkja um farloyvi, fyri síðan at nokta mær tað. Hetta er at halda fólk fyri gjøldur, og tað er ikki tað, eg havi mest brúk fyri nú, sum heilsustøðan er. Áðrenn eg sendi umsóknina, ráðførdi eg meg við serkøn fólk, sum kenna viðurskiftini á Maskinmeistaraskúlanum sera væl. Tey vóru samd um, at hetta var ein góð loysn fyri skúlan.

Grundgevingarnar í brævinum eru púrasta burturvið. Eg kann als ikki góðtaka, at tað skal stríða ímóti áhugamálum skúlans, at eg gerist frískur aftur. Tí tað er tað, sum málið í veruleikanum snýr seg um. Tað er týðiligt, at tú vilt tvinga meg at koma aftur til arbeiðis fulla tíð, og harvið noyða meg at ganga ímóti tilmæli eygnalæknans. Tað hevði verið skilaleyst av mær at gjørt tað, tí sjálvandi ynski eg at vinna heilsuna aftur.

Tú nevnir, at tú ert sinnaður at finna aðra loysn. Nú tú hevur umhugsað málið í nærum 4 vikur, fari eg at biðja teg innan 24 tímar greiða mær frá í teldubrævi, hvørja „loysn í málinum", tú hugsar um ístaðin fyri at játta mær farloyvi. Málið hevur skund, tí sjúkrameldingin gongur út fríggjadagin.

Annars skal eg boða frá, at eg fari víðari við málinum til hægri myndugleikar. Tað havi eg rætt til sum borgari í einum fríum samfelag. Tú skal heldur ikki gerast kløkkur, um málið kemur fram í fjølmiðlunum, tí her ert tú farin út um alt sømiligt mark. Eg ætli mær eisini at greiða myndugleikunum frá úttalilsi tínum á fundi við fakfelagið tann 12. nov. 2004. Tá ein nevndarlimur spurdi teg, um tú sum stjóri ikki hevði eina ávísa skyldu at lurta eftir eygnalæknanum, svaraði tú: „Um A ikki klárar at røkja tær uppgávur, ið EG áleggi honum, so er tað ÚT! Her skal eingin eygnalækni koma og bestemma nakað!" (Hetta er mestsum orðarætt endurgivið). Hetta er greið tala, men hon er neyvan í samsvar við almenna starvsfólkapolitikk landsins, sum tú hevur skyldu at virða. Tú hevur eisini í øðrum førum víst, at tú umboðar ein primitivan og harðrendan leiðslustíl, sum eg trúði. hoyrdi eini farnari tíð til.

At enda skal eg minna á avtaluna um løn fyri seinnu hálvu 2004, sum varð gjørd á sama fundi, tann 12. nov. Hesa avtalu hevur tú ikki hildið, tí enn resta uml. kr. 15.000 í at flyta mær. Eg fari hervið at biðja teg flyta mær peningin."

Við skrivi, dagfest 18. febr. 2005, hevur A sent skúlastjóranum eina nýggja umsókn, ið er soljóðandi:

> „**Nýggj umsókn um farloyvi**
> Av tí at umsóknin, dagf. 18. januar 2005, ikki varð gingin á møti sambært svarskrivi, dagf. 13. februar 2005, kenni eg meg noyddan at senda inn nýggja umsókn um farloyvi, eftir tað sum kom fram á fundi okkara millum 16. februar 2005.
>
> Eg fari tí hervið at biðja um farloyvi frá arbeiði mínum í tíðarskeiðnum frá 20. februar til 31. desember 2005.
>
> Fakfelag mítt er kunnað um málið, og fer at taka tað til viðgerðar. Umsóknin er tí treytað av, at um seinni kanningar vísa, at noktanin av fyrru umsóknini er tikin á skeivum grundarlag, so kann vendast aftur til fyrru umsóknina.
>
> Eg fari eisini at biðja um at umsóknin verður avgreidd í dag.“

Við skrivi, dagfest 18. febr. 2005, hevur skúlastjórin svarað umsóknini soleiðis:

> „**Vísandi til umsøkn um farloyvið**
> Vísandi til umsókn tygara dagfest tann 18. feb 2005, um farloyvið frá 20 Februar 2005 til 31. des 2005, skal við hesum verða sagt frá, at skúlin játtar farloyvi uttan løn í nevnda tíðarskeiðið.“

Við skrivi, dagfest 18. mai 2005 (skal helst vera 18. apríl – skrivið er móttikið í Mentamálaráðnum 20. apríl), hevur B, adv., sent Mentamálaráðnum soljóðandi kæru:

> „**<u>Viðv. kæru um noktað farloyvi og niðursetta tíð.</u>**
> Undirritaði skal við hesum kæra noktandi umsókn um farloyvi og niðursetta tíð (frá 1.7. 2005 – 31.12. 2005) vegna A á nú samanlagda Maskinmeistaraskúlanum/Føroya Sjómansskúla. Orsøkin er, at klientur mín í skrivi, dagfest 18. jan. 2005, søkti um farloyvi og

niðursetta tíð vega sjúku, men leiðslan noktaði honum hesar sømdir í skrivi, dagfest 13. feb. 2005.

Grundarlagið undir kæruni er, at grundgevingar skúlans ikki hava hald í veruleikanum. Avloysari er og kann finnast umframt sáttmála- og siðvunnin rættindi, ið áttu at gjørt, at umsóknin lættliga skuldi verið eftirlíkað

Hjálagt í avriti er:
Umsókn frá A, dagfest 18. jan. 2005
Noktandi svar leiðslunnar, dagfest 13. feb. 2005
Skriv eygnalæknans til skúlan, dagfest 13. jan. 2005"

Við skrivi, dagfest 29. apríl 2005, hevur Mentamálaráðið váttað fyri móttøkuna av kæruni og boðað frá, at hendan er send skúlanum til ummælis.

Í teldubrævi, dagfest 17. mai 2005, hevur skúlastjórin biðið Mentamálaráðið um, at ummælisfreistin verður longd til 1. juni, og er hetta játtað. Fráboðan um hetta er eisini send advokatinum.

Við skrivi, dagfest 1. juni 2005, hevur skúlastjórin sent Mentamálaráðnum soljóðandi kæruummæli:

„**Viðv.: kæru um noktað farloyvi og niðusetta tíð-tykkara máltal ...**
Víst verður til bræv tykkara frá 29. apríl 2005.

Viðmerkingar okkara til kæruna eru hesar:

Vegna trupulleikar við sjónini hevur A verið sjúkrameldaður frá skúlanum hesi tíðarskeið:
1/1-2004 til 12/4-2004
13/4-2004 til 27/6-2004 og
6/12-2004 til 8/2-2005

Hetta gevur eina sera stóra sjúkrafráveru.

Sambært seinastu læknaváttan frá eygnalæknanum dagfest 13/1-2005 við ávísing til eldri læknaváttan til skúlan dagfest 22/6-2004 við ískoyti frá 16/7-2004, so er støðan við sjónini hjá A framvegis trupul, og verður indikerað, at tað í nærmastu framtíð helst verður neyðugt við nýggjari skurðviðgerð og sjúkramelding aftur.

Drúgva fráveran hjá A frá arbeiðinum hevur havt við sær stórar trupulleikar í arbeiði okkara við fyriskipan av arbeiði skúlans, har undirvísingarplanur skal verða uppá pláss í góðari tíð, áðrenn viðkomandi hálvárssemestur tekur sína byrjan, eitt arbeiði hvørs neyvleiki er ein fyritreyt fyri, at álítandi taltilfar kann útvegast at grunda fíggjarætlan skúlans á fyri komandi árið.

Sum tað er skylda okkara verður dentur lagdur á at fáa sum mest burtur úr játtanini til skúlan. Lagt varð upp til, at skúlin skuldi taka inn næmingar til „Maskinist“ í august 2005. Játtanin er so tepur, at um skúlin skal halda hesa ætlan, er ikki pláss fyri longri sjúkralegum sum tann hjá A undanfarnu tvey tíðarskeið. Viðmerkjast skal at meirútreiðslan av sjúkraleguni hjá A í 2004 var omanfyri kr. 250.000,- og var høvuðsorsøkin til, at skúlin fór uppum loyvdu játtanina í 2004.

Vit hava sjálvandi stóra samkenslu við heilsustøðuni hjá A, og hevur skúlin eftir førimuni roynt at laga viðurskifti síni til støðu hansara, men viðurkennandi, at vit hava eina stovn at reka við stórari ábyrgdarskyldu mótvegis næmingum skúlans hvat frálæru viðvíkur og mótvegis mynd-ugleikunum hvat ásettum fíggjarkarmi viðvíkur, so kom skúlin til ta niðurstøðu, at vit ikki mettu áhugamál skúlans røktaði nóg væl, um vit gingu umsóknini frá 18. januar 2005 á møti um farloyvi frá arbeiðinum smb. § 4 í sáttmálanum frá 20/2-2005-30/6-2005 og at arbeiða hálva tíð seinna hálvár 2005 smb. § 24 í lønarsáttmálanum. Hinvegin metti skúlin, at seinna umsókn A um farloyvi smb. § 4, t.v.s. uttan løn, kundi játtast honum fyri samlaða tíðarskeiðið 20/2-2005 til 31/12-2005, tá hetta í meira avmarkaðan mun grípur inn í tilrættaleggingararbeiðið, so hetta mettu vit fór at bera til, og er tað sagt A í brævi, dagfest 18/2-2005, harav makaskjal er viðlagt saman við makaskjali av umsóknarbrævi hansara dagfest sama dag.

Avgerð skúlans byggir á eina konkreta metan um tørv skúlans, har serligur dentur hevur verið lagdur á tilrættarlegging av arbeiði skúlans á ein skipaðan

og vælvirkandi hátt, og við atliti til í góðari tíð at kunna byrgja upp fyri tí støðu, at óvæntaðar útreiðslur kunnu taka seg upp í játtunarárinum, sum hædd ikki er tikin fyri.

Vit loyva okkum at skoyta uppí, at um so er at A fær viðhald í kæru síni, so verður skúlin at umhugsað uppsøgn av starvsmanninum smb. galdandi reglur.“

Við skrivi, dagfest 3. juni 2005, sendi Mentamálaráðið frágreiðingina frá skúlanum til advokatin til ummælis.

Við skrivi, dagfest 28. juni 2005, hevur advokaturin sent Mentamálaráðnum soljóðandi viðmerkingar:

„**Viðv. máltal ... – Kæra um sýtan fyri farloyvi og niðursetta tíð – A /Maskinmeistaraskúlin.**
Vísandi til skriv ráðsins frá 3. juni 05 skulu vegna kæraran A verða gjørdar hesar viðmerkingar:

Vísandi til, at tíðarskeiðið, sum søkt er farloyvi fyri, er um at verða runnið, hevur málið viðvíkjandi niðursettari arbeiðstíð frá august 05 størri týdning fyri kæraran, enn málið um farloyvi.

Tað er ikki rætt tá sagt verður, at læknaváttan frá 13.01.05 indikerar, at neyðugt verður við nýggjari skurðviðgerð og sjúkrafráveru sum fylgja av hesum í framtíðini. Seinasta skurðviðgerðin var 03.05.05, og A veit onki um, at hann skal hava fleiri. Tískil er tað, ið stjórin á Maskinmeistaraskúlanum førir fram, ikki rætt.

A kann ikki átaka sær ábyrgdina av, at fyriskipan av skúlans arbeiði ikki hevur gingið eftir vild, hvat undirvísingarplani viðvíkur.

A greiðir frá, at eygnalæknin longu í skrivi dagfest 22.06.04 boðaði skúlanum frá, at hann fór at verða sjúkrameldaður eftir skurðviðgerð í des. 2004. Hóast hetta, var tímatalvan ikki liðug fyrr enn umleið 16. des. 2004.

A heldur ikki, at útreiðslur av sjúku hansara hava verið kr. 250.000,-. Ynskiligt var, um stjórin dokumenteraði hetta neyvt, um hann heldur fast við hesa upphædd.

Hann er vitandi um, at ein annar starvsmaður eisini var sjúkraskrivaður á heysti 2004, og eisini stjóraskiftið hevur verið um hetta mundið.

Harumframt verður víst á, at teldurøkt var einki gjørt við meðan hann var sjúkur, og at táverandi stjórin tók á seg undirvísingina í M5-flokkinum ein part av tíðini uttan løn.

A heldur, at talið kr. 250.000,- er alt ov høgt.

Hann heldur ikki, at stjórin hevur stóra samkenslu við sær – sum stjórin vil vera við. Víst verður á, at stjórin ikki hevur lagað seg eftir tilmælinum frá eygnalæknanum um, at A eigur at halda seg til verandi, kendu uppgávurnar, tí í jan. 05 ætlaði stjórin at áleggja honum tað sera krevjandi uppgávuna at yvirtaka flokkin M4 í eltøkni.

Seinna tilmæli eygnalæknans er, at A arbeiðir hálva tíð – hesum sýtti stjórin fyri. Tískil varð kært til Mentamálaráðið.

A heldur ikki, at stjórin hevur haldgóðar grundgevingar fyri at sýta honum at arbeiða niðursetta tíð.

Í noktandi svarinum er als ongin grundgeving. Á fundi 16. febr. sigur stjórin, at hann ikki heldur, at nakar skal kunna arbeiða hálva tíð. Annars verður víst til skjal 9 og til, at heldur ongin brúkilig grundgeving er í skrivi stjórans frá 1. juni 05.

Víst verður á, at næmingarnir skulu hava kravdu undirvísingina, óansæð tað er A ella ein annar, ið letur hana frá sær. At A kann byrja aftur í august 05 kann bara – í samsvari við landsgranskoðarafrágreiðingina – minka um nógvu yvirtíðina hjá lærarunum.

Meira alment skal vera tikið samanum við hesum viðmerkingunum:

Hvørki stjórin á Maskinmeistaraskúlanum – heldur enn nakar annar – kann tryggja sær, at heilsan hjá, í hesum føri starvsfólki, viknar í styttri ella varandi tíðarskeið.

At leggja fyri dagin tann leiðsluhátt, vit her eru vitni til, er skelkandi. At arbeiðsumstøðurnar gerast so truplar í einum føri sum hesum, kann ikki góðtakast. At stjórin skal brúka so drúgva tíð um eitt einstakt mál sum í hesum føri er átaluvert.

Men allarmest skelkandi er tó tað seinasta, sum stjórin fráboðar í skrivinum, nevniliga, at um A fær viðhald í kæru síni, verður skúlin at umhugsa uppsøgn av A sbr. galdandi reglum.

Sjálvsagt er tað kanska einamest Mentamálaráðið, ið sum yvirskipaður myndugleiki má taka neyðug stig til at forða fyri, at tílíkar útsagnir koma frá stjóranum á Maskinmeistaraskúlanum í framtíðini, tí ikki ráðnum at siga, er tað ein ólóglig hóttan, ið stjórin her kemur við – og vildi uppsøgn av A nú, grundað á her nevndu viðurskifti, av somu orsøk verið ólóglig og skeiv. Avleiðingarnar av tílíkum fyrisitingarligum mistaki kann ráðið sjálvsagt longu nú – eins og vit – ímynda sær. Kravt verður tískil, at stjórin verður rættleiddur beinanvegin, og at hetta verður fráboðað skrivstovu mínari.

A er til reiðar at koma aftur til arbeiðis í august 2005. Sjúkraviðgerð hansara er liðug. Upplýsast skal, at hóast sjónin er veik nú, er hon heldur betri enn á heysti 2004, tá A enn arbeiddi fulla tíð. Umsóknin um at sleppa at arbeiða hálva tíð, er grundað á tilmæli eygnalæknans.

Ongin kæra hevur verið um A og arbeiði hansara í hesi 23 árini, hann hevur starvast á Maskinmeistaraskúíanum. Tvørturímóti leggi eg við ummæli frá fyrrverandi stjóra Q og P eins og fulltrúi tykkara C bert hevur havt rósandi orð til A.

Við hesum verður viðgerðin av kæruni vegna A aftur latin Mentamálaráðnum til støðutakan."

Við skrivi, dagfest 19. juli 2005, hevur Mentamálaráðið svarað kæruni frá A soleiðis:

**„Kæra um farloyvi og um at arbeiða hálva tíð frá A**
Í skrivi, dagfest 18. mai 2005, kærir B, advokatur avgerðina hjá Maskinmeistaraskúlanum at sýta tygum farloyvi úr starvinum frá 20. februar 2005 til 30. juni 2005 og um at arbeiða hálva tíð seinna hálvár 2005. Viðmerkingar eru komnar frá báðum pørtum og Mentamálaráðið metir, at málið er so væl lýst, at avgerð kann takast í kæruni. B vísir á, at umsóknin um niðursetta tíð hevur størri týdning enn málið um farloyvi, og tí verður dentur lagdur á henda partin av kæruni.

Mentamálaráðið hevur tikið hesa avgerð:
**Kæran frá A um farloyvi í tíðarskeiðnum 20. febr.- 30. juni 2005 og um at arbeiða niðursetta tíð seinna hálvár 2005 verður ikki gingin á møti. Skúlastjórin fær eina rættleiðing um ávís viðurskifti í sambandi við kæruna.**

**Málslýsing**
Í skrivi, dagfest 18. januar 2005, søkja tygum um farloyvi úr starvinum frá 20. februar 2005 til 30. juni 2005 og um at arbeiða hálva tíð seinna hálvár 2005. Tygum vísa í hesum sambandi á § 4 og § 24 í sáttmálanum. Tað gongur fram av umsóknini, at farloyvisumsóknin er grundað á heilsustøðuna.

Í skrivi, dagfest 13. februar 2005, boðar Maskinmeistaraskúlin frá, at umsóknin ikki kann gangast á møti, og at í hvørgum tíðarskeiði er møguligt at geva farloyvi. Avgerðin er grundað á,

- metingar skúlans um tørvin í tíðarskeiðinum og
- at tað er í stríð við áhugamál skúlans at geva tygum farloyvi og
- at tað er torført at finna egnaðan avloysara.

Skúlin vísir eisini á longu sjúkrafráveru tygara, og á at skúlin er sinnaður til at finna eina loysn saman við tygum.

Í skrivi, dagfest 18. februar 2005, lata tygum inn nýggja umsókn um farloyvi frá 20. februar 2005 til 31. desember 2005. Í umsóknini vísa tygum á, at tygum kenna tygum noyddan at senda inn nýggja umsókn, tí fyrra umsóknin ikki varð játtað. Tygum vísa eisini á, at tygum vilja halda fast við fyrru umsóknina, um tað vísir seg, at noktanin av umsóknini er tikin á skeivum grundarlag. Í skrivi sama dag t.v.s. 18. februar 2005 játtar Maskinmeistaraskúlin tygum farloyvi uttan løn í tíðarskeiðinum, sum søkt er um.

B, advokatur kærir vegna A avgerðina hjá Maskinmeistaraskúlanum til Mentamálaráðið í skrivi, dagfest 18. mai 2005. Í skrivinum vísir B á, at grundgevingar skúlans ikki hava hald í veruleikanum. Avloysari er og kann finnast umframt sáttmála- og siðvunnin rættindi, ið áttu at gjørt, at umsóknin lættliga skuldi verið eftirlíkað.

Maskinmeistaraskúlin fær kæruna til viðmerkingar, og í skrivi, dagfest 1. juni 2005 vísir E, stjóri, á

- stóra sjúkrafráverana
- at tað í nærmastu framtíð helst verður neyðugt við skurðviðgerð
- at stórir trupulleikar eru við at fyriskipa arbeiði orsakað av fráveruni hjá A
- stóru fíggjarligu útreiðslurnar fyri skúlan orsakað av sjúkuni hjá A
- at áhugamál skúlans ikki vórðu røkt, um A fær farloyvi eftir fyrru umsóknini
- at fyrra umsóknin ávirkar tilrættaleggingararbeiðið meira enn seinna umsóknin

Skúlin vísir á, at avgerðin er grundað á eina konkreta meting um tørv skúlans, har serligur dentur er lagdur á tilrættaleggingina av arbeiði skúlans á ein skipaðan og vælvirkandi hátt og at byrgja upp fyri óvæntaðum útreiðslum.

Skúlin skoytir uppí, at um A fær viðhald í kæru síni, so verður

skúlin at umhugsað uppsøgn av starvsmanninum smb. galdandi reglum.

Í skrivi, dagfest 28. juni 2005, ger B, advokatur viðmerkingar til viðmerkingarnar hjá E. Hann vísir á, at málið um niðursetta arbeiðstíð frá august 2005 hevur størri týdning enn málið um farloyvi. Hann ger vart við,

- at tað er ikki rætt, at tað er neyðugt við nýggjari skurðviðgerð,
- at útreiðslurnar av sjúkuni hjá A ikki hava verið kr. 250.000 og ynskiligt er við dokumentatión,
- at stjórin ikki hevur so stóra samkenslu við A, sum hann vil vera við, m.a. við ikki at laga seg eftir tilmælinum frá eygnalæknanum,
- at stjórin ikki hevur haldgóðar grundgevingar fyri at sýta honum at arbeiða niðursetta tíð,

Meira alment tekur B samanum. Hann vísir á, at eingin kann tryggja sær, at heilsan hjá starvsfólki viknar í longri ella styttri tíðarskeið, at leiðsluháttur stjórans er skelkandi, og at mest skelkandi er, at stjórin fráboðar í skrivinum, at um A fær viðhald í kæruni, verður skúlin at umhugsa uppsøgn av A sbr. galdandi reglum.

**Kæruviðgerð**

Sambært galdandi reglum tekur skúlastjórin avgerð í málum um niðursetta tíð, og hansara avgerð kann kærast til hægri myndugleika. Tað gongur fram av teimum upplýsingum, sum eru í málinum, at umsóknin um niðursetta tíð er grundað á veiku heilsustøðu tygara. Tygum vísa í grundgevingunum á, at sambært sáttmála millum Felag Maskinmeistaralærara og Fakfelag Sjómansskúlalærara og Fíggjarmálaráðið hava tygum rætt til farloyvi. Í § 4 er ásett: „Lærara skal verða loyvt at fáa farloyvi við ongari løn, tá ið tað ikki stríðir ímóti áhugamálum skúlans“ og í § 24: „Lærari í fullum starvi kann eftir umsókn fáa niðursett tímatal.“

Mentamálaráðið skal gera hesar viðmerkingar til hesar ásetingarnar og annars alment um umsóknina um farloyvi og niðursetta tíð.

Ásetingarnar í sáttmálanum geva ikki *rætt* til farloyvi ella niðursetta tíð, men tær áseta, at lærari *kann* fáa farloyvi ella niðursetta tíð. Í sambandi við farloyvisumsóknir verður vanliga tikið atlit til viðurskiftini hjá viðkomandi lærara og tørvin hjá skúlanum. Tað er ongastaðni ásett, hvussu hesi atlit skulu metast í mun til hvørt annað, og hetta kann helst í mongum føri skapa iva um avgerðina. Tað er setanarmyndugleikin, sum tekur avgerð um, hvussu stórur dentur verður lagdur á einstøku grundgevingarnar. Ofta áseta sáttmálar, á sama hátt sum sáttmálin millum Fíggjarmálaráðið og Felag Maskinmeistaralærara, at starvsfólk „kunnu" fáa farloyvi, og myndugleikin kann tí altíð sýta farloyvi við sakligum grundgevingin. Maskinmeistaraskúlin hevur í sínum grundgevingum víst á ymiskar metingar sum grundarlag undir sýtingini. Hesar eru m.a.

1. tørvur skúlans,
2. trupulleikar við at fyriskipa arbeiði,
3. tilrættalegging av arbeiðinum og
4. trupulleikar við at finna egnaðan avloysara.

Talan er um fyrisitingarligar og námsfrøðiligar metingar, sum Mentamálaráðið ikki kann seta til viks sum ósakligar. Mentamálaráðið kann ikki taka undir við B, har hann vísir á, at stjórin ikki hevur haldgóðar grundgevingar fyri at sýta A at arbeiða niðursetta tíð. Ábyrgdarøki skúlastjórans er sambært lóg at gera tær ítøkiligu metingarnar um tilrættalegging, fyriskipan og tørv í skúlanum, og Mentamálaráðið kann ikki við teimum grundgevingunum tygum ella advokatur tygara føra fram, seta hesar til viks. Tilmæli eygnalæknans, um at tygum skulu hava ávísar uppgávur, eiga at verða fataðar, sum ein lýsing av heilsustøðuni, og ikki sum ein staðfesting av hvørjar uppgávur tygum eiga at røkja. Tað er bert skúlastjórin, sum kann taka avgerð um, hvørjar uppgávur tygum eiga at røkja í skúlanum.

Hinvegin tekur Mentamálaráðið undir við B, advokati, í atfinningum hansara mótvegis skúlastjóranum í sambandi við nógvu umrøðuna av sjúku tygara, áseting av útreiðslunum í hesum sambandi og fráboðanini um, at um tygum fáa viðhald í kæruni, so verður skúlin at umhugsa uppsøgn av tygum sambært galdandi reglum. Hesar viðmerkingar skúlastjórans kunnu als ikki góðtakast, og Mentamálaráðið skal við hesum taka frástøðu frá teimum. At tygum

hava ávísar heilsuligar trupulleikar er greitt ávíst í skjølunum. Tað er alment kent, at drúgv sjúkralega við fleiri longri tíðarskeiðum kunnu heimila setanarmyndugleikanum at siga starvsfólk úr starvi, men tað er ikki góður starvsfólkapolitikkur og heldur ikki í tráð við góðan fyrisitingarsið at vísa á, hvussu nógv stovnurin missir orsakað av sjúku hjá ávísum starvsfólki og heldur ikki at boða frá, at stovnurin umhugsar uppsøgn um kæran fær viðhald.

Mentamálaráðið fer at taka hetta mál upp við stjóran og í skrivi at rættleiða hann um hesi viðurskifti og leggja áherðslu á, at hetta ikki eigur at koma fyri aftur.

**Niðurstøða**

Kæran frá A um farloyvi og um at arbeiða niðursetta tíð seinna hálvár 2005 verður ikki gingin á møti. Í sambandi við avgerðina er serliga dentur lagdur á grundgevingar skúlastjórans um tørv skúlans og trupulleikar við at fyriskipa og tilrættaleggja arbeiðið.

Stjórin í Maskinmeistaraskúlanum fær eina skrivliga rættleiðing frá Mentamálaráðnum í sambandi við viðmerkingar hansara um ætlaðu uppsøgnina av A og kostnaðin av sjúkradøgunum.

Avgerðin kann ikki kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika.

Avrit av hesum skrivi er sent til ... v/ B og Maskinmeistaraskúlan v/ E.“

Tann 1. aug. 2005 hevur B, adv., sent landsstýrismanninum í mentamálum soljóðandi teldubræv:

„Góðan dag !
Eg kom á læstar dyr í Mentamálaráðnum við bornum brævi, sum eg tí má fáa fram til tygara á annan hátt. Vóni ikki, at telduposturin eisini kemur á læstar dyr.

Brævið, eg skuldi bera tær, er soljóðandi:

Viðv. umbøn um uppafturtøku av avgerð um farloyvi.

Vísandi til avgerð Mentamálaráðsins, dagfest 19. juli 2005, (tykkara

máltal: ...) í kærumáli, dagfest 18. mai 2005, sum undirritaði sendi Mentamálaráðnum vegna A, lærara á Maskinmeistaraskúlanum, um at virka sum lærari við hálvari tíð frá í summar, loyvi eg mær at heita á tygum um at taka umsóknina um niðursetta tíð upp til nýggja viðgerð og avgerð.

Grundgeving mín er, at skúlans leiðsla onga ítøkiliga grundgeving hevur givið, til tess at avgerðin kann halda – hvørki sakliga ella løgfrøðiliga. Sýting skúlans er burtur úr vón og viti, tí einki er til hindurs fyri, at aðrir haldgóðir undirvísarar kunnu taka ta undirvísing, sum klientur mín hevði slept. Ein heildarmeting við støði í starvsfólkapolitikki landsstýrisins ger málið bara uppaftur meir skammiligt og ljótt. Maðurin hevur í samfull 23 ár tænt skúlanum trúliga og væl, og nú hann lættliga kundi hildið fram við hálavari tíð (og løn tilsvarandi), verður hann hjartaleyst skúgvaður út í myrkrið.

Tygum eru einasti maður, sum kann gera gott aftur tað, sum í hesum máli er niðurbrotið, og tískil fari eg at heita á tygum um at taka eina skjóta og haldbara avgerð – til gagns fyri allar partar.

Avrit av hesum skrivi verður sent yrkisfeløgunum fyri ávikavist Maskinmeistaraskúlan og Føroya Sjómansskúla.“

Tann 7. aug. 2005 hevur B, adv. aftur sent landsstýrismanninum soljóðandi teldubræv:

„Góðan dag aftur, D !
Tað ger mær ilt at og bíður mær hart ímóti at skriva enn einaferð til tygara í hesum máli, tí tað átti at verið so hjartaliga óneyðugt.

Støðan er tann, at ein embætismaður vendi sær til A straks eftir mína „bornu áheitan.“ Boðskapurin var bæði stuttur og gleðiligur: A skuldi bara venda sær til skúlastjóran, so skuldi alt laga seg. Treytin var, at eingin annar slapp við til samrøðuna. A ráðførdi seg sjálvandi við undirritaða og felag sítt. Feløgini ráddu A frá at fara einsamallur á umrødda fund, men treyta

sær, at embætismaðurin eisini var við. Hesum vildi embætismaðurin ikki hoyra talan um og minti A á, at hann helt summarfrí.

Málið sær er tí uppsteðgað !!

Hjálpti einki annað, var gamalt, at áheitan varð send kongi. Tað ger eg so enn eina ferð.

Hvat snýr málið seg um? Jú, ein heilsuveikur maður biður um at sleppa at arbeiða niðursetta tíð við tilsvarandi niðursettari løn. Hetta er eitt so lítið ynski, ein kann hugsa sær. Í veruleikanum biður hann bara um at sleppa at arbeiða, tað hann orkar og fáa løn fyri tað, hann orkar. Ongar sømdir -aðrar enn – eina hálva tímatalvu !!!

Hví skal A ikki fáa hesar lítlu sømdir? Almenni starvsfólkapolitikkurin og praksis hjá tí almenna elva til at halda fólki á arbeiðsmarknaðinum longst gjørligt. Hetta betrar øll úrslit bæði búskaparliga og persónligt. t.v.s. best fyri allar partar. T.d. hevur Føroya Lærarafelag sáttmálaáseting um, at sjúkir lærarar kunnu hava 22% niðursettu tíð uttan lønarmiss. Hesar sømdir verða veittar teimum við 60 ára aldur, uttan at sjúka annars er uppií.

Eg skilji ikki skúlastjórans ræðslu fyri, at nakar er við á einum fundi. Meinti, at opinleiki og vanligt reinføri er best fyri allar partar. T.d. hava eg og skúlastjórin í øðrum høpi arbeitt fyrimyndarliga væl saman, beint áðrenn hann gjørdist skúlastjóri. Hann hevur onga menniskjaliga ella persónliga orsøk at ræðast meg. Eg haldi, at hann ger eitt mistak, tí nútíðarsamfelagið og borgarar tess finna seg ikki í ógrundaðum atburði. Hann verður noyddur at læra seg spælireglurnar hjá tí almenna, annars fara almennu spælireglurnar at fella hann. Persónliga vil eg honum einki ilt, og mín persónur hevur heldur ongan týdning í hesum máli. Trupulleikin er bara, at hann er á skeivari kós. Tað lysti meg at vita, hvat Umboðsmaðurin sigur til, at málsviðgerðin í málinum noktar A niðursetta tíð/løn, grundað á, at tað stríðir ímóti skúlans áhugamálum, meðan óalmenna viðgerðin kann fixa problemið við einum loynifundi.

Góði D !! Sum landsstýrismaður og við ráðharraábyrgd er alneyðugt, at

tygum straks tekur í nakkaspikið á skúlanum og gevur harraboð um, at A møtir á skúlanum til vanliga tíð í morgin, og at hann fær niðursetta tíð/løn, soleiðis søkt er um.

Takk fyri lesturin, og Gud signi verk tygara!“

Við teldubrævi, dagfest 10. aug. 2005, hevur advokaturin sent landsstýrismanninum soljóðandi áminning:

„Góðan dag!
Eg havi einki hoyrt um, at nakað er hent A at frama – bara deyðatøgn! Eg eri nú í teirri støðu, at eg ikki kann bíða meir og havi tí avgjørt at fara víðari við málinum, er A ikki boðsendur at koma til arbeiðis aftur áðrenn kl. 12:00 í morgin tann 11. aug. 2005.“

Við skrivi, dagfest 11. aug. 2005, hevur Mentamálaráðið sent advokatinum soljóðandi fráboðan:

**„Viðv.: A / Maskinmeistaraskúlin**
Mentamálaráðið hevur móttikið teldupostar tygara, dagfestar 1. august og 10. august 2005. Orsakað av summarfrí hjá starvsfólkunum í Mentamálaráðnum, hevur ikki verðið møguligt at viðgera málið fyrr enn nú.

Í løtuni verður kannað eftir, hvørt Mentamálaráðið kann gera meira við málið, sum annars er avgjørt við skrivi okkara, dagfest 19. juli 2005. Miðað verður ímóti, at tygum fáa svar í næstu viku, hvørt kæran um niðursetta arbeiðstíð kann verða tikin til nýggja viðgerð.“

C, deildarstjóri í Mentamálaráðnum hevur skrivað soljóðandi notat, dagfest 15. aug. 2005:

**„Notat viðv. kærumálið hjá A**
Lstm, aðalstjóri, stjórin á sjómans- og maskinmeistaraskúlanum og undirritaði komu ásamt um at gera eina semingsroynd har heitt var á A um at seta seg í samband við stjóran á sjómans- og maskinmeistaraskúlanum, nú úrskúrður er gjørdur í kærumálinum viðv. farloyvi v.m.

Hetta var gjørt eftir at stjórin á sjómansskúlanum er tilreiðar at tosa við A fyri at leggja alt gamalt afturum, tvs. byrja av nýggjum, og at A altíð er vælkomin at tosa við seg um framtíðina og starvsviðurskiftini annars á skúlanum.

Undirritaði ringdi til A tann 2. august 2005 og greiddi honum frá hesum, og A legði dent á, at hann hevur sakførara og fakfelagið, sum koyra málið fyri seg, og at tað tí ikki ber til hjá honum at steðga málinum nú, tí eftir tí sum hann hevur fingið upplýst frá sakførara sínum, eru tað enn aðrir møguleikar, sum ikki eru troyttir fyri at fáa broytt avgerðina hjá stjóranum á sjómans- og maskinmeistaraskúlanum og MMR. A greiddi frá, at hann fór at tosa við sakføraran og fakfelagið fyri at fáa at vita hvat hesir partar halda, at hann skal gera, nú undirritaði hevur sett meg í samband við hann, men at hann dugir illa at síggja hvussu hetta kann bera til nú, tí sakførarin og fakfelagið koyra málið.

A ringdi aftur til undirritaða og boðaði frá, at hann var tilreiðar at tosa við stjóran á sjómans- og maskinmeistaraskúlanum treytað av, at undirritaði ella B, sum starvast á sjómans- og maskinmeistaraskúlanum, eru tilstaðar undir samrøðuni. Undirritaði setti seg í samband við stjóran á sjómans- og maskinmeistaraskúlanum og greiddi frá hesum, men E segði at hann er tilreiðar at tosa við A fyri at leggja alt gamalt afturum, tvs. byrja av nýggjum, og at A altíð er vælkomin at tosa við seg um framtíðina og starvsviðurskiftini annars á skúlanum, men at hetta er treyta av at A kann tosa við seg uttan at ein triðji partur verður við til samrøðuna.

Undirritaði boðaði A frá hesum, og hann greiddi frá, at hann fór at seta seg í samband við E dagin eftir, men tað gjørdi A ikki og niðurstøðan er tískil, at semingsroyndin ikki eydnaðist."

A hevur skrivað soljóðandi frágreiðing, dagfest 16. aug. 2005, frá fundi millum ráðið, skúlastjóran og hann sjálvan:

**„Fundur í MMR týsdagin 16. august 2005 kl. 14.**

Á fundinum vóru: D, landsstýrismaður, C, deildarstjóri, E, skúlastjóri og A.

D bjóðaði vælkomin og greiddi frá endamálinum við fundinum.

C las upp fýra treytir fyri fundin:
1. Partarnir skuldu koma til eina semju á fundinum.
2. Báðir partar skuldu vísa vilja til eina loysn.
3. Onki skuldi skrivast niður, og
4. um ongin semja fekst, so hevur ongin fundur verið (non existing).

C segði, at MMR ynskti, at E og A í einrúmi tosaðu einans um málið at loyva A at arbeiða hálva tíð, onki annað. E nevndi, at hann mátti koma inn á onnur mál eisini.

D og C fóru nú av fundinum. E byrjaði beinanvegin at tosa um, at A hevði verið óloyalur yvir fyri skúlanum. Nevndi, at A var farin uttan um stjóran og hevði sent teldupost til D og C. A vísti á, at hann hevði bert sent avrit av tveimum brøvum til D og C.

Tosað varð eisini um lønarmálið hjá A frá heystinum 2004. E segði seg hava víst sera góðan vilja at loysa málið. A vísti á, at E fleiri ferðir hevði lovað at flyta írestandi peningin, men gjørdi tað ongantíð. E lovaði at flyta upphæddina í kravinum frá B minus kr. 700 til A í morgin, somuleiðis sakførararaútreiðslurnar. Lønarmálið hjá G (aug. 2000 – des. 2002) varð eisini nevnt. A segði, at hetta mál hevði skapt øsing og misnøgd á skúlanum, tí ongin kundi góðtaka, at ein lærari fær fulla løn í 2½ ár fyri nærum onki at gera. Slíkur persónur, vísti A á, átti ikki at verið settur sum varastjóri og enn minni sum fyribils stjóri í aug. 2004.

A spurdi so, um E var sinnaður at loyva A at arbeiða hálva tíð. E svaraði, at tað var ikki at gera semju; hann vildi ikki, at A skuldi „vinna“ málið. E segði, at A hevði biðið um 50 %, og E hevði noktað umsóknini, tvs. hevði lovað 0 %, og hevði fingið viðhald í MMR. Tí mátti ein semja hava útgangsstøði í 25 %. Hann skuldi tó vísa góðan vilja og royna at nærkast 40 % arbeiðstíð. Hann kundi tó ikki lova nakað, tí hann legði ikki tímatalvu sjálvur.

D og C komu nú aftur á fundin uml. kl. 15.30. E førdi fram, at hann vildi toyggja seg til uml. 40 % arbeiðstíð, men vildi ikki binda seg til nakað, tá A bað um at fáa skrivliga váttan um minst 40 % tíð. A var ikki serliga glaður fyri hesa loysn, sum serliga C royndi at tvinga A til at góðtaka. A kendi seg rættiliga kroystan, tí hann var einsamallur móti trimum frá hinum partinum. D mótmælti, at hann var í nøkrum parti. Teir tríggir noktaðu A at brúka sín rætt at ráðføra seg við fakfelagið og sakføraran.

Fundurin endaði við, at E lovaði at boða A og C frá fríggjadagin 19. august, um A kundi byrja at arbeiða mánadagin 22. august 2005. Tá A spurdi, um hann hevði rætt til løn fyri juli og august, svaraði E: Nei, tú fært løn frá tí degi, tú byrjar aftur. Markið fyri at fáa pensjónsgjald er 50 % løn. Tí heitti C á E um at gjalda A pensjónsgjald, hóast arbeiðstíðin kom at verða 40 %. Hesum noktaði E fyri, og segði at A átti at vera nøgdur, tí í dag fær hann onga løn.

C kravdi, at A bert kunnaði B um fundin, og ikki tosaði við I, fakfelagsformann, um nakað. Fundurin var fleiri ferðir við at enda í „non existing“ (pkt. 4).

Fundur lokin kl. 17“

Tann 16. aug. 2005 sendi A soljóðandi teldubræv til C, deildarstjóra í Mentamálaráðnum:

„Á fundinum í dag nevndi tú, at eg hevði sent tær teldubræv um alment innlit í mál um løn hjá varastjóranum G. Brævið er journalført, segði tú. Eg dugi ikki at síggja, at eg havi sent tær nakað bræv. Brævið er bert sent til limirnar í fakfelagnum 14. juni 2005.

Kanst tú gera so væl og vátta, at tú hevur ikki fingið tað frá mær?

Kanst tú gera so væl og siga mær, hvør hevur sent tær brævið?“

Tann 18. aug. 2005 sendi A soljóðandi teldubræv til aðalstjóran í Mentamálaráðnum:

„Týskvøldið sendi eg deildarstjóranum niðanfyri nevnda bræv. Onki svar er komið enn. Eg fari tí at biðja teg um alment innlit í málið, so eg kann fáa svar upp á teir tveir spurningarnar.“

Tann 19. aug. 2005 hevur aðalstjórin svarað A við soljóðandi teldubrævi:

„Umbønin er móttikin og er farin til avgreiðslu.“

Tann 19. aug. 2005 hevur skúlastjórin sent A soljóðandi teldubræv:

„Góðan dagin A!
Eg havi sum lovað ringt til tín seinnapartin í dag, men nakrar ferðir var upptikið og nú svarar ikki!

Eg arbeiði við at tú kemur til arbeiðis í komandi viku. Tú skal undirvísa M5 í ELtøkni, og er tað 9,54 tímar pr viku, hetta hálvárið. Løn verður goldin frá fyrsta starvsdegi.

Viðvíkjandi pension:. Smb sáttmálanum, so hevur tú ikki rætt til pension, tá tú er undir hálva tíð ! Smb semju við Mentamálaráðið, so verður pension goldin í forhold til 9,54 tímar

Eisini er smb semju, givin boð til Gjaldstovuna, at gjalda út kr 22.249,67 (løn) til tín, eins og boð er givin um at gjalda ... kr 2.387,50

Vinarliga boða mær frá um hetta er ein loysn, sum tú góðtekur og ring til mín á fartelefonina, tí tað er ikki vist at eg lesið teldupostin hjá skúlanum í vikuskiftinum.“

Tann 21. aug. 2005 hevur skúlastjórin sent A soljóðandi teldubræv:

„Eg havi aftur ring til tín í dag (... og ...) men eingin tekur telefonina.

Eg síggi at tú hevur lisið teldupostin (sí niðanfyri), men ikki svara !
Hvussu skal tað skiljast ?

Støða mín er, at eg má vita í dag, um tú góðtekur loysina, sum eg sendi fríggjadagin ella ikki!

Eg má hava at vita í dag (sunnudag) um tú góðtekur ella ikki, tí planleggjast má fyri morgin degnum. Eg havi higartil ikki givið boð um at broyta skemaði, tvs at vit koyra eftir skemanum frá august byrjan og ert tú tí ikki innkomin í skemaði enn !

Um eg ikki hoyri frá tær í dag, so skalt tú ikki koma til arbeiðis mánadagin, tí slíkt má planleggjast. Eg vil hava greitt svar til teldupost mín, áðrenn tú byrjar.“

Tann 22. aug. 2005 sendi L, undirvísingarleiðari, A soljóðandi teldubræv:

„Í teldupostí, dagfestur 16. august 2005, til C, deildarstjóra setur tú fram tveir spurningar viðvíkjandi málið um alment innlit í mál hjá G.

Í teldupostí, dagfestur 16. februar 2005, til K, aðalstjóra biður tú um alment innlit í skjøl sum viðvíkja G og hansara farloyvi og víðari lesnaði á ... .

Seinni sama dag sendi K teldupostin víðari til C. Við hesum skuldi báðir spurningarnir frá tær verið svaraðir.“

Sama dagin hevur A svarað undirvísingarleiðaranum soleiðis í teldubrævi:

„Hatta er púra misskilt. Eg tosi um eitt bræv frá mær til limirnar í fakfelagnum dagf. 14. juni (ikki 16. februar) 2005, sum onkur hevur sent víðari til C, helst nakrar dagar seinni. Fyrri spurningurin er

svaraður munnliga. Seinni spurningur er ikki svaraður: Hvør sendi C brævið? C kennir svarið, so tað er skjótt at avgreiða.

Kunnu tit gera so væl og svara."

Við skrivi, dagfest 22. aug. 2005, hevur B, adv., sent Mentamálaráðnum soljóðandi fráboðan:

„**Viðv. A, lærari á Maskinmeistaraskúlanum.**
Vísandi til skriv mítt frá 1. aug. 2005 til Mentamálaráðið viðvíkjandi uppafturtøku av máli um farloyvi (niðursett tíð og samsvarandi løn), skal eg boða frá, at klientur mín er farin aftur til arbeiðis, og at málið tískil ikki er aktuelt longur.

Havi eg skilt støðuna rætt, er A í óløntum farloyvi alt árið 2005, og at hann skal byrja aftur í sínum gamla starvi 1. januar 2006."

Tann 24. aug. 2005 hevur L, undirvísingarleiðari, sent A soljóðandi teldubræv:

„Sum nevnt frammanundan, so er bræv frá tær um alment innlit í mál hjá G, dagfest 16. februar 2005, skrásett her í Mentamálaráðnum. Ongar aðrar áheitanir frá tær um alment innlit í mál hjá G eru skrásettar her í Mentamálaráðnum.

Brævið tú vísir til, frá tær til limirnar í fakfelaginum, dagfest 14. juni 2005, er ikki skrásett her í Mentamálaráðnum."

Tann 25. aug. 2005 hevur A sent aðalstjóranum í Mentamálaráðnum soljóðandi teldubræv:

„Til K, aðalstjóra.
Tann 18. august 2005 sendi eg aðalstjóranum umsókn um alment innlit í mál, sum viðvíkur mær persónliga. Málið snýr seg um, at onkur hevur sent C, deildarstjóra, eitt bræv, sum eg havi skrivað 14. juni 2005 og sent til limirnar í fakfelag Maskinmeistaralærara. Brævið er ikki ætlað Mentamálaráðnum. Hvat ætlanin hjá tí ókenda

persóninum er við at senda MMR brævið, kann eg bara gita mær til. Deildarstjórin hevur í telefonsamrøðu 18. aug. 2005 váttað, at undirritaði hevur ikki sent honum brævið, men vil ikki upplýsa, hvør hevur sent honum tað. Brævið til deildarstjóran er at finna í MMR og eigur sjálvandi at vera skrásett. L, undirvísingarleiðari, roynir eisini, sum sæst niðanfyri, at sleppa undan at avgreiða málið.

Eg fari tí enn einaferð at heita á aðalstjóran um at veita mær fult innlit í málið við øllum viðkomandi skjølum. Um onki fullgott svar er komið innan 10 dagar, kenni eg meg noyddan at venda mær til løgtingsins umboðsmann. Tá verður eisini neyðugt at greiða umboðsmanninum frá tí sum hendi 16. august 2005 í MMR, tá hetta mál gjørdist mær kunnugt.

Við vón um fult innlit sum skjótast."

Tann 5. sept. 2005 sendi A landsstýrismanninum og C, deildarstjóra í Mentamálaráðnum, soljóðandi teldubræv:

„Av tí at deildarstjórin C ringdi til mín 18. august 2005, har hann m.a. spurdi, um eg hevði fingið ta avtalaðu upphæddina fyri írestandi løn 2004 flutta á mína kontu, kenni eg tað sum mína skyldu at boða MMR frá, at enn er onki oyra komið á mína kontu. Avtalan segði, at upphæddin (kr. 22.949,67 minus kr. 700,00) skuldi flytast dagin eftir fundin 16. august 2005.

19. august skrivar skúlastjórin soleiðis í teldubrævi til mín:

"Eisini er smb semju, givin boð til Gjaldstovuna, at gjalda út kr 22.249,67 (løn) til tín, eins og boð er givin um at gjalda ... kr 2.387,50"

2. sept. 2005 ringdi eg til Gjaldstovuna at kanna málið. Gjaldstovan sigur, at fyrst komu boð um at flyta omanfyri nevndu upphædd til mín. Síðani komu nýggj boð um ikki at flyta upphæddina. Tann 1. sept. Komu boð frá skúlanum um at flyta kr. 12.904,- á mína kontu. Hetta er greitt brot á avtaluna. Sum sagt, so er enn onki komið á mína kontu, og nú eru tríggjar vikur síðani fundin 16. august 2005,

har landsstýrismaðurin, deildarstjórin, skúlastjórin og undirritaði vóru við.

Sostatt má eg bara staðfesta, at avtalan er brotin, og fakfelagið verður tí noytt at fara í rættin við málinum."

Við skrivi, dagfest 5. okt. 2005, hevur A sent Mentamálaráðnum soljóðandi áheitan:

**„Um írestandi løn, eftirløn og alment innlit**

**Írestandi løn fyri 2004**

Á fundi í Mentamálaráðnum týsdagin 16. aug. 2005 varð avtala gjørd um, at Maskinmeistaraskúlin skuldi gjalda mær lønina (kr. 22.249), sum írestaði fyri heystið 2004, so eg kundi fáa ta í sáttmálanum ásettu mánaðarlønina.

5. sept. havi eg í teldubrævi (skjal 3) boðað MMR frá, at avtalan ikki er hildin.

8. sept. vórðu kr. 12.903 fluttar mær í staðin fyri sum avtalað kr. 22.249. Onki eftirlønargjald er goldið av upphæddini.

Eg loyvi mær tí at spyrja landsstýrismannin:

1. Hevur MMR tikið neyðug stig til at tryggja, at avtalan verður hildin?
2. Góðtekur landsstýrismaðurin, at ein avtala, sum er gjørd undir hansara hjáveru, verður brotin?

**Eftirlønargjald**

Á sama fundi kravdi MMR, at skúlin skuldi gjalda mær eftirløn, hóast arbeiðstíðin nú er minni enn 50%, sum sáttmálin ásetur sum minstamark fyri at fáa eftirlønargjald. Eg gangi tí út frá, at MMR skrivliga hevur givið skúlastjóranum loyvi at gjalda mær eftirløn (skjal 1). Loyvi mær hervið at biðja landsstýrismannin senda mær avrit av hesum skrivi. Á fundinum varð onki nevnt um, at eftirlønargjaldið skuldi roknast av 50% løn ella minni. Tí skilti eg boðini frá MMR, sum at skúlin skuldi flyta mær fult eftirlønargjald.

Fyrsta vanliga lønarflytingin var 26. sept., **men onki eftirlønargjald er flutt til eftirlønargrunnin**. Eg byrjaði arbeiðið aftur 22. august, men ongin løn er goldin fyri tíðarskeiðið 22.-31. august.

Nevnast kann, at varastjórin á Maskinmeistaraskúlanum, sum las á ... í 3½ ár, umframt at fáa fulla løn, eisini fekk fult eftirlønargjald í øllum tíðarskeiðnum. Tað kann ikki vera rætt, at starvsfólk á sama stovni fáa so ymiskar sømdir.

Loyvi mær at heita á landsstýrismannin um at fáa eftirlønarmálið í rættlag.

**Alment innlit**
Eisini kom fram á hesum sama fundi, at eitt teldubræv, sum eg 14. juni 2005 sendi limunum í fakfelag mínum, varð sent skúlastjóranum og deildarstjóranum í MMR, sum var við á fundinum. Eg havi í tveimum teldubrøvum biðið aðalstjóran um alment innlit í hetta mál. Seinna brævið (skjal 2) er sent 25. aug. 2005. Onki svar er komið, so enn havi eg ikki fingið innlit í málið, sum eg havi rætt til sambært lógini um alment innlit. Í hesum føri havi eg enntá rætt til víðkað innlit sambært § 4 í lógini.

Eg loyvi mær tí at heita á landsstýrismannin um at syrgja fyri, at málið verður avgreitt, sum lógin ásetur.

At enda skal eg boða frá, at eg ikki aftur ætli mær at møta á einum slíkum fundi, sum varð hildin í Mentamálaráðnum 16. august 2005."

Við skrivi, dagfest 28. okt. 2005, hevur C, deildarstjóri, svarað A soleiðis:

**„Viðvíkjandi írestandi løn, eftirløn og umbøn um alment innlit**
Mentamálaráðið hevur móttikið skriv tygara dagfest tann 5. oktober 2005, viðvíkjandi írestandi løn, eftirløn og umbøn um alment innlit.

*Innleiðandi málslýsing*
Tygum hava verið í starvi á Maskinmeistaraskúlanum síðani 1984, og hava tygum røkt starvið, sum „settur lærari á Føroya Maskinskúla" til við árslok 2003, tá tygum gjørdust sjúkur.

Tygum vóru sjúkrameldaður fyrra hálvár 2004, og byrjaðu aftur við skúlaársbyrjan í august 2004, har tygum hildu fram í sama starvi við somu arbeiðsuppgávum, sum tygum høvdu áðrenn tygum gjørdust sjúkur. Hetta var staðfest av Mentamálaráðnum eftir at tygum høvdu kært avgerðina hjá skúlanum viðvíkjandi tygara arbeiðsuppgávum.

Tygum gjørdust aftur sjúkur í desember 2004 og vóru sjúkrameldaður til tann 18. februar 2005, og søktu tygum um farloyvi frá 20. februar 2005 til 30. juni 2005, eins og søkt var um at arbeiða niðursetta tíð svarandi til hálva tíð frá 1. juli 2005 til 31. desember 2005. Skúlin kundi ikki ganga umsókn tygara á møti, og tí søktu tygum um farloyvi restina av árinum, og var umsókn tygara tá gingin á møti. Tygum kærdu síðani skúlans avgerð um, at tygum ikki fingu farloyvi í mun til fyrru umsóknina. Mentamálaráðið staðfesti avgerðina hjá skúlanum 19. juli 2005, men gav skúlanum eina rættleiðing í mun til handfaringina av málinum.

Eftir hetta vendi sakførari tygara sær til Mentamálaráðið og greiddi frá, at tygum ynsktu at koma aftur til arbeiðis, tí tygum mettu, at tygum vóru førur fyri at taka arbeiðið upp aftur við niðursettum tímatali.

Tann 2. august 2005 gjørdi Mentamálaráðið eina roynd, har heitt var á tygum um at fara at tosa við leiðsluna á skúlanum, har tit í felag kundu finna eina loysn, soleiðis at tygum kundu koma til arbeiðis og arbeiða eitt ávíst tímatal, sum bæði tygum og skúlin kundu taka undir við. Tygum vildu ikki tosa við leiðsluna á skúlanum uttan so, at Mentamálaráðið ella onkur annar triði partur var hjástaddur. Sostatt var staðfest, at royndin hjá Mentamálaráðnum miseydnaðist.

Tann 16. august gjørdi Mentamálaráðið enn eina roynd saman við tygum og skúlanum, sum hevði til endamáls, at tygum kundu koma til arbeiðis við niðursettari tíð. Tann 22. august byrjaðu tygum aftur við niðursettari tíð í starvi tygara út frá einari serligari avtalu, sum skúlin og tygum gjørdu út frá teimum fortreytum, sum vóru til staðar.

Støðan sum tygum, og sostatt eisini skúlin, hava verið í, er ein sera óheppin støða. Mentamálaráðið hevur tískil lagt stóran dent á, at skúlin kundi geva tygum serligar setanartreytir og arbeiðsumstøður, sum samsvara tygara ynskjum.

Mentamálaráðið fer frameftir ikki at gera meira við málið, og tískil eru viðmerkingarnar hjá Mentamálaráðnum niðanfyri endaligar.

*Írestandi løn*
Viðvíkjandi írestandi løn hevur Mentamálaráðið vent sær til Føroya Sjómans- og Maskinmeistaraskúla, og skúlin hevur greitt Mentamálaráðnum frá, at tygum ikki hava vent tygum til skúlan hesum viðvíkjandi, og skúlin metir, at tygum hava fingið ta løn, sum tygum hava rætt til í hesum sambandi. Tað skal við hesum verða sagt frá, at hetta er eitt mál millum tygum og skúlan, og um tygum meta, at tað er eitthvørt, sum er ógreitt, ella sum ikki er í lagi í hesum sambandi, verða tygum vinarliga biðin um at taka hesi viðurskiftini upp saman við skúlanum. Mentamálaráðið er, sum tygum kunnugt, ikki partur í málinum, tí skúlin hevur setanarmyndugleikan eins og lønargjaldingar um hendi.

*Eftirlønargjald*
Mentamálaráðið hevur givið Føroya Sjómans- og Maskinmeistaraskúla boð um, at tygum skulu hava eftirlønargjald, sum er í samsvari við hálva løn sambært sáttmála.

*Alment innlit*
Viðvíkjandi umbøn um alment innlit, hava tygum fingið innlit í tey skjøl sum tygum hava biðið um innlit í. Fyri at ongin ivi skal verða hesum viðvíkjandi verður listi sum vísir øll skjøl sum eru skrásett í persónsmáli tygara hjálagdur. Eru tað onkur av hesum skjølum sum tygum ynskja innlit í verða tygum biðin um at boða Mentamálaráðnum frá hesum.

Listi sum vísir øll skjøl, sum eru skrásett í persónamáli tygara, er hjálagdur

Avrit av hesum skrivi, eins og avrit av skrivi tygara, er sent til Føroya Sjómans- og Maskinmeistaraskúla.“

A hevur skrivað frásøgn frá fundi á Lønardeildini, 4. nov. 2005. Frásøgnin, sum er dagfest 9. nov. 2005, og sum I og J við undirskriftum hava váttað at vera í lagi, er soljóðandi:

„**Fundarfrásøgn**
Fundurin var millum Lønardeildina (LND) í Fíggjarmálaráðnum (FMR) og felagið Maskinmeistaralærarar.

Umboð fyri Mentamálaráðið (MMR) var eisini við. Fundurin varð hildin í FMR á Argjum 4. november 2005 kl. 13.00.

Við vóru:
M og N, LND;
L, MMR;
I, J og A.

M bjóðaði vælkomin og segði, at fakfelagið hevði biðið um fundin.

I gjørdi vart við, at fundurin var avtalaður við Lønardeildina og undraðist á, hví umboð fyri MMR var við. M nevndi, at vanlig mannagongd var, at umboð fyri avvarðandi aðalráð var við til sáttmálasamráðingar. Hetta tók nevndin til eftirtektar, og L var við á fundinum.

**Lærararáðið og niðurskurðstímar § 25**
Fyrst varð spurningurin um lærararáð mótvegis námsfrøðiligum ráð umrøddur. Nevndin førdi fram, at lærararáðið er heimilað í lóg frá 1978, sum framvegis er í gildi. L nevndi lógina frá 2001, sum í viðmerkingunum nevnir lærararáðið. Hann segði, at MMR hevði tulkingarrættin í slíkum málum. M segði, at tað hevði týdning fyri komandi samráðingar, at málið um lærararáðið varð avgreitt.

Nevnt varð, at stjórin av sínum eintingum í sept. 2004 segði upp allar niðurskurðstímarnar; hetta er greitt brot á sáttmálan og slíkt kann fakfelagið ikki góðtaka.

Nevndin førdi fram, at niðurskurðstímarnir verða ikki nýttir til tað, teir eru ætlaðir, og at tekniska útgerð skúlans Undir Krákugjógv verður misrøkt. Framkomin útgerð, sum varð játtað í 2003 og 2004, er framvegis ikki tikin í brúk. Stórur partur av tímunum verður brúktur til uppgávur, sum MMR áður rindaði fyri. Yvirlitið frá skúlastjóranum, dagf. 19. sept. 2005, vísir greitt, hvussu lágt leiðslan raðfestir maskinmeistaraútbúgvingina í mun til skipsføraraútbúgvingina. Ongin av limum okkara fær nakran av teimum 25 tímunum. Hetta kann nevndin als ikki góðtaka. Nevndin góðtekur ikki, at simulatorútgerð Sjómansskúlans krevur 10 ferðir meira røkt enn øll útgerðin undir Krákugjógv.

**Farloyvi § 4**

Nevndin kundi ikki góðtaka, at ein lærari, sum vegna sjúku søkir um farloyvi í 4 mánaðir, fær tað noktað uttan nakra haldgóða grundgeving. Grein 4 sigur, at lærari „skal, alt tað ber til" fáa farloyvi. Í staðin verður lærarin tvingaður við hóttan um uppsøgn at søkja um farloyvi uttan løn í 10 mánaðir. M segði, at noktað farloyvi skal grundgevast væl sambært fyrisitingarlógini. LND kann ikki meta um tørv skúlans; tað ger stjórin.

**Niðursett arbeiðstíð § 24**

Nevndin kundi heldur ikki góðtaka, at sami lærari, sum eftir tilmæli frá serlækna søkir um loyvi at arbeiða hálva tíð, fær tað noktað uttan nakra haldgóða grundgeving. Nevndin kærdi málið til MMR.

MMR gekk ikki kæruni á møti í fyrsta umfari. L vísti á, at málið hevði fingið sakliga viðgerð í MMR. A vísti á, at seinni tók MMR málið uppaftur og heitti á skúlastjóran um at loyva læraranum at arbeiða niðursetta tíð.

M nevndi, at tað er stjórin sum avgerð, um ein umsókn kann gangast á møti. Noktandi svar skal grundgevast sambært fyrisitingarlógini. Hon nevndi, at vanliga verður ein slík umsókn játtað.

**Almenni starvsfólkapolitikkurin**

Nevndin førdi fram, at starvsfólkapolitikkurin verður ikki virdur av stjóranum. Dømi eru um, at starvsfólk hava fingið harðrenda sálarliga viðferð av leiðsluni. Nøkur starvsfólk eru hótt við uppsøgn uttan grundgeving. Málburðurin er mangan sera ljótur.

Tá nevnt varð, at stjórin hevur brúk fyri einum skeiði í almennari fyrisiting, kunnaði L um, at stjórin skuldi á slíkt skeið um stutta tíð.

Spurt varð, um starvsfólk hava skyldu at møta til starvsfólkasamrøðu við stjóran, tí tey aftra seg at fara í einrúm við stjóran. M og N søgdu seg ikki kunna svara; tær høvdu ongantíð hoyrt ein slíkan spurning.

Spurt varð eisini, um stjórin kann nokta at fundast við nevndina um sáttmálaspurningar, tí hann tímir ikki at hava fakfelag ella løgfrøðing við. M svaraði, at tað átti ikki at verið nakar trupulleiki fyri stjóran at fundast við fakfelagið.

Nevnt varð, at trivnaðurin er sera vánaligur á skúlanum og starvsfólkini kenna seg ótrygg við støðuna.

Øll vóru samd um, at skúlin hevur álvarsamar leiðslutrupulleikar.

**Annað**

Málið um írestandi løn fyri heystið 2004 til A varð eisini nevnt. M segði, at um ein lærari ikki fekk ta ásettu lønina, var hetta eitt mál, sum LND vildi taka sær av.

Spurt varð um møguliga álitisfólkaskipan, sum sáttmálin heimilar. M nevndi, at skipanin hjá Lærarafelagnum kundi brúkast sum fyrimynd.

Nevndin var glað um, at L var við á fundinum, tí flestu av umrøddu málunum viðvíktu MMR.

Fundur lokin kl. 15.00.“

Tann 16. des. 2005 hevur A sent soljóðandi teldubræv til Mentamálaráðið:

„Í skrivinum frá MMR dagf. 28. okt. 2005 eru skeivleikar, sum eg kenni meg noyddan at rætta.

**Rætting og viðmerkingar**

Tá sagt verður, at A byrjaði sum lærari í 1984, so er tað ikki rætt. Eg byrjaði í føstum starvi, fulla tíð tann 19. okt. 1981 á Føroya Maskinskúla. Sostatt gongur nú á 25. ári. Fari fyri triðju ferð at heita á MMR um at rætta hetta í skráseting tykkara.

Tit greiða frá sjúkrasøgu míni. Tað mátti ikki verið neyðugt at

endurtikið alla søguna ferð eftir ferð. Sjúkrasøguna kenni eg betur enn nakar annar.

Lýsingin av málinum viðvíkjandi umsóknini um farloyvi fyrra hálvár 2005 og loyvi at arbeiða hálva tíð er sera ófullfíggjað og eintáttað.

Tað sum hendi í málinum eftir 19. juli 2005 skal eg ikki gera viðmerkingar til her, men viðgerðin tykir mær ógvuliga løgin.

Eg havi ongantíð biðið um „serligar setanartreytir og arbeiðsumstøður", men bara um loyvi at arbeiða hálva tíð fyri hálva løn. Eg havi t.d. ongantíð biðið um, at starv mítt verður gjørt til eitt „vart starv", sum vanligt er í slíkum føri. Tá kunnu fólk arbeiða t.d. hálva tíð og kortini fáa fulla løn.

**Løn og eftirlønargjald**

Tit skriva, at eg havi ikki vent mær til skúlan um málið. Hetta er ikki rætt. Eg tosaði eitt sindur við skrivstovumannin, sum vanliga avgreiðir lønir, um málið, áðrenn eg skrivaði brævið til MMR 5. okt. 2005. Hann gav Gjaldstovuni skyldina, og nevndi, at málið hevur ferðast aftur og fram millum skúlan og gjaldstovuna. Hann nevndi eisini, at eg hevði rætt til løn í juli mánað í ár. Annars bar ikki væl til hjá mær at greiða honum frá eini avgerð, sum er tikin á fundinum í MMR 16. aug. 2005, har onki er skrivað niður.

Eg tosaði aftur við skúlan um málið 29. nov. 2005, men onki hendi. Seinasta royndin varð gjørd 7. des. 2005, tá fakfelagið sendi skúlanum bræv um málið. Skúlin skyldar mær framvegis 20 – 30 túsund krónur í løn og eftirlønargjaldi.

At enda kann eg upplýsa, at eg í samráð við eygnalæknan søkti um loyvi at arbeiða niðursetta tíð (50 – 60 %) árið 2006. Umsóknin varð játtað 30. nov. 2005."

Tann 19. des. 2005 hevur C, deildarstjóri, svarað A aftur við soljóðandi teldubrævi:

„Vísandi til teldupostin niðanfyri skal við hesum enn einaferð verða sagt frá, at tygum skulu samskifta við leiðsluna á skúlanum um øll viðurskifti tygara. Harumframt er tað illoyalt av starvsfólki at

venda sær beinleiðis til yvirskipaða mynduleikan uttan at leiðslan á skúlanum er kunnað um hetta frammandundan. Í hesum sambandi skal viðmerkjast, at illoyalitetur kann fáa avleiðingar fyri starvssetan tygara.

Viðvíkjandi rættingum, í sambandi við nær tygum byrjaðu sum lærari á Føroya Maskinskúla, skal við hesum verða sagt frá, at hetta nú er rætt skrásett í MMR.“

Við skrivi, dagfest 28. febr. 2006, hevur A sent Mentamálaráðnum soljóðandi innlitsumbøn:

**„Alment innlit**
Vísandi til lógina um alment innlit fari eg at loyva mær at biðja um innlit í fýra mál, sum øll viðvíkja mær persónliga.

**1. Eftirlønargjald til A**
Í skrivi til MMR, dagf. 5. okt. 2005, bað eg MMR um avrit av brævi til Maskinmeistaraskúlan, har MMR gevur skúlanum boð um at gjalda A eftirlønargjald, hóast arbeiðstíðin var minni enn 50%. Onki avrit kom, og eftirlønarmálið er ikki fingið í rættlag enn, hóast nógvar royndir. Í brævi til mín, dagf. 28. okt. 2005, skrivar MMR, at boð eru givin skúlanum um at gjalda A eftirlønargjald svarandi til 50% arbeiðstíð. Skúlin sigur seg ikki hava fingið nakað tílíkt skriv. Bæði Gjaldstovan og Lønardeildin í FMR siga í telefonsamrøðum 7. des. 2005, at slík boð frá MMR til skúlan eiga at vera skrivlig. Eg fari tí at biðja um avrit av skrivunum frá MMR til skúlan um eftirlønargjald til A sambært lógini um alment innlit.

**2. Rættleiðingar til skúlastjóran**
Í skrivi frá MMR til mín, dagf. 19. juli 2005, verður sagt, at skúlastjórin hevur fingið tvær rættleiðingar frá MMR fyri viðferðina av A undir sjúku: Onnur fyri at hótta MMR við, at um MMR loyvir A at arbeiða hálva tíð, so kann A vænta at verða uppsagdur, og onnur fyri at hava sett prís á sjúkuna hjá A og brúkt tað ímóti A. Eg fari at biðja um alment innlit í málið við avriti av rættleiðingunum til stjóran. Um

rættleiðingarnar eru givnar munnliga, fari eg biðja um at fáa at vita, nær tær eru givnar og undir hvørjum umstøðum.

**3. Teldubræv frá 16. juni 2005**

Tvær ferðir áður, 18. og 25. aug. 2005, havi eg biðið um alment innlit í eitt mál, sum snýr seg um, at ein ónevndur persónur hevur víðarisent MMR eitt teldubræv, dagf. 14. juni 2005, sum eg sendi limunum í fakfelagnum Maskinmeistaralærarar. Deildarstjórin C hevur váttað, at brævið er skrásett í skjalagoymslu tykkara. Hetta mál meti eg at vera sera álvarsamt, tí bæði deildarstjórin og námsfulltrúin L royna at sleppa undan at avgreiða málið. Sjá viðløgdu skjøl. Tað tykist sum at MMR ikki virðir lógina um alment innlit.

Teldubrævið frá 14. juni 2005 snýr seg um, at ein lærari á Maskinmeistaraskúlanum, G, sum tvær ferðir hevur fingið noktað farloyvi við løn frá MMR, kortini hevur fingið fulla løn í minsta lagi í 2½ ár, meðan hann hevur lisið á .... Talan sigst vera um kr. 700.000, sum lærarin helst hevur fingið útgoldið í heimildarloysi. Tann 26. mai 2005 bað eg um alment innlit í lønarmálið frá Fíggjarmálaráðnum (FMR), og fekk tað játtað uttan trupulleikar.

**4. Lønarmálið hjá maskinskúlalærara**

Eg eri kunnaður um, at FMR hevur sent málið um lønina hjá omanfyri nevnda lærara víðari til MMR at viðgera. Svarið frá FMR til mín er dagfest 8. juni 2005.

Vísandi til pkt. 3, fari eg at biðja um alment innlit í viðgerðina í MMR av lønarmálinum hjá læraranum, sum eg fekk innlit í frá FMR. Av tí at tað var undirritaði, ið byrjaði málið, haldi eg meg hava rætt at vita, hvat síðani er hent í málinum.

Hetta mál hevur stóran áhuga millum teir lærarar á Maskinmeistaraskúlanum, sum um ikki so langa tíð skulu útbúgva seg víðari eins og G.

Higartil hevur gingið sera striltið at fáa neyðugar upplýsingar frá MMR. Vónandi verður ikki soleiðis hesaferð."

Við skrivi, dagfest 6. mars 2006, hevur Mentamálaráðið svarað innlitsumbønini soleiðis:

> **„Viðvíkjandi umbøn um alment innlit**
> Í brævi, dagfest 28. februar 2006, biða tygum um alment innlit. Skjøl, sum tygum hava biðið um innlit í, eru viðfest hesum brævi.“

Tann 13. mars 2006 hevur A sent landsstýrismanninum í mentamálum soljóðandi skriv:

> **„Hóttur undir sjúkraviðgerð uttanlands**
> Tað kom mær dátt við at fáa hóttandi teldubrævið frá MMR, dagf. 19. des. 2005, meðan eg var staddur uttanlands í sjúkraørindum, har deildarstjórin óbeinleiðis heitir á skúlastjóran at siga meg úr starvi. Haldi tað vera MMR til lítlan sóma at senda mær slíkt bræv, meðan eg eri á ... í Keypmannahavn og beint áðrenn eg skuldi leggjast undir skurð fyri tíggjundu ferð. Vorðið sum jólagáva at fáa frá MMR.
>
> **Loynifundurin 16. august 2005**
> Eg skal eisini minna á, at tað var fakfelag mítt, sum gjøgnum sakførara vendi sær til MMR við kæru tann 18. apríl 2005. Margháttliga handfaringin av málinum í MMR eftir 19. juli 2005 tvingaði meg at taka málið úr hondunum á fakfelagnum. Tað var ongantíð ætlan mín at føra mína egnu søk; tí vendi eg mær til fakfelagið. Henda lógartryggjaða rætt mín átti MMR at virt og latið fakfelagið ført mína søk allan vegin. Tí kann tað ikki góðtakast, at MMR nú hóttir meg persónliga, bert tí eg ynski at rætta nakrar skeivleikar í brævi tykkara, dagf. 28. okt. 2005. Fakfelagið kann av góðum grundum ikki gera viðmerkingar til tað, sum fór fram á loynifundi (non existing meeting) í MMR tann 16. august 2005. Hetta hevur onki við illoyalitet at gera.
>
> Eg havi framvegis ta støðu, at MMR hevur skyldu at syrgja fyri, at tær avtalur um løn og eftirlønargjald, sum vórðu gjørdar 16. august 2005, verða hildnar. Hvar er rættartrygdin hjá borgaranum, tá avtalur, sum verða gjørdar á slíkum loynifundi ikki verða hildnar og onki er skrivað niður?

Í lønarmálinum er onki hent, síðan fakfelagið skrivaði til stjóran 7. des. 2005.

Eg kann eisini upplýsa, at MMR hevur vent sær beinleiðis til mín nógv oftari, enn eg havi vent mær til MMR. Hetta er gjørt bæði munnliga og skrivliga.

**Fái ikki alment innlit**

Tann 28. febr. 2006 sendi eg umbøn til MMR um alment innlit í fýra mál. Svarið, ið L sendir mær tann 6. mars, er at meta sum ein háðan. Hann sendir mær avrit av tveimum gomlum brøvum, sum eg sjálvandi havi frammanundan, tí tey eru stílað til mín. Tað var ikki tað, eg bað um. Hetta vísir eisini vantandi virðing fyri lógini um alment innlit.

**Málið verður sent Løgtingsins umboðsmanni**

Eftir drúgva umhugsan havi eg nú tikið avgerð um at senda alt málið um umsókn mína um loyvi at arbeiða niðursetta tíð til Løgtingsins umboðsmann, tí mannagongdin, sum MMR brúkar, kann ikki vera røtt fyri eitt framkomið samfelag. Tað var skelkandi at uppliva, at MMR hevur eina skrivliga mannagongd í fýra punktum fyri, hvussu ein „non existing“ fundur skal fara fram. Tá eg so eisini fái at vita, at slíkir fundir ikki eru óvanligir í MMR, verður málið enn meira álvarsamt. Bræv verður latið Umboðsmanninum í dag saman við tí rúgvismikla tilfari, sum er í málinum.

Kanska var ætlanin við teldubrævinum frá deildarstjóranum tann 19. des. 2005 at ræða meg til at tiga. Tað fer ikki at eydnast. Ætli mær framvegis at brúka mín rætt at gera vart við mína støðu, bæði í talu og skrift. Eg fari heldur ongantíð at góðtaka, at sjúk fólk fáa slíka viðferð, sum eg havi fingið. Eg skilji framvegis ikki, at eg skuldi uppliva slíkt, sum eg havi verið úti fyri síðani mars 2004, bert tí at eg gjørdist sjúkur.

Eg eri fullgreiður um, at hetta skriv fer eisini at føra til hóttanir um uppsøgn, men mær vitandi hevur ein og hvør borgari í landinum

rætt at biðja um alment innlit og at venda sær til Løgtingsins umboðsmann uttan at missa starvið.

Eg kann tó gleðast um, at 22 tey fyrstu árini vóru góð á Maskinmeistaraskúlanum, tí sátt og semja valdaðu á einum fyrimyndarligum arbeiðsplássi. Tíverri er tað ein farin tíð.“

## Partshoyring

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og við skrivi, dagfest 15. mars 2006, varð klagan send Mentamálaráðnum til ummælis við einari freist áljóðandi 4 vikur, eins og ráðið varð biðið um at lata umboðsmanninum øll skjølini, bæði frá ráðnum og skúlanum.

Í telefonsamrøðu, 5. apríl, heitti Mentamálaráðið á umboðsmannin um at leingja ummælisfreistina til 3. mai 2006, og varð hetta játtað.

Við skrivi, dagfest 2. mai 2006, hevur Mentamálaráðið latið umboðsmanninum soljóðandi frágreiðing um málið:

> **„Viðvíkjandi klagu frá A**
> Vísandi til skriv tygara, dagfest 15. mars 2006, vil Mentamálaráðið við hesum geva tygum hesa frágreiðing.
>
> **Frágreiðing til punkt 1, har A biður Løgtingsins Umboðsmann um at kanna málið um viðgerðina av umsókn um loyvi at arbeiða niðursetta tíð vegna sjúku og meta um, hvørt umsóknin fekk sakliga viðgerð ella ikki.**
>
> Í skrivi, dagfest 18. mai 2005, sí fylgiskjal 1, kærir B, advokatur, vegna A, avgerð hjá Føroya Sjómans- og Maskinmeistaraskúla um farloyvi og niðursetta arbeiðstíð.
>
> Skrivið frá B er skrásett í journalskipan Mentamálaráðsins tann 20. apríl 2005, og kann dagfestingin í brævinum tí ikki verða røtt. Mentamálaráðið metir, at rætta dagfestingin skal verða 18. apríl 2005.

Í brævi, dagfest 29. apríl 2005, sí fylgiskjal 3, heitir Mentamálaráðið á Føroya Sjómans- og Maskinmeistaraskúla, sum hevur setanarmyndugleikan, um at gera viðmerkingar til kæraskrivið frá B.

Sama dag verður skriv, sí fylgiskjal 2, sent til B, har greitt verður frá, at kæran er send til leiðsluna á Føroya Sjómans- og Maskinmeistaraskúla til viðmerkingar. Skúlin fær 14 dagar hoyringarfreist, og Mentamálaráðið miðar eftir at taka avgerð í málinum, eftir at viðmerkingarnar hjá skúlanum eru sendar advokatinum til ummælis við eini freist uppá uml. 14 dagar.

Í telduposti, dagfestur 17. mai 2005, sí fylgiskjal 4, heitir Føroya Sjómans- og Maskinmeistaraskúli á Mentamálaráðið um at leingja freistina fyri svarskrivinum til 1. juni 2005.

Í telduposti, dagfestur 18. mai 2005, sí fylgiskjal 5, gongur Mentamálaráðið áheitanini á møti.

18. mai 2005, sí fylgiskjal 6, verður í telduposti boðað B frá, at skúlin hevur fingið longt freistina til 1. juni 2005. B svarar sama dag aftur í telduposti, sí fylgiskjal 7, „at tað er í lagi".

1. juni 2005, sí fylgiskjal 8, móttekur Mentamálaráðið skriv frá Føroya Sjómans- og Maskinmeistaraskúla við viðmerkingum til kæruna frá A.

Í brævi, dagfest 3. juni 2005, sí fylgiskjal 9, sendir Mentamálaráðið skrivið við viðmerkingunum frá Føroya Sjómans- og Maskinmeistaraskúla til B til viðmerkingar.

Í brævi til Mentamálaráðið, dagfest 28. juni 2006, sí fylgiskjal 10, sendir B viðmerkingar til viðmerkingarnar frá Føroya Sjómans- og Maskinmeistaraskúla.

Í brævi, dagfest 19. juli 2005, sí fylgiskjal 11, til A, boðar Mentamálaráðið frá, at henda avgerð er tikin í kærumálinum um farloyvi og niðursetta arbeiðstíð:

*Kæran frá A um farloyvi í tíðarskeiðinum 20. febr.- 30. juni 2005 og um at arbeiða niðursetta tíð seinna hálvár 2005 verður ikki gingin á møti. Skúlastjórin fær eina rættleiðing um ávís viðurskifti í sambandi við kæruna.*

Ì brævinum er eisini henda niðurstøða gjørd:
*Kæran frá A um farloyvi og um niðursetta tíð seinna hálvár 2005 verður ikki gingin á møti. Í sambandi við avgerðina er serliga dentur lagdur á grundgevingar skúlastjórans um tørv skúlans og trupulleikar við at fyriskipa og tilrættaleggja arbeiðið. Stjórin í Maskinmeistaraskúlanum fær eina skrivliga rættleiðing frá Mentamálaráðnum í sambandi við viðmerkingar hansara um ætlaðu uppsøgnina av A og kostnaðin av sjúkaradøgunum.*

*Avgerðin kann ikki kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika.*

1. august 2005, sí fylgiskjal 12, sendir B, teldupost til D, landsstýrismann, við áheitan um at taka málið hjá A viðvíkjandi niðursettari tíð upp aftur til nýggja viðgerð og avgerð. Avrit av hesi áheitan var eisini send til yrkisfeløgini fyri ávikavíst Maskinmeistaraskúlan og Føroya Sjómansskúla.

Í innanhýsis notati, dagfest 15. august 2005, sí fylgiskjal 13, greiðir C, deildarstjóri, frá, at hann saman við landsstýrismanninum, aðalstjóranum og stjóranum á Føroya Sjómans- og Maskinmeistaraskúla komu ásamt um at gera eina semingsroynd við at heita á A um at seta seg í samband við stjóran á Føroya Sjómans- og Maskinmeistaraskúla.

C ringdi til A tann 2. august 2005 og greiddi honum frá hesum. A vildi ráðføra seg við sakførara sín og fakfelag, áðrenn hann tók støðu til málið.

A ringdi aftur til C og greiddi frá, at hann var til reiðar at tosa við stjóran á Føroya Sjómans- og Maskinmeistaraskúla treytað av, at C ella H, lærari á Føroya Sjómansskúla, vóru til staðar undir samrøðuni.

Hesum sýtti stjórin á Føroya Sjómans- og Maskinmeistaraskúla fyri.

C boðaði A frá hesum. A segði, at hann fór at seta seg í samband við stjóran á Føroya Sjómans- og Maskinmeistaraskúla dagin eftir, men tað gjørdi A ikki, og niðurstøðan var tí, at semingsroyndin, sum var gjørd 2. august 2005, miseydnaðist.

7. august 2005, sí fylgiskjal 14, sendi B í telduposti áheitan til D landsstýrismann um at „taka í nakkaspikið á skúlanum og geva harraboð um, at A fær tað hann søkir um".

10. august 2005, sí fylgiskjal 15, sendir B í telduposti eina áminning um málið hjá A.

Í brævi, dagfest 11. august 2005, sí fylgiskjal 16, sendir Mentamálaráðið bræv til B við boðum um, at Mentamálaráðið kannar eftir, um meira kann gerast við málið, og hvørt kæran um niðursetta arbeiðstíð kann verða tikin til nýggja viðgerð.

Í brævi til Mentamálaráðið, dagfest 22. august 2005, sí fylgiskjal 17, boðar B frá, at klientur hansara (A) er farin aftur til arbeiðis, og at málið tískil ikki er aktuelt longur.

Síðani hevur A vent sær til Mentamálaráðið nakrar ferðir um málið, sí fygiskjal 18, í sambandi við m.a lønarviðurskifti, sí fylgiskjøl 19 og 20.

Í kæruskrivinum til Løgtingsins Umboðsmann, dagfest 13. mars 2006, vísir A á, at mentamálaráðharrin, D, og deildarstjórin, C, báðir í telefonsamrøðu hava sagt, at teir eru harmir um, at brævið er sent, meðan Mentamálaráðið er í feriu, og at teir ikki vistu av hesum. A vísir harumframt á, at hetta bert kann skiljast sum, at vistu teir av hesum, so var avgerðin broytt, og A fekk loyvi at arbeiða hálva tíð. Mentamálaráðið vil staðiliga avvísa, at hetta skal skiljast soleiðis, at avgerðin, við støði í hesum, hevði verið broytt, tí málið var endaliga viðgjørt og avgreitt í Mentamálaráðnum.

**Frágreiðing til punkt 2 um, hvat Løgtingsins Umboðsmaður heldur um tað, at MMR skipar fyri „non existing"-fundi, har eingin fær loyvi at skriva nakað niður? Tá fundurin er lokin, hevur eingin fundur verið! Hvar er rættartrygdin hjá borgaranum, tá ið eingin skrivlig avtala finst og eingin fundarfrásøgn?**

MMR roynir altíð at finna eina loysn og hevur eina serliga ábyrgd, tá ið málini blíva so trupul og fastlæst, sum talan var um í hesum føri, og annars altíð, tá ið talan er um, at borgarin følir seg at verða fyri vanbýti. Tískil valdi MMR eisini í hesum máli at gera eina síðstu roynd, eftir at royndin, sum var gjørd 2. august 2005, sí fylgiskjal 13, miseydnaðist, soleiðis at A kundi koma aftur til arbeiðis.

MMR fekk partarnar at tosa saman við einum endamáli, og tað varð at fáa A aftur til arbeiðis, og var hetta avrátt við báðar partar, tvs. A og skúlastjóran á Føroya Sjómans- og Maskinmeistaraskúla, áðrenn partarnir møttust. Harumframt var avrátt, at eingi onnur viðurskifti skuldu takast fram, bert hetta, at A skuldi koma aftur til arbeiðis, og nú skuldu báðir partar hyggja frameftir og leggja alt, sum higartil varð farið fram millum partarnar, á hylluna, og um partarnir ikki kundu ganga hesum á møti, skuldu partarnir ikki møtast. Báðir partar tóku undir við hesum og møttust fyri at viðgera tað, at A skuldi koma aftur til arbeiðis, og hetta endaði við, at A fór aftur til arbeiðis hálva tíð.

Støðan var fastløst. A og skúlastjórin vóru ósamdir, fakfelagið og sakførari vóru eisini uppi í málinum. Samstarvið og arbeiðsviðurskiftini á skúlanum vóru blivin ótolandi. Landsstýrismaðurin var eisini drigin inn í málið. Støðan var so trupul, at MMR sá seg noytt til at finna útvegir fyri, at partarnir kundu tosa saman, so trætan, sum var so ógvuslig, kundi fáast av vegnum. MMR hevur ongantíð upplivað slíkt. MMR hevði tann leiklut at fáa partarnar at tosa saman. Hetta eydnaðist, og MMR kunnugt, so vóru viðurskiftini loyst millum hesar báðar partarnar. Tað er ikki vanligt, at Mentamálaráðið tekur stig til slíkar semingsroyndir, og eingin skrivlig mannagongd finst um slíkar fundir, men støðan var vorðin so óvanlig, at neyðugt var

at taka stig til at fáa avskeplaðu viðurskiftini á beint aftur. Tí var skipað fyri hesum semingfundi.

Tað sum A annars vísir til í kæruskrivi sínum, hevur MMR ongar viðmerkingar til, tí tá ið partarnir skiltust, vóru partarnir, sum greitt frá omanfyri, samdir um, at A fór aftur til arbeiðis hálva tíð, og at partarnir harumframt vóru samdir um at hyggja frameftir.

**Frágreiðing til punkt 3 um, hvat Løgtingsins Umboðsmaður heldur um svarini frá MMR um umbønir hjá A um alment innlit ? Hevur A ikki rætt at fáa innlit í nevndu mál ?**

Í brævi, dagfest 28. februar 2006, sí fylgiskjal 21, søkir A um alment innlit í fýra mál.

Í svarskrivi, dagfest 6. mars 2006, sí fylgiskjal 22, sendir Mentamálaráðið tvey skjøl.

Tey fýra málini, sum A biður um innlit í eru:
1. Eftirlønargjald til A
2. Rættleiðingar til skúlastjóran
3. Teldubræv frá 16. juni 2005
4. Lønarmál hjá maskinskúlalærara

ad. 1. Føroya Sjómans- og Maskinmeistaraskúli fekk avrit av brævi til A, dagfest 28. oktober 2005, har tað greitt er tilskilað undir „Eftirlønargjald“, at A skal hava eftirlønargjald, sum er í samsvari við hálva løn sambært sáttmála. Stjórin á skúlanum hevði frammanundan fingið munnliga fráboðan um sama.

ad. 2. Stjórin á Føroya Sjómans- og Maskinmeistaraskúla fekk avrit av brævi til A, dagfest 19. juli 2005, har tað niðast á síðu 3 stendur „ *í sambandi við nógvu umrøðuna av sjúku tygara, áseting av útreiðslunum í hesum sambandi og fráboðanini um, at um tygum fáa viðhald í kæruni, so verður skúlin at umhugsa uppsøgn av tygum sambært galdandi reglum. Hesar viðmerkingar skúlastjórans kunnu*

*als ikki góðtakast, og Mentamálaráðið skal við hesum taka frástøðu frá teimum. „*

ad. 3. A byrjar við at siga, at hann tvær ferðir áður hevur biðið um alment innlit í eitt teldubræv, dagfest 14. juni 2005. Mentamálaráðið kann bert enn eina ferð endurtaka, at nevnda teldubræv ikki er skrásett í skjalagreiðsluni hjá Mentamálaráðnum

ad. 4. HA, sum A vísir til, er G, varaskúlastjóri á Føroya Sjómans- og Maskinmeistaraskúla. A hevur áður biðið um alment innlit í persónsmálið hjá G og fingið øll skjøl, sum lógin um alment innlit gevur honum rætt til."

Við skrivi, dagfest 3. mai 2006, vórðu viðmerkingarnar frá Mentamálaráðnum sendar klagaranum til ummælis við einari freist áljóðandi 3 vikur.

Við skrivi, dagfest 10. mai 2006, hevur klagarin latið umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar til skrivið frá Mentamálaráðnum:

**„Viðmerkingar til skriv frá Mentamálaráðnum (MMR) til Løgtingsins umboðsmann (LUM), dagf. 02. mai 2006.**

**Umsóknin um arbeiði hálva tíð**
Tað undrar meg, at MMR ongar viðmerkingar hevur til handfaringina, sum umsókn mín, dagf. 18. januar 2005, fekk á skúlanum, áðrenn kæra varð send MMR. MMR varðar av Maskinmeistaraskúlanum, og MMR hevur verið kunnað um málið alla tíðina og hevur mælt stjóranum til at játtað umsóknini. Fekk málið sakliga viðgerð á skúlanum? Hvør var við í viðgerðini á skúlanum? Hevur leiðsla skúlans borið seg rætt at?

Eg má staðfesta, at onki notat finst frá 2. august 2005 um allar telefonsamrøðurnar hjá deildarstjóranum, C, henda dag. Sambært starvsmannalógini frá 1958, § 9, hevur stjórin skyldu at fundast við fakfelagið um málið. Tað hevur verið ein trupulleiki, at bæði skúlastjórin og MMR hava noktað at tosað við fakfelagið og sakførara

tess, men hava roynt at tvingað meg einsamallan á fund. Harðrenda framferðin móti mær hevur verið sera tyngjandi, tí heilsustøða mín var ikki so góð. Tað er ósatt, at eg lovaði at seta meg í samband við stjóran tann 3. august 2005. Tann dagin var fundur millum nevndirnar í báðum fakfeløgunum.

Tað er ongin ivi um, at grundin til, at MMR valdi at taka málið uppaftur í august 2005, var tann ódámliga viðferð, ið eg fekk frá leiðslu skúlans. Óttin fyri, at málið fór at koma fram í fjølmiðlunum og á Løgtingi, hevur óivað eisini verið ein orsøk.

**Loynifundurin 16. august 2005**

Kunningin fór fram á fundinum og ikki áðrenn fundin. Hevði eg vitað frammanundan, hvat ið bíðaði, hevði eg ikki farið á slíkan fund, hvørki einsamallur ella saman við øðrum.

Tað undrar meg, at skjalið, sum deildarstjórin las upp í byrjanini av loynifundinum 16. august 2005, ikki verður útflýggjað Umboðsmanninum, tí her siterar MMR úr skrivinum. Eg kenni væl orðaljóðið aftur. Hetta er eitt sera týðandi skjal í málinum. MMR kallar fundin ein semingsfund, men í skjalinum verður heitið „non-existing fundur“ nýtt.

Tað er ikki rætt, at eg hevði fingið lovað arbeiði hálva tíð, tá eg fór av fundinum. Tá eg byrjaði at arbeiða aftur 22. august, var arbeiðstíðin sett til uml. 40 %. Her sigur MMR ósatt, tí teir vita, at eg fekk ikki loyvi at arbeiða hálva tíð, sum øll onnur í míni støðu fáa.

Tað er neyvan hent áður innan tað almenna, at sjúk fólk hava fingið so eyðmýkjandi viðferð, sum eg fekk á hesum fundi. Eg kendi meg hart kroystan av yvirvaldinum, og eg hevði ongan at ráðføra meg við.

MMR skrivar: „*Samstarvið og arbeiðsviðurskiftini á skúlanum vóru blivin ótolandi*“. Eg havi ikki eina einastu ferð havt samstarvstrupulleikar við leiðslur skúlans tey fyrstu 22 árini, meðan eg var fult arbeiðsførur. Tá nýggj leiðsla kom á skúlan í 2004, fór so mangt av lagi. Hetta er MMR væl vitandi um. Eg kann t.d. vísa til fund í MMR tann 10. juni 2005 um lærararáðið (skjal 1), har eg varð boðin við.

Á hesum fundi nevndi landsstýrismaðurin møguleikan at kanna leiðsluviðurskiftini á skúlanum. Eisini var fundur við lønardeildina í FMR um sáttmálatrupulleikar tann 4. nov. 2005 (skjal 2). Umboð fyri MMR var við á hesum fundi. Á fundinum var full semja um, at skúlin hevur álvarsligar leiðslutrupulleikar.

Mín meting er, at MMR hevur ikki rætt hond frá síðu til at loysa veruligu trupulleikarnar á Maskinmeistaraskúlanum, og landsstýrismaðurin hevur runnið undan síni ábyrgd, tó at hann veit um skilið. Leiðslutrupulleikar skúlans verða ikki loystir við einum non-existing fundi í MMR. Tað skal sterkari lútur til.

Tað er høpisleyst at tosa um samstarv við fólk, sum ikki eru í starvi. Eg havi verið burtur frá arbeiðinum frá 4. des. 2004 til 22. august 2005, fyrst í sjúkrafarloyvi og síðani í farloyvi uttan løn.

Annars hevur stjórin róst mær fyri gott samstarv, meðan eg var til arbeiðis (sagt á fundi 16.02.2005).

Longu frá 3. arbeiðsdegi nýggja stjórans hava eg og mong onnur starvsfólk verið hótt við uppsøgn uttan grund. M.a. av hesi orsøk er trivnaðurin á skúlanum sera vánaligur. Slíkur leiðsluháttur tekur eisini arbeiðshugin frá fólki.

**Alment innlit**

ad 1. Í brævi til mín, dagf. 28. okt. 2005, sigur MMR: „*Boð **eru givin** skúlanum ...*“ Nú váttar MMR, at skúlin bert hevur fingið avrit av brævinum stílað til mín, men ongi skrivlig boð beinleiðis frá MMR. Nær fekk skúlin munnligu boðini um eftirlønargjaldið? Lønarmálið og eftirlønargjaldið eru framvegis ikki fingin í rættlag.

ad 2. MMR váttar, at stjórin onga rættleiðing hevur fingið. Í brævið, dagf. 19. juli 2005, stílað til mín, sigur MMR: „*Stjórin ...fær eina **skrivliga** rættleiðing...*“ Avrit av brævinum til mín, dagf. 19. juli 2005, er sent skúlanum; tað er alt.

ad 3. Tá deildarstjórin í MMR ringir til mín tann 18. august 2005, er ongin ivi um, at hann hevur teldubrævið fyri sær, tí hann kann vátta, at eg havi ikki sent honum tað, men vil ikki upplýsa, hvør hevur sent honum brævið, hóast hann veit tað. Hann nevndi, at tað var ikki komið frá skúlanum. Tá teldubrævið ikki er skrásett í mínum

máli, átti tað at verið skrásett í navninum á tí persóni, ið sendi MMR brævið. Mangt bendir á, at MMR dylir upplýsingar fyri LUM. Finst onki notat í MMR frá telefonsamrøðuni 18. august 2005?

ad 4. Tað hevði verið áhugavert at frætt frá Lønardeildini í FMR, hví tey hava sent MMR málið, sum eg fekk innlit í tann 8. juni 2005. Havi eg ikki rætt at fáa at vita, hvat hendir víðari í einum máli, sum eg havi reist?

G varð settur sum varastjóri 1. apríl 2004. Starvið varð ongantíð lýst leyst, hvørki í bløðunum ella við uppslagi á skúlanum, so ongin fekk møguleika at søkja. Kortini góðkendi MMR mannagongdina. Sami G var virkandi stjóri í august 2004.

-----------------

Tað undrar meg, at telduskrivið til landsstýrismannin, dagf. 13. mars 2006, ikki er við í skjalayvirlitinum frá MMR.

Annars standi eg framvegis við hvørt orð, eg áður havi skrivað.

**Nýggir upplýsingar í málinum**

Tann 23. mars 2006 ringdi eg til danska pensiónsgrunnin PFA at spyrja, hví onki inngjald var komið inn á mínar kontur síðani februar 2005 (skjal 3). Tá fekk eg at vita, at PFA hevði í febr. 2005 fingið boð frá Maskinmeistaraskúlanum um, at „A er fratrådt sin stilling i febr. 2005.“ Tí kann onki setast inn á mínar kontur. PFA spurdi eisini: „Hvor er du ansat nu?“ Enn havi eg ikki fingið skrivliga váttan frá PFA um boðini (skjal 4). Hetta er um somu tíð sum umsókn mín verður noktað av skúlanum (febr. 2005).

Hetta er eitt álvarsmál, ið átti at verið kannað nærri.“

Við skrivi, dagfest 15. mai 2006, vórðu viðmerkingarnar frá klagaranum sendar Mentamálaráðnum til ummælis við einari freist áljóðandi 3 vikur.

Í telefonsamrøðu, 2. juni 2006, bað Mentamálaráðið um at ummælisfreistin varð longd til 26. juni, og varð hetta játtað.

Við skrivi, dagfest 15. juni 2006, hevur Mentamálaráðið latið umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

„**Viðvíkjandi klagu frá A**
Í skrivi, dagfest 15. mars 2006, spyr Løgtingsins Umboðsmaður Mentamálaráðið, um Mentamálaráðið ynskir at gera fleiri viðmerkingar til kæru frá A, lærara á Føroya Sjómans- og Maskinmeistaraskúla.

Mentamálaráðið hevur í brævi, dagfest 2. mai 2006, gjørt eina frágreiðing til Løgtingsins Umboðsmann um málið.

Mentamálaráðið hevur hesar viðmerkingar til viðmerkingarnar frá A til Løgtingsins Umboðsmann, dagfest 10. mai 2006.

A vísir í skrivi sínum á, at tað er ósatt, at hann lovaði at seta seg í samband við stjóran á Føroya Sjómans- og Maskinmeistaraskúla tann 3. august 2005. Mentamálaráðið vil staðiliga vísa aftur, at Mentamálaráðið sigur ósatt, sí fylgiskjal 1, har tað í innanhýsis notati, dagfest 15. august 2005, er staðfest, at A tann 2. august 2005 í telefonsamrøðu við Mentamálaráðið greiddi frá, at hann dagin eftir fór at seta seg í samband við stjóran á Føroya Sjómans- og Maskinmeistaraskúla.

A hevur fingið sera sømiliga viðgerð í sambandi við hetta mál eins og onnur mál, sum A hevur latið Mentamálráðnum til viðgerðar. Mentamálaráðið tekur frástøðu frá pástandum um ósannindi og teimum ákærum, sum A førir fram í skrivi sínum, har hann m.a. førir fram, at hann kendi seg hart kroystan av yvirvaldinum uttan at hava nakran at ráðføra seg við. Alt fór siðiliga fram tá ið partarnir tosaðu saman, og A hevði sakførara, sum koyrdi málið hansara vegna, soleiðis sum tað eisini er staðfest í frágreingini frá Mentamálaráðnum, dagfest tann 2. mai 2006.

A vísir eisini í skrivinum á, at hann ikki eina einastu ferð hevur havt samstarvstrupulleikar við leiðslu skúlans, fyrr enn nýggj leiðsla tók við á skúlanum í 2004, og at tað tá fór so mangt av lagi. Hetta er ikki í tráð við verðuleikan, og fyri at ongar misskiljingar skulu verða hesum viðvíkjandi, fer Mentamálaráðið at vísa á kærumál um broyting í starvsviðurskiftum,

sí fylgiskjølini frá 2 til 16, har tað m.a. gongur fram, hvussu samstarvið millum A og fyrrverandi leiðsluna á Maskinmeistaraskúlanum var.

A førir í skrivinum fram, at landsstýrismaðurin á fundi við lærarar á skúlanum um námsfrøðiligt ráð og lærararáð, tann 10. juni 2005, nevndi møguleikan at kanna leiðsluviðuskiftini á skúlanum. Hetta er heldur ikki í tráð við veruleikan og púra burturvið, tí leiðsluviðurskiftini á Føroya Sjómans- og Maskinmeistaraskúla vóru als ikki viðgjørd á fundinum, sum fundarfrágreiðingin frá fundinum eisini staðfestir, sí fylgiskjal 1 í viðmerkingarskrivinum frá A, sum er dagfest tann 10. mai 2006. Eisini vísir A til fund við Lønardeildina í Fíggjarmálaráðnum, tann 4. november 2005, um sáttmálaviðurskifti, og at full semja var um, at skúlin hevur álvarsligar leiðslutrupulleikar. Hetta er heldur ikki rætt, tí tað, sum Mentamálaráðið førdi fram á fundinum, var, at um lærarar føla, at teir hava innanhýsis trupuleikar á skúlanum, so eigur hetta at verða tikið upp saman við leiðsluni á Føroya Sjómans- og Maskinmeistraskúla. Mentamálaráðið vil eisini vísa á, at um lærarar hava trupulleikar við leiðsluni á skúlanum, so er hetta ikki eitt mál fyri Lønardeildina í Fíggjarmálaráðnum, men eitt mál sum fyrst og fremst skal viðgerast innanhýsis á skúlanum, og í øðrum lagi kunnu lærarar venda sær til Mentamálaráðið umvegis leiðsluna á skúlanum, um tað gerst neyðugt.

Viðvíkjandi lønarmálinum og eftirlønargjaldinum verður víst til avgerðina hjá Mentamálaráðnum. Vísast kann harumframt á, at leiðslan á skúlanum hevur kunnað Mentamálaráðið um, at leiðslan fleiri ferðir hevur vent sær til A fyri at fáa greiði á hesum viðurskiftum sambært avgerðini hjá Mentamálaráðnum, men A hevur ikki sett seg í samband við leiðsluna á skúlanum.

A førir eisini fram, at Mentamálaráðið dylir upplýsingar fyri Løgtingsins Umboðsmanni, og hetta er sjálvandi heldur ikki rætt, tí sjálvandi fær Løgtingsins Umboðsmaður teir upplýsingar, sum fyriliggja í málinum.

Viðvíkjandi tí, at A metir, at Mentamálaráðið ikki hevur rætt hond frá síðu og at landsstýrismaðurin hevur runnið undan síni ábyrgd, vil Mentamálaráðið staðiliga vísa aftur, sum handfaringin av hesum eins og øðrum málum viðvíkjandi A staðfesta. Málini viðvíkjandi A hava fingið

eina sakliga, siðiliga og óhefta viðgerð, og A hevur stórt sæð fingið tað, sum hann hevur biðið um.

A leggur í skrivi sínum upp til samantvinnan millum myndugleikaøkini hjá Fíggjarmálaráðnum og Mentamálaráðnum. Um A er áhugaður í at frætta frá Lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum, eigur hann at venda sær til Lønardeildina.

Viðvíkjandi varaskúlastjórastarvinum í fyrrverandi Maskimneistaraskúlanum vil Mentamálaráðið vísa á, at málið er avgreitt, og Mentamálaráðið hevur onki at finnast at í sambandi við handfaringina av málinum.

Av misgáum er teldubræv frá A til landsstýrismannin, dagfest 13. mars 2006, har A kunnar um, at málið nú er latið Løgtingsins Umboðsmanni, ikki komið við í frágreiðingina hjá Mentamálaráðnum, sum er dagfest tann 2. mai 2006. Teldubrævið er hjálagt sum fylgisskjal nr. 17. í hesum sambandi vil Mentamálaráðið eisini vísa á fylgiskjølini í frágreiðingini hjá Mentamálaráðnum, dagfest tann 2. mai 2006, og her serliga fylgiskjølini nr. 18 – 22.

Mentamálaráðið metir, at tær ákærur og tey ósannindi, sum A førir fram í hesum máli eru sera álvarslig. Mentamálaráðið fer tískil at krevja próvførslu frá A í hesum A í mun til ákærurnar og ósannindini, um so er, at hetta verður nýtt í støðutakanini í hesum máli. Tað einasta, sum Mentamálaráðið hevur gjørt í hesum málið, er, at hjálpa einum persóni, sum í fleiri umførum hevur verið sjúkrameldaður frá sínum arbeiði."

Við skrivi, dagfest 21. juni 2006, eru viðmerkingarnar frá ráðnum sendar klagaranum til ummælis við einari freist áljóðandi 2 vikur.

Við skrivi, dagfest 28. juni 2006, hevur klagarin latið umboðsmanninum hesar viðmerkingar:

**„Viðmerkingar til svarið frá MMR, dagf. 15. juni 2006, sum kom við postinum tann 22. juni 2006.**

Eg kann als ikki góðtaka, at aðalstjórin roynir at gera meg til lygnara.

Tað, sum eg havi skrivað, er sannleiki, og LUM hevur fingið hópin av skjølum, sum prógva tað, eg sigi. Sjálvandi kann ongin „skjalprógva“ alt, sum verður sagt í telefon. Eg havi heldur ongar ákærur sett fram móti nøkrum, men staðfest tað, sum veruliga er farið fram. Víst sigi eg eisini mína hugsan um viðurskiftini á skúlanum og um hetta mál, sum eg sendi LUM í mars 2006.

MMR hevur ein stóran trupulleika, tí teir hava ikki fylgt ásetingunum um notatskyldu og um at fundarfrásøgn skal skrivast um hvønn fund. Eg skilji væl, at MMR er hart kroyst, men tað sømir seg ikki MMR at spilla fólk út. MMR skuldi heldur handfarið málið á rættan hátt frá byrjan.

Í skrivinum, dagf. 28. okt. 2005, skrivar deildarstjórin um tað, sum fór fram 02. aug. 2005. Onki verður nevnt um, at eg havi lovað at seta meg í samband við stjóran tann 03. aug. 2005. Hetta er komið afturat nú 02. mai 2006, og verður gjørt til ein týðandi spurning, men so er ikki. Allar royndir áður at tosa við stjóran vóru nyttuleysar, tí hann var ikki at vika. Og hví skuldi eg gjørt ímóti boðunum frá fakfelagsformanninum og sakføraranum, sum eg beint tá hevði fingið? 03. aug. samtykkja bæði fakfeløgini á skúlanum, at eg skal ikki fara einsamallur á fund við stjóran (fundarfrásøgn, dagf. 03. aug. 2005 og skriv frá sakføraranum, dagf. 07. aug. 2005).

Eg kundi havt skrivað, at deildarstjórin má minnast skeivt, tí hann hevði nógvar telefonsamrøður henda dag (02. aug. 2005), og notatið, sum eg ikki havi sæð, er skrivað 13 dagar seinni. Skuldi tað ikki verið skrivað beinanvegin?

Deildarstjórin hevur áður víst, at minnið kundi verið betri. Eg hugsi um teldubrævið, sum eg bað um innlit í tann 18. aug. 2005. Tað kann ikki bara hvørva í skrásetingini.

Tað, sum er nógv meira álvarsamt, er, at MMR 02. aug. 2005 góðtekur, at stjórin ikki vil tosa við fakfelagið, tí tað hevur hann skyldu til sambært lóg.

Tað sum fór fram á loynifundinum 16. aug. 2005 havi eg skrivað niður beint eftir fundin. Víst var eg kroystur, bæði fíggjarliga og sálarliga. Eg hevði onki oyra fingið at liva av síðani í febr. 2005, og varð tvungin at taka farloyvi uttan løn restina av árinum; annars varð eg uppsagdur. Eg kundi onki fáa frá ALS ella Almannastovuni. Sjálvt eftir fundin hevði eg onga trygd fyri, at eg slapp til arbeiðis aftur. Umframt, at eg sjálvur hevði verið gjøgnum drúgva sjúkraviðgerð, var familjan hart rakt av sjúku og deyða. Hetta kann landsstýrismaðurin vátta. Hann kann eisini vátta, at fundurin var sera eyðmýkjandi fyri meg; tað er hann kunnaður um. Eg var einsamallur móti trimum.

A hevur ongantíð skrivað: „... *at hann ikki eina einastuferð hevur havt samstarvstrupulleikar við leiðslu skúlans,* ***fyrr enn*** *nýggj leiðsla tók við á skúlanum í 2004, og at tá fór so mangt av lagi.*“ Hetta er ein grov rangsnúgvan av mínum orðum, og má átalast, tí eg skrivaði: „*Eg havi ikki eina einastuferð havt samstarvstrupulleikar við* ***leiðslur*** *skúlans tey fyrstu 22 árini, meðan eg var fult arbeiðsførur*“ So kemur nýggjur setningur, ið er soljóðandi: „*Tá nýggj leiðsla kom á skúlan í 2004, fór so mangt av lagi.*“

Eg byrjaði á skúlanum 19. okt. 1981, og trupulleikarnir byrjaðu, meðan eg lá sjúkur niðri á Ríkissjúkrahúsinum í mars 2004. Tað er lætt at rokna út, at talan er um meira enn 22 ára tíðarmun. Tá eg byrjaði aftur at arbeiða í august 2004, hevði nýggj leiðsla tikið við. So her er fult samsvar. Hvat er endamálið hjá MMR við at snara mínum orðum, soleiðis at setningarnir fáa heilt annan týdning? (Aðalstjórin hevði helst dumpað í eini PISA-roynd í lesiførleika).

Tað er áhugavert, at MMR sendir alla skjalarúgvuna frá 2004 til LUM. Nøkur skjøl vanta í, sum eg tí sendi LUM. Skjal nr. 1, dagf. 28. apríl 2004, varð sent MMR, áðrenn nøkur kæra varð send. Skjal nr. 2, dagf. 24. aug. 2004, átti at verið við í skjalarúgvuni frá MMR. Eru hesi skjøl ikki skrásett í MMR? Notat frá fundum/samrøðum millum C, deildarstjóra og P, skúlastjóra, tann 29. apríl og 08. juni 2004 eru heldur ikki við; kanska eru tey ikki at finna. Teldubrævið frá 06. febr. 2004 (skjal nr. 3) er ikki sent MMR áður. Eg skal minna

á, at eg fekk viðhald í kæruni um teldurøktina, sum varastjóri skúlans kravdi, at eg skuldi missa.

Tað hevði verið sera áhugavert, um LUM tók málið um setan av varaskúlastjóra á Maskinmeistaraskúlanum upp til viðgerðar sum eitt serstakt mál, tí tann framferðin var ógvuliga óvanlig. Tað hevði verið sera hóskiligt, nú skúlamálaráðharrin í einum fjølmiðli, tann 19. mai 2006, biður um frágreiðing um ivasamar lønarflytingar til júst sama persón. LUM hevur longu fingið øll skjølini í málinum um setanina so lagaliga upp í hendi.

At eg endurgevi landsstýrismannin rætt frá fundinum 10. juni 2005 hava fleiri fundarluttakarar váttað (skjal nr. 4). Fundurin vardi uml. 2 tímar, meðan fundarfrágreiðingin (niðurstøðan) hjá MMR bara er 5 linjur. Nær er frágreiðingin skrivað? Hon varð ikki send O fyrr enn 04. nov. 2005, hóast hann bað um hana beinanvegin. Hevur landstýrismaðurin gloymt sítt egna uppskot?

Tað sum fór fram í FMR tann 04. nov. 2005 er gjølliga greitt frá og váttað av fleiri luttakarum (fundarfrásøgn, dagf. 09. nov. 2005). Spurningar um sáttmálabrot hoyra heima í Lønardeildini, mær vitandi. Kann MMR gera so væl og skjalprógva tað, teir siga frá fundinum?

Tað man vera alment kent eftirhondini, at skúlin hevur eina harðrenda leiðslu, sum ikki hevur neyðugu virðingina fyri galdandi reglum og forskriftum. Fleiri av skjølunum í hesum máli prógva tað. Tann 09. des. 2005 var fundur við stjóran (skjal nr. 5), har m.a. hóttanir stjórans um uppsagnir vórðu umrøddar. Í skrivi, dagf. 12. des. 2005, váttar stjórin við síni egnu undirskrift, at hann hevur hótt starvsfólk við uppsøgn (skjal nr. 6).

Tá eg tosi um viðurskiftini á Maskinmeistaraskúlanum nú og fyrr, er tað út frá nærum 25 ára royndum.

So blindur eri eg ikki, at eg ikki sá, at deildarstjórin við byrjanina á loynifundinum 16. aug. 2005 las upp úr einum hvítum A4-arki,

hvussu non-existing fundurin skuldi skipast. Nú kom so enn eitt skjal frá 15. aug. 2005 undan kavi. Tað verður áhugavert at vita, um eg fái høvi at síggja tey notatini einaferð seinni. Kanska er fundarskráin at finna í seinna notatinum frá 15. aug. 2005; tað veit eg sjálvandi ikki.

Aðalstjórin skrivar, at eg altíð havi fingið siðiliga viðferð. Eg eri als ikki samdur. Her eru trý dømi:

1. Á loynifundinum segði stjórin (fundarfrásøgn frá 16. aug. 2005), at eg skuldi ikki fáa loyvi at arbeiða hálva tíð, tí so kundi eg fara av fundinum og siga, at eg hevði vunnið. At tosa soleiðis við fólk, sum hava mist heilsuna, er tað siðilig viðferð? Og vorðið sum grundgeving.

2. At MMR góðkendi, at eg skuldi haldast undir 50 % arbeiðstíð, og harvið missa sáttmálaásetta rættin til eftirlønargjald, er tekin um lágan moral og er ósiðilig viðferð. MMR hevur ikki kunnað prógvað, at teir hava gjørt nakað fyri at tryggja mær eftirlønargjald.

3. Útsøgnin um siðiliga viðferð ger, at eg loyvi mær at senda LUM avrit av teldubrævi (skjal nr. 7), sum eg ongantíð ætlaði mær at senda. Í teldubrævinum, dagf. 09. des. 2005, verður sipað til eina hending, sum fór fram tveir dagar frammanundan. Tann 07. des. 2005 segði fíggjarleiðari skúlans soleiðis við meg: „*Grundin til, at tú hevur fingið løn undir sjúku, er, at tú ert limur í eini bestemtari meinigheit.*“ Ússaliga svar stjórans upp á fyrispurningin, um hann tók undir við orðunum, sæst í skjalinum. Eg bað eisini fíggjarleiðaran koma við eini umbering. Skrivliga svar fíggjarleiðarans byrjar soleiðis: „*Eg fari her einaferð fyri allar at gera tær greitt, at tú ikki fært nakra umbering frá mær, tí eg meinti hvørt einasta orð eg segði...*“

Skrivið frá fíggjarleiðaranum verður ikki sent við, tí eg meti, at tað er ikki borðbært. Er hetta at fáa siðiliga viðferð?

Sama dag (07. des. 2005) fekk skúlin eisini hjálagda bræv frá fakfelagnum (skjal nr. 8) um løn og eftirløn. Onki er framvegis hent í lønar- og eftirlønarmálinum, hóast fleiri áheitanir. Heldur onki svar

> er komið til felagið upp á brævið, og nú er hálvt ár farið. Kann MMR prógva, at skúlin hevur vent sær til mín ella felagið um málið?
>
> Tað vardi meg ikki, at ein meinaleys umsókn um loyvi at arbeiða hálva tíð av heilsuávum, skuldi fáa MMR niður á eitt so lágt støði, sum als ikki sømir seg einum mentaðum stjórnarráði. Eg loyvi mær at ivast í, um ráðgevingin, sum landstýrismaðurin hevur fingið frá sínum egnu embætisfólkum er nóg dygg, men hann hevur sjálvandi evstu ábyrgdina. Neyvan nakar í MMR kennir hetta mál betri enn landsstýrismaðurin sjálvur. Hann veit eisini, at A sigur ikki ósatt.
>
> Um landsstýrismaðurin persónliga hevur góðkent, at ljóta svarskrivið frá MMR, dagf. 15. juni 2006, fór út av húsinum, so hevur landsstýrismaðurin eftir míni meting ein trupulleika, sum løgmaður má taka sær av.“

Við skrivi, dagfest 30. juni 2006, vórðu viðmerkingarnar frá klagaranum sendar Mentamálaráðnum til ummælis við einari freist áljóðandi 2 vikur.

Í telefonsamrøðu 7. juli bað Mentamálaráðið um, at ummælisfreistin varð longd til 1. sept. 2006, og varð hetta játtað.

Við skrivi, dagfest 25. august 2006, hevur Mentamálaráðið boðað umboðsmanninum frá, at ráðið hevur avgjørt ikki at gera fleiri viðmerkingar til hetta málið.

Við skrivi, dagfest 28. august 2006, boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at hann fór undir endaligu viðgerðina av hesum málinum.

## *Niðurstøða*

*Viðgerð mín av hesum máli snýr seg um viðgerðina og avgerðirnar hjá Vinnuháskúlanum og Mentamálaráðnum um at nokta umsóknini frá A um loyvi at arbeiða niðursetta tíð seinna hálvár í 2005. Harumframt fari eg eisini at viðgera handfaringina hjá Mentamálaráðnum av innlitsumbønum, sum klagarin hevur latið ráðnum. Spurningurin um noktan av farloyvi fyrra hálvár í 2005 er ikki fevndur av klaguni til mín*

*og heldur ikki av kæruni til Mentamálaráðið. Eg geri tí ikki meira við tann partin av málinum.*

*Skúlin noktaði umsóknini frá klagaranum um loyvi at arbeiða niðursetta tíð seinna hálvár í 2005. Avgerðin var grundað á tørvin hjá skúlanum, og at tað var torført at finna avloysara. Víst verður eisini til stóru sjúkrafráveruna hjá klagaranum, sum skal hava havt óhepnar avleiðingar fyri starvsøki hansara, og at tað skal vera í stríð við áhugamál skúlans at játta umsóknini.*

*Í kæruummælinum til Mentamálaráðið hevur skúlastjórin m.a. útgreinað grundgeving sína á hendan hátt:*

„...

> Drúgva fráveran hjá A frá arbeiðinum hevur havt við sær stórar trupulleikar í arbeiði okkara við fyriskipan av arbeiði skúlans, har undirvísingarplanur skal verða uppá pláss í góðari tíð, áðrenn viðkomandi hálvárssemestur tekur sína byrjan, eitt arbeiði hvørs neyvleiki er ein fyritreyt fyri, at álítandi taltilfar kann útvegast at grunda fíggjarætlan skúlans á fyri komandi árið.
>
> Sum tað er skylda okkara verður dentur lagdur á at fáa sum mest burtur úr játtanini til skúlan. Lagt varð upp til, at skúlin skuldi taka inn næmingar til „Maskinist" í august 2005. Játtanin er so tepur, at um skúlin skal halda hesa ætlan, er ikki pláss fyri longri sjúkralegum sum tann hjá A undanfarnu tvey tíðarskeið. Viðmerkjast skal at meirútreiðslan av sjúkraleguni hjá A í 2004 var omanfyri kr. 250.000,- og var høvuðsorsøkin til, at skúlin fór uppum loyvdu játtanina í 2004.
>
> Vit hava sjálvandi stóra samkenslu við heilsustøðuni hjá A, og hevur skúlin eftir førimuni roynt at laga viðurskifti síni til støðu hansara, men viðurkennandi, at vit hava eina stovn at reka við stórari ábyrgdarskyldu mótvegis næmingum skúlans hvat frálæru viðvíkur og mótvegis myndugleikunum hvat ásettum fíggjarkarmi viðvíkur, so kom skúlin til ta niðurstøðu, at vit ikki mettu áhugamál skúlans røktaði nóg væl, um vit gingu umsóknini frá 18. januar 2005 á møti um farloyvi frá arbeiðinum smb. § 4 í sáttmálanum frá 20/2-2005-30/6-2005 og at arbeiða hálva tíð seinna

hálvár 2005 smb. § 24 í lønarsáttmálanum. Hinvegin metti skúlin, at seinna umsókn A um farloyvi smb. § 4, t.v.s. uttan løn, kundi játtast honum fyri samlaða tíðarskeiðið 20/2-2005 til 31/12-2005, tá hetta í meira avmarkaðan mun grípur inn í tilrættaleggingararbeiðið, so hetta mettu vit fór at bera til, og er tað sagt A í brævi, dagfest 18/2-2005, harav makaskjal er viðlagt saman við makaskjali av umsóknarbrævi hansara dagfest sama dag.

Avgerð skúlans byggir á eina konkreta metan um tørv skúlans, har serligur dentur hevur verið lagdur á tilrættarlegging av arbeiði skúlans á ein skipaðan og vælvirkandi hátt, og við atliti til í góðari tíð at kunna byrgja upp fyri tí støðu, at óvæntaðar útreiðslur kunnu taka seg upp í játtunarárinum, sum hædd ikki er tikin fyri.

Vit loyva okkum at skoyta uppí, at um so er at A fær viðhald í kæru síni, so verður skúlin at umhugsað uppsøgn av starvsmanninum smb. galdandi reglur.“

*Eg havi ikki møguleika fyri at meta um, hvørt tað var gjørligt hjá skúlanum at játta umsóknini ella ikki, men eg havi ilt við at síggja, at tann parturin av grundgevingini, sum snýr seg um at kunna tilrættaleggja arbeiði í góðari tíð, kann nýtast, tá talan er um at sleppa at arbeiða hálva tíð aftaná summarfrítíðina 2005. Havast skal í huga, at umsóknin er latin inn í januar mánaði.*

*Vísandi til at klagarin at enda fekk játtað at arbeiða uml. 40% heldur enn 50%, loyvi eg mær eisini at ivast í tí partinum av grundgevingini, sum snúði seg um í góðari tíð at kunna byrgja upp fyri óvæntaðum útreiðslum.*

*Hvørki skúlin ella Mentamálaráðið tykjast hava gjørt nakra frágreiðing frá umrødda fundinum, og er hetta ikki í samsvari við notatskylduna sambært § 6 í innlitslógini. Hinvegin hevur A skrivað eina frágreiðing, sum er endurgivin frammanfyri. Hóast partarnir ikki tykjast heilt samdir um, hvat er hent á fundinum, haldi eg úrslitið geva eina greiða ábending um, at fundarfrásøgnin hjá A er røtt, tá hann skrivar soleiðis:*

„A spurdi so, um E var sinnaður at loyva A at arbeiða hálva tíð. E

> svaraði, at tað var ikki at gera semju; hann vildi ikki, at A skuldi „vinna“ málið. E segði, at A hevði biðið um 50 %, og E hevði noktað umsóknini, tvs. hevði lovað 0 %, og hevði fingið viðhald í MMR. Tí mátti ein semja hava útgangsstøði í 25 %. Hann skuldi tó vísa góðan vilja og royna at nærkast 40 % arbeiðstíð. Hann kundi tó ikki lova nakað, tí hann legði ikki tímatalvu sjálvur.“

*Eg dugi heldur ikki at síggja, at ein uppgerð av, hvat sjúkrafráveran hjá klagaranum skal hava kostað skúlanum er eitt sakligt atlit, tá søkt verður um farloyvi ella niðursetta arbeiðstíð og harvið samsvarandi niðursetta løn. Hóttanin um, at uppsøgn verður umhugsað, um Mentamálaráðið gevur A viðhald í kæruni, er eisini heilt burturvið. Eg kann tí ikki annað enn taka undir við, at ráðið í niðurstøðu sínari sigur seg vilja geva skúlastjóranum eina skrivliga rættleiðing fyri hetta.*

*Sambært frágreiðingini frá Mentamálaráðnum til mín, dagfest 2. mai 2006, sær tað kortini út til, at eingin beinleiðis rættleiðing er givin skúlastjóranum, men at hesin sambært frágreiðingini frá ráðnum, bert hevur fingið avrit av brævinum til A, dagfest 19. juli 2005.*

*Hetta haldi eg avgjørt ikki vera nøktandi, hvørki fyri klagaran ella skúlastjóran, sum á hendan hátt umvegis ein triðjapersón skal hava fingið eina rættleiðing / ábreiðslu. Eg fari tí at mæla ráðnum til at taka hetta við rættleiðingini uppaftur, og at avgreiða hetta á rættan hátt.*

*Í klaguni vísir A á, at stjórin á Vinnuháskúlanum skal hava noktað honum at hava nakran annan við sær á fundin 16. aug. 2005. At hetta er so, er eisini váttað í notati, dagfest 15. aug. 2005, sum C, deildarstjóri, hevur skrivað.*

*Eg skal í hesum sambandi vísa á § 8 í fyrisitingarlógini, ið er soljóðandi:*

> „§ 8. Hann, sum er partur í einum máli, kann til eina og hvørja tíð, tá málið verður viðgjørt, lata seg umboða av øðrum ella fáa hjálp frá øðrum. Myndugleikin kann tó krevja, at parturin perónliga er við, tá tað er av týdningi fyri avgerðina í málinum.
>
> *Stk. 2.* Ásetingin í stk. 1, 1. pkt. er ikki galdandi, um so er, at

áhugi partanna í at lata seg umboða ella vera hjálptur má metast at eiga at víkja fyri munandi umhugsni fyri almennum ella privatum áhugamálum, ella har annað er ásett við lóg.

*Eg dugi ikki at síggja, at nøkur haldgóð grundgeving er fyri at nokta einum starvsfólki at lata seg umboða ella at fáa hjálp frá øðrum í einum máli sum hesum. Eg haldi, at avgerðin hjá stjóranum er beinleiðis brot á hendan grundleggjandi rættin, sum parturin hevur sambært § 8 í fyrisitingarlógini. Hetta átti Mentamálaráðið eisini at boða stjóranum frá, tá ráðið tók stig til at skipa fyri umrødda fundinum. Eg fari tí at geva ráðnum eina átalu fyri ikki at hava gjørt vart við hetta.*

*Eg haldi alt hetta málið bera týðilig brá av, at talan ikki hevur verið um sakliga fyrisiting frá skúlastjóranum. Hetta sjónarmið byggi eg bæði á tær ivasomu grundgevingarnar, sum víst er á omanfyri, hóttanina frá stjóranum um uppsøgn í kæruummælinum, noktanina um at A kundi hava nakran við sær á fund, 16. aug. 2005, og síðani ta „semju", sum gjørdist úrslitið av hesum fundinum.*

*Eg fari tí eisini at mæla Mentamálaráðnum til at taka sjálvt kærumálið uppaftur til viðgerðar og eftirkanna, um grundgevingarnar fyri noktandi svarinum eisini vóru tær, sum avgerðin veruliga bygdi á.*

*Sambært klaguni hevur Mentamálaráðið svarað innlitsumbønini frá A, dagfest 28. febr. 2006, á tann hátt, at innlit er givið í tvinni onnur skriv, sum klagarin ikki hevði biðið um. Svarið frá Mentamálaráðnum, dagfest 6. mars 2006, er soljóðandi:*

„**Viðvíkjandi umbøn um alment innlit**
Í brævi, dagfest 28. februar 2006, biða tygum um alment innlit. Skjøl, sum tygum hava biðið um innlit í, eru viðfest hesum brævi."

Í klaguummælinum til mín, dagfest 2. mai 2006, hevur Mentamálaráðið gjørt hesar viðmerkingar til hendan partin av klaguni:

„Í svarskrivi, dagfest 6. mars 2006, sí fylgiskjal 22, sendir Mentamálaráðið tvey skjøl.

Tey fyra málini, sum A biður um innlit í eru:

1. Eftirlønargjald til A
2. Rættleiðingar til skúlastjóran
3. Teldubræv frá 16. juni 2005
4. Lønarmál hjá maskinskúlalærara

ad. 1. Føroya Sjómans- og Maskinmeistaraskúli fekk avrit av brævi til A, dagfest 28. oktober 2005, har tað greitt er tilskilað undir „Eftirlønargjald", at A skal hava eftirlønargjald, sum er í samsvari við hálva løn sambært sáttmála. Stjórin á skúlanum hevði frammanundan fingið munnliga fráboðan um sama.

ad. 2. Stjórin á Føroya Sjómans- og Maskinmeistaraskúla fekk avrit av brævi til A, dagfest 19. juli 2005, har tað niðast á síðu 3 stendur *„í sambandi við nógvu umrøðuna av sjúku tygara, áseting av útreiðslunum í hesum sambandi og fráboðanini um, at um tygum fáa viðhald í kæruni, so verður skúlin at umhugsa uppsøgn av tygum sambært galdandi reglum. Hesar viðmerkingar skúlastjórans kunnu als ikki góðtakast, og Mentamálaráðið skal við hesum taka frástøðu frá teimum."*

ad. 3. A byrjar við at siga, at hann tvær ferðir áður hevur biðið um alment innlit í eitt teldubræv, dagfest 14. juni 2005. Mentamálaráðið kann bert enn eina ferð endurtaka, at nevnda teldubræv ikki er skrásett í skjalagreiðsluni hjá Mentamálaráðnum

ad. 4. G, sum A vísir til, er G, varaskúlastjóri á Føroya Sjómans- og Maskinmeistaraskúla. A hevur áður biðið um alment innlit í persónsmálið hjá G og fingið øll skjøl, sum lógin um alment innlit gevur honum rætt til."

*Sambært frágreiðingini eru tey skjøl, sum biðið verður um undir pkt. 1 og 2, ikki til skjals. Hetta átti tí at framgingið av svarinum frá Mentamálaráðnum. Eg skal í hesum sambandi minna á, at eitt svar uppá eina innlitsumbøn er ein fyrisitingarlig avgerð, sum skal avgreiðast samsvarandi ásetingunum í fyrisitingarlógini. Umsøkjarin átti tí eisini at fingið eina fráboðan um, at eingi slík skriv vóru til, og harvið eina grundgeving fyri, at hann ikki fekk hesi skjøl, sum biðið varð um.*

*Í pkt. 3 biður klagarin enn einaferð um innlit í, hvør hevur latið ráðnum eitt teldubræv, sum A 14. juni 2005 hevur sent limunum í fakfelagnum Maskinmeistaralærarar, og sum ikki var ætlað ráðnum. Hendan innlitsumbøn er sett fram fleiri ferðir áður, bæði í august og oktober 2005. Í teldubrævi, dagfest 24. aug. 2005, hevur undirvísingarleiðarin svarað A, at hetta teldubræv ikki er skrásett í ráðnum. Eg kann av góðum grundum ikki taka dagar ímillum, hvørt ráðið hevur ella hevur havt hetta teldubræv um hendi, og geri tí ikki meira við hendan spurning.*

*Viðvíkjandi pkt. 4 sigur ráðið í ummæli sínum, at klagarin hevur fingið øll skjølini viðvíkjandi hesum máli. Uttan mun til um hetta er so ella ikki, hevði Mentamálaráðið skyldu til at svara hesum partinum av innlitsumbønini.*

*Eg haldi ikki avgreiðsluna hjá Mentamálaráðnum av hesari innlitsumbønini hava verið nøktandi, og fari tí eisini at geva ráðnum eina átalu fyri hetta.*

*Av tí, at eg haldi talan hava verið um álvarsom brek við viðgerðini av umsóknini frá A um loyvi at arbeiða niðursetta tíð, havi eg samsvarandi § 10, stk. 1 í umboðsmanslógini boðað formansskapinum í Løgtinginum, løgmanni og landsstýrismannin í mentamálum frá niðurstøðu mínari.*

*Burtursæð frá givnum átalum og tilmælum, fari eg ikki at gera meira við hetta málið.*

## 28.7 Handfaringin hjá Almanna- og heilsumálaráðnum og Landssjúkrahúsinum av starvsfólkamáli hjá tænastumanni

Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um handfaringina hjá Almanna- og heilsumálaráðnum og Landssjúkrahúsinum av málinum, tá fyribilssetanin av einum tænastumanni sum leiðandi yvirlækni varð tikin aftur, og tænstumaðurin fekk eina ávaring sum vanligur yvirlækni. Hóast talan formliga var um afturtøku av eini fyribilssetan, helt umboðsmaðurin, at málið skuldi viðgerast sum um talan var um eina fasta setan. Hetta varð m.a. grundað á, at fyribilssetanin hevði vart í meira enn tvey ár uttan steðg. Umboðsmaðurin helt orsøkirnar til afturtøkuna vera uppáhald um tænastumisbrot, og tí var afturtøkan at meta sum agarevsing, sum sambært tænastumannalógini ikki kann áleggjast uttan at tænastuligt forhoyr hevur verið frammanundan. Umboðsmaðurin mælti tí Almanna- og heilsumálaráðnum til at taka málið uppaftur og viðgera málið eftir reglunum í tænastumannalógini. Umboðsmaðurin hevði einki at viðmerkja til, at Landssjúkrahúsið í tíðindaskrivi hevði kunnað um, at tænastumaðurin varð settur frá sum leiðandi yvirlækni, tí málið hevði tá fingið drúgva umrøðu í fjølmiðlunum, men dugdi ikki at síggja nakað endamál við at kunna almenningin um, at ætlanin var at geva honum eina ávaring. (J. nr. 200600027)

## Klagan

Við skrivi, dagfest 13. mars 2006, hevur B, adv., sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

**„Kæra yvir umsitingina hjá Almanna- og heilsumálaráðnum og Landssjúkrahúsinum í starvsfólkamálinum viðvíkjandi A, leiðandi yvirlækna**

A hevur vent sær til mín og biðið meg kært umsitingina hjá Almanna- og heilsumálaráðnum og Landssjúkrahúsinum í sambandi við starvsfólkamál hansara.

A hevur verið í starvi sum tænastumaður og yvirlækni á Landssjúkrahúsinum síðani juli 1991.

Hann hevur starvast har í 14 ár uttan nakra átalu ella ávaring.

Somuleiðis hevur A, undantikið nakrir mánaðar í 2003, síðani 2000 verið settur sum leiðandi yvirlækni fyri kirurgiska depilin á Landssjúkrahúsinum.

Heldur ikki sum leiðandi yvirlækni hevur A móttikið nakra ávaring ella átalu í starvi sínum.

Í tíðarskeiðinum frá 13. – 20. oktobur 2005 var arbeiðssteðgur á arbeiðsmarknaðinum.

A var burturstaddur, men kom aftur á Landssjúkrahúsið tann 19. oktobur 2005. Hann varð tá upplýstur um, at fleiri av sjúklingum hansara vóru avlýstir vegna nevnda arbeiðssteðg.

A var sera ónøgdur við hesi viðurskifti, nevniliga at sjúklingar hansara vóru avlýstir, uttan at hann ella nakar annar yvirlækni hevði tikið støðu til, hvørt talan var um akuttar sjúklingar ella ikki.

A gjørdi vart við hesi viðurskifti á fundi tann 19. oktobur 2005 kl. 9.00.

Mikil orðadráttur var á hesum fundi, og mangt bendir á, at leiðandi yvirsjúkrasystirin hevur fatað boðini á nevnda fundi soleiðis, at sjúklingarnir hjá A ikki skuldu avlýsast. Hon fór síðani av sínum eintingum út av fundinum og kallaði sjúklingarnar inn av nýggjum, uttan at A visti av hesum.

Hósmorgunin 20. oktobur 2005 fekk A at vita, at sjúklingar hansara vóru møttir, og at tann fyrsti sjúklingurin longu var doyvdur.

Hann gjørdist sera illa við av hesum, tí tað var ikki ætlan hansara at innkalla sjúklingarnar í stríð við avgerðina hjá leiðsluni.

Hann vendi sær beinanvegin til leiðsluna og spurdi, hvat hann skuldi gera. Hann fekk at vita, at tá sjúklingarnir vóru kallaðir inn, skuldi hann viðgera hesar.

Arbeiðssteðgurin varð avlýstur sama dag, nevniliga 20. oktobur 2005.

Sama dag, 20. oktobur 2005, fær A fundarboð frá leiðsluni, og fær hann at vita, at talan verður um tænastustig mótvegis honum.

A vendi sær til mín, tí hann hevði fingið at vita frá leiðsluni, at fundur varð ásettur sama dag kl. 16.00.

Eg tosaði við sjúkrahúsleiðsluna tann 20. oktobur 2005 og fekk fundin útsettan til dagin eftir kl. 17.00.

Seinri varð so fundurin útsettur til mánadagin 24. oktobur 2005.

Á hesum fundi fekk A handað skriv um fráboðan um ætlaða innstilling til uppsøgn sum tænastumaður á Landssjúkrahúsinum.

Saman við hesum skrivi vórðu løgd við 6 upprit frá leiðsluni á Landssjúkrahúsinum.

Í nevnda skrivi verða grundgevingarnar fyri ætlaðu uppsøgnini nevndar at vera, at A undir arbeiðssteðginum 13. – 20. oktobur 2005 skal hava boðað frá, at hann ikki ætlaði sær at avlýsa nakrar skurðviðgerðir av sjúklingum hansara, hóast at sjúkrahúsleiðslan hevði avgjørt, at tað bert skuldu fremjast bráfeingisviðgerðir, meðan arbeiðssteðgurin var.

Undir hesum umstøðum leggur sjúkrahúsleiðslan til grund, at A, hóast at hava fingið fráboðan um hesa avgerð, ikki hevur tikið stig til, at sjúklingarnir ikki vórðu kallaðir inn.

Úrslitið av hesum varð, at hann sambært leiðsluni hevði eitt fult óbroytt skurðprogramm tann 20. oktobur 2005.

Sambært sjúkrahúsleiðsluni er hetta gjørt í eini støðu, tá sjúkrahúsið annars var í eini neyðstøðu, og verður atferðin hjá A av sjúkrahúsleiðsluni mett at vera ábyrgdarleys.

Onnur grundgevingin er, at A ikki hevur viljað framt tær avgerðir, sum kirurgiska depilsleiðslan saman við sjúkrahúsleiðsluni hevur fráboðað tann 14. apríl 2005 viðvíkjandi føðideildini.

Í hesum sambandi verður sagt, at A ikki hevur víst neyðugan loyalitet og leiðsluábyrgd í sambandi við hesa umlegging.

Í skrivinum staðfestir sjúkrahúsleiðslan, at A skal hava víst ein slíkan atburð, at leiðslan hevur mist álitið á honum, og verður tí ein fráboðan um ætlaða uppsøgn fráboðað honum vegna manglandi loyalitet, manglandi ábyrgdarkenslu og manglandi samstarvsvilja mótvegis leiðsluni á Landssjúkrahúsinum.

Undirritaði mótmælti á fundinum hesi avgerð, tí talan var um disipliner viðurskifti, sum undir øllum umstøðum mugu hava sum fyritreyt, at ein tænastumannasak er reist mótvegis A.

Grundgevingarnar hjá sjúkrahúsleiðsluni vóru greitt av slíkum slagi, at hesar viðvíkja disiplinerum viðurskiftum. Sjúkrahúsleiðslan helt fast við, at talan var um eina diskretionæra uppsøgn.

Undirritaði mótmælti beinanvegin hesum framferðarhátti við skrivi dagfest 25. oktobur 2005.

Eisini mótmælti undirritaði, at sjúkrahúsleiðslan, sum ikki er setanarmyndugleikin, kundi fráboða A eina ætlaða uppsøgn sum tænastumaður.

Mítt sjónarmið er, at slík avgerð ikki kann delegerast til ein annan myndugleika, men at ein slík avgerð má takast av landsstýrismanninum sjálvum.

Málið fekk mikla umrøðu, og Serlæknafelag Føroya mótmælti eisini

mannagongdini hjá sjúkrahúsleiðsluni við skrivi dagfest 29. oktobur 2005.

Viðmerkjast skal, at sjúkrahúsleiðslan ikki, sum lógin fyriskrivar, samstundis sum fráboðanin um ætlaða uppsøgn varð latin A, sendi eina kunning til fakfelag hansara um ætlaðu uppsøgnina.

Undirritaði heitti á sjúkrahúsleiðsluna um at fáa øll skjølini umsett, og at málið beinanvegin skuldi leggjast fyri Foreningen af Speciallæger.

Hetta varð síðani gjørt, og freistin hjá mær at svara varð útsett í eina viku.

Undirritaði sendi vegna A tann 2. novembur 2005 hoyringssvar, har eg gjørdi sjúkrahúsleiðsluna varuga við, at framferðarhátturin hjá sjúkrahúsleiðsluni og avgerðin um at siga A úr starvi ikki var røtt.

Á fundi tann 6. novembur 2005 fekk A eina skrivliga avgerð um fráboðan um ávaring.

Í skrivinum verður sagt, at sjúkrahúsleiðslan hevur avgjørt at broyta fráboðaðu ætlanina um at heita á landsstýrismannin í almanna- og heilsumálum um at siga A úr starvi sum tænastumann á Landssjúkrahúsinum, men at sjúkrahúsleiðslan samstundis hevði mist alt álit á, at hann kundi halda áfram í starvinum sum leiðandi yvirlækni.

Niðurstøðan í nevnda skrivi er, at sjúkrahúsleiðslan gevur A eina soljóðandi ávaring:

„Í virki tygara sum yvirlækni á Landssjúkrahúsinum skulu tygum rætta tygum eftir avgerðum hjá leiðsluni og vísa samstarvsvilja."

Samstundis verður fráboðað, at setanin sum leiðandi yvirlækni verður tikin aftur frá A. Einki verður upplýst við hvørji freist hetta verður gjørt.

Undirritaði mótmælti hesi avgerð við skrivi dagfest 15. novembur 2005, har eg m.a. gjørdi galdandi, at tá sjúkrahúsleiðslan hevði tikið avgerð um at taka aftur starvið frá A sum leiðandi yvirlækni, kundi leiðslan ikki eisini geva honum eina ávaring.

Tey viðurskifti, sum høvdu givið orsøk til at taka aftur setanina sum leiðandi yvirlækni, høvdu samband við hetta starv og ikki samband við starvið hjá A sum vanligur yvirlækni.

Sjúkrahúsleiðslan svaraði aftur við skrivi dagfest 22. novembur 2005, har leiðslan kom við nøkrum grundgevingum fyri avgerð sínari. Grundgevingarnar vóru,

- at A við atburði sínum skal hava verið orsøkin til, at avlýstu sjúklingarnir vórðu kallaðir inn aftur uttan at talan var um bráðneyðugar viðgerðir,
- at A skal hava verið fult vitandi um, at sjúklingarnir vóru innkallaðir aftur,
- at A skal hava fyrireikað skurðviðgerðirnar av egnum sjúklingum,
- at A aftan á fund við leiðsluna 19. oktobur 2005 ikki gjørdi nakað aktivt fyri at fylgja yvirskipaðu avgerðini, og
- at hann við atburði sínum skal hava virkað ímóti avgerðum, tiknar av sjúkrahúsleiðsluni undir eini kreppustøðu.

Viðmerkjast skal, at sambært upplýsingunum í málinum hevur eingin lækni tikið støðu til, um teir sjúklingar, sum vórðu viðgjørdir tann 20. oktobur 2005, vóru bráðneyðugir ella ikki, eins og A og onnur á Landssjúkrahúsinum, herundir fakfelag hansara hava gjørt galdandi, at Landssjúkrahúsið als ikki undir hesum umstøðum var í eini kreppustøðu.

Eisini er at viðmerkja, at sambært leiðslubygnaðin á Landssjúkrahúsinum er ivasamt, hvørt sjúkrahúsleiðslan av sínum eintingum, uttan at tosa við viðkomandi yvirlækna, hevur rætt til at avlýsa sjúklingar.

A hevur undir allari viðgerðini hildið fast við, at hann ikki var vitandi um, at sjúklingarnir vóru innkallaðir aftur tann 20. oktobur 2005.

Í hesum sambandi hevur A eisini gjørt vart við, at eitt upprit frá yvirsjúkrasystrini ikki kundi verða rætt, og hava fleiri yvirlæknar skrivliga váttað hetta í einum uppriti frá 23 novembur 2005.

Undirritaði kærdi avgerðina hjá sjúkrahúsleiðsluni til Almanna- og heilsumálaráðið við skrivi frá 25. novembur 2005.

Sjúkrahúsleiðslan svarar aftur við skrivi frá 19. desembur 2005, har sjúkrahúsleiðslan gav nærri grundgevingar fyri avgerð síni um at geva A eina ávaring.

Undirritaði sendi hoyringsskriv til Almanna- og heilsumálráðið tann 4. januar 2006, har eg enn einaferð gjørdi vart við, at tað greitt framgongur av málinum, at A hósmorgunin 20. oktobur 2005 mótvegis sjúkrahúsleiðsluni var sera ovfarin av, at sjúklingar møttu upp henda morgunin, og vísti eg einaferð til eitt upprit, sum sjúkrahússtjórin sjálvur hevur skrivað 23. oktobur 2005.

Í hesum uppriti verður orðarætt sagt soleiðis:

"Hann segði (A), at hann ikki visti av, at sjúklingarnir vóru innkallaðir, og onkur hevði gjørt tað, uttan at hann visti av tí. Hann vildi vita, um hann skuldi avlýsa sjúklingarnar. Hann fekk boð um, at hann ikki skuldi avlýsa sjúklingarnar."

Eisini førdi eg enn einaferð fram, at tað ikki gevur nakra meining at geva eina ávaring, tá sjúkrahúsleiðslan longu frammanundan hevur tikið eitt so álvarsligt stig sum at taka aftur setanina av honum sum leiðandi yvirlækni.

Við hesi avgerð misti A munandi tygn á landssjúkrahúsinum, eins og hann fór munandi niður í løn.

Tann 27. januar 2006 var fundur í Almanna- og heilsumálaráðnum,

har báðir partar luttóku. A var burturstaddur í arbeiðsørindum og var tí ikki við á fundinum.

Við skrivi dagfest 2. februar 2006 boðar Almanna- og heilsumálaráðið frá, at avgerðin hjá sjúkrahúsleiðsluni verður staðfest.

Tað løgna í málinum er, at grundgevingarnar fyri ikki at ganga kæruni á møti ikki eru tær somu, sum sjúkrahúsleiðslan hevur brúkt.

Ávaringin sambært Almanna- og heilsumálráðnum skal vera givin fyri tvørrandi samstarvsvilja, fyri ikki at lýða leiðslubod í kreppustøðu og „fyri at hótta starvsfólk".

Tað framgongur ongastaðni í málinum, at A skal hava hótt nøkur starvsfólk, og tí kann undirritaði als ikki góðtaka, at Almanna- og heilsumálaráðið í eini kæruviðgerð tykist taka til aðrar grundgevingar og meira niðursetandi viðurskifti enn tey, sum hava fyriligið í málinum frammanundan.

Eisini sigur Almanna- og heilsumálaráðið:

„Grundgevingarnar frá leiðsluni á Landssjúkrahúsinum fyri at geva ávaringina eru ikki á nøktandi hátt afturvístar av tygum."

Hesin parturin av grundgevingini tykist byggja á ta heilt skeivu fatan, at tað er A, sum hevur próvbyrðuna fyri, at tey viðurskifti, sum geva orsøk til ávaringina, fyriliggja ella ikki.

Tað er sjálvsagt soleiðis, at tað er sjúkrahúsleiðslan, sum hevur próvbyrðuna fyri, at tey viðurskifti, sum sjúkrahúsleiðslan førir fram í grundgeving síni, herundir at A skal hava verið vitandi um, at sjúklingarnir vóru innkallaðir aftur, veruliga hava fyriligið.

Í málinum eru sum kunnugt mótstríðandi upplýsingar, herundir upplýsingar, sum sjúkrahúsleiðslan sjálv hevur framleitt, og tí er í míni verð eingin ivi um, at leiðslan ikki hevur lyft ta próvbyrðu,

sum skal til fyri at kunna geva ta ávaring, sum hon hevur givið við teimum fyriliggjandi grundgevingunum.

Tað er tí beinleiðis skeivt av Almanna- og heilsumálaráðnum partvíst at taka inn nýggj viðurskifti, herundir at A skal hava hótt starvsfólk, og at tað er A sum hevur próvbyrðuna fyri, at grundgevingarnar fyri ávaringini eru til staðar ella ikki.

Á henda hátt hevur Almanna- og heilsumálaráðið eftir míni metan borið seg skeivt at umsitingarliga og hevur gjørt eina skeiva løgfrøðiliga metan av málinum.

Samanumtikið meti eg, at sjúkrahúsleiðslan og Almanna- og heilsumálaráðið hava framt stór umsitingarlig mistøk í sambandi við hetta starvsfólkamál.

Av fyrstan tíð átti sjúkrahúsleiðslan ikki havt sent A eina fráboðan um ætlaða innstilling til uppsøgn sum tænastumaður á Landssjúkrahúsinum, og at givið honum boð um at fara heim til hús, meðan málið varð viðgjørt.

Hetta er ein so álvarslig avgerð, at henda avgerð bert kann takast av setanarmyndugleikanum, sum er landsstýrismaðurin sjálvur.

Einki fyriliggur í málinum um, at Landssjúkrahúsið, áðrenn henda avgerð er tikin, hevur samráðst við Almanna- og heilsumálaráðið.

Eisini er tað eitt umsitingarligt mistak, at grundgevingarnar fyri hesi avgerð eru av disiplinerum slagi, uttan at ein tænastumannakanning hevur verið hildin, áðrenn avgerðin varð tikin.

Viðgerðin aftan á hevur eisini staðfest, at sjúkrahúsleiðslan ikki hevði neyðuga løgfrøðiliga grundgeving fyri ætlan sínari um at innstilla A til eina uppsøgn, og varð henda avgerð síðani broytt av sjúkrahúsleiðsluni.

Nógv bendir á, at sjúkrahúsleiðslan fyri at skava út yvir sítt egna

mistak valdi at taka til onnur stig, herundir at taka aftur setanina av A sum leiðandi yvirlækni og eisini at geva honum eina ávaring við teirri grundgeving, at sjúkrahúsleiðslan hevði mist alt álit á, „at hann kundi halda fram í starvinum sum leiðandi yvirlækni."

Í hesum sambandi meti eg, at sjúkrahúsleiðslan gjørdi eitt mistak, at hon fór í fjølmiðlarnar við hesum og almannakunngjørdi, at leiðslan hevði mist „alt" álit á honum sum leiðandi yvirlækni.

Óneyðugt er at siga, at slíkar upplýsingar, sum verða bornar alment fram, eru til miklan skaða fyri ein yvirlækna.

Eisini eri eg av teirri áskoðan, at sjúkrahúsleiðslan í skrivi sínum frá 22. novembur 2005 í veruleikanum kemur við nýggjum grundgevingum í mun til upprunaliga skrivið frá 24. oktobur 2005.

Í upprunaligu avgerðini varð upplýst, at A ikki skal hava tikið stig til, at sjúklingarnir ikki vórðu kallaðir inn aftur.

Í skrivinum frá 22. novembur 2005 verður nú beinleiðis sagt, at A aktivt skal hava skipað soleiðis fyri, at sjúklingarnir vórðu innkallaðir aftur.

At enda haldi eg, at Almanna- og heilsumálaráðið hevur gjørt eitt stórt umsitingarligt mistak, parvíst við at koma við heilt nýggjum grundgevingum fyri at staðfesta ávaringina, nevniliga eina fullkomiliga órímiliga grundgeving um, at A skal hava hótt stavsfólk og við at leggja til grund, at tað er A, sum hevur próvbyrðuna fyri, at tey viðurskifti, sum eru orsøk til ávaringina, ikki fyriliggja.

Eg fari við hesum at biðja Løgtingsins Umboðsmann um at taka málið upp til viðgerð og vænti at frætta aftur.

Skjølini í málinum verða løgd við í avriti."

## Málsgongd

Í skrivi, dagfest 24. oktober 2005, hevur landssjúkrahúsið sent A soljóðandi skriv:

> **„Fráboðan um ætlaða innstilling til uppsøgn sum tænastumaður á Landssjúkrahúsinum**
>
> Við hesum verður boðað frá, at ætlanin er at heita á landsstýrismannin í Almanna- og heilsumálum um at siga tygum úr starvi sum tænastumann á Landssjúkrahúsinum.
>
> Orsøkin til ætlaðu uppsøgnina er væntandi samstarvsvilji í sambandi við, at leiðsluavgerðir eru tiknar og skulu fremjast í verki á stovninum. Tað, sum ger støðuna serliga álvarsama, er, at tygum eru í starvi sum leiðandi yvirlækni við leiðsluábyrgd fyri meira enn 100 starvsfólkum. Í hesum starvið hava tygum víst ein atburð, sum hevur gjørt, at sjúkrahúsleiðslan hevur mist álitið á, at tygum kunnu halda áfram at starvast á Landssjúkrahúsinum.
>
> Innan fyri seinastu vikuna, eru tvey ítøkilig dømi um hetta:
>
> 1. Undir arbeiðssteðginum frá 13. til 20. oktober 2005 boðaðu tygum, eftir at vera afturkomin av útlondum tann 19. oktober 2005 kl. 9, frá, at tygum ikki ætlaðu at avlýsa nakra skurðviðgerð av sjúklingum tygara, hóast sjúkrahúsleiðslan hevði avgjørt og fráboða, at tað einans vóru bráðfeingis viðgerðir, sum skuldu fremjast, meðan arbeiðssteðgur var.
>
> Hóast tygum vóru kallaður á fund við sjúkrahúsleiðsluna á middegi tann 19. oktober 2005 og har greitt fingu at vita, at tygum skuldu fylgja avgerðini, so tóku tygum ikki stig til, at sjúklingar ikki vórðu kallaðir inn. Úrslitið av hesum var, at tygum høvdu fult og óbroytt skurðprogram tann 20. oktober 2005. Hetta er gjørt í eini støðu, tá ið sjúkrahúsið er í eini neyðstøðu og verður tí mett serliga ábyrgdarleyst.
>
> 2. Á fundi millum sjúkrahúsleiðsluna og kirurgisku depilsleiðsluna tann 18. oktober 2005 søgdu tygum, at tygum ongantíð hava trúð

upp á umleggingarnar á føðideildini, og at tygum ikki vilja fremja tær avgerðir, sum kirurgiska depilsleiðslan saman við sjúkrahúsleiðsluni hevur fráboðað tann 14. apríl 2005. Tygum hava ikki víst loyalitet og leiðsluábyrgd í samband við hesa umlegging.

Tygum hava sostatt, sum leiðari og tænastumaður, gingið beint móti avgerðum, sum sjúkrahúsleiðslan hevði tikið, og verður hetta mett sum greitt brot á § 9 í Løgtingslóg nr. 31 frá 5. juli 1971 um tænastumenn landsins, har tað er ásett, at ein tænastumaður skal vísa slíkan atburð, sum starvi hansara sømir. Ein serlig ábyrgd liggur á leiðara um at vísa ábyrgd og sømiligan atburð.

Við hesum verður hervið boðað frá, at sjúkrahúsleiðslan hevur mist álítið á tygum og av hesi orsøk vísandi til §§ 23 og 25 í Løgtingslóg nr. 31 frá 5. juli 1971 um tænastumenn landsins, ætlar at heita á landsstýrismannin í almanna- og heilsumálum um at siga tygum úr starvi við 3 mánaða freist vegna manglandi loyalitet, manglandi ábyrgdarkenslu og manglandi samstarvsvilja mótvegis leiðsluni á Landssjúkrahúsinum.

Meðan málið verður viðgjørt, verða tygum biðin um ikki at vera til arbeiðis á Landssjúkrahúsinum. Løn tygara verður ikki skerd hetta tíðarskeið.

Viðløgd eru notat, sum nærri útgreina tey faktisku viðurskiftini.

Sambært Løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg hava tygum rætt til at verða hoyrdur, áðrenn slíkar avgerðir sum hesar verða tiknar. Tygum fáa 14 daga hoyringsfreist, og eitt skrivligt hoyringssvar skal verða sjúkrahúsleiðsluni í hendi í seinasta lagi tann 7. november 2005 kl. 16.00.

Viðlegg:

1. Arbeiðssteðgurin 13. til 20. oktober 2005 og atburðurin hjá A, leiðandi yvirlækna. (M, sjúkrahússtjóri)

2. Notat frá telefonsamrøðu við H, yvirlækna, mikudagin 19. oktober uml. kl. 11.00. (E, læknastjóri)
3. Notat frá samrøðu við A, mikudagin 19. oktober uml. kl. 11.15. (E, læknastjóri)
4. Notat frá samrøðu við A, mikudagin 20. oktober, kl. 9.40 (E, læknastjóri)
5. Notat eftir umbøn frá døgunum 13.10.05 til 20.10.05 har Landssjúkrahúsið er rakt av arbeiðssteðgi. (D, leiðandi sjúkrarøktarfrøðingur)
6. Notat frá fundi viðv. føðideildini tann 18. oktober 2005, kl. 13 í fyrisitingini á Landssjúkrahúsinum. (N, sjúkra-røktarstjóri)

**Viðlegg 1**

**Notat – Arbeiðssteðgurin 13. til 20. oktober 2005 og atburðurin hjá A, leiðandi yvirlækna**

Starvsmannafelagið boðaði frá arbeiðssteðgi hósdagin tann 13. oktober 2005, kl. 14. Tá fóru allir limir hjá Starvsmannafelagnum til hús – uttan vekslarin, sum ikki fór heim fyrr enn seinrapartin fríggjadagin, aftaná at undantak ikki var komið upp á pláss tá.

Sjúkrahúsleiðslan fór beinanvegin í gongd við at søkja um undantøk, soleiðis at bráðfeingis virksemið á sjúkrahúsinum ótarnað kundi halda áframm. Hetta var fyri vekslaran, medicoteknisku deild, KT-deildina, læknaskrivarar, goymsluna og maskinverkstaðið.

Í fyrstani var rættiliga ógreitt, hvussu hetta skuldi verða gjørt. Starvsmannafelagið vísti til Fíggjarmálaráðið, tí tey søgdu at talan var um verkbann. Hetta var Fíggjarmálaráðið ósamt í. Mannagongdin fyri handfaringina av undantøkum kom ikki upp á pláss fyrr enn seinnapartin fríggjadagin, 14. oktober.

Einastu undantøk, sum vórðu givin fríggjadagin, vóru fyri vekslaran og maskinverkstaðið. Arbeitt var hart fyri at fáa undantøk fyri medicoteknisku deild, KT-deildina og goymsluna, soleiðis at hesi vóru tøk í vikuskiftunum um neyðugt. Undantøk fyri medicoteknisku- og KT-deildina fingu vit ikki fyrr enn sunnudagin 16. oktober.

Sjúkrahúsleiðslan var saman við umboði fyri Fíggjarmálaráðið á fundi við nevndina í Starvsmannafelagnum mándagin tann 17. oktober, fyri at fáa læknaskrivarar og goymsluna at verða umfataðið av undantøkunum. Hetta gekk sera striltið og tað var ikki fyrr enn um morgunin tann 19. oktober, at vit fingu hesi undantøk.

Leiðslubólkurin varð kallaður til fundar fríggjadagin tann 14. oktober 2005, kl. 12. Tá var avgerðin hjá sjúkrahúsleiðsluni um einans at fremja bráðfeingis virksemi undir arbeiðssteðginum umrødd. Í leiðslubólkinum var semja um, at hetta var tað rætta at gera og lýsast skuldi í útvarpinum í øllum tíðindasendingum í vikuskiftinum umframt í LS-nýtt, heimasíðuni og intranetinum (heimabeitinum). Leiðslubólkurin skuldi eisini syrgja fyri at kunna beinleiðis innanfyri síni øki.

A, leiðandi yvirlækni á Skurðdeplinum var burturstaddur í ..., tá ið arbeiðssteðgurin byrjaði tann 13. oktober 2005. Hann kom ikki aftur til Føroya fyrr enn mánadagin tann 17. oktober.

Boðað var inn til fundar í leiðslubólkinum kl. 7.30 á C3 hvønn gerandismorgun, meðan arbeiðssteðgurin var. Hetta var avgjørt á fundi í leiðslubólkinum, fríggjadagin tann 14. oktober.

A møtti ikki til fundar týsdagin tann 18. oktober kl. 7.30, men leiðslufelagi hansara á skurðdeplinum, D var við á fundinum henda dagin.

Leiðslubólkurin avgjørdi henda dagin at flyta komandi morgunfundir undir arbeiðssteðginum til kl. 9, soleiðis at hann kom aftaná morgunkonferansurnar á deildunum. Hetta tí tað kundi verða fleiri upplýsingar hagani, sum vóru týdningarmiklir at hava við.

Fyrstu ferð undirritaði hoyrdi nakað frá A undir arbeiðssteðginum, var tá ið leiðslubólkurin hevði fund, mikudagin tann 19. oktober kl. 9.

Á hesum fundinum legði hann út við at siga, at hann ikki fór at

avlýsa nakrar av sínum sjúklingum. Hann segði eisini beinleiðis við D, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, at tað vildi fáa fylgir fyri tann, sum hevði avlýst hansara sjúklingar. Generelt var hann ímóti strategiini, sum var løgd og meinti, at sjúkrahúsið skuldi hava fult virksemi fyri at virka ímóti fakfeløgunum. Undirritaði segði á hesum fundinum, at tað bleiv tað ikki talan um, tí sjúkrahúsið var í eini neyðstøðu, har vit ikki høvdu nýggjar forsýningar av goymsluvørum og ongar skrivarar. Undirritaði segði beinleiðis við A, at tað var ábyrgdin hjá yvirlæknunum at syrgja fyri, at bráðfeingis sjúklingar blivu viðgjørdir og at tað einans var hetta virksemi, sum skuldi vera.

Aftaná fundin fór sjúkrahusleiðslan niðan aftur í fyrisitingina. Vit sótu saman í fundarhølinum, tá ið telefon var til E, læknastjóra um 11 tíðina. Hetta var H, yvirlækni, sum var illur um, at A kundi innkalla allar sínar sjúklingar, og H vildi hava sama møguleika. Hann fekk boð um, at einki var broytt viðvíkjandi virkseminum og at tað einans skuldi vera bráðfeingis virksemi.

Aftaná samrøðuna umrøddi sjúkrahúsleiðslan støðuna og avgjørdi, at E skuldi ringja til A og biðja hann um at koma á fund um hetta beinanvegin. Tað gjørdi E og tosaði inni á kontórinum hjá sær. Tá hann kom aftur, fortaldi hann, at A hevði verið sera óforskammaður. At hann hevði sagt, at hetta skuldi sjúkrahúsleiðslan ikki blanda seg uppí og hann hevði eisini hótt við, at E skuldi minnast til, hvat var hent við P. Hann hevði eisini hótt við, at hann vildi siga seg frá sum leiðandi yvirlækna. Hann noktaði blankt at koma á ein fund við sjúkrahúsleiðsluna og hevði síðani smekkað rørið á.

Sjúkrahúsleiðslan umrøddi nú spurningin, hvat skuldi gerast. Hetta kundi ikki ganga og mátti steðgast. Onkur av hinum yvirlæknunum hevði víst misnøgd við avgerðina um, at tað einans var bráðfeingis virksemi, men teir høvdu góðtikið avgerðina. Nú var tað sjálvur tann leiðandi yvirlæknin, sum gekk beint ímóti tí, sum leiðslan hevði avgjørt.

Meðan vit tosaðu um hetta, kom A kortini niðan í fundarhøli í fyrisitingini, har sum sjúkrahúsleiðslan sat. Hetta var eitt sindur

yvir kl. 12. Hann hevði pappírir í hondini. Undirritaði roknaði við, at hetta var ein uppsøgn úr starvinum sum leiðandi yvirlækni. Hetta var kortini ikki talan um eitt uppsagnarskriv, men eitt heilt annað mál.

Tá eg hevði móttikið hetta skrivi frá honum, segði eg honum, at vit høvdu biðið hann komið á fund. Hann segði, at tað var ikki tí, hann var her. Kortini fóru vit beint yvir at diskutera hesa støðuna.

Undirritaði segði við hann, at vit í sjúkrahúsleiðsluni als ikki kundu góðtaka, at hann uppførdi seg upp á henda mátan og gekk beinleiðis ímóti tí, sum leiðslan hevði avgjørt. At tað einans vóru bráðfeingis sjúklingar, sum skuldu viðgerast, meðan arbeiðssteðgurin var. Hann segði so, at so vildi hann bara definerað alt sum bráðfeingis. Hetta søgdu vit var at umganga reglurnar og tað var eitt sindur av togarí millum A og E um hetta. Hann segði, at hann vildi ikki diskutera hetta við ein narkosulækna, sum als ikki hevði forstand upp á kirurgi. Hann segði, at hann ikki vildi niður á eitt barnahavastøði í diskussiónini og eingin skuldi tosa niður til hansara. Undirritaði segði, at vit góðtóku ikki hansara atburð og at hann hevði at rættað seg eftir tí, sum sjúkrahúsleiðslan hevði avgjørt.

A tók síðani ein pen og bað um at fáa eitt pappír. Meðan vit sótu har, setti hann seg at orðað eitt skriv, sum var stílað til undirritaða. Uttan at hetta var sagt ella hann kláraði at skriva tað liðugt og geva tað, so gangi eg út frá, at talan var um eina uppsøgn úr starvinum sum leiðandi yvirlækni.

Sjúkrahúsleiðslan fór av fundinum eina løtu, og tosaðu um hvat vit skuldu gera. Avgjørt var, at hann skuldi taka støðu til, um hann fylgdi avgerðini um at tað einans vóru bráðfeingis sjúklingar, sum skuldu viðgerast meðan arbeiðssteðgurin var. Komin inn aftur læs undirritaði lýsingina upp, sum var send út í útvarpi og innanhýsis, og spurdi um A vildi fylgja hesi avgerðini. Tá svaraði hann ja og fundurin var hevaður.

Aftaná at A var farin, umrøddu vit í sjúkrahúsleiðsluni støðuna. Vit vóru samd í, at hetta bar ikki til.

Tað næsta sum hendi av beinleiðis sambandi millum undirritaða og A var, at hann ringdi heim til mín um kvøldið umleið kl. 20. Hann segði, at hann ætlaði at fara frá sum leiðandi yvirlækni og at eg skuldi vera fyrireikaður upp á at fáa eitt skriv frá honum morgunin eftir.

Eg segði við hann, at eg var heilt samdur við honum í, at hann skuldi frá sum leiðandi yvirlækni, og at hann skuldi uppføra seg ordiliga, um hann skuldi vera á Landssjúkrahúsinum. Eg segði honum, at eg tolereri ikki atburðin, sum hann vísti í stríðnum móti leiðsluni, síðst tá hann fór frá sum leiðandi yvirlækni í sambandi við at P mátti fara.

Næsta morgun, hósdagin tann 20. oktober, tá eg møtti til arbeiðis, fekk eg at vita, at allir 5 sjúklingar, sum A hevði sett á operatiónsprogrammið, áðrenn hann fór til ...fyri meiri enn 14 døgum síðani, vóru møttir upp. Teir vóru kallaðir inn. Vit tosaðu í sjúkrahúsleiðslunin um vit skuldu krevja, at hesir sjúklingarnir fóru heim aftur, men avgjørdu at hetta skuldi ikki gerast, tí tað skuldi ikki ganga út yvir sjúklingarnar, at tað var ein tvídráttur, har ein leiðandi yvirlækni ikki gekk eftir boðum. Hetta mátti handfarast øðrvísi.

Fundur var í leiðslubólkinum kl. 9 um støðuna undir arbeiðssteðginum. A møtti ikki upp fyrr enn kl. 9.30 og var tá í operatiónsklæðum. Hann segði einki á fundinum. Hann bað um at sleppa at tosa við E aftaná fundin. Eg bað E um at siga við A, at hann skuldi koma á fund við sjúkrahúsleiðsleiðsluna kl. 16.

E fortaldi frá samrøðuni, at A hevði verið rættiliga kroystur. Hann segði, at hann ikki visti av at sjúklingarnir vóru innkallaðir og onkur hevði gjørt tað, uttan at hann visti av tí. Hann vildi vita, um hann skuldi avlýsa sjúklingarnar. Hann fekk boð um, at hann ikki skuldi avlýsa sjúklingarnar.

Í sjúkrahúsleiðsluni umrøddu vit nú spurningin, hvat vit skuldu

gera. Ikki einans hevði A sagt, at hann ikki ætlaði sær at ganga eftir boðunum hjá sjúkrahúsleiðsluni, men hann hevði eisini gjørt tað. Um morgunin dagin fyri hevði hann garterað runt á skurðdeplinum og hótt við fylgjum fyri tann, sum hevði avlýst hansara sjúklingar. Hann hevði síðani verið á fundi við sjúkrahúsleiðsluna og játtað, at hann vildi fylgja boðunum. Kortini hevði hann ikki fylgt upp uppá hetta og tryggja sær, at sjúklingarnir ikki vóru kallaðir inn. Hann hevði sostatt í royndum ikki fylgt boðunum og generelt livað upp til tað, sum við allari rímiligheit kann krevjast av einum, sum er leiðandi yvirlækni.

Generelt kann sigast um leiklutin hjá A undir arbeiðssteðginum, at hann als ikki hevur livað upp til leiklutin sum leiðandi yvirlækni á einum av teimum stóru deplunum á Landssjúkrahúsinum við yvir 100 stavsfólkum. Hann átti sjálvandi sum ovasti leiðari á deplinum, at sett seg inn í støðuna beinanvegin, tá hann kom aftur úr ... mánadagin 17. oktober og tryggja sær, at alt á deplinum varð lagt til rættis upp á ein forsvarligan hátt og innan fyri teir karmar, sum yvirskipaða leiðslan á Landssjúkrahúsinum hevði ásett. Herundir at tryggja sær, at tað vóru gjørdar mannagongdir fyri, at tað einans vóru bráðfeingis sjúklingar, sum blivu viðgjørdir og at hinir blivu avlýstir. Hetta gjørdi hann als ikki. Heldur tvørturímóti fer hann inn og skapar ruðuleika og er tann mest illoyali yvirfyri avgerðini, sum er tikin. Hetta er í eini støðu, tá ið sjúkrahúsið er í eini neyðstøðu, har vit ikki vita, hvussu langur arbeiðssteðgurin fer at vera. Tá hetta verður gjørt, fær sjúkrahúsið ikki nýggjar forsýningar til goymsluna, tað eru eingir læknaskrivarar at finna og føra journalirnar o.s.fr.

Sjúkrahúsleiðslan avgerð, at tað ikki ber til at hava ein slíkan persón á Landssjúkrahúsinum, sum í starvinum sum leiðandi yvirlækni á skurðdeplinum uppførur seg so ábyrgdarleyst og skapar órógv á sjúkrahúsinum undir einari neyðstøðu. Tað er so avgjørt tyngjandi fyri hann, at hann er í einum leiðandi starvi við stórari starvsfólkaábyrgd, tá hann uppførir seg soleiðis. Tá hann kann gera tað í hesi støðuni, hvat kann hann tá loyva sær sum vanligur yvirlækni?

Tað ber ikki til at lata A halda áfram sum tænastumaður á Landssjúkrahúsinum, tí vit hava mist alt álitið á honum.

Tá talan er um ein leiðandi persón, er tað ikki rætt at geva ávaringar, áðrenn komið verður til uppsøgn. Hetta tí leiðsluautoriteturin verður tikin frá einum, sum hevur eina ávaring hangandi yvir sær. Hetta er orsøkin til, at sjúkrahúsleiðslan ikki metir at vanligi politikkurin, sum er galdandi fyri starvsfólk annars, skal vera galdandi í eini støðu sum hesari.

A fær skrivliga boð um at møta á fundi við sjúkrahúsleiðsluna seinnapartin tann 20. oktober, kl. 16, og hann kann hava ein hjásitara við. A biðjur um at fáa hetta útsett til dagin eftir kl. 16, tí álitisumboðið hjá honum kann ikki møta. Hetta verður í fyrstu syftu noktað, men so broyta vit hesa avgerð, og fundurin verður settur til kl. 16 fríggjadagin 21. oktober. Seinni verður hetta aftur flutt til kl. 17. Sjúkrahúsleiðslan hevur síðani fund við sín sakførara um málið. Úrslitið av hesum verður, at fundurin við A verður fluttur til mánadagin, 24. oktober 2005, kl. 17.

**Viðlegg 2**
**Notat frá telefonsamrøðu við H, yvirlækna**
Mikudagin 19. okt umleið kl 11.00

H ringir til mín og er sera illa nøgdur við, at vit í leiðslubólkinum hava tikið avgerð um at avlýsa allar ikki bráneyðugar skurðviðgerðir. Greiðir frá, at hann sjálvur hevði nakrar sera smáar skurðviðgerðir á skránni til hendan dagin, og at hann helt, at tað „líktist svartasta ongum, at hann ikki kundi fáa loyvi til at fremja hesar smáu skurðviðgerðirnar – honum hevði ikki nýtst nakra stórvegis hjálp ella nakra serliga nógv tilfar, hetta eru bara smáar skurðviðgerðir“.

Eg fasthelt, at talan var um eina undantaksstøðu fyri alt sjúkrahúsið, har vit í verðunleikanum ikki kundu tryggja nakra sum helst forsýningar av tilfarið, og heldur ikki vistu hvussu leingi støðan kundi varða, og tí høvdu tikið hesa avgerðina, og at hon skuldi respekterast.

H var kortini sera misnøgdur, og eg spurdi um tað vóru nakrar neyðugar ella hóttandi støður hjá hesum sjúklingunum hjá honum. H segði, at tað var tað ikki, men hann kortini helt, at tað var ein býtt avgerð, sum vit høvdu tikið, men at hann fór at gera, sum vit søgdu. Eisini helt hann tað var undarligt, at tekin vóru til, at A kundi opererað sum honum lysti.

Samrøðan endaði við, at H týðuliga misnøgdur segði, nú hevði hann so sagt sína meining.

**Viðlegg 3**
**Notat frá telefonsamrøðu við A**
Mikudagin 19.10.05 kl umleið 11.15

Aftaná at H, yvirlækni hevði ringt til mín og gjørt vart við sína misnøgd, og havandi í huga úttalilsini frá A fyrr um morgunin, tá ið vit sótu saman við depilsleiðslunum, varð avgjørt, at eg skuldi ringja til A. Hetta fyri at fáa greiði á, um hann í verðunleikanum ætlaði at gera ímóti boðunum frá sjúkrahúsleiðsluni:

Eg segði, at eg hevði fingið nakrar indikatiónir uppá, at hann hevði ætlanir um at skurðviðgera hósdagin 20. við øllum teim upprunaliga innkallaðu sjúklingunum. Hetta, hóast at vit fyrr um morgunin høvdu gjørt honum heilt greitt, at bert bráðfeingis (akuttar) skurðviðgerðir skuldu fremjast, meðan arbeiðssteðgurin var.

A gjørdist eftir mínari metan alt fyri eitt bæði hóttandi og ófólkaligur, við tað at hann bað meg minnast til P, og at eg skuldi ikki blanda meg upp í hansara øki upp á handan mátan. Eisini vildi hann hava at vita, hvør hevði slatra um hansara virksemi, tað hevði hann rætt til at fáa upplýst, segði hann. Eg segði, at tað vildi eg slett ikki diskuterað, men at eg hevði fingið fleiri tekin uppá at ætlanin hjá A var at opererað við fulla elektiva programminum.

A segði, at eg skuldi ikki byrja at behandla hann sum P, og at hann vildi ikki finna seg í, at eg førdi meg fram á barnagarðsstadie, og

blandaði meg í kirurgiska depilin. Um hetta varð mátin, so vildi hann siga seg frá sum leiðandi yvirlækni.

Eg segði, at hann skuldi koma niðan til ein fund við samlaðu sjúkrahúsleiðsluna beinanvegin. Tað vildi hann ikki hoyra talan um, og samrøðan endaði tískil.

**Viðlegg 4**
**Notat frá samrøðu við A**
Hósmorgunin 20. oktober uml. kl 09.40

Beint eftir fundin í leiðslubólkinum bað A um eina samrøðu við læknastjóran E.

Vit fóru so tveireinir innar á eina tóma skrivstovu niðri á C3, og høvdu eina stutta samrøðu:

A legði fyri við at siga, at hann nú var eitt sindur illa við, at allir hansara sjúklingar vóru møttir til planlagda skurðviðgerð hendan dagin. Hann segði, at hann ikki hevði kallað teir inn, men at onkur annar hevði gjørt tað.

Eg segði, at tað var heilt greitt ímóti teirri avgerðini, sum sjúkrahúsleiðslan og depilsleiðslurnar høvdu tikið, og at eg metti tað sum væntandi loyalitet ímóti ovastu leiðsluni á sjúkrahúsinum.

A segði, at í hvussu so er tveir av teim møttu sjúklingunum kanska kundu sendast heimaftur. Eg spurdi, um sjúklingarnir vóru komnir uttan at vera boðsendir, men A segði, at onkur, hann visti ikki hvør, tað var – ið hvussu so er ikki hann – hevði ringt til sjúklingarnar dagin fyri (tvs mikudagin 19.okt.) og biðið teir komið til skurðviðgerð kortini.

Eg segði, at eg helt ikki vit sum stovnur kundu koma okkum sovorna framferð, og at um so var, at sjúklingarnir fyrst vóru avlýstir, bæði við lýsing í útvarpi og við at ringt hevði verið til teir við avboðum, fyri síðan aftur at verða uppringdir mikudagin við boðum um at koma kortini, so kundu vit ikki senda teir heimaftur uttan skurðviðgerð.

Míni boð vóru tí, at hesar 5 sjúklingarnar máttu vit operera, men at eg sá tað sum hent var sum eina beinleiðis handling ímóti avgerð og givnum ordra frá sjúkrahúsleiðsluni, og metti tað at vera talan um illoyalitet, og í verðunleikanum myttarí ímeðan sjúkrahúsið reelt var sett í undantaksstøðu.

**Viðlegg 5**
Tórshavn, tann 21 oktober2005
Sjúkrahúsleiðslan
Notat eftir umbøn frá døgunum 13.10.05 til 20.10.05 har Landssjúkrahúsið er rakt av arbeiðssteðgi.

Tann **13. oktober** klokkan 14.00 fara øll starvsfólk, ið eru limir í Starvsmannafelagnum heim vegna arbeiðssteðg. Á kir.depli eru tað læknaskrivararnir.

Tann **14 oktober** klokkan 12.00 kallar sjúkrahúsleiðslan depilsleiðslunar inn til fund á C3, at viðgera støðuna.

Avgjørt verður, at allar elektivar viðgerðir skulu útsetast og bert bráðfeingis sjúklingar skulu viðgerast. Kunngjørt verður í útvarpinum og á heimasíðuni hjá L.S. Tað verður eisini sagt, at vit taka støðuna upp dag fyri dag um víðari planlegging av avleiðingum, arbeiðssteðgurin hevur við sær.

Fyri skurðdepilin eru tað sjúklingar, sum standa á programminum til mánadagin, sum støða skal takast til fríggjadagin. D, leiðandi sjúkrarøktarfrøðingur er, sum einasta umboð fyri depilsleiðsluna á kir. deplinum og bráðeindini á fundi, vegna tað, at báðir leiðandi yvirlæknarnir eru burturstaddir.

D sigur nú við E, læknastjóra, um hann vil hjálpa sær við at fáa boðini til læknarnar á O.P., tað eru I, gynokologur og ortopædarnir, sum eiga elektivu skurðviðgerðimar mánadagin, so skal D fáa boðini til deildarleiðarnar og hon vil eisini royna at fáa avspákingar ígjøgnum við starvsfólkið.

Tá ið D kemur í samband við Q, deildarleiðara á narkosudeildini, sigur hon, at vit sita akkurát og tosa um, hvussu programmið verður og har vóru F og H til staðar og Q kunnar um avgerðina, sum eg bar fram.

D gevur C á sjúklingastovuni boð um, at tað eru 4 sjúklingar, sum eru elektivir og eg kunni hana um avgerðina, sum leiðslan hevur kunngjørt og teir blíva avlýstir. D sigur eisini við C, at teir læknar, sum hava onnur boð, mugu koma við øðrum ordinatiónum, um tað er so.

Tann **17. oktober** mánamorgun klokkan 7.30 er avtalað, at leiðsluforumið er saman á C3, støðan er óbroytt.

Eftir fundin ringir D til F og spyr hann, um A hevði verið til læknakonferensu kl.8.00, tí at D hevði ta fatan, at A skuldi vera aftur úr ... . F svarar, at A kemur aftur í løbi av degnum. D spyr so, um teir sjúklingar sum standa á programminum til týsdagin og F sigur, at hann kann ikki útseta teir tveir cancer sjúklingar, sum hann hevur og verða tey samd um, at hesir sjúklingar blíva skurðviðgjørdir.

D ringir til O, eygnalækna og spyr um, hvussu tað verður við eygasjúklingunum og vit blíva samd um, at eygasjúklingarnir blíva avlýstir. D gevur C boð um hetta.

A ringir sama dag kl.12.45 til D og sigur, at hann er komin til landið, men er ikki á Landssjúkrahúsinum, D kunnar A um arbeiðssteðgin og teir avleiðingar, sum eru og at leiðsluforumið at hettar er tíðliga á morgni.

Tann **18. oktober** týsdag er aftur fundur á C3 klokkan 7.30/ Ongin lækni umboðar kir.depilin og bráðeindina og tað verður farið fram, sum undanfarnu dagar.

Tann **19. oktober** mikudag. C spyr D, um tað er nakað nýtt viðv.

verkbanninum, um hon ikki kann fara í gongd við at avlýsa, tíð tað er so keðiligt, at tað blívur so seint við avlýsingunum, um bíðað verður og øll lurta ikki eftir útvarpinum. D sigur ja, tí hon sigur, at støðan er óbroytt

Klokkan 9.00 er leiðslufundur á C3. A leiðandi yvirlækni fyri kir. depilin er nú við og tað verður tosað um hesa óhepnu støðu, sum verkbannið hevur við sær. A blívur nakað ilskur upp á eitt tíðspunkt og sigur, at hann ætlar sær ikki at avlýsa sínar sjúklingar og sigur við D, „eitt kann eg siga tær, at tú vágar tær ikki at røra mínar sjúklingar – gert tú tað, so verða vit óvinir fyri restina av lívinum – so skal eg ikki hava nakað at gera við teg meira".

D sigur eftir fundin við C, at hon tíverri er noydd at ringja til teir 5 sjúklingarnar hjá A, tí at tað er tað, A hevur sagt. Hettar verður gjørt. D ringir til A og biður hann koma at tosað við seg. Hettar játtar A, men kemur ikki og við einari telefonsamrøðu seinni klokkan ca. 12, sigur D, at „tú yvirtræðkar mínar grensur, við at tosa soleiðis við meg og tað er ikki gott fyri tað álitisforhold, sum skal verða okkara millum." Hann svarar bert aftur, „ja eg veit tað", og tosar um, at hann ætlar sær at fara at søkja um farðloyvi í einar 3 mdr. og tosar víðari um onnur ting.

Tað, sum nú er á kir. depli, er, at hinir læknarnir eru sera ilskir um, at skal leiðandi yvirlækni fáa sínar sjúklingar ígjøgnum, so skulu teir eisini hava sínar ígjøgnum og fara nú í gongd við at finna útav, hvør er tann, sum hevur avlýst sínar sjúklingar.

Tann **20. oktober** hósdag klokkan 9.00 er leiðslufundur á C3 og verður sama galdandi, sum undanfarnu dagar og M, sjúkrahússtjóri leggur dent á, at allar depilsleiðslur skulu gera, sum avtalað er. D sigur nú, at hon vil biðja læknastjóran hjálpa sær við at fáa boðini út til eftirtektar hjá læknabólkinum, við tað at leiðandi yvirlæknin A ikki er til staðar.

Hesin kemur, tá fundurin er um at vera liðugur.

**Viðlegg 6**

**Notat frá fundi viðv. føðideildina tann 18. oktober 2005 kl. 13 í fyrisitingini á Landssjúkrahúsinum.**

Til staðar: E, læknastjóri, N, sjúkrarøktarstjóri, D, leiðandi sjúkrarøktarfrøðingur á skurðdeplinum, L, virkandi deildarleiðari á føðideildini og A, leiðandi yvirlækni á skurðdeplinum, sum kom seinni á fundinum.

Ljósmóðir, R hevði vikuna áðrenn fundin ringt til sjúkrahúsleiðsluna og biðið um ein fund við leiðsluna viðv. trupulleikum í samband við umleggingarnar á føðideildini. Hon upplýsti samstundis, at ljósmøðurnar høvdu gjørt eitt skriv um hesar trupulleikar, sum tær vildu senda leiðsluni. Hetta skriv, dagfest tann 14. oktober 2005, varð móttikið í fyrisitingini áðrenn fundin. Eisini varð skriv frá forkvinnuni í Ljósmøðrafelagnum móttikið í fyrisitingini um sama evni. Avrit av hesum báðum skrivum varð útflýggjað á fundinum.

Mett varð í sjúkrahúsleiðsluni, at tað var neyðugt at hava ein fund við avvarðandi leiðarar áðrenn fundin við ljósmøðurnar og varð hesin fundur avtalaður at verða tann 18. oktober kl. 13 í fyrisitingini.

Áðrenn A kom á fundin, vóru ymiskir trupulleikar, við at fáa arbeiðið á føðideildini til at ganga, umrøddir. L gjørdi greitt, at tað hevði verið torført at klára allar akuttfunktiónir og ambulatoriivirksemi á deildini við verandi manning, og at tað harumframt hevði verið serliga nógv at gera, umframt sera nógv kompliserað forløb, síðani umleggingin varð sett í verk.

Undir fundinum varð, umframt mangt annað, komið inn á sjálvu avgerðina um umleggingarnar, sum varð kunngjørd tann 14. apríl 2005 og sett í verk frá 1. september 2005.

Avgerðin um umleggingarnar á føðideildini, sum upprunaliga varð tikin av sjúkrahúsleiðsluni og kirurgisku depilsleiðsluni í felag, bleiv tað á fundinum sett spurnartekin við frá A. Hann dróg fram skriv, sum hann læs upp frá, har hann tók klára frástøðu frá avgerðini um

umleggingarnar á føðideildini yvirfyri sjúkrahúsleiðsluni. Hetta skriv er ikki móttikið í fyrisitingini og ikki heldur skrásett í málinum.

Orðadrátturin um hetta varð herdur av, at A á fundinum framførdi, at tað var ein „sjændsil", at síggja, hvat „tykkara avgerð hevur havt av avleiðingum fyri L", sum var týðiliga kensuliga ávirkað undir orðadráttinum. N framførdi í hesum sambandi, at hansara leiklutur sum leiðandi yvirlækni á skurðdeplinum, ikki hevði verið í samsvar við hansara leiðsluábyrgd og at hann átti at fylgja avgerðini, sum var tikin í felag av sjúkrahúsleiðsluni og depilsleiðsluni.

Spurdur beinleiðis, um hann ætlaði sær at fylgja avgerðini um umleggingarnar, segði hann, at hann als ikki var samdur við avgerðini, sum sjúkrahúsleiðslan hevði valt og at hann ongantíð hevði trúð uppá hana og at hon var í andstøðu við hansara bestu sannføring um, hvussu hendan umleggingingin átti at hava verið skipað.

Fundurin endaði sostatt uttan nakra klára niðurstøðu, um hvussu komið verður víðari í málinum. Ein av høvuðsorsøkunum kom av tí stóru óvissu, sum var komin fram undir fundinum um, at tann tikna avgerðin ikki verður fylgd av leiðandi yvirlæknanum. Tó varð hildið fast við, at so leingi ongin onnur avgerð er tikin í málinum, so er tann upprunaliga avgerðin galdandi."

C á Sjúklingaskrivstovuni hevur 25. oktober 2005 latið sjúkrahúsleiðsluni soljóðandi frágreiðing:

---

**„Frágreiðing frá Sjúklingaskrivstovuni í samband við arbeiðsteðgin, ið vardi frá 13/10 2005 kl. ca 13 00 til 20/10 kl. 12 00.**

Tá arbeiðsteðgurin byrjaði, fingu vit boð frá leiðandi sjúkrarøktarfrøðingum um at útseta allar elektivar innleggingar.

Hettar varð gjørt uttan trupuleikar (klokkan mundi tá vera áleið 14 00)

Útsetingarnar á med øki vóru avgreiddar í samráð millum leiðandi sjúkrarøktarfrøðing og leiðandi yvirlækna.

Leiðandi Sjúkrsrøktarfrøðingur á med øki, gav so sjúklingaskrivstovuni boð

Bert í samband við uttanlandaferðir hevur sjúklingaskrivstovan í tíðarbilinum frá 13/10 til og við 17/10 2005 verið í samband við nakran yvirlækna.

Tað var ikki altíð lætt at fáa fatur á sjúklingunum, í dagtímunum, serliga var hettar galdandi á medisinska økinum, tí vit fingu so seint at vita frá teimum um útsetingar. Hettar førdi við sær, at vit máttu biðja trissuna ringja til teir sjúkl., ið vit ikki fingu fatur í.

19/10 05: Fyri ikki at geva trissunum eyka arb. spurdi eg leiðandi sjúkrarøktarfrøðing á skurð øki, beinan vegin hon kom til arbeiðis, um vit skuldu útseta innl. 20/10, viðkomandi var júst tá á veg á fund við sjúkrahúsleiðsluna, og havandi í huga at arbeiðsteðgur framvegis var, og at kunngerð var farin í fjølmiðlarnar um at allar elektivar innl blivu útsettar vegna arbeiðsteðg, fekk eg boð um at útseta teir sjúkl. ið skuldu koma til innl 20/10 05.

Eg byrjaði at útseta kl ca 8 30. Tað tók ca 1 tíma at fáa fatur á næstan øllum, bert ein væntaði í, og hendan sjúkl. fekk eg als ikki fatur í.

19/10 05 kl. ca. 9 15 – 9 30 ringdi leiðandi sjúkrarøktarfrøðingur á skurð økinum, hon var tá stødd á leiðslufundi, og segdi at eg skuldi afturkalla útsetilsini, hettar bleiv gjørt beinan vegin uttan trupuleikar. Orsøkin til hettar var, segði hon, at tað vóru komnar broytingar í frá leiðandi yvirlækna, hann vildi hava sínar sjúklingar inn, og tað skuldi eingin blanda seg inn í tað.

19/10 05: kl ca 10 – 1100:: H yvirlækni kemur inn á skrivstovuna,og spyr hvør hevur útsett hansara sjúklingar til 19/10 05. Hann fær at vita at boðini eru komin frá leiðandi sjúkrarøktarfrøðingi á Skurð deild.

H er ógv. illur, tí hann júst hevur fingið at vita at leiðandi yvirlækni kortini fær sínar sjúklingar inn. Hann biður um at fáa sjúklingarnar til 19/10 innkallaðar aftur til 26/10. Til hettar svari eg at tað fer ikki at bera til, vit vita jú ikki hvønn veg arbeiðsteðgurin ber, og heldur ikki kenna vit, hvussu nogv frammanundan standa til innl hendan dag. Eg sigi honum, at sjúkl. mugu visiterast av nýggjum. Hann er ógvuliga illur tá hann fer av skrivstovuni, tá hevur hann ringt til E læknastjóra, og samtalandi hann fer hann út.

19/10 05: kl. 12 00 A yvirlækni ringir og spyr hvør gav boð um útsetilsi av hansara sjúklingum 20/10 05, og hvør gav boð um at afturkalla útsetilsini. Eg segði sum var, leiðandi sjúkrarøktarfrøðingur á Skurð øki.

19/10 kl. ca. 13:00 G yvirlækni ringir, spyr hvør hevur givið boð um útsetilsi av hansara sjúkl. til 19/10 05, hann far sama svarð: leiðandi sjúkrarøktarfrøðingur á Skurð øki

19/10 kl. ca. 14:00 I yvirlækni ringir: Hon spyr um sjúklingin ið eg ikki hevði fingið fatur á (hettar var hennara sjúkl.) hvør hevði givið boð um útsetilsi, hettar fekk hon at vita, men at tað ikki hevði eydnast mær at fingið fatur á viðkomandi. Eg fái tá at vita frá I, at sjúkl. var møtt, men var farin avstað aftur (hettar hevði eg ikki givið leiðandi sjúkrarøktarfrøðingi boð um.) Tað vísti seg at hesin sjúkl arbeiðir í húsinum.“

Við skrivi, dagfest 2. november 2005, hevur B, adv., gjørt soljóðandi viðmerkingar til fráboðanina um ætlaðu innstillingina til uppsøgn av A:

**„A, ledende overlæge – j.nr. ...**
Der henvises til Landssygehusets skrivelse af 24. oktober 2005, hvori meddeles, at sygehusledelsen agter at indstille A til uansøgt afsked.

Som advokat for A skal jeg hermed fremkomme med følgende bemærkninger:

**1. Generelt**
Indledningsvis skal jeg meddele, at der efter min opfattelse ikke foreligger omstændigheder i sagen, som berettiger sygehusledelsen til at indstille A til uansøgt afsked.

Det skal bemærkes, at det er min opfattelse, at selv om sygehusledelsens redegørelse og sagsfremstilling blev lagt til grund foreligger der ikke omstændigheder, som kan berettige sygehusledelsen til at indstille en tjenestemand til afsked.

A har været ansat som overlæge og tjenestemand på Landssygehuset siden juli 1991. Han har således været ansat på Landssygehuset som tjenestemand i over 14 år. I hele denne periode har han ikke modtaget nogen som helst advarsel eller fået meddelt en irettesættelse.

Tværtimod viser de bilag, som jeg har fået forelagt, at A siden sin ansættelse har udført sit arbejde samvittighedsfuldt og uden anmærkninger. Hans kollegaer har samstemmende oplyst, at A kliniske virksomhed har været udført med særdeles gode resultater.

A har – med undtagelse af nogle måneder i 2003 – siden 2000 været konstitueret som ledende overlæge for kirurgisk afdeling på Landsygehuset.

Heller ikke i sin egenskab af ledende overlæge har A modtaget nogen advarsler eller irettesættelser.

Det skal bemærkes, at der ikke på nogen måde foreligger oplysninger om længerevarende samarbejdsproblemer mellem A og sygehusledelsen. Jeg er blandt andet bekendt med, at sygehusledelsen for nogle få uger siden har bevilget A fuld lønkompensation i forbindelse med planer om et kortvarigt vikariat på et andet sygehus i uddannelsesmæssigt øjemed.

Ved vurderingen af denne sag har det stor betydning at fremhæve, at sygehusledelsens indstilling om afsked er baseret på nogle episoder som finder sted over et meget kortvarigt tidsrum, nemlig højst 2 dage.

Det siger sig selv, at sygehusledelsen ikke på denne baggrund kan påberåbe sig samarbejdsvanskeligheder som begrundelse for en indstilling om afsked.

**2. En afskedigelse med sygehusledelsens begrundelse forudsætter en disciplinær undersøgelse.**
Som påpeget under mødet den 24. oktober 2005 og ved min efterfølgende skrivelse af 25. oktober 2005 er det min opfattelse, at indstillingen om opsigelse af A i realiteten bygger på en antagelse af, at A har handlet i strid med udstedte ordrer, og at han skal have nægtet at udføre ordrer, som sygehusledelsen har udstedt.

På denne baggrund er det min opfattelse, at der i realiteten er tale om en disciplinær afskedigelse, idet afskedigelsen er begrundet med, at A ikke har handlet pligtmæssigt.

Det er herefter min opfattelse, at en afskedigelse af A under alle omstændigheder må forudsætte, at der indledes en tjenestemandssag imod ham i medfør af reglerne i tjenestemandslovens §§ 17-19.

Det skal i denne forbindelse bemærkes, at det efter praksis er fast antaget, at afsked som straf for en tjenesteforseelse kan – når forholdet ikke er fastslået ved dom – aldrig finde sted uden efter tjenesteforhør, jfr. tjenestemandslovens § 21.

Det skal i denne forbindelse særligt bemærkes, at A ikke er enig i sygehusledelsens fremstilling af de faktiske forhold.

Efter almindelige forvaltningsretslige grundsætninger må en forvaltningsmyndighed ikke ved mulighed for valg mellem flere procedurer vælge den enkleste, for derved at slippe for den besværlige.

Et sådant hensyn til procedureforholdene – såkaldt procesfordrejning – vil være uberettiget.

Generelt er der altid en risiko for procesfordrejning i sager vedrørende afskedigelse af tjenestemænd, idet der som bekendt er en væsentlig

forskel på proceduren ved henholdsvis diskretionær og disciplinær afskedigelse.

Der er ingen tvivl om, at det er sygehusledelsens synspunkt, at A ikke har handlet i overensstemmelse med udstedte ordrer, og at hans adfærd har været pligtstridig.

Der er således i givet fald tale om en disciplinær afskedigelse.

**3. Sagens faktiske omstændigheder**

Det har stor betydning at fremhæve, at A i ugerne forud for de omhandlede episoder havde været bortrejst.

A ankom til Færøerne den 17. oktober 2005.

Efter at være kommet tilbage fra udlandet konfererede han med overlæge F vedrørende hans patienter på afdelingen.

Om tirsdagen den 18. oktober 2005 fik A at vide, at hans patienter som skulle opereres i den samme uge, var blevet aflyst.

Det er rigtigt, at A blev meget oprørt over, at hans patienter var blevet aflyst uden hans vidende.

Onsdagen den 19. oktober 2005 blev tidligt om morgenen afholdt et ledelsesmøde, hvor A højlydt gav klart udtryk for, at han ikke kunne acceptere, at hans patienter var blevet aflyst uden hans viden.

Oversygeplejersken, som deltog i mødet, har efter alt at dømme opfattet A tilkendegivelser på mødet således, at hun skulle annullere aflysningerne af hans patienter.

Dette var en misforståelse, idet det aldrig var A hensigt at handle imod den ordre, som ledelsen havde udstedt. Det var derimod hans hensigt at få dette emne op til diskussion, idet han principielt ikke kunne acceptere sygehusledelsens håndtering af sagen.

En afgørende årsag til A utilfredshed var, at der efter hans opfattelse ikke forelå et kvalificeret lægeligt skøn over, hvilke patienter, der kunne udsættes og hvilke patienter der var akutte/kræftpatienter.

Senere samme dag havde A et møde med ledelsen.

Under dette møde bekræftede A, at han ville følge de ordrer, som ledelsen havde udstedt vedrørende aktiviteten på landssygehuset, men han udtrykte endnu en gang, at han mente, at beslutningen om at nedtrappe aktiviteten ikke var særligt velovervejet.

Da A mødte på arbejde den 20. oktober 2005 var han overbevist om, at hans patienter var blevet aflyst.

Han blev derfor meget overrasket over at få en meddelelse fra operationsafdelingen om, at hans første patient allerede var bedøvet. Der var tale om et barn, og under disse omstændigheder valgte A at operere patienten.

Han tog herefter straks kontakt med sygehusledelsen og oplyste i denne forbindelse, at der var tale om en misforståelse, at hans patienter alligevel var mødt op til operation.

Han spurgte herefter, om han skulle sende patienterne hjem, men således som situationen havde udviklet sig, blev parterne enige om, at patienterne alligevel skulle opereres.

Det skal bemærkes, at den næste patient var en kræftpatient, og da operationen af den tredje patient skulle foregå, var arbejdskonflikten allerede overstået.

Det er min opfattelse, at denne fremstilling i væsentligt grad bestyrkes af den redegørelse, som er udarbejdet af sygehusdirektør M af 20. oktober 2005, bilag 1.

Det fremgår af denne redegørelse, at A under mødet ca. kl. 12.00

onsdag den 19. oktober 2005 bekræftede, at han ville følge de ordrer, som sygehusledelsen havde udstedt.

**5. Omstruktureringen af fødeafdelingen**

Det er ikke korrekt, når sygehusledelsen anfører, at A under mødet den 18. oktober 2005 skal have meddelt, at han ikke ville gennemføre de beslutninger, som sygehusledelsen har meddelt den 14. april 2005.

Omlægningen af fødeafdelingen har været langvarig og meget kompliceret.

Det var A som oprindeligt tog sagen op, idet det var hans opfattelse, at fødeafdelingen kørte meget irrationelt. Denne funktion står for ca. 10 mio. kr. af sygehusets budget, svarende til 25 % af det samlede budget for kirurgisk afdeling.

Sygehusledelsen tog herefter beslutning om, at man burde søge at rationalisere fødeafdelingen, herunder omlægge ledelsesstrukturen på afdelingen.

Der blev først på året indkaldt til et stormøde, hvor samtlige interessegrupper deltog. Det blev til en omfattende mødeaktivitet med deltagelse af repræsentanter fra jordemødrene, sygeplejerskerne, oversygeplejersken på kirurgisk afdeling og sygehusledelsen. Under disse møder blev en omstruktureringsmodel drøftet.

A påpegede straks, at det var uhensigtsmæssigt, at den lægefaglige side indenfor obstetrikken og børnesygdomme ikke blev inddraget i disse drøftelser. Det var endvidere A opfattelse, at han som ledende overlæge ikke i nødvendigt omfang blev inddraget i den efterfølgende proces.

Den 11. april 2005 fik A fra sygehusledelsen et forslag til en ny ledelsesmodel på en omstruktureret fødeafdeling.

A svarede samme dag, at han ikke kunne tilslutte sig dette forslag

idet det var hans opfattelse, at forslaget ikke løste de reelle problemer på fødeafdelingen. Det var hans opfattelse, at den ledelsesmodel, som sygehusledelsen havde foreslået, var for uklar, og at denne sandsynligvis ville skabe nye konflikter mellem sygeplejersker, læger og jordemødre.

A har overfor sygehusledelsen givet udtryk for, at når han ikke selv troede på løsningsmodellen, var det bedst for alle parter, at han ikke personligt skulle involveres i gennemførelsen af omstruktureringen af fødeafdelingen.

Samtidig gav han udtryk for, at såfremt ledelsen mente, at den foreslåede model var den bedste løsning, burde ledelsen selv stå for implementeringen således at ledelsen også kunne høste resultatet af denne.

Under de drøftelser som meget naturligt har været omkring denne sag har A på intet tidspunkt givet udtrykt for, at han ville modarbejde ledelsens ønsker om at implementere løsningen.

Under mødet den 18. oktober 2005 udtrykte A de samme betænkeligheder, som han tidligere har givet udtryk for vedrørende den løsningsmodel, som ledelsen har foreslået. Det skal bemærkes, at sagen vedrørende omlægningen af fødeafdelingen har haft en vis offentlig opmærksomhed, idet sagen bl.a. førte til en fogedretssag imod sygeplejerskeforeningen.

Det er derfor naturligt, at sygehusledelsen anser det som et stort prestigetab, såfremt implementeringen af løsningen ikke lykkedes, men det er ikke korrekt at beskylde A for at have modarbejdet ledelsen. Det må ligeledes være naturligt, at den ledende overlæge har en bestemt holdning til en sådan omlægning.

Det som foregik under mødet den 18. oktober 2005 er ikke andet end meningsudvekslinger imellem ledelsen og A som ledende overlæge, hvilket er naturligt. Det er muligt at sagen vedrørende aflysning af

patienter har medført, at A også vedrørende denne sag har udtrykt sig mere kraftigt.

En meningstilkendegivelse under de givne omstændigheder kan efter min opfattelse ikke danne grundlag for en antagelse om, at A som ledende overlæge skal have optrådt illoyalt og at han på denne baggrund skal indstilles til afsked.

**6. Særligt vedrørende samarbejdsvanskeligheder**

Det fremgår af almindelige forvaltningsretlige regler og af den offentlige ansættelsespolitik, at ansættelsesmyndigheden altid først skal forsøge sig med mindre indgående skridt, før der tages skridt til afskedigelse.

Det fremgår direkte af landsstyrets offentlige opsigelsespolitik, at offentligt ansatte som altovervejende udgangspunkt kun kan opsiges efter at de har modtaget både en mundtlig og skriftlig advarsel.

Sygehusledelsens synspunkt vedrørende dette spørgsmål i sagen vedrørende A er efter min opfattelse ret uforståeligt.

Sygehusledelsen erkender i sit notat af 23. oktober 2005, at de omhandlede episoder vedrørende A optræden under normale omstændigheder ville have medført en advarsel.

Alligevel er det sygehusledelsens opfattelse, at det ikke er korrekt at give en advarsel i denne sag, idet en advarsel efter ledelsens opfattelse vil medføre, at A mister sin autoritet som leder.

Dette er naturligvis ikke rigtigt, idet en advarsel er et internt forhold imellem ledelse og overlæge, og som derfor ikke på nogen måde vil have nogen indflydelse på overlægens daglige virke.

Det skal i denne forbindelse påpeges, at ombudsmandspraksis i adskillige sager har statueret, at samarbejdsproblemer ikke uden nærmere kvalifikation kan påberåbes som grundlag for en beslutning om afskedigelse.

Der kræves for det første, at samarbejdsproblemerne har haft en betydelig negativ indflydelse på udførelsen af opgaverne på det pågældende ansættelsessted.

Der skal endvidere foreligge en klar forbindelse mellem samarbejdsproblemerne og den person, som ønskes afskediget, ligesom hovedskylden for problemernes opståen ikke må kunne tilskrives andre end den, som søges afskediget.

Af den almindelige forvaltningsretslige grundsætning om proportionalitet følger yderligere, at der fra den afskedigende myndigheds side skal være udfoldet bestræbelser på at løse samarbejdsproblemerne ved mindre vidtgående skridt end afskedigelse.

**7. Sammenfatning**

En beslutning om afskedigelse af en tjenestemand er en meget alvorlig beslutning, som må forudsætte, at det bevismæssige og juridiske grundlag for afgørelsen er til stede, og at grundlaget er særligt sikkert.

Under henvisning til foranstående og den beskrevne praksis, er det min helt klare opfattelse, at der ikke er grundlag for en indstilling om afskedigelse af A.

Det er muligt, at A adfærd den 19. og 20. oktober 2005 kan kritiseres, men disse forhold kan efter min opfattelse i bedste fald kun berettige til en irettesættelse.

Det fremgår af sagen, at A er konstitueret som ledende overlæge.

I denne forbindelse skal bemærkes, at almindelige betragtninger om proportionalitet ligeledes må medføre, at sygehusledelsen er forpligtet til at overveje en tilbagekaldelse af konstitutionen før en afskedigelse overhovedet kan komme på tale.

Det skal påpeges, at sygehusledelsen under mødet den 24. oktober 2005, direkte spurgt om forholdet, oplyste, at ledelsen ikke havde

nogen indvendinger imod A faglige virke som overlæge på kirurgisk afdeling. Det var hans ledelsesmæssige adfærd som sygehusledelsen satte spørgsmålstegn ved.

Under disse omstændigheder er det min samlede opfattelse, at den mest vidtgående løsning af denne sag kan blive, at sygehusledelsen ud fra en samlet vurdering overfor A tilkendegiver, at konstitutionen som ledende overlæge tilbagekaldes.

Baseret på sagens faktiske oplysninger skal jeg tilkendegive, at jeg under ingen omstændigheder vil acceptere en afskedigelse af A som tjenestemand.

Såfremt sygehusledelsen fastholder sin beslutning om at indstille til afsked, vil der blive taget retslige skidt i sagen, idet det er min opfattelse, at en indstilling om afskedigelse helt åbenbart vil være i strid med gældende regler.

Det skal bemærkes, at denne skrivelse har været forelagt Foreningen af Speciallæger. FAS har meddelt, at foreningen fuldt ud kan tilslutte sig inholdet af skrivelsen."

Sjúkrahússtjórin hevur 3. november 2005 sent B, adv. og A soljóðandi teldupost:

„Tað skal hervið upplýsast, at Dimmalætting hevur biðið um og fær alment innlit í málið viðv. ætlanarskrivinum hjá A."

Við skrivi, dagfest 6. november 2005, hevur Landssjúkrahúsið sent A soljóðandi avgerð:

**„Avgerð og fráboðan um ávaring**
Vísandi til ætlanarskriv frá 24. oktober 2005 og hoyringssvar tygara frá 2. november 2005 verður við hesum sagt frá, at sjúkrahúsleiðslan hevur avgjørt at broyta fráboðaðu ætlanina um at heita á landsstýrismannin í Almanna- og heilsumálum um at siga tygum úr starvi sum tænastumann á Landssjúkrahúsinum.

Í tilgongdini til málið hevur sjúkrahúsleiðslan sæð setan tygara sum tænastumann á Landssjúkrahúsinum sum eina heild, har kjarnin í málinum hevur verið atburður tygara, sum leiðandi yvirlækni. Sjúkrahúsleiðslan hevur mist alt álitið á, at tygum kunnu halda áframm í hesum starvi. Hoyringssvar tygara broytir einki hesum viðvíkjandi. Sagt verður tí frá, at sjúkrahúsleiðslan hevur avgjørt, at tygum alt fyri eitt verða settur frá, sum leiðandi yvirlækni á skurðdeplinum.

Út frá eini heildarmeting av málinum, metir sjúkrahúsleiðslan tó ikki, at løgfrøðiligt grundarlag er fyri at siga tygum úr starvi sum tænastumann. Tygum verða tískil biðin um at møta aftur til arbeiðis 7. november 2005.

Í sambandi við, at tygum sostatt kunnu halda áfram sum vanligur yvirlækni á Landssjúkrahúsinum, hevur sjúkrahúsleiðslan í hyggju at geva tygum soljóðandi ávaring, út frá somu hendingum, sum eru lýstar í ætlanarskrivinum frá 24. oktober 2005 og notatum í málinum:

„Í virki tygara sum yvirlækni á Landssjúkrahúsinum skulu tygum rætta tygum eftir avgerðum hjá leiðsluni og vísa samstarvsvilja"

Sambært Løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg hava tygum rætt til at verða hoyrdur áðrenn slík avgerð, sum henda verður tikin. Tygum fáa 14 daga hoyringsfreist um ætlaðu ávaringina, og eitt skrivligt hoyringssvar skal verða sjúkrahúsleiðsluni í hendi í seinasta lagi tann 21. november 2005 kl. 16.00."

Sjúkrahússtjórin hevur 6. november 2005 sent fjølmiðlunum soljóðandi tíðindaskriv:

**„A settur frá sum leiðandi yvirlækni, men heldur áfram sum vanligur yvirlækni á Landssjúkrahúsinum.**

Leiðslan á Landssjúkrahúsinum hevur avgjørt, at A, verður settur frá sum leiðandi yvirlækni á Skurðdeplinum og samstundis hevur

hann fingið fráboðan um eina ávaring. Men sjúkrahúsleiðslan fer ikki at mæla til, at A verður uppsagdur sum tænastumaður á Landssjúkrahúsinum. Hann fer sostatt at halda áframm sum vanligur yvirlækni.

Orsøkin til, at sjúkrahúsleiðslan tók stig fram ímóti at siga táverandi leiðandi yvirlæknanum á kirurgiska deplinum úr starvi, bæði sum leiðari og tænastumaður, er at leiðslan á ongan hátt vil góðtaka ein slíkan leiðsluatburð, sum tann, ið leiðandi yvirlæknin vísti. Ein av atvoldunum til trupulleikarnar á Landssjúkrahúsinum er, at tað mangan er stríð um, hvør hevur rættin at taka yvirskipaðar avgerðir á stovninum. Hetta máar støðið undan einum vælvirkandi stovni, og tað kann sjúkrahúsleiðslan ikki góðtaka. Sjúkrahúsleiðslan hevur lagt seg eftir at víst ein opnan leiðslustíl, har øll starvsfólk verða hoyrd og vird. Men tá komið er fram til eina avgerð, so skal hon virðast, og allir leiðarar hava skyldu til at virka fyri at fremja avgerðir í verki innan fyri síni øki. Hesa skyldu hevur leiðandi yvirlæknin á kirurgiska deplinum ikki livað upp til.

A varð tískil sendur til hús 24. oktober við einum ætlanarskrivi um at heita á landsstýrismannin í almanna- og heilsumálum um at siga hann úr tænastumannastarvi á Landssjúkrahúsinum. Sjúkrahúsleiðslan vil í hesum sambandi sláa fast, at A ongantíð formliga er blivin uppsagdur, soleiðis sum stundum hevur verið ført fram í fjølmiðlunum. A fekk 14 dagar til at koma við einum hoyringssvari, og hetta svar var Landssjúkrahúsinum í hendi 4. november.

Sjúkrahúsleiðslan hevur nú viðgjørt málið og hevur avgjørt at broyta upprunaligu ætlan sína. Hetta er gjørt út frá eini heildarmeting av málinum, har sjúkrahúsleiðslan ikki metir, at løgfrøðiligt grundarlag er fyri at siga A úr starvinum sum tænastumann.

Hoyringssvarið broytir tó einki upp á støðuna hjá sjúkrahúsleiðsluni um, at A ikki kann halda áfram sum leiðandi yvirlækni á skurðdeplinum. Hann verður tískil alt fyri eitt settur frá sum leiðandi yvirlækni. Hann heldur tó áfram sum vanligur yvirlækni og sjúkrahúsleiðslan hevur fráboðað honum eina ávaring um at rætta seg eftir

leiðsluavgerðum framyvir. Ávaringina kann hann gera viðmerkingar til í seinasta lagi 21. november.“

Við skrivi, dagfest 15. nov. 2005, hevur B, adv., sum svar uppá skrivið frá 6. nov. 2005, sent Landssjúkrahúsinum soljóðandi skriv:

**„A – ...**
Der henvises til Landssygehusets skrivelse af 6. november 2005, hvori meddeles, at sygehusledelsen agter at give A en advarsel samtidig med at det tilkendegives, at sygehusledelsen har truffet afgørelse om, at A konstitution som ledende overlæge tilbagekaldes.

Som oplyst under mødet den 6. november 2005 er det min opfattelse, at der under de foreliggende omstændigheder ikke er grundlag for at meddele A en advarsel.

Som påpeget i min skrivelse af 2. november 2005 er A generelt ikke enig med sygehusledelsens sagsfremstilling, herunder sagens faktum.

Det er min opfattelse, at den påtænkte advarsel baserer sig på disciplinære forhold, hvorfor en evt. advarsel med de nævnte begrundelser må forudsætte, at der har fundet et tjenesteforhør sted i medfør af tjenestemandslovens § 21, eller at A kan begære en sådan undersøgelse, såfremt sygehusledelsen fastholder sin beslutning om at tildele en advarsel.

Som oplyst under mødet den 6. november 2005 vil A ikke modsætte sig sygehusledelsens afgørelse om at tilbagekalde hans konstitution som ledende overlæge. Jeg går i denne forbindelse ud fra, at A i opsigelsesperioden beholder sit løntillæg som ledende overlæge.

I min skrivelse af 2. november 2005 har jeg redegjort for, at jeg mener, at sagen i værste fald enten kunne medføre en irettesættelse, eller at sygehusledelsen fratog A konstitution som ledende overlæge.

Det siger sig selv, at sygehusledelsen ikke kan anvende begge

reaktionsmuligheder, idet en tilbagekaldelse af konstitutionen jo er den mest indgribende foranstaltning.

Det er indlysende, at sygehusledelses afgørelse om at fratage A stillingen som ledende overlæge alene er baseret på hans adfærd som ledende overlæge. Sygehusledelsen har tidligere tilkendegivet, at denne ikke har nogle bemærkninger til A kliniske funktion på landssygehuset.

Efter at A er fratrådt som ledende overlæge er en advarsel meningsløs.

Under de nu foreliggende omstændigheder er det således min opfattelse, at der ikke er hjemmel til at meddele A en advarsel.

Såfremt sygehusledelsen fastholder denne tilkendegivelse kan jeg oplyse, at afgørelsen vil blive påklaget.

Det skal bemærkes, at denne skrivelse har været forelagt Foreningen Af Speciallæger. FAS har meddelt, at foreningen fuldt ud kan tilslutte sig indholdet af skrivelsen.

Kopi af denne skrivelse er tilsendt Almanna- og heilsumálaráðið og S, adv.“

22. nov. 2005 hevur sjúkrahússtjórin sent A soljóðandi ávaring:

**„Fráboðan um ávaring**
Vísandi til hoyringsskriv okkara frá 6. november 2005 og skriv frá advokati B frá 15. november 2005, skulu vit við hesum siga frá, at sjúkrahúsleiðslan hevur gjørt av at geva tygum hesa ávaring:

at tygum í virki tygara sum yvirlækni á Landssjúkrahúsinum skulu rætta tygum eftir avgerðum frá leiðsluni og vísa samstarvsvilja.

Tað er í hesum sambandi at viðmerkja, at sambært skjølum í

málinum, sum tygum eisini hava fingið makaskjal av, meta vit at kunna leggja til grund:

- at tygum við atburði tygara beinleiðis hava verið orsøk til, at avlýstir sjúklingar hjá tygum verða innaftur kallaðir – uttan at talan er um bráðneyðugar viðgerðir
- at tygum fult út hava verið vitandi um, at hesir eru innaftur kallaðir, samanhildið við, at tygum hava fyrireikað skurðviðgerðirnar av egnum sjúklingum
- at tygum aftaná fund við leiðsluna mikudagin 19. oktober, ikki gera nakað aktivt fyri at fylgja tí yvirskipaðu avgerðini
- og at tygum við hesum atburði hava virkað ímóti avgerðum, tiknar av sjúkrahúsleiðsluni undir einari kreppustøðu

Tá so er, meta vit ikki at tygum sum yvirlækni, í sambandi við egnar sjúklingar, hava fylgt teimum avgerðum, sum sjúkrahúsleiðslan hevur tikið. Tað er tí atburður tygara sum yvirlækni, ið her verður átalaður og ávaring givin fyri.

Sambært fyrisitingarlógini kann avgerðin um hesa ávaringina verða kærd til Almanna- og heilsumálaráðið innan 4 vikur."

C á Sjúklingaskrivstovuni hevur 23. november 2005 sent sjúkrahússtjóranum soljóðandi frágreiðing:

„Vísandi til samtalu okkara í gjár 22/2005 og í dag 23/11 2005, fari eg at koma við hesi frágreiðing, rættleiðing.

Eg bleiv í gjár 22/11 2005 kontakta av A yvirlækna. Hann gjørdi meg varugan við at dagurin 19/10 ið eg hevði sagt at hann, G og I høvdu ringt og spurt um avlýstar og innafturkallaðar sjuklingar var skeivt endurgivin, dagurin var 20/10 05. Eg kann ikki við vissu siga at eg havi minst rætt, dagurin kann hava verið 20/10.

Í dag 23/11 05 gjørdi G yvirlækni meg varugan við tað sama, og aftaná

at hava tosað við D, sum hevði langa samtalu við G sama dag, eri eg komin til tað niðurstøðu at fyrispurningurin frá G var 20/10.

23/11 2005 kl. 14 45 kemur A yvirlækni inn á Skrivstovuna við frágreiðing undirskrivað av 5 yvirlæknum, ið staðfesta at umtalaði dagur var 20/10 2005.

Eg má nokk viðurkenna at eg má hava tikið feil av døgunum, og at umrøddu fyrispurningar hava verið 20/10 2005.

Hjálagt sendi eg bræv frá yvirlæknunum

Eg eri hørm um hesa keðiligu villu, sum eg bert fái grundgivið við at tað var ógvuliga „stressandi" á skrivstovuni hesar dagar, hvar eg var einsamøll til arbeiðis, og hevði sera nógv um at vera."

Saman við skrivinum varð sent skriv, sum 5 yvirlæknar høvdu undirskrivað sama dag, og sum var soljóðandi:

„Vedrørende notat fra Patientkontoret, underskrevet af C: „Redegørelse fra Patientkontoret i forbindelse med arbejdsnedlæggelsen, som varede fra 13/10 2005 kl. 13.00 til 20/10 kl. 12.00", dateret 25-10-05, som er vedlagt sagen mod A og gøres gældende for tildeling af advarsel, vil undertegnede, som var tilstedeværende, mens samtalerne fandt sted i konferenceværelset på kirurgisk afdeling påpege den forkerte datoangivelse for disse samtaler. Samme datoforvildelse er gengivet i udredningen fra D af samme dato. Samtalerne, anført på anden side i notatet, med A, G og I, fandt sted om torsdagen 20. Oktober 2005, og ikke som anført om onsdagen 19. Oktober."

Við skrivi, dagfest 25. nov. 2005, hevur B, adv., sent soljóðandi skriv til Landssjúkrahúsið (Innihaldsliga er skrivið ein kæra, sum er stílað til Almanna- og heilsumálaráðið):

**„Málið um ávaring til A, yvirlækna – ...**
Eg havi móttikið skriv tykkara dagfest 22. novembur 2005 og

skal upplýsa, at málið við hesum verður kært til Almanna- og heilsumálaráðið.

Eg skal í hesum sambandi vísa á, at tað als ikki er rætt, enn minni ført prógv fyri, at A við atburði sínum skal hava verið orsøk til, at avlýstir sjúklingar vórðu kallaðir inn aftur, uttan at talan var um bráðneyðugar viðgerðir.

Í hesum sambandi fari eg at biðja sjúkrahúsleiðsluna nágreiniliga upplýsa, hvør persónur upprunaliga avlýsti sjúklingarnar, sum annars vóru kallaðir inn í tí vikuni tá verkfall var. Sum kunnugt vóru hesir sjúklingar avlýstir, meðan A var burturstaddur.

Eg fari somuleiðis at biðja sjúkrahúsleiðsluna upplýsa, hvør lækni hevur mett um hesir sjúklingar kundu avlýsast, herundir um talan var um bráðneyðugar viðgerðir ella ikki, og hvør persónur gjørdi eftir boðunum um at avlýsa sjúklingarnar meðan A var burturstaddur, og hvør persónur kallaði sjúklingarnar inn aftur av nýggjum.

Av málinum framgongur heilt greitt, eisini av teimum av leiðsluni gjørdu uppritum, at A tann 20. oktobur 2005 var sera bilsin av, at sjúklingar hansara vóru møttir til skurðviðgerð henda dagin.

Eg leggi annars við eina váttan frá yvirlæknunum F, A, G, H og I um, at tað upprit, sum Sjúklingaskrivstovan hevur gjørt, enntá eftir at A var sendur til hús, als ikki er rætt, av tí at tann samrøða, sum C vísur til í sínum notati, ikki fór fram tann 19. oktobur 2005 men tann 20. oktobur 2005 kl. 12.00, tá málið sum øllum kunnugt var yvirstaðið.

Eg havi gjørt tykkum varug við, at hesin feilur er av sera stórum týdningi fyri málið.

Eisini rætta dagfestingin vísur heilt greitt, at A ikki hevur verið vitandi um, at sjúklingar hansara vórðu kallaðir inn av nýggjum. Um so var, hevði hann onga orsøk havt til at spurt Sjúklingaskrivstovuna, hvør ið hevði innkallað sjúklingar hansara.

Eg fari at biðja sjúkahúsleiðsluna um at upplýsa, hvør hevur umbiðið tey notat, sum C og D hava gjørt eftir, at sjúkahúsleiðslan tók avgerð um at senda A til hús.

Tað er eisini eftir míni metan fullkomiliga burturvið at siga, at A skal hava verið fult vitandi um, at sjúklingar hansara vórðu kallaðir inn aftur, og at hann skal hava lagt til rættis skurðviðgerðirnar av egnum sjúklingum í stríð við tey boð, sum sjúkrahúsleiðslan hevur givið.

Eg fari at spyrja, hvørjar próvgrundir sjúkrahúsleiðslan vísur til í hesum sambandi.

Eg fari eisini at spyrja, hvussu hetta hongur saman við, at A tann 20. oktobur 2005 spyr Sjúklingaskrivstovuna, hvør hevur innkallað sjúklingar hansara, og at hann á morgni tann 20. oktobur 2005 mótvegis sjúkrahúsleiðsluni tyktist sera ovfarin av, at sjúklingar hansara kortini vóru møttir til skurðviðgerð.

Eg skal avvísa, at A eftir fundin tann 19. oktobur 2005 hevur havt eina skyldu til at taka stig fyri at fylgja teimum boðum, sum leiðslan hevði givið. Tað er heilt greitt, at A var misnøgdur við avgerðina hjá leiðsluni, tí í veruleikanum var eingin saklig grund fyri at avlýsa sjúklingar hansara.

Eg skal endurtaka, at A tann 19. oktober 2005 livdi í teirri trúgv, at hansara sjúklingar vóru avlýstir. Undir hesum umstøðum er ein pástandur um, at hann átti at tikið aktiv stig fyri at tryggja, at sjúklingarnir veruliga blivu afturkallaðir, púra meiningsleysur.

Sjúkrahúsleiðslan vísur í skrivi sínum til, at sjúkrahúsið tann 19. oktobur 2005 var í eini kreppustøðu. Hetta er als ikki rætt, og skal eg vísa til tey sjónarmið, sum eg havi sett fram í fyrsta hoyringssvari mínum frá 2. novembur 2005.

Av málinum framgongur eisini, at goymslan á Landssjúkrahúsinum longu 19. oktober 2005 hevði fingið undantaksloyvi frá Starvsmanna-felagnum.

Eisini skal eg gera vart við, at allur orðadrátturin, sum stóðst av hesum máli, hevur samband við, at A tá var leiðandi yvirlækni og luttók á leiðslufundum saman við sjúkrahúsleiðsluni.

Atburður hansara hevur einki við vanliga yvirlæknastarv hansara at gera. Var hann vanligur yvirlækni, tá hendingarnar fóru fram, hevði hann als ikki verið partur í málinum.

Undir hesum umstøðum, serliga nú hann er farin frá sum leiðandi yvirlækni, er eingin ivi um, at ein ávaring í hesum sambandi ikki gevur nakra meining.

Eg skal upplýsa, at um Almanna- og heilsumálaráðið hóast hesar viðmerkingar ætlar at staðfesta avgerðina hjá Landssjúkrahúsinum, verður fyrivarni tikið um at leggja málið fyri Føroya Rætt ella Løgtingsins Umboðsmann.

Avrit av hesum skrivi er sent til Almanna- og heilsumálaráðið. Upplýsast skal, at eg í skrivi mínum til Almanna- og heilsumálaráðið havi biðið um fund við ráðið, so eg munnliga kann fáa høvið at leggja málið fram fyri ráðnum."

Við skrivi, dagfest 20. des. 2005, hevur Almanna- og heilsumálaráðið sent B, adv., viðmerkingarnar frá Landssjúkrahúsinum til kæruna, dagfestar 19. des. 2005. Viðmerkingarnar eru soljóðandi:

**„Viðmerkingar til kæru frá A**

Víst verður til skriv tykkara frá 2. desember 2005, har biðið verður um viðmerkingar til skriv frá B, advokati dagfest 25. november 2005, sum er at skilja sum kæra um ávaringina, sum Landssjúkrahúsið fráboðaði A, yvirlækna í skrivi tann 22. november 2005.

Kæran byggir á somu punktir, sum eru nevnd í fráboðanini um ávaringina.

1. At A við atburði sínum beinleiðis hevur verið orsøk til, at avlýstir

sjúklingar vórðu innkallaðir, hóast talan ikki hevur verið um bráðneyðugar viðgerðir.

Øll sum vóru við á leiðslufundi tann 19. oktober 2005 kunnu vitna um, at A, beinleiðis hótti D við, at tað vildi fáa fylgir fyri hana, um hansara sjúklingar vórðu útsettir.

Talan var ikki um bráðneyðugar viðgerðir, tí sjúklingarnir vóru settir á operatiónsprogrammið minst 14 dagar frammanundan. Tá tað um morgunin tann 20. oktober gjørdist greitt fyri sjúkrahúsleiðsluni, at sjúklingarnir hjá A vóru møttir til skurðviðgerð, og tann fyrsti faktiskt longu var skurðviðgjørdur, segði A, at hann kundi avlýsa.

Tað vóru einans hansara egnu sjúklingar, sum hann við sínum hóttandi atburði gav boð um, ikki máttu verða útsettir. Hetta er sostatt nakað, sum einans rættaði seg móti hansara egna virki sum yvirlækni og ikki móti skurðdeplinum sum heild. Hann var nevniliga í eini rollu, har hann bæði var leiðandi yvirlækni við eini leiðslufunktión og yvirlækni við eini kliniskari funktión. Hann brúkti rolluna sum leiðandi yvirlækni til at geva sær sjálvum nakrar sersømdir sum kliniskur yvirlækni. Nakrar sømdir sum hinir yvirlæknarnir ikki fingu.

Sjúkrahúsleiðslan álegði D, leiðandi sjúkrarøktarfrøðingi og C, leiðara á sjúklingaskrivstovuni at skriva frágreiðingar um teirra upplivingar av hendingunum undir arbeiðssteðginum.

Tað er eitt ivamál um, nær A og aðrir yvirlæknar settu seg í samband við sjúklingaskrivstovuna fyri at spyrja, hvør hevði útsett teirra sjúklingar. Aftaná at 5 yvirlæknar á skurðdeplinum, í samband við kæruna frá A, hava skrivað undir eitt skriv, har teir siga, at tað var 20. oktober, kann C ikki avvísa, at tað kann vera rætt.

Óansæð óvissuna, so er tað hvørt fall heilt vist, at H vendi sær til sjúklingaskrivstovuna umleið kl. 11 tann 19. oktober við hesum sama fyrispurningi. Hann var tá illur um, at A fór at fáa sínar sjúklingar inn. Hvussu visti hann tað?

Í avgerðini hjá sjúkrahúsleiðsluni um at geva eina ávaring er dentur ikki lagdur á frágreiðingina frá sjúklingaskrivstovuni, sum varð skrivað aftaná at A hevði fingið hoyringsskriv og varð koyrdur til hús.

Leiðandi yvirlæknin átti av røttum ábyrgdina av, at fakliga ráðiligar mannagongdir vóru gjørdar viðvíkjandi effektivering av avgerðini hjá sjúkrahúsleiðsluni um, at sjúklingaviðgerðir, sum ikki vóru bráðneyðugar, skuldu útsetast. Hetta gjørdi A ikki.

Tað framgongur av skrivinum frá C tann 25. oktober, hvussu mannagongdirnar undir arbeiðssteðginum vórðu skipaðar. Hetta vóru vanligar mannagongdir, í samband við at sjúklingar vóru útsettir.

Tá ið sjúkrahúsleiðslan fríggjadagin 14. oktober hevði tikið avgerðina um at útseta allar viðgerðir, sum ikki vóru bráðneyðugar, ringdi E, læknastjóri, eftir avtalu við D, til allar yvirlæknar á skurðdeplinum, sum høvdu sjúklingar til viðgerð mánadagin.

Meginreglan var, at allar viðgerðir vórðu avlýstar, og hvør einstakur yvirlækni mátti so meta um, um tað var bráðneyðugt at fremja ávísar skurðviðgerðir. Sum dømi vildi ein yvirlækni hava nakrar sjúklingar til týsdagin, sum hann metti høvdu bráðskund og hesar viðgerðirnar blivu so gjørdar.

Ítøkiliga vórðu sjúklingarnir hjá A útsettir tíðliga um morgunin mikudagin tann 19. oktober, tvs. tveir dagar aftaná, at hann var komin aftur úr …. C vildi tá hava at vita frá D, um hon skuldi útseta sjúklingarnar, sum vóru settir til skurðviðgerð tann 20. oktober. Sjúklingaskrivstovan visti, at tað kann verða sera trupult, at fáa fatur á sjúklingunum. D gav henni boð um at fara undir at ringja til sjúklingarnar umleið kl. 8.30 tann 19. oktober – eftirsum at øll útlit vóru til, at arbeiðssteðgurin fór at standa við. Aftaná at A umleið ein tíma seinni hevði hótt hana, gav D kontraboð til sjúklingaskrivstovuna.

2. At A hevur verið vitandi um, at hesir sjúklingar vóru innaftur kallaðir samanhildið við, at hann hevði fyrireikað skurðviðgerðirnar av egnum sjúklingum.

Um morgunin tann 19. oktober ringdi H, yvirlækni til E, læknastjóra og var misnøgdur við, at A eftir øllum at døma kundi operera sum honum lystir, meðan hinir ikki sluppu tað.

Á middegi tann 19. oktober hevði A funnið framm 3 av journalunum til sínar 5 sjúklingar næsta dag. Hann manglaði einans tvær, upplýsti hann fyri D, sum tosaði við hann um hetta mundi. Tað var áðrenn hann fór niðan í fyrisitingina og fekk álagt av sjúkrahúsleiðsluni at fylgja áløgdum boðum.

Journalirnar hevði hann lagt klárar á skurðgeingini í sambandi við ráðleggingina av skurðprogramminum fyri komandi dag. Hví skuldi hann gjørt hetta, um so var, at hann ikki visti, at sjúklingarnir vóru inn aftur kallaðir?

Journalirnar lógu klárar á skurðgeingini, tá fyrsti sjúklingurin bleiv doyvdur tíðliga á morgni tann 20. oktober.

A kunnaði eisini tann 19. oktober J, deildarleiðara á G4 um, at hansara sjúklingar fóru at blíva innlagdir dagin eftir. Hetta hevði hann ikki gjørt, uttan so hann visti, at sjúklingarnir ikki vóru útsettir.

3. At A aftaná fundin við leiðsluna á middegi tann 19. oktober ikki gjørdi nakað aktivt fyri at fylgja yvirskipaðu avgerðini.

Samrøðan millum H og E gav eina greiða ábending um, at A hevði ætlanir um fremja sínar skurðviðgerðir móti viljanum hjá sjúkrahúsleiðsluni. Tá E ringdi til A fyri at kanna hetta nærri, noktaði A at koma á fund við sjúkrahúsleiðsluna um málið – hóast hann fekk hetta álagt.

Tá hann so kom niðan í fyrisitingina í øðrum ørindum, var hann sera óforskammaður mótvegis sjúkrahúsleiðsluni og serliga læknastjóranum. Aftaná langt togarí, játtaði hann til endan at fylgja boðunum frá leiðsluni um einans at viðgerða sjúklingar, sum høvdu bráðneyðugan tørv, meðan arbeiðssteðgur var.

Samanhildið við, at hann beint áðrenn fundin hevði savnað journalirnar

saman og gjørt tær klárar umframt at boða seingjadeildini frá, er eingin ivi um, at hann visti, at sjúklingarnir vóru kallaðir inn. Um hann hevði verið loyalur móti avgerðini hjá sjúkrahúsleiðsluni, átti hann at tikið aktiv stig til at tryggja, at sjúklingarnir, sum hann hevði hótt seg til blivu innkallaðir, blivu avlýstir aftur.

4. At A við sínum atburði hevur virkað ímóti avgerðum, tiknar í eini kreppustøðu av sjúkrahúsleiðsluni.

Arbeiðssteðgurin, sum byrjaði tann 13. oktober 2005, var øðrvísi enn flestu aðrar ósemjur á arbeiðsmarknaðinum, við tað at tað var ógreitt, um talan var um verkfall ella verkbann. Samskiftið við Starvsmannafelagið var av somu orsøk sera trupult og at byrja við, vóru eingi undantøk givin. Tað tók langa tíð at fáa hetta upp á pláss og út við ein heil vika, áðrenn læknaskrivarar og goymslan vóru umfataði av undantøkunum. Øll undantøk vóru givin við teirri greiðu fortreyt, at talan einans mátti verða um bráðneyðugar viðgerðir. Um hetta ikki bleiv fylgt, blivu øll onnur undantøk eisini tikin aftur.

Talan var um eina kreppustøðu á sjúkrahúsinum, og undir hesum umstøðum avgjørdi sjúkrahúsleiðslan í samráð við allan leiðslubólkin, at tað einans mátti verða bráðneyðugar viðgerðir so leingi, sum arbeiðssteðgurin stóð við. M.a. tí at eingir skrivarar vóru og sjúkrahúsið fekk ikki nýggjar forsýningsvørur.

A hevði eina aðra áskoðan um, hvussu kreppan skuldi handfarast. Tað vóru eisini onnur starvsfólk, sum vóru misnøgd við støðuna. Men tað var einans A, sum opinlýst og aktivt virkaði ímóti avgerðini.

Sjúkrahúsleiðslan kann ikki góðtaka, at ein yvirlækni við atburði sínum beinleiðis undirgravar leiðsluautoritetin hjá sjúkrahúsleiðsluni og ger beint ímóti týðuliga útmeldaðum avgerðum. Hetta er orsøkin til, at A hevur fingið soljóðandi ávaring: „at tygum í virki tygara sum yvirlækni á Landssjúkrahúsinum skulu rætta tygum eftir avgerðum frá leiðsluni og vísa samstarvsvilja.“

Omanfyristandandi grundgevingar vísa týðuliga, at hetta hevur A ikki gjørt í sambandi við tað, sum hann hevur fingið ávaringina fyri.

Um tað eru fleiri spurningar, eru vit til reiðar at svara teimum.“

Við skrivi, dagfest 4. jan. 2006, hevur B, adv., sent soljóðandi skriv til Almanna- og heilsumálaráðið:

**„Kæra um ávaring til A, yvirlækna – tykkara ...**
Víst verður til skriv tykkara dagfest 20. desembur 2005 og til avrit av skrivi frá sjúkrahúsleiðsluni til Almanna- og heilsumálráðið dagfest 19. desembur 2005.

Eg skal upplýsa, at kæran verður fasthildin, og at tær viðmerkingar, sum sjúkrahúsleiðslan hevur gjørt, als ikki broyta grundarlagið fyri fyriliggjandi kæruni.

Viðmerkingarnar frá sjúkrahúsleiðsluni vísa heilt greitt, at talan er um disipliner viðurskifti, tí nú er málið vorðið ein spurningur um, hvat ið prógvað er og ikki.

Hetta eru júst viðurskifti, sum eg beinavegin vísti á á tí fyrsta fundinum við sjúkrahúsleiðsluna, tá A tann 24. oktobur 2005 varð fráboðaður um ætlaða innstilling um uppsøgn sum tænastumaður á Landssjúkrahúsinum.

Í hesum sambandi skal eg vísa til skriv mítt til ... dagfest 25. oktobur 2005, sum eg leggi við í avriti, og annars til svar mítt í málinum til Landssjúkrahúsið dagfest 2. novembur 2005.

Eg skal endurtaka, at A er tænastumaður og tí er fevndur av teimum rættindum, sum tænastumannalógin gevur einum tænastumanni.

Er talan um eina ákæru um, at ein tænastumaður ikki hevur fylgt boðum frá leiðsluni, er talan um eitt disiplinert mál, sum má avgreiðast aftaná, at ein tænastumannakanning hevur verið framd.

Ein tænastumannakanning er ein rættartrygd hjá tænastumanninum, sum arbeiðsgevarin á ongan hátt hevur loyvi til at umganga.

Tað framgongur heilt greitt av málinum, at A hósmorgunin 20. oktobur 2005 mótvegis sjúkrahúsleiðsluni var sera ovfarin av, at sjúklingar møttu upp henda morgunin, og skal eg í hesum sambandi vísa til tað notat, sum sjúkrahússtjórin sjálvur hevur skrivað tann 23. oktobur 2005, síða 5.

Her verður sagt orðarætt soleiðis:
„Hann segði (A), at hann ikki visti av, at sjúklingarnir vóru innkallaðir, og onkur hevði gjørt tað, uttan at hann visti av tí. Hann vildi vita, um hann skuldi avlýsa sjúklingarnar. Hann fekk boð um, at hann ikki skuldi avlýsa sjúklingarnar."

Eisini framgongur av málinum, og er hetta eisini váttað av øðrum yvirlæknum, at A hósdagin 20. oktobur 2005, eftir at sjúklingarnir vóru viðgjørdir, spurdi sjúklingaskrivstovuna, hvør ið hevði innkallað sjúklingarnar aftur.

Tað er sera týdningarmikið at hava í huga, at sjúkrahúsleiðslan av sínum eintingum, uttan at nakar lækni hevur tikið støðu til hetta, hevur avlýst sjúklingarnar hjá A uttan hansara góðkenning.

Eg havi í skrivi mínum til sjúkrahúsleiðsluna dagfest 25. novembur 2005 spurt, hvør lækni metti sjúklingarnar, áðrenn teir vórðu avlýstir, herundir hvørt ein læknalig meting fyrilá av, hvørt talan var um bráðneyðugar viðgerðir ella ikki, hvør persónur gjørdi eftir boðunum um at avlýsa sjúklingarnar, meðan A var burturstaddur, og hvør persónur kallaði sjúklingarnar inn aftur av nýggjum.

Tá eg einki svar havi fingið til fyrispurningin, rokni eg við, at sjúkrahúsleiðslan av sínum eintingum hevur gjørt hetta í samráð við D, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing.

Í hesum sambandi skal eg eisini vísa á leiðslureklativið fyri

Landssjúkrahúsið, harav greitt framgongur, at skulu slíkar avgerðir takast, skulu hesar takast í samráð við leiðandi yvirlæknan.

Leiðandi yvirlæknin var burturstaddur, tá avgerðin varð tikin, og heldur ikki avloysari hansara hevur verið vitandi og kunnaður um tær tiknu avgerðirnar um at avlýsa skurðviðgerðir undir verkfallinum.

Í hvussu so er má vera greitt, at eingin frá kirurgiska deplinum var umboðaður á tí fundinum, har avgerðin um at avlýsa sjúklingarnar varð tikin, og neyvan hevur heldur nakar verið hjástaddur frá narkosudeildini.

Tað er púra rætt, at A, tá hann kom aftur av fundi tann 19. oktobur 2005, harðliga mótmælti hesi mannagongd, tí hann metti tað als ikki vera neyðugt at avlýsa sjúklingarnar, og hann var sera argur um, at sjúklingarnir vóru avlýstir uttan nakra læknaliga meting.

Eftir míni metan er eingin ivi um, at yvirsjúkrasystirin á fundinum hevur misskilt boðini, sum A gav á fundinum, og at hon av sínum eintingum er farin út av fundinum og hevur kallað sjúklingarnar inn aftur.

Undir øllum umstøðum var A fullkomiliga óvitandi, og tað var heldur ikki ætlan hansara beinleiðis at arbeiða ímóti tí avgerð, sum var tikin, meðan hann var burturstaddur.

Tað er rætt, at A, fyri at mótmæla at skurðviðgerðir sjálvandi kundu fara fram og hóast verkfall, av sínum eintingum fann nakrar journalir fram, men varð hetta ikki gjørt sum ein beinleiðis fyrireiking til at fara undir skurðviðgerðirnar, sum sjúkrahúsleiðslan framførir.

Annars er sum heild at siga, at hetta mál hevur havt rættiliga álvarsligar fylgjur fyri A, yvirlækna.

Hann er koyrdur frá sum leiðandi yvirlækni og hevur av hesi orsøk fingið ein munandi niðurskurð í inntøku sínari á Landssjúkrahúsinum.

Tygn hansara er eisini minkað samsvarandi hesum.

Undir hesum umstøðum haldi eg tað vera fullkomiliga burturvið eisini at geva honum eina ávaring.

Ávaringin er givin A í eginleika hansara av at vera leiðandi yvirlækni. A vildi ikki havt verið við í teimum orðadráttum, sum hava verið um hetta mál, um hann ikki var leiðandi yvirlækni.

Eg meti, at sjúkrahúsleiðslan hevur borið seg skeivt at í hesum máli, og varð hetta eisini boðað frá á tí fyrsta fundinum við sjúkrahúsleiðsluna tann 24. oktobur 2005. Sjúkrahúsleiðslan hevur meira ella minni av sínum eintingum koyrt ein tænastumann til hús.

Hetta er ein sera álvarslig avgerð at taka, og serstakliga gerst málið álvarsligt, tá tað síðani vísur seg, at løgfrøðiligu grundgevingarnar fyri at koyra tænastumannin til hús als ikki hava verið tilstaðar.

Eg kann upplýsa, at sjúkrahúsleiðslan var vitandi um sjónarmið okkara um, at løgfrøðiliga grundarlagið ikki var í lagi longu áðrenn avgerðin um at koyra hann til hús varð tikin.

Vísandi til ta umrøðu, sum málið hevur fingið, var tað sjálvandi eitt stórt prestigutap fyri sjúkrahúsleiðsluna at síggja seg noyddan til at seta A aftur í starv sum yvirlækna.

Fyri at bøta um hetta hevur sjúkrahúsleiðslan helst tikið avgerð um, at ein ella onnur reaktión mátti takast fram, hetta fyri at sjúkrahúsleiðslan ikki skuldi missa andlit, og er tað helst av hesi orsøk, at sjúkrahúsleiðslan tekur tað heilt óvanliga stigið, bæði at siga hann úr starvi sum leiðandi yvirlækna og samstundis geva honum eina ávaring.

Enn verri er tað eftir míni metan, at sjúkrahúsleiðslan sama dag, sum ávaringin varð givin tann 6. novembur 2005, sendi út eitt tíðindaskriv, har leiðslan m.a. førir fram, at man hevur mist alt álit

á A, at man tí hevur koyrt hann frá sum leiðandi yvirlækna, og at man eisini hevur givið honum eina ávaring.

Slík framferð kann als ikki góðtakast.

Eg skal enn einaferð bera fram, at tað er meiningsleyst at geva eina ávaring til ein persón, sum frammanundan er koyrdur úr starvi.

Ein ávaring undir teimum givnu umstøðunum stendur heldur ikki í mát við tað brot, sum er farið fram, tá hugsað verður um, hvørjar avleiðingar málið annars hevur havt fyri A.

Eg skal framvegis biðja um ein fund við Almanna- og heilsumálráðið, so eg fái høvi til munnliga at leggja hetta mál fram fyri ráðnum saman við A og álitismanni hansara.

Málið er eftir míni metan sera prinsipielt og er av stórum týdningi fyri A, yvirlækna.

Eg vænti at frætta aftur."

K, starvsfólkaleiðari í Almanna- og heilsumálum hevur 31. jan. 2006, skrivað soljóðandi notat til landsstýrismannin í Almanna- og heilsmálum:

„Viðvíkjandi kæru frá B, adv. vegna A, yvirlækna á Landssjúkrahúsinum, um ávaring givin honum 22. november 2005

B, adv. hevur vegna A, yvirlækna, í skrivi 1. desember 2005, kært avgerð hjá leiðsluni á Landssjúkrahúsinum um at geva A ávaring fyri tær hendingar, sum fóru fram undir verkfallinum hjá Starvsmannafelagnum í oktober 2005.

Kæran hevur verið til viðmerkingar hjá Landssjúkrahúsinum, og svarið frá Landssjúkrahúsinum hevur verið hjá B, adv, til viðmerkingar.

Í svari sínum bað B, adv. um fund, fyri at kærarin munnliga kundi bera síni sjónarmið fram.

Fundur var tí hildin 27. januar 2006, har umboð fyri báðar partar vóru til staðar. Undirritaða sær hetta sum 2 mál:

1. uppsøgn úr funktión sum virkandi leiðandi yvirlækni við tí grundgeving, at hann ikki virðir leiðsluavgerðir.
2. ávaring fyri, sum yvirlækni á Skurðdeplinum at sýna manglandi samstarvsvilja, at ganga móti boðum leiðslunnar og at hótta starvsfólk.

Ein av grundgevingunum fyri hesum er, at B sjálvur hevur skilt málini frá hvørjum øðrum, við tað at hann onki heldur verða til hindurs fyri at siga A úr funktiónini sum leiðandi yvirlækni, men lata hann halda áfram sum vanligur yvirlækni.

Ad.1.
Hetta mál verður mett sum avgreitt. A er sagdur úr hesi funktión við vanligari uppsagnarfreist og hevur góðkent hetta.

Ad.2.
Ávaringin er givin fyri at tryggja sær, at A sum vanligur yvirlækni framyvir heldur tær treytir, sum eru galdandi fyri slíkar, tí at hann hevur mótarbeitt leiðsluavgerðum í fleiri førum, og í hesum serliga føri mótarbeitt avgerðini hjá leiðsluni um bert at skurðviðgera bráðfeingis sjúklingar undir verkfalli.

Allir hinir yvirlæknar á Skurðdeplinum gingu undir boðini, summir mótmælandi, men tó.

Hetta vildi A ikki, hann hóttir seg 19. oktober 2005 fram til, at fáa allar sínar sjúklingar til skurðviðgerð 20. oktober 2005 innkallaðar.

Hann fer enntá sjálvur og leitar journalir teirra fram, og fráboðar seingjardeildini at sjúklingarnir koma á deildina aftaná skurðviðgerð.

Hetta er staðfest bæði í skrivi frá LS og aftursvari frá B, advokati.

H ringdi til sjúkrahúsleiðsluna 19. oktober, tí hann var vitandi um, at A ætlaði sær at skurðviðgera sum vanligt.

Í svarskrivinum frá B verður sagt, at A: „bert fann journalirnar fram fyri at mótmæla, at skurðviðgerðir sjálvandi kundu fara fram.“

B afturvísir ikki í svarskrivinum, at A boðaði seingjardeildini frá, at sjúklingarnir fóru at koma á deildina.

Hetta er ein staðfesting av, at hann gekk ímóti boðum leiðslunnar, og at meta sum ein provokatión.

Slík framferð av starvsfólki, í hesum føri starvsfólki so høgt í tign, sum ein yvirlækni er, eigur ikki at vera góðkend av leiðsluni.

Um hon verður tað, er ongin endi á, hvussu starvsfólk kunnu bera seg at mótvegis boðum frá leiðsluni. Tí er tað sjálvsagt, at leiðslan má handla.

Spurningurin kundi verið, um A hevði handlað, sum hann gjørdi, um hann ikki var leiðandi yvirlækni. Hetta er ein spurningur, sum ikki ber til at fáa svaraðan. Vit hava bert veruleikan at fyrihalda okkum til, og í veruleikanum var hann leiðandi yvirlækni, sum fekk sær sjálvum víðkaðar heimildir til at gera nakað, sum allir yvirlæknar høvdu fingið boð um frá leiðsluni ikki at gera.

Um ávaring ikki varð givin, men bert uppsøgn úr starvi sum leiðandi yvirlækni, hevði spurningurin um, hvussu ein yvirlækni hevur loyvi til at uppføra seg, staðið ósvaraður.

Tað vil siga, A og onnur við, kundu hildið, at tað, at hótta starvsfólk, og at gera móti boðum leiðslunnar, er í lagi, tí tað fær ongar avleiðingar.

Í skrivinum, har fráboðað varð A, at hann varð uppsagdur sum

virkandi leiðandi yvirlækni, var boðað honum frá, at slík framferð ikki verður góðkend, og tað var natúrligt, at tað var har, tað var gjørt.

Tað vildi verið skeivt, ikki at nevnt nakra treyt fyri, at hann framhaldandi skuldi kunna vera yvirlækni, tá ætlanin upprunaliga var, at heita á landsstýrismannin um at loysa hann úr hesum starvi.

Av tí at hetta var ein avgerð, sum tað sambært fyrisitingarlógini skuldi hoyrast um, var neyðugt at ávaringin kom at standa fyri seg sjálva, tá avgerðin endaliga var tikin.

**Niðurstøða**

Hóast tað ikki kann staðfestast, um A, um hann ikki var leiðandi yvirlækni við teim heimildum, eitt slíkt starv hevur við sær, hevði handlað, sum hann gjørdi, metir undirritaða at talan er um tvey sjálvstøðug mál.

1 um setan, ábyrgd og skyldur sum virkandi leiðandi yvirlækni, og 1 um setan, ábyrgd og skyldur sum vanligur skurðyvirlækni á Landssjúkrahúsinum.

1. málið er avgreitt.

Tað, at A handlaði sum hann gjørdi, meðan hann var leiðandi yvirlækni, hevur viðført, at hann varð sagdur úr hesi tænastu.

2. málið snýr seg um, at givin verður minst møgulig agarevsing fyri tvørrandi samstarvsvilja, ikki at lýða leiðsluboð í kreppustøðu og fyri at hótta starvsfólk.

Ætlanin um hesa ávaring var givin samstundis og í sama skrivi sum uppsøgn úr starvi sum leiðandi yvirlækni, og var ein natúrligur liður hjá leiðsluni í at boða frá, hvørjar treytirnar vóru fyri, at hann kundi halda fram sum vanligur yvirlækni ístaðin fyri at innstillast til uppsøgn, sum upprunaliga ætlað.

Um ikki skal kunnað bera til at átala slíka framferð, so hevur ein leiðsla í roynd og veru ongi amboð til at fáa skil á viðurskifti, sum eru ella verða avlagaði á einum stovni.

Mælt verður til, at kæran frá B, adv, ikki verður gingin á møti, vísandi til at neyðugt var í hesu støðu, sum minsta mark, at geva ávaring.

Í fráboðanini um ávaring, er ikki nevnt hvørt talan er um munnliga ella skrivliga ávaring. Av tí at A ongantíð hevur fingið ávaring fyrr, verður við hesum staðfest, at talan er um munnliga ávaring.

Mælt verður frá, at Almanna- og heilsumálaráðið krevur tænastuligt forhoyr.

Talan er í høvuðsheitum um samstarvstrupulleikar, og agarevsingin er av slíkum slag, sum ikki krevur, at tænastuligt forhoyr frammanundan verður framt.

A kann sjálvur, sambært Tænastumannalógini § 19, stk. 4. krevja, at tænastuligt forhoyr fer fram, hetta tó bert um hann fær viðmæli frá avvarðandi felag við tingingarrætti.

Mælt verður til, at hetta verður fráboðað honum gjøgnum advokat hansara B."

Landsstýrismaðurin í Almanna- og heilsumálum hevur við skrivi, dagfest 2. feb. 2006, svarað kæruni soleiðis:

**„Viðvíkjandi kæru tygara dagfest 25. november 2006 vegna A, yvirlækna, um ávaring givin av leiðsluni á Landssjúkrahúsinum 22. november 2005.**

Landsstýrismaðurin hevur nú viðgjørt kæru tygara.

Kæran var send til ummælis á Landssjúkrahúsinum. Haðani kom svar 19. desember 2005. Tygum fingu so freist til 9. januar 2006 at viðgera viðmerkingarnar frá Landssjúkrahúsinum. Hetta gjørdu

tygum í svarskrivi dagfest 4. januar 2006, har tygum eisini vístu á, at tygum framvegis ynsktu fund við landsstýrismannin fyri at kunna lýsa málið munnliga. Hetta ynski var tygum eftirlíka soleiðis, at fundur var hildin 27. januar 2006, har báðir partar vóru umboðaðir og kundu koma við sjónarmiðum og viðmerkingum.

Út frá skrivliga tilfarinum og fundinum 27. januar 2006, er landsstýrismaðurin komin til tað niðurstøðu, at kæra tygara ikki kann gangast á møti.

Landsstýrismaðurin vil tó við hesum staðfesta, at talan er um munnliga ávaring, vísandi til at A ikki hevur fingið ávaring fyrr.

**Grundgevingin fyri ikki at ganga kæruni á møti:**
Ávaringin var givin fyri tvørrandi samstarvsvilja, fyri ikki at lýða leiðsluboð í kreppustøðu og fyri at hótta starvsfólk.

Grundgevingarnar frá leiðsluni á Landssjúkrahúsinum fyri at geva ávaringina eru ikki á nøktandi hátt afturvístar av tygum.

Um ikki skal kunnað bera til at átala slíka framferð, sum A nýtti undir verkfallinum hjá Starvsmannafelagnum í oktober 2005, so hevur ein leiðsla í roynd og veru ongi amboð til at fáa skil á viðurskifti, sum eru ella vera avlagaði á einum stovni.

Í svarskrivinum frá 4. januar 2006 verður nevnt at tænastumannakanning eigur at verða framd.

Sagt skal vera frá, at sambært Løgtingslóg nr. 31 frá 5. juli 1971 um Tænastumenn Landsins, við seinni broytingum § 21, er agarevsingin – ávaringin, sum her er givin, av slíkum slag, sum ikki krevur, at tænastuligt forhoyr frammanundan verður framt.

A kann tó sjálvur sambært § 19, stk. 4 í somu lóg krevja, at tænastuligt forhoyr fer fram, hetta tó bert um hann fær viðmæli frá avvarðandi felag við tingingarrætti.“

## Partshoyring

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og við skrivi, dagfest 16. mars 2006, varð klagan send Almanna- og heilsumálaráðnum til ummælis. Hetta varð gjørt, tí at Almanna- og heilsumálaráðið hevði viðgjørt málið sum eitt kærumál, og hevði staðfest avgerðina hjá Landssjúkrahúsinum um at geva A, yvirlækna, eina ávaring.

Við skrivi, dagfest 7. apríl 2006, hevur Almanna- og heilsumálaráðið latið umboðsmanninum eina soljóðandi frágreiðing:

> **„Viðvíkjandi klagu frá B, adv., vegna A, yvirlækna.**
>
> Víst verður til skriv tygara dagfest 16. mars 2006.
>
> **Frágreiðing um viðgerðina av kæruni.**
> Sagt skal vera frá at Almanna- og heilsumálaráðið í hesum skrivinum viðgerð málið frá tí degi kæran er móttikin í Ráðnum.
>
> Undan hesum degi var Almanna- og heilsumálaráðið ikki inni í málinum annað enn, at leiðslan á Landssjúkrahúsinum á fundi 24. oktober 2005 kunnaði landsstýrismannin um sínar ætlanir.
>
> Almanna- og heilsumálaráðið fekk tann 28. november 2005 frá ..., B, adv, skriv, sum var avrit av skrivi dagfest 25. november 2005 til Landssjúkrahúsið, har tað millum annað verður upplýst, at málið verður kært til Almanna- og heilsumálaráðið. Í skrivinum biður B, adv, um fund um málið.
>
> Almanna- og heilsumálaráðið velur, sjálvt um tað ikki framgongur heilt týðiliga av skrivinum, at viðgera málið sum kærumál, og sendir skriv til Landssjúkrahúsið tann. 2. desember 2006, har biðið verður um viðmerkingar til skrivið frá B, adv. við freist til 16. desember 2005 at svara.
>
> Sama dag verður fráboðan hesum viðvíkjandi send B, adv, og boðað verður frá, at vent verður aftur til umbønina um fund,

tá Almanna- og heilsumálaráðið hevur móttikið og viðgjørd viðmerkingarnar frá Landssjúkrahúsinum.

16. desember 2006 boðar sjúkrahússtjórin frá, at hann ikki hevur møguleika at svara tann dagin og biður um freist til 19. desember 2005. Hetta verður játtað.

19. desember 2005 kemur svarskriv frá Landssjúkrahúsinum við viðmerkingum til kæruna frá A.

20. desember 2005 verða viðmerkingarnar frá Landssjúkrahúsinum sendar B, adv. til viðmerkingar við svarfreist til 9. januar 2006.

9. januar 2006 móttekur Almanna- og heilsumálaráðið svarskriv frá B, adv. Umframt at svara viðmerkingunum frá Landssjúkrahúsinum, verður hildið fast um ynski um fund við landsstýrismannin um málið.

Fundur verður hildin 27. januar 2006.

Almanna- og heilsumálaráðið valdi at innkalla báðar partar til fundin, fyri at høvi skuldi verða hjá báðum at koma til orðanna.

31. januar 2006 verður tilmæli latið landsstýrismanninum í málinum.

Tilmæli er grundað á kæruna, viðmerkingarnar frá báðum pørtum og fundinum hildin varð 27. januar 2006.

Landsstýrismaðurin góðtók tilmæli 1. februar 2006.

Niðurstøðan var í skrivi dagfest 2. februar 2006 fráboðað B, adv. við avriti til Landssjúkrahúsið.

**Viðmerkingar.**

Almanna- og heilsumálaráðið fer ikki av nýggjum at gera viðmerkingar til tygara, til alt tað, sum ført verður fram í kæruni, tí tað er alt viðgjørt í teimum skjølum, sum liggja í málinum.

Almanna- og heilsumálaráðið hevur tó hesa viðmerking:

B førir fram, at Almanna- og heilsumálaráðið nýtir aðrar grundgevingar enn Landssjúkrahúsið, og hevur tikið nøkur dømi fram.

Hetta er ikki so, grundgevingar eru tær somu, bert eru orðingarnar ymiskar.

Hjálagt hesum skrivið er alt málið frá Almanna- og heilsumálaráðnum saman við skjølum frá Landssjúkrahúsinum, sum liggja í einum plastikklumma fyri seg."

Við skrivi, dagfest 19. apríl 2006, vórðu hesar viðmerkingar sendar klagaranum til ummælis. Tá umboðsmaðurin einki hevði frætt aftur frá klagaranum, boðaði umboðsmaðurin við skrivi, dagfest 17. mai 2006, pørtunum frá, at umboðsmaðurin fór undir endaligu viðgerðina av málinum.

## *Niðurstøða*

*Klagan snýr seg um handfaringina hjá Landssjúkrahúsinum og Almanna- og heilsumálaráðnum av starvsfólkamálinum hjá A, sum serliga viðvíkur hendingum undir arbeiðssteðginum í oktober 2005.*

*Viðgerð mín av málinum fevnir um viðgerðina hjá Landssjúkrahúsinum í sambandi við, at fyribilssetanin av A sum leiðandi yvirlækni varð tikin aftur, og hann fekk eina ávaring sum yvirlækni, umframt kærumálsviðgerðina í Almanna- og heilsumálaráðnum.*

*Eg havi gjørt av ikki at kanna tilgongdina til ætlaðu innstillingina um uppsøgn av A sum tænastumanni, tí Landssjúkrahúsið hevur í skrivi, dagfest 6. nov. 2005, boðað honum frá, at Landssjúkrahúsið slepti hesi ætlan.*

*Eftir at Landssjúkrahúsið slepti málinum um at siga A úr starvi sum tænastumaður, tók Landssjúkrahúsið aftur fyribilssetanina av honum sum leiðandi yvirlækni á kirurgiska deplinum og gav honum eina ávaring sum vanligur yvirlækni. Í sambandi við afturtøkuna av fyribilssetanini hevur sjúkrahúsleiðslan ikki nágreinað, um talan var um eitt agamál (disciplinærsag) ella um eina diskretionæra avgerð.*

*Ein fyribilssetan verður vanliga bert nýtt í eitt styttri tíðarskeið, og heldur uppat við at starvið verður lýst leyst, og at annar persónur verður*

*settur í starvið, ella at eitt frammanundan ásett tíðarskeið er runnið. Í hesum máli er tí formliga talan um afturtøku av eini fyribilssetan (konstitutión), heldur enn uppsøgn úr føstum starvi. Men tað, at A hevði verið fyribilssettur uttan steðg síðani september 2003, og setanin varð tikin aftur sum ein beinleiðis avleiðing av teimum viðurskiftum, sum í fyrsta umfari vóru orsøk til, at ætlanin var at siga honum úr starvi sum tænastumann á Landssjúkrahúsinum, hevur eftir míni meting við sær, at afturtøkan eigur at viðgerast sum um talan var um eina fasta setan.*

*Sambært § 21, 1. pkt. í tænastumannalógini (løgtingslóg nr. 31 frá 5. juli 1971 um tænastumenn landsins, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 73 frá 13. juni 1995) kann agarevsingin fyri tænastumisbrot m.a. vera flyting til annað starv í ella uttan fyri starvsøkið, starvslækking, herundir lækking við einum ella fleiri lønarstigum innan fyri somu lønarrammu, ella loysn úr starvi. Sambært § 21, 3. pkt. kann agarevsing av hesum slag – um málið ikki er avgjørt við dómi – ongantíð verða givin uttan so at tænastuligt forhoyr hevur verið frammanundan. Reglur um mannagongdir í tílíkum málum eru ásettar í kapittul 4 í tænastumannalógini.*

*Afturtøkan av fyribilssetanini av A sum leiðandi yvirlækni er partvís at meta sum flyting í annað starv (hann varðveitir yvirlæknastarvið), og tá broytingin fer fram uttan umsókn, verður hetta vanliga fatað sum ein starvslækking. Avgerandi fyri metingina um, um talan er um agarevsing, er, um sjúkrahúsleiðslan í sínum grundgevingum fyri avgerðini vísir til viðurskifti, sum mugu metast at vera tænastumisbrot, heldur enn til viðurskifti sum ikki kunnu lastast viðkomandi sum tænastumisbrot, sum t.d. at viðkomandi er ógegnaður at røkja starvið, ella viðurskifti, sum ikki hava samband við útinningina av starvinum.*

*Sjúkrahúsleiðslan hevur í skrivi til A, dagfest 24. oktober 2005, sum grundgeving fyri at taka fyribilssetanina aftur víst til, at*

- *A hevði boðað frá, at hann ikki ætlaði at avlýsa nakra av hansara skurðviðgerðum, hóast sjúkrahúsleiðslan hevur*

*avgjørt og fráboða, at tað einans vóru bráðfeingis viðgerðir, sum skuldu fremjast, meðan arbeiðssteðgur var,*

- *at A, hóast hann greitt hevði fingið at vita, at hann skuldi fylgja avgerðini, ikki tók stig til, at sjúklingar ikki vórðu kallaðir inn,*
- *at A í sambandi við umleggingarnar á føðideildini ikki hevði víst loyalitet og leiðsluábyrgd,*
- *at A hevði gingið beint móti avgerðum, sum sjúkrahúsleiðslan hevur tikið, og at hetta varð mett sum greitt brot á § 9 í tænastumannalógini.*

*Eg haldi, at nevndu viðurskifti eru at meta sum uppáhald um tænastumisbrot. Grundað á hetta haldi eg afturtøkuna av fyribilssetanini av A sum leiðandi yvirlækna vera at meta sum agarevsing, sum sambært § 21, 3. pkt. í tænastumannalógini ikki kann áleggjast uttan at tænastuligt forhoyr hevur verið frammanundan.*

*Eg fari at mæla Almanna- og heilsumálaráðnum til at taka málið uppaftur til nýggja viðgerð og viðgera tað eftir reglunum í tænastumannalógini. Eg skal samstundis heita á Almanna- og heilsumálaráðið um at lata meg frætta, hvørja niðurstøðu ráðið kemur til hesum viðvíkjandi.*

*Við atliti til ávaringina, sum A fekk sum vanligur yvirlækni, og sum Almanna- og heilsumálaráðið staðfesti sum verandi agarevsing, sum sambært § 21, 3. pkt. tó ikki kravdi, at tænastuligt forhoyr hevði verið frammanundan, fari eg at vísa á tað, sum Jørgen Mathiassen m.a. skrivar um agarevsing í Forvaltningspersonellet, 2. udg., 2000, á bls. 206:*

> „Det er en nærliggende tanke, at den disciplinære straffastsættelse er præget af straffeprocessens principper. Det er i høj grad tilfældet. Princippet om ne bis in idem[1] fører til, at der ikke kan rejses disciplinær sag på grundlag af et forhold, som allerede én gang har medført ikendelse af disciplinær straf. Og det følger af proportionalitetsprincippet, at der ikke må anvendes mere

1 W. E. von Eyben, Juridisk Ordbog, 1991, GAD: „Ne bis in idem: der må ikke to gange føres proces om samme spørgsmål.“

indgribende disciplinærstraffe, dersom mindre indgribende er tilstrækkelige, og at der skal være et rimeligt forhold mellem den konstaterede tjenesteforseelse og den ikendte disciplinærstraf."

*Í klaguni til mín hevur klagarin víst á ymisk viðurskifti í sambandi við kærumálsviðgerðina í Almanna- og heilsumálaráðnum. Vísandi til, at eg havi mælt ráðnum til at taka málið uppaftur, havi eg valt ikki at viðgera hendan partin av kæruni.*

*Í sambandi við at uppsagnarætlanin varð slept, og A varð settur frá sum leiðandi yvirlækni, kunnaði Landssjúkrahúsið almenningin um hetta í tíðindaskrivi í fjølmiðlunum. Landssjúkrahúsið boðaði samstundis frá ætlaðu ávaringini.*

*Eg havi sum so einki at viðmerkja til, at Landssjúkrahúsið kunnaði almenningin um, at uppsagnarætlanin varð slept, og at A varð settur frá sum leiðandi yvirlækni. Málið hevði longu tá fingið drúgva umrøðu í fjølmiðlunum. Eg dugi tó ikki at síggja nakað endamál við, at Landssjúkrahúsið av sínum eintingum boðar almenninginum frá, at ætlanin er at geva A eina ávaring. Hetta kann – umframt at vera tyngjandi fyri yvirlæknan – geva ta óhepnu fatan, at avgerðin í veruleikanum er tikin, og at tað tí er nyttuleyst hjá honum at gera viðmerkingar til ætlaðu ávaringina.*

*Eg fari í hesum sambandi at vísa á tað, sum danski umboðsmaðurin hevur sagt í FOB 96, bls. 51 (58), serliga pkt. 2 um at myndugleikar í fjølmiðlunum sjálvbodnir kunna um ymisk mál:*

***„2) Myndigheders anvendelse af pressen som medium.***

*...*

*Offentliggørelse af sager kan imidlertid i visse tilfælde rejse retssikkerhedsmæssige problemer. Især kan det være forbundet med problemer såfremt offentliggørelse omfatter oplysninger om enkeltpersoners eller virksomheders forhold, og oplysningerne samtidig må opfattes som belastende for de pågældende.*

*. . .*

*Udgangspunktet må være at en myndighed er berettiget til at offentliggøre sager som ifølge offentlighedsloven ville være undergivet aktindsigt på begæring af pressen. Når myndighederne herudover ønsker at formidle deres synspunkter gennem debatindlæg i pressen, interviews, læserbreve, kronikker, medvirken i fjernsyns- eller radioudsendelser, må der foretages en konkret vurdering. I denne vurdering må efter min mening i hvert fald indgå en afvejning af behovet for at informere offentligheden (herunder om sagen er kendt i forvejen) og sagens nyhedsværdi på den ene side, og på den anden side de retssikkerhedsmæssige og andre betænkeligheder ved at udlevere oplysninger til offentligheden i den valgte form.“*

*Burtursæð frá tilmælinum til Almanna- og heilsumálaráðið um at taka hetta málið upp aftur til viðgerðar, geri eg ikki meira við hetta málið.*

# *VI. Skjøl*

## Skjal 1

**Løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann**

**1. Partur**
**Umboðsmaðurin og Løgtingið**

**§ 1.** Løgtingið velur ein uttantingsmann fyri eitt 5 ára skeið at hava innlit við fyrisiting heimastýrisins.

*2. stk.* Doyr umboðsmaðurin í embætistíð síni ella er hann av øðrum orsøkum ikki førur fyri at røkja starv sítt, ger formansskapur Løgtingsins av, hvør skal røkja starvið, til Løgtingið velur ein nýggjan umboðsmann. Tað sama er galdandi, um umboðsmaðurin biður um at verða loystur úr starvi, ella um Løgtingið loysir hann úr starvi smb. stk. 3.

*3. stk.* Hevur Løgtingið ikki longur álit á umboðsmanninum, kunnu tveir triðingar av løgtingsmonnunum loysa hendan úr starvi.

**§ 2.** Umboðsmaðurin, ið ikki kann sita á Løgtingi ella í kommunustýri, skal so vítt gjørligt hava løgfrøðiliga útbúgving.

**§ 3.** Við løgtingslóg kunnu verða gjørdar almennar reglur fyri virksemi umboðsmansins. Annars er umboðsmaðurin í starvi sínum óheftur av Løgtinginum.

**2. Partur**
**Heimildir**

**§ 4.** Virksemið umboðsmansins fevnir um alla fyrisiting heimastýrisins (t.e. lands- og kommunalu).

*2. stk.* Lógin er eisini galdandi fyri feløg, stovnar, felagsskapir v.m., ið verða roknað við til almennu fyrisitingina sambært fyrisitingarlógini, lógini um alment innlit ella lógini um almennar skráir.

*3. stk.* Í meting sínari av kommunalari umsiting skal umboðsmaðurin vísa atlit til tær serligu umstøður, kommunufyrisiting virkar undir.

*4.stk.* Interkommunalir felagsskapir eru undirlagdir virksemi umboðsmansins.

*5. stk.* Virksemi umboðsmansins fevnir ikki um ríkis-

myndugleikar, Løgtingið og stovnar undir Løgtinginum.

**§ 5.** Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, at tær í § 4 nevndu umsitingareindir ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti einstaka borgaranum.

### 3. Partur
### Kærumál og egin mál

**§ 6.** Ein og hvør kann senda umboðsmanninum klagu um tær í § 4 nevndu umsitingareindir.

*2. stk.* Tann, ið klagar, skal navngeva seg í klaguni. Klagan skal vera umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi eitt ár eftir, at tey viðurskifti, ið klagað verður um, áttu sær stað.

*3. stk.* Klaga um avgerðir, ið møguligur hægri umsitingarmyndugleiki kann broyta, kann ikki sendast umboðsmanninum, fyrr enn viðkomandi hægri myndugleiki hevur tikið avgerð í málinum. Freistin, ið er nevnd í 2. stk., skal í slíkum førum roknast frá tí degi, hægri myndugleikin tekur avgerð sína.

*4. stk.* Umboðsmaðurin tekur støðu til, um grundarlag er fyri víðari kanningum í máli, ið klagað verður um.

*5. stk.*Umboðsmaðurin kann sjálvur taka eitt mál til viðgerðar og fremja neyðugar kanningar í hesum sambandi.

### 4. Partur
### Kanningar

**§ 7.** Ger umboðsmaðurin av at taka eina kæru til viðgerðar, skal hann beinanvegin kunna viðkomandi umsiting um innihaldið í kæruni, um ikki vandi er fyri, at hetta kann darva kanningini. Harumframt skal umsitingin biðjast um ummæli í málinum, áðrenn umboðsmaðurin tekur avgerð um at gera vart við meting sína av málinum smb. § 10, stk. 2. Umboðsmaðurin kann áseta tíðarfreist til ummæli.

**§ 8.** Tær í § 4 nevndu umsitingar hava skyldu at geva umboðsmanninum tær upplýsingar og at leggja fram øll tey skjøl, sum hesin embætis vegna krevur at fáa fyrilagt.

*2. stk.* Umboðsmaðurin kann stevna fólki í rættin at vitna um viðurskifti, ið eru avgerandi í kanningararbeiðinum. Í slíkum førum eru reglurnar í rættargangslógini galdandi. Rættarfundirnir eru ikki almennir. Tann, ið klagan viðvíkur, hevur saman við hjáseta rætt at vera hjástaddur, meðan slík vitnisførsla fer fram.

*3. stk.* Umboðsmaðurin hevur

rætt til at vitja støð, ið kannað verða, og hann hevur fría atgongd til at gera kanningar í øllum neyðugum hølum.

§ **9.** Umboðsmaðurin hevur tagnarskyldu um tey viðurskifti, hann í virksemi sínum fær kunnleika til. Tagnarskyldan stendur við, eftir at umboðsmaðurin fer úr starvi, og fevnir eisini um starvsfólk á umboðsmansstovninum.

**5. Partur**
**Niðurstøður**

**§ 10.** Kemur umboðsmaðurin til ta niðurstøðu, at álvarsligt mistak ella vansketni er framt av einum av teimum í § 4 nevndu umsitingum, skal umboðsmaðurin boða formansskapi Løgtingsins, løgmanni og viðkomandi landsstýrismanni og /ella kommunustýri frá hesum og koma við tilmæli til teirra.

*2. stk.* Umboðsmaðurin hevur rætt til alment at finnast at, koma við tilmælum, og á annan hátt gera vart við meting sína av máli, hann hevur kannað.

*3. stk.* Umboðsmaðurin kann mæla viðkomandi myndugleikum til, at fríur rættargangur verður givin, smb. rættargangslógini §§ 330 –336c, í málum, sum hava verið viðgjørd eftir hesi lóg.

§ **11.** Umboðsmaðurin letur Løgtinginum ársfrágreiðing um arbeiðið sítt. Frágreiðingin verður almannakunngjørd áðrenn 1. juli.

*2. stk.* Boðar umboðsmaðurin Løgtinginum, landstýrismanni ella kommunustýri frá einum máli, ella tekur hann eitt mál við í ársfrágreiðing sína, skal hann upplýsa um, hvat viðkomandi hevur ført fram til verju sína.

§ **12.** Rakar umboðsmaðurin við lýti í galdandi lógum, fyriskipanum ella umsitingarligum avgerðum, skal umboðsmaðurin boða Løgtingi og viðkomandi landsstýrismanni frá hesum. Er talan um viðurskifti, ið viðvíkja kommunalari ella interkommunalari umsiting, skal umboðsmaðurin eisini boða viðkomandi kommunustýri frá.

§ **13.** Um umboðsmaðurin krevur tað, kunnu dómstólarnir vísa frá sær privatmál móti umboðsmanninum vegna avgerðir, sum hann tekur við grundarlagið í hesi lóg.

**6. Partur**
**Lønar- og eftirlønarviðurskifti**

§ **14.** Lønarviðurskifti umboðsmansins, herundir eisini spurningin um eftirløn og bíðipening, verða ásett við løgtingslóg.

*2. stk.* Umboðsmaðurin kann ikki, uttan við loyvi Løgtingsins, vera í starvi hjá almennum ella privatum fyritøkum, virkjum ella stovnum.

*3. stk.* Møguligur spurningur um ógegni umboðsmansins í ávísari søk verður lagdur fyri formansskap Løgtingsins, sum, um mett verður, at talan er um ógegnið, útnevnir annan at viðgera hetta ávísa mál.

**§ 15.** Umboðsmaðurin kann krevja at verða loystur úr starvi við seks mánaða freist at galda frá seinasta degi í einum mánaði.

## 7. Partur
## Fyrisiting

**§ 16.** Umboðsmaðurin setir og loysir úr starvi starvsfólk síni.

**§ 17.** Tær útreiðslur, ið standast av umboðsmansstovninum, verða játtaðar á Løgtingsins fíggjarlóg.

*2. stk.* Umboðsmaðurin ger roknskap fyri virksemi stovnsins, hesin skal vera grannskoðaður av grannskoðara Løgtingsins.

## 8. Partur
## Ígildisreglur

**§ 18.** Henda lóg kemur í gildi 1. januar ár 2001.

*2. stk.* Klagur um viðurskifti í tíðarskeiðinum 1. januar 2000 og til henda lóg kemur í gildi, kunnu kortini leggjast fyri umboðsmannin til viðgerðar.

## Skjal 2

***Vegleiðingin um Løgtingsins umboðsmann***

**Hvønn og hvat kunnu tygum klaga um**

Umboðsmaðurin hevur eftirlit við allari fyrisitingini undir heimastýrinum, tvs. bæði lands-, kommunalu og interkommunalu myndugleikunum.

Umboðsmaðurin kann viðgera klagur um avgerðir hjá myndugleikunum, eins og viðferð teirra av borgarum og málum.

Tygum kunnu t.d. klaga um eina noktan av einari umsókn, um tann valda viðgerðarháttin, um ta tíðina, sum hetta hevur tikið og / ella framferðarháttin hjá embætisfólkunum.

Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, at myndugleikarnir ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti einstaka borgaranum.

Dómstólarnir, Løgtingið, feløg og privatir persónar eru ikki almennir fyrisitingarmyndugleikar. Tí kann umboðsmaðurin ikki viðgera klagur um hesi. Donsku myndugleikarnir, sum t.d. løgreglan hoyra ikki undir heimastýrið. Tí kann umboðsmaðurin heldur ikki viðgera klagur um hesar. Um tygum eru í iva um, hvørt tygum kunnu klaga til umboðsmannin um ein ávísan myndugleika, kunnu tygum altíð spyrja okkum.

**Hvussu kunnu tygum klaga**

Um tygum ynskja at klaga, skulu tygum skriva til umboðsmannin og greiða frá, **hvønn** og **hvat** tygum ynskja at klaga um. Um tygum hava latið onkran annan klaga tygara vegna, skulu tygum leggja eina undirskrivaða fulltrú við klaguni. Tað lættir um málsviðgerðina, um tygum senda møgulig viðkomandi skjøl (brøv frá tygum, svar frá myndugleikunum osv.) saman við klaguni. Á hendan hátt fáa tygum eisini ofta skjótari svar, tí umboðsmaðurin vanliga hevur tørv á at síggja hesi skjøl.

**Hvat kann umboðsmaðurin gera**

Um umboðsmaðurin eftir at hava kannað málið kemur til ta niðurstøðu, at hann gevur viðkomandi viðhald, kann hann finnast at tí myndugleikanum,

sum klagan snýr seg um. Umboðsmaðurin kann eisini heita á myndugleikan um at umhugsa málið av nýggjum og taka eina aðra avgerð. Leggið til merkis, at umboðsmaðurin ikki sjálvur kann broyta eina avgerð. Uppgávan hjá umboðsmanninum er sostatt at greiða myndugleikanum frá, at hesin eftir hansara fatan hevur gjørt eitt mistak.

Í hesum sambandi skulu tygum hava í huga, at umboðsmaðurin hevur avmarkaðar møguleikar fyri at taka støðu til avgerðir, ið eru grundaðar á reinar metingar ella avgerðir, har tað krevst ein serligur førleiki (t.d. læknaligur).

**Hvat hendir, tá umboðsmaðurin fær eina klagu**

Umboðsmaðurin hevur 3 møguleikar at svara eini klagu:

1. Klagan verður kannað nærri.
2. Klagan verður avvíst, tí at umboðsmaðurin ikki kann viðgera hana.
3. Umboðsmaðurin velur ikki at kanna málið.

*1. Klagan verður kannað nærri.*
Heldur umboðsmaðurin, at ein klaga skal kannast nærri, sendir hann hana til viðkomandi myndugleika og biður um eina viðmerking. Samstundis biður hann eisini um at læna møgulig skjøl í málinum. Viðmerkingin frá myndugleikanum verður vanliga send viðkomandi, sum fær møguleika at gera sínar viðmerkingar.

Hann, ið hevur klagað, verður vanliga kunnaður um gongdina í málinum.

Tá myndugleikin og viðkomandi hava gjørt sínar viðmerkingar til málið, er hetta vanliga klárt til endaligu niðurstøðu umboðsmansins. Alt eftir, hvussu nógv mál eru til viðgerðar hjá umboðsmanninum samstundis, og hvussu skjótt myndugleikarnir svara umboðsmanninum, mugu tygum rokna við, at tað kann ganga umleið eitt hálvt ár, áðrenn málið er liðugt viðgjørt.

*2. Klagan verður avvíst.*
Løgtingið hevur í umboðsmanslógini (lóg nr. 60 frá 10. mai 2000) sett mark fyri, nær umboðsmaðurin kann viðgera eina klagu:

*„Klaga um avgerðir, ið møguligur hægri umsitingarmyndugleiki kann broyta, kann ikki sendast umboðsmanninum, fyrr enn viðkomandi hægri myndugleiki hevur tikið avgerð í málinum...“* (§ 6, stk. 3)

Um tað er møguligt at kæra

eina avgerð til ein annan fyrisitingarmyndugleika, skal hetta sostatt verða roynt, áðrenn umboðsmaðurin kann viðgera málið. Avgerðir, sum verða fráboðaðar skrivliga, skulu geva eina vegleiðing um møguligar kærumøguleikar, áðrenn farast kann til umboðsmannin. Eru tygum í iva, kunnu tygum venda tygum til myndugleikan, sum hevur tikið avgerðina, ella møguliga til skrivstovuna hjá umboðsmanninum.

„...Klagan skal vera umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi eitt ár eftir, at tey viðurskifti, ið klagað verður um, áttu sær stað." (§ 6, stk. 2)

Orðingin „viðurskifti" fevnir um alt, sum klagast kann um til umboðsmannin, t.d. viðgerðina av einum máli, málsviðgerðartíðina, avgerðina í málinum, atburðin o.s.v. Klaga tygum um eina avgerð, skal hendan sostatt verða tikin innanfyri tað seinasta árið.

Inniheldur klagan til umboðsmannin viðurskifti, sum myndugleikin ikki áður hevur tikið støðu til, sendir umboðsmaðurin næstan altíð klaguna víðari til myndugleikan og biður hendan taka støðu til hesi viðurskiftini. Samstundis verður viðkomandi kunnaður um hetta, og biðin um at bíða við at klaga til umboðsmannin til myndugleikin hevur tikið støðu í málinum. Kemur eingin nýggj klaga, ger umboðsmaðurin ikki meira við málið.

*3. Umboðsmaðurin velur ikki at kanna málið.*

Í umboðsmanslógini stendur:

*„Umboðsmaðurin tekur støðu til, um grundarlag er fyri víðari kanningum í máli, ið klagað verður um."* (§ 6, stk. 4)

Umboðsmaðurin hevur sostatt ikki skyldu til at taka allar klagur upp til viðgerðar. Hann kann nokta at viðgera klaguna sum heild ella bert at viðgera ávís viðurskifti í hesari.

Umboðsmaðurin kannar altíð eina klagu gjølla, áðrenn hann tekur avgerð um at avvísa hana. Í tílíkum metingum verður vanliga hugt at, um tað eru útlit fyri, at umboðsmaðurin kann hjálpa viðkomandi.

Ofta skrivar ella ringir umboðsmaðurin til viðkomandi ella til myndugleikan, fyri at hava eitt trygt grundarlag fyri avgerð síni. T.d. kann hann biðja um skjølini í málinum.

Ein avvísing av at viðgera eina klagu kann sostatt vera úrslitið av einari víðfevndari málsviðgerð hjá umboðsmanninum.

## Umboðsmaðurin kann sjálvur taka eitt mál til viðgerðar

Umboðsmaðurin kann eisini kanna eitt mál, uttan at tað finst nøkur klaga hesum viðvíkjandi. Umrøða í fjølmiðlunum kann t.d. hava við sær, at umboðsmaðurin gerst varur við eitt mál, sum hann ynskir at kanna nærri. Onkuntíð kunnu klagur vera orsøk til, at umboðsmaðurin fer at kanna viðurskifti, sum tað ikki er klagað um.

Umboðsmaðurin kann sambært §§ 6, stk. 5 og 8, stk. 3 kanna stovnar og tænastustøð v.m., ið hoyra til virkisøki hansara.

## Um umboðsmannin og embætið

Løgtingið velur fimta hvørt ár ein Løgtingsins umboðsmann. Hevur Løgtingið ikki longur álit á umboðsmanninum kunnu 2/3 av limunum loysa hann úr starvi.

Umboðsmaðurin setir og loysir úr starvi starvsfólk síni.

Tygum kunnu ringja á tlf. 35 85 00 ella venda tygum til skrivstovuna í Traðagøtu 43, Argir, um tygum hava spurningar.

# *Lógaryvirlit*

Niðanfyri er eitt yvirlit yvir ta lóggávuna, sum er umrødd / nevnd í álitunum frá umboðsmanninum. Yvirlitið fevnir bæði um hesa og tær undanfarnu ársfrágreiðingarnar. Yvirlitið vísir til einstøku málini, ið eru nevnd t.d. 02/23.2, og merkir hetta, at talan er um mál nr. 23.2 í ársfrágreiðingini fyri 2002.


Lóggáva, kunngerð v.m. Mál:

ALS-lógin (løgtingslóg nr. 113 frá 13.06.1997):
– § 1. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/10.1
– § 7. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/10.1
– § 14 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .05/28.4
– § 19 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .05/28.4
– § 26, stk. 1, 2. pkt . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/10.1

Ábyrgd landsstýrismanna (løgtingslóg nr. 90 frá 04.06.1996):
– § 2. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/23.2
– § 4. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/23.2
– § 5. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/23.2

Barnaforsorgarlógin (Lb. Nr. 104 frá 02. 03.1988):
– § 32, stk. 1 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 04/11.2

Barsilsskipanarkunngerðin (kunngerð nr. 91 frá 31.05.2001):
– § 6. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/20.2

Barsilsskipanarlógin (løgtingslóg nr. 48 frá 03.04.2001):
– § 5. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/20.2
– § 12 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/20.2
– § 18 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/20.2
– § 25 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/20.2

Býarskipanarlógin (løgtingslóg nr. 13 frá 21.05.1954):
– § 5 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/21.2
– § 10 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/21.4
– § 10, stk.. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/21.2
– § 12, stk. 1 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/21.1
– § 15 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/21.1
– § 17 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/21.1

Byggisamtyktin fyri Klaksvíkar kommunu
– § 9. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/21.2
– § 10 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/21.2
Byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu kap. I.
– § 4. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/21.4
– § 7 nr. 1 og 2. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/21.4
– § 9, stk. 1 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/21.4
Byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu kap. IV
– § 5, stk. 6 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/21.4
– § 25 nr. 5 og 6. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/21.4
Dagstovnalógin (løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai 2000):
– § 8. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .05/28.3
– § 10 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .05/28.3
– § 11 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .05/28.3
Djórasjúkur (Løgtingslóg nr. 16 frá 23.02.2001):
– § 47 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/23.4
Djórainnflutningur (løgtingslóg nr. 58 frá 22. apríl 2003):
– § 1. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .05/29.1
Europeiski mannarættindasáttmálin
(kgl. fyriskipan nr. 136 frá 25.02.2000):
– art. 8. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/25.1
Fyrisitingarlógin
- § 7, stk. 1 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .06/11.2
- § 8. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .06/28.6
- § 13, nr. 2. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .06/28.2
- § 18 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .06/28.2
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .06/28.5
- § 21 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .06/22.1
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .06/28.2
- § 23 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .06/22.1
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .06/28.2
Fornminnissavnslógin (løgtingslóg nr. 32 frá 02.05.1952):
– § 3. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/28.3
Forsorgarlógin (lógarkunngerð nr. 100 frá 02.03.1988):
– § 9. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/20.1
– § 17 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/20.1
Fólkaskúlalógin (løgtingslóg nr. 125 frá 20.06.1997):

– § 26 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.1
– § 26, stk. 1 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.1
– § 29 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.1
– § 29, stk. 5 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.1
– § 40 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.1
– § 41, stk. 1 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.1
– § 41, stk. 2 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.1
– § 46 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.1
– § 47, stk. 1 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.1
– § 47, stk. 3 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.1
– § 57, stk. 7 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.1
– § 59 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.1
Fríðtíð við løn (Løgtingslóg nr. 30 frá 7.04.1986):
– § 21, stk. 4 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/10.3
Frítíðargrunnurin (K.nr. 101 frá 12.08.1988):
– § 3. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/10.3
Frítíðarkunngerðin (kunngerð nr. 14 frá 16.02.1987):
– § 3, stk.1, 1. pkt. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/20.2
Frítíðarlógin (løgtingslóg nr. 30 frá 07.04.1986):
– § 1. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/20.2
– § 10 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/20.2
– § 12 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/20.2
Fyrisitingarlógin (løgtingslóg nr. 132 frá 10.06.1993):
– § 1. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.2
– § 1. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.4
– § 2. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/11.2
– § 2, stk. 1 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/21.5
– § 3, stk. 1, nr. 5 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/21.1
– § 7, stk. 1 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.3
– § 7, stk. 1 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/11.1
– § 7, stk. 2 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/11.4
– § 8. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .05/28.3
– § 9. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/28.2
– § 9. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .05/28.2
– § 10, stk. 2 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/28.2
– § 12, stk. 2 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/28.3
– § 16 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/23.2

– § 18 .................................02/28.2
– § 18 .................................04/10.1
– § 18 .................................05/28.3
– § 18 .................................05/29.1
– § 18, stk. 1 ............................03/21.1
– § 18, stk. 1 ............................03/28.3
– § 18, stk. 2, nr. 1 .........................03/21.1
– § 18, stk. 2 ............................04/21.2
– § 19 .................................02/28.2
– § 20 .................................02/28.2
– § 21 .................................04/28.3
– § 21 .................................01/11.2
– § 21 .................................02/10.5
– § 21 .................................02/11.1
– § 21 .................................02/28.1
– § 21 .................................02/28.2
– § 22 .................................02/28.2
– § 23 .................................04/28.3
– § 23 ................................. 04/23.2
– § 23 .................................01/11.2
– § 23 .................................02/10.5
– § 23 .................................02/28.1
– § 23 .................................02/28.2
– § 23, stk. 1 ............................01/11.2
– § 23, stk. 2 ............................01/11.2
– § 24 .................................02/28.2
– § 24 .................................05/28.3
– § 25 .................................02/28.2
Grundlógin:
– § 14, 2. pkt. ............................01/28.1
– § 73 .................................02/21.1
HF-kunngerðin (kunngerð nr. 103 frá 17.07.1996):
– § 20, stk. 2 ............................02/28.2
HF-lógin (løgtingslóg nr. 107 frá 29.06.1995):
– § 15 .................................02/28.2
– § 16 .................................02/28.2
– § 16, stk. 1 ............................02/28.2

– § 16, stk. 4 .02/28.2
– § 20 02/28.2
Hýruvognskunngerð í Tórshavn
– § 2, stk. 4 .04/10.2
– § 15, stk. 1 .04/10.2
– § 15, stk. 2 .04/10.2
Hýruvognsreglugerð í Tórshavn (K.nr. 90 frá 20.10.1987):
– § 1 .04/10.2
Innlitslógin (løgtingslóg nr. 133 frá 10.06.1993):
– § 4, stk. 1 .03/11.1
– § 4, stk. 1, 2. pkt. .02/11.1
– § 4, stk. 2 .04/11.2
– § 4, stk. 3 .04/11.1
– § 4, stk. 3 .01/11.2
– § 4, stk. 3 .03/11.1
– § 5, stk. 1, nr. 2 .01/11.1
– § 6 .04/28.1
– § 6 .04/23.3
– § 6 .02/28.2
– § 6 .03/10.2
– § 6 .03/21.2
– § 6 .04/21.1
– § 6, stk. 1 .03/28.3
– § 7 .02/11.1
– § 7 .04/11.2
– § 8 .04/11.2
– § 11 .02/11.1
– § 12 .04/11.5
– § 12, stk. 1 nr. 2 .04/11.3
– § 13 .04/11.5
– § 13, stk. 1 nr. 5 .04/11.3
– § 13, stk. 1, nr. 6 02/11.1
– § 15 .04/11.2
– § 15, stk. 1 .04/11.4
– § 16 .04/21.1
– § 16 .04/11.5
– § 16, stk. 1 .04/11.3

– § 16, stk. 1 .01/11.1
– § 16, stk. 1 .03/11.1
– § 16, stk. 2 .04/11.1
– § 16, stk. 2 .04/11.3
– § 16, stk. 3 .01/11.1
– § 16, stk. 3 .03/11.1
Innlitslógin
- § 4, stk. 1, 2. pkt. .06/11.3
- § 4, stk. 3 .06/11.2
- § 6 .06/28.2
- .06/28.6
- § 7 .06/11.3
- § 8, nr. 3 .06/11.3
- § 11, stk. 1 .06/11.3
- § 13, stk. 1, nr. 3 .06/11.1
- § 13, stk. 2 .06/11.1
Kommunulógin (løgtingslóg nr. 45 frá 29.06.1972):
– § 4. .02/27.1
– § 41 .02/21.1
Kommunustýrislógin (løgtingslóg nr. 87 frá 17.05.2000):
– § 12 .02/27.1
– § 12, stk. 1 .02/27.1
– § 13, stk. 1 .02/27.1
– § 13, stk. 2 .02/27.1
– § 14 .02/27.1
– § 27, stk. 2 .02/27.1
– § 55 .02/21.1
– § 55 .02/27.1
– § 55, stk. 1 .02/27.1
Kommunuvallógin (løgtingslóg nr. 44 frá 19.06.1972):
– § 3. .02/27.1
Kringvarpslógin (løgtingslóg nr. 22 frá 20.02.1998):
– § 5. .01/11.2
– § 5. .02/27.4
– § 5, stk. 1 .02/27.2
– § 6. .02/27.4
– § 6, stk. 1 .02/27.4

– § 6, stk. 2 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.2
– § 6, stk. 2 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .01/11.2
– § 13 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .01/11.2
– § 13 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.4
– § 13, stk. 1 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .01/11.2
– § 13, stk. 2 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.4
– § 15 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.4
– § 17 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .01/11.2
– § 18, stk. 2 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .01/11.2
– § 20, stk. 2 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/27.1
– § 25 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .01/11.2
– § 25, stk. 1 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .01/11.2
Kunngerð um gjøld fyri avrit og fotoavrit
(K.nr.199 frá 15.12.93) . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/23.2
Landsvegalógin (løgtingslóg nr. 51 frá 25.07.1972):
– § 5. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/21.1
Lærararáðskunngerðin (kunngerð nr. 46 frá 09.05.1997):
– § 7, stk. 2 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/28.2
Lærarаútbúgving (løgtingslóg nr. 69 frá 28. mai 1980):
– § 1. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .05/28.2
– § 16 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .05/28.2
Matrikuleringslógin (Løgtingslóg nr. 64 frá 11.12.1962):
– § 15 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/21.5
– § 16 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/21.5
– § 17 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/21.5
– § 18 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/21.5
– § 20 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/21.5
Matvørulógin (Løgtingslóg nr. 46 frá 21.06.1985):
– § 41, stk. 5 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/11.4
Meirvirðisgjaldsfrítøka
(kunngerð nr. 136 frá 17. juni 1993): . . . . . . . . . . . . . .02/22.1
Meirvirðisgjaldsfrítøka
(kunngerð nr. 166 frá 12. des. 1992):. . . . . . . . . . . . . . 02/22.1
Meirvirðisgjaldslógin (løgtingslóg nr. 136 frá 08.09.1992):
– § 1. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/22.1
– § 2. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/22.1
– § 2, stk. 3 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/22.1

– § 2, stk. 5 .02/22.1
– § 3. .02/22.1
– § 4. .02/22.1
– § 5. .02/22.1
– § 12 .02/22.1
Navnakunngerðin (kunngerð nr. 71 frá 29.06.2002):
– § 1-3. .03/25.1
Navnalógin (løgtingslóg nr. 41 frá 26.03.2002):
– § 2, stk. 3 .03/25.1
– § 2, stk. 4 .03/25.1
Navnalógin (Ll. nr. 41 frá 26. mars 2002)
- § 11, stk. 3 .06/25.1
Ognartøkulógin (lov nr. 69 frá 07.05.1881):
– § 2. .03/21.1
Postgjøld (kunngerð nr. 134 frá 11.10.2001): .02/27.4
Próvtøkukunngerðin (kunngerð nr. 65 frá 27.04.2001):
– § 52, stk. 3 .02/27.3
– § 53 .02/27.3
– § 67 .02/27.3
Rúsdrekkalógin (Løgtingslóg nr. 20 frá 10.03.1992):
– § 1. 04/23.7
– § 9. .04/23.7
– § 10, stk. 1 .04/23.7
– § 11 .04/23.7
– § 13 .04/23.7
Sjónvarpsgjaldskunngerðin (kunngerð nr. 103 frá 20.12.2002):
– § 1. .03/27.1
Skattafyrisitingarlógin (løgtinglóg nr. 169 frá 30.12.1997):
– § 16 02/10.1
– § 17 .02/10.1
– § 17, stk. 4 .02/10.1
Skattalógin
- § 157 .06/22.1
Skipaskráseting (løgtingslóg nr. 9 frá 05.03.1970):
– § 35 .02/23.2
– § 35, stk. 1 .02/23.2
– § 36 .02/23.2

– § 36, stk. 1 .02/23.2
– § 37 .02/23.2
– § 37, stk. 2 .02/23.2
– § 37, stk. 3 .02/23.2
Skuldarumskipanarlógin (løgtingslóg nr. 29 frá 8. apríl 2005)
- § 3 .06/22.1
Starvsskipan fyri kommunalar skattakærunevndir
(kunngerð nr. 48 frá 15.04.1998):
– § 5. .02/10.1
– § 8. .02/10.1
– § 9. .02/10.1
– § 11 .02/10.1
– § 13, stk. 2 .02/10.1
Sterkstreymsútbúnaður (Løgtingslóg nr. 134 frá 10.06.1993):
– § 2. .04/29.1
– § 3. .04/29.1
– § 6. .04/29.1
Studentaskúlakunngerðin (kunngerð nr. 102 frá 17.06.1996):
– § 12 .02/28.2
Studentaskúlakunngerðin (kunngerð nr. 102 frá 26.06.2001):
– § 20 .02/27.3
– § 20, stk. 3 .02/27.3
– § 20, stk. 4 .02/27.3
– § 30 .02/27.3
Studentaskúlalógin (løgtingslóg nr. 106 frá 29.06.1995):
– § 9. .02/28.2
– § 10 .02/28.2
– § 10, stk. 1 .02/28.2
– § 10, stk. 4 .02/28.2
– § 13 .02/28.2
– § 13, stk. 1 .02/28.2
– § 13, stk. 2 .02/28.2
– § 13, stk. 3 .02/28.2
Stuðul til flutning av fiski (løgtingslóg nr. 14
frá 3. mars 1999 um við seinni broytingum)
- § 1 .06/23.1
Studentaskúlalógin (løgtingslóg nr. 106 frá 29. juni 1995)

- § 10 .................................06/28.4
- § 13, stk. 1 ..............................06/28.4
Stýrisskipanarlógin (løgtingslóg nr. 103 frá 26.07.1994):
– § 29, stk. 2 ..............................03/28.3
– § 33, stk. 1 ..............................01/28.1
– § 33, stk. 3 ..............................03/28.3
– § 56 .................................02/27.1
Tænastumannaeftirlønarlógin (løgtingslóg nr. 32 frá 05.07.1971):
– § 2...................................01/28.1
– § 10 .................................01/28.1
Tænastumannalógin (løgtingslóg nr. 31 frá 05.07.1971):
– § 29 .................................02/28.1
Tænastumannalógin
(løgtingslóg nr. 31 frá 12.07.1971) Kap. 5.......... 04/28.1
- § 11, stk. 1 ..............................06/28.3
- § 21..................................06/28.7
Umboðsmanslógin (løgtingslóg nr. 60 frá 10.05.2000):
– § 4...................................02/27.2
– § 4...................................02/27.4
– § 4...................................03/10.1
– § 4...................................03/21.2
– § 4, stk. 2 ...............................01/11.2
– § 4, stk. 4 ...............................04/29.1
– § 4, stk. 4 ...............................04.21.1
– § 4, stk. 5 ...............................04/29.1
– § 5...................................02/27.4
– § 6...................................02/27.4
– § 6, stk. 1 ...............................03/21.2
– § 6, stk. 2 ...............................04/21.3
– § 6,stk.2 ................................04/23.1
– § 6, stk. 2 ...............................03/21.2
– § 6, stk. 3 ...............................02/10.1
– § 6, stk. 3 ...............................04/10.1
– § 6, stk. 3 ...............................04/10.2
– § 6, stk. 3 ...............................04/11.2
– § 6, stk. 3 ...............................04/21.3

– § 6, stk. 4 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/28.3
– § 6, stk. 4 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/11.1
– § 6, stk. 4 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/21.3
– § 6, stk. 5 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/29.1
– § 10 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/10.3
– § 10 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/11.5
– § 10, stk. 1 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/21.1
– § 10, stk. 1 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/11.1
– § 12 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/23.3
– § 12 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .01/11.2
– § 12 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.2
– § 12 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.4
– § 12 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/20.1
– § 18 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/23.1
– § 18 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/10.3
– § 18 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/21.1
– § 18, stk. 2 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/23.1
Umboðsmanslógin
- § 4, stk. 3 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .06/28.1
Veterinert eftirlit (K.nr. 24 frá 16.03.2001):
– § 1. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/23.4
Veterinert eftirlit-gjøld (K.nr. 124 frá 28.08.2001):
– § 6. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/23.4
– § 7. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/23.4
Vinnuligur fiskiskapur (løgtingslóg nr. 28 frá 10.03.1994):
– § 5, stk.3 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/23.2
– § 5, stk. 3 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04.23.1
– § 5, stk. 4 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/23.2
– § 5, stk. 4 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/23.1
– § 5, stk. 4 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/23.6
– § 7. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/23.2
– § 7. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/23.1
– § 7. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/23.2
– § 8. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/23.2
– § 8, stk. 4 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/23.2
– § 28 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/23.2
– § 31 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/23.2

– § 31 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/23.6
– § 31, stk. 2 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/23.3

# *Leitorð*

Niðanfyri er eitt yvirlit yvir nøkur leitorð, sum eru umrødd / nevnd í álitunum frá umboðsmanninum. Yvirlitið fevnir um hesa og tær undanfarnu ársfrágreiðingarnar. Yvirlitið vísir til einstøku málini, ið eru nevnd t.d. 02/27.1, og merkir hetta, at talan er um mál nr. 27.1 í ársfrágreiðingini fyri 2002.


**Leitorð** **Mál:**

Afturtøka av avgerð . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/27.1
Agarevsing . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 06/28.7
Akravegurin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 03/21.1
Almanna- og heilsumálaráðið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 04/28.3
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 05/28.3
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 06/11.3
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 06/28.7
Almannakunngerðing av kommunustýrisavgerðum . . 02/27.1
Almannastovan . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/10.2
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/10.3
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/10.4
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 03/10.3
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 03/20.1
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 06/20.1
Almennur stovnur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/27.2
ALS . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 03/10.1
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 05/28.4
ALS-kærunevndin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 03/10.1
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 05/28.4
Arbeiðsloysisskipanin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 06/28.2
Arbeiðsloysisstuðul . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 05/28.4
Álvarslig átala . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.1
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.2
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 04/10.3
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 04/21.1
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 04/11.5

– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .05/28.2
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .05/28.3
Ársfundarætlan . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.1
Ársmet. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.3
Átala . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .01/11.1
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/10.1
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/10.2
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/10.3
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/10.4
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/23.2
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/27.1
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.3
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/28.1
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/28.2
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/10.1
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/10.2
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/10.3
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/10.4
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/11.1
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/20.2
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/21.2
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/28.1
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/28.2
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/11.1
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/10.1
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/23.3
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/28.2
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/11.3
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/21.3
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/21.5
Ávaring (munnlig). . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .05/28.1
Ávaring . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .06/28.3
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .06/28.4
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .06/28.7
Ávísingarsøla . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/22.1
Avlamisbilur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/10.3
Avrit av skjølum. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .01/11.1

Avtalubrot .02/23.2
Bandaðar útvarpsupptøkur .02/27.4
Barsilspeningur .03/20.2
Barsilsskipanin .03/20.2
BLF-sáttmálin .01/28.1
– .02/28.1
– .02/28.3
Brekað barn .03/20.1
Broyting av ársmetum .02/27.3
Burturvísing .06/11.1
Bústaðarnøvn .06/25.1
Bygdamenning .02/27.1
Byggiloyvi .04/10.1
– .04/21.2
Bygging .04/21.4
Byggisamtyktin fyri Klaksvíkar kommunu .04/21.2
Byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu .04/21.3
– .04/21.4
Byggiætlan .04/21.4
Bygnaðarbroytingar .02/28.1
– .06/28.5
Deildarleiðari II .02/28.3
Deildarleiðari I .02/28.3
Diskretioner uppsøgn .01/28.1
Djórainnflutningur .05/29.1
Eftirgeving av skatti .06/22.1
Eftirnavn .06/25.1
Elnevndin .04/29.1
Endursetan .02/28.1
Fakfelagsbløð .02/27.4
Fakkombinatiónir .02/28.2
Fast starv .05/28.2
FF-blaðið .02/27.4
Fiskimálaráðið .06/23.1
Fíggjarmálaráðið .06/28.3
– .01/28.1
– .02/22.1

– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/28.1
Fíggjarmálaráðið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/10.4
Fiskiloyvi. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/23.1
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/10.2
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/23.1
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/23.2
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/23.3
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/23.5
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/23.6
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .05/23.1
Fiskimálastýrið. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/23.1
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/23.2
Fiskimálaráðið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/10.2
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/11.1
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/23.1
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/23.2
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/23.3
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/23.5
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/23.6
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .05/23.1
Fjølmiðlaábyrgdarlóg . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.4
Fjølmiðlanevnd . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.2
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.4
Flokking . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/28.3
Flutningsstuðul . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .06/23.1
Fólkaatkvøða um niðurlegging av skúla . . . . . . . . . . . .02/27.1
Fráboðan av avgerð . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .06/22.1
Fráboðan til umsøkjarar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/28.2
Fráboðan um lógarbrek . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.2
Frávik frá byggisamtykt. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/21.2
Frítíðargrunnurin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/10.3
Frítíðarløn. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/20.2
Frítíðarskúli . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .05/28.3
Fróðskaparsetur Føroya. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/10.4
Fuglafjarðar kommuna . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/10.1
Fyribils fráboðanarskriv . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/28.2
Fyribils niðurstøða. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .05/29.1

Fyribilssetan, afturtøka . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .06/28.7
Fyritíðarpensjón. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .06/20.1
Fyrsti kommunustýrisfundur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.1
Føroya Barnaheim . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/11.2
Føroya Jarðarráð . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04.11.1
Føroya Kommunufelag . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/27.1
Føroya Kærustovnur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/10.1
–. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/10.4
Føroya Landfúti . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/11.4
Føroya Studentaskúli og HF-skeið í Hoydølum. . . . . .02/27.3
Føroya Studentaskúli og HF-skeið. . . . . . . . . . . . . . . . .06/28.4
Garantiforskrift . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.1
Góður fjølmiðlasiður. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.2
–. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/10.1
–. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/28.1
–. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/28.2
Gjøld fyri veterinerar kanningar . . . . . . . . . . . . . . . . .04/23.4
Grannahoyring. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/21.2
Grundgeving. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .01/11.2
–. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/10.5
–. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/11.1
–. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/28.1
–. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/28.2
–. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/21.3
–. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/28.3
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .06/11.2
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .06/22.1
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .06.28.2
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .06/28.5
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .06/28.6
Heimild . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.1
–. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/28.2
Heilsufrøðiliga Starvsstovan . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/23.4
–. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/11.4
Heimild umboðsmansins mótvegis ÚF. . . . . . . . . . . . .02/27.4
Hjálpartólamiðstøðin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/10.3
Hósvíkar kommuna. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/21.1

Hoyringsskriv . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/28.2
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .06/28.3
Hoyvíkar skúli . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/28.1
Hýruvognsloyvi . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/10.2
Hýruvognsnevndin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/10.2
ILA. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/11.4
Innlendismálaráðið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/21.2
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .06/25.1
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .06/25.2
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 06/28/5
Innanhýsis arbeiðsskjal . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/11.1
Innlit . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .01/11.1
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/11.1
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/28.2
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/10.2
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/11.1
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/11.1
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/11.2
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/11.3
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/21.1
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/21.3
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/11.5
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .06/11.1
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .06/11.2
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .06/11.3
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .06/28.6
Innlit í journalkort. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .01/11.1
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/21.2
Innlit í tíðindahandrit . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .01/11.2
Javnstilling av bløðum í ÚF . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.4
Journalisering av teldubrøvum. . . . . . . . . . . . . . . . . .04/21.5
Journalistiska virksemið hjá ÚF. . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.4
Journalistiskar metingar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.4
Kappingaravlaðing. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/22.1
Kappingarráðið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/22.1
Klaksvíkar kommuna . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/21.2
Klaksvíkar Sjúkrahús. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/28.3

Kommunala eftirlitið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.1
Kommunustýrisfundir . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.1
Konsignatiónsgoymsla . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/22.1
Konsignatiónsvørur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/22.1
Kunning . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .06/11.2
Kærumyndugleiki . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.1
Kærunevndin í almannamálum . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/20.1
Kærurætt . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.3
Landingarmiðstøð . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .06.23.1
Landsfornfrøðingur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/28.3
Landsskattakærunevndin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/10.1
Landsrættardómur viðv. ALS . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.4
Landsrættardómur viðv. FF . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.4
Landssjúkrahúsið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .06/28.7
Landsverkfrøðingurin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/28.1
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/21.1
Leiðandi yvirlækni . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .06/28.7
Loyvisnevndin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/23.7
Lærarar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/28.1
Løgmansskrivstovan . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/21.1
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.1
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/28.1
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/28.1
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .06/11.2
Løgmálaráðið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/25.1
Lønarflokking . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/10.4
Lønar- og setanartreytir . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .01/28.1
Løgreglan . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/29.1
Magistarafelag Føroya . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/28.3
Marknaeftirlit . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/23.4
Marknagilsvegurin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/21.2
Matrikulstovan . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/21.5
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .06/28.5
Málsviðgerðartíð . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/10.1
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/10.2
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/10.3
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/10.4

– .......... 02/10.5
– .......... 02/21.1
– .......... 03/10.1
– .......... 03/10.3
– .......... 03/10.4
– .......... 03/20.2
– .......... 04/10.1
– .......... 04/23.3
– .......... 04/10.3
– .......... 04/21.1
Meirinnlit .......... 06/11.3
Meirvirðisgjald av heimavirkaðum vørum .......... 02/22.1
Menningarstovan .......... 02/22.1
Mentamálastýrið .......... 02/27.1
– .......... 02/28.2
– .......... 02/28.3
– .......... 02/27.3
Mentamálaráðið .......... 03/10.4
– .......... 03/27.1
– .......... 03/28.3
– .......... 04/28.1
– .......... 05/28.2
- .......... 06/28.4
- .......... 06/28.6
Metingarkostnaður .......... 02/21.1
Metingarnevnd .......... 02/21.1
Mikladals kommuna .......... 02/27.1
Mismunur .......... 02/28.2
Morgunsendingar .......... 02/27.4
Mótrokning .......... 01/28.1
Munaløn .......... 01/28.1
Møna .......... 04/21.4
Navnabroyting .......... 06/25.1
Navnanevndin .......... 03/25.1
Navnauppkalling .......... 03/25.1
Námsfrøðingur .......... 05/28.3
Niðurlegging av skúlum .......... 02/27.1

Niðursett tíð vegna sjúku .......................06/28.6
Norðuratlantsbólkurin ..........................02/27.2
Notatskylda...................................03/10.2
- ...............................................03/28.3
- ...............................................04/23.3
- ...............................................04/21.1
- ...............................................06/28.2
- ...............................................06/28.6
Notatskylda, ikki-lógarfest .....................03/10.2
Nýggja stýrisskipanin ..........................02/28.1
Nývalt kommunustýri...........................02/27.1
Oljumálaráðið ..................................04/21.2
–...............................................04/21.3
–...............................................04/21.4
Ognartøka......................................02/21.1
–...............................................03/21.1
Ognartøkuendurgjald ...........................02/21.1
Ógegni.........................................02/21.1
Ógilding av kommunustýrisavgerðum ............02/27.1
Óheftur tíðindaflutningur.......................02/27.4
Óhøviskur málburður...........................02/27.4
Partshoyring...................................02/28.2
–...............................................03/28.3
–...............................................05/28.3
–...............................................05/28.5
–...............................................05/29.1
- ...............................................06/28.2
- ...............................................06/28.5
Partsinnlit.....................................04/11.2
–...............................................05/28.2
- ...............................................06/28.2
Partsumboðan / hjálp ...........................06/28.6
Prísir fyri bond og fløgur frá ÚF og SVF ..........01/11.2
Programmábyrgdin í ÚF.........................02/27.4
Programmvirksemið hjá ÚF......................02/27.4
Programmvirksemið hjá ÚF og SVF ..............01/11.2
Próvbyrða......................................04/23.6

Próvtøkubók . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.3
Redaktionel avgerð . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.4
Roknskapir . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .06/11.2
Rúsdrekka . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .05/28.1
Rúsdrekkasøla Landsins . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .06/11.1
Ræðisavmarking . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/23.2
Rætti myndugleiki . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/28.2
Saklig fyrisiting . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .06/28.6
Samanlegging av stovnum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/28.1
Samstarvsevni . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/28.1
Samstarvstrupulleikar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/28.1
Setanar- og lønarviðurskifti . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/28.3
Setanarbólkur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/28.1
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/28.2
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/28.3
Setanarbræv . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/28.2
Setanarmyndugleiki . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/28.2
Setanarpolitikkur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/28.1
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/28.3
Setanarsamrøður . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/28.3
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/28.3
Setanarsáttmáli . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .06/11.2
Setursskrivari . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/10.4
SEV . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/29.1
Siðvenja . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .01/28.1
Sjálvsognarstovnar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/11.2
Sjónvarp Føroya . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .01/11.2
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .01/11.1
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/27.1
Sjónvarpsgjald . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/27.1
Skattakærunevnd . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/10.1
Skattur og avgjøld . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/10.1
– . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/22.1
Skattaskuld . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .06/22.1
Skeinkiloyvi . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/23.7
Skipaskrásetingin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/23.2
Skopunar skúli . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/28.1

Skrivligar uppgávur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.3
Skrivligt svar. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/10.2
Skuldarumskipanarnevndin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .06/22.1
Skúlamyndugleikar á staðnum. . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.1
Skúlanevnd. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.1
Skúlaumdømi. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.1
Skúlaøki . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.1
Skúlin á Trøllanesi . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.1
Standardskriv . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .06/22.1
Starvsfólka- og arbeiðsmarknaðarmál. . . . . . . . . . . . . .01/28.1
Starvsfólka- og arbeiðsmarknaðarmál v.m. . . . . . . . . .02/28.1
Starvsfólkaleiðsla . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 06/28.1
Starvsfólkapolitikkur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/28.1
Starvssetan . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/28.1
–. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/28.2
–. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .05/28.2
–. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .05/28.3
–. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .05/28.5
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .06/28.2
Starvstreytir . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .06/11.2
Stjóri . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .06/11.1
Streymstuldur. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/29.1
Studentaskúlin og HF- skeiðið í Hoydølum. . . . . . . . .02/28.2
Subjektivur tíðindaflutningur. . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.4
Sundurbýting . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/21.3
–. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/21.5
Svartlisting . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.4
Teldupostur. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/11.1
Thorvald Stoltenberg. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.2
Tíðindabløð . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.4
Tíðindaflutningur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .01/11.2
–. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.2
–. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.4
Tilmæli . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .01/11.2
–. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .01/28.1
–. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/21.1
–. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.3

–........................................03/21.2
–........................................03/25.1
–........................................04/23.3
–........................................04/23.5
–........................................04/11.2
–........................................04/23.6
–........................................04/21.2
Tilmæli um setan í starv........................02/28.2
Toll- og Skattstova Føroya .......................02/10.1
–........................................02/22.1
- ........................................06/28.3
Tórshavnar býráð............................. 01/11.1
–........................................04/10.2
–........................................04/11.3
–........................................04/21.1
–........................................04/21.3
–........................................04/21.4
–........................................04/11.5
–........................................04/21.5
Tórshavnar kommuna........................03/21.2
- .........................................06/28.1
Trúarviðurskifti ..............................06/28.2
Tvøroyrar kommuna...........................05/28.3
Tænastuligt forhoyr...........................06/28.7
Tænastumaður................................01/28.1
Tænastumannaeftirløn ........................01/28.1
Tænastuviðurskifti............................06/28.3
Umboðan .....................................05/28.3
Umboðsstova .................................06/11.2
Ummæli ......................................04/21.5
- .........................................06/28.2
Undantaksloyvi viðv. Byggisamtykt............... 04/21.3
Undirvísing og gransking v.m ...................02/27.1
Undirvísingarárslok........................... 02/27.3
Undirvísingarhøli..............................02/27.1
Uppihaldsloyvi................................06/25.2
Upplýsingarskylda-ikki lógarfest ..................04/10.2

Uppsøgn . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/28.1
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .06/28.1
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .06/28.5
Útgravingarloyvi . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/21.4
Útoyggjafulltrúi . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/28.1
Útoyggjanevndin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.1
Uttanfyristandandi klagari . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/28.1
Útvarp Føroya . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .01/11.2
–. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.2
–. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.4
Útvarpsnevndin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.4
Vanbýti í tíðindaflutninginum hjá ÚF . . . . . . . . . . . . .02/27.4
Vandamikil djór . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .05/29.1
Vágs kommuna . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .06/22.1
Vegleiðing um uppafturtøku . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.3
Veiðuloyvi . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/23.1
–. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/23.1
Victoria . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/25.1
Viðgerðartíð . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .06/20.1
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .06/25.2
Viðtøkuføri kommunustýrisins . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.1
Vinnuframagrunnurin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/10.5
Vinnuháskúlin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .06/28.6
Vinnulívs- og Fiskivinnumál . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/23.1
Vinnumálastýrið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/22.1
–. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/28.1
Vinnumálaráðið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/20.2
–. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .03/21.1
–. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/10.2
–. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/23.4
–. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .04/11.4
–. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .05/29.1
- . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .06/11.1
Virkandi skúli. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .02/27.1
Yvirkvalifiseraður . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .06/28.2